

RE

Nas

Na

Na

Telephone: +47 75

LØGTINGS TIDINDI

1979

Løgtingstíðindi

1979

Bind A

Løgtingsmál

TÓRSHAVN 1981

Løgtingstíðindi 1979
Copyright Føroya Landsstýri
Lagt til rættis hevur Esther Beck
Prentað hevur Dagprent
Bundið inn hevur Helgi Justinussen.

INNIHALD

ÓLAVSØKUTINGIÐ 1979

ÁLITISMENN OG NEVNDIR

Nr.		bls.
	Tingnevndir	9
100	Val av álitismonnum og nevndum	436

ALMANNAMÁL

80	Løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensjónistar	357

ARBEIÐSVIÐURSKIFTI

57	Prístalsviðgerð av lønum	250
103	Lærlingaviðurskifti	438

DØMS- OG LØGREGLUMÁL

47	Lóg um skrásettar grannskoðarar	173
77	Broyting í lóg um fuglaveiðu	351
81	Loyvi til brygging av øli	364
83	Broytingar í ferðslulógini	382
98	Lóg um summarlið	433
102	Broyting í løgtingslóg um vápn	437

FÍGGJARMÁL

5	Skatting av állendskum fyritøkum og persónum	20
7	Broyting í innflutningsgjoldum	39
8	Broyting í innflutningsgjoldum	41
9	Gjald av motorakførum	45
11	Løgtingslóg um eykaskatt til landskassan	49
14	Fíggingarmiðstøð	55
16	Eykafíggjarløgtingslóg 1978/79	56
36	Fíggjarløgtingslóg 1980/81	133
55	Ynisk inntokulógarupptskot	223
82	Broyting í skattalógini	380
104	Heimild til landskassan til lántoku	441

FISKISKAPUR OG ØNNUR SJÓVINNA

1 Studningur til veiðu av jákupsskel 24
2 Minstiprísur á fiski 25
3 Soluskylda 26
4 Broyting í minstulonini 28
6 Tíðaravmarkaður eykastuðningur til fiskivinnuna 31
15 Agn- og frystiniðstoð 56
18 Bráðfeingis stuðul til flaka- og saltfiskaveiðu v.m. 97
30 Flutningur av feskari fiskavoru 119
31 Nevnd av viðgera figgjarviðurskiftini hjá fiskivinnuni og samfelagnum.. 122
32 Rakstur av trolarannum «Nónhamar» 125
38 Avheinting av útróðrarfiski 153
39 Lán til fiskifor 154
40 Sáttmáli um fiskiskap út fyri strondum Sambandsríkjanna 157
41 Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirettindi í 1980 159
42 Royndir við partroling 161
43 Útlýggjan av upplýsingum um trupulleikarnar hjá fiskivinnuni 166
44 Veðhald fyri lánum til fiskamjøl v.m. á goymslu 168
45 Landskassans lutloka í fyribilsrakstri av flakavirkinum Vestfisk í Sorvági 169
48 Avloysingarlán til fiskifor 182
49 Broyting í løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir 183
52 Sala av sildaverksmiðjuni í Kollafirði (landsfjósinum) til Kollafjarðar kommunu 188
53 Fiskiveiða á landleiðini 189
54 Ymisk lógaruppskot um stuðul til fiskivinnuna 190
58 Avgjald av laksaveiðu 252
59 Rakstrarstuðningur, manningarstuðningur, minstalon og minstiforvinningur 258
60 Framleiðing av rakstrarstuðningi 265
62 Prístalsviðgerð av feskfiskaprísum 274
63 Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirettindi í 1980 287
64 Skipan um sínámillum fiskiskap í 1980 Føroyar-Svorfki og Føroyar-Póland 289
66 Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirettindi í 1980 292
68 Keyp av royndar- og ramsóknarskipi 297
75 Sínámillum fiskiskapur av svartkjaftí Føroyar-Ísland 349
91 Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir 419
95 Veðhald fyri láni til P/F Fiskualing 425
96 Ferðaseðla prísáseting 428

FYRISPURNINGAR

10 Fyrispurningur til Hergeir Nielsen, landsstýrismann 48

17 Fyrispurningur til Hergeir Nielsen, landsstýrismann 96
22 Fyrispurningur til D. P. Danielsen, landsstýrismann 105
26 Fyrispurningur til Heðin M. Klein, landsstýrismann 112
33 Fyrispurningur til Hergeir Nielsen, landsstýrismann 127
34 Fyrispurningur til Demmus Hentze, landsstýrismann 128
35 Fyrispurningur til Heðin Klein, landsstýrismann 129
37 Fyrispurningur til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann 151
46 Fyrispurningur til Dánjal P. Danielsen, landsstýrismann 172
50 Fyrispurningur til logmann 184
65 Fyrispurningur til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann 291
67 Fyrispurningur til Dánjal P. Danielsen, landsstýrismann 296
70 Fyrispurningur til Hergeir Nielsen, landsstýrismann 350
88 Fyrispurningur til Demmus Hentze, landsstýrismann 396
99 Fyrispurningur til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann 435

HAVNIR, VEGIR OG LENDINGAR

70 Vegir og lendingar 318
71 Útbygging av Skopunar havn 331
93 Studningur til Vestmanna kommunu til regulering v.m. av grundoki á havnarokinum 122

HEILSUMÁL

20 Rikislóg um «erstatning for vaccinationsskader» 101
27 Kgl. fyriskipan um «hjemmesygeplejerskeordninger, sundhedsplejerskeordninger og skolelægeordning» 113
28 Kgl. fyriskipan «om foranstaltninger til tuberkulosens bekæmpelse» 115
29 «Anordning om tilbud om gratis vaccination mod visse sygdomme» 117
73 Setan av nevnd at gera uppskot um tubbakslóggávu 345
105 Setan av nevnd at gera uppskot um tubbakslóggávu 444

IDNAÐUR OG HANDVERK

23 Broyting í keglingslóg um menningargrunn fyri ídnað, handverk og lenastufyritøkur 106
51 Veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir 186

KOMMUNUMÁL

52 Søla av sildaverksmiðjuni í Kollafirði (landsfjósinum) til Kollafjarðar kommunu 188
97 Veðhald fyri láni til Klaksvíkar kommunu 430

LÁN OG LÁNABYRGDIR

15 Agn- og frystiniðstøð 56
19 Veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin 100

24 Løgtingslóg um lán til keyp av loftanstøðini í Vági 107
44 Veðhald fyri lánum til fiskanjøl van. á goymslu 168
49 Broyting í løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir 183
91 Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir 419
95 Veðhald fyri láni til p/f Fiskaaling 425
97 Veðhald fyri láni til Klaksvíkar kommunu 430

LANDSSTÝRIÐ

90 Almennt kunngerðablað 414
94 Landsstýrismál 423

LØGTINGIÐ

Tingsetanin 1
Tingnevndir 9
Frágreiðing frá løgmanni 13
74 Setan av nevnd at gera lógarupptskot um løgtingsins umboðsmann 347

RÍKISLØGIR

20 Ríkislóg um «erstatning for vaccinationsskader» 101
27 Kgl. fyriskipanir um «hjemmesygeplejerskeordninger, sundhedsplejerskeordninger og skolelægeordning» 113
28 Kgl. fyriskipan «om foranstaltninger til tuberkulosens bekæmpelse» 115
29 «Anordning om tilbud om gratis vaccination mod visse sygdomme» 117
84 Meting av skaða 388
89 Kgl. fyriskipan um «menighedsråd» 397
101 Veiting av heimarætti 436

SAMFERÐSLUMÁL

12 Landið setir á stovn bilrutur millum Tórshavn og Vestmanna og Tórshavn og Kirkjubø 51
61 Keyp av strandfaraskipi 266
78 Rutusambandið inn á Skálafjørðin og fergulega á Sundi 354
87 Rutukoyring á Sundi 393
108 Rutusambandið á Skálafjørðin 452

SKÚLAMÁL

69 Løgtingslóg um læraraútbúgving 301
107 Spurningurin um undirvisingarevnið nøring í fólkaskúlanum 451

STÝRISSKIPANIN

13 Uppskot til samlyktar viðvíkjandi stýrisskipanarlógini v.m. 53
92 Broyting í stýrisskipanarlógini 420

TRYGGING

85 Tryggingarloyvi 390
106 Allt frá millumtinganevndini til kannan av tryggingarviðurskiftunum .. 445

ÚTLENDIS MÁL

72 Norðurlanda Ráðið 339

ÚTVARP OG SJÓNVARP

79 Happadráttarloyvi til Útvarp Føroya 355

VINNUMÁL

56 Broytingar í løglingslóg um pristal 243

VÍSIND, BÓKMENTIR OG LIST

86 Broyting í løgtingslóg um fólkabókasøvn v.m. 391

LØGTINGSMÁL í NUMMARRØÐ

		bls.
	Tingsetanin	1
	Tingmevndir	9
	Frágreiðing frá lognmanni	13
1	Studningur til veiðu av jákupsskel	24
2	Miustiprísur á fiski	25
3	Søluskylda	26
4	Broyting í mjostulonini	28
5	Skatting av útlendskum fyritøkum og persónum	29
6	Tíðaravmarkaðnr eykastuðningur til fiskivinnuna	31
7	Broyting í innflutningsgjøldum	39
8	Broyting í innflutningsgjøldum	41
9	Gjøld av motorakforum	45
10	Fyrispurningur til Hergeir Nielsen, landsstýrismann	48
11	Løgtingslóg um eykaskatt til landskassan	49
12	Landið setur á stovn bilrutur millum Tórshavn og Vestmanna og Tórshavn og Kirkjubø	51
13	Uppskot til samlyktar viðvíkjandi stýrisskipanarlógini v.m.	53
14	Figgingarmiðstøð	55
15	Agn- og frystimiðstøð	56
16	Eykafiggjarlogtingslóg 1978/79	58
17	Fyrispurningur til Hergeir Nielsen, landsstýrismann	96
18	Bráðfongis stuðul til flaka- og saltfiskaveiðu v.m.	97
19	Veðhald fyri lán til Húsalánsgrunnin	100
20	Ríkislóg um «erstatning for vaccinationsskader»	101
21	Fyrispurningur til Jákup Lindenskov, landsstýrismann	103
22	Fyrispurningur til D. P. Danielsen, landsstýrismann	105
23	Broyting í logtingslóg um ummingargrunn fyri iðnað, handverk og tænastufyritøkur	106
24	Løgtingslóg um lán til keyp av loranstøðini í Vági	107
25	Málið ikki framlagt	111
26	Fyrispurningur til Hoðin M. Klein, landsstýrismann	112
27	Kgl. fyriskipanir um «hjemmesygeplejerskeordninger, sundhedsplejerskeordninger og skolehegeordning»	113
28	Kgl. fyriskipan «om foranstaltninger til tuberkulosens bekæmpelse»	115

29 «Anordning om tilbud om gratis vaccination mod visse sygdomme» 117
30 Flutningur av feskari fiskavorn 119
31 Nevnd at viðgera figgjarvíðurskiftini hjá fiskivinnuni og samfelagnum .. 122
32 Rakstur av trolaranum «Nónhamar» 125
33 Fyrispurningur til Hergeir Nielsen, landsstýrismann 127
34 Fyrispurningur til Demmur Hentze, landsstýrismann 128
35 Fyrispurningur til Heðin Klein, landsstýrismann 129
36 Figgjarloglingslóg 1980/81 133
37 Fyrispurningur til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann 151
38 Avheintingar av útróðrarfiski 153
39 Lán til fiskifor 154
40 Sáttmáli um fiskiskap út fyri strondum Sambandsríkjanna 157
41 Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirettindi i 1980 159
42 Royndir við partroling 161
43 Útflýggjan av upplýsingum um trupulleikarnar hjá fiskivinnuni 166
44 Veðhald fyri lánum til fiskanjal v.m. á goymslu 168
45 Landskassans luttøku í fyribilsrakstri av flakavirkinum í Sørvági 169
46 Fyrispurningur til Dánjal P. Danielsen, landsstýrismann 172
47 Lóg um skrásettar grannskoðarar 173
48 Avloysingarlán til fiskifør 182
49 Broyting í loglingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir 183
50 Fyrispurningur til logmann 184
51 Veðhald fyri lánum til smærri iðnaðarvirkir 186
52 Søla av sildaverksmiðjuni í Kollafirði (Landsfjósinum) til Kollafjarðar kommunu 188
53 Fiskiveiða á landleiðini 189
54 Ymisk lógaruppskot um stuðul til fiskivinnuna 190
55 Ymisk inntøkulógaruppskot 223
56 Broytingar í loglingslóg um pristal 243
57 Pristalsviðgerð av lønum 250
58 Avgjald av laksaveiðu 252
59 Rakstrarstuðningur, manningarstuðningur, minstalon og mlustiforvinningur 258
60 Framleinging av rakstrarstuðningi 265
61 Keyp av strandfaraskipi 266
62 Pristalsviðgerð av feskfiskaprísum 274
63 Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirettindi , 1980 ..287
64 Skipan um sínámillum fiskiskap í 1980 Føroyar-Svoriki og Føroyar-Pólland 289
65 Fyrispurningur til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann 291
66 Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirettindi í 1980 292
67 Fyrispurningur til Dánjal P. Danielsen, landsstýrismann 296

68 Keyp av royndur- og rannsóknarskipi 297
69 Løgtingslóg um heraraðbúgving 301
70 Vegir og lendingar 318
71 Ítbygging av Skopunar havn (48/78 (vetrarting)) 331
72 Norðurlanda Ráðið 339
73 Setan av nevnd at gera uppskot um tubbakslóggávu 345
74 Setan av nevnd at gera lógaruppskot um løgtingsins umboðsmann 347
75 Sínámillum fiskiskapur av svarlkjalti Foroyar-Ísland 349
76 Fyrispurningur til Hergeir Nielsen, landsstýrismann 350
77 Broyting í lóg um fuglaveiðu 351
78 Rutusambandið inn á Skálafjørðin og fergulega á Sundi 354
79 Happadráttarloyvi til Ólvarp Foroya 355
80 Løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensjónistar 357
81 Loyvi til brygging av oli 364
82 Broyting í skattalógini 380
83 Broyting í ferðslulógini 382
84 Meting av skaða 388
85 Tryggingarloyvi 390
86 Broyting í løgtingslóg um fólkabókasovn v.m. 391
87 Rutukoyring á Sandi 393
88 Fyrispurningur til Demmus Ifentze, landsstýrismann 395
89 Kgl. fyriskipan um «menighedsråd» 397
90 Alment kunngerðablað 414
91 Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir 419
92 Broyting í stýrisskipanarlógini 420
93 Studningur til Vestmanna kommunu til regulering v.m. av grundloki á havnarokinum 422
94 Landsstýrismál 423
95 Veðhald fyri láni til P/f Fiskaaling 425
96 Ferðaseðla prísáseting 428
97 Veðhald fyri láni til Klaksvíkar kommunu 430
98 Lóg um summartíð 433
99 Fyrispurningur til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann 435
100 Val av álitsmonnum og nevndum 436
101 Veiting av heimarætti 436
102 Broyting í løgtingslóg um vápn (43/1978 (vetrarting)) 437
103 Lærlingaviðurskifti (67/78, 68/78 (vetrarting) og 6/80) 438
104 Heimild til landskassan til lántaku 441
105 Setan av nevnd at gera uppskot um tubbakslóggávu 444
106 Álit frá millumtinganevndini til kannan av tryggingarviðurskiftunum (54/78 (vetrarting)) 445
107 Spurningurin um undervisingarevnið næring í fólkaskúlanum 451
108 Rutusambandið á Skálafjørðin 452

Ólavsøkutingið 1979

Ár 1979, 30. juli kl. 13 var Føroya løgting sett.

Tingformaðurin frá seinastu tingsetu, Hilmar Bech, tók formanssessin og lýsti, at ólavsøkutingið 1979 var sett sambært skriv frá løgmanni dagfest 11. juli 1979.

Tingmenninir eru hesir:

Norðoya valdømi:

Hákun Djurhuus, Tórshavn, ff.
Eli Nolsoe, Klaksvík, sb.
Poul J. Olsen, Klaksvík, jf.
Asbjørn Joensen, Klaksvík, sj.
Finnbogi Isaksen, Tórshavn, tf.

Eysturoyar valdømi:

Edmund í Garði, Strendur, ff.
Jógvan Olsen, Toftir, sb.
Johs. M. Olsen, Strendur, sb.
Jørgen Thomsen, Skála, jf.
Signar Hansen, Fuglafirði, tf.
Adolf Hansen, Tórshavn, f.&f.

Norðstreymoyar valdømi:

Øssur Dam Jacobsen, Vestmanna, ff.
Agnar Nielsen, Vestmanna, sb.
Jógvan Durhuus, Vestmanna, tf.

Suðurstreymoyar valdømi:

Óli Breckmann, Tórshavn, tf.
Jógvan Sundstein, Tórshavn, tf.
Pauli Ellefsen, Hoydalar, sb.
Gilif Samuelsen, Tórshavn, sb.
Jóna Henriksen, Tórshavn, jf.
Jákup Lindenskov, Tórshavn, jf.
Hilmar Kass, Tórshavn, sj.
Karin Kjølbro, Argir, tf.
Erlendur Patursson, Kirkjubø, tf.
Inuil Jacobsen, Nólsoy, f.&f.

Vágoya valdømi:

Ivan Johannesen, Miðvági, sb.
Haldur Hansen, Tórshavn, jf.

Sandoyar valdømi:

Eydun Videro, Skálavík, tf.
Hans M. Joensen, Skopun, tf.

Suðuroyar valdømi:

Flemming Mikkelsen, Vági, sb.
Hilmar Bech, Porkeri, jf.
Andrias Petur Jacobsen, jf.
Sverre Midjord, Tvoroyri, jf.

Formaðurin bað Signar Hansen, og Ivan Johannesen um at vera fyribils skrivarar.

Formaðurin boðaði frá, at valbólkurin frá 25. januar 1979 Framburðs- og Fiskivinnuflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Sambandsflokkurin halda fram til val av nevndum v.m.

Samstundis boðaði formaðurin frá, at samgongan frá 25. januar 1979 millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin er slitin, tesum hava Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin boðað frá.

Síðani fór fram val av formansskapi.

Eftir uppskoti var Agnar Nielsen valdur til formann og Hilmar Bech var valdur til næstformann.

Eftir at Agnar Nielsen hevði tikið sæti sum formaður, fór fram val av tingskrivarum. Ivan Johannesen var valdur sum fyrsti skrivari og Sverre Midjord sum annar skrivari.

Løgmaður fekk síðani orðið til lognansroðuna 1979.

10. august las formaðurin skriv frá Erlendi Paturssoni, dagf. 8. august 1979, har

hann søkir um farloyvi frá 10. august og umleið 14 dagar fram, meðan hann verður burturstaddur í almennum orindum, og søkir samstundis um, at næsti maður á tjóðveldislistanum í Suðurstreym tekur sæti á tingi ímeðan.

Fleiri tingmenn ynsktu at vita, hvorji almenn orindi Erlendur Patursson gjordi uttanlands, áðrenn hetta mál kom til atkvøðu. Formaðurin útsetti atkvøðugreiðslunna til ein seinri fund, tá málið er kannað.

16. august var skrivlig frágreiðing frá landsskrivstovuni, sum formaðurin hevði biðið um, útbýtt til flokksformannanna, formaðurin las frágreiðingina upp, sum var soljóðandi:

«1. Logtingsformaðurin hevur biðið landsskrivstovuna geva sær eitt ummæli í spurninginum, um gamla marknaðarnevndin er til, nú nýggj logtingsseta er byrjað, og val av nýggjari marknaðarnevnd ikki enn er farið fram. Hertil er at siga:
2. Eftir logtingslóg nr. 22 frá 22. mai 1962, jbr. Logtingstíðindi 1961, bls. 352, setur logtingið niður 7-manna millumtinganevnd. Nevndin hevur sum uppgávu at taka móti upplýsingum frá landsstýrinum í fiskimarks- og felagsmarknaðarmálunum, eins og landsstýrið í hesum málum kann ráðfora seg við nevndina. Landsstýrið kann áleggja limunum tagnarskyldu. Útreiðslurnar av nevndararbeiðinum verða goldnar úr landskassanum.
3. Í mun til aðrar logtingsnevndir, eisini millumtinganevndir, eitt nú figgjarnevndin, hevur marknaðar- og fiskimarksnevndin ta serstøðu, at hon er skipað við logtingslóg, at grundarlagið undir henni ikki er tingskipanin. Eisini er tann munurin, at landsstýrið vendir sær beinleiðis til nevndina og ikki sum vanligt er, at landsstýrið leggur málið fyri logtingið, sum síðani tekur avgerð um, um málið skal til viðgerðar í nevnd. Hin stórsti munurin er, at í lógini stendur einki um, at logtingið leggur mál fyri nevndina. Annað er, at logtingið í málum á hesum øki letur málini til viðgerðar í nevndini, t.v.s. at nevndin, hvat logtingsmálum viðvíkur, hevur fingið sama funktión sum aðrar logtingsnevndir. Eisini kann verða víst á, at eftir lógini um fiskiavtalur við fremmand lond, kann marknaðarnevndin, sum hon nú er komin at eita, geva fyribils góðkenning av avtalum, tá logtingið ikki er saman.
4. Eftir hesum hevur marknaðarnevndin fingið eina dupulta funktión, hin fyrra at taka ímóti upplýsingum frá landsstýrinum og geva landsstýrinum ráð í ávissum málum, í vissum forum undir tagnarskyldu, og hin seinra funktiónin at viðgera logtingsmál eins og aðrar logtingsnevndir.
5. Eftir lógini er marknaðarnevndin millumtinganevnd. Sama status hevur figgjarnevndin havt tey mongu seinri árini. Figgjarnevndin er samtbært § 10 í tingskipanini ein av teimum 3 fastu nevndunum, ið skulu skipast, tá logtingið er sett.

Spurningurin er nú, um hesar báðar nevndirnar, ella millumtinganevndir yvir-

høvur, bert fungera undir og imillum tingsetur, soleiðis at skilja, at tá løgtingið er sett, eru ongar nevndir, til løgtingið hevur valt nýggjar.

Beinleiðis lógarreglur ella reglur í tingskipanini eru ikki at finna, ið svara uppá henda spurning. Vanliga fatanin er helst, at gamla fíggjarnevndin missir sítt mandat, tá løgtingssetanin er byrjað. Tað er tó ein spurningur, um ikki gamla fíggjarnevndin í einari akuttari situatión, har tað av onkrari orsøk dregur út at velja nýggja nevnd, hevur mandat og má handla.

6. Sum longu sagt, er marknaðarnevndin vald av løgtinginum við tí setningi eftir lógini, at landsstýrið kann orientera umboð fyri løgtingið og at ráðfora seg við. Landsstýrið hevur krav uppá, at hetta umboðið er til taks, og helst eisini altið til taks, síðani mál og spurningar á hesum øki altíð kunnu stinga seg upp og krevja skjóta viðgerð. Um hina funktiónina, vanlig løgtingsnevnd, er at siga, at har mugu sonnu reglur galda sum fyri fíggjarnevndina.
7. *Niðurstøðan* er, at funktiónin, sum marknaðarnevndin hevur eftir lógini, ráðgevandi stovnur uttan avgerðarrætt, helst forir við sær, at nevndin hevur mandat og situr, til nýggj nevnd er vald.»

Síðani var atkvætt um farloyvi til Erlend Patursson, og vóru 15 atkvoður fyri, málið soleiðis fallið.

21. august las formaðurin bræv dagf. 17. august frá Javnaðarflokkinum, Tjóðveldisflokkinum og Fólkaflokkinum, har hesir boða frá, at teir standa saman í valbólki til val av nevndum v.m. Eisini var skriv dagfest 17. august frá Hákun Djurhuus, Hilmar Bech, Jógvan Sundstein, Óla Breckmann, Finnboga Isaksen, Signar Hansen og Sverra Midjord, sum vísa til § 2 í tingskipanini og krevja val av formansskapi til Føroya Løgting á sama fundi.

Síðan fór fram val av tingformanni, og var Hilmar Bech valdur til formann, til næstformann var Agnar Nielsen valdur. Eftir formansskifti fór fram val av skrivarum, Signar Hansen var valdur til fyrsta skrivara og Ivan Johannesen til annan skrivara.

31. august las formaðurin skriv frá Erlendi Patursson, dagf. 31. august 1979, har hann gevur frágreiðing um luttoku sína í havrættarnevndini í New York í samband við umræðu av ferð hansara, sum var soljóðandi:

Føroya løgting,
Tórshavn.

Í sambandi við ta umræðu, ið á løgtingi hevur verið um luttoku mína á havrættarfundinum í New York, fari eg at geva løgtinginum hesa frágreiðing:

1. Við at fyrireika hesa fundarferð (frábodan til danska uttanríkismálaráðið um

Iutteku mína, útvegan av ameriskum visum o.a.) hevði landsstýrisskrivstovan, sum eisini er skrivstova løgtingsins, givið «grønt ljós» fyri hesi ferð míni.

2. Áður enn eg fór av stað hevði eg samrøðu við skrivstovustjóra landsstýrisins, sum eisini er skrivstovustjóri løgtingsins, og kundu orð hansara ikki skiljast øðruvísi enn so, at táverandi marknaðarnevnd var sitandi hagan til onnur hevði verið vald.

3. Hetta sama hevur síðan sami skrivstovustjóri váttað og endurtikið í skrivi sínum 16. august til løgtingsformannin, har hann sigur: «Niðurstøðan er, at funktiónin, sum marknaðarnevndin hevur eftir lógini, ráðgevandi stovnur uttan avgerðarrætt, helst forir við sær, at nevndin hevur mandat og situr til nýggj nevnd er vald».

4. Síðan eg tók við sum marknaðarnevndarformaður árið 1975 havi eg — umframt henda seinasta fundin — luttikið í seks havrættarfundum, og havi eg ikki hoyrt annað enn at hetta var alt í lagi, ja sjálvsagt.

5. Á hesum havrættarfundum verða mál viðgjørd og í seinasta enda samtykt,ið eru grundleggjandi fyri allari framtíð. Hesir fundir eru alir ein samanhangandi heild, og tað hevði tí undir øllum umstøðum verið óforsvarligt at lata henda eina gleppa burtur í millum.

Niðurstøðan nú tí vera tann, at eg hevði ikki bert fullan rætt, men eisini fulla skyldu til luttoku á hesum umtalaða havrættarfundi í New York.

Eg fari í dag at geva marknaðarnevndini fyribils frágreiðing frá fundinum, og so skjótt sum tilber nevndini og løgtinginum endaliga frágreiðing.

Á Føroya løgtingi, 31. august 1979

Erlendur Patursson
formaður marknaðarnevndarinnar.

Løgmaður boðaði 19. november frá, at Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fólkatingsmaður biður um at verða loystur úr starvinum sum landsstýrismaður, tá hesin hevur tikið við vali sum limur av Fólkatinginum. Sama dag boðaði formaðurin frá skrivi frá Jákupi Lindenskov, ið sigur frá, at hann tekur tingmannastarvið uppaftur.

20. november góðkendi tingið við 20 atkvøðum fyri og 1 ímóti at Jóan Pauli Poulsen, Sandvík, tekur sæti á tingi fyri Sverra Midjord, meðan hann var sjúkur. Næsti maður var Manne Næs, men var hann burturstaddur. Triði á listanum var Martin Poulsen,

hann var deyður. Fjórði var Jóan Pauli Poulsen. Hilmar Kass gjordi vart við, at Manne Næs hevði eingi skrivlig boð givið um burturveru, og kundi Hilmar Kass ikki góðtaka hesa framferð.

Tingið góðkendi, at Óli Jacobsen tók sæti sum varamaður fyri Jákup Lindenskov á løgtingi, meðan hann var á fólkatingi.

Skriv var lisið upp 12. dec. frá Óla Jacobsen, sum bar seg undan at mota á tingi fyri Jákup Lindenskov vegna starv sítt sum formaður í Føroya Fiskimannafelag. Adolf Hansen bað um at fáa eina juridiska frágreiðing um hetta frá landsstýrinum.

17. december boðaði formaðurin frá, at Manne Næs var heimafturkomin. Tingið samtykti við 26—0 atkvæðum, at hann tók sæti, meðan Sverri Midjord hevur farloyvi vegna sjúku.

21. januar 1980 var skriv dagfest sama dag frá landsskrivstovuni viðvíkjandi umsóknini frá Óla Jacobsen um at sleppa undan at mota á tingi fyri Jákup Lindenskov býtt út, sum var soljóðandi:

«Løgtingsformaðurin hevur skrívliga biðið undirritaða um eitt ummæli í spurninginum, um grundirnar, sum Óli Jacobsen forir fram í skrivi dagfest 11. december 1979 fyri at leggja mandatið sum løgtingslimur frá sær restina av valskeiðinum, eru nóg góðar.

Í nevnda skrivi forir Óli Jacobsen fram, at hann vegna stóra og vaksandi arbeiðsbyrðu sum formaður Føroya Fiskimannafelags ikki hevur moguleikar at taka sæti á løgtingi so leingi hesin formansskapur varar, og tað vil siga restina av valskeiðinum.

Løgtingsformaðurin hevur eisini í skrivinum sagt frá, at tinglimur hevur greitt honum frá, at tinglimurin vísandi til, at løgtingið einaferð fyrr hevur sýtt tinglimi at sleppa frá at mota (J. F. Kjølbro), ikki kann greiða atkvæði fyri, at Óli Jacobsen fær loyvi at leggja mandatið frá sær.

Fyrst er at umroða reglurnar um fundarskyldu og farloyvi hjá løgtingslimum og síðani reglurnar um, at løgtingslimur leggur mandatið frá sær. reglurnar eru í § 37 í tingskipanini.

Eftir reglunum hevur løgtingslimur fundarskyldu, uttan so hann hevur lógligt forfall ella farloyvi. Hann skal siga løgtingsformanninum frá forfalli, og løgtingsformaðurin ger løgtinglimum hetta kunnugt. Reglan um forfall svarar til § 40 í «Forretningsorden for Folketinget» (FFO), men tann munurin er, at FFO bert óbeinleiðis nevnir fundarskylduna, skipanin sigur, at tann limur, «der er forhindret i at møde», skal siga fólkatingsformanninum frá forfalli.

Reglan um fundarskyldu er eisini tilskilað í fyrstu tingskipanini frá 16. september 1924, har tað í § 38 stendur: «Intet medlem bør uden orlov eller gyldigt forfald udeblive fra tingets møder». Fundarskyldan hevur sín uppruna í, at løgtingslimur hevði

skyldu at taka við vali, tað var eitt borgarligt umboð at vera logtingslimur, og av hesum fylgdi skyldan at mota á tingfundum, jbr. skriv frá logmálaráðnum dagfest 29. mars 1860, Færøsk Lovsamling 1901, Bang og Bærentsen. Hvussu ein tilík fundarskyldu skal fremjast var tá í 1860, og er tað eisini eitt, ein óloystur spurningur, men skylduna hevur tinglimurin, so leingi hann situr.

Undan fundarskylduni slepst bert, um logtingslimur hevur lógligt forfall. Hvat liggur í orðinum «lógligt» er ikki greitt frá í tingskipanini, men ein leiðbeining liggur tó í treytunum fyri at fáa farloyvi, har tilskilað er som treyt sjúka, burturferð í almennum starvi ella onnur orsok. Hetta seinasta «onnur orsok» gevur moguleika fyri rúma tulking, at dømi eru nevnd avmarka tó moguleikarnar nakað.

Orsokirnar at fáa farloyvi skulu føra við sær, at tinglimurin ikki kann luttaka á tingfundum í ein mánað í minsta lagi.

Meðan treytirnar fyri at sleppa undan fundarskyldu og fyri at fáa farloyvi óbeinleiðis og beinleiðis eru tilskilaðar og moguleikarnir eru avmarkaðir, eru ongar reglur fyri, undir hvørjum treytum tinglimur kann fara frá med alla. Tingskipanin sigur bert, at «fer maður frá sum tinguaður, skal varamaður taka sæti á tingi». Er logtingslimastarvið eitt borgarligt umboð, má hovuðsreglan vera, at tinglimur ikki kann leggja starvið frá sær, hann má sita tíðina út, jbr. eisini § 16 í logtingslóg um stýriskipan Føroya í sermálum: «Løgtingsmenn verða valdir fyri 4 ár». Tingskipanin tekur tó hædd fyri, at tað kunnu hugsast serumstøður, ið føra við sær, at tinglimur ikki hevur moguleikar at sita í starvinum, hann kann vera deyður, leingi álvarsliga sjúkur, fluttur med alla av landinum o.t. grundir, ið gera tað fysiskt ómoguligt at mota, í hesum førum má varamaður koma inn og ikki bert fyribils.

Grundarlagið undir hesari útlegging er, at tinglimastarvið er eitt borgarligt umboð. Tað var starvið, men er tað ikki aftaná nýggju logtingsvallógina frá 1978, jbr. § 17, 3. stk. har kravt verður, at valevnislistin skal vera undirskrivaður av valevnunum. Spurningurin er tí, um tað nú er neyðugt at føra ávísa grund fyri at leggja mandatið frá sær.

FFO sigur í § 41 «når et medlem ophører at være medlem af tinget, tager vedkommende stedfortræder sæde i tinget». Reglan verður skyld og praktiserað soleiðis, at fólkatingslimi ikki nýtist at geva nakra grund fyri, hví hann leggur frá sær, bonum nýtist bert at siga, at hann ger tað. Orðingin av FFO § 41 og orðingin av tingskipanini § 37, 2. stk. 1. pkt. eru tær somu. Eisini kann sigast, at logtingið við heimastýrislógini broytist frá at vera ráðgevandi hjá ríkisstýrinum í lógarmálum til at vera lóggávuting, logtingið eigur tí ikki at vera undir reglum um, at tinglimastarvið er borgarligt umboð, ein regla sum er galdandi fyri kommunal ráð, har hon er neyðug, síðani kommunurnar eru fyrisitingarligir stovnar, ið skulu virka ávíst bundið áramál, meðan logtingið hevur heimild at upploysa seg sjálvt.

Vísandi til tað, sum her er flutt fram, er niðurstoðan, at Óli Jacobsen eigur at kunna leggja mandatið sum logtingslimur frá sær restina av valskeiðinum.»

8. februar las formaðurin avrit av skrivi frá Erlendi Patursson til Føroya landsstýri

um «Nordisk regionalpolitisk Landlingsprogram» og Norðlendska íløgubankan. Skrivið varð býtt út til tingmenn og fór annars í landsstýrismálanevndina.

Tinglið góðkendi 29. februar við 24-0 atkvøðum, at Ingrid Sundum tók sess á tingi fyri Erlend Paturssen, meðan hann er burturstaddur.

29. februar 1980 las formaðurin skriv frá Óla Jacobsen, sum bað tingið sleppa sær undan at taka sæti á tingi fyri Jákup Lindenskov, orsakað av vaksandi arbeiðsbyrði í fiskimannafelagnum. Tingið samtykti við 18 atkvøðum, at Óli Jacobsen skuldi sleppa undan at mota, samtykt varð við 20 atkvøðum, at Hanna Lisberg skuldi taka sæti á tingi, meðan Jákup Lindenskov er burturstaddur.

4. mars varð við 24 atkvøðum samtykt, at Margeir Toftegaard, Fuglafirði, tekur sæti á tingi fyri Johs. M. Olsen, meðan hann er burtur í almennum ørindum.

24. mars 1980 las formaður skriv frá Jógvani Sundstein, sum søkir um farloyvi fyribils orsakað av stórari arbeiðsbyrðu í løtuni, og biður um, at næsti maður á fólkaflokslistanum í Suðurstreym tekur sæti á tingi í meðan.

Táið atkvøðugreiðslan um farloyvi hjá Jógvani Sundstein sama dag skuldi fara fram, mótmælti Hilmar Kass, at løgtingsmenn fáa farloyvi við tí grundgeving, at teir hava ov nógv at gera — serstakliga tá tað bert er fyri nakrar dagar, men í samband við hesa umsókn um farloyvi, kann hann taka undir við, at tað verður givið, til seningsarbeiðið er av, tí tað er borgaraskylda, sum er lagd á hann. Adolf Hansen vísti á, at seningsstovnurin hevði varamann, og mælti hann til, at hesin átók sær uppgávuna sum seningsmaður, soleiðis at Jógvan Sundstein kundi mota á tingi.

Síðani varð við 17 atkvøðum samtykt, at Eliesar Arge tók sæti á tingi fyri Jógvan Sundstein.

30. apríl segði formaðurin frá, at 108 tingmál vóru viðgjørd í hesi tingsetu, tey flestu vóru avgreidd.

Fastar tingnevndir

FÍGGJARNEVND:

Fastir limir: Pauli Ellefsen, Asbjørn Joensen, Jógvan Olsen, Háku Djurhuus, Poul J. Olsen, Hilmar Bech og Jógvan Durhuus.

Tiltakslimir: Johannes M. Olsen, Hilmar Kass, Ivan Johannesen, Øssur Dam Jacobsen, Haldur Hansen, Jørgen Thomsen og Signar Hansen.

UMSÓKNARNEVND:

Flemming Mikkelsen, Jona Henriksen og Jul Jacobsen (í lutakast við Edmund í Garði og Hans M. Joensen).

LANDSSTÝRISMÁLANEVND:

Eli Nolsoe, Jørgen Thomsen og Adolf Hansen (í lutakast við Óla Breckmann og Finnboga Isaksen).

AÐRAR NEVNDIR

LÓGARNEVND:

Óli Jacobsen, Karin Kjølbro, Eyðun Videro, Eilif Samuelsen og Agnar Nielsen.

FISKIVINNUNEVND:

Fastir limir: Poul Jacob Olsen, Øssur Dam Jacobsen, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Jógvan Olsen, Adolf Hansen og Eyðun Videro (í lutakasti við Johs. M. Olsen).

Tiltakslimir: Óli Jacobsen, Hakun Djurhuus, Karin Kjølbro, Signar Hansen, Agnar Nielsen, Juul Jacobsen og Óli Breckmann.

VEGA- OG HAVNANEVND:

Haldur Hansen, Jørgen Thomsen, Háku Djurhuus, Edmund í Garði (í lutakasti við Flemming Mikkelsen), Jógvan Olsen, Juul Jacobsen og Hans Marius Joensen.

SOSIALA NEVND:

Jona Henriksen, Karin Kjølbro, Jógvan Sundstein, Eli Nolsoe og Flemming Mikkelsen.

SKÚLANEVND:

Andrias Petur Jacobsen, Edmund í Garði, Finnbogi Isaksen, Eilif Samuelsen og Ivan Johannesen.

KIRKJUNEVND:

Signar Hansen, Jona Henriksen, Edmund í Garði, Johs. Martin Olsen og Juul Jacobsen.

ÍDNAÐARNEVND:

Jorgen Thomsen, Jógvan Sundstein, Hans Marius Joensen, Flemming Michelsen og Ivan Johannesen.

NORÐURLANDA RÁÐIÐ:

Fastir limir: Erlendur Patursson og Johs. Martin Olsen.

Tiltakslimir: Karin Kjølbro og Agnar Nielsen.

FÆRØERNES REALKREDITINSTITUT:

Jógvan Durhuus og Jákup Mortensen, Tvoroyri.

SJÚKRAHÚSSTÝRINI:

Klaksvíkar sjúkrahús:

Fastir limir: Olvheðin Jacobsen, Klaksvík Johan Simonsen, Klaksvík og Obert Eliasen, Fuglafjorður.

Tiltakslimir: Bjarti Hojbro, Klaksvík, Petur Simonsen, Fuglafirði, Asbjørn Joensen, Klaksvík.

Landssjúkrahúsið:

Fastir limir: Helgi Øster, Tórshavn, Liggjas Joensen, Tórshavn og Trygvi Samuelsen, Tórshavn.

Tiltakslimir: Hentzar Ellingsgaard, Sørvági, Dia P. Johannesen, Glyvrar og Samson Hojgaard, Vestmanna.

Suðuroyar sjúkrahús:

Fastir limir: Andrias Djurhuus, Vági, Hans Hendrik Strom, Trongisvági og Gunnar Vestergaard, Tvøroyri.

Tiltakslimir: Sverri Skaalum, Vági, Olaf Vestergaard, Sumba og Levi Niclasen, Hvalba.

RÁÐLEGGINGARNEVNDIN FYRI SJÚKRAHÚSINI:

Johan Simonsen, Klaksvík, Trygvi Samuelsen, Tórshavn og Hans H. Strom, Tvøroyri.

Valdir vórðu hesir (23. apríl 1980):

GRANNSKOÐARI FYRI FØROYA SPARIKASSA:
D. J. Kjærbo, Fuglafirði.

NEVNDIN FYRI SKIPAFELAGNUM FØROYAR:
Tórálvur M. Olsen, Sandi og Eli Nolsoe, Klaksvík.

UMBOÐSMAÐUR á AÐALFUNDI Í SKIPAFELAGNUM FØROYAR:
Martin Joensen, Tórshavn,
Tiltakslimur: Jákup Veyhe, yngri, Tórshavn.

KIRKJUSTJÓRN:
Jona Henriksen, Tórshavn, Agnar Nielsen, Vestmanna og Vilhelm Nielsen, Sandavági.

UMBOÐSMAÐUR Á AÐALFUNDI Í SJÓVINNUBANKANUM:
Karter Højgaard, umsjónarmaður, Tórshavn og Jákup Lamhauge, havnafúti, Runavík.

STÝRIÐ FYRI MENTAGRUNN FØROYA LØGTINGS:
Jákup Lindenskov, Tórshavn.
Tiltakslimur: Andr. P. Jacobsen, Nes, Vági.

FØROYA LISTASAVN:
Rúni Øregaard, Tórshavn, Óssur Dam Jacobsen, Vestmanna og Flemming Samuelsen, Tórshavn.

NEVND Í L/F GRØNLANDSFELAGIÐ:
Fastir limir: Poul J. Olsen, Klaksvík, P. H. Weihe, Sørvági og Frederik Hansen, Søldarfirði.
Tiltakslimir: Jørgen Thamsen, Skáli, Leon Joensen, Sørvági og Johan Simonsen, Klaksvík.

UMBOÐSMAÐUR Á AÐALFUNDI HJÁ P/F FLOGSAMBANDI FØROYA:
Jógvan Sundstein, Tórshavn.

VAL AV 2 EFTIRLITSMONNUM VIÐ FONGSLINI FYRI 4 ÁR EFTIR § 793 Í RÆTTARGANGSLÓGINI:
Jákup Lindenskov, Tórshavn og Eli Nolsøe, Klaksvík.

NEVND FYRI ILEGGINGARGRUNN (60 milj.):
Gunnar Joensen, Hvalvík.

TILTAKSLIMIR Í NEVNDINA FYRI MENNINGARGRUNNIN:
Hergeir Petersen, verkfr., Tórshavn, Petur Reinert, læknir, Eiði og Trygvi F. Guttesen, Tórshavn.

NEVNINGAGRUNNLISTAR (29. nov. 1979):
Suðuroyar sýsla: Aki Dimon, Tvoroyri, Dion Nolsoe, Vági, Poul Johs. Poulsen, Sumba, Eiler Djurhuus og Páll Leo, Vági.

Sandoyar sýsla: Niels á Reynatúgvu, Sandi, Mortan Mikkelsen, Sandi, Louis Eystberg, Skopun, Iørmund Olsen, Húsavík og Poul Olsen, Skopun.

Streymoyar sýsla: Grímur á Dul, Tórshavn, Tórstein Grækarisson, Kvívík, Albert Hansen, Tórshavn, Jafet Danberg, Tórshavn og Albert Hansen, Argir.

Vága sýsla: Thor Nielsen, Sandavágur, Joen J. í Horni, Sandavági, Frits Jacobsen, Sørvági, Gudmund Niclasen, Miðvágur og Tórður Skaalum, Sorvágur.

Eysturoyar sýsla: Ámundur Berthelsen, Strendur, Poul Martin Joensen, Fuglafirði, Karl D. Joensen, Lamba, Hans Jacob Poulsen, Eiði og Poul Hansen, Eiði.

Norðoya sýsla: Arne Ziskason, Klaksvík, Amaliel Hansen, Klaksvík, Ragnar Samuelsen, Klaksvík, Sámal Christiansen, Klaksvík og Antonius Olsen, Klaksvík.

SAMFERÐSLUNEVNDIN (29. febr. 1980):
Sofus Sivertsen og Atli Jensen, báðir Tórshavn.

Frágreiðing frá løgmanni 1979

Eftir at løgtingið varð sett ólavsøkudag 1979, helt løgmaður røðu.

Farna tingár hevur verið hendingaríkt á mangan hátt. Politiskt og vinnuliga eru stórar broytingar farnar fram og eru enn í loturi rembingar á hesum økjum. Rembingar, sum verða avgerandi fyri møguleikar, rættindi og skyldur hins einstaka borgara.

Hóast menn støðugt í 1978 og serliga farna partin av 1979 hava talað um, hvussu hann dregur á loftina, mugu øll sanna, at ódnin øgantíð brast soleiðis á, at vit ikki kunnu takka fyri eitt gávurlíkt og framburðarkent tíðarskeið heilt fram til dagin í dag.

Óvissa um fiskimøguleikar, óvissa um orkuútvegan, óvissa um prisgongd, gjaldjavna og virkismøguleikar á landi merkja útlitið í dag, men tann gongd, verið hevur seinastu 10 árini, hevur — sum eg so mangan havi víst á — styrkt og ment hetta samfelagið, so tað betri er fært fyri at fóta sær, um ólogi ganga á.

Men fyri at henda menning skal muna, er neyðugt, at ikki fyrilitarleyst verður nýtt av samlaðu tjóðarorkuni, bert til tess fyribils at halda uppi einum virkseni í samfelagnum, sum ikki uppá longri sikt eigur lívsmøguleika. Bert um eisini verður brotið upp úr nýggjum, kunnu vit skapa økt virði og tola uppilogur á øðrum økjum. Bert við at nýta orkuna sum sáð, ið ger nýggjan gróður, hava vit møguleikar at skáka okkum undan avleiðingum av mótráki uttanum okkum.

Fíggjarliga og politiska rákið uttanum okkum eru vit ov fá og veik til at ávirka avgerandi.

Men eru vit ikki úti um okkum í góðum tíma og skilja rákið, sum uppi er, og tí leika tann leikin, sum hetta rák treytar, so er skjótt, at farið er fyri bakka alt tað, ið bygt varð hesi ár.

Skilja vit rákið, og handla vit glegt og snarpt, kunnu teir tjansir skapast, sum gera at einki av tí, vunnið er, gleppur okkum av hondum aftur.

Eru vit ov seinir á fótum í hesum málum, kunnu lattliga flokkast okkum afturgongd og arbeiðsloysi.

Hetta veri sagt um ein politikk, sum ikki nóg væl og nóg tíðliga verður lagaður

til tær umstøður, sum rákið uttan um okkum skapar. Í hesum liggur, at tað er skeivt við nógvum tosi um kreppu í okkara samfelag: Í staðin átti meira at verið talað um kreppufyribyrgjandi tiltok, sum minka teir trupulleikar, sum avleiðingar av kreppustøðu í idnaðarlondunum, hækkandi oljuprísum og øðrum viðurskiftum, vit ikki hava tamarhald á, hava skapt fyri okkara vinnuliv.

Tað er nevniliga aðalmunur imillum kreppuna, sum nú í mong ár hevur herjað uttan um okkum og teir trupulleikar, vit nú hava. Vit hava jú hesi sonnu ár her heima hjá okkum havt betri lívsumstøður og hægri livifót enn nakrantið fyrr í okkara sogu.

Men hetta vil eg venda aftur til, tá gongdin, sum verið hevur, og útlitið framyvir eru nærri lýst.

Árið 1977 kom at roynast føroyingum metár, hvat framleiðslu, útflutningi og rentabiliteti viðvikur, tí er samanbering fyri 1978 og farnu helvt av 1979 við tað árið so natúrlig, men tikið yvir eitt longri tíðarskeið t.d. aftur til fyrst í sjeytiártunum sæst, at talan er um ein javnan vokstur í okkara samfelag við árinum 1977 í serstøðu, har útflutningsnøgd og -virði, býtislutfall í uttanríkishandlinum og gjaldjavnvág alt togaði rætta vegin. Taka vit samlaðu bruttofaktorinntøkuna hesi ár við í metingina, verða árini 1978 og 1979 ikki at sýna nakra afturgongd, men heldur reella framgongd, eisini sammett við árið 1977. Henda inntøka verður fyri 1978 helst at toga at 2,5 milliardum krónum, meðan hon í 1977 var góðar 2, og í 1976 1,6 mia. kr.

Fram til 1. juni í ár er útflutningurin umleið hin sami sum sama tíðarskeið í fjør, meðan hann, um vit taka juli mánaða við, er væl storri í ár. Um samlaða útflutningin í 1979 kunnu vit meta, at hann gerst nakað hægri enn í 1978, virðið av fiskaútflutninginum verður storri, og upphæddin fyri útflutt skip kemur at telja meira enn í 1978. Men fyri at røkka upp um útflutningin í 1977, sum var 862 mill. kr., mugu flestar kvotur, okkum eru tryggjaðar, verða veiddar.

Innflutningurin fyrru helvt av 1979 er 41 mill. kr. minni, enn hann var sonnu tíð í fjør, so har er ein lítil bati í eygsjón, men hvussu nógv orkudýrkanin kemur at hava ávirkað innflutningsprísirnar innan árslok er í løtuni ilt at spáa um. Samanumtikið er tó útlit til eina ávísa minking í samlaða gjaldjavnahallinum í ár.

Uppsparingin í 1978 varð umleið 530 mill. kr. ella eins stór og í 1977, og er hetta enn eitt av prógvunum fyri, at ikki er støðan so holt, sum summir hinka til.

Býtislutfallið í uttanríkishandli okkara fall í 1978 við 4 stigum úr 95 niður í 91, og er hetta ein av orsøkunum til at gjaldjavnahallið í fjør gjørdist 156 mill. kr. Høvuðsorsøkin var fall í útflutningsvirðinum orsakað av dollarkursfallinum, og tí vit veiddu meir av billigum fiskasløgum enn fyrr.

At leiðirnar, vit kunnu veiða á treingjast, er ein veruleiki, og størsta stríð okkara hevur verið at bildið um fiskirættindi á gomlum leiðum í slíkan mun, at umlegging til heimaleiðir og uppbyggjan av nýggjum veiðumøguleikum kundi gerast yvir rímiliga tíð.

Hóast mong hørð orð um mist veiðurættindi, er tað ein veruleiki, at tað er eydnast at halda øllum skipum í vinnu, og framvegis kunnu tey vera tað restina av árinum innan fyri teir kvotukarmar, sum fingnir eru. Annað er so tað, at tørvandi rentabili-

tetur hjá portum av vinnuni og fiskaloysi á nógvum leiðum gera at kinkur er í. Eitt fiskaloysi, sum flesta staðni er orsakað av serligum bitabroytingum í sjónum, men eisini í ovveitt hevur verið. Afturat hesum kemur, at veðrið í vetur tarnaði heimaróðrinum nógv.

Inntil 1. juli í ár er heildarveiða okkara í tonsum 146.000, mótvegis 167.000 í fjor ella 19.000 tons færri, og er tað serliga lodnu undan Íslandi, toski úr Barentshavinum, rækjum undan Grønlandi og svartkjalfi av Føroya-ókinum, sum minni er veitt av í ár. Men útflutningsvirðið av tí, veitt er, er stórri enn í fjor.

Nevndi í fjor, at tann umroða Føroyar fekk uttanlanda, sum landið har alt búskaparliga gekk øvugt av búskaparligu gongdini aðrastaðni — sum landið, ið fleyt í hunangi — var vandamikil fyri okkara møguleikar fyri at basa fylgjunum av teirri óvissu, vit livdu í.

Eins vandamikið er at fara hin vegin!

Vit mugu avvegað og objektivt meta okkara møguleikar til einahvorja tíð og ikki vaksa ella minka teir í taktiskum orðavali og politískum tjaki.

Gera vit ikki okkum sjálvum greitt hvorja loytu, hvar vit flóta, og hvorja leið rákið ber, gerast tiltøk okkara skeiv og meira til skaða enn gagn. Tað stendur framvegis fast, at vit koma at vera fyri bakkøstum, tí møguleikar knappliga ganga undan, og tí mugu vit øll standa á varðhaldi og bera upp í liðini allastaðni har ágangur er.

Vit skulu sjálvt við minni veiðunogd, men øktari viðgerð tryggja tann til samfelagsraksturin neyðuga búskaparliga vøksturin.

Men samstundis mugu vit aftur læra at meta sum virði aðrar lívsumstøður, sum ikki júst eru so tengdar at teimum nýtslumøguleikum, sum ótálmað brúk av náttúruvirðunum skapa í teirri orkukrevjandi framleiðsluni.

Fólki okkara er eisini í komandi tingsetu tryggjað, at hin einstaki ikki inntøkuliga sað kennir seg verri fyri enn áður. Hetta tryggjar tann útjavningarpolitikkur, sum fer fram yvir skatta- og studningsskipaninar, og hetta medvirkar tann búskaparliga stabiliseringin við ríkisveitingum til, men skal hetta halda fram, er neyðugt at javnvág er ímillum møguleikar, neyðuga stabilisering og nýtsluviðkan. Eisini er neyðugt at prioritera fløgurnar so, at tær — skaptar heima ella læntar uttanlands — koma teimum framleiðslufremjandi og kreppufyribyrgjandi tiltøkum fyrst tilgóðar.

Hesi tiltøk koma flest øll at miða ímóti at dubba okkum best møguligt til broyttar umstøður, til økta flakavirkisorku, til stýring og fígging av landbúnaðinum, til økta farma- og ferðamannasigling, til fjøltáttan av idnaðinum og ikki minst til orkuútvegan. Skal hetta røkkast, er avmarkað, hvat hin einstaki fær í sín lut av materiella vøkstrinum, men eigur hann framvegis tað arbeiðssemi, ta virðing fyri materiellum virðum og tað skynsemi í umsiting, sum forfedrar okkara áttu, er hann við til at tryggja, at vit framvegis eiga eitt gott samfelag, eitt sterkt samfelag og eitt ríkt samfelag.

Skal hin einstaki kenna sína ábyrgd her, er meira neyðugt enn nokrantíð, at po-

litiski verður skipað so fyri, at hansara medvirkan og hansara medavgerð verniliga telja.

Tað hevur verið siður, at løgmaður á ólavsoku ummælir mong samfelagsøki hvørt sær, figgjar- og skattaorku, skiparaksturin sundurgreinaðan, ídnað og landbúnað, samfelagsútbyggingina innan heilsuverkið, sosiala økið, vegagerðina, samferðslu- og kommunikatiónsøkið, húsabyggingina, skúla- og mentunarmál og mangt, mangt annað.

Hetta varð rættuliga gjølla gjort við ársbyrjan, og vil eg í ár tí bert stutt minna á, at á øllum hesum økjum, í øllum samfelagsins liðum, er framvegis gróður, útbygging og menning, og minna á, at hetta hava vit orkað, tí framleiðsla okkara er so hampuliga stór, og tí aðrir hava havt álit á búskapi okkara.

Støðan er annars rættuliga vel lýst í teim mongu skjølum og tí taltilfari, sum er hjálagt hesi røðu.

Framhaldandi fara vit eisini at orka útbygging og menning, men karmur okkara í fiskivinnu tykist skjótt settur, so at skilja, at vit kenna avmarkingarnar og moguleikarnar fyri at troyta royndar og óroyndar leiðir enn betri. Tí eigur nú at verða lagdur so stórur dentur á at fyriskipa aðrar vinnuvegir alfurat, hóast verandi kunnu útbyggjast munandi enn. Hetta krevur politiskar umstøður hjá tí almenna at fyriskipa enn betri, stýra meira skynsamt og samvirka dyggiligari við landsins borgarar. Tí batar ikki, at vit royna at fáa hesar at falla í fátt við at mála daprar framtíðarmyndir um búskaparligt ófori fyri teimum, og hetta, tí okkum torvar tað, teir kalla visiónir — evnir til at síggja nýggjar moguleikar — og dirvi til at fremja teir.

Nei, vil nugu kalt og hóliga tala um tingini, sum tey eru, arbeiðarin, fiskimaðurin, vinnulívsmaðurin, politikkarin og hvør einstakur borgari, skulu vit seta okkum nýggj mál og mið.

Av hesi orsok vil eg heldur tala meira um búskaparligu støðu okkara sum heild, heldur enn um tey einstoku samfelagsøkini.

Fiskivinnumoguleikarnar, sáttmálarnar við onnur lond og framleingjan teirra hava vit umrott so ofta, men lat meg siga, at eg meti moguleikar at vera fyri at framleingja teir allar í nakað broyttum líki og at fáa í lag onkran nýggjan eisini fyri komandi ár.

Landbúnaðarútbyggingina og ídnaðarútbyggingina orka vit eisini at halda í gongd og menna.

Hesi trý oki vóni eg, at sjálvt teir, sum alla tíðina tala um búskaparliga kreppu í Føroyum, duga at síggja onkra vón fyri. Tað duga teir, um teir vilja vera sannir.

At nýlendi verður útlagt, har okkum óroyndir vinnuvegir finna grund, er straks torfarari at skapa fatan fyri hjá øllum, at óroyndir søluvegir verða gingnir, at orkan

kann fáast til vega á annan hátt, at vit mugu forka okkum eitt vet burtur frá monopolstoðnni innan ávís vinnuøki, at virkir til viðgerð av ónýttum fiskastovnum og skip til veiðu av teim skulu byggjast (svartkjafttur, gullaksur, lodna, blálonga, langasport), at fiskaaling má útbyggjast í stórum málistokki, at almenna umsitingarorkan (og umsitingarhjálpin) má styrkjast, at óskattaða uýtslan kann liggja, at farma- og ferðamannasiglingin kann geva hundraðir av milliónum, at ein samskipað og konsessionerað ferðsla á landi gevur stóra sparing, og at ein samskipan av innkeypi og effektivari príseftirlit best tálmar inflatiónini, tykist tað vónleyst at skapa breiða semju um.

Men frenst av øllum, so kann eingin meiriluti skapast fyri, at hesi framstig má og eigur hitt almenna dyggiliga at fyriskipa, skulu privatir orka at lyfta uppgávurnar og kenna eggjan til at fara undir tær við ábyrgd yvir fyri okkara felags húsarhaldi.

Kortini vænti eg, at fatanin av, nær kappingarfilosofiin, og nær samtaks- ella felagsbúgsjónin orka at loysa uppgávurnar, fer at gerast meira útgreinað og greið í komandi tíð.

Við øllum hesum moguleikum, og tí búskaparliga stoðan er so sterk, sum hon er, at hendan talan um kreppu rættuliga ábyrgdarleys, tí hon kann sjúlvsagt fáa fólk at halda, at vit í Føroyum eru um at koma í somu óloysiligu trongstoðu, sum tey mongu ídnaðarlondini eru í.

Tað ber ikki til at gloyma, at tað er ein avgerandi munur í millum ta djúpt gangandi kreppu, sum flestu ídnaðarlond eru í, og so hinvegin teir vinnuligu trupulleikar okkara samfelag hevur í lotuni.

Kreppan hjá ídnaðarlondunum er eyðkend av stórum *arbeiðsloysi*, ov hogum *framleiðslukostnaði* á útflutningsvørum, einum kostnaði, sum menn meta stava frá einum *óttálmaðum lønarvokstri*.

Onnur eyðkenni eru vaksandi trupulleikar við at *okja* um *útflutningsvirði* og nogd, tí kreppan er so vittfevnandi. Hetta saman við *hækkandi oljuprísum* hevur skapt stórar gjaldjavnatrupulleikar og *eina inflation*, sum tykist torfor at temja. Stjórnirnar hava sett búskaparlig tiltok í verk, sum mest miða fmóti at minka um lønarvoksturin, hækka útflutningsvirðið og minka um innflutningin.

Okkara trupulleikar stava eisini frá hækkandi framleiðslukostnað. Men hesin hækkandi framleiðslukostnaður stavar at kalla bert frá teimum hækkandi oljuprísunum.

Haraftur fmóti eru *vit spard fyri arbeiðsloysi*, og álvarsamar *soluvrupulleikar hava vit ikki*. Gjaldsjavnahall Føroya er í sturra lagi, tó ikki storri enn, at útheimurin framvegis hevur álit á føroyska búskapin.

Hóast okkara trupulleikar ikki kunnu sammetast við tefrra, eru trupulleikar okkara álvarsamir nokk, og eiga vit tí longu nú at seta í verk skilagóð *kreppufyribyggjandi* tiltok.

Hovuðsendamálið við hesum tiltokum eigur sjálvsagt at vera hetta at halda vinnuhjólunum gangandi og harvið sleppa undan tí arbeiðsloysi, sum er hin daprasta fylgjan av eini og hvorjari búskaparkreppu.

Tað er helst skilagott, at hesi krepputiltøk í *fyrstu* atlogu umfata eina fleirtáttaða bráfongishjálp til øll fiskiskip, so tey ótarnað kunnu halda fram í vinnulívinum. Hetta merkir ein rakstrarstudning í mun til hækkandi oljuútreiðslurnar og lætta í avdráttarbyrðunum.

Harmæst eiga vit í aðru atlogu longu nú at fyriskipa meiri langsiktaðum og varandi búskaparligum tiltøkum.

Tiltøk, sum skulu tryggja okkum hóskilig skip og harvið ein framleiðslukostnað, sum framleiðslan sjálv so vítt moguligt kann bera, (t.d. tykjast meðalstóru trolararnir ikki veiðueffektivir til at royna nóg viða á Føroyarokinum, vit mugu og skulu stuðla, meðan spakuliga verður útskift, vit eiga einki nótaskip, sum stendur mát, skal hugsast um at nýta teir nýggju moguleikarnar, vit eiga eingi skip, sum árið runt kunnu veiða 200 - 600 tons av svartkjaftí pr. viku til matframleiðslu, allir okkara motorar brenna ta dýrastu oljuna o.s.fr.; úrslitið av hesum kann gerast, at okkara veiðumenn eins og farmasiglingarmenninir fara í vinnu hjá teim, sum hava hesi før.)

Hesi tiltøk eiga eisini at miða ímóti at økja um okkara útflutningsvirði, samt ímóti at økja um framleiðsluna av vørum, sum í dag verða innfluttar, (at virkini ikki eru bundin av at framleiða júst tað, sum sølusamtakið fyrisetur, men t.d. ótarnaði kunnu gera royndir við 10 - 20% av rávøruni, meðan 80 - 90% fara til meginframleiðsluna, at neyv avvegan verður ímillum tann møguleiku, vit hava til at tálma prísvøkstri við at keypa avlopsframleiðslu frá øðrum og so øking av innlendis framleiðslu, at føroysku arbeiðstakarar gerast førir fyri at átaka sær øll arbeiði, teir kunnu gera eins bíligar og aðrir, tá sama kappingarfori, sum útlendingar hava, er veitt teim, hvat stuðuli og fígging viðvíkur o.s.fr.)

Fremst av øllum mugu tiltøkini bera við sær eina veruliga herferð ímóti orkuoyðsli og eiga í sær møguleika fyri at útloysa alternativar (aðrar) orkumøguleikar.

Í teim loysnum, vit velja, mugu vit leggja dent á ikki at skerja almenna virksemið, har minsti vandi er fyri, at harav fylgir arbeiðsloysi.

Røddir vóru frammi í 1975 og eru tað aftur nú, sum mæla til álvarsligar niðurskurðir. Onnur lond hava royndt hetta, men einki prógv er fyri at niðurskurðir yvirhøvur virka krepputfyribyrgjandi.

Vit mugu leggja dent á at fyribyrgja ungdómsarbeiðsloysi, og vit mugu leggja dent á at hava við í planleggingini fakfeløgini, vinnulívsfeløgini, stovnar og serfroðingar.

Eydnast ein búskaparpolitikkur eftir hesum hovuðslinjum, eru góðar vónir um, at vit fara at megna at styrkja okkara búskap og bøta munandi um gjaldjavnan.

Hvorjar *møguleikar* hava vit so fyri at verja búskap okkara móti kreppu?

Vit hava tann *fyrimun*,at vit mótsett mongum oðrum tjóðum hava rættuliga friar hendur til at seta í verk búskaparlig tiltok, (eru ikki bundin av EEC- ella oðrum reglum í sama mun).

Hetta frælsi hava vit ikki nýtt, tí hava bankar okkara kunna okt uttanlandaskuldina við lántoku til goymsluhús o.a. uttan samskipan við almenna lánipolitikkin.

Við landsbankanum fáa vit eitt tól til fyriskipan av slíkum tiltokum og samskipan teirra við politikk bankanna, kommunanna, teirra privatu og landsstýrisins.

Vit hava *tann fyrimun*, at vit í lotuni hava *eina orsøk* til tann hækkaða framleiðslukostnaðin, og hon er nærum bert hin eina, *olíuprísin* og ikki lonarvoksturin.

Vit hava *tann fyrimun*, at vit eiga vinnulívsmenn, fiskimenn og arbeiðsfólk við áræði, sum áður hava sýnt vilja og evni til at loftta broyttum vinnuumstøðum.

Vit hava *tann fyrimun*, at vit, sum longu nevnt, hava uppbygt eitt sterkt samfelag við vælvirkandi stovnum, samt at partar av vinnuni eru væl konsoliderðir.

Men sjálvandi eru og verða viðurskifti, sum vit ikki eru harrar yvir, sum koma inn yvir okkum uttanífrá.

Hetta krevur, at allar góðar kreftir finna saman og semjast um tiltøk, sum kunnu halda kreppuni frá durunum. Tá vit hugsa um, hvussu skaðilig henda kreppa hevur verið fyri *fjøld* av fólki í okkara grannalondum, bæði socialt og politiskt, skuldu vónir verið um, at menn og flokkar finna fram til skilagóðar loysnir, hóast flokto politisku viðurskiftini.

Hesi eru í ólagi, tað er eingin loyna. Javnaðarflokkurin hevur boðað frá, at fólkaflokksins støðutakan í teimum samráðingum, sum máttu vera aftan á landsfund javnaðarflokksins, har sligið varð fast, at fólkaflokkurin var gingin frá samgongusáttmálanum, var sovorðin, at eingki grundarlag var fyri framhaldandi samstarvi millum hesar báðar flokkar.

Kortini situr landsstýrið, valt av teim trimum flokkunum, framvegis, og tað hevur skyldu til at virka dyggiliga og skilagott við ollum samfelagsmálum inntil tann dagin, eitt annað stýri tekur við, ella inntil verandi stýri er umskipað.

Umboð javnaðarflokksins í landsstýrinum leggja tí fyri samstarvsmenninar har tey nágreiniligu uppskot um kreppufyribyrgjandi tiltok, sum flokkurin hevur útarbeitt, bæði viðvíkjandi stuttfreistaðum tiltokum og eini langtíðarætlan. Henda ætlan verður saman við uppskotunum frá hinum flokkunum viðgjord, og hevur landsstýrið skyldu til beinanvegin at koma til tingið við einum uppskoti til loysn.

Spurningurin er so, um ikki tingið eigur at taka sær tíð til at avgreiða hetta mál, áðrenn farið verður undir ta politisku uppgerð, sum verandi ósemja krevur.

I undanfarna havi eg vegna landsstýrið royni at tala um stoðu tjóðartinnar, soleiðis sum tað er væntað av formanni landsstýrisins. Men tað skerst ikki burtur, at í verandi stoðuni er væntað ein meira politiskt merkt lýsing av teim orsokum, sum eivdu til samgonguslitið og av teim avleiðingum, sum hetta vil fáa.

Vil loyva mær at gera tað, og verður henda lýsing merkt av, at eg umfram at vera formaður í landsstýrinum eisini eri limur og formaður í einum av teimum flokkum, sum valdu hetta stýrið.

Sum eg nevndi við tingslitið í mai, hevði javnaðarflokkurin mett, at tann pris vit rindaðu í atkvoðum við valið í 1978, uftaná at hava havt ábyrgdina av leiðsluni av landsins stýri í 16 av 20 árum, var tað rímuligt at bera, tí so mikið av javnaðarpolitikki hevði ein kunnað rikið sum part av eintum tillagingarpolitikki ímillum borgarlig og sosialdemokratisk sjónarmið, at politiskt og fyri hin einstaka borgaran royndist skurðurin góður.

Vit sóu við ársskiftið, at eingin onnur samgonga enn hon, sitið hevði, kundi skipast, og løgdu tí okkara lut til, at eitt samgongugrundarlag fekkst til vega. Eitt grundarlag sum sýndi vilja til at virka fyri heildina uttan at kova rættin hjá einstaklingum og bólkum.

Hóast samarbeiðið frá 1975 - 78 gekk rættiliga væl, tóktist longu undir samgongusamráðingunum at vera torfarari at rokka semju. Valúrslitið, sum gav borgarligan meirluta, spokti væl, men ein gav tí ikki gætur nóg mikið, serliga ikki at tað fór at gerast møguligt at spæla upp til hinar borgarligu flokkarnar ímóti tí skrivaða orðinum í samgongusáttmálanum.

At hetta er gjørt, er okkara tulking. Aðrir kenna seg — siga teir — ikki sekar í nøkrum avviki frá givnum lyftum.

Tað gjørdist skjótt greitt, at tær avbjóðingar, sum lógu fyri framman, kravdu munandi størri medvirkan frá samfelagsins síðu enn áður, munandi sterkari igongdsetan og fyriskipan enn áður, serliga til at ganga óroyndar leiðir, skuldi ikki olf samfelagsorkan fara í beinleiðis studningi, sum tænti tí endamáli at halda hjólini í gongd, men sum eisini — hendi ikki annað — bleiv tærd upp í nýtslu, sum ikki skapar nýggjar møguleikar.

Royni var tí at ganga nýggjar leiðir á sunnum okjum, men hildu vit okkum skjótt kenna eina ávísa darvan frá fíggjarnevndarleiðsluni, eina darvan sum fordaði skjótum og effektivum atgerðum til nýskapan. Hendan blokaduroynd kundi við tí borgarliga meirilutanum aftanfyri skjótt gerast so effektiv, at okkara stýrislag avskeplaðist. Tí tað hevur onganntíð verið tann parlamentariska meiningin, at ein stjórn bert skal umsita viljan hjá leiðsluni í eini løgtingsnevnd, men at hon skal fyriskipa og stýra, stinga út í kortið, leggja uppskot fyri lóggávutingið og veita sær heimildir og taka ímóti heimildum frá hesum.

Landsstýrið fekk við valið 23. januar ikki allar atkvoður samgongunnar, kanska

liggur her orsokin til royndina hjá figgjarnevndarleiðslumi at seta seg sum hægsta umsitingar- og politiska vald, og kanska liggur her spirin til, at neyðuga álitið millum flokkarnar vísti seg ikki at vera til.

Vit gjordu skjótt greitt, at vit ongantið fóru at góðtaka *bert* at umsita ein politikk, sum er útstungin av borgarligum flokkum.

Eg undirstriki orðið *bert*, tí royndt hevur verið at siga, at javnaðarflokkurin á óparlamentariskan hátt vildi nokta at umsita avgerðir, sum vóru í tráð við borgarliga hugsan, tað vildu vit ongantið loyvt okkum, men vit vildu ikki *bert* gera hetta, men eisini umsita hin partin av avtalunum, nevniliga tey tiltokini, sum skulu fremjast av samfelagsorsokum, tiltok, sum eisini eru samfelagsins menningarmál, men har hin einstaki ikki rokkur, og tað almenna tí má ganga á odda.

Vit vistu, at umbýti av portum av samfelagsognini skuldi fremjast, tí viðurskifti uttanum okkum komu at nerva okkara búskap, men vit vildu ikki góðtaka, at hetta hendi á tann hátt, at áhugamál hjá nokrum fáum skúgvaðu onnur til viks. Vildu ikki at almenn luttøka uttan medavgerð kundi misnýtast, tí almenn luttøka, hóast flestu ynskja hana, kennist mongum ringur ráki.

Fólkaflokksins hugsan, at okkara trupulleikar kunnu loysast eftir liberalum grundreglum og javnaðarflokksins, at hetta ikki letur seg gera, men at tí almenna nú má loyvast at taka initiativir, hevur tað sýnt seg ógjørligt at sameina, ikki bert í einum einstøkum máli, men yvirhevur, og noyddist javnaðarflokkurin tí at taka hetta sum orsøk til samgonguslit. Vit kundu ikki góðtaka, at minsti flokkurin í samgonguni tiltók sær vetorætt á økjum, har vit mettu greiðar reglur vóru avtaladar frammanundan, tá vit frammanundan fult og heilt í samgongugrundarlagnum hevdu tikið hædd fyri, at javnaðarflokkurin bert átti 8 av 32 tingmonnum, og tí bert kundi fáa ávísan part av hugsanum sínum við í setningin. Men hesin parturin skuldi eisini fremjast.

Tað hevur verið royndt at einfaldgera ósemjuna á slíkan hátt, at málið bert snýr seg um keyp av einum skipi — stuttleikaskipi verður hartil lagt — soleiðis er tað ikki. Talan er um grundleggjandiójavna í stuðutakan til vinnulívs- og aðra útbygging. Fyri okkum hevur keyp av skipum fleiri endamál, botan av almennum tænastuveitingum, skapan av nýggjum vinnuvegi til teir hundraðir av útbúnum monnum, sum nú virka fyri aðrar í kapping við okkara áhugamál, botan av gjaldjavnshalli okkara (og telur hvør króna her dupult, tí hon er einaferð spard og einaferð vunnin) og seinast, men ikki minst kapitaltilvøkstur av hesi vinnu fellur í okkara samfelag og ikki uttanlands og mennir harvið okkara moguleikar til at útbyggja nýggj øki.

At keypa skip til stuttleika hevur als ongan áhuga.

Vit hava merkt blokaduna á øðrum økjum við, økjum har torvandi loysn vil bera í sær enn ein útflutning av «know how», vitan og dugnaligheit til aðrar, tí okkara menn fara í teirra tænastu.

Vit sita so eftir á berum.

Javnaðarflokkurin hevur einki ynski um at leggja frá sær. Tvørturímóti vil hann fegin framvegis taka við ábyrgd.

Hetta gjordi hann í 1959 - 63 og 1967 - 79, men skal hann vera við, er fortreytin, at útlit er til úrslit og veruligan framburð, soleiðis sum hesi skeið góvu. Bert at umsita hevur ongantið verið okkara yniski. Vit kenna skyldu til eisini at stýra og fyriskipa.

Úrslit verða bert rokkin í semju. Føroyingar hava upplivað naggatódu, tá innanhýsis klandur eyðkendi eitt stjórnarskeið.

Slíkum viðurskiftum ber ikki til at arbeiða undir, skal vinnast á trupulleikum heldur enn at tjakast um, hvussu ein fær teir til viks.

Javnaðarflokkurin metir, at í summum málum er fólkaflokkurin gingin frá teim lyftum, vit hildu hann hava givið, men tað er eingin í javnaðarflokkinum, sum sigur fólkafloksmenn ringar fyri at hava aðra meining um, hvat avtalað varð, ella fyri nú at gera greitt, hvussu langt teir vilja ganga. Tað má so bert gerast greitt, at grundarlagið fyri samarbeiði ella úrslitum ikki er til staðar.

Avleiðingarnar av hesum tí verða at taka.

Javnaðarflokkurin hevur mett, at hin rættasta avleiðingin var eitt nýval, og mett at eitt slíkt vildi givið honum styrki til at tikið við leiðsluni av nýggjari samgongu.

Men hvussu eru annars viðurskiftini, tá ein samgonga ikki longur ætlar at samarbeiða.

Semjan u m samansetan av landsstýri byggir á eina avtalu um ein ávisan politikk, og ein meiriluti avtalar hendan politikk.

Sjálvt um lóggávan bert krevur ein meirluta, tá landsstýrið verður valt, og ikki krevur at landsstýrið fer frá, um tað í valskeiðinum vísir seg, at hesin meirlutin ikki longur er til staðar, so má tað metast at vera rætt, at eitt landsstýri undir hesum umstøðum leggur frá sær so skjótt, sum tað er gjørligt at skipa eitt annað landsstýri.

Sambært løgtingslóg um umboðsvald Føroya er landsstýrið valt fyri alt valskeiðið hjá løgtinginum. Leggur løgmaður ella landsstýrismaður frá sær í valskeiðinum, skal løgtingið velja annan løgmann ella landsstýrismann. Lógin sigur harímóti einki um, hvat henda skal, um eitt landsstýri leggur frá sær vegna politiska ósemju.

Eg vil meta, at um eitt landsstýri vil leggja frá sær vegna politiska ósemju, er rætta leiðin at ganga at útskriva val av nýggjum. Henda rætt hevur landsstýrið ikki; til hetta krevst løgtingssamtykt. Samtykkir løgtingið ikki nýval, meti eg, at tingið hevur rætt til at velja landsstýri av nýggjum. Summir løgfroðingar meta tó, at eitt landsstýri bert kann fara frá eftir nýval.

Men tað er vert at gera sær greitt, at fyri tað um javnaðarflokkurin sigur samstarvið við fólkaflokkin upp og yniskir eitt nýtt landsstýri skipað, so skal sitandi landsstýri virka, ikki bert sum eitt sokallað forrætningsministerium, men á øllum økjum, har tað er valt til at virka.

Landsstýrið vil tí ikki útskjóta mál sum t.d. hjálp til fiskivinnuna, meðan bíðað verður eftir einum nýggjum landsstýri.

Eg vil enda við at undirstrika, at samarbeiðið millum fólkaflokkin og javnaðarflokkin er slitið.

Javnaðarflokkurin fer tí at leggja uppskot fram um nýval, men vil meta, at løg-

tingið áðrenn eigur at viðgera og samtykkja slikar fyribils hjálparveitingar til fiskiskipaflotan, at hesar fáa gildi í seinasta lagi 10. august í ár.

Kann flotin soleiðis ótarnaður halda fram, eru líkindir og stundir til politisku uppgerðina og viðgerðina av uppskoti okkara um val.

Eg ynski tinginum og tingmonnum eydnu til at taka tær fyri fólk og land skilabestu avgerðir í hesum málum.

Sí SKJAL. 2.

1. Studningur til veiðu av jákupsskel

Ár 1979, hósdagin 2. august legði Heðin M. Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

logtingslóg um studning til veiðu av jákupsskel.

§ *1.* Í tíðarskeiðinum 1. september 1979 til 31. mars 1980 verður latið í studningi til veiðu av jákupsskel 20 oyru fyri hvort kilo landað í Føroyum at býta millum manning og skip á sama hátt, sum veiða annars verður býtt.
2. stk. Studningurin verður latin úr Lonjavningargrunni Skipsfiskimanna.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om tilskud til fiskeri af kammusling.

§ *1.* I tidsrummet 1. september 1979 til 31. marts 1980 ydes i tilskud til fiskeri af kammusling 20 øre for hvert kilo landet på Færøerne at fordele mellem mandskab og skib på samme måde som fangst iøvrigt bliver fordelt.
Stk. 2. Tilskuddet ydes af Lønjavningsgrunnur Skipsfiskimanna.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Eftir logtingslóg nr. 27 frá 1. juni 1978 var heimild í tíðarskeiðinum 1. september 1978 til 31. mars 1979 at lata í studningi til veiðu av jákupsskel 20 oyru/kg avreidd í Føroyum. Studningurin varð býttur millum manning og skip á sama hátt, sum veiða annars verður býtt.

Umsóknir liggja fyri um at endurnýggja studningsskipanina.

Veiðutal:	1. sept. 1977 til 31. mars 1978	=	580 tons
	1. sept. 1978 til 31. mars 1979	=	910 tons

1. viðgerð 8. august. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 31. august legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 2. august 1979 og undir 1. viðgerð 8. august beint í fíggjarnevndina.

Ein samd fíggjarnevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins, sum er ein endurnýggjan av vanligu lóggávuni um stoðning til veiðu av jákupsskel.

2. og 3. viðgerð 31. august. Uppskotið samtykt við 28—0 atkvøðum.

F.I., j.nr. 1501-16-6. Lóg nr. 78 frá 21. september 1979.

---

2. Minstiprísur á fiski

Ár 1979, mikudagin 8. august legði Adolf V. Hansen vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar.

Alagt verður landsstýrinum at fyriskipa, at minstuprísirnir á fiski verða settir, soleiðis at vinnan kann hvila í sær sjálvum uttan stuðningsveitingar til manningar og før. Prisirnir skulu pristalsviðgerast.

Viðmerkingar:

Í seinastu tingsetu setti fiskivinnuflokkurin fram uppskot um at hækka fiskaprisirnar á ráfiski. Hetta uppskot fall, men síðan er staða fiskiflotans, eisini tann partur, sum ikki veiðir feskfisk, versnað munandi. So flokt politisku viðurskifti okkara eru í lotuni, er bráðneyðugt at fara til verka fyri at greiða tey floktu viðurskifti, vinnan arbeiðir undir.

1. viðgerð 10. august, málið beint í fíggjarnevndina, sum 21. november legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið var lagt fram av Foroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 8. august 1979 og undir 1. viðgerð tann 10. august 1979 beint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskotinum til samtyktar verður landsstýrinum álagt at fyriskipa, at minstuprísirnir á fiski verða settir soleiðis, at vinnan kann hvíla í sær sjálvum uttan studningsveitingar til manningar og for. Prísirnir skulu prístalsviðgerast.

Fíggjarnevndin er samd um at mæla tinginum til, at málið verður sent landsstýrinum og verður víst til neyðuga endurskoðan av studulslógum til fiskivinnuna, tá bráðfengis studulslóggáva til fiskivinnuna fer úr gildi tann 31. januar 1980.

2. viðgerð 29. november. Samtykt varð við 24—0 atkvøðum at senda landsstýrinum málið.

F.L.j.nr. 1501-16-). Lóg nr. 78 frá 21. september 1979.

---

3. Søluskylda

Ár 1979, mikudagin 8. august legði Adolf V. Hansen vegna Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t
til

løgtingslóg um soluskyldu.

§ *1.* Framleiðarar av útflutningsvørum hava skyldu at selja upp til 30% av framleiðsluni til hægstbjóðandi.

§ *2.* Útflutningsloyvi verður bert givið um eingin fráboðan er komin til fiskivinnuskrivstovuna um hægri prísir.

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

løgtingslov om salgspligt.

§ *1.* Fremstillere af eksportprodukter har pligt til at sælge op til 30% af produktionen til højstbydende.

§ *2.* Udførselstilladelse bliver kun meddelt, såfremt ingen meddelelse er kommet til fiskerikontoret om højere priser.

§ *3.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Av tí at flest allir framleiðarar eru knýttir at ávisari útflutningsfyritoku, og eru undir skyldu at selja alla framleiðslu sína gjognum hesa fyritoku, hevur landið milliónta p orsakað av manglandi kapping um at fáa hægsta pris.

1. viðgerð 10. august. Málið beint í fíggjarnevndina, sum 21. november legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið var lagt fram av Foroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 8. august 1979 og undir 1. viðgerð tann 10. august 1979 beint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskotinum skulu framleiðarar av útflutningsvørum hava skyldu at selja upp til 30% av framleiðsluni til hægstbjóðandi, og skal útflutningsloyvi bert verða givið, um eingin fráboðan er komin til fiskivinnustovuna um hægri prísir.

Í viðmerkingunum verður sagt, at torvandi kapping í søluliðunum gevur landinum stór tap.

Fíggjarnevndin er samd um at mæla tinginum til, at málið verður sent landsstýrinum, og verður víst til neyðuga endurskoðan av stuðulslógum til fiskivinnuna, tá bráðfengis stuðulslógin til fiskivinnuna fer úr gildi tann 31. januar 1980.

2. viðgerð 28. november 1979. Uppskotið frá samdari fíggjarnevnd um at senda landsstýrinum málið varð samtykt við 22—1 atkvøðum.

4. Broyting í minstulønini

Ár 1979, fríggjadagin 10. august legði Adolf V. Hansen vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til
samtykkt,

Landsstýrinum verður álagt at koma við lógarbroytingum til lógir um minstulon og minstaforvinningi soleiðis at

mynstraðir fiskimenn fáa ein mánaða minstulon fyri hvorjar 20 dagar teir eru mynstraðir,

og at

útróðrarmenn fáa 1 mánaða minstulon fyri hvorjar 12 útróðrardagar.

Viðmerkingar:

Soleiðis sum mynstrið í okkara samfelag er útviklað seinastu árini verður tryggjað flestu fólkum á landi eina mánaðarløn fyri hvorjar ca 170 tímar og færri, tey eru heimanifrá.

Við skipi verður arbeitt hvonn dag, og er tískil ein arbeiðsmánaði við trolara, har gingið verður 6 og 6, ca 360 tímar og við línuskipi, har egnt verður umborð, umleið 450 til 480 arbeiðstímar.

So sum lonartryggleikin er vorðin á landi mótvegis lonartryggleika fiski- og útróðrarmanna, er tað ein sjálvfylgja, at ein og hvor at sær komin ger alt fyri at umgangast at fara til fiskiskap.

Havast má í huga, at enn er neyðugt við nógvum og góðum fiski- og útróðrarmonnum um samfelagshjólið framhaldandi skal haldast gangandi.

Tað er skylda tingsins at bera so í bandi, at fiski- og útróðrarmenn, ikki bert stoðast í vinnuni, men at eisini ein passandi tilgongd verður hvørt ár. Um henda tilgongd kemur í bylgjum, so er vandi fyri at hetta ávirkar tilgongdina av rávoru til virkini á ein ikki heldigan hátt.

1. viðgerð 21. august. Málið var beint í fíggjarnevndina, sum 21. november legði fram soljóðandi

Álit

Málið var lagt fram av Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 10. august 1979 og undir 1. viðgerð tann 21. august 1979 beint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskotinum til samtyktar verður álagt landsstýrinum at koma við lógarbroytingum til lógir um minstulon og minstaforvinningi solciðis at mynstraðir fiskimenn fáa ein mánaða minstulon fyri hvorjar 20 dagar, teir eru mynstraðir og at útróðrarmenn fáa 1 mánaða minstulon fyri hvorjar 12 útróðrardagar.

Í viðmerkingunum verður tilskilað, at spurningurin er ikki bert um lonartryggleiku, men eisini um tilgongd av fólki til vinnuna.

Í fyriliggjandi uppskoti eru nýggir tankar.

Fíggjarnevndin er samd um at mæla tinginum til, at málið verður sent landsstýrinum at viðgera í tilknýti til tey mál, ið skulu viðgerast í samband við, at galdandi bráðfengis stuðulsskipan til fiskivinnuna fer úr gildi 31. januar 1980.

2. viðgerð 29. november. Samtykt varð við 24—0 atkvoðum at beina málið til landsstýrið.

---

5. Skatting av útlendskum fyritøkum og persónum

Ár 1979, fríggjadagin 10. august legði Adolf V. Hansen vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum í hesu tingsetu at leggja fyri tingið uppskot um lóg / broytingar í lóg um at allar útlendskar fyritokur og persónar sum handla ella átaka sørarbeiðir, tó undantikið vanliga lontaking,

1) skulu gjalda skatt sum føroyskar fyritokur og persónar,
2) skulu gjalda 10% avgift av ollum umsetninginum og
3) skulu gjalda 50% avgift til landskassan av tí vinningi fluttur verður av landinum.

Viðmerkingar:

Nú í fleiri ár hava útlendskar fyritøkur og persónar kappast við føroyskan handil og ídnað.

Henda kapping hevur fort við sær at føroyski handilin og ídnaðurin ikki er verðin so týðandi táttur í føroyska samfelagnum sum rímiligt og neyðugt er í hesum broytingartíðum. Hetta kundi verið eitt alternativ til langfaraveiðuflotan so hvørt hesia ikki sleppur at virka frítt.

Hartil kemur at stórir partar av føroyska kapitalinum verður fluttur av landinum.

1. viðgerð 21. august. Málið beint í skattanevndina, sum 24. apríl legði fram soljóðandi

A l i t

Framburðs- og Fiskivinnuflokkurin legði hetta mál fyri tingið 10. august 1979, og við 1. viðgerð 21. august varð tað beint í skattanevndina.

Eftir uppskotinum verður álagt landsstýrinum at leggja uppskot fyri tingið um at broyta skattalógina, so at allar útlendskar fyritøkur, sum handla ella átaka sær arbeiði her á landi

1) skulu gjalda skatt sum føroyskar fyritøkur og persónar,
2) skulu gjalda 10% avgjald av øllum umsetninginum, og
3) skulu gjalda 50% avgjald til landskassan av tí vinningi, sum verður fluttur av landinum.

Skattanevndin hevur havt fund við stjórran á líkningarráðnum, sum hevur greitt nevndini frá galdandi skipan.

Til pkt. 1 er at siga, at í § 15 í galdandi skattalóg eru reglur, sum áseta, at fyritøkur og persónar, sum eru útlendsk, men reka ella taka lut í vinnu her, koma undir avmarkaða skattskyldu, t.v.s. at tey verða eins og føroyskar fyritøkur og persónar skattað av tí vinningi, sum virki teirra gevur her á landi. Hetta sama er galdandi fyri inntøku, sum útlendingar fáa av at vera stjórnar- og nevndarlimir í fyritøkum í Føroyum, og fyri inntøku, sum útlendingar hava av fastum ognum her.

Í teimum skattaavtalum, sum eru millum Føroyar og onnur lond, eru gjøllari reglur, sum áseta, at hesar fyritøkur og persónar ikki bera dupultan skatt. Hesar skattaavtalur miða ímóti, at útlendskar fyritøkur og persónar, sum reka vinnu í Føroyum, skulu fáa somu skattliga viðgerð her á landi, sum føroyskar fyritøkur, ið reka vinnu aðrastaðni, fáa í hesum londum.

Hetta, sum greitt er frá omanfyri, vísir, at tilmælið í pkt. 1 í uppskoti Framburðs- og Fiskivinnufloksins, er longu tikið við í núgaldandi skattalóg.

Pkt. 2 og 3 í uppskotinum miðja ímóti at áleggja eitt umsetningsgjald á útlendskar fyritøkur og persónar, sum reka vinnu í Føroyum. Hetta stríðir ímóti prinsippinum

um javnstøðu fyri virki í fríari kapping. Somuleiðis stríðir hetta imóti endamálinum við teimum skattaavtalum, Føroyar hava við onnur lond.

Út frá tí, sum er fört fram omanfyri, kann skattanevndin ikki taka undir við uppskotinum frá Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum.

2. viðgerð 28. apríl 1980. Uppskotið fall við 3—0 atkvøðum.

---

6. Tíðaravmarkaður eykastudningur til fiskivinnuna

Ár 1979, týsdagin 21. august legði Heðin M. Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um tíðaravmarkaðan eykastudning til fiskivinnuna.

§ *1.* At lækka um prísin á brenniolju til føroysk deksfiskifør í fiskiveiðu verða úr landskassanum latin 42 oyru í studningi fyri hvønn litur brenniolju. Hækkar prísurin á brenniolju seinri í árinum, er landsstýrinum heimilað at hækka studningin við upp til 10 oyru fyri hvønn liturin.

2. stk. Fær skip brenniolju fyri lægri pris enn 130,0 oyru liturin, lækkar studningurin við 1 oyra fyri hvørt oyra, prísurin á brenniolju er niðanfyri 130,0 oyru liturin.

3. stk. Studningsskipanin verður um-

lagtingslov om tidsbegrænset ekstratilskud til fiskerierhvervet.

§ *1.* Til nedbringelse af prisen på brændselsolie til færøske fiskerskibe i fiskeri ydes af landskassen 42 øre i tilskud for hver liter brændselsolie. Stiger prisen på brændselsolie senere på året, bemyndiges landsstyret til at forhøje tilskudet med indtil 10 øre for hver liter.

Stk. 2. Såfremt et skib får brændselsolie til en lavere pris end 130,0 øre pr. liter, formindskes tilskudet med 1 øre for hver øre, prisen for brændselsolie er under 130,0 øre pr. liter.

Stk. 3. Tilskudsordningen administre-

sitio av Lonjavningargrunni Skipsfiskimanna. Fyri olju keypta í Føroyum verður studningurin avroknaður beinleiðis til oljufelogini.

§ 2. Játtaðar verða Ráfiskagrunninum í eykastudningi úr landskassanum so mikið, at grunnurin til skip og manning rindar 15 oyru fyri hvort kg av øllum feskfiski landaður í Føroyum frá føroyskum fiskiskipum. Treyt fyri studninginum er, at fiskurin er blóðgaður og fyrsta floks vøra.

§ 3. Í rakstrarstudningi til føroysk deksfiskifartoy verða úr landskassanum latin 5 oyru fyri hvort kg av øllum feskum fiski landaður í Føroyum frá føroyskum fiskiskipi. Treyt fyri studninginum er, at fiskurin er blóðgaður og fyrsta floks vøra.

2. stk. Lonjavningargrunnur Skipsfiskimanna fyrisitur studningsskipanina.

§ 4. Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 37 frá 1. juni 1979 um agnstudning verða úr landskassanum latin í eyka agnstudningi 50 oyru fyri hvort kg. av agni.

2. stk. Lonjavningargrunnur Skipsfiskimanna fyrisitur studningsskipanina.

§ 5. § 2, 1. stk. í løgtingslóg nr. 14 frá 5. mai 1975 um studning til veiðu av ídnaðarfiski broytt við løgtingslóg nr. 39 frá 6. mai 1976 fær hesa orðing fyri tíðarskeiðið 15. august 1979 til 31. januar 1980:

«Tá ið fiskur verður landaður í Føroyum til ídnað til 33 oyru fyri kg í avreiðingarprísi, verður latið í studningi 12 oyru fyri kg. Studningurin lækkar við ¾ oyra fyri hvort oyra, avreiðingarprísurin er hægri enn 35 oyru fyri kg.»

§ 6. Henda lóg hevur gildi fyri tíðarskeiðið 15. august 1979 til 31. januar 1980. Løgtingslóg nr. 28 frá 1. juni 1978 um brennioljustudning til fiskiskip sum broytt við løgtingslóg nr. 36. frá 1. juni 1979 er farin úr gildi frá 15. august 1979.

res af Lonjavningargrunni Skipsfiskimanna. For olie, der er indkøbt på Færøerne, afregnes brændselstilskudet direkte til olieselskaberne.

§ 2. Der bevilges Ráfiskagrunninum i ekstra tilskud fra landskassen så meget, at fonden kan betale til skib og mandskab 15 øre for hvert kg af al frisk fisk landet på Færøerne af færøske fiskerfartøjer. Det er en betingelse for tilskudet, at fisken er strubeskåren og af første sortering.

§ 3. I driftstilskud til færøske dækksfiskefartøjer ydes der af landskassen 5 øre for hvert kg. af al frisk fisk landet på Færøerne af færøske fiskerfartøjer. Det er en betingelse for tilskudet, at fisken er strubeskåren og af første kvalitet.

Stk. 2. Lonjavningargrunnur Skipsfiskimanna administrerer tilskudsordningen.

§ 4. Efter reglerne i lagtingslov nr. 37 af 1. juni 1979 om agntilskud ydes der af landskassen i ekstra agntilskud 50 øre for hvert kg. agn.

Stk. 2. Lonjavningargrunnur Skipsfiskimanna administrerer tilskudsordningen.

§ 5. § 2, stk. 1 i lagtingslov nr. 14 af 5. maj 1975 om tilskud til fangst af industrifisk ændret ved lagtingslov nr. 39 af 6. maj 1976 får følgende formulering for tidsrummet 15. august 1979 til 31. januar 1980:

«Ved landing på Færøerne af fisk til industri til en indhandlingspris på 33 øre pr. kg ydes i tilskud 12 øre pr. kg. Tilskudet formindskes med ¾ øre pr. kg for hver øre, indhandlingsprisen er højere end 35 øre pr. kg.»

§ 6. Denne lov har gyldighed for tidsrummet 15. august 1979 til 31. januar 1980. Lagtingslov nr. 28 af 1. juni 1978 om brændselsolietilskud til fiskerskibe, som ændret ved lagtingslov nr. 36 af 1. juni 1979, er trådt ud af kraft 15. august 1979.

Viðmerkingar:

Tá ið løgtingsmálið um hækkan av brennioljustudninginum var til viðgerðar í løgtinginum í vár, segði landsstýrið í viðmerkingum til lógaruppskotið, at ymist kundi bent á, at løgtingið og landsstýrið seinri í hesum ár framhaldandi fóru at viðgera ein studningsform til veiðuflotan. Hetta varð sagt út frá teirri ásannan, at teir politisku myndugleikarnir ikki tá kundu sigu, hvussu veiðuumstoðurnar og serstakliga útreiðslusíðan hjá okkara veiðuflota fór at taka seg út í hesum árinum og upp aftur minni longur fram. Her var partvís hugsað um broyttar oljuútreiðslur, um aðrar útreiðsluhækkingar, um prisútvikling og um broytta fiskiveiðu.

Landsstýrið metir seg nú betur fort fyri at ætla um hesi viðurskifti yvir stytri tíðarskeið, og leggur hervið fleirtáttað studulsuppskot fyri løgtingið. Hesi uppskot verða oll at galda í tíðarskeiðinum 15. august 1979 til 31. januar 1980.

Uppskotini eru hesi:

1. Brennioljustudningurin til oll føroysk veiðufor verður ásettur til 42 oyru liturin. Harumframt fær landsstýrið heimild til at hækka studningin eftir 1. november 1979 við upp til 10 oyrum liturin, um vøksturin í oljuútreiðslunum heldur fram.

Kann føroyskt fiskifar útvega sær olju fyri hægri pris enn kr. 1,30 liturin, lækkar studningurin við 1 oyra fyri hvørt oyra, prísurin á brennuolju er niðanfyri kr. 1,30 fyri liturin.

Ein útrokning av oljuprishækkanini hjá føroyskum veiðuforum fyri alt árið 1979 út frá verandi hækking og við innkalkuleraðum nýggjum hækkingum restina av árinum — og við frádragnum studningi fyri tað, sum farið er av hesum ári — vísir eina útreiðsluhækking í oljuprísinum pr. litur uppá 30 oyru ella 40%. Tá verður roknað við einum oljuprísi um ársskiftið upp á 162,5 oyru liturin. Útreiðslurnar til hækkan av brennioljustudninginum í tíðarskeiðinum 15. august 1979 til 31. januar 1980 verða mettar til umleið 8,5 milj. kr.

2. Avreiðingarprísurin á øllum botnfiski, sum í feskum líki verður avreiddur í Føroyum av føroyskum veiðuforum verður í nevnda tíðarskeiði hækkaður við 15 oyru/kg aftrat tí avreiðingarprísi, sum Ráfiskagrunnurin annars ásetur. Hendan hækking í fiskaprísinum upp á 15 oyru/kg verður mett at kosta knappliga 7 milj. kr.

3. Í vár varð samtykt í løgtinginum at læta í agnstudningi 1 kr. fyri hvørt kg, og varð serlig lóggáva gjørd í hesum sambandi. Landsstýrið skjýtur hervið upp at hækka agnstudningin í nevnda tíðarskeiði við 50 oyrum aftrat upp í kr. 1,50 fyri hvørt kg. av agni. Útreiðslurnar til hækking í agnstudninginum verða mettar til 1,5—2 milj. kr.

4. Botnmarkið fyri studningsveiting til avreiðingarprísin á ídnaðarfiski, sum landaður verður í Føroyum, verður hækkað úr 23 oyrum upp í 33 oyru kg. Er avreiðingarprísurin minni enn 33 oyru, verður eingin studningur latin. Tá ið prísurin er 33 oyru, verður studningurin 12 oyru/kg lækkandi við ¾ oyru fyri hvørt oyra, sum prísurin hækkar upp um 35 oyru. Núgaldandi lóggáva er tann, at er avreiðingarprísurin 23 oyru, verða 10 oyru latin í studningi, lækkandi við 1 oyra fyri hvørji 1½ oyra, sum prísurin er omanfyri 25 oyru. Hetta botnmark upp á 33 oyru kann endurskoðast í tíðarskeiðinum.

Tað er ilt at ætla um, hvussu nikið av ídnaðarfiski verður landaður í Føroyum frá 15. august í ár til 31. januar komandi, men henda umlegging í prísstudningsskipanini á ídnaðarfiski kann í nevnda tíðarskeiði leysliga metast at kosta 1,5 milj. kr.

5. Latið verður í rakstrarstudningi til fiskiskip, sum avreiða botnfisk í feskum líki í Føroyum, 5 oyru pr. kg. Rakstrarstudningurin er avmarkaður til tíðarskeiðið 15. august 1979 til 31. januar 1980 og verður mettur at kosta landskassanum stívliga 1,5 milj. kr.

Viðvíkjandi nótaskipum serstakliga er tað at siga, at landsstýrið fer at setra seg í samband við nøkur teirra og við Havsbrún í Fuglafirði fyri at kanna møguleikarnar at fáa flutt heim til Føroya nakað av tí lodnu eystanfyri, sum føroyingum er tillutað í Barentshavinum og í hesum sambandi fáa í lag eina fíggjarskipan, soleiðis at hetta kann lata seg gera.

Tey bráðfongis lógaruppskot, sum landsstýrið hervið leggur fyri løgtingið, hava til endamáls at halda veiðuflota okkara í vinnu, men tað er landsstýrinum púra greitt, at tað við tí kostnað fyri landskassan, sum her er talan um, fer framyvir illa at bera til uttan munandi almenna inntøkuhækking.

Tað er tí av alstórum týdningi, at bæði teir politisku myndugleikarnir og vinnan sjálv gera neyðugar kanningar viðvíkjandi veiðu- og rakstrarmøguleikum fyri veiðuflotan yvirhøvur við tí fyri eyga at fáa fiskiskiparakturin í eina betri legu uttan alt ov stór krøv til landskassans orku, og soleiðis, at tað verður størst møguligt samsvar millum uppbygging veiðuflotans og teir veiðumøguleikar, sum eru til staðar.

Landsstýrið miðar ímóti at hava uppskot hesum viðvíkjandi greið at leggja fyri løgtingið innan 1. februar komandi.

I. viðgerð 22. august, frávik í tíðarfreistini varð givið.

Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 23. august legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið var lagt fram av landsstýrinum 22. august 1979 og undir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið fleirtáttað stuðulsuppskot til fiskivinnuna.

Ætlanin er, at reglurnar skulu galda í tíðarskeiðinum 15. august 1979 til 31. januar 1980.

Talan er um

1. Hækkaðut brennioljustudningur til øll føroysk veiðufor.
2. Hækking av avreiðingarprísinum á øllum botnfiski, sum í feskum líki verður avreiddur í Føroyum av føroyskum veiðuførum.
3. Eykastudningur,
4. Hækking av botnmarki fyri studningsveiting til avreiðingarprísin á iðnaðarfiski, ið landaður verður í Føroyum,
5. Í rakstrarstudningi til føroysk deksfiskifor verða latin úr landskassanum 5 oyru fyri hvørt kg av øllum feskum fiski landaður í Føroyum av føroyskum fiskiskipum.

Landsstýrið tilskilar í viðmerkingum sínum, at fyriliggjandi uppskot hava til endamáls at halda veiðuflota okkara í vinnu.

Undir viðgerðini í løgtinginum vóru eisini spurningarnir um studning til opnar bátar og saltfiskastudningurin frammi. Í figgjarnevndarviðgerðini vórðu hesir tættir eisini við, og hevur figgjarnevndin fingið upplýst, at landsstýrið fer at leggja fram lógaruppskot viðvíkjandi saltfiskastudninginum.

Viðvíkjandi teimum opnu bátunum er meirilutin í figgjarnevndini av teirri áskoðan, at studningurin sambært løgtingslóg nr. 28 frá 2. mai 1975 við seinni broytingum eigur at hækkast við 5 oyrum upp til 10 oyru.

Meirilutin (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Sverre Midjord og Jógvan Durhuus) tekur undir við uppskoti landsstýrisins. Vísandi til omanfyristandandi viðmerkingar um studning til opnar bátar — kompensatión fyri oljustudning hjá deksfiskiførum — setur nevndi meirilutí fram soljóðandi broytingaruppskot til § 1 í løgtingslóg nr. 28 frá 21. mai 1975 um broyting í løgtingslóg um minstulon og annan stuðul til fiskivinnuna:

Broytingaruppskot
til

§ 1 í logtingslóg nr. 28 frá 21. mai 1975 um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.	§ 1 i lagtingslov nr. 28 af 21. maj 1975 om ændring i lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.
§ 1, punkt 3, b verður orðað soleiðis: «Opnir bátar 10 oyru fyri kilo.»	§ 1, punkt 3, b formuleres således: «Åbne både 10 øre pr. kg.»

Minnilutin (Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen úr Sambandsflokkinum og Asbjørn

Joensen úr Sjálvstýrisflokkinum) vísir til tær viðmerkingar, sum vórðu fordar fram undir 1. viðgerð av málinum í logtinginum. Í figgjarnevndini hevur minnilutin biðið um fund við Felagið Trolskip, sum alment hevur sagt frá, at tantu av landsstýrinum framlagda loysn ikki loysir trupulleikarnar hjá vinnuni. Meirilutin í figgjarnevndini sýtti fyri at hava fund við Felagið Trolskip. Síðani bað minnilutin um at fáa til vega teir ársroknskapir fyri skipini, sum Foroya landsstýri hevur til taks. Hetta var eisini sýtt av meirilutanum.

Tá málið hevur ligið so stutt frammi, og tá umstoðurnar annars fyri at viðgera málini eru so vánaligar, sær minnilutin seg ikki foran fyri at gera eitt grundleggjandi nýtt uppskot til loysn av umroddu spurningum. Minnilutin skjýtur upp at broyta uppskot landsstýrisins um rakstrarstudning uppá 5 oyru pr. kg til 10 oyru pr. kg. Herumframmt verður latin eykarukstrarstudningur uppá 10 oyru pr. kg til teir trolarar, sum ikki fáa lut í foroyskum feskfiskakvotum í fremmandum sjógvi og sum ikki fáa loyvi til at trola innan fyri 12 fjórðingar í Foroyum.

Í staðin fyri uppskotið um eykastudning til Ráfiskagrunnin verður skotið upp at veita manningini 8 oyru fyri hvørt kg av øllum feskfiski, landaður í Foroyum frá foroyskum fiskiskipi. Hesi 8 oyru verða útgoldin saman við feskfiskastudningi til manningina uppá ávikavist 10 og 18 oyru og koma ikki undir reglurnar um lækking.

Minnilutin skjýtur upp, at agnastudningur verður hækkaður við 125 oyru pr. kg, í staðin fyri 50 oyru.

Eisini skjýtur minnilutin upp, at studningurin til ídnaðarfisk verður uppá 18 oyru í staðin fyri 12 oyru.

Minnilutin hevur ikki havi moguleika fyri at viðgera uppskot landsstýrisins til inntøkulógir. Undir 1. viðgerð vísti minnilutin á teir skeivleikar, sum eru til stedar, og minnilutin mótmælti, at eykatollur aftur nú verður lagdur á innfluttar rávørur til føroyskan ídnað.

Í tann mun broytingaruppskot minnilutans verða samtykt á logtingi, fer minnilutin beinanvegin at leggja fram lógaruppskot um sparing og meirainntøkur samsvarandi hesum.

Samsvarandi hesum setur minnilutin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

§ 2 verður orðað soleiðis:

«Til manningina verður latin studningur uppá 8 oyru fyri hvørt kg av øllum feskum fiski landaður í Foroyum frá foroyskum fiskiskipi.»

Í § 3 verður «5 oyru» broytt til «10 oyru». Aftarat 1. stk. í § 3 verður sett: «Fyri teir trolarar, sum ikki fáa lut í foroyskum feskfiskakvotum í fremmandum sjógvi og sum ikki sleppa at

§ 2 formuleres således:

«Til mandskabet ydes et tilskud på 8 øre for hvert kg af al fersk fisk, der er landet på Færøerne af færøske fiskerskibe.»

I § 3 ændres «5 øre» til «10 øre». Til 1. stk. i § 3 tilføjes: «Til de trawlere, som ikke får andel i færøske ferskfiskekvoter på fremmed søterritorium, og som ikke får tilladelse til at fiske inden-

trola innan fyri 12 fjórðingar úr Føroyum er rakstrarstuðningurin 20 oyru.»

for 12 somil fra Færøerne er driftstilskuddet 20 øre.»

I § 4 verður «50 oyru» broytt til «1,25 kr.».

I § 4 ændres «50 øre» til «kr. 1,25».

I § 5 verða «12 oyru» broytt til «18 oyru».

I § 5 ændres «12 øre» til «18 øre».

23. august var málið beint í fíggjarnevndina eftir uppskoti frá formanninum.

Fíggjarnevndin legði sama dag fram soljóðandi

Iskoyti til álit

Ein samd fíggjarnevnd heitir á landsstýrið um at skunda undir verandi samráðingar við lángevarar til føroysk fiskiskip, um at fallin gjald verða útsett og lánini um møguligt longd.

Ein samd fíggjarnevnd setur fram soljóðandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

Sum stk 4 í § 1 í uppskoti landsstýrisins verður sett:

«Opnir bátar 5 oyru fyri kg, at rinda eftir reglunum í § 1, punkt 3b, løgtingslóg nr. 28 frá 21. mai 1975 um broyting í løgtingslóg um minstulon og annan stuðul til fiskivinnuna við seinni broytingum.»

23. august 2. viðgerð. Framlagt varð broytingaruppskot frá Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum soljóðandi:

Broytingaruppskot

§ 1 verður orðað soleiðis:

«Núgaldandi prísir á ráfiski landaður í Føroyum verður hækkaður við 1 kr. pr. kg.»

§ 1 formuleres således:

«De nugældende priser for rafisk, der landes på Færøerne forhøjes med 1 kr. pr. kg.»

§ 2 verður orðað soleiðis:

«Avreiðingarprísirnir á iðnaðarfiski landaður í Føroyum verður settur til 60 oyru pr. kg.»

§ 2 formuleres således:

«Indhandlingspriserne for industrifisk, der er landet på Færøerne, fastsættes til 60 øre/kg.»

§ 3 verður orðað soleiðis:

«Prísurin á saltfiski og flaki landað í

§ 3 formuleres således:

«Priserne på saltfisk og filet, landet på

Foroyum verður hækkaður ávikavist 2 og 3 kr. pr. kg.»

§ 4 verður orðað soleiðis:

«Prisirnir á øllum øðrum fiski landaður í Foroyum verður hækkaður við 25%.»

§ 5 verður orðað soleiðis:

«Peningurin verður goldin úr landskassanum, og umsitin av Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.»

Sum nýtt stk. 2 í § 6 verður sett:

«Allar lógir um studning til fiskiflotan fella burtur í sama tíðarskeiði.»

Færøerne forhøjes med henholdsvis 2 og 3 kr. pr. kg.»

§ 4 formuleres således:

«Priserne for samtlige andre fiskesorter, der landes på Færøerne, forhøjes med 25%».

§ 5 formuleres således:

«Beløbene erlægges af landskassen, og administreres af Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.»

Som nyt stk. 2 i § 6 tilføjes:

«Alle love vedrørende tilskud til fiskeriet bortfalder i samme tidsrum.»

Atkvøðugreiðslan varð hendan:

Broytingaruppskot frá samdari figgjarnevnd til § 1, 4. stk. 3 b samtykt við 29—0, soleiðis broytt samtykt við 27—0.

Broytingaruppskot frá minnilutanum (Paula Ellefsen, Ivan Johannesen og Asbjørn Joensen) til § 2 fall við 9—0.

§ 2 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 25—0 atkvøðum.

§ 3 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 27—0. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Paula Ellefsen, Ivan Johannesen og Asbjørn Joensen til § 3 fall við 7—0 atkv.

§ 4 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 27—0 atkvøðum. Broytingaruppskot til § 4 frá omanfyrinevnda minniluta fall við 7—0 atkvøðum.

§ 5 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 27—0 atkvøðum. Broytingaruppskot frá omanfyri nevnda minniluta fall við 9—0 atkv.

§ 6 samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Málið soleiðis broytt samtykt við 27—0 atkvøðum at fara til 3. viðgerð.

23. august 3. viðgerð. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 27—0 atkvøðum.

F.L.j.nr.1539-3. Lóg nr. 72 frá 24. august 1979.

7. Broyting í innflutningsgjøldum

Ár 1979, mikudagin 22. august legði Dethmus Hentze, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjald.

§ *1.* Í § 1 í løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 verður «2%» broytt til «4%».

§ *2.* Í § 2 verður sett aftaná prentpappír: «agn, fiskur, ið avreiddur verður frá fremmandum skipum, fiskur, sum innfluttur verður til virkingar ella fiskur, ið er keyptur og innfluttur á føroyskum skipum.»

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin, tó fær landsstýrið heimild at geva undantaksloyvi viðvikjandi uppkrevjingini ta fyrstu vikuna, har serlig viðurskifti gera seg galdandi.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om ekstraindførselsafgift.

§ *1.* I § 1 ændres «2%» til «4%».

§ *2.* I § 2 indsættes efter trykkeripapir: «agn, fisk, der indhandles fra fremmede skibe, fisk, der importeres til tilvirkning eller fisk, der er indkøbt og importeret med færøske skibe.»

§ *3.* Denne lov træder i kraft straks, dog bemyndiges landsstyret til vedrørende opkrævningen den første uge at meddele dispensation.

Viðmerkingar:

Landsstýrið vísir til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 6/1979: Tíðaravmarkaður eykastudningur til fiskivinnuna, har serstakliga útreiðslusíðan viðvikjandi stoðuni hjá fiskivinnuni er lýst.

Til tess at útvega tí almenna tær neyðugu inntøkur, ið kostnaðurin í sambandi við løgtingsmál nr. 6/1979 krevur, leggur landsstýrið fram frammanfyri standandi uppskot til hækking av eykainnflutningsgjaldinum upp til 4%, og verður mett at henda hækking fer at geva landskassanum eina meirinntøku uppá 16—17 milj. kr. árliga.

Frávik í tíðarfreistini til viðgerðina av hesum máli varð givin.

1. viðgerð 22. august, málið varð beint í figgjarnevndina, sum 23. august legði fram soljóðandi

Alit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 22. august 1979 og undir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið hevur skotið upp, at eykainnflutningsgjaldið uppá 2%, ið var ásett við løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 verður hækkað til 4%. Undantaksreglan í § 2 í nevndu lóg verður viðkað og fær landsstýrið heimild til at gera ávís undantok viðvíkjandi uppkrevjingini ta fyrstu viktuna.

Landsstýrið metir, at nevnda hækking fer at útvega landskassanum eina meirinntøku uppá 16—17 milj. kr., og verður peningurin at nýta í samband við útreiðslur, ið standast av løgtingsmáli nr. 6/1979: Tíðaravmarkaður eykastudningur til fiskivinnuna.

Ein meiriluti (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Sverre Midjord og Jógvan Durhuus) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Ein minniluti (Pauli Ellefsen, Ivan Johannesen og Asbjørn Joensen) vísir til viðmerkingar sínar í løgtingsmáli nr. 6/1979: Tíðaravmarkaður eykastudningur til fiskivinnuna.

2. og 3. viðgerð 23. august. Málið samtykt við 20—0 atkvøðum.

F.F., j.nr. 421-1-10. Lóg nr. 68 frá 24. august 1979.

8. Broyting í innflutningsgjøldum

Ár 1979, mikudagin 22. august legði Demmur Hentze, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broytingar í innflutningsgjøldum.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.m. við seinri broytingum verða avgjøldini av niðanfyri nevndu vørum broytt soleiðis:

27. *Vognar og onnur akfør, eisini vognsmiðverk.*
Bilar og motorhjólhestar, tiltaks- og leysalutir til teirra utan gummidekk, -ringar og -slangur.

27.01	Motorsúklur og scootarar	av virðinum	153%
27.02	Persónvognar.		
	Gjaldskyldug virði:		
	undir 5.250 kr.	5.250 kr.	
	5.250 — 9.999 kr.	av virðinum	118%
	10.000 — 14.999 kr.	11.800 kr. av 10.000 kr. + 143% av restini	
	yvir 15.000 kr.	18.950 kr. av 15.000 kr. + 158% av restini	
27.03	*Hýruvognur.*		
	Munurin millum persónvognstollin og hýruvognstollin verður endurrindaður úr landskassanum yvir eitt 2 ára skeið, eina ferð árliga. Hýruvognstollurin verður roknaður soleiðis:		
	Gjaldskyldugt virði:		
	undir 5.250 kr	5.250 kr.	
	yvir 5.250 kr.	5.250 kr. av 5.250 kr. + 43% av restini	

27.04	*Smábussar til 10 - 19 fólk*, forarin íroknaður.		
	Gjaldskyldugt virði:		
	Fyri stødd 10-11 persónar	av virðinum	43%
	Fyri stødd 12-13 persónar	av virðinum	33%
	Fyri stødd 14-15 persónar	av virðinum	23%
	Fyri stødd 16-17 persónar	av virðinum	13%
	Fyri stødd 18-19 persónar	av virðinum	8%
27.05	*Bussar til 20 ferðafólk ella fleiri*, forarin íroknaður		0
27.06	*Last- og vøruvognar.*		
	Gjaldskyldugt virði:		
	undir 15.000 kr.	5.250 kr.	
	15.000 - 39.999 kr.	5.250 kr av 15.000 + 13% av restini	
	40.000 - 74.999 kr.	8.500 kr. av kr.40.000 + 11% av restini	
	yvir 75.000 kr.	12.350 kr. av kr. 75.000 + 8% av restini	
27.07a.	Knallertir	av virðinum	53%
b.	Súklur	av virðinum	23%
27.08	Neyðsendarakfør og líkvognar		0
27.09	Avlamisakfør	av virðinum	18%
27.10	Dumpers o.t.	av virðinum	18%
27.11	Campingvognar, trailarar og aðrir viðfesti-vognar	av virðinum	23%
27.12	Aðrar vørur	av virðinum	23%

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om ændringer i indførselsafgifter.

§ *1.* I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter m.v. med senere ændringer ændres afgifterne af nedenstående varer således:

27. *Automobiler og andre befordringsmidler, også vognmagerarbejde.*
Automobiler og motorcykler, samt reservedele og tilbehør til sådanne, undtagen gummidæk, -ringe og -slanger.

27.01	Motorcykler og scootere			153%
27.02	Personvogne			
	Afgiftspligtig værdi			
	Under 5.250 kr.		5.250 kr.	
	5.250 - 9.999 kr.			118%
	10.000 - 14.999 kr.	11.800 kr. af 10.000 kr. + 143% av resten		
	over 15.000 kr.	18.950 kr. af 15.000 kr. + 158% af resten		

27.03 *Hyrevogne.*
Forskellen mellem personvognstolden refunderes af landskassen over en 2 årig periode een gang årlig. Hyrevognstolden beregnes således:

Afgiftspligtig værdi:		
under 5.250 kr.		5.250 kr.
over 5.250 kr.	5.250 kr. af 5.250 kr. + 43% af resten	

27.04 *Mindre busser til 10 - 19 personer,* føreren iberegnet.

Afgiftspligtig værdi:		
Størrelse 10 - 11 personer		43%
Størrelse 12 - 13 personer		33%
Størrelse 14 - 15 personer		23%
Størrelse 16 - 17 personer		13%
Størrelse 18 - 19 personer		8%

27.05 *Busser til 20 personer eller flere,* føreren iberegnet 0

27.06 *Last- og varevogne.*

Afgiftspligtig værdi:	
Under 15.000 kr.	5.250 kr.

15.000 - 39.999 kr.	5.250 kr.	af kr. 15.000
	+ 13%	af resten
40.000 - 74.999 kr.	8.500 kr.	af kr. 40.000
	+ 11%	af resten
over 75.000 kr.	12.350 kr.	af kr. 75.000
	+ 8%	af resten

27.07a. Knallerter	af værdien	53%
b. Cykler	af værdien	23%
27.08 Udrykningsfartøjer og rustvogne		0
27.09 Invalidekørestøjer	af værdien	18%
27.10 Dumpers o.l.	af værdien	18%
27.11 Campingvogne, trailere og andre påhængsvogne	af værdien	23%
27.12 Andre varer	af værdien	23%

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Vist verður til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 6/1979: Tíðaravmarkaður eykastudningur til fiskivinnuna. Viðmerkjast skal, at ætlaða inntokan av hesum uppskotinum verður umleið 2 milj. kr.

Frávik í tíðarfreistini verð givið til viðgerðina av hesum máli.

1. viðgerð 22. august. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 23. august legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 22. august 1979 og undir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið hevur skotið upp, at pkt. 27: Vognar og onnur akfor yvirhovur fær eina tollhækking uppá 3%. Tó verða nú undir punkt 27.11: Campingvognar o.a. tollaðir við 23% og bussar til 20 fólk og fleiri eru framvegis uttan punkttoll.

Landsstýrið vísir í viðmerkingum sínum til løgtingsmál nr. 6/1979: Tíðaravmarkaður eykastudningur til fiskivinnuna. Omanfyrinevnda tollhækking væntast at geva eina meirinntøku uppá 2 milj. kr. til landskassan.

Ein meiriluti (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Sverre Midjord og Jógvan Durhuus) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Ein minniluti (Pauli Ellefsen, Ivan Johannesen og Asbjørn Joensen) vísir til viðmerkingar sínar í løgtingsmáli nr. 6/1979: Tíðaravmarkaður eykastudningur til fiskivinnuna.

2. og 3. viðgerð 23. august samtykt við 20—0 atkvoðum.

F.L. j.nr. 403-6-28. Lóg nr. 69 frá 24. august 1979.

---

9. Gjøld av motorakførum

Ár 1979, mikudagin 22. august legði Demmus Hentze, landsstýrismaður fram sóljóðandi

	Fíggjarløgtingslóg 1978/79 Finanslagtingslov kr. (1.000)	Uppiskoytisjáttan 1978/79 Tilægsbevilling kr. (1.000)	Tilsamans Ialt kr. (1.000)
2040 Heilsumiðstøðir, í grunn	1.000	0.0	1.000.0
Sundhedscenter, henl. i fond			
2050 Læknar	285	11.7	296.7
Læger			
2060 Ljósmødur	285	142.3	427.3
Jordemødre			
2090 Ymiskar útreiðslur	281	+ 8.0	273.0
Diverse udgifter			
	36.681	4.124.6	40.805.6
§ 13 Samferðslumál			
Kommunikationsvæsen			
3900 Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúm og umsiting av vegum (viðm.)	40.000	13.902.1	53.902.1
Nye veje og broer, udvidelse af broer og vedligeholdelse af veje (anm.)			
3902 Havnagerð, í grunn	26.000	0.0	26.000.0
Havnebygning, henl. i fond			
3903 Lendingar, í grunn	12.500	0.0	12.500.0
Landingspladser, henl. i fond			
3904 Flogferðsla, í grunn.....	1.000	0.0	1.000.0
Flyvetrafik, henl. i fond			
3905 Strandfaraskip í grunn	1.000	0	1.000.0
Kystskibe, henlægges i fond			
3906 Berghols- og brúgvagerð, í grunn	8.000	0	8.000.0
Tunnel- og brobygning, henl. i fond			
3907 Studningur til kommunur til asfaltering, í grunn	4.500	0	4.500,0
Tilskud til kommuner til asfaltering, henl. i fond			
3908 Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins	3.600	0	3.600.0
Postvæsenets bygge- og driftsfond			
	96.600	13.902.1	110.502.1

		Fíggjarlogtingskbýg 1978/79 Finanslagtingslov kr. (1.000)	Uppiskoytisjáttan 1978/79 Tillægsbevilling kr. (1.000) Tilsammans	Ialt kr. (1.000)
§ 14	**Skúlamál**			
	Undervisningsvæsen			
2210	Fólkaskúlin	25.500	424.3	25.924.3
	Folkeskolen			
2215	HF-skeið í Suðuroy	683	1.026.4	1.709.4
	HF-kursus i Suðuroy			
2216	HF-skeið í Klaksvík	513	582.6	1.095.6
	HF-kursus i Klaksvik			
2220	Studentaskúli	6.198	69.7	6.267.7
	Gymnasium			
2225	Kostdeild studentaskúlans	699	81.7	780.7
	Studenterskolens kostafdeling			
2230	Føroya Sjómannaskúli	2.210	299.5	2.509.5
	Færøernes Navigationsskole			
2240	Klaksvíkar Sjómannaskúli	1.110	÷566.9	543.1
	Klaksvik Navigationsskole			
2250	Foroya Fólkaháskúli	846	÷ 9.8	836.2
	Færøernes Folkehøjskole			
2255	Húsarhaldsskúlar	563	+ 50.3	512.7
	Husholdningsskoler			
2260	Kvøldskúlar	435	217.5	652.5
	Aftenskoler			
2290	Ítrótt			
	Idræt			
3110	Lánigrunnur til ítróttarani.	500	0.0	500.0
	Lånefond til idrætsanlæg			
3112	Studningur til Í.S.Í. (viðm.)	700	0.0	700.0
	Tilskud til I.S.F. (anm.)			
3113	Studningur til ferðir innanoyggja	400	34.6	434.6
	Tilskud til indenøs rejser			
2295	Ymiskir studningar	9.060	379.6	9.439.6
	Diverse tilskud			
		49.417	2.488.8	51.905.8

	Fíggjarlógligslóg 1978/79 Fínanslagtingslov kr. (1.000)	Uppiskoytisjáttan 1978/79 Tillægsbevilling kr. (1.000)	Tilsamans Ialt kr. (1.000)
§ 15 Vísind, bókmentir og list			
Videnskab, litteratur og kunst			
2310 Landsbókasavn	1.219	+ 14.9	1.204.1
Landsbibliotek			
2320 Fólkabókasøvn	1.470	+ 89.5	1.380.5
Folkebiblioteker			
2330 Landsskjalasavn	331	+ 51.9	279.1
Landsarkiv			
2340 Føroya Fornminnissavn	1.564	+ 45.6	1.518.4
Færøernes Museum			
2350 Bygdasøvn	135	+ 90.2	44.8
Bygdemuseer			
2355 Fiskirannsóknarstovan	1.961	+ 511.3	2.472.3
Fiskeribiologisk laboratorium			
2365 Fuglakanningarstøð	18	9.7	27.7
Ornitologisk station m.v.			
2370 Náttúrugripasavn	721	+ 5.3	715.7
Naturhistorisk samling			
2375 Fróðskaparsetur Føroya	2.571	+ 167.2	2.403.8
Færøernes Akademi			
2379 Stovnar á Debessartrøð	456	23.8	479.8
Institutioner på Debessartrøð			
2380 Heilsufrøðiligt Starvsstova	674	68.9	742.9
Hygiejnisk laboratorium			
2385 Náttúrufriðjingarnevndir	80	+ 5.3	74.7
Naturfredningsudvalg			
2389 Sangur og tónleikur	200	9.9	209.9
Sang og musik			
2390 Ymiskir studningar	3.038	44.9	3.082.9
Diverse tilskud			
	14.438	+ 198.8	14.636.8

	Fíggjarlogtingslóg 1978/79 Finansiaringslov kr. (1.000)	Uppískoytisjáttan 1978/79 Tillægsbevilling kr. (1.000)	Tilsamans Ialt kr. (1.000)
§ 16 **Fiskivinna, sigling o.t.**			
Fiskeri, søfart o.l.			
2401 Vrakarastovnur	948	116.5	1.064.5
Vragerinstitution			
2410 Nautiskt Royndarkanmar	16	+ 8.4	7.6
Nautisk provekammer			
2420 Sjómansheim (viðm.)	551	0.0	551.0
Sømandshjem (amm.)			
2430 Vaktar- og bjargingarskip	7.000	+1.443.3	5.556.7
Vagt- og bjærgningsskib			
2433 Vaktarskipið Ólavur Halgi	0	1.464.1	1.464.1
Vagtskibet Ólavur Halgi			
2490 Aðrir stuðningar			
Andre tilskud			
3301 Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna	52.000	28.560.0	80.560.0
Mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet			
3302 Stuðningur til grunnlu til endurnýgging av fiskiskipaflotanum	19.000	0.0	19.000,0
Tilskud til fonden til fiskerflådens fornyelse			
3303 Grindir	5	30.0	35.0
Grindefangst			
3307 Praktiskar fiskiroyndir	3.000	+ 78.4	3.078.4
Praktiske fiskeriforsøg			
3308 Vaktarskip, í grunn	1.000	0.0	1.000.0
Vagtskib, henl. i fond			
3309 Útróðrarstøðir	600	0.0	600.0
Hjemmefiskeristationer			
3730 Landsstýrinum at ráða yvir	180	+ 56.2	123.8
Landsstyret at råde over			

	Fíggjarlogtingslóg 1978/79 Finanslogtingslov kr. (1.000)	Upískoytisjáttan 1978/79 Tillægsbevilling kr. (1.000) Tilsamans	Ialt kr. (1.000)
2492 Laksa- og silaalja	300	0.0	300.0
Lakse- og ørreddrift			
2493 Prísásetingarnevndin fyri salt- og ráfisk	100	+ 43.3	56.7
Prisudvalget for salt- og råfisk			
	84.700	28.697.9	113.397.9
§ 17 **Landbúnaður og matrikulering**			
Landbrug og matrikulering			
2501 Landsdjóralæknaembætið	352	+ 6.5	345.5
Landsdyrlægeembedet			
2504 Landbúnaðarráðgevari	130	+ 4.7	125.3
Landbrugskonsulent			
2505 Seyðaráðgevari og seyðaroyndir	75	0.5	75.5
Fårcavlskonsulent og fårcavlsforsøg			
2510 Útskifting og matrikulsfova	2.489	+ 3.0	2.492.0
Udskiftning og matrikelkontor			
2520 Royndarstøðin í Hoyvík	793	46.3	839.3
Forsøgsstationen i Hoyvík			
2590 Aðrir studningar	7.505	1.244.2	8.749.2
Andre tilskud			
	11.344	1.282.9	12.626.9

		Fíggjarløgtingslóg 1978/79 Finanslovtingslov kr. (1.000)	Uppískoytisjáttan 1978/79 Tillægsbevilling kr. (1.000)	Tilsamans Ialt kr. (1.000)
§ 18	**Handil, idnaður o.t.**			
	Handel, industri m.v.			
2710	Arbeiðseftirlit	669	+ 58.8	610.2
	Arbejdstilsyn			
2720	Bileftirlit	321	63.7	384.7
	Biltilsyn			
2723	Ráðið fyri ferðsluloyvi	200	0.0	200.0
	Rådet for færdselssikkerhed			
2726	Filmseftirlit	50	79.0	129.0
	Filmstilsyn			
2730	Skipaskrá og -uppmáting	30	12.4	42.4
	Skibsregistrering og -opmåling			
2731	Seningsmannaskipan	21	+ 1.7	19.3
	Forligsinstitution			
2732	Kolagrevstur	100	19.1	119.1
	Kulbrydning			
2733	Læraráðið	66	50.4	116.4
	Lærerådet			
2734	Skeiðvirksemi	115	2.0	117.0
	Kursusvirksomhed			
2790	Aðrir stuðningar			
	Diverse tilskud			
	3501 Føroya Ferðamannafelag	100	0.0	100.0
	Færøernes turistforening			
	3502 Stuðul til idnaðarfrembjandi endamál	2.250	55.2	2.305.2
	Støtte til industrifremmende formål			
	3503 At leggja í gistingarhúsgrunnin	700	0.0	700.0
	Henlæggelse i hotelfonden			
	3504 Til menningargrunn	4.500	0.0	4.500.0
	Til udviklingsfond			
3730	Landsstýrinum at ráða yvir	50	+ 24.7	25.3
	Landsstyret at råde over			
		9.172	196.6	9.368.6

	Fíggjarlogtingslóg 1978/79 Finansloftingslov kr. (1.000)	Uppískoytisjáttan 1978/79 Tillægsbevilling kr. (1.000)	Tilsamans Ialt kr. (1.000)
§ 19 **Almenn forsorg v.m.**			
Socialvæsen m.v.			
2805 Fólkapensjón	33.460	4.224.1	37.684.1
Folkepension			
2810 Avlamispensjón	13.950	1.753.1	15.703.1
Invalidepension			
2820 Barnastyrk til stakar uppihaldarar	1.090	162.2	1.252.2
Børnebidrag til enlige forsørgere			
2830 Einkjupensjón	3.190	+206.9	2.983.1
Enkepension			
2840 Vanlig forsorg	1.085	+657.9	1.027.1
Almindelig forsorg			
2845 Viðkað hjálp	210	187.8	397.8
Udvidet hjælp			
2850 Einkjuhjálp	2.190	+221.2	1.968.8
Enkehjælp			
2855 Barnaforsorg	1.460	689.9	2.149.9
Børneforsorg			
2860 Umsiting av heimahjálparaskipanini	2.290	802.0	3.092.0
Administration af hjemmehjælpsordningen			
2865 Frítíðarheimið í Skrivaragøtu	0	300.6	300.6
Fritidshjemmet i Skrivaragøtu			
2890 Ymsir studningar	15.260	+131.0	15.129.0
Forskellige tilskud			
	74.785	6.902.7	81.687.7

	Fjárlagafrumvarp 1978/79 Finansloven kr. (1.000)	Uppáskotafjáttur 1978/79 Tillægsbevilling kr. (1.000)	Tilsamans Ialt kr. (1.000)
§ 20 **Pensjónsútreiðslur**			
Pensionsudgifter			
2901 **Pensjónsútreiðslur**			
Pensionsudgifter			
1060 Pensjónir	250	16.2	266.2
Pensioner			
1061 Biðipeningur	300	+ 15.6	284.4
Ventepenge			
	550	0.6	550.6
§ 21 **Effektivar veðhaldsbindingar, í grunn**			
Effektive garantiforpligtelser, i fond			
2902 **Effektivar veðhaldsbindingar, í grunn**	4.000	0.0	4.000.0
Effektive garantiforpligtelser, i fond			
§ 22 **Aðrar og óvissar útreiðslur**			
Andre og uvisse udgifter			
2910 **Aðrar og óvissar útreiðslur**			
Andre og uvisse udgifter			
2050 Umboðan	250	67.8	317.8
Repræsentation			
2570 Útreiðslur av vali	100	157.3	257.3
Udgifter vedrørende valg			
2575 Dóms- og lógreglumál	10	19.8	29.8
Retsvæsen og politi			
2580 Studningur til politiskt upplýsingararbeiði v.m.	540	0.0	540.0
Tilskud til politisk oplysningsarbejde m.m.			
3730 Landsstýrinum at ráða yvir	150	194.1	344.1
Til landsstyret at råde over			
	1.050	439.0	1.489.0

		Fíggjarløgtingslóg 1978/79 Finanslagtingslov kr. (1.000)	Uppiskeytisjáttan 1978/79 Tillægsbevilling kr. (1.000)	Tilsamans Ialt kr. (1.000)
§ 23	**At leggja í ymsar grunnar v.m.**			
	Henlægges til forskellige fonds m.m.			
3801	Avlopið hjá opotekinum lagt í apotekaragrunnin	+ 138	+1.225.3	+1.363.3
	Apotekets overskud henlagt til apotekerfonden			
3805	Avlopið hjá telefonverkinum	+ 342	+2.168.7	+2.510.7
	Telefonværkets overskud			
3810	Avlopið hjá Útvarpinum	666	91.4	757.4
	Radiofoniens overskud			
3806	Postverk Føroya	0	+1.977.2	+1.977.2
	Færøernes postvæsen			
3815	Til kirkjugrunnin (viðm.)	1.220	0.0	1.220.0
	Til kirkefonden (anm.)			
		1.406	+5.270.8	+3.873.8
§ 24	**Burturleggingar til avdráttir av lánum**			
	Henlæggelser til afdrag på lån			
2930	Burturleggingar til avdráttir av lánum..	21.000	+6.315.9	*)14.684.1
	Henlæggelser til afdrag på lån			
§ 25	**Avskrivingar**			
	Afskrivninger			
2940	Avskrivingar	3.500	6.326.2	9.826.2
	Afskrivninger			

	Fíggjarlogtingslóg 1978/79 Finanslagtingslov kr. (1.000)	Uppiskoytisjáttan 1978/79 Tillægsbevilling kr. (1.000)	Tilsamans Ialt kr. (1.000)
§ 26 **Ymsar ognarútreiðslur**			
Diverse ejendomsudgifter			
2950 Ymsar ognarútreiðslur (kt. 1330 § 11) ..	150	+ 154.4	+ 4.5
Diverse ejendomsudgifter			
Samanlagdar útreiðslur	438.757	54.295.9	493.052.9
Udgifter ialt			
Munur	472	+3.005.7	+2.533.7
Difference			
	439.229	51.290.2	490.519.2

*)avdráttir ialt 1978/79	24.510.200
+ avskrivingar 1978/79	9.826.200
burturleggingar til avdráttir	14.684.000

2. viðgerð 11. december. Broytingaruppskotið frá fíggjarnevndini varð samtykt við 27—0.

3. viðgerð 14. december. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 26—0.

F.L. j.nr. 400-27. Lóg nr. 37 frá 17. apríl 1980.

17. Fyrispurningur til Hergeir Nielsen, landsstýrismann

Ár 1979, týsdagin 28. august setti Eyðun Videro, logtingsmaður, fram soljóðandi

fyrispurning

Hví verður rutubáturin «Sildberin», sum er bygdur til at rokja rutusambandið Sand-Skúvoy, ikki settur í hesa sigling, nú hann er liðugur?

Viðmerkingar:

Vit hoyrdu nú um dagarnar, at «Sildberin» var farin royndartúr, og at ætlanin var at royna hann í sigling til Mykines og Fugloy/Svínoy, hóast báturin er fingin til vega fyri at rokja rutusambandið til Skúvoyar. Ætlandi skal hann byrja sigling til Skúvoyar, tá vetrarferðaætlanin kemur í gildi umleið 20. sept. 1979.

Sum kunnugt er sigling upp á Skúvoynna sera trupul um veturin, tí lendingaviðurskiftini eru vánalig, og roknað varð við, at so skjótt báturin nú var liðugur, skuldi hann royndarkoyrast á staðnum, bæði fyri at fólkið í Skúvoy skuldi fáa nyttu av honum sum skjótast, og fyri at teir menn, ið skuldu manna bátin, kundu gera seg kunnugan við bátin í feimum viðurskiftum, sum har eru, áðrenn heystveðrið kom.

31. august svaraði Hergeir Nielsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar uppá fyrispurning frá Eyðun Videro, logtingsmanni, viðvíkjandi Skúvoyarbátinum «Sildberin».

Báturin bleiv kontraktaður fyri umleið hálvumoðrum ári síðan, og tikið varð av tí bíligasta tilboðnum, ið var frá Poul Eli Bærentsen á Tvoroyri. Hetta verkstað hevði ikki fyrr bygt bát, men mett varð, at fekniska útgerðin og manningin kundu makta uppgávuna. Eyðsæð var, at uppgávan var stór fyri verkstaðið, og at seinkingar møguliga vildu koma, og er hetta tíverri ofta komið fyri, eisini á øðrum skipasmiðjum. Orsøkirnar til seinking av hesum projektinum hava verið fylgjandi:

Tørvandi umstøður at byrja við, m. a. mátti høll byggjast, og gekk tí trekt í byrjanini.

Tørvandi arbeiðsmegi.

Leveringstrupulleikar.

Broytingar í projektinum, m. a. varð farið yvir til eitt annað slag av motorum.

Og til seinast møgulig undirmetan av hvussu umfatandi projektið var.

Nú báturin fór royndartúr vísti tað seg, at hann hevði eitt brek. Hetta brekið forir við sær, at báturin, tá ið hann siglir fulla ferð á deyðavatni, fer at rulla. Hetta fyribrigdi kemur sjáldan fyri, og er eitt slag av frekvenstruputleikum, ið fyrst kemur til sjóndar á einum tekniskum royndartúri. Skipasmiðjan er farin undir at rætta brekið, og verður hetta sjálvsagt gjort á skjótast møguligan hátt.

Tá talan hevur verið um sigling til Mykinesar, Fugloyar og Svínoyar, er talan um einkultar royndartúrar, og kemur hetta ikki at tarna Skúvoyarsiglingina á nakran hátt.

---

18. Bráðfeingis stuðul til flaka- og saltfiskaveiðu

Ár 1979, mikudagin 29. august legði Heðin Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um bráðfongis stuðul til flaka- og saltfiskaveiðu.

§ *1.* Umfram studningarnar eftir §§ 6 og 7 í løgtingslóg nr. 69 frá 26 september 1974 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verða latnir fylgjandi cykastudningar fyri fiskitúrar byrjaðir í 1979:

1. Fiskaflak, § 6, og upsaflak. Tá ið føroyskt fiskifar landar ella umskipar fiskaflak í Føroyum, verður latið til manningina 15 oyru fyri kg av

lagtingslov om midlertidig støtte til filét- og saltfiskfiskeri.

§ *1.* Foruden tilskudene i henhold til §§ 6 og 7 i lagtingslov nr. 69 af 26. september 1974 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet ydes følgende ekstratilskud til fisketure påbegyndt i 1979:

1. Fiskefilét, § 6, og sejfilét. Ved landing eller omskibning på Færøerne af fiskefilét fra færøske fiskefartøjer ydes der til mandskabet 15 øre pr.

kilaskornum flaki uttan skræðu, annars 12 oyru fyri kg. Verður veiðan landað í aðrari havn enn foroyskari, verður bert hálvur studningur latin.

2. Saltfiskur, § 7, og upsi. Tá ið foroyskt fiskifar landar saltfisk í foroyskari havn, verður latið til manningina av fullsaltaðum toski og upsa nr. 1, 12" og størri:
   a. av trolveiðu 11 oyru fyri kg, og
   b. av línu-, snoris-, snellu- og garnaveiðu 20 oyru fyri kg.

   Verður veiðan landað í aðrari havn enn foroyskari, fær mannningin hálvan studning av 88% av bruttoveiðuni, um veiðan er seld uttan frádrátt í prisi.

3. Svartkalvi og hemari, § 6 A. Tá ið foroyskt fiskifar landar ella umskipar svartkalva ella hemara í Føroyum, verður latið í studningi 12 oyru fyri kg. Verður veiðan landað í aðrari havn enn foroyskari, verður bert latin hálvur studningur.

§ 2. Í áfrokningini av eykastudninginum luttekur eingin við meira enn einum mansparti.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

kg filét, skåret i kile uden skind, iøvrigt 12 øre pr. kg. Såfremt fangsten landes i anden havn end færøsk, ydes der kun halvt tilskud.

2. Saltfisk, § 7, og sej. Ved landing på Færøerne af saltfisk fra færøske fiskerfartøjer ydes der mandskabet af helsaltet torsk og sej nr. 1, 12" og større:
   a. fra trawlfiskeri 11 øre pr. kg, og
   b. fra langline-, håndline-, snelle- og garnfiskeri 20 øre pr. kg.

   Landes fangsten i anden havn end færøsk, er tilskudet halvdelen af 88% af bruttofangsten, såfremt fangsten er solgt uden fradrag i pris.

3. Hellefisk og sildehaj, § 6 A. Ved landing eller omskibning på Færøerne af hellefisk eller sildehaj fra færøske fiskerfartøjer ydes der mandskabet i tilskud 12 øre pr. kg. Såfremt fangsten landes i anden havn end færøsk, ydes der kun halvt tilskud.

§ 2. I udregningen af ekstratilskudet deltager ingen med mere end en mandskabsandel.

§ 3. Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í skrivum hevur Føroya Fiskimannafelag heitt á landsstýrið um at fáa framlongt bráðfongisstudningin fyri flaka- og saltfiskaveiðu v.m. at galda eisini fyri árið 1979.

Hesin bráðfongis studul hevur verið í gildi síðan 1975 og hevur verið endurnýggjaður á hvørjum ári síðani. Í fjor kom serstakur studul eisini at umfata manningina á svartkalva- og hemaraveiðu.

Hóast saltfiskaprísirnir hava í ár havt ein vokstur uppá millum 17% og 19% fyri fær ymsu fiskastoddirnar í mun til árið í fjor og ein væl minni rakstur uppá millum 6% og 8%, alt eftir saltfiskastoddunum, í mun til árið 1977, metir landsstýrið, at tað eftir umstøðunum er rætt, at lógin verður framlongd at galda eisini fyri íverandi ár, grundað á ta sannroynd, at flaka- og saltfiskatrolararnir hava yvirhovur gjort verri

túrar í ár enn í fjor. og at línubátarnir á saltfiskaveiðu hava fleiri gjort longri túrar og hava ið hvussu er í nokrum forum lakari veiðu enn undanfarnu ár.

Saltfiskabátarnir eystanneftir hava veitt nakað av upsa, samanlagt sluk 550 tons í saltfiski. Landsstýrið heldur tað tí vera rímuligt, at lógin um bráðfongis stuðul til flaka- og saltfiskaveiðu v.m. verður soleiðis broytt, at hon eisini kemur at umfata upsa, og setir fram uppskot samsvarandi hesum.

Útreiðslurnar samsvarandi hesi lóg metir landsstýrið soleiðis:

Saltfiskur, herundir saltupsi	kr.	870.000,—
Flak	—	60.000,—
Svartkalvi og hemari	—	80.000,—
	kr.	1.010.000,

Tingsins loyvi at frávíkja tiðarfreistina til viðgerðina varð givið

29. august 1. viðgerð. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 31. august legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 29. august 1979 og undir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið hevur skotið upp, at bráðfongisstuðningurin fyri flaka- og saltfiskaveiðu, sum hevur verið galdandi síðan 1975 og hevur verið endurnýggjaður á hvørjum ári, verður framlongdur eisini fyri árið 1979. Í 1978 kom serligur stuðningur eisini at umfata manningina á svartkalva- og hemaraveiðu.

Í fyriliggjandi uppskoti hevur landsstýrið umframt tikið upsa við.

Umframt lógaruppskotið frá landsstýrinum var á fíggjarnevndarfundinum framlagt skriv frá Føroya Fiskimannafelag viðvíkjandi hægri stuðningi til upsa, soleiðis at hann fær sama stuðningsupphædd sum toskur.

Ein samd fíggjarnevnd vísti á tað skeivu í, at slíkar áheitanir komu til fíggjarnevndina, áðrenn nevnda felag hevði gjort royndir at samráðast við Føroya Fiskasølu, Reiðarafelagið, Prísásetingarnevnd, Landsstýrið og aðrar møguligar avvarðandi stovnar.

Ein samd fíggjarnevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

2. og 3. viðgerð 31. august. Uppskot landsstýrisins samtykt við 28—0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1539-2-2. Lóg nr. 77 frá 21. september 1979.

19. Veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin

Ár 1979, mikudagin 29. august legði Hergeir Nielsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram saljóðandi

U p p s k o f
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri uttanlandsláni til Húsalánsgrunnin uppá 25 milj. kr.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om garanti til Husláanefondet.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et udenlandsk lån til Husláanefondet på 25 mill. kr.

§2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Nýggja lógin um Húsalánsgrunnin kom í gildi 1. juli 1978, men enn hevur ikki borið til at fáa grunnin at virka eftir ætlan, m.a. so at útlánsupphæddin kundi tvífaldast, av tí at grunnurin hevur ikki pening tokan.

Tað er ætlan landsstýrisins, at eitt ávíst lutfall skal vera millum lántøkur og eginogn grunsins, og at ein stórur partur av lántunum skal takast upp í Føroyum, m,a, sum brævalán. Fyri hesi finst heimild í lógini til landskassaveðhald.

Fyri at gera grundu forun fyri at fara at virka skjótast gjørligt hevur landsstýrið tó samtykt í fyrstu atlegu at taka upp eitt uttanlandslán uppá 25 milj. kr. Við tí tilskoti grunninum er játtað á fíggjarlógini, og við tí afturgjalding, grunnurin fær av sínum útlánum, verður hann við nevnda uttanlandsláni forur fyri at veita tvífald so stór útlán sum áður í tíðarskeiðinum frá 1. juli 1978 teil 31. mars 1980.

Í lógini um Húsalánsgrunnin er ikki heimild givin landsstýrinum at veðhalda fyri uttanlandslánum, og verður málið tí lagt fyri løgtingið.

1. viðgerð 31. august. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum sama dag legði fram

Á l i t

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 29. august 1979 og undir 1. viðgerð 31. august beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið hevur skotið upp, at tað fær heimild landskassans vegna at veðhalda fyri uttanlandsláni til Húsalánsgrunnin uppá 25 milj. kr.

Í viðmerkingunum verður tilskilað, at fyri at fáa grunnin til at virka skjótast gjorligt, verður neyðugt at taka umrodda lán, og táið í lógini um Húsalánsgrunnin ikki er givin landsstýrinum heimild at veðhalda fyri uttanlandslánum, er neyðugt, at slík heimild verður útvegað.

Meirihutin (Hákun Djurhuus, Poul J. Olsen, Sverre Midjord, Jógvan Durhuus, Ivan Johannesen og Johs. Martin Olsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, meðan minnilutin (Asbjørn Joensen) vísir til sína stoðu í álitinum í lógtingsmáli nr. 72/1978: Húsalánsgrunnurin frá 27. september 1978.

Tingsins loyvi at frávíkja tíðarfreistini til 2. og 3. viðgerð varð givið.

2. og 3. viðgerð 31. august. Málið samtykt við 26—0 atkvæðum.

F.T., j.nr. 1426-5-5. Lóg nr. 76 frá 21. sept. 1979.

---

20. Ríkislóg um »erstatning for vaccinationsskader«

Ár 1979, fríggjadagin 10. august varð skriv dagf. 9. august 1979 frá landsstýrinum lagt fram:

Ríkisumboðsmaðurin hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 82 frá 8. mars 1978 «om erstatning for vaccinationsskader» verður lýst at galda í Føroyum.

Landslæknin hevur eftir áheitan sent ríkisumboðsmanninum tað ummæli um lógina, «at det ikke forekommer undertegnede nødvendigt med særlige ændringer for Færøernes vedkommende».

Føroya Vanlukkutryggingarráð hevur eftir áheitan sent landsstýrinum tað ummæli um lógina «at der herfra intet haves at indvende imod, at loven får gyldighed for Færøerne i den foreliggende form».

Landsstýrið leggur eftir hesum málið fyri løgtingið við tilmæli.
+ *skjøl.*

Málið varð beint í lógarnevndina, sum 20. november legði fram soljóðandi

Á l i t

Landsstýrið hevur hin 9. august 1979 sent tinginum soljóðandi skriv:

«Ríkisumboðsmaðurin hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 82 frá 8. mars 1978 «om erstatning for vaccinationsskader» verður lýst at galda í Føroyum.

Landslæknin hevur eftir áheitan sent ríkisumboðsmanninum tað ummæli um lógina, «at det ikke forekommer undertegnede nødvendigt med særlige ændringer for Færøernes vedkommende».

Føroya Vanfukkutryggingarráð hevur eftir áheitan sent landsstýrinum tað ummæli um lógina «at der herfra intet haves at indvende imod, at loven får gyldighed for Færøerne i den foreliggende form».

Landsstýrið leggur eftir hesum málið fyri løgtingið við tilmæli.
+ *skjøl.*»

Málið varð beint í lógarnevndina, og setur ein samt lógarnevnd fram fylgjandi

U p p s k o t
til
samtyktar.

Lóg nr. 82 frá 8. mars 1978 «om erstatning for vaccinationsskader» verður lýst at galda í Føroyum.

2. viðgerð 27. og 29. november. Málið samtykt við 23 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

F.L. j.nr. 921-15.

21. Fyrispurningur til Jákup Lindenskov, landsstýrismann

Ár 1979, fríggjadagin 31. august setti Asbjørn Joensen, logtingsmaður fram soljóðandi

fyrispurning

Vísandi til viðmerkingarnar verður spurt landsstýrismannin um hann nú, tá vit um fáar mánaðar skriva 1980, er forur fyri at svara, nær byrjað verður at byggja pleyguheimsdeild í samband við Klaksvíkar sjúkrahús.

Viðmerkingar:

Leingi hevur nú verið bíðað eftir at farið varð undir byggingina av tí neyðugu pleygudeildini við Klaksvíkar sjúkrahús. Tað er óneyðugt her at gera vart við, hvussu átroðkandi hetta mál er, og hava vit eisini í samband við frásognir logmansins havt vónir um, at hetta var ein ætlaður veruleiki.

Soleiðis førir logmaður fram í árinum 1973:

«Sum nevnt í logmansroðuni í fjor hevur landsstýrið avgjort, at farast skal undir bygging aftrat sjúkrahústuum á Tvoroyri og í Klaksvík, so hesi kunnu veita eldri og brekaðum nóg góða pleyguviðgerð.

Byggingin á Tvoroyri er mett at kunna byrja 1. november og tann í Klaksvík eina ferð næsta ár.»

Í logmansroðuni 1974 verður sagt:

«Í Suðuroy er bygging av roktarheimi byrjað, í Norðuroyum verður hakin settur í hesi tingsetu .....»

Í roðu sini í 1975 sigur logmaður:

«Tað fer fram bygging av ellis- og roktarheimi á Tvoroyri, hendan bygging vent-ast liðug í komandi ári, samstundis sum fyrireikingar verða framdar til líknandi heim í Klaksvík.

Í hesum føri verður bygt soleiðis, at felagshiti, kokur og vask verður við sjúkrahúsið á staðnum.»

Í roðu sini í 1976 tekur logmaður soleiðis til:

«Men ótrygdin er tíverri mangar ferðir storri á hinum sjúkrahúsunum, tí tað hevur ikki borið til at fingið tær neyðugu útbúnu læknakreftir.

Á Klaksvíkar sjúkrahúsi er tó bæði medicinskur og skurðlækni, men sjúkrahúsini krevja munandi modernisering.

Landsstýrið hevur í hyggju á ólavsoku at leggja fyri tingið lógaruppskot um nútímansgerð av Norðuroya sjúkrahúsi — heruppí er eisini ætlan um at byggja sjálvstøðugt roktar- og ellisheim í tilknýti við sjúkrahúsið.

Hendan ætlan, sum umfatar roktar- og ellisheim, heilsumiðstoð og fysiurgiska deild, umfatar eisini umbygging av koki, vaskarí og gerð av nýggjum kapelli. Kostnaðarætlanin liggur um 16 milj. kr.»

Í árinum 1977 málber logmaður seg í roðu sínu á henda háft:

«Ætlan landsstýrisins við bygging av ellis- og roktarheimum stendur við, og verður byggingin í Klaksvík byrjað um fáar mánaðar.»

Í 1978 er orðingin hjá logmanni:

«Í hesum valskeiði er framhaldandi arbeiði gjort til útbygging av okkara heilsustovnum, sjúkrahúsum, roktar- og ellisheimum .....»

Í logmansroðuni fyri árið 1979 ger logmaður ikki nakra ávísa úgreining av teinum einkultu okjunum, men tekur oll felagsokini saman, her íroknað heilsuverkið, og sigur hann m.a. frá, at í øllum samfelagsligum liðum er framvegis gróður, útbygging og menning, og minnir á, at hetta hava vit orkað, tí fraúleiðsla okkara er so hampuliga stór, og tí at aðrir hava havt álit á búskapi okkara.

Hóast tað, sum frásagt er í samband við hesar mongu roður logmans vegna landsstýrið, so er enn einki arbeiði byrjað á staðnum, og er tað ongum ilt at bera, um ivi nú stendst av, um hetta mál nú veruliga ætlast loyst.

31. august 1979 varð samtykt, at Jákup Lindenskov skuldi svara fyrispurninginum, men við tað at tingfundur ikki var aftur fyrrenn 19. november, og tá Jákup Lindenskov í hesum millumbilinum varð valdur til fólkatingsmann, varð fyrispurningurin ikki svaraður.

22. Fyrispurningur til D. P. Danielsen, landsstýrismann

Ár 1979, fríggjadagin 31. august setti Adolf V. Hansen, løgtingsmaður tram so-ljóðandi

f y r i s p u r n i n g

Hevur landsstýrið gjort nakrar kanningar viðvíkjandi harustovninum, og hevur landsstýrið nakrar ætlanir um fríðing um so er, at stovnurin er niðurundir komin.

Viðmerkingar:

Tann ringi veturin eins og tað ringa várið má haldast at hava tynt nógv í harustovninum. Er stovnurin so nógv niður undir komin sum menn halda, kann verða vandamikið at loyva skjóting í vetur.

Samtykt við 23—0, at Dánjal Pauli Danielsen, landsstýrismaður skuldi svara fyrispurninginum.

23. april 1980 varð fyrispurningurin aftur tikin.

23. Broyting í lógtingslóg um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur

Ár 1979, mánadagin 19. november legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973 verða gjørdar hesar broytingar:
1) § 3 verður orðað soleiðis:

«Nevnd grunsins telur 3 limir og 3 tiltakslimir, sum verða valdir av løgtinginum fyri 3 ár. Ein nevndarlimur gongur út hvørt ár. Ein tiltakslimur gongur út hvørt ár, fyrstu 2 árini við lutakasti. Nevndarlimirnir og tiltakslimirnir skulu hava góðan kunnleika til ídnað.»

2) Í § 6 verður «1973/74» broytt til «1979/80».

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring af lagtingslov om udviklingsfond for industri, håndværk og servicevirksomheder.

§ 1. I lagtingslov nr. 37 af 26. juni 1973 foretages følgende ændringer:
1) § 3 affattes således:

«Fondens bestyrelse består af 3 medlemmer samt 3 suppleanter, som vælges af lagtinget for 3 år. Et bestyrelsesmedlem afgår hvert år. En suppleant afgår hvert år, de første 2 år ved lodtrækning. Bestyrelsesmedlemmerne samt suppleanterne skal have godt kendskab til industri.»

2) I § 6 ændres «1973/74» til «1979/80».

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

ad 1. Nevndin í menningargrunninum telur 3 mans, men hevur ongar eykamenn.

Grunnurin hevur tveir fundir um mánaðin, og fyri at hesir fundir kunnu verða hildnir regluliga, ynskir nevndin at eykamenn verða valdir.

ad 2. Tá lógin varð samtykt í 1973 fekk grunnurin heimild at upptaka lán við landskassavetbhaldi, tó hægst 2 milj. kr. um árið í 5 ár. Hesi 5 ár eru nú farin, og ynskir grunnurin at henda heimild verður endurnýggjað.

1. viðgerð 20. november 1979. Skotið varð upp at beina málið í fíggjarnevndina, annað uppskot varð at beina málið í serstaka ídnaðarnevnd. Atkvott varð um málið skuldi í fíggjarnevndina. Hetta fekk 1 atkvoður og fall, málið varð sostatt beint í ídnaðarnevndina, sum 29. november legði fram soljóðandi

Á l í t

Málið, sum er lagt fram av landsstýrinum, varð við 1. viðgerð beint í ídnaðarnevndina.

Ormur broytingin snýr seg um at velja 3 tiltaksmenn í nevndina hjá menningargrunninum afturat teimum 3 nevndarlimunum, sum eru. Hetta er neyðugt av ti. at monnum við hvort berast frá at møta. Eisini kann tað koma fyri, at nevndarlimir eru inhabilir at viðgera einstok mál.

Ídnaðarnevndin ynskir at gera greitt, at valið av tiltakslimum verður at skilja soleiðis, at ein tiltakslimur verður at velja fyri hvonn nevndarlim sær.

Hin broytingin er, at lániheimildin hjá menningargrunninum uppá 2 milj. kr. um árið í 5 ár verður endurnýggjað frá og við 1979/80.

Ein samd ídnaðarnevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 5. december. 3. viðgerð 11. december. Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1212-14-1. Lóg nr. 10 frá 16. januar 1980.

---

24. Løgtingslóg um lán til keyp av Loranstøðini í Vági

Ár 1979, týsdagin 27. november legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um lán til keyp av Loranstøðini í Vági.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at læna kr. 1.256.000,00 til keyp av ognunum, sum hoyra til Loranstøðina í Vági.

§ 2. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om lån til køb af Loranstationen i Vági.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at låne kr. 1.256.000,00 til køb af de til Loranstationen i Vági hørende ejendomme.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við gildi frá 1. januar 1978 hevur altjóðaloftferðslustovnurin ICAO - International Civil Aviation Organisation - uppsagt partar av ICAO-sáttmálanum við danska ríkið frá 25. september 1956 um figging av ávísum loftferðslutænastum í Grønlandi og í Føroyum viðvikjandi loranstøðnum ávikavist í Frederiksdal og á Skúvanesi í Vági.

Útreiðsluna til bygging av Loranstøðini í Vági hevur danska farvatnsverkið undir verjumálaráðnum goldið, og samráðingar hava verið og eru framvegis millum farvatnsverkið og ICAO um figgjarligu viðurskiftini teirra millum í samband við uppsognina.

Tá ið landsstýrið í 1976 fekk kunnleika til uppsognina, vendi landsstýrið sær til ríkisumboðsmannin við frábodan um, at bygningarnir vóru egnaðir til aðra nýtslu hjá tí almenna, t. d. almanna endamál, og við áheitan til ríkismyndugleikarnar um at taka landsstýrið við í ráðaleggingini um framlíðarnýtslu av hesum bygningum. Samstundis bað landsstýrið um at fáa kunnleika til tekningar og lýsingar av bygningunum.

Sama árið sendi ríkisumboðsmaðurin landsstýrinum frábodan frá verjumálaráðnum, har m. a. varð sagt, at verjumálaráðið einki hevði í móti, at Loranstøðin varð avhendað til landsstýrið - treytað av góðkenning frá donsku peningsveitandi myndugleikunum. Við hesi frábodan fylgdu tekningar og lýsingar av bygningunum, sum nú eru til skjals á landsskrivstovuni.

Eftir áheitan frá landsstýrinum hava Statens Andssvageforsorg, Føroya deild, og Almannastovan kannað bygningarnar, og út frá úrslitinum av hesi kanning er landsstýrið komið til ta niðurstoðu, at bygningarnir fyri ein stóran part eru væl hóskandi til nýtslu sum vistarheim og bústaðir til starvsfólk á heiminum, og at torvur er fyri einum slíkum heimi fyri pensionistar við ymsum likamligum og sálarligum brekum, tað er einum sjálveigandi stovni, nakað sum vistarheimini í Tórshavn og Runavík.

Við tí fyri eygað at royna skuldi verið at fáa ta skipan í lag, at landsstýrið ognaði sær hesar bygningar og síðani lat nevnda stovni bygningarnar til nýtslu ókeypis, bað landsstýrið síðani ríkisumboðið í fyrstu syftu upplýsa, um ríkismyndugleikarnir kundu lata landsstýrinum bygningarnar ókeypis og, um so ikki varð, í aðru syftu um eitt tingingargrundarlag viðvikjandi treytunum fyri avhendingini.

Úrslitið av hesum varð, at ríkisumboðið sendi landsstýrinum frábodan frá verjumálaráðnum, at tann virðismetingin av bygningum og grundokjum, sum nústaðni varð gjørd, var uppá tilsamans kr. 1.256.000,00, umfram fyrispurning, um landsstýrið varð sinnað at ognа sær Loranstøðina við nevndu bygningum og grundokjum fyri tilskilaðu virðismetingarupphædd - framvegis treytað av góðkenning frá donsku peningsveitandi myndugleikunum.

Í hjálagda skjali «Loranstøðin í Vági» hevur landsstýrið nærri tilskilað, hvørjir bygningar og grundoki talan er um, eins og virðismetingin er sundurliðað, og harumframt eru tilskilað stodd og leigurupphædd viðvikjandi teimum grundokjum, sum Loranstøðin hevur í leigu.

Ætlan landsstýrisins er, sum fyrr nevnt, at ein partur av stoðini, í skjalinum nevndur B-partin «Bakkin», skal nýtast til eitt sjálveigandi vistarheim. Rakstrarútreiðslurnar av einum slíkum heimi til 10 pensionistar kunnu út frá rakstrarútreiðslunum á vistarheiminum í Runavík í fíggjarárinum 1978/79 metast til umleið kr. 650.000,00 um árið. Av hesi upphædd verður sambært § 32 í lógarkunngerð nr 131 frá 29. mars 1977 fyri Føroyar «om offentlig forsorg», samanber § 29 og 34 í lógarkunngerð nr. 542 frá 11. november 1976 fyri Føroyar «om folkepension» og § 36 í lógarkunngerð nr. 541 frá 11. november 1976 fyri Føroyar «om invalidepension» helvtin at rinda úr ríkiskassanum, meðan hin helvtin verður goldin frá føroyskari síðu eftir løgtingslóg nr. 74 frá 24. oktober 1978 um býti av sosialu útreiðslunum.

Tann partin av stoðini, sum í skjalinum er nevndur C-partin, «Brekkan», tað er sethúsini C2 og C3, metir landsstýrið verða væl egnaðan til starvsfólkaíbúðir, og tá hesi hús standa á ognarjorð, kunnu tey nøgduliga seinri verða seld avvarðandi starvsfólkum ella øðrum, um tað ikki, tá ið heimið er stovnsett, vísir seg, at heiminum framyvir fer at torva annað ella bæði húsini til pensionistar.

Í hesum sambandi kann verða upplýst, at í lotuni eru í B-partinum tann stórsta av teinnum trimum íbúðunum og í C-partinum bæði sethúsini útleigað, og landsstýrið hevur fingið fleiri fyrispurningar frá fólki, sum eru hugað at leiga ella keypa íbúðir ávikavist hús hjá stoðini.

Sum er hevur landsstýrið ongar endaligar ætlanir um nýtsluna av tí partinum av stoðini, sum í skjalinum verður nevndur A-partin, tað er sendistoðin «Toppurin», men landsstýrið hevur fingið áheitan frá fólki, sum hava áhuga at keypa bygningin til ídnaðarendamál.

Vísandi til tær samráðingar, sum landsstýrið hevur havt við ríkisstýrið um at ogna sær Loranstoðina, ætlanir landsstýrisins viðvikjandi nýtsluni av stoðini og viðurskiftini viðvikjandi stoðini annars, sum greitt er frá frammanfyri, er landsstýrið av teirri áskoðan, at Loranstoðin í fyrstu syftu eigur at koma á føroyskar hendur sum ein heild.

Landsstýrið leggur sostatt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um lán til keyp av Loranstoðini í Vági við tilmæli.

Loranstøðin í Vági.

Bygningar		Virðismeting	Ognarviðurskifti
A. Sendistøðin «Toppen»	kr.	580.000,--	35.610 m² til leigu frá Hamra bagastýri fyri 1.700,- kr./árl. *)
B. 3 bís «Bakkan», bilhús, skrivstovu- og verkstaðarholi umfram 3 íbúðir, B1.			4.000 m² til leigu frá Hamra bagastýri fyri 100,- kr./árligu
B2 og B6	kr.	420.000,	
C. 2 sethús «Skranten»			
C2	kr.	125.000,	
Grundoki	kr.	32.000,	Ogn hjá loranstøðini
C3	kr.	115.000,	
Grundoki	kr.	34.000,	Ogn hjá loranstøðini
Virðismeting tilsamans	kr.	1.256.000,	

*) Í sambandi við flyting av sendistøðini í 1969 fekk Hamra bagastýri rætt til beiti á øllum okjunum, uttan bar sum bygningar og antennumastrar standa.

A. er sendistøðin uppi á Skúvnoesi.
B. eru húsini sunnanfyri Vágsfjørð, og
C. eru sethúsini norðanfyri Vágsfjørð.
Vegin millum A. og B. hevur loranstøðin umsitið.

1. viðgerð 5. december. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 23. april 1980 legði fram soljóðandi

Alit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 27. november 1979 og undir fyrstu viðgerð 5. december sama ár beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at tað fær heimild landskassans vegna at læna 1.256.000 kr. til keyp av ognunum, sum hoyra til Loranstøðina í Vági.

Eftir at partar av ICAO-sáttmálanum millum altjóða loftferðslustovnin og danska ríkið eru farnir úr gildi, hevur danska verjumálaráðið ikki longur brúk fyri loranstøðini í Vági. Samráðingar hava verið millum landsstýrið og ríkisstýrið um, at landsstýrið kann ogna sær loranstøðina, og tá landsstýrið hevur ávísar ætlanir viðvíkjandi nýtsluni av støðini og viðurskiftini viðvíkjandi støðini annars, er landsstýrið

av teirri áskoðan, at loranstoðin eigur at koma á føroyskar hendur sum ein heild. Í viðmerkingunum annars hevur landsstýrið tilskilað ætlanir sínar um nýtsluna av teimum ávísu partunum av loranstoðini.

Ein meiriluti (Haldur Hunsen, Jørgen Thomsen, Jógvan Durhuus, Pauli Ellefsen og Ivar Johannesen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Ein minniluti (Hákun Djurhuus og Asbjørn Joensen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til, at í fyrsta lagi eigur loranstoðin at verða latin Vágs kommunu ókeypis og í øðrum lagi, at um ikki so verður, at landsstýrið fær heimild landskassans vegna at veðhalda fyri láni til Vágs kommunu til keyp av loranstoðini í Vági, og setur samsvarandi hesum fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar

I. Loranstoðin í Vági verður ókeypis latin Vágs kommunu, og

II. Um ikki alternativ I verður samtykt, fær landsstýrið heimild landskassans vegna at veðhalda fyri láni til Vágs kommunu til keyp av loranstoðini í Vági.

2. viðgerð 24. apríl 1980. § 1 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 20-1, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

Uppskot til samtyktar frá minniluttanum (Hákun Djurhuus og Asbjørn Joensen) fall við at pkt. I fekk 10-0, pkt. II 11-0.

3. viðgerð 28. apríl, uppskot landsstýrisins samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1010-17. Lóg nr. 52 frá 12. mai 1980.

25./79. Málið ikki framlagt

26. Fyrispurningur til Heðin Klein, landsstýrismann

Ár 1979, hósdagin 29. november setti Hilmar Kass, logtingsmaður, Heðini Klein, landsstýrismanni, fram soljóðandi

Fyrispurning

Leggur landsstýrið uppskot fyri logtingið, sum kunnu loysa fíggjarkreppuna hjá fiskivinnuni?

Verða hesi uppskot ætlað at hjálpa fram í tíðina, ella verða tey sum tey síðstu bert ætlað til at skumpa trupulleikarnar eitt sindur frá okkum?

Nær verða hesi uppskot løgd fram?

Viðmerkingar:

Long tíð er gingin, síðan tað gjordist hvørjum hugsandi føroyingi greitt, at hovuðsvinna okkara fór at koma í fíggjarligar trupulleikar av slíkum slag, sum ikki kunnu loysast bert við at hækka studningar av ymsum slag nokur øyru og so gera inntøkulógir, sum fáa prístalið at hækka í stórum, tí hetta kemur fiskivinnuni aftur um brekku við tí úrsliti, at støðan versnar í stórum.

Fyri fleiri árum síðan, meðan landsinntøkan vaks óvanliga skjótt, gjordi Sjálvstýrisflokkurin andstøðuni greitt, hvussu fór at gangast við tí fíggjarpolitikki, hon førdi, um vit vóru fyri einum aftúrstigi, men ikki fyrr enn nú, nógv av bestu skipum okkara verða lýst til tvingsilssølu, og nógv onnur liggja við bryggju, tí tað loysir seg betur, tí tey hava beinleiðis rakstrarhall, nú tykist samgongan at verða vorðin var við, at alt er ikki so væl vorðið, sum teir hava greitt fyri fólki.

Tá bráðfeingis kreppulógirnar vóru til viðgerðar í august í ár, atkvoddi eg fyri einum parti av teimum, men eg gjordi samstundis greitt, at tær loystu ongar trupulleikar fram í tíðina, men eg tók undir við teimum, so endurskipaða samgongan kundi fáa stundir at fyrireika og framleggja grundleggjandi broytingar í hesum máli.

Tríggir mánaðir eru farnir og einki er hent við málinum.

Nú er bráðneyðugt at finna loysn, tí steðgar fiskivinna okkara, so steðgar skjótt samfelagshjólið alt, og verða tí hesir spurningar settir landsstýrismanninum í fiskivinnumálum:

29. november varð samtykt, at Heðin Klein, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

14. december svaraði Heðin Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Løgtingsmaðurin Hilmar Kass hevur sett undirritaða tríggjar spurningar.

Viðvikjandi fyrsta spurningi tingmansins er at siga, at landsstýrið í næstum fer at leggja uppskot fyri løgtingið, sum kunnu hjálpa um fíggjarviðurskiftini hjá fiskivinnuni.

Til annan spurning er fyrst at siga, at spurningurin er settur fram við einum polemiskum sikti, sum undirritaði ikki kann taka undir við. Uppskot landsstýrisins eru ætlað at hjálpa bæði í ti aktuellu stoðuni og við framtíðini í huga.

Til triðja spurningin er svarið, at landsstýrisins uppskot verða í tveimum partum. Uppskot viðvikjandi aktuellu likviditetsstoðuni hjá veiðuflotanum verður lagt fyri løgtingið nú fyrsta dagin, meðan uppskot viðvikjandi eini framtíðar stoðulsskipan til fiskivinnuna verða fyrilagd løgtinginum í januar 1980.

---

27. Kgl. fyriskipanir um »hjemmesygeplejerskeordninger, sundhedsplejerskeordninger og skolelægeordning«

Ár 1979, mikudagin 5. december legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at fremja hjáløgdu uppskot til:

1. »Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov nr. 408 af 13. juni 1973 om hjemmesygeplejerskeordninger«.
2. »Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov nr. 409 af 13. juni 1973 om sundhedsplejerskeordninger.«

3. »Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om skolelægeordning, jfr. lovbekendtgørelse nr. 430 af 16. august 1974.«

Viðmerkingar:

I álitinum frá nevndini viðvíkjandi kommunulæknaskipanini o. o. m. í Føroyum 1973 er sett fram uppskot um eina samskipan av heima-, sjúkra-, smábarna- og skúlaheilsusystraviðurskiftunum, og logtingið hevur í logtingsmáli nr. 14/1975 tann 6. februar 1976 samtykt, at henda samskipanin skal fremjast.

I álitinum er eisini tað uppskot sett fram, at útreiðslurnar av skipanini verða býttar við helvtini til ríkiskassan og einum fjórðingi til ávikavist landskassan og kommunurnar.

Henda gjaldsskipan hevur ta fyritreyt, at lóg nr. 408 frá 13. juni 1973 «om hjemmesygeplejerskeordninger» verður sett í gildi í Føroyum, tá eingin lóg er galdandi á hesum økinum, sum er.

Gjaldsskipanin og samskipanin gera tað harafturat neyðugt at broyta ta smábarnaheilsusystraskipanina, sum er galdandi sambært kgl. fyriskipan nr. 423 frá 7. december 1965 «om ikraftsættelse på Færøerne af lov om sundhedsplejerskeordning.»

Eisini hevur gjaldskipanin viðvíkjandi skúlaheilsusystrum ta fyritreyt, at galdandi lógin fyri Føroyar «om skolelæger» nr. 140 frá 31. mars 1960 verður broytt.

Vísandi til hetta hevur innanríkismálaráðið í samráð við ríkisumboðið og landslæknan gjørt uppskot til tær triggjar kgl. fyriskipanirnar, sum nevndar eru í frammanfyri standandi uppskoti til samtyktar.

Herumframt hevur ríkisumboðið gjørt hjálagda notat um útreiðslurnar og býtið av teimum undir galdandi skipan og undir tí samskipan, sum uppskotið til samtyktar fevnir um.

Til hetta notatið skal viðmerkjast, at innanríkismálaráðið í skrivi dagfest 31. mai 1979 hevur tikið fyrivarni viðvíkjandi góðkenning frá donsku fíggjarnevndini av skúlalæknaskipanini, av tí at gjaldskipanin viðvíkjandi skúlalæknum sambært uppskotið er øðrvísi enn í Danmark, har kommunurnar rinda allar útreiðslurnar uttan endurgjald.

Landsstýrið hevur samtykt at leggja uppskotini til umræddu triggjar kgl. fyriskipanir fyri logtingið við tilmæli.

I viðgerð 19. december. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 27. februar legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð hin 5. december 1979 lagt fram av landsstýrinum og við 1. viðgerð hin 19. december 1979 beint í sosialu nevndina.

Uppskotið snýr seg um at seta í gildi reglur fyri heimasjúkrasystraskipan, heilsusystraskipan og skúlalæknaskipan. Soleiðis sum tingið samtykti í tingmáli nr. 14/1975 hin 6. februar 1976.

Fíggjarliga ávirkanin av skipanunum verður, at føroysku sjúkrakassarnir koma at

spara kr. 375.000, og kommununnar spara 215.000 kr. Landskassin og statskassin koma at rinda ávikavist kr. 725.000 og 1.055.000 metra. Landskassans partur er tikin við á fíggjarlogtingslógaruppskotinum fyri 1980/81.

Ein meirluti (Iona Henriksen, Karin Kjølbro og Jógvan Sundstein) ásannar, at tingið í 1976 hevur samtykt at seta nevndu skipanir í verk. Út frá hesum og tí upplatan, at hendan fyribyrgjandi heilsuskipanin og partvís desentralisering av heilsuhjálp kemur at minka um trýstið á sjúkrahúsini, og harvið framyvir spara um útreiðsluøkingina á hesum oki, mælir meirlutin til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Ein minniluti (Eli Nolsoe og Flemming Mikkelsen) setur eingki uppskot fram, men tekur stoðu í tingsalinum.

2. viðgerð 4. mars 1980. Uppskotið varð samtykt við 25-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 908-3-2.

---

28. Kgl. fyriskipan »om foranstaltninger til tuberkulosens bekæmpelse«

28. Kgl. fyriskipan «om foranstaltninger til tuberkulosens bekæmpelse».

Ár 1979, mikudagin 5. desember legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið mælir rikisstýrinum til at fremja hjálagda uppskot til «Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov nr. 178 af 7. maj 1975 om ændring af lov om foranstaltninger til tuberkulosens bekæmpelse».

Viðmerkingar:

Við lóg nr. 178 frá 7. mai 1975 um broyting í lóg nr. 145 frá 12. mars 1918 við seinri broytingum «om foranstaltninger til tuberkulosens bekæmpelse» í Danmark eru §§ 2-17 farnar úr gildi, og í staðin eru settar §§ 2-4. Eftir §§ 2 og 3 hava innanríkismálaráðharrin og heilsustýrið heimild at áseta reglur ávikavist um «foranstaltninger til tuberkulosens bekæmpelse» og um, hvørji fólk ella bólkar av fólki skulu

tuberklakannast v.m. 1 § 4 er heimild at seta lógina í gildi fyri Føroyar við kgl. fyriskipan.

Um grundgevingina fyri nevndu broytingar í reglunum um «foranstaltninger til tuberkulosens bekæmpelse» verður víst til hjálagdu viðmerkingar til uppskotið til frammanfyri nevndu lóg nr. 178/1975.

Frammanfyri nevnda lóg nr. 145 frá 12. mars 1918 varð sett í gildi fyri Føroyar við fyriskipan nr. 185 frá 1. april 1921 sum broytt við fyriskipan nr. 138 frá 22. mars 1939.

Í hjálagda uppskoti til fyriskipan verður skotið upp at broyta reglurnar í fyriskipan nr. 185 frá 1. april 1921 sum broytt við fyriskipan nr. 138 frá 22. mars 1939 samsvarandi broytingini í Danmark, soleiðis at §§ 2-15 fara úr gildi, og í staðin verða settar §§ 2 og 3, sum heimila ávikavist innanríkisumálaráðharranum og heilsustýrinum eftir samráðing við landsstýrið at ásetta reglur ávikavist «om foranstaltninger til tuberkulosens bekæmpelsen» og um hvørji fólk ella bólkar av fólki skulu tuberklakannast v. m.

Uppá fyrispurning frá ríkisumboðsmanninum hevur landslæknin eftir samráðing við yvirlæknan í lungnamedicini sagt frá, at hann ongar læknafigur viðmerkingar hevur til lóg nr. 178/1975 og mælir til, at lógin verður sett í gildi í Føroyum.

Landsstýrið hevur samtykt at leggja uppskotið til «Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov nr. 178 af 7. maj 1975 om ændring af lov om foranstaltninger til tuberkulosens bekæmpelse» fyri lógtingið við tilmæli.

1. viðgerð 12. december. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 29. februar legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð hin 5. december 1979 lagt fram av landsstýrinum og við 1. viðgerð hin 12. december 1979 beint í sosialu nevndina.

Broytingin snýr seg um, at í staðin fyri fjoldarkanningar fyri tuberklar kann skipan setast í verk til kanning av einstokum bólkum. Bæði landslæknin og yvirlæknin í lungnamedicini viðmæla uppskotið.

Sjómannakanningar fara fram óbroyttar.

Nevndin tekur einmælt undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 4. mars 1980. Uppskotið varð samtykt við 30—0 atkvæðum.

F.L. j.nr. 926-7.

29. »Anordning om tilbud om gratis vaccination mod visse sygdomme«

Ár 1979, mikudagin 5. december legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

I

Uppskot
til
samtyktar.

Lógtingið mælir ríkisstýrinum til at fremja hjálagda uppskot til »Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov nr. 634 af 17. december 1976 om tilbud om gratis vaccination mod visse sygdomme«.

II

Uppskot
til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um býti av Føroya parti í samsýningum fyri kopping móti difteri og stívkrampa.

§ 1. Løgtingslóg nr. 8 frá 16. mai 1956 um býti av Foroya parti í samsýningum fyri kopping móti difteri og stívkrampa verður sett úr gildi.

§ 2. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

løgtingslov om ophævelse af løgtingslov om fordeling af Færøernes andel af honorarer for vaccination mod difteri og stivkrampe.

§ 1. Løgtingslov nr. 8 af 16. marts 1956 om fordeling af Færøernes andel af honorarer for vaccination mod difteri og stivkrampe ophæves.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við lóg nr. 634 frá 17. december 1976 »om tilbud om gratis vaccination mod visse sygdomme« í Danmark eru reglurnar um ókeypis koppseting sambært fleiri lógir samlaðar í eina lóg fyri at fáa til vega meira snildligar reglur um koppseting, so hon betur kann laga seg eftir framtíðar torvinum.

Um nærri grundgevingina fyri nýggju lógina verður víst til hjálogdu viðmerkingar til lógaruppskotið.

Vísandi til hetta hevur innanríkismálaráðið gjørt hjálagda uppskot til »Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov nr. 634 af 17. december 1976 om tilbud om gratis vaccination mod visse sygdomme«. Sumstundis hevur innanríkismálaráðið gjørt uppskot til »Bekendtgørelse om gratis vaccination mod visse smitsomme sygdomme m.v. på Færøerne«, sum í § 1 ásetir: »Enhver person under 18 ár, der har dansk indfødsret eller bopæl på Færøerne kan gratis blive vaccineret mod kighoste, difteri, stivkrampe og polio samt tuberkulose«.

Innanríkismálaráðið tekur fyrivarni viðvíkjandi góðkenning frá danska figgjarnevndini av skipanini, av tí at ríkiskassin eftir uppskotinum endurrindar landskassanum 50% av útreiðslunum, meðan útreiðslurnar í Danmark allar verða rindaðar av amtskommununum umfram av København og Frederiksbergs kommunum.

Landslæknin hevur mælt til, at lógin verður sett í gildi í Føroyum skjótast gjørligt, vísandi til, at hon fyrisitingarliga vil verða eitt framstig, og at einki er, sum talar ímóti, at hon verður sett í gildi.

Skipanin viðvíkjandi rindan av útreiðslunum hevur verið ymisk eftir teimum ymisku lógunum. Útreiðslurnar til koppseting móti polio hevur gjaldstovan lagt út og fingið endurrindað við 100% úr ríkiskassanum. Útreiðslurnar til koppseting móti difteri og stívkrampa hevur landskassin rindað og fingið endurgoldnar úr ríkiskassanum við 50%, meðan hin helvtin hevur verið býtt millum landskassan og viðkomandi kommunur sambært løgtingslóg nr. 8 frá 16. mars 1956 um býti av Føroya parti í samsýningum fyri kopping móti difteri og stívkrampa. Eftir at farið varð undir at koppseta móti polio, difteri og stívkrampa í senn, hevur ríkiskassin tó goldið allar útreiðslurnar hesum viðvíkjandi. Útreiðslurnar til koppseting móti kikhosta hevur landskassin rindað og fingið endurrindaðar við 50% úr ríkiskassanum og 50% av viðkomandi kommunum.

Sambært uppskotið til kgl. fyriskipan § 1. stk. 2, verða útreiðslurnar rindaðar av landsstýrinum og ríkiskassin endurrindar landskassanum helvtina av útreiðslunum, meðan einki er ásett um, at kommunurnar skulu bera ein part av útreiðslunum. Hetta svarar til, at tað í Danmark eru amtskommununurnar, ikki kommununurnar á staðnum burtursæð frá København og Frederiksbergs kommunum, ið rinda útreiðslurnar av hesi koppsetingarskipan.

Samlaðu útreiðslurnar til koppseting móti polio, difteri, stívkrampa og kikhosta vóru í 1978/79 góðar kr. 85.000,00, nevniliga góðar kr. 67.000,00 rindaðar úr ríkiskassanum og góðar 18.000 kr. rindaðar av kommununum.

Uppskotið til kgl. fyriskipan førir sostatt við sær, at landskassin kemur at rinda umleið kr. 43.000,00 árliga til nevndu koppseting, heruppi í tann partin uppá kr. 18.000,00, sum kommununurnar higartil hava rindað. Meirútreiðslan at rinda frá føroyskari síðu verður sostatt kr. 25.000,00.

Landsstýrið hevur samtykt at leggja uppskot til «Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov nr. 634 af 17. december 1976 om tilbud om gratis vaccination mod visse sygdomme» og uppskot til løgtingslóg um avtoku av løgtingslóg um býti av Føroya parti í samsýningum fyri kopping móti difteri og stívkrampa frá 6. mars 1956 fyri løgtingið við tilmæli.

1. viðgerð 12. december. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 15. apríl legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið var lagt fram av landsstýrinum tann 5. december 1979 og undir 1. viðgerð tann 12. í sama mánaða beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at samtykt verður at logtingið mælir ríkisstýrinum til at fremja tað í málinum hjálagda uppskot til «Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov nr. 634 af 17. december 1976 om tilbud om gratis vaccination mod visse sygdomme».

Eftir uppskotinum til logtingslóg um avtoku av logtingslóg um býti av Foroya parti av samsýningum fyri kopping móti difteri og stivkrampa verður logtingslóg nr. 8 frá 16. mai 1956 um býti av Foroya parti í samsýningum fyri kopping móti difteri og stivkrampa sett úr gildi

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og tekur ein meiriluti (Hákun Djurhuus, Haldur Hansen, Jørgen Thomsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen og Jógvan Durhuus) undir við uppskoti landsstýrisins, meðan minniluti (Asbjørn Joensen) einki uppskot setur fram.

2. viðgerð 21. og 23. apríl. 3. viðgerð 24. apríl, uppskotið samtykt við 27—0, atkv.

F.L. þátt. 927-10. Lóg nr. 70 frá 28. mai. 1980.

---

30. Flutningur av feskari fiskavøru

Ár 1979, týsdagin 11. december legði Hilmar Kass, logtingsmaður vegna Sjálvstýrisflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar.

Álagt verður landsstýrinum í samráð við fiskavirkir, skip og bátar at skipa fyri regluligum sambandi við útlandið, so feskar fiskavørur kunnu flytast á europeiska marknaðin.

Álagt verður landsstýrinum um neyðugt við lógaruppskoti at tryggja, at øll virkir, skip og bátar kunnu vera við í slíkari solu uttan mun til, um tey eru bundin at solufelag ella ikki.

Viðmerkingar:

Kreppan, fiskafloti okkara er í, verður ikki loyst við at hækka almennan stuðning. Vit mugu fara út um kendar vanabundnar leiðir við at skapa moguleika fyri friari kapping í avreiðingarprísinum.

Um feskfiskafloti okkara fekk sama pris, sum er galdandi á europeiska meginlandinum, so var hann ikki í kreppu.

Umberingin, at vit eru so langt frá meginlandinum, dugir ikki longur. Um t. d. Smyril sigldi til Scrabster tvær ferðir um vikuna, ella flutningsflogfar fleyg eina ferð um dagin, so kundi munandi av tí fiski, ið kemur heilt feskur upp á land í Føroyum, verið fluttur sum fesk fiskavora til brúkaran í Bretlandi ella longri inni á meginlandinum.

Neyðugt verður at gera nýggjan tíðarhóskandi flogvoll. Vit hava ikki ráð at lata vera.

Vit hevdu tá fingið ein avreiðingarpris, ið hevði verið minst tvær ferðir so hogur sum galdandi minstiprísur fyri allan fisk, sum verður avreiddur heilt feskur. Royndir eru longu gjordar, sum prógva betta.

Neyðugt verður at umskipa fiskimynstrið. Tí fiskur, sum hevur ligið fleiri dagar um borð á skipi, egnar seg ikki í hesi kapping. Tað er beldur eingin meining í, at heilt feskur fiskur skal hava sama avreiðingarpris sum fiskur, ið hevur ligið tvær vikur um borð á skipi.

Fyri at tryggja at ótilvirkaður fiskur ikki fór av landinum okkum til skaða, so átti ein minstiprísur at verið á fiski, sum verður fluttur rundur av landinum, sum var so hogur, at hann gav meiri útflutningsvirði, enn annars kundi fingist fyri hann. Vandi skuldi tó ikki verið fyri hesum. Um fiskurin verður skorin her á landi, verða flutningsútreiðsturnar ikki tað hálva av tí, tær vera, um fiskurin fer rundur av landinum.

Nakrir fyrimunir, um heuda skipan fæst í lag:

Avreiðingarprísurin á heilt feskum fiski og harvið inntokurnar hjá manning og skipi verða tvifaldaðar.

Strandferðslan og moguliga onnur føroysk skipafelog hevdu fingið storri inntoku.

Flutningur av feskum og frystum vorum við føroyskum bílum til Bretlands og longur fram og flutningur av aðrari voru heimaftur hevði verið ein nýggj týðandi vinnugrein.

P/f Flogsamband kundi keypt flutningsflogfar og soleiðis fingið gongd aftur á tað mál, sum frantakshugaðir menn settu sær fyri at loysa fyri eini 15 árum síðan, men sum tað almenna beindi fyri.

Tann parturin av vinnuni, ið nú er uttan ávirkan á søluna, hevði komið beinleiðis í samband við marknaðin.

Almennur stuðul til feskfiskaflotan kundi verið minni.

1. viðgerð 18. december. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 26. mars 1980 legði fram soljóðandi

Álit

Tað er Sjálvstýrisflokkurin, sum hevur lagt málið fyri løgtingið, og við fyrstu viðgerð varð tað beint í fiskivinnunevndina.

Í viðmerkingunum verður sagt, at kreppan, okkara fiskifloti er komin í, verður ikki loyst við at hækka almennan studning; vit mugu fara út um kendar vanahundnar leiðir við at skapa møguleika fyri frían kapping í avreiðingarprísinum.

Eisini verður skotið upp, at «Smyril» siglir tvær ferðir um vikuna til Scrabster við fiski ella flutningsflogfar flýgur eina ferð um dagin.

Víðari verður sagt, at neyðugt verður at gera nýggjan tíðarhóskandi flogvøll. Vit hava ikki ráð at lata vera.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Poul Jacob Olsen, Øssur Dam Jacobsen, Eyðun Viderø, Hans M. Joensen, Finnbogi Isaksen, Adolf Hansen) kann taka undir við uppskotsstillaranum í tí, at um vit kundu lingið munandi hægri prís fyri okkara útflutningsvøru og í sama mun minkað um tilskotið úr landskassanum, so hevði nógv verið vunnið.

Meirilutin heldur, at hetta mál er so stórt og umfatandi bæði við at leggja rutur sjóvegis og loftvegis, og haraftrat at fara undir at byggja nýggjan flogvøll, at hon ikki hevur møguleika at viðgera málið víðari, sum tað fyriliggur í løtuni, men er samd við uppskotsstillaranum 1, at málið verður sent landsstýrinum til víðari viðgerð, og setur fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Málið verður sent landsstýrinum til víðari viðgerð.

Minnilutin (Jógvan Olsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setur einki uppskot fram.

2. viðgerð 11. apríl 1980. Uppskotið til samtyktar frá meirilutanum (P. J. Olsen, Øssur Dam Jacobsen, Eyðun Viderø, Hans M. Joensen, Finnboga Isaksen og Adolf Hansen) samtykt við 18-0 atkvøðum.

---

31. Nevnd at viðgera fíggjarviðurskiftini hjá fiskivinnuni og samfelagnum

Ár 1979, týsdagin 11. december legði Hilmar Kass, løgtingsmaður vegna Sjálvstýrisflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Vald verður løgtingsnevnd við einum umboði úr hvørjum flokki. Henda nevnd fær sum uppgávu at leggja fyri løgtingið uppskot, sum kunnu skapa varandi loysu av fíggjarkreppuni hjá fiskivinnuni og samfelagnum.

Viðmerkingar:

Á vári 1975 varð Ráfiskagrunnurin skipaður.

1. grein:

Settur verður á stovn grunnur nevndur Ráfiskagrunnurin.

2. stk. Ráfiskagrunnurin hevur til endamáls at tryggja tí partinum av føroyska fiskiflotanum, ið avreiðir feskan fisk til fiskavirkir í Føroyum javnan avreiðingarpris fyri longri tíðarskeið.

2. grein:

Nevndin ásetur avreiðingarprísin.

2. stk. Nevndin ásetur avrokningarprísin frá úttlytara til fiskavirkir soleiðis, at avrokningarprísurin heldur framleiðsluútreiðslur og fulnaðargjald, tó við tolum, nevndin ásetur.

Hetta eru korini, fiskivinnan — fiskimaðurin — hevur arbeitt undir, síðani ráfiskagrunnurin fór at virka.

Sambært hesa lóg verður øllum liðum í samfelagnum tryggjað sítt fyrst, og um nakað er eftir, fær fiskivinnan tað. Nakað hevur verið lagt aftrat úr landskassanum, men ikki við einum orði verður fyriskrivað, at avreiðingarprísurin skal vera so høgur, at fiskimaðurin fær inntøku, sum hækkar við pristalinum, ella skipini skulu hava nóg mikið til framleiðsluútreiðslur og fullnaðargjald.

Hetta kann ikki vera annað enn viðvenda mannagongdin. Fiskivinnan er grundvøllurin í samfelag okkara, og tí eigur roknistykkið at byrja við avreiðingarprísinum, sum má vera so høgur, at fiskivinnan kann bera seg, og ískoytið úr landskassanum má koma í søluliðið, um tað er neyðugt.

Seinastu árini hevur stórur partur av fiskiskapinum ikki fingið til framleiðsluútreiðslur, ena minni til fulnaðargjald.

Fiskivinnan er við at steðga av figgjartrupulleikum. Nokur skip royna at selja uttanlands, har meira fæst fyri fiskin, og hetta hevur ávirkað, at arbeiðið á flakavirkjunum er minkað munandi, so arbeiðandi fólkið eisini er farið at merkja sviðan.

Stórar samfelagsbroytingar eru neyðugar. Tað kann ikki vera nógv skil í fyrst at lata landsins borgarum einar 150 milj. kr. og so at krevja tær aftur til at lata høvuðsvinnuni. Her er skeivleiki í lonarlagnum, sum má broytast.

Gongdin í landsins figgjarpolitikki er út av lagi ring. Uttanlandsskuldin veksur óhugnaliga skjótt. Arbeiðsskapandi íløgur eru ikki í mun til vokstur í skuldini. Meginparturin fer í eitt alt ov stórt forbruk hjá tí almenna og einstaklinginum.

Um ikki vend fæst í hesa skeivu gongd, fara vit at missa tað figgjarliga sjálvstýri, vit hava.

Vit meta støðuna so álvarsama, at mælt verður til at leggja partapolitikk burtur og skipa eina nevnd við einum umboð úr hvørjum flokki, sum fær til uppgávu at koma við uppskoti, hvussu figgjarkreppan hjá fiskivinnuni og samfelagnum ollum kann loysast fram í tíðina.

1. viðgerð 18. december. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 26. mars 1980 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av Sjálvstýrisflokkinum, og við fyrstu viðgerð 18. december 1979 varð málið beint í fiskivinnunevndina.

Í viðmerkingunum síga uppskotsstillararnir millum annað, hvussu út av lagi illa ráfiskagrunnurin hevur virkað fyri fiskimannin og skipini, og teir meta, at hetta er høvuðsorsokin til teir trupulleikar, sum okkara fiskivinna er komin í. So verður eisini sagt, at um fiskaprísirnir høvdu verið prístalsviðgjordir, so hevði sæð betri út.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Poul Jacob Olsen, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Óssur Dam Jacobsen og Eyðun Viderø) kann ikki taka undir við hesum sjónarmiði uppskotsstillaranna, tí vit meta, at ráfiskagrunnurin hevur virkað rættiliga vel, síðani lógin um ráfiskagrunnin kom í gildi; við hvussu er heldur meirilutin, at einki uppskot enn hevur verið lagt fyri tingið, sum er betri.

Meirilutin heldur ikki, at tað hevði verið lættari at komið til nakað betri úrslit, um ein nevnd verður sett við einum limi úr hvørjum flokki til at viðgera figgjarviðurskiftini her á landi.

Tey mál, ið snúgva seg um figgjarviðurskifti landsins, koma fram á ting, og her fáa tingmenn høvi til at siga sína hugsan og bera sínt hugskot fram; harnæst fáa slík mál viðgerð í figgjarnevndini, har uppskotsstillararnir hava møguleika til at gera sína ávirkan galdandi.

Meirilutin setur einki uppskot fram í hesum máli.

Ein minniluti (Adolf V. Hansen) kann sum heild taka undir við viðmerkingunum til uppskoti. Mett verður tó, at orðingin í uppskotinum til samtyktar er ov veikt útformað í tann mun, at eingin tíðarfreist fyri framlogu av nevndarinnar uppskoti verður sett, og at nevndini ikki verður heimilað at taka sær alla neyðuga serkona hjálp.

Minnilutin tekur undir við, at prísásetingin eigur at byrja við teimum, sum útvega råvøruna, og at møgulig fiskoyti koma í síðsta enda, í útflutningsliðinum og/ella søluliðinum.

Fiskaprísirnir megu leggjast á eitt tílíkt stoði, at fiskifør og manning eins og fiskavirkir og arbeiðsfólk hvør í sínum lagi kunnu hvíla í egnum inntokum, og at prísirnir verða dýrtíðarviðgjørdir, soleiðis at tryggleiki fæst fyri bæði arbeiði og íløgum.

Út frá hesum setur minnilutin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Vald verður ein nevnd við einum umboði úr hvørjum flokki. Henda nevndin fær sum uppgávu at endurskoða tær lógir og reglugerðir, sum saman við heildarloysnini hava ført til kreppuna hjá fiskivinnuni.

Nevndin kann taka sær alla ta serkønu hjálp, hon hevur fyri neyðini fyri at útarbeiða uppskot, sum kunnu skapa varandi loysn av fíggjarkreppuni hjá fiskivinnuni og samfelagnum.

Nevndin skal í seinasta lagi 1. oktober 1980 leggja uppskot fyri tingið.

Ein annar minniluti (Jógvan Olsen) kann í hovuðsheitum taka undir við teimum viðmerkingunum, ið uppskotsstillararnir føra fram, serliga har sagt verður viðvíkjandi avreiðingarprísinum, at roknistykkið eigur at byrja við avreiðingarprísinum.

Minnilutin tekur ikki undir við at seta eina serliga nevnd, soleiðis sum skotið er upp, at viðgera hesi vandamál, men metir, at løgtingsins fíggjarnevnd eigur at verða litið upp í hendi at gera hetta arbeiði, sum eigur at byrja við at savna saman alt tað tilfar, ið fyriliggur hjá teimum ymisku stovnunum í hesum málum, og setur fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Álagt verður løgtingsins fíggjarnevnd á ólavsoku 1980 at leggja fyri løgtingið uppskot um eina loysn av fíggjarkreppuni hjá fiskivinnuni.

2. viðgerð 11. apríl 1980. Broytingaruppskot frá minnilutanum Adolf Hansen fall við 4-0, uppskotið til samtyktar fall við 4-0. broytingaruppskot frá minnilutanum Jógvan Olsen fall við 11-0.

32. Rakstur av trolaranum „Nónhamar"

Ár 1979, týsdagin 11. december legði Atli P. Dam, løgmaður vegna landsstýrið fram

Uppskot
til

løgtingslóg um at landskassin rekur troloran «Nónhamar» til fiskiskap.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at reka trolaran «Nónhamar» til fiskiskap, herundir at taka upp tey lán, ið raksturin krevur. Eisini verður heimilað landsstýrinum saman við fíggjarnevndini at selja trolaran.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om at landskassen driver trawleren «Nónhamar» til fiskeri.

§ 1. Landsstyret bemyndiges landskassens vegne at drive trawleren «Nónhamar» til fiskeri, og i denne forbindelse at optage de lån, som driften forudsætter. Endvidere bemyndiges landsstyret til sammen med finansudvalget at afhænde trawleren.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Landsstýrið keypti m/s «Nónhamar» á tvingsilsuppboði tann 8. november í ár fyri at tryggja studningslán uppá umleið kr. 5 milj. og veðhaldsskyldur yvirfyri Eksportfinans, Oslo, uppá kr. 3,8 milj. + rentur og áður goldið til Eksportfinans umleið kr. 500.000, sum var partur av avdrátti við rentum.

Báturin varð keyptur fyri sjópantikrøv kr. 2 milj. + útreiðslur.

Keypt varð sambært avtalu við Eksportfinans, Oslo. Sambært hesa avtalu yvirtekur landsstýrið, til annar keypari fæst, restskuldina til Eksportfinans n. kr. 17.955.000.

Av falnum rentum pr. 20. sept. 1979 n. kr. 2.852.253 skal landsstýrið gjalda n. kr. 1 milj., meðan n. kr. 852.253 verða lagdar afturat hovuðsstólinum, Eksportfinans avskrivar n. kr. 1 milj.

Landsstýrið heldur tað vera rætt at selja bátin, um hóskandi boð fæst, men tá hetta kann taka nakað av tíð, og tá landsstýrið ikki heldur tað vera rætt at leggja bátin fyri teym, verður søkt um heimild at reka bátin til fiskiskap.

Ætlanin er so at útgerðarfelag skal reiða bátin út, meðan ein rakstrarnevnd verður sett til at hava eftirlit við rakstrinum.

Í løtuni er báturin leigaður út til P/f J. F. Kjølbro til ein ísfiskatúr í december mánaða.

1. viðgerð 13. december. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 21. december legði fram soljóðandi

Á l í t

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 11. december 1979 og undir fyrstu viðgerð tann 13. december beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og mælir meirilutin (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Jørgen Thomsen og Jógvan Durhuus) tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen) kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins og setur fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar

Landsstýrinum verður álagt beinanvegin at taka stig til at selja trolaran «Nónhamar» fyri hægst møguligan søluprís. Roynt eigur at vera at skipa so fyri, at trolarin verður verandi í Klaksvík.

Minnilutin (Asbjørn Joensen) kann ikki taka undir við uppskotinum og setur fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar

Landsstýrinum verður heimilað at hava raksturin av m/t «Nónhamar» fyri eitt ár til 1. januar 1981 og at seta nevnd at hava eftirlit við rakstrinum. Nevndin eigur eftir eitt hálvt ár at boða fíggjarnevndini frá rakstrarúrslitinum. Tá rakstrarárið er runnið, eigur málið at verða tikið til nýggja viðgerð.

21. december 1979 varð tingsins Joyvi givið at frávíkja tíðarfreistini at hava 2. viðgerð av málinum. § 1 í landsstýrisins uppskoti varð samtykt við 18-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. Minnilutauppskot frá Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen fall við 7-0. Minnilutauppskot frá Asbjørn Joensen fall við 3-0.

Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 3. viðgerð á seinni fundi sama dag við 18-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1415-1-555. Lóg nr. 9 frá 14. januar 1980.

33. Fyrispurningur til Hergeir Nielsen, landsstýrismann

Ár 1979, týsdagin 27. november setti Juul Jacobsen, logtingsmaður Hergeiri Nielsen, landsstýrismanni fram soljóðandi

f y r i s p u r n i n g

Tað kemur fyri at kolli koma til Nólsoyar, sum eru so tung, at Ritan ikki kann lyfta tey. Kann tað ikki lata seg gera at skifta um uppá bátarnar hjá Strandferðsluni ta rutuna, soleiðis at vit kunnu fáa sonn sendir sum aðrir borgarar í landinum til vøruflutning.

Viðmerkingur:

Ritan er ein góður fartur, sum vit eru glaðir fyri, men tað er mark fyri hvat hon kann lyfta. Tað hendir seg at slík kolli koma til Nólsoyar, sum eru so tung, at annað far má fáast, tá kunnu vit ikki brúka Strandferðsluna, tí hon er so dýr og oftani er tvørligt at fáa annað far sum rímuligt er. Vit hava fingið eitt flakavirki, sum vit eru glað fyri, men fyri at fáa tað at mala runt, mugu vit venda hvørjum oyra, og uttan vælvild frá Strandferðsluni verður tí ikki liv lagað.

13. december svaraði Hergeir Nielsen, landsstýrismaður fyrisputninginum soleiðis

Tá flutningur er av tílíkum slag, at verandi bátur, eitt nú til Nólsoyar, ikki vísir seg at fúka ávís krøv, hevur Strandferðslan sýnt vælvild og sent annan bát, ið hevur verið førur fyri at røkja hesa uppgávu.

Strandferðslan sýnir, og ætlar framvegis at sýna sonn vælvild, eisini á leiðini til Nólsoyar.

34. Fyrispurningur til Demmus Hentze, landsstýrismann

Ár 1979, mikudagin 12. december setti Ivan Johannesen, løgtingsmaður vegna Sambandsflokkin Demmus Hentze, landsstýrismanni fram soljóðandi

Fyrispurning

Undir viðgerðini av løgtingsmáli nr. 28/1978 (vetrarting): Skattaendurgjald til sjófólkið samtykti løgtingið í mai 1979 uppskot til samtyktar frá skattanevndini í uppiskoytisálitinum:

«Løgtingið áleggur landsstýrinum at leggja uppskot fyri tingið um hesar broytingar í skattalógini:

1. Serskatting av øllum hjúnum.

...»

1. Hvat hevur landsstýrið gjørt við hetta mál?

2. Ætlar landsstýrið at fáa hetta mál avgreitt, áðrenn komandi skattaálíkning?

21. december svaraði Demmus Hentze, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis

Spurt verður, hvat landsstýrið hevur gjørt við spurningin um serskatting av øllum hjúnum, og um landsstýrið ætlar at fáa málið avgreitt, áðrenn komandi skattaálíkning, og skal vera svarað, at millum tær stórbroytingar, sum vórðu framdar í skattalógini í seinastu tingsetu, var eisini framd ein partvís serskatting av hjúnum.

Landsstýrið hevði í sínum arbeiði við lógini miðað imóti at fáa alla samskatting avtikna, men vísti tað seg trupult at fáa eina fullkomiliga serskatting av øllum hjúnum at gerast væl hóskandi. Úrslitið kom at vera, at serskatting er, har konan hevur inntøku av

a. sjálvstøðugum virki ella vinnu uttan fyri vinnu og virki mansins,
b. avlamis- og fólkapensjón, eftirløn og sjúkraløn og
c. uppihaldspeningi og øðrum sansýningum.

Tann sami vansin at fáa skipað eina fullkomiliga serskatting av hjúnum er sjálvandi tann sami nú sum fyri ári síðani, og kann ikki væntast, at broyting verður gjørd til komandi skattaálíkning.

35. Fyrispurningur til Heðin M. Klein, landsstýrismann

Ár 1979, hósdagin 13. december setti Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, Heðin Klein, landsstýrismanni fram soljóðandi

f y r i s p u r n i n g

Samb. yvirlit frá Hagdeildini eru veidd falt 4.373 tons av kongafiski fyrstu 10 mánaðirnar av 1979. Av hesum eru landað uttanlands 986 tons og samb. mánaðaryvirlit nr. 390 a frá Foroya Fiskasolu hevur hetta solufelag í sama tíðarskeiði útflutt til Danmarkar 207 tons og til V-Týskland 5 tons av ísaðum kongafiski og blálongu, falt 212 tons. Verður sæð burtur frá blálongu, t. v. s. um øll 212 tonsini eru kongafiskur, verður samlaði útflutningurin av kongafiski fyrstu 10 mánaðarnar av 1979 bert 1198 tons.

Draga vit 1.198 tons frá 4.373 tonsum sæst at 3.175 tons av kongafiski eru (bureaukratisk) forsvunnin.

Í bløðunum um dagarnar skrivar formaður Meginfelag Útróðrarmanna, Isak Matras, m.a.: «Úr ráfiskagrunninum eru farnar 4.373X0,78=3.410.980 kr. *Beint ímóti lóg og reglugerð grunsins*». (Orsakað av uttanlanda landingunum skal hetta tal verða 3.387.000X0,78=2.641.860 kr.).

Út frá hesum verður landsstýrismaðurin spurdur fylgjandi:

1. Hvar eru nevndu 3.175 tons av kongafiski?

2. Hvussu nógv og til hvønn hevur ráfiskagrunnurin goldið studning fyri kongafisk fyrstu 10 mánaðarnar av 1979?

3. Ætlar landsstýrið at kanna og møguliga reisa ákæru í málinum um kongafisk, um so er at gingið er «*beint ímóti lóg og reglugerð grunsins*».

20. december svaraði Heðin M. Klein, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

a) Samtíðis hjálagda yvirlit frá Lønjavningargrunninum er í tíðarskeiðinum 24. de-

cember 1978 til 27. oktober 1979 útgoldið kr. 2.845.984,78 fyri tilsamans 3.893.222 kg av kongafiski. Hvørt ið hevur fingið útgoldið hendan pening, er vist á hjálagda yvirliti.

b) Tá uppgerðin hjá Lonjavningargrunninum er fyri eitt 14-daga tíðarskeið, ber illa til at koma nærri tíðarskeiðinum «fyrstu 10 mánaðarnar av 1979».

c) Yvirlitið frá Veiðihagtalsstovuni visir, at í tíðarskeiðinum januar-oktober 1979 eru í Føroyum av føroyskum førum landað 4.016.000 kg av kongafiski. Henda upphædd er ósløgdur fiskur, og er lagt afturat tann fiskur, sum er fiskaður við Ísland og avreiddur í Føroyum.

Sostatt samsvarar nøgdin, sum Lønjavningargrunnurin hevur nýtt til at útgjalda ískoyti eftir, nokk so væl við ta nøgd, sum Veiðihagtalsstovan uppgevur fyri veiðuna, tá hædd verður tikin fyri tey ymisku uppgerðartíðarskeiðini.

d) Um hagtølini hjá Fiskasøluni (mánaðaryvirlit nr. 390 a) kann sigast, at her eru bert uppgivin fyri seg ísaður kongafiskur. Frystur kongafiskur er sambært hjálagda yvirlit nógv tann størsti parturin av kongafiskaframleiðsluni. Hesin parturin er í yvirlitinum settur undir «Ymiskt/kalvi, reyðsprøka o.a.».

e) Samlaða framleiðslan hjá flakavirkjunum, sum Fiskasølan uppgevur fyri tíðarskeiðið 1. januar til 6. november 1979, er sambært hjálagda yvirlit 3.792.800 kg umroknað til rundan fisk. Aftrat hesum kemur ein nøgd, sum Marr & Co hevur selt uppá 211.955 kg. Eisini hevur Handils- og Frystivirkið sjálvt selt umleið 6,4 tons. Sostatt verður samlaða nøgdin her 4.011.155 kg. Hetta kann eisini sigast at samsvara væl við hinar báðar upphæddirnar, tá ein tekur hædd fyri munin í uppgerðartíðarskeiðinum.

Sostatt er at svara til fyrispurningin frá Adolf Hansen, løgtingsmanni:

1) Tey 3.175 tonsini eru í mánaðaryvirliti nr. 390 a frá Fiskasøluni sett undir upphæddina «Ymiskt/kalvi, reyðsprøka o.a.»

2) Ráfiskagrunnurin hevur í tíðarskeiðinum 24. december 1978 til 27. oktober 1979 útgoldið kr. 2.845.984,78 fyri 3.893.222 kg av kongafiski til tey virkir, ið her eru nevnd.

3) Landsstýrið ætlar onga ákæru at reisa, so leingi tað ikki dugir at síggja, hvar og hvussu gingið er ímóti lóg og reglugerð fyri Ráfiskagrunnin.

Kongafiskanøgd og útgjald Ráfiskagrunnsins til kongafisk fyri tíðarskeiðið 24.12.1978 til 27.10.1979.

	kg.	kr.	kr.
24/12 1978 — 06/01 1979	36.481	á 0,53	19.334,93
07/01 — 20/01	146.173	á 0,57	83.318,61
21/01 — 03/02	303.297	á 0,28	84.923,16
04/02 — 17/02	75.207	á 0,28	21.057,96
18/02 — 03/03	34.041	á 0,30	10.212,30
04/03 — 17/03	5.420	á 0,30	1.626,00
18/03 — 31/03	2.702	á 0,27	729,54
01/04 — 14/04	57.205	á 0,28	16.017,40
15/04 — 28/04	65.619	á 0,33	21.654,27
29/04 — 12/05	203.673	á 0,33	67.212,09
13/05 — 26/05	210.052	á 0,22	46.211,44
27/05 — 31/05	59.441	á 0,21	12.482,61
01/06 — 09/06	287.825	á 0,66	189.964,50
10/06 — 23/06	190.895	á 0,62	118.354,90
24/06 — 07/07	100.912	á 0,67	67.611,04
08/07 — 21/07	151.032	á 0,73	110.253,36
22/07 — 04/08	176.013	á 0,93	163.692,09
05/08 — 14/08	131.782	á 0,90	118.603,80
15/08 — 18/08	47.095	á 1,05	49.449,75
19/08 — 01/09	242.029	á 1,05	254.130,45
02/09 — 15/09	209.564	á 1,05	220.042,20
16/09 — 29/09	274.238	á 1,08	296.177,04
30/09 — 13/10	421.878	á 1,01	426.096,78
14/10 — 27/10	460.648	á 0,97	446.828,56
	3.893.222		2.845.984,78

Studningur Ráfiskagrunsins til kongafisk í tíðarskeiðinum
24.12. 1978 til 27.10. 1979.

p/f. Bacalao	530.515,79 kr. fyri	726.879 kg.
p/f. J. Dahl Gorðum	222,85 kr. fyri	241 kg.
p/f. Frost	62.292,88 kr. fyri	77.809 kg.
p/f. Frostvirkið	9.814,49 kr. fyri	11.479 kg.
p/f. Fuglafjarðar fsvirki	82.203,98 kr. fyri	101.218 kg.
p/f. Foroyskt fslendskt Fiskavirki	52.218,78 kr. fyri	76.713 kg.
p/f. Handils- & Frystivirkið	588.247,57 kr. fyri	833.380 kg.
p/f. Joensen & Olsen	449,25 kr. fyri	465 kg.
p/f. J. F. Kjølbro	423.960,60 kr. fyri	497.137 kg.
p/f. Klivar	2.985,23 kr. fyri	3.231 kg.
p/f. Lynfrost	276.226,08 kr. fyri	382.006 kg.
p/f. N. Niclasen	5.439,13 kr. fyri	15.691 kg.
p/f. Norðis	23.776,24 kr. fyri	36.224 kg.
p/f. Nykur	27.528,06 kr. fyri	36.559 kg.
p/f. Polarfrost	370.782,09 kr. fyri	543.864 kg.
p/f. Snarfrost	136.657,87 kr. fyri	229.096 kg.
p/f. Sólaris	33.034,43 kr. fyri	35.511 kg.
p/f. Tvøroyrar Flakavirki	168.931,32 kr. fyri	182.772 kg.
p/f. Vestmanna Fiskavirki	50.698,14 kr. fyri	102.947 kg.
	2.845.984,78 kr. fyri	3.893.222 kg.

36. Fíggjarløgtingslógin 1980/81

Ár 1979, frígjadagin 14. december legði Demmus Hentze, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram uppskot til fíggjarløgtingslóg smbr. *skjal nr. 4 A* við soljóðandi viðmerkingum:

Viðmerkingar til fíggjarlógaruppskotið 1980/81.

Inntøkurnar.

Fíggjarlógaruppskotið hevur eina javnvág uppá 612.560.005 kr.

Skattainntøkan er sett at geva 326 milj. kr. í mun til fíggjarárið 1979/80 er hetta ein hækking uppá 43,5 milj. kr.

Tollinntøkurnar eru settar til 285,8 milj. kr. í mun til ta verandi fíggjarlóg er hetta ein hækking uppá 44,1 milj. kr.

Viðvíkjandi teimum í uppskotinum settu inntøkum skal vera sagt, at tað má haldast vera ivasamt, um tær fara at røkka uttan broytingar í skatta- og tolllóggávuni tann vegin, sum gevur landskassanum meirinntøkur. Orsøkin er tann, at í hesum fíggjarári er kontoin til minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna vaksin alnikið og samstundis gongur núgaldandi skipan hesi konto viðvíkjandi út 31. januar 1980, og sum er, kann eingki verða sagt, hvussu tann nýggja skipanin, ið tá tekur við og fer at galda í komandi fíggjarári, fer at síggja út ella hvussu fiskivinnurakstur okkara fer at roynast í komandi ári.

Viðvíkjandi tollinntøkuni skal vera lagt aftrat, at tað er nakað torfort at meta um hana, tí í mai mánaða í ár fóru rættiliga stórar tollhækkingar fram á flestu vørubólkum umframt, at so gott sum allar vørur fingu eitt cykainnflutningsgjald uppá 2%. Haraftrat kom síðani í september mánaði aftur eitt cykagjald uppá 2%.

Útreiðslurnar:

Útreiðslurnar eru vaksnar við 80.532.000 kr., og eru hækkingarnar í stórum hesar:

§ 5	Renturútreiðslur	5.400.000 kr.
§ 6	Strandfaraskip landsins	9.200.000 —
§ 10	Løgtingið	965.000 —
§ 11	Landsfyrisiting	9.250.000 —
§ 12	Heilsumál	4.190.000 —
§ 13	Samferðslumál	+ 700.000 —
§ 14	Skúlamál	3.154.000 —
§ 15	Vísund, bókmentir og list	4.411.000 —
§ 16	Fiskivinna	41.808.000 —
§ 17	Landbúnaður	1.675.000 —
§ 18	Handil, ídnaður o.tl.	+ 4.761.000 —
§ 19	Almannamál	6.871.000 —

Í uppskotinum eru lønarútreiðslurnar uppsettar við núgaldandi pristali og við sáttmálabundnum lønarhækkingum.

Ad § 6. Landsstovnar.

Árini frammanundan hevur Strandferðslan verið uppsett undir hesi grein við tí upplædd, sum seinasta árs roknskapur hevur vist, men til hetta fíggjarlógaruppskotið hevur stovnurin gjørt fíggjarætlan, sum sýnir eitt hall í rakstri uppá 16,7 milj. kr., og er upplýst, at hækkingin serliga stavar frá oljudýrkanini umfram hýru- og lønarvøkstri. Lagt kann vera aftrat, at í hesum fíggjarárinum er hallið mett at vera upp móti tí, sum skotið er upp at játta í komandi fíggjarári.

Ad § 10. Løgting.

Í hesi grein er konto 520: Løgtingstíðindi og kunngerðarsavn sett til kr. 500.000, og eru her tiknar við útreiðslur til fyrireikingar at geva út alment lýsingarblað. Landsstýrið hevur í ætlan í hesi tingsetu at leggja fram lóggávu um eitt tílíkt blað.

Ad § 11. Landsfyrisiting.

Undir hesa grein er sett nýggj konto: Landsskúlafyrisitingin við 3,4 milj. kr. Umframt einstakar nýnormeringar, herundir 2 prísansarar aftrat, eru settar av 500.000 kr. eyka til ognirnar á Tinganesi, herundir fyrireikingar at fáa Sjóbúðina uppafturbygda.

Ad § 12. Heilsumál.

Henda grein hevur lítið av nýjáttanum, men tá oljuútreiðslurnar hjá sjúkrahúsunum eru vaksnar almikið, er játtan veitt til oljusparandi tiltøk. Sum nýggj konto er sett heimasjúkrasystraskipan við kr. 665.000, um tingið samtykkir uppskotið, sum er hjá tí til viðgerðar.

Ad § 13. Samferðslumál.

Henda konto er nærum óbroytt.

Ad § 14. Skúlamál.

Henda grein er frá seinastu játtan farin úr 56,9 milj. kr. uppí 60,1 milj. kr., ella ein vøkstur uppá 5,7%.

Ad § 15. Vísund, bókmentir og list.

Viðvíkjandi prís- og lønarvøkstri, kann her verða nevnt, at undir øllum greinum í uppskotinum til hesa fíggjarlóg eru oljuútreiðslurnar vaksnar heilt munandi. Annars skal vera upplýst, at tá ið kontoin: Fiskirannsóknarstovan er vaksin úr 2,4 milj. kr. til 3,7 milj. kr., er orsøkin serliga tann, at landsstýrið umhugsar at fáa til vega nýtt fiskirannsóknarskip í staðin fyri «Jens Chr. Svabo», og eitt nýtt skip er dýrari í rakstri.

§ *16. Fiskivinna.*

Við hetta fíggjarárs byrjan var játtanin til mínstulon og annan stuðul til fiskivinnuna 80,5 milj. kr. Síðani hevur løgtingið samtykt fleiri munandi stuðulsskipanir, og roknað verður við, at tá hetta fíggjarár er komið at enda, eru av hesi konto útgoldnar einar 120 milj. kr. Sum frammanfyri sagt frá, kann landsstýrið nú við hesa framlogu ikki siga, hvussu nógv ein møgulig nýggj stuðulsskipan ber við sær í útreiðslum, og hvussu vánirnar fyri fiskivinnuni fara at vera í komandi fíggjarári, og hevur tí avsett somu upphædd, sum roknað er við, at 1979/80 fer at kosta landskassanum.

Vaktar- og bjargingartænastan er eisini farin munandi upp, og stendst hetta serliga av rakstrinum av «Tjaldrinum» og «Ólavi Halga», og eru aftur her oljurútreiðslurnar, ið gera seg galdandi. Leggjast skal aftrat, at uppií teimum knøppu 12 milj. kr., henda konto vísir, er eisini ein stór umvæling, sum má gerast við «Tjaldrið». Henda umvæling kann neyvan fara at kosta undir 1 milj. kr.

§ *17. Landbúnaður.*

Henda grein hevur stórt sæð somu upphædd, sum árini frammanundan. Hon er uppá 13,8 milj. kr.

§ *18. Handil, ídnaður o.t.*

Henda grein er lækkað úr 19,4 milj. kr. niður í 14,7 milj. kr., og stendst henda lækking av, at landsstýrið stendur fyri so stórum krøvum frá høvuðsvinnu okkara og metir tí, at tað er meir hóskandi í komandi fíggjarári at seta av til orkugrunn 5 milj. kr. Í hesum fíggjarárinum eru avsettar 10 milj. kr.

§ *19. Almannamál.*

Henda grein er vaksin úr 93 milj. kr. til 100 milj. kr. og er hetta í samsvar við tær ætlanir, ið tær sosialu veitingarnar fara at kosta landskassanum. Tann samlaða útreiðsluhækkingin er í mun til verandi fíggjarlóg 12,5%.

Sí skjal 4 A.

1. viðgerð 21., 22. og 23. januar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 25. mars legði fram soljóðandi

Álit

14. december 1979 varð av landsstýrinum lagt fram fyri løgtingið uppskot til fíggjarløgtingslógina 1980/81.

Málið kom til viðgerðar 21. januar 1980 og varð beint í fíggjarnevndina.

Framlagda fíggjarlógaruppskotið javnvigar í inntøkum og útreiðslum við kr. 612.560.005.

Arbeiðshátturin hjá fíggjarnevndini hevur verið hin sami sum undanfarnu ár fyri

at fáa eina greiða mynd av okkara búskaparligu viðurskiftum, bæði hvat viðvíkur støðuni sum hon er og útlitini framyvir.

Fundir hava verið við Búskaparráðið, Fiskasoluna og peningastovnarnar.

Tann mynd hesir stovnar, ið hava fingurin á pulsinum á okkara búskapi, í fjor gav okkum var ávarandi og álvarsom.

Hetta var gjort tinginum greitt í álitinum til fíggjarlógaruppskotið í fjor.

Myndin, ið hesir somu stovnar endurgeva í ár, er ikki minni ávarandi.

Búskaparráðið vísti á, at býtislutfallið fyri 1979 var vánaligt, avmarkingar blivu gjørdar í fiskiskapinum og ein nýggj oljukreppa kom. Hallið á gjaldsjavnanum í 1978 var stórt, serliga tí aktiviteturin í 1977 var ov stórur.

Í mars 1979 á fundi við fíggjarnevndina ávaraði búskaparráðið ímóti hesum:

1. at taka fleiri uttanlandslán
2. avmarka yvirnýtsluna
3. halda aftur við íløgum
4. at vera ov bjartskygdir viðvíkjandi okkara búskapi.

Fíggjarnevndin vildi nú vita, um orsøk var til at gera áskoyti til nevndu ávaringar.

Búskaparráðið svaraði, at tað sum hent er, er at vit eru farnir frá einum grovum hákonjukturi til ein lágkonjuktur.

Neyðugt verður at bremsa aktivitetskravið á likviditetin, t. v. s. minka um eftirspurningin.

Neyðugt verður at fáa hallið á gjaldsjavnanum niður. Støðan er nevniliga tann, at náttúrulógirnar í búskapinum eru farnar at virka og fáa sínar avleiðingar, t. v. s. í fjør og fyrra árið ávaraði búskaparráðið ímóti tí, ið fór at henda, nú eru vit komin í ta støðuna, ið tá var ávarað ímóti.

Knappheit er uppá likviditet og skal ein stór sanering fara fram í vinnulívinum, so verður eisini neyðugt at útvega likviditet til eina slíka sanering.

Búskaparráðið upplýsti, at uppsparingin er munandi minkað og meta teir at orsøkin er inflatiónin.

Eisini vístu teir á, at meðan tað áður í trongum tíðum í Føroyum hevði vist seg at gjørligt var at fáa eina ávísa uppsparing kortini, so var myndin nú broytt til tað verra.

Ráðið metti, at hallið á gjaldsjavnanum fyri 1979 verður 190 milj. kr., og merkir hetta at okkara uttanlandsskuld er vaksin við sama tali. Tað hevur vigað tungt, at veiðuavmarkingarnar hjá fiskiflotanum eru gjørdar og at útflutningurin er stagneraður.

Tað var vístá og undirstrikað, at heimafiskiskapurin altíð hevur havt ein veikan rentabilitet.

Fíggjarnevndin hevur havt fund við Føroya Fiskasøln eins og undanfarnu ár og fingið frágreiðing.

Fiskasølan er av teirri áskoðan, at hugsanin um at fáa meira pening hevur við sølu av traditionellum fiski í útlondunum, í veruleikanum ikki gevur nunandi upphæddir. Undantok kunnu tó møguliga gerast fyri kongafisk og blálongu.

Sum heild tikið má ikki roknast við prishækkingum, tí viðurskiftini liggja rættiliga føst. Broytingarnar kunnu bert koma ígjognum inflatión. Fiskasølan gjørdi vart við kappingina av kjøtmati frá landbúnaðinum, serliga viðvíkjandi hosnarungum, har prísurin er tvífaldaður, meðan prísurin á fiski seinru árini er faldaður 5 ella 6 ferðir.

Peningastovnarnir gjørdu vart við, at kreppan er sligin ígjognum í uppsparingini, serliga frá 1. december 1979. Útlitið framyvir er at munandi broyting er farin fram í

1. uppsparing
2. likviditeti.

Árið hevur ikki verið eins og tey frammanundan. Vanliga spara fólk um várið, serliga aftaná nýggjár. Nú hevur verið øðrvísi. Solciðis tykist at vera broytt teir seinastu mánaðirnar. Minni eftirspurningur eftir lánum til bygging, annars sami lánitørvur.

Tað hevur sansað at í 1979 og varar helst við inn í 1980. Likviditetsbroytingin hevur verið harðliga til tað verra.

Eftirstøður og yvirfrekk í bankunum hava ongantíð verið so stór sum nú og tykist tað, sum ein orsøk til hesa støðu hjá vinnulívinum er, at ein stegður er komin í við at rinda, tí teir vóna at fáa lut í 60 milj. kr. lánunum til fiskifor.

Peningastovnarnir tilskilaðu, at tey stuttu innlánini vísa eina minni hækking enn árini frammanundan og at nýtslan av kredittum er storri enn fyrr. Teir upplýstu, at útlánini eru økt í mun til innskotini, og hevur hetta bert latið seg gera, tí ársvinningurin hevur verið so stórur og eisini eru virðisbrev belánt í Tjóðarbankanum.

Samanumtikið eru peningastovnarnir av teirri áskoðan, at neyðugt er, at hildið verður aftur við útlánum, og kann hetta gerast við rentupolitikki og at leverandørkredittir verða veittir.

Tann mynd ið samverðurnar hjá logtingsins figgjarnevnd við Búskaparráðið, Fiskasøluna og peningastovnarnir hava givið okkum vísir, at vit eru búskaparliga í vandasjógvi. Tað vóru vit eisini í fjor, eitt ár við rekordhalli á gjaldsjavnvágini.

Tá var stavnhaldið, at hovuðsvinnan - fiskivinnan - eigur og skal eiga ein forrætt frammum onnur vinnuøki og hava politisk tiltøk verið gjørd fyri at halda hetta lyftí. Men støðan sum heild hjá okkara búskapi er nú verri enn myndin vísti seinasta ár. Rekordhallið á gjaldsjavnanum er uppaftur størri enn tað var í 1978, og avparerandi tiltøk eru uppaftur neyðugari í tíðini framyvir sigá teir stovnar óbeinleiðis, sum figgjarnevndin hevur havt fundir við.

Taka vit nú ta mynd, ið aðrir hava gjort sær av okkara búskapi, t. d. Det Rådgivende Udvalg vedrørende Færøerne, ið gjølla hevur fylgt við og fylgir við okkara búskaparliga politikki, so siggja vit, at í høvuðslinjunum í sínum sjónarmiðum liggja teir borð um borð við tað, ið okkara egnu búskaparkonu gera vart við.

Samandráttur av tí ið Det Rådgivende Udvalg vedrørende Færøerne sigur viðvíkjandi fíggjarstoðuni fyri Føroyar í 1979 er hesin:

Hallið í føroysku fiskiveiðuni, ið byrjaði í 1978, helt áfram í 1979. Útflutningurin av fiskavørum lð frá 1977 til 1978 fall við 10%, fall við uppaftur góðum 7% frá 1978 til 1979 og er hetta í næstan fult mát orsakað av fallið í fiskiveiðuni, tá útflutningsprísirnir fyri fisk vóru næstan eins høgir í 1979 sum í 1978.

Niðurgongdin í veiðini kann í eitt vist mát tillutast minkan í rækjufiskiveiðu undir Grønlandi, men eisini veiðurnar undir Føroyum vístu tó, hóast miklan stuðul til fiskivinnuna, lyndi at standa í stað, samstundis sum tað ikki var gjørligt at nýta tær veiðukvotur, ið vit høvdu fingið sambært fiskiveiðusáttmálar við EF, Noreg og Sovjetsamveldið.

Tá hækkingin í innflutningsprísinum uppá gott 10% frá 1978 til 1979 bert í ávist mát varð mótsvarað av falli í innflutningsnøgd, hækkaði hallið á handilsjavnvágini frá 212 milj. kr. í 1978 til 288 milj. kr. í 1979, og roknast má við, at hallið á gjaldsjavnvágini - eftir at studningurin frá danska statskassanum uppá 300 milj. er tikin við - hevur verið minst 200 milj. kr. í 1979 mótvegis knappum 160 milj. kr. í 1978.

Hallið er fíggjað við ógvuligari stórari almennari lántøku í útlondunum í 1979, og hevur hetta loyvt cína ávísa øking av virðisbrævagoymslunum hjá teimum føroysku peningastovnunum.

M. a. sum úrslit av teimum innflutningsgjøldum, ið vóru ásett í september, eru prísirnir í 1979 farnir upp við umleið 17%, meðan lønirnar eru farnar upp við umleið 14%, soleiðis at reallønarbatin tey seinastu árini nú er avloystur av einum falli uppá 3%. Skattainntøkurnar hjá tí almenna eru í 1979 øktar munandi gjøgnum størri innflutningsgjøld. Økingin av skattainntøkuni var ætlað nýtt til fíggjan av vaksandi stuðuli til fiskivinnuna, soleiðis at ikki var ætlað ein avmarking í tokari inntøku hjá fólki gjøgnum almennan fíggjarpolitikk.

Útlitið fyri 1980 er ikki ljóst. Væntast má enn meira fall í rækjufiskiskapinum við Grønland, og tað tykist ivasamt, um møguleikar eru fyri øking av fiskiskapi aðra staðni. Ætlandi er, at longu núverandi stuðul til fiskivinnuna orsakar vanda fyri óøkonomiskari nýtslu av fiskastovninum, og tað liggur nær at umhugsa, um man í staðin fyri at økja stuðulin enn meira, eigur at stremba ímóti at minka um tann partin av fiskiskipaflotanum, sum higartil hevur verið á fjarfiskileiðum.

Tá roknast má við, at býtislutfallið verður uppaftur verri, orsakað av hækkandi innflutningsprísum, serliga fyri orku, má væntast, at hallið á gjaldsjavnvágini - uttan serlig fíggjarlig tiltøk — vil verða enn størri í 1980 uttan so, at tað fyri eina tíð verður minkað gjøgnum sølu av partum av fiskiskipaflotanum.

Framhald av útlendskari lántøku í tað mát, sum hevur verið framd tey seinastu

2 árini, vil ikki vera forsvarlig, tá hugsað verður um, at longu rentingin av núverandi skuld vil tyngja gjaldsjavnvágina fyri komandi ár í størst mát. Tað má tí roknast fyri neyðugt, at við skipanini av fíggjarpolitikkinum verða gjørd tiltøk fyri at tryggja javnvág millum tí eina síðuni støddina av nýtsluni og ílogunum í Føroyum og á hini síðuni tær nogdir, sum ein í samroynd kann vænta verða tøkar fyri føroyska samfelagið uppá eitt sindur longri sikt. Hetta vil nokk bera í sær, at ein við fíggjarætlanini um landskassans útreiðslur og inntøkur niðar ímóti einum munandi yvirskoti. Samstundis eigur ein at umhugsa eina skipan av gongdini í inntøkunum, soleiðis at ikki longur verður givið endurgjald fyri møgulig hækkaði innflutningsgjøld ella fyri uppaftur størri vøkstir í prísinum fyri orku.

Soleiðis málber «Det rådgivende udvalg vedrørende Færøerne» seg í einari viðmerking til fíggjarligu gongdina her í Føroyum í 1979.

Fíggjarnevndin hevur tikið tær ávaringar, ið frammanfyri eru framførdar til eftirtektar, og kann av sonnum vera sagt, at tað hevur verið ein í grundini partvís samd nevnd, ið hevur tikið støðu til teir nógvu ivaspurningar, ið altíð stinga seg upp, tá fíggjarlógarviðgerðirnar fara fram.

Viðvíkjandi inntøkusíðuni er tað ein samd fíggjarnevnd, ið tekur undir við inntøkutalinum 685.065.000 kr., men viðvíkjandi broytingaruppskotinum, ið sett verða fram til ymiskar útreiðslugreinir, er fíggjarnevndin samd í vissum førum, meðan gotnr skiljast í øðrum, hvat onki er at siga til, tá tað snýr seg um sjónarmið hjá flokkum við stevnuskráum, ið hava sjógv millum seg.

At rákið á politiska økinum hevur av einstaklingunum, at teir skulu standa undir størri byrðum, enn lagdar hava verið á teir fyrr, er eyðsæð, tí hevur fíggjarnevndin roynt at skarva burturav brúkinum hjá tí almenna, uttan kortini at darva effektivitetin ella gera so nógv av, at virkishjól steðga, og hendur verða tómar.

Tann 3-mannanevnd, ið fíggjarnevndin í fjør setti til at útvega fíggjarnevndini frágreiðing um úrtíðarlønir, hevur latið nevndina fingið hesa frágreiðing, ið vísir, at her er talan um 25 milj. kr. Frágreiðingin verður nú latin landsstýrinum, ið fær álagt at finna ein annan umsitingar- og avløningarform, ið ikki førir við sær eitt slíkt risatal í úrtíðaravløning.

Sum lið í almennum spariltaki er fíggjarnevndin samd um at steðga setanini av fólki fyri eina tíð á teimum ymisku almennu stovnunum.

Í álitinum til seinastu fíggjarlóg helt fíggjarnevndin orsøk vera til at gera vart við, at konto 1280 I § 11: Ferða- og dagpeningur var mikið brúkt og átti at verða ansað eftir, at henda konto eins og tilsvarandi konti hjá øllum landsstovnum hert verða nýttar, tá ferðing er neyðug, og at ferðirnar ikki vara longri enn neyðugt.

Tíverri hevur landsstýrið á hesum øki ikki tikið fíggjarnevndarinnar ávaring til eftirtektar, og hevur brúkið á hesari konto verið: Játtað 1 milj. kr., brúkt pr. 29. februar 1980: 1.134.000 kr., óavroknað 400.000 kr.

Samsvarandi hugsanini í tí frammanfyri framførda setur ein samd fíggjarnevnd uppskot um hesar broytingar til landsstýrisins uppskot.

Broytingarnar í útreiðslusíðuni í mun til landsstýrisins uppskot eru hesar:

§ 6. *Landsstovnar:*

0115	Bussrutan	÷ kr.	222.000

ad 0115:
Játtaðar verða kr. 60.000.— tilsamans
til samferðslunevndina.

Greinin er sett til	÷ kr.	22.114.000

§ 10. *Løgting:*

501—1001	Løgtingsmenn (rætting)	÷ kr.	30.000
	— (fiskivinnunevndin)	÷ —	20.000
510—1028	Løgting	÷ —	10.000
540—1014	Intern grannskoðan	÷ —	75.000
	Eingin nýnormering (1)		
2340	Leiga av maskinum	+ —	10.000
540—1015	1 avloysari í 5 mán.	+ —	30.000
	Greinin er sett til	kr.	6.073.000

§ 11. *Landsfyrisitingin:*

1120—1014	1 starv ósett	÷ kr.	120.000
1150—1014	Eingin nýnormering (2)	÷ —	250.000
1028	1 fólk til kannan av kelduskattaskipanini í ávísa tíð	+ —	125.000
1170—1014	Eingin nýnormering uttan 1 lærling	÷ —	165.000
1201— 605	Sí konto 2355	+ —	81.000
1014	Eingin nýnormering uttan 1 lærling til tolldeild og 1 lærling til skattadeild	÷ —	284.000
2355	EDV útreiðsla hækkað	+ —	325.000
	Játtað kr. 100.000 til fólk at krevja inn skatt	+ —	100.000
1250—1014	Bert 1 nýnormering loyvd		
1280	Ferða- og dagpeningur	+ —	250.000
1295—2140	Umvælingar	+ —	50.000
3820	Í grunn	+ —	400.000
1301—1014	Eingin nýnormering	÷ —	140.000
1016	Ósett starv	÷ —	140.000
	Greinin er sett til	kr.	35.003.000

§ 12. *Heilsumál:*

2010	Landssjúkrahús	÷ kr.	300.000
2020	Klaksvíkar sjúkrahús	÷ —	125.000
2030	Suðuroyar sjúkrahús	+ —	75.000
	Greinin er sett til	kr.	47.828.000

§ 13. *Samferðslumál:*

1.	Nýggir vegir og brýr	÷ kr.	10.000.000
2.	Havnagerð, í grunn	÷ —	2.000.000
3.	Lendingar, í grunn	÷ —	1.000.000
6.	Berghols- og brúgvagerð	÷ —	3.000.000
	Greinin er sett til	kr.	86.200.000

§ 14. *Skúlamál:*

2220—	Ortíð skorin	÷ kr.	300.000
2230—	Generelt skorið	÷ —	200.000
2240—	— —	÷ —	100.000
2260—	— —	÷ —	100.000
2290/3113	— —	÷ —	50.000
2295/3115	— —	÷ —	50.000
/3132	— —	÷ —	50.000
3141	strikað	÷ —	5.000
3142	strikað		
	Greinin er sett til	kr.	59.250.000

§ 15. *Vísund, bóknentir og list:*

2310	Eingin nýnormering	÷ kr.	400.000
2230	Eingin nýnormering		
2340	Eingin nýnormering		
2355	Eingin nýnormering	÷ —	80.000
2375	Tokni ikki játtað	÷ —	535.000
2390/3208	Chr. Høj	+ —	3.000
2390/3214	Fornminnissavn, í grunn	÷ —	100.000
3212	Norðurlanda hús, í grunn	÷ —	100.000
3230	Landsstýrið at ráða yvir	÷ —	100.000
	Greinin er sett til	kr.	18.396.000

§ 16. *Fiskivinna, sigling o.t.:*

2430	Generelt skorið	+ kr.	180.000
2460	Eingin føst samsýning	+ —	122.000
2490/3301	Hækking sbt. lóg	+ —	72.500.000
2490/3308	Vaktarskip, í grunn	+ —	100.000
	Greinin er sett til	kr.	221.775.000

§ 17. *Landbúnaður og matrikulering:*

2510/2592	Bilur ikki játtaður	+ kr.	80.000
2520	Eingin nýnormering	+ —	00.000
	Greinin er sett til	kr.	13.659.000

§ 18. *Handil, iðnaður o.t.:*

2726	Skorið	+ kr.	90.000
2732	Hækkað	+ —	100.000
2790/3503	Hækkað	+ —	100.000
	Greinin er sett til	kr.	14.671.000

Til § 18.2790.3502 verður sett henda

Viðmerking	Anmærkning
Herav 1.500.000 kr. til royndir at gera matvørur úr svartkjafti.	Heraf 1.500.000 kr. til forsøg med produktion af madvarer af sortmule.

§ 19. *Almannamál:*

2890/3663	Hækkað	+ kr.	150.000
2890/3671	Skorið	+ —	100.000
3674	Skorið	+ —	500.000
	Greinin er sett til	kr.	99.727.000

§ 20. *Pensjónsútreiðslur:*

1062	Tænastumannaeftirlønir	+ kr.	1.390.000
	Greinin er mett til	kr.	2.300.000

§ 21. *Effektivar veðhaldsbindingar, í grunn:*

2902	Hækkað við	+ kr.	2.000.000
	Greinin er sett til	kr.	6.000.000

§ 24. *Burturleggingar til avdráttir av lánum:*

Avdráttir	kr. 30.500		
+ avskrivingar	kr. 27.500	kr.	3.000.000
	Greinin er sett til	kr.	3.000.000

§ 41. *Lán:*

Nýupptikin lán til vegir og havnir o.tl. hækkað við	+ kr.	3.000.000

Greinin er í inntøkum sett til kr. 57.000.000.

Meirilutin í fíggjarnevndini (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Jørgen Thomsen, Jógvan Durhuus og Ásbjørn Joensen) settur fram søljóðandi

Broytingaruppskot
til
uppskot landsstýrisins.

§ 5. *Rentur og vinningsbýti v.m.:*

0400 Rentuinntøkur	kr.	19.000.000
0450 Rentuútreiðslur	÷ —	40.000.000
Greinin er sett til	÷ kr.	21.000.000

§ 6. *Landsstovnar:*

0110 Strandfaraskip landsins verður broytt til	÷ kr.	19.000.000
Greinin er sett til	÷ kr.	22.114.000

Ein minnihúfi (Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen úr Sambandsflokkinum) ber fram:

Undir 1. viðgerð av lógaruppskotinum var semja um, at stórar útreiðsluupphæddir tørvaðu á tí uppskoti, sum landsstýrið hevði lagt fram. Seinni eru lagd fram og samtykt lógaruppskot um lækkaðar útreiðslur viðvíkjandi fiskivinnuni og lógaruppskot um eykainntokur til landskassan. Út frá hesum skal uppskot landsstýrisins, sum javnvigaði við gott og væl 612 milj. kr., hækkast við 72,5 milj. kr. til eina samlaða javnvág uppá umleið 685 milj. kr.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt tað soleiðis broytta uppskot frá landsstýrinum.

Hetta er 6. ferð Føroya landsstýri ger uppskot til fíggjarlóg fyri sitandi samgonguflokkar.

Hyggur ein eftir álitinum til fíggjarloglingslógirnar fyri tey seinastu 5 fíggjarárini, so sæst týðiliga, at sambandsflokkurin hevur verið grundleggjandi ósamdur við samgonguflokkarnar, um hvør politikkur eigur at verða rikin.

Deils hevur flokkurin ábaldandi vist á skeivleikarnar í teinum politisku tiltøktum, sum framd eru, og deils hevur umboð floksins ferð eftir ferð funnist harðliga at tí arbeiði, sum fram er farið í fíggjarnevndini.

Fyri gott og væl 5 árum síðani setti sambandsflokkurin fram uppskot um, at løgtingið álegði landsstýrinum, saman við fíggjarnevndini, beinanvegin at gera fíggjarætlan fyri fíggjarárini 1975/76 til 1979/80. Sambandsflokkurin stóð einsamallur á løgtingi um hetta krav.

Hevði uppskotið tá verið samtykt, og arbeiðið gjort, so hevði samgongan ikki í so stóran mun havt mist tamarhaldið á okkara fíggjarviðurskiftum.

Í álitinum til fíggjarløgtingslógina 1975/76 fordi umboð Sambandsflokksins fram m.a.: «Teir trupulleikar, sum samfelag okkara stendur yvir fyri, verða torførir at loysa. Tað vil altíð vera mark fyri, hvussu stórar og knappligar broytingar ein kann fremja í einum samfelag. Nevndu trupulleikar kunnu neyvan loysast eftir einum fíggjarári. Tað er neyðugt at gera loysnir við eitt sindur longri sikti.» Síðani varð vist á áðurnevndu uppskot sambandsflokksins um langtíðarplanlegging.

Í sama áliti fordi meirilutin fram longu í byrjanini av 1975 vegna samgonguflokkarnar: «Útlit eru ikki bara fyri trongstøðu hjá vinnuni, men trongstøðan er longu ein veruleiki hjá parti av henni.»

Hóast umboðini fyri samgonguflokkarnar longu tá sóu trupulleikarnar, so hevur samgongan ikki á nakran hátt megnað at loysa okkara vinnulívstrupulleikar.

Árið eftir, tá fíggjarløgtingslógin fyri 1976/77 var til viðgerðar, hevði umboð sambandsfloksins í fíggjarnevndini uppskot um m.a. at lækka aktivitetin hjá landsverkfroðinginum við 10 milj. kr. Talan var her um eitt lið í royndum floksins at fáa samgonguna at reka ein meira varðligan og skilagóðan íløgu- og fíggjarpolitikk.

Tá fíggjarløgtingslógin 1977/78 var til viðgerðar, varð skotið upp at strika fániheimildir til landsverkfroðingin, og minka um samlaðu játtanina við 15 milj. kr., eisini eitt lið í somu royndum at minka um almenna aktivitetin á hesum oki.

Meðan umboð sambandsfloksins í álitunum til fíggjarløgtingslógirnar 1975/76,

1976/77 og 1977/78 hevði atfinningar og broytingaruppskot til fíggjarløgtingslógaruppskot samgongunnar, so varð í álitinum til fíggjarløgtingslógina 1978/79 greitt sagt frá, at umboð sambandsfloksins ikki kundi mæla til at samtykkja uppskot samgongunnar til fíggjarløgtingslóg 1978/79.

Samanumtikið var grundgevingin hendan:

> Alt ov lítið skil er í tí arbeiði, sum er farið fram í fíggjarnevndini, eingin verulig roynd er gjørd fyri at tryggja, at fíggjarløgtingslógin samsvarar við tær politiskt avgerðir, sum tiknar eru fyrst og fremst á fiskivinnuøkinum og á samferðsluøkinum.
>
> Einki bendir á, at meirilutin ætlar at fremja nøkur stig fyri at minka um vøksturin á teimum almennu útreiðslunum.
>
> Ein samtykt av uppskoti meirilutans førir við sær eina fíggjarliga gongd, sum inniber, at vit um stutta tíð kunnu koma í álvarsligar fíggjarligar trupulleikar.
>
> Tann fíggjarpolitikkur, sum meirilutin hevur rikið tey seinastu árini, hevur longu fört við sær, at tað nú ikki longur er nóg mikið við broytingaruppskotum til fyriliggjandi fíggjarlógaruppskot, men at tað er neyðugt við einari grundleggjandi broyting av okkara framtíðarpolitikki.

Hetta var grundgevingin fyri, at umboð sambandsfloksins í fíggjarnevndini ikki kundi mæla til at samtykkja fíggjarløgtingslógina fyri 1978/79.

Tíverri vísti tað seg sanniliga eisini, at grundgevingin var rætt. Hetta sæst m.a. við at gjøgnumganga eykafíggjarlógina fyri sama fíggjarárið, serliga viðvikjandi grein 16: Fiskivinna, sigling o.t.

Í álitinum til fíggjarløgtingslógina 1979/80 hevur umboð sambandsfloksins aftur uppskot um m.a. at minka um aktivitetin hjá landsverkfrøðinginum. Heldur ikki hesa ferð fekst undirtøka fyri hesum sjónarmiði.

Sum tað sæst av álitunum til fíggjarløgtingslógirnar fyri omanfyri nevndu fíggjarár, so hevur tað verið ógjørligt at fingið nakað samarbeiði flag við meirilutan í fíggjarnevndini.

Samgongan hevur, hóast ávaringar frá andstøðuni, búskaparráðnum o.ø. rikið sín egna fíggjarpolitikk.

Og úrslitið er har eftir. Á fundi við fíggjarnevndina upplýsti Búskaparráðið, at nettoutlanlandsskuldin seinasta árið er økt frá 525 milj. kr. við 190 milj. kr. til 715

milj. kr. við árslok 1979. Síðan tá hevur Foroya landsstýri upptikið utanlandslán uppá 57 milj. kr. og er ætlanin sambært fyriliggjandi fíggjarlógaruppskot til vegir og havnir, og í øðrum lánum, at læna 57 milj. kr. í 1980/81. Á fundinum upplýsti Búskaparráðið eisini, at væntast má eitt stórt hall á gjaldsjuvnanum komandi ár, og harav standandi øking í nettoutanlandsskuldini.

Í byrjanini av fíggjarlógarviðgerðini varð, eisini frá samgongumonnum, lagt upp til eitt breitt samarbeiði í fíggjarnevndini. Arbeiðið gekk betur frá hondini hesa ferð enn undanfarnu ár. Stóran part av tíðini hovdu vit góðar vónir um at náa til eitt felags úrslit og eitt felags álit. At hetta miseydnaðist kann minnilutin ikki taka nakra ábyrgd av. Tvørtur imóti stóð minnilutin við øll tey einstøku málini sum semja var fingin um í nevndini, líka inntil umboðini hjá tveimum samgonguflokkum søgdu frá, at teir ikki kundu liva upp til nakra semju.

Hetta forðaði sjálvandi ikki fyri, at minnilutin stendur við, og mælir til at samtykkja tey sparitiltøk, sum semja fekst um við samgonguflokkarnar, og sum eru nevnd undir felagsálitinum.

Herumframt setir minnilutin fram eitt broytingaruppskot til uppskot meirilutans og nøkur broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins.

Minnilutin kann ikki taka undir við at játta rentur uppá 2 milj. kr. til lán av skipakeypi. Í fíggjarlógaruppskoti landsstýrisins hevur Strandferðslan roknað við samlaðum útreiðslum uppá góðar 49 milj. kr.

Mælt verður til at krevja, at Strandferðslan minkar um hesar útreiðslur við umleið 10%. Minnilutin kann ikki taka undir við at játta útreiðslur til stovnan av almennum lýsingarblaði. Meðan samgonguflokkarnir, tá avtornaði, ikki kundu ganga við til at spara meira enn 16 milj. kr. á § 13: Samferðslumál, mælir minnilutin til at samtykkja eina samlaða sparing á hesi grein uppá 25 milj. kr. Hin vegin er semja um at hækka lántøkuna við 3 milj. kr. Tíverri hevur tað heldur ikki í ár eydnast at fingið meirilutan til at gjørt neyðugar sundurgreiningar yvir tey arbeiði sum skulu gerast, og tey sum skulu skjótast út.

Minnilutin mælir eisini til at minka um útreiðslurnar til studning til politiska upplýsing v.m. við kr. 200.000 til kr. 540.000.

Hesi sparitiltøk minnilutans, útyvir tey sparitiltøk, sum ein samd fíggjarnevnd mælir til, geva eina samlaða minniútreiðslu uppá góðar 16 milj. kr.

Meginpartin av hesi upphædd, 15 milj kr., mælir minnilutin til at leggja í ein grunn til vinnulig endamál. Grunnurin skal stuðla fíggingina av nýggjum tiltøkum innan føroyskt vinnulív, bæði innan fiskivinnu, idnað og jarðarbrúk, við tí endamáli at skapa nýggjar (alternativar) og viðkaðar vinnuvegir. Foroya Landsstýri og fíggjarnevnd Løgtingsins eiga at gera nærri reglugerð. Peningurin verður lutaður út og umsitin av verandi stovnum.

Út frá tí, sum frammanfyri er nevnt, setur minnilutin (Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen) fram soljóðandi

1) **broytingaruppskot**
til
meirlutans uppskot

1. § 5 konto 0450 ..... kr. 40.000.000
verður broytt til kr. 38.000.000.

2) **broytingaruppskot**
til
landsstýrisins uppskot

2. § 6 konto 0110 ..... kr. 16.700.000
verður broytt til kr. 11.700.000.

3. § 6 konto 0145 ..... ÷ kr. 370.000
verður broytt til ÷ 2.370.000.—.
Viðm.: Peningurin kr. 2. milj. verður fluttur
frá § 13.8.

4. § 10 konto 520 ..... kr. 500.000
verður broytt til:
Løgtingstíðindi og kunngerðasavn.
Lagtingstidende og kundgørelsessamling kr. 320.000.

5. § 13 konto 1 ..... kr. 45.000.000
verður broytt til kr. 32.000.000.
konto 2 ..... kr. 27.700.000
verður broytt til kr. 22.700.000.
konto 3 ..... kr. 13.000.000
verður broytt til kr. 11.000.000.
konto 6 ..... kr. 8.000.000
verður broytt til kr. 3.000.000.
konto 8 ..... kr. 2.000.000
verður broytt til kr. 0.
Viðm.: Peningurin kr. 2 milj. verður fluttur
á § 6 konto 0145.

6. § 22 konto 2580 ..... kr. 740.000
verður broytt til kr. 540.000.

7. § 23 konto 3850 Grunnur til vinnuendamál ..... kr. 15.000.000

Viðm.: Reglugerð verður gjørd av landsstýri og fíggjarnevnd.

Fíggjarnevndarlimur sjálvstýrisfloksins (Asbjørn Joensen) forir fram, at hóast undirtoku av tí áliti, fíggjarnevndin hevur tillagað, við ávísum broytingum, so er hetta ikki at skilja sum verandi nøgdur við fyriliggjandi lógaruppskot, og enn minni borgar hetta fyri undirtoku av tí fíggjarpolitikki, samgongan forir.

Fíggjarnevndin hevur í vissan mun roynt at skarva av teimum ymisku játtanum, uttan at hetta kom at minka um peninganýtsluna, men einans fyri at rokka teim upphæddum, ið frestaðu á sjálvum lógaruppskotinum. Afturat hesum má ásannast keyp av gomlum ferðamannaskipi, hvørs útreiðslur megu takast við, men verður hetta tá gjort við mótmæli.

Upphæddin á fíggjarlógini til Strandfaraskip Landsins er mælt til at geva eitt rakstrarhall uppá 19 milj. kr. fyri árið 1980/81.

Ásannast má, at um her ikki skal gerast stór yvirnýtsla, er tað neyðugt við eini skerjing í siglingini, og eigur landsstýrið skjótast at taka stig til hetta.

Sjálvstýrisflokkurin hevur áður mælt til pris- og lonarsteðg, og má hetta endurtakast, tá vit uttan tiltøk av slíkum slagi ikki kunnu gera okkum vónir um at hendan fíggjarlógin heldur enn undanfarnar kemur at halda viðvíkjandi útreiðslusiðuni, tó við tí muni, at inntokuslóðan hesa ferð heldur ikki, sum fíggjarvánirnar eru, fer at kasta nakað av sær til rindan av eini eykafíggjarlóg.

Tilrátt verður av teim serkønu innan fíggjarviðurskiftti, at neyðugt verður við einum fíggjarpolitikki, ið ávísir eina konsolidering, eins væl og tilrátt verður at minka um ta stóru lánskuld, ið nú togar seg væl 800 milj., harav tað almenna teknar seg fyri góðan helmingin.

Hvørki av hesum málum eru rokkin.

Tá so hugsað verður um, at Orion-lánið, 42 milj. kr., alt fellur til gjaldingar í 1981, uttan at ein króna er tøk, er einki annað í vøntu enn ein umskipan, leingjan ella nýlán til endurgjald av hesum láni og øðrum við. Frásagnir og ætlan samgongunnar um at vit koma at læna okkum burtur úr kreppuni, er og kemur at miseydnast, samfelagsbúskapinum og foroyska sjálvstýrinum til óbótaligan skaða.

Sí SKJAL 4 B.

26. mars legði samd fíggjarnevnd fram soljóðandi

broytingaruppskot

Fíggjarnevndin mælir til soljóðandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

§ 1 0010	Vanligur landsskattur verður hækkað við	37.000.000 kr.
	Sædvanlig landsskat	til 340.500.000 kr.
	Greinin er sett til 363.500.000 kr.	

§ 2 0100 Tollgjøld	verður hækkað við	35.000.000 kr.
Toldafgifter	til	284.500.000 kr.
Greinin er sett til 285.800.000 kr.		

Sama dag lógdu eisini Jona Henriksen og Hanna Lisberg fram soljóðandi

broytingaruppskot
til

grein 12 í løgtingsmáli nr. 36/1979: Heilsumál konto nr. 2010: Landssjúkrahúsið.

Settur verður 1 traumatologur (skaðalækni) á Landssjúkrahúsinum. Mett upphædd kr. 285,000,— + møgulig tól.

Viðm.: Landssjúkrahúsið hevur í sínum figgjarætlan m.a. setan av 1 skaðalækna, og tá hesin ikki er tikin við á Løgtingsins figgjarlóg 1980/81, loyva vit okkum undirritaðu at leggja fram broytingaruppskot um setan av 1 traumatologi, tá vit meta tað av allarstørsta týdningi at fáa henda lækna, so sum skaðarnir hesi seinastu árini eru vaksandi í óhugnaligan mun.

2. viðgerð 26. mars. Tingsins loyvi at frávikja tíðarfreistina at hava 2. viðgerð varð givið.

Atkvøðugreiðslan varð hendan:

§ 1. Broytingaruppskot frá samdari figgjarnevnd samtykt við 29—0. § 1 soleiðis broytt samtykt við 30—0.

§ 2. Broytingaruppskot frá samdari figgjarnevnd samtykt við 29—0. § 2 soleiðis broytt samtykt við 30—0.

§§ 3 og 4 samtyktar við 30—0.

§ 5. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen) fall við 8—0.

Broytingaruppskot frá meirilutanum (Hákun Djurhuus, Poul J. Olsen, Jørgen Thomsen, Jógvan Durhuus og Asbjørn Joensen) samtykt við 27—0. § 5 soleiðis broytt samtykt við 29—0.

§ 6. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen) fall við 10—0.

Broytingaruppskot frá meirilutanum (Hákun Djurhuus, Poul J. Olsen, Jørgen Thomsen, Jógvan Durhuus og Asbjørn Joensen) samtykt við 19—0. Broytingaruppskot frá samdari figgjarnevnd samtykt við 30—0, § 6 soleiðis broytt samtykt við 23—0.

§§ 7—8 samtyktar við 30—0.

§ 10. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen) fall við 12—0.

Broytingaruppskot frá samdari fíggjarnevnd samtykt við 31—0. § 10 soleiðis broytt samtykt við 31—0.

§ 11. Broytingaruppskot frá samdari fíggjarnevnd samtykt við 31—0, § 11 soleiðis broytt samtykt við 31—0.

§ 12. Broytingaruppskot frá Jonu Henriksen og Honnu Lisberg fall við 9—0.

Broytingaruppskot frá samdari fíggjarnevnd samtykt við 29—0. § 12 soleiðis broytt samtykt við 30—0.

§ 13. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen) fall við 10—0.

Broytingaruppskot frá samdari fíggjarnevnd samtykt við 30—0. § 13 soleiðis broytt samtykt við 30—0.

§ 14. Broytingaruppskot frá samdari fíggjarnevnd samtykt við 31—0. § 14 soleiðis broytt samtykt við 31—0.

§ 15. Broytingaruppskot frá samdari fíggjarnevnd samtykt við 31—0. § 15 soleiðis broytt samtykt við 31—0.

§ 16. Broytingaruppskot frá samdari fíggjarnevnd samtykt við 31—0. § 16 soleiðis broytt samtykt við 31—0.

§ 17. Broytingaruppskot frá samdari fíggjarnevnd samtykt við 31—0. § 17 soleiðis broytt samtykt við 31—0.

§ 18. Tá ið broytingaruppskot frá samdari fíggjarnevnd til § 18 kom fyri, varð ynski um at atkvøtt varð uttan viðmerkingar, hetta varð samtykt við 28—0. Við viðmerkingum samtykt við 30—0. § 18 soleiðis broytt samtykt við 31—0.

§ 19. Broytingaruppskot frá samdari fíggjarnevnd samtykt við 31—0. § 19 soleiðis broytt samtykt við 31—0.

§ 20. Broytingaruppskot frá samdari fíggjarnevnd samtykt við 31—0. § 20 soleiðis broytt samtykt við 31—0.

§ 21. Broytingaruppskot frá samdari fíggjarnevnd samtykt við 31—0. § 21 soleiðis broytt samtykt við 31—0.

§ 22. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Ivan Johannesen og Paula Ellefsen) fall við 12—0, § 22 samtykt við 31—0.

§ 23. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen) varð fráfallið. § 23 samtykt við 31—0.

§ 24. Broytingaruppskot frá samdari fíggjarnevnd samtykt við 30—0. § 24 soleiðis broytt samtykt við 30—0.

§§ 25—26, 30—40 samtyktar við 30—0.

§ 41. Broytingaruppskot frá samdari fíggjarnevnd samtykt við 28—0. § 41 soleiðis broytt samtykt við 28—0.

§§ 42—46 samtyktar við 30—0.

3. viðgerð 26 . mars. Tingsins loyvi at víkja tíðarfreistini til at hava 3. viðgerð varð givið. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 30—0.

F.L. j.nr. 400-28. Lóg nr. 29 frá 28. mars 1980.

---

37. Fyrispurningur til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann

Ár 1979, hósdagin 13. december setti Jørgen Thomsen, løgtingsmaður Vilhelm Johannesen, landsstýrismanni fram soljóðandi

fyrispurning

1. Nær kann ein vænta, at løgtingslóg frá 16. oktober 1978 um lønarviðurskifti handverkslærlinga fer at virka?

2. Veit landsstýrið at siga, hvussu langt ið nevndin er komin við arbeiði sínum, og nær álit um ábotur í viðurskiftum handverkslærlinga verður lagt fram.

Viðmerkingar:

Í september 1978 samtykti løgtingið lógaruppskot, sum ber í sær hækkingar í lærlingalønum, og harnæst uppskot til samtyktar um at landsstýrið setur 7-mannanevnd, ið skal kanna og leggja fram álit í viðurskiftum handverkslærlinga.

Henda nevnd skuldi vera soleiðis samansett, at tveir av nevndarlimunum verða útnevndir eftir tilmæli frá Føroya handverksmeistarafelag, tveir eftir tilmæli frá Føroya handverkarafelag og tveir frá Føroya handverkslærlingafelag. Hin sjeynda limin skuldi landsstýrið útnevna, og skuldi hesin vera formaður.

Síðani hevur løgtingið í mai 1979 samtykt at víðka nevndina við 2 limum, harav annar skal vera ein faklærari frá Tekniska skúlanum, Tórshavn, og hin ein faklærari frá Tekniska skúlanum, Klaksvík.

Tað er nú liðin drúgv tið síðani lærlingaviðurskiftini komu í ólag.

Hetta má haldast at vera ein óliðilig stoða, vegna tað at handverkslærlingar ikki verða tiknir í læru.

Ein er vitandi um, at fjøld av ungum monnum og moguliga kvinnum við biða eftir, at hesi viðurskifti koma í rættlag.

Loyvi eg mær tí at seta fram omanfyri standandi spurning.

20. december svaraði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

Frá Jørgen Thomsen, løgtingsmanni, hevur undirritaði fingið fylgjandi fyrispurningar:

1. Nær kann ein vænta, at løgtingslóg frá 16. oktober 1978 um lønarviðurskifti handverkslærlinga fer at virka?

2. Veit landsstýrið at siga, hvussu langt, ið nevndin er komin við arbeiði sínum, og nær álit um ábotur í viðurskiftum handverkslærlinga verður lagt fram?

ad. 1. Til fyrsta spurningin er at siga, at broytingin frá 16. oktober 1978 í lærlingalógini um hækking av lønunum hevur virkað síðan hon kom í gildi fyri teir lærlingar, sum eru, ella koma í læru. Nakað annað er, at síðan lógin um hækking av lærlingalonini kom í gildi, er talið av nýggjum lærusáttmálum fallið munandi.

ad. 2. Nevndin fór í gongd við arbeiði sítt í september mánað í ár og hevur landsstýrið frá nevndarformanninum fingið upplýst, at nevndin metir seg at vera so gott sum lidna við arbeiði sítt og roknar við at hava seinasta fund í januar mánað komandi ár.

38. Avheintan av útróðrarfiski

Ár 1979, hósdagin 13. december legði Flemming Mikkelsen, løgtingsmaður vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar.

Álagt verður Foroya landsstýri í samband við tey fráboðaðu krepputiltøkini at gera nærri reglur fyri, at útróðrarfiskur á teimum plássum, har eingin fiskakeypari er, verður avheintaður við bili, har koyrivegur er til næsta fiskakeypara.

Viðmerkingar:

Á summum plássum er serliga trupult hjá útróðrarmonnum at sleppa av við veiðuna. Tað vísir seg, at núgaldandi flutningsstudningur ikki hevur loyst trupulleikarnar.

Álagt eigur at verða flakavirkjum at heinta útróðrarfisk á hesum plássum. Hin vegin eiga flakavirkini at fáa endurgjald fyri tær meirútreiðslur, sum metast at standa av hesum.

1. viðgerð 19. december. Málið varð uttan nevndarviðgerð heint til 2. viðgerð.
2. viðgerð 21. december. Málið fall við 15-0 atkvøðum.

39. Lán til fiskifør

Ár 1979, fríggjadagin 14. december legði Atli P. Dam, løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um lán til fiskifør.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at lána upp til 60 milliónir kr. at nýta til lán til fiskifør til at bøta um rakstrargrundarlag teirra, herundir til effektivisering og rationalisering av førunum.

§ 2. Lán kunnu veitast til fiskifør, sum eru komin í fíggjarliga trongstøðu vegna broyttu fortreytirnar fyri at reka fiskiskap.

§ 3. Landsstýrið setur reglur um treytirnar fyri lánveitingini eftir hesi lóg.

§ 4. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om lån til fiskeskibe.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegna at optage lån på indtil 60 millioner kr. til at anvende til udlån til fiskefartøjer til forbedring af deres driftsmæssige grundlag, herunder til effektivisering og rationalisering af fartøjerne.

§ 2. Lån kan ydes til fiskefartøjer, der som følge af stedfundne ændringer i forudsætningerne for udøvelse af fiskeri, er kommet i økonomiske vanskeligheder.

§ 3. Landsstyret fastsætter betingelserne for ydelse af lån i henhold til nærværende lov.

§ 4. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Sum løgtinginum kunnugt eru seinastu árini farnar fram munandi broytingar á ti støði, sum føroysk fiskifor hava havt at reka fiskiskap. Í hesum sambandi kann vísast á, at veiðimoguleikarnir á fjar- og miðleiðum, har føroysk fiskifor vanliga hava roynt, síðani fiskimarksútflytingar í øllum Norðuratlantshavinum eru versnaðir í summum forum vegna kvoteringar og í øðrum forum vegna fiskaloysi. Av hesum hevur staðist eitt vaksandi tal av fiskiførum, sum fyrst og frenst royna á landleiðini.

Samstundis við versnaðu veiðumøguleikunum eru rakstrarútreiðslurnar í mongum forum øktar munandi. Serstakliga eru útreiðslurnar til olju øktar nógv og harvið eisini tann reiðskapur, sum er framleiddur við tilfari frá oljuídnaðinum.

Eftirsum søluprísirnir á útlendsku marknaðunum ikki eru hækkaðir nóg mikið til at viga upp móti versnaðu veiðumøguleikunum og vaksandi útreiðslunum, er ein partur av fiskiflotanum komin í fíggjarliga trongstøðu. Hetta er hent, hóast løgtingið

hevur veitt skiparakstrinum munandi stuðul m. a. við ískoytum til fiskaprísir og oljustudning.

Sambært kanningar, landsstýrið hevur gjørt av støðuni hjá fiskiførunum, og upplýsingar frá ymsum áhugafeløgum er tað átroðkandi at seta í verk tiltøk, sum kunnu bøta um viðurskiftini hjá skipum í trongstøðu. Landsstýrið metir, at tiltøk mugu gerast, sum miða ímóti ikki einans at loysa aktuellu trupulleikarnar, men eisini tiltøk, ið bera í sær effektivisering og rationalisering av fiskiførum til betri at hóska til broyttu umstøðurnar.

Teir aktuellu trupulleikarnir vísa seg fyrst og fremst í, at ein partur av fiskiførunum ikki fíggjarliga eru førur fyri at svara hvørjum sítt. Ein týdningarmikil táttur í hesum er, at fíggingin av skipunum oftani er ov stuttfreistað. Herav stendst tørvur fyri, at fíggingin verður gjørd lagaligari og betri í samsvar við inntøkugrundarlagið og tað áramál, skipini kunnu reka rationella veiðu.

1. viðgerð 17. december. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 20. december legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 14. december 1979 og undir fyrstu viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 19. december 1979 viðgjørt málið, og á fundi sama dag fekk fíggjarnevndin frá landsstýrinum munnliga frágreiðing um tað taltilfar, sum landsstýrið hevur lagt til grund fyri uppskot sítt um landskassalán upp til 60 milj. kr.

Ein av landsstýrinum settur arbeiðsbólkur hevur gjørt eina meting av lántørvinum. Í bólkinum hava verið umboð fyri Hagdeildina (2), Búskaparráðið (1) og Lønjavningargrunnin (1).

Tá egin gjaldorka, lánleingjanir og støk eindømi eru tikin frá, hevur landsstýrið eftir upplýsingum frá lánstovnunum, ognarum og eigarum mett tørvin til umleið ta upphædd, ið landsstýrið søkir um heimild til at læna.

Á nevnda fundi við landsstýrið varð upplýst, at landsstýrið viðvíkjandi viðgerð av lánumsóknum vil fara fram á tann hátt, sum nýttur verður, tá veitt verður veðhald fyri kreppuláni, t. v. s. at landsstýrið saman við fíggjarnevnd løgtingsins fær heimild at játta umsóknum. Landsstýrið og fíggjarnevndin vóru samd um at skjót málsviðgerð má til, um lógin skal virka eftir ætlan sínu.

Fíggjarnevndin er av tí áskoðan, at tað eigur at standa í lógini, at reglurnar um treytirnar sambært § 3 í lógaruppskotinum verða at góðkenna av fíggjarnevndini og setur fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til uppskot landsstýrisins. Sum 2. stk. í § 3 verður sett:

Hesar reglur verða at góðkenna av fíggjarnevnd logtingsins.	Disse regler skal godkendes af lagtingets finansudvalg.

Við hesi broyting mælir meiritutin (Håkun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Jørgen Thomsen og Jógvan Durhuus) til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnitutin (Pauli Ellefsen, Ivan Johannesen og Asbjørn Joensen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men vísir til lotingsmál nr. 48/1979: Avloysingarlán til fiskifør.

Tingsins loyvi at frávíkja tíðarfreistini at hava 2. viðgerð.

2. viðgerð 21. december. Adolf Hansen legði fram vegna Foroya Framburðs- og Fiskivinnuflokk fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

í uppskoti landsstýrisins verður í § 2 skoytt uppí sum

«*2. stk.* Tey lán, sum verða veitt skipum eftir hesi lóg, eru rentu- og avdráttarfrí og verða at avskriva yvir 10 ár.»	«*Stk. 2.* De lån, der bevilges skibe efter denne lov, er rente- og afdragsfri og bliver at afskrive over 10 år.»

Atkvøðugreiðslan varð hendan:

§§ 1 og 2 í landsstýrisins uppskoti vórðu samtyktar við 19-0. Broytingaruppskot frá meiritutanum í fíggjarnevndini (Håkun Djurhuus, Jørgen Thomsen, Jógvan Durhuus og Poul J. Olsen) til § 3 varð samtykt við 19-0, § 3 soleiðis broytt samtykt við 19-0.

Tingsins loyvi varð givið at hava 3. viðgerð sama dag. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 17-0.

F.L.j. nr. 1415-15. Lóg nr. 8 frá 16. januar 1980.

40. Sáttmáli um sínámillum fiskiskap út fyri strondum Sambandsríkjanna

Ár 1979, týsdagin 18. december legði Atli P. Dam, lognaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar

Løgtingið góðkennir hjálagda sáttmála millum Føroya Landsstýri og donsku rikisstjórnina øðru megin og stjórn Sambandsríkja Norður-Ameriku hinumegin um fiskiskap út fyri strondum Sambandsríkjanna.

Viðmerkingar:

Føroyar hava gjort sonevndar rammusáttmálar um fiskiskap við Noreg, E. E. C. og Sovjetsamveldið. Hesir áseta reglur, ið eru karmur um sínamillum fiskiskap fyri 10 ár í senn, um ikki ein av portunum sigur sáttmálan ella skipanina upp.

Eisini hevur Føroya Landsstýri samráðst um sáttmála við Kanada, og er hesin undirskrivaður við fyrivarni um broyting av orðaljóðinum í einstoktum greinum.

Hesin sáttmáli kann væntandi hava endaliga góðkenning frá báðum portum í januar 1980.

Samráðingar hava verið við amerikonsku stjórnina nú í góð tvey ár og endaðu 5. september 1979, tá sáttmálin varð undirritaður í Washington av donsku stjórnini, Føroya landsstýri og stjórn Sambandsríkjanna. Sáttmálin er fyribils galdandi til 1. juli 1984.

Sáttmálin snýr seg fyrst og fremst um føroyska veiðu við strendur U.S.A.s, tá talan er um sokallaðan avlopsfisk, t. v. s. at loyvi verður givið til veiðu í stovnum, sum amerikumenn ikki sjálvir troyta til fulnar, men í grundini er sáttmálin, sum tað sæst í § XII kortini ein sínámillum sáttmáli, tí amerikumenn skulu kunna krevja veiðuloyvi í avlopsstovnum føroyinga.

Hetta er kortini meira ein «teoretiskur» moguleiki, tí amerikumenn hava onga «traditión» fyri at veiða hesumegin Atlantshavið.

Tað, sum í fyrstu syftu hevur áhuga føroyinga, er veiða eftir hemara og øðrum hávasløgum, soleiðis at fiskiveiðan við Kanada í sonnu stovnum kann leingjast og fara fram, tá t.d. ísviðurskifti darva veiðuni í kanadiskum sjógvi.

Tað er ikki væntandi, at «avlop» verður av toski ella øðrum botnfiski í bræði, men ein lítil moguleiki er fyri, at makrel-, silda- og hogguslokkastovnarnir við U.S.A. fara at mennast so, at avlop verður. Føroyingar kunnu tá koma upp í part, tá veiðuloyvi verður býtt út fyri hesar stovnar, um teir hava áhuga fyri tí.

U.S.A. hevur sáttmálar við hesum orðaljóði við mong lond, eitt nú Sovjet, Bulgaria, Rumenia, Spania, E.E.C., Japan o.o. og byggja allir hesir á, at sokallað «traditionel» veiða skal eiga fyrimunir, men aftanfyri okkara sáttmála liggur ein viðurkenning av, at Føroyar eru «overwhelmingly dependant» av fiskivinnu, og skulu vit tí kunna fáa part í loyvum, eisini innan stovnar, har vit ongan søguligan rætt eiga, bert «avlop» er í hesum stovnum.

Beinanvegin tingið hevur samtykt fyriliggjandi sáttmála, verður sokt um loyvi til hemaraveiðu, og skal heudan fara fram komandi vár, átti sáttmálin at fingið góðkenning í hesum ári. Forseti U.S.A. hevur lagt sáttmálan fyri kongress og senat, og verður hann vónandi samtyktur har fyrsta dagin.

Sí SKJAL nr. 5.

Formaðurin bað um tingsins loyvi at frávíkja tíðarfreistini at viðgera málið. Framburðs- og Fiskivinnuflokkurin og Sambandsflokkurin mæltu frá at geva hetta loyvi, tí tingmenn máttu hava betri tíð at seta seg inn í hesi mál. Løgmaður segði, at tingmenn kendu hesi bæði málini, men ynskti hann, at málið varð viðgjørt hósdagin 20. dec. fyrrapart.

1. viðgerð 20. dec. Málini nr . 40 og 41 vórðu viðgjørt undir einum, og vórðu bæði veind í marknaðarnevndina, sum 20. december legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 18. december 1979 og undir fyrstu viðgerð 20. december beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur á fundi 20. december viðgjørt málið og mælir ein samd marknaðarnevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. december. Uppskotið varð samtykt við 27—0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1500-4-14.

41. Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1980

Ár 1979, týsdagin 18. december legði Atli Dam, lógmaður, vegna landsstýrið, fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 28. november 1979 millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1980.

Viðmerkingar:

Sambært skipanina millum Føroyar og Sovjetsamveldið um høvuðsreglurnar fyri sínámillum fiskiskap (tingmál nr. 18/1977) skulu partarnir fyri í ár í senn avtala nøgdir og fiskasløg, sum loyvt verður portunum at fiska á sjóøkinum hjá hvorjum øðrum.

Samráðingar um eina slíka avtalu fyri sínámillum fiskiskap í 1980 vóru í Moskva 26. - 30. november 1979, og samdust partarnir um viðløgdu skipan, sum ber í sær, at føroysk skip fáa loyvi til at veiða í sovjetiskum sjógvi 7000 tons av toski, íroknað hjáveiðu av hýsu og øðrum botnfiski, harav alt kann veiðast í sovjetiskum sjógvi ella 4800 tons í sovjetisk - norska felagsøkinum, tí sonevnda «blandaða» ella «gráa» økinum. Tey 2200 tonsini, sum eftir eru, kunnu antin veiðast í sovjetiskum sjógvi ella treytað av góðkenning frá norsku myndugleikum í norska partinum av Barentshavinum. Føroysk skip kunnu harnæst veiða 15.000 tons av lodnu. Afturfyri verður loyvt 15 russiskum skipum at veiða á sjóøki Føroya 65.000 tons av svartkjafti til matna. Sínamillum fiskiskapurin kann innast alt árið 1980.

Partarnir samdust um í 1980 at halda fram við sínamillum royndarfiskiskapinum. Tað vil siga, at føroyskum skipum er loyvt at reka royndarfiskiskap eftir rækjum í russiskum sjógvi, meðan 3 sovjetisk skip kunnu gera royndarfiskiskap í føroyskum sjógvi djúpari enn 700 m. Hesin fiskiskapur skal fremjast sambært fisklætlanum, sum partarnir skulu siga hvørjum øðrum frá frammanundan. Í hesum sambandi var áhugi sagdur verða fyri at umskifta sendinevndir av serfrøðingum innan fiskihættir og viðgerð av fiski.

Samráðingarúrslitið er viðlagt sum skjal 1.

Sí SKJAL 6.

Tingsins loyvi at frávíkja tíðarfreistini at viðgera hetta mál varð givið. Málið varð viðgjørt saman við nr. 40: Sáttmáli um fiskiskap út fyri strondum Sambandsríkjanna.

1. viðgerð 20. december. Málini vórðu bæði beind í marknaðarnevndina, sum sama dag legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 18. december 1979 og undir fyrstu viðgerð tann 20. december beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur á fundi 20. december 1979 viðgjørt málið, og tekur meirilutin (Jógvan Durhuus, Jógvan Sundstein, Edmund í Garði og Haldur Hansen) undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Jógvan Olsen og Eli Nolsøe) setur fram soljóðandi

broytingaruppskot

Sovjettisk skip eiga ikki at fáa loyvi at inna svartkjaftafiskiskap í føroyskum sjógvi norðanfyri 63° 30′.

Hesin minniluti tekur annars støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Asbjørn Joensen) tekur ikki undir við russiskum royndarfiskiskapi, og er av teirri áskoðan, at nøgd og virði av veiddum fiski í okkara sjógvi eigur at samsvara betur til tað, ið vit kunnu veiða á russiskum øki.

Ein samd marknaðarnevnd ger vart við, at í fundarfrásøgnini frá samráðingunum í Moskva 26. — 30. nov. 1979 um sínámillum fiskiskap við Føroyar — Sovjetsamveldið verður sagt:

«Teir (russar) harmaðust um, at eingir serfrøðingar hovdu havt stundir til at luttaka.»

Sipað varð her til fiskiskap á djúpum vatni undir Føroyum.

Ein samd marknaðarnevnd heitir á landsstýrið um at ávirka, at føroyingar í mest møguligan mun kunnu vera um borð á slíkum russiskum kanningar- og fiskiskipum.

2. viðgerð 21. december. Uppskot landsstýrisins samtykt við 17—0 atkvøðum Broytingaruppskot frá minnilutanum (Jógvan Olsen og Eli Nolsøe) fall við 10—0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1500-4-39.

42. Royndir við partroling

Ár 1979, týsdagin 18. december legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um royndir við partroling.

§ 1. Landsstýrinutn verður heimilað landskassans vegna at lána upp til 5 mill. kr., ið verða at nýta til royndarfiskiskap við partroling í 1980.

§ 2. Partrolingin skal byrja í april 1980, og gerast av 3 skipaslogum:

1 par av Estables-s-m slagnum,
1 par av Campbeltown slagnum og
1 par av Cuba ella Polens slagnum.

§ 3. Lán samb. § 1 verður at afturrinda yvir fíggjarløgtingslógina § 16 konto 2490/3307 (praktiskar fiskiroyndir).

§ 4. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om forsøg med partrawling.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån op til 5 mill. kr., der skal benyttes til forsøgsfiskeri med partrawling i 1980.

§ 2. Partrawlingen skal påbegyndes i april 1980 og foretages med 3 skibstyper:

1 par af Estables-s-m-typen,
1 par af Campbeltown typen og
1 par af Cuba eller Polens typen.

§ 3. Lånet i henhold til § 1 bliver at tilbagebetale over lagtingsfinanslovens § 16, konto 2490/3307 (praktiske fiskeriforsøg).

§ 4. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Fyri at koma okkum úr tí trongstoðu fiskivinnan er komin í, megu allir moguleikar kannast og troytast. Okkara trolarafloti er av einum tíllkum samansetningi, at royndarumráði hansara avgreinast til relativt grunt vatn.

Talið av trolarum er vorðið so stórt í mun til økið teir hava moguleika at royna á, at nakað má gerast fyri at vaksa um hetta øki.

Um skipini kundu roynt meira á djúpum vatni hevði royndarøkið vaksið munandi. Við partroling kann tann eksisterandi flotin royna munandi djúpri, og harvið troyta tað ríkidømi, ið har finst. Við partroling hálverast talið av trolum ið eru í sjótinum og harvið gerst rúmsáttari fyri hvørt trolið sær, eins og tað gerst rúmsáttari fyri arðar veiðuhættir. Er basis fyri rentablari veiðu á djúpum vatni vil eisini tað verða við-

virkandi til at rúmsáttari verður hjá samlaða veiðuflotanum. Tað verður longur millum hvørt einkult skip.

Ein trolari, Bakka Kristian, hevur havt fleiri royndir við partroling saman við ymsum øðrum trolarum. Í lotuni gera teir royndir saman við Gullberg.

Umframt teir fyrimunir, ið nevndir eru omanfyri kann upplýsast at partroling er orkusparandi og reiðskapssparandi, og hartil kemur at gróðurin á botni verður betur vardur, við tað at eingir lemmar (hurðar) verða nýttir og við tað at bert eitt trol verður drigið eftir botni fyri hvørjar tveir trolarar.

Orkunýtslan fyri hvørt parið svarar til umleið 75% av tí, ið somu trolarar nýta, tá teir veiða hvør sær. Tann tilsvarandi reiðskapsnýtslan er umleið 50%.

Til tær praktisku fiskiroyndir, ið higartil hava verið gjordar, hava av og á verið nýtt skip sum fíggjarliga eru komin í trongstøðu. Hetta er ein «humanur» politikkur, men úrslitini verða hareftir.

Fyri at uppnáa tey bestu úrslitini við partroling er ynskjuligt at tey bestu skipini við teimum skilabestu skiparunum verða nýtt, eins og ynskjuligt er, at tey skip ið av eintingum hava gjørt royndirnar, verða tikin framum.

Við tað at tað verður fíggjarliga ov tungt hjá privatum at fullfora tilíkar royndir, er rættast at hitt almenna heldur áfram har hesir undangongumenn hava víst vegin. Royndir megu halda áfram við 3 skipasløgum til haldgott úrslit er fingið. Fíggjarorsøkir megu ikki støðga royndunum á hálvari leið.

1. viðgerð 20. december. Málið varð beint í fiskivinnunevndina. 21. januar 1980 varð rætting útbýtt, sum var soljóðandi:

Til Løgtingsins fiskivinnunevnd
v/ Poul J. Olsen, nevndarformanni

Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 42/1979: Royndir við partroling.

Sum tað sæst í nevnda tingmáli samsvarar lógartekstur og viðmerkingar ikki.

Heitt verður tí við hesum á nevndina um at gera fylgjandi rættingar í lógartekstinum:

Í § 1 aftaná «partroling í 1980» verður sett:

á djúpum vatni.	på dybt vand.

og í § 2 verður sett sum

2. *stk.* Partrolingin má ikki fara fram grynni enn 150, 175 og 200 favnar við teimum ávikavísu skipasløgunum.	2. *stk.* Partrawling må ikke finde sted på lavere vand end 150, 175 og 200 favne med de respektive skibstyper.

23. april 1980 legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

Álit

Málið var lagt fram av Foroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 18. december 1979 og undir 1. viðgerð tann 20. í sama mánaða beint í fiskivinnunevndina.

Skotið verður upp, at landsstýrið fær heimild at táma upp til kr. 5 milj. at nýta til royndarfiskiskap við partroling í 1980. Byrjast skal í 1980 við trimum ávísum skipasløgum og skal roynast á djúpum vatni, frá 150 niður um 200 favnar ávikavist fyri tilskilaðu skipaslogini.

Ásannast má, at lonandi partroling longu hevur tikið seg upp og vísir hesin veiðuháttur seg at bera ávísar moguleikar í sær.

Á fundi í Fiskivinnunevndini tann 22. april 1980 var til taks taltilfar, ið vísir góð úrslit til bátarnar úr Vestmanna og fyri Bakka Kristian úr Leirvík. Hetta taltilfar, sum verður lagt við, prógvar, at umrøddi veiðuháttur ikki hevur verið til ógagns fyri býti av veiddu fiskasløgunum. Taltilfarið vísir eisini, at upsin er vorðin ein størri partur av veiðuni. Samlaða veiðumogdin er næstan tann sama.

Fyri kostnaðarsfðuna vísir tað seg, at sparing í olju er umleið ⅓ og eisini verður spart í reiðskapsnýtsluni. Tá veiðumogdin stórt sæð er hin sama er greitt, at avvarðandi bátar heldur spara enn fiska seg burtur úr eini moguligari fíggjartrongstoðu.

Tey úrslit, ið veiðuferini hava nátt við partroling eru hampulig og prógva, at veiðuháttur er lønandi. Viðvíkjandi á storri dýpi mælir meirilutin (Jákup Lindenskov, Øssur Dam Jacobsen, Eyðun Videro, Finnbogi Isaksen, Hans Marius Joensen og Jógvan Olsen) til, at hetta verður gjort í samráð við Fiskirannsóknarstovuna.

Sami meiriluti mælir til, at stórsta skipaslag av teimum í lógaruppskotinum nevndu fáa moguleika at royndarpartrola niðan fyri 150 favna dýpi.

Út frá tí sum omanfyri er fort fram, tekur meirilutin (Jákup Lindenskov, Øssur Dam Jacobsen, Eyðun Videro, Finnbogi Isaksen, Hans Marius Joensen og Jógvan Olsen) ikki undir við uppskotinum frá Foroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki.

Minnilutin (Adolf Hansen) mælir til at samtykkja framlagda lógaruppskot.

+ 2 skjøl.

SKJAL 1

Heygadrangur 1/1 10/4 1980.

	Toskur	Hýsa	Upsi o.a.		í alt
1978	116.462	4.353	6.946	(5,4%)	127.761 kg
1979	46.276	5.344	4.287	(7,7%)	55.907 kg
1980 (o. part.)	7.868	4.815	1.646	(11,5%)	14.329 kg
1980 (partrol)	14.839	12.197	48.913	(64,4%)	75.949 kg

Columbus

1978 (2 túrar)	37.351	1.957	4.727	(10,7%)	44.035 kg
1979 (7 túrar)	33.486	11.934	188.359	(80,6%)	233.779 kg
1980 (4 túrar) partrol	16.666	31.912	129.139	(72,7%)	177.717 kg
1980 (5. túrur) partrol				uml.	25.000 kg

Norðfinnur

1978	46.052	17.566	6.744	(9,6%)	70.362 kg
1979	72.963	10.320	16.320	(16,3%)	99.961 kg
1980 (partrol)	8.502	25.640	88.021	(72,1%)	122.163 kg

Vestfinnur

1978	83.743	18.555	8.743	(7,9%)	111.041 kg
1979	121.255	10.544	12.575	(8,7%)	144.374 kg
1980 (partrol)	8.502	25.640	88.021	(72,1%)	122.163 kg

Gullberg

1978 (19/4–15/12)	293.873	47.355	161.364	(32,1%)	502.592 kg
1979	71.474	14.680	67.374	(43,9%)	153.528 kg
1980 (partrol)	30.009	24.367	190.651	(77,8%)	245.027 kg

Leithamar

1977 (allt árið)	418.992	40.541	65.637	(12,5%)	525.170 kg
1980 (partrol)	14.839	12.197	48.913	(64,4%)	75.949 kg

Vesturbúgvin:

toskur	62.461 kg	
hýsa	35.078 kg	
longa	2.663 kg	
upsi	165.850 kg	
kongafiskur/rúd	22.850 kg	
	288.902 kg	sala 930.822,80 kr.

Norðbúgvin:

toskur	41.248 kg	
hýsa	9.666 kg	
longa	275 kg	
upsi	886 kg	
rúd	5.432 kg	
	57.507 kg	sala 208.493,49 kr.
í Vík	27.000 kg	
	84.507 kg	

Fram:

toskur	58.144 kg	
hýsa	32.704 kg	
longa	1.116 kg	
upsi	114.809 kg	
kongafiskur/rúd	34.598 kg	
	241.371 kg	sala 791.014,50 kr.

2. viðgerð 24. apríl 1980. Málið aftur beint í fiskivinnunevndina, sum 28. apríl legði fram

Uppískoytisálit

Nevndin hevur av nýggjum viðgjort málið eftir at tað undir 2. viðgerð aftur varð beint í Fiskivinnunevndina.

Meirilutin (Jákup Lindenskov, Øssur Dam Jacobsen, Eyðun Videro, Finnbogi Isaksen, Hans Marius Joensen og Jógvan Olsen) sum í upprunafliðinum hevur fort

fram, at partroling visir seg at geva hampuliga góð úrslit, er framvegis av teirri hugsan, at royndir við partroling eiga at verða gjørdar í samráð við Fiskirannsóknarstovuna og mælir til henda framferðarhátt í tann mun peningur er tokur til royndarfiskiskap, og vísandi til viðmerkingarnar um stórstu skipastøddina sum nevnd er í lógaruppskoti uppskotsstillarans.

Sami meirilutí setir tí fram fylgjandi

U p p s k o t
til
samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at gera royndir við partroling niðanfyri 150 favna dýpi við tí í lógaruppskotinum stórst nevndu skipastødd í tann mun peningur er tøkur.

Minnilutin (Adolf Hansen) mælir til at samtykkja lógaruppskotið.

Frambaldandi 2. viðgerð 29. apríl 1980. Uppskotið til samtyktar frá meirilutanum í fiskivinnunevndini (J. Landenskov, Øssur Dam Jacobsen, Finnbogi Isaksen, Hans Marius Joensen og Jógvan Olsen) samtykt við 30—0. Uppskotið frá Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum fall við 3—0.

---

43. Útflýggjan av upplýsingum um trupulleikarnar hjá fiskivinnuni

Ár 1979, týsdagin 18. december legði Pauli Ellefsen, løgtingsmaður vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar.

Landsstýrið verður álagt at útflýggja teimum politisku flokkunum tær upplýsingar, sum eru tøkar viðvíkjandi fíggjarligu trupulleikunum hjá Føroysku fiskivinnuni.

Viðmerkingar:

I útvarpi, bløðunum og undir orðaskiftinum á løgtingi viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 39/1979 er upplýst, at Føroya landsstýri frá Fiskivinnuráðnum hevur fingið álit um fíggjarviðurskiftini hjá føroyska feskfiskaflotanum. Eisini er upplýst, at landsstýrið hevur taltilfar, bygt á innheintaðar fíggjarupplýsingar hjá teimum einstøku skipunum og teimum einstøku leverandørunum v.fl., sum liggur aftanfyri lógaruppskotið nr. 39/1979. Omanfyri standandi uppskot til samtyktar gongur út uppá at áleggja landsstýrinum at útflýggja teimum politisku flokkunum úrslitini av nevndu kanningum og tær fíggjarupplýsingar, sum annars eru tokar og kunnu nýtast til politiskar metingar um fíggjarligu gongdina og stoðuna hjá fiskiflotanum.

1. viðgerð 21. december. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 15. apríl 1980 legði fram soljóðandi

Álit

Málið var lagt fram av Sambandsflokkinum tann 18. december 1979 og undir 1. viðgerð tann 21. í sama mánaða beint í fíggjarnevndina.

Sambandsflokkurin hevur uppskot til samtyktar um, at landsstýrinum verður álagt at útflýggja teimum politisku flokkunum tær upplýsingar, sum eru tøkar viðvíkjandi fíggjarligu trupulleikunum hjá føroysku fiskivinnuni.

Aftaná at málið er beint í fíggjarnevndina hevur landsstýrið handað fíggjarnevndini tær upplýsingar frá Fiskuvinnuráðnum, sum nevndar eru í viðmerkingunum til uppskotið til samtyktar.

Fíggjarnevndin er samd um, at tørvur framyvir verður fyri at neyðugar upplýsingar verða útflýggjaðar teimum politisku flokkunum og tekur einmælt undir við uppskotinum til samtyktar.

2. viðgerð 17. apríl. Atkvøðugreiðslan varð útsett til 18. apríl. Uppskotið frá Sambandsflokkinum fall við 15—0.

44. Veðhald fyri lánum v.m. á goymslu

Ár 1979, týsdagin 18. december legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.

§ 1. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1980/81 at veita veðhald fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild og agn á goymslu. Veðhaldið verður givið fyri lánum ikki upp um 70 % av lánivirðinum.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til fiskemel og animalsk olie m.v. på lager.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1980/81 at garantere for lån til fiskemel, animalsk olie, konsumsild og agn på lager. Garantien ydes for lån, der ikke må overstige 70% af låneværdien.

§ 2. Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Uppskotið er samsvarandi við løgtingslóg nr. 45 frá 31. mai 1979, sum fer úr gildi 31. mars 1980. Lógin skal bert galda komandi fíggjarár. Vísst verður til viðmerkingar frá landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 54/1975, løgtingstíðindi 1975, bls. 231.

1. viðgerð 21. december. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 15. april legði fram

Alit

Málið var lagt fram av landsstýrinum tann 9. december 1979 og undir 1. viðgerð tann 21. í sama mánaða beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at tað fær heimild landskassans vegna í fíggjarárinum 1980/81 at veita veðhald fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild og agn á goymslu. Veðhaldið verður givið fyri lánum ikki upp um 70% av lánivirðinum. Í viðmerkingunum verður sagt, at uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 45 frá 31. mai 1979, sum fór úr gildi 31. mars 1980.

Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 17. apríl. 3. viðgerð 21. apríl. Uppskot landsstýrisins samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1408-5-2. Lóg nr. 53 frá 12. mai 1980.

45. Landskassans luttøka í fyribilsrakstri av flakavirkinum Vestfisk í Sørvági

Ár 1979, týsdagin 18. december legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram

Uppskot
til

løgtingslóg um landskassans luttøku í fyribilsrakstri av flakavirkinum Vestfisk í Sørvági.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at luttaka í rakstrinum av flakavirkinum Vestfisk hjá Sørvágs kommunu við helvtini av rakstrarúrslitinum, tó í mesta lagi við helvtini av kr. 1.000.000,- í 1980 og helvtini av kr. 500.000,- í 1981.

§ 2. Landsstýrið ger nærri ásetingar um, hvorjar útreiðslur og inntokur, tað verða at taka við, tá rakstrarúrslitið eftir § 1 verður gjørt upp.

§ 3. Landskassans luttøka í rakstrinum heldur uppat tann dag, tá p/f Flakavirkið í Sørvági byrjar at taka ímóti fiski, tó í seinasta lagi 1. juli 1981.

§ 4. Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1980.

lagtingslov om landskassens deltagelse i foreløbig drift af filétfabrikken «Vestfisk» i Sørvági.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at deltage i driften af filétfabrikken Vestfisk, der ejes af Sørvágs kommune, med halvdelen af driftsresultatet, dog maximalt halvdelen af kr. 1.000.000 i 1980 og halvdelen af kr. 500.000 i 1981.

§ 2. Landsstyret træffer nærmere bestemmelser om hvilke udgifter og indtægter der skal regnes med, når driftsresultatet efter § 1 skal beregnes.

§ 3. Landskassens deltagelse i driften ophører den dag, P/f «Flakavirkið í Sørvági» begynder at indhandle fisk, dog senest den 1. juli 1981.

§ 4. Denne lov træder i kraft 1. januar 1980.

Viðmerkingar:

Flakavirkið hjá P/f N. Niclasen í Sørvági helt uppat við at taka ímóti fiski í juli 1979. Virkið var stórsta arbeiðsplass í bygdini, og fyri at forða fyri at arbeiðsplássið varð niðurlagt, og útróðrarmenn fingu truptulleikar við at sleppa av við fiskin, keypti Sørvágs kommuna Flakavirkið á heysti 1979 við ti fyri eyga at reka virkið viðari undir navninum «Vestfisk» til P/f «Flakavirkið í Sørvági» undir stovnan um eitt til tvey ár fer at taka ímóti fiski.

Kommunan metir leysliga, at rakstrarhallið kemur at verða umleið 887.000 kr. um árið íroknað útreiðslur til rentur og avdrátt av lánum til rakstur, ábotur, maskinútvegan og rentur av eini lánsupphædd uppá kr. 2.800.000,- til keyp av ognini frá P/f N. Nielasen.

Kommunan metir, at tað hevur alstóran týdning ikki bert fyri kommununa, men fyri samfelagið sum heild at hava flakavirkið gangandi og hevur tí sokt um, at landskassin luttekur í rakstrinum av hesum virki.

Í viðgerð 19. december. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 16. apríl 1980 legði fram

Álit

Málið var lagt fram av landsstýrinum tann 18. december 1979 og undir 1. viðgerð 19. í sama mánaða beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið hevur skotið upp, at tað fær heimild landskassans vegna at luttaka í rakstrinum av flakavirkinum Vestfisk hjá Sorvágs kommunu við helvtini av rakstrarúrslitinum, tó í mesta lagi við helvtini av kr. 1.000.000,- í 1980 og helvtini av kr. 500.000,- í 1981.

Eftir lógaruppskotinum skal landskassans luttoka í rakstrinum halda upp at tann dag, tá p/f Flakavirkið í Sorvági byrjar at taka fiskur í, tó í seinasta lagi 1. juli 1981.

Fíggjarnevndin hevur havt fund við umboð fyri Sorvágs bygdaráð um málið. Á fundinum vóru lagd fram seinastu rakstrartolini fyri flakavirkið.

Undir samráðingunum í fíggjarnevndini varð frá bygdarráðnum skotið upp, at landskassans luttoka verður broytt soleiðis, at heldur enn at landskassin luttekur í rakstrinum fyri flakavirkið Vestfisk hjá Sorvágs kommunu, skal landskassin veðhalda fyri ávísum parti av láni í samband við keypið frá p/f N. Nielasen.

Tað varð upplýst, at ognin er yvirtikin frá nevnda felag fyri kr. 2.800.000,00.

Út frá hesum uppskoti frá Sorvágs bygdarráð, sum er eigari av flakavirkinum Vestfisk, tekur fíggjarnevndin undir við, at veitt verður ávíst veðhald fyri ta skuld, ið kommunan átók sær í samband við keypið og setur fram soljóðandi

Broytingaruppskot
til

lagtingslóg um veðhald fyri láni til flakavirkið Vestfisk í Sorvági.

§ 1. Landsstýrinum er heimlað landskassans vegna at veðmakda fyri láni upptil 70% av kr. 2.800.000,00 til flaka-

lagtingslov om garanti for lån til filétfabrikken «Vestfisk» i Sørvági.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån indtil 70% af kr. 2.800.000,00 til filétfa-

virkið Vestfisk í Sørvági. Lánið verður at veðtryg gja í virkinum.

brikken Vestfisk i Sørvági. Lånet pantsikres i virksomheden.

§ 2. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 23. apríl. Málið varð beint aftur í figgjarnevndina, sum 28. apríl legði fram nýtt

Álit

Figgjarnevnd løgtingsins legði fram álit í málinum dagfest 14. apríl 1980, og varð hetta álitið tikið til aðru viðgerð 23. í sama mánaða.

Eftir at tingið samtykti at beina málið aftur í figgjarnevndina, hevur figgjarnevndin aftur á fundi tann 23. apríl viðgjørt málið.

Meirilutin (Håkun Djurhuus, Jørgen Thomsen, Jógvan Durhuus, Ivan Johannesen, Pauli Ellefsen og Asbjørn Joensen) endurtekur álit sítt, sum orðað í framlogu 14. apríl, meðan minnilutin (Haldur Hansen) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Framhaldandi 2. viðgerð seinri sama dag. Haldur Hansen, løgtingsmaður, legði fram

Uppískoytisálit

Undir 2. viðgerð av málinum gjørdi Haldur Hansen vart við, at hann ikki tekur undir við broytingaruppskoti figgjarnevndarinnar um at veita veðhald til flogufiggjan, tá henda figgjan frammunundan er greidd. Tað er heldur ikki hetta, sum Sørvágs kommuna hevur søkt um.

Minnilutin (Haldur Hansen) mælir tinginum til at samtykkja landsstýrisins uppskot óbroytt.

Framhaldandi 2. viðgerð. Uppskot landsstýrisins fall við 8—0 atkvøðum. Uppskotið frá figgjarnevndini varð samtykt í staðin fyri uppskot landsstýrisins, § 1 fekk 29—0 og § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð sama dag. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 30—0.

F.L. j.nr. 1413-1-80. Lóg. nr. 48 frá 12. mai 1980.

46. Fyrispurningur til Dánjal Paula Danielsen, landsstýrismann

Ár 1979, mikudagin 19. december setti Asbjørn Joensen, logtingsmaður vegna tingmenninar í Norðoyggjum og Eysturoy fram soljóðandi

f y r i s p u r n i n g

1. Kann landsstýrismaðurin siga nakað um, nær bergholsgerðin Leirvík — Gota kann fara fram?

2. Hevur landsstýrismaðurin umhugsað nakað tiltak fyri at byrgja fyri vanlukkum á Leirvíkarvegnum, so sum at gera neyðugar kanningar, av tí at vegurin ikki kann bera ov tungan flutning?

Viðmerkingar:

Undan seinasta vali vóru fleiri uppskotini logd á tingborð um bygging av tunnellum ymsastaðni í landinum, eitt nú Kaldbak — Signabø og Leirvík — Gøta.

Sum viðmerking til hetta seinast nevnda uppskot Leirvík — Gøta varð tað fört fram, at hesin vegur var sera ringur, fyri ikki at siga beinleiðis vandamikil at ferðast eftir, tá hann er bygdur upp fyri mongum árum síðani við teimum avmarkaðu møguleikum, sum tá vóru, eins og havast má í huga ta ferðslu, sum tá var talan um.

Her til kemur, at nú er ferðslan skipað so, at nærum øll ferðing og flutningur til og frá Norðuroyggjum skal flytast hendan vegin, og er hetta eitt stórt tal bæði av ferðafólki og tungum flutningsbilum.

Tað er tí eyðsæð, at hesin vegur er hart lastaður, hetta ger stoðuna vandamikla og kann í versta føri væntast, at ólukka kann henda, um einki tiltakið verður gjørt.

23. april 1980 svaraði Dánjal Pauli Danielsen, landsstýrismaður fyrispurninginum frá Asbjørn Joensen soleiðis:

Asbjørn Joensen hevur sett mær henda fyrispurning:

1. Kann landsstýrismaðurin siga mær nakað um, nær bergholsgerðin Leirvík - Gøta kann fara fram.
2. Hevur landsstýrismaðurin umhugsað nakað tiltak fyri at byrgja fyri vanlukkum á Leirvíkarvegnum, so sum at gera neyðugar kanningar, av tí at vegurin ikki kann bera ov tungan flutning.

Ætlanin var fyri 4 árum síðani at fara undir breiðkan av Leirvíkarvegnum, men

kom yvski tá fram í løgtinginum at í staðin varð gjørd tunnel, ein, um farið var yvir í Gøtudal og tvær, um farið varð norður móti Varmakelduleiði. Mett varð, at tunnelloysnin tá var einar 15 milj. kr. dýrari enn vanligur vegur.

Peningur hevur ikki síðani verið tokur til hesa rættiliga krevjandi ilogu, serliga við tað at arbeitt verður við Kallsoyartunnellunum, og er heldur eingin peningur settur av í ár til endamálið.

Ásannast má, serliga nú nýggja Ternan fer í sigling og eftir øllum at doma flutningurin eftir Leirvíkarvegnum verður at økjast í stórum, at vegurin er alt ov vánaligur, og verður sum skjótast at fara undir at fáa hetta broytt.

Hóast stórar niðurskurðir í vegakontoini til nýgerðir, meti eg, at farast má beinan vegin undir nágreiniligar kanningar, og arbeiðið gerast so skjótt sum tað fíggjarliga er møguligt.

Til annan spurning er at siga, at sjálvandi verður tað gjort, ið gerast kann at fyribyrgja ólukkum á verandi vegi. Vegurin hevur sum er verið nýttur til tungan flutning, og verða bilarnir valla tyngri við nýggju Ternuni, men sum áður sagt fleiri.

---

47. Lóg um skrásettar grannskoðarar

Ár 1979, mikudagin 19. december legði Dánjal Pauli Danielsen, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um skrásettar grannskoðarar.

1. táttur. Skráseting.

Gr. 1. Landsstýrið hevur skrásetingina av grannskoðarum um hendur.

2. *petti.* Rætt til at verða skrásettur og harvið nýta heitið «Skrásettur grannskoðari» hevur tann einstaklingur, sum

lagtingslov om registrerede revisorer.

Kap. 1. Optagelse i registret.

Par. 1. Landsstyret fører et revisorregister.

Stk. 2. Ret til at blive optaget i revisorregisteret og dermed til at benytte betegnelsen «registreret revisor» har enhver person, der:

1) hevur heimarætt í ríkinum,
2) býr í Føroyum,
3) er fyltur 25 ár,
4) ikki er gjørdur ómyndugur, er undir verja ella hevur búgv sítt til frotaviðgerð,
5) hevur staðið prøvtøkur ella royndir, sum landsstýrið hevur góðkent til hetta endamál, og
6) í minsta lagi 3 ár aftaná at verða fyltur 18 ár hevur útint alt vanligt bókhalds-, roknskapar- og grannskoðaraarbeiði hjá einum góðkendum grannskoðara, einum skrásettum grannskoðara ella hjá einum grannskoðara, sum verður skrásettur sambært gr. 15, 2. petti.

3. petti. Upptøka í skrásetingina kann verða noktað í teimum í borgarligu revsilógini gr. 78, 2. petti nevndu umstøðum. Eisini kann upptøka í skrásetingina verða noktað, um viðkomandi í starvi ella vinnu hevur sýnt sovorðnan atburð, at orsøk er at rokna við, at hann ikki vil rokja starv sítt sum skrásettur grannskoðari væl og virðiliga.

4. petti. Landsstýrið kann víkja frá krøvunum í petti 2, nr. 1 og 6. Skrásetingin kann í hesum førum verða tíðaravmarkað.

Gr. 2. Skrásetti grannskoðarin fær handað prøvskjal um skrásetingina frá landsstýrinum.

Gr. 3. Ein skrásettur grannskoðari verður strikaður úr skrásetingini,

1) tá hann doyr,
2) um hann heldur uppat við at lúka krøvini í gr. 1, 2. petti, nr. 1, 2 ella 4,
3) um rætturin til at verða upptikin í skrásetingina verður tikin frá honum samb. gr. 11, 3. petti ella sambært gr. 79 í borgarligu revsilógini, ella
4) um hann rekur vinnu ella hevur

1) har dansk indfødsret,
2) har bopæl på Færøerne,
3) er fyldt 25 år,
4) ikke er umyndiggjort, under lavværgemål eller har sit bo under konkursbehandling,
5) har bestået eksaminer eller prøver, som landsstyret har godkendt til dette formål, og
6) i mindst 3 år efter det fyldte 18. år har deltaget i udførelsen af de almindeligt forekommende bogførings-, regnskabs- og revisionsarbejder hos en statsautoriseret revisor, en registreret revisor eller hos en revisor, der opnår registrering efter par. 15, stk. 2.

Stk. 3. Optagelse i registeret kan nægtes under de i borgerlig straffelovs par. 78, stk. 2 nævnte omtændigheder. Endvidere kan optagelse i registret nægtes, såfremt den pågældende i stilling eller erhverv har udvist en sådan adfærd, at der er grund til at antage, at han ikke vil drive virksomhed som registreret revisor på forsvarlig måde.

Stk. 4. Landsstyret kan undtage fra betingelserne i stk. 2, nr. 1 og 6. Registreringen kan i så fald tidsbegrænses.

Par. 2. Den registrerede revisor får udleveret et bevis for den stedfundne registrering fra landsstyret.

Par. 3. En registreret revisor slettes i registeret,

1) når han dør,
2) hvis han ophører med at opfylde betingelserne i par. 1, stk. 2, nr. 1, 2 eller 4,
3) hvis retten til at være opført i registret frakendes ham efter par. 11, stk. 3, eller borgerlig straffelov par. 79, eller
4) hvis han driver et erhverv eller ind-

starv, sum ikki kann sameinast við starvið sum skrásettur grannskoðari eftir teimum krovum, sum landsstýrið setur sambært gr. 8.

2. petti. Verður ein skrásettur grannskoðari strikaður, skal skrásetingarprógvið beinanvegin verða handað landsstýrinum.

3. petti. Fellur orsokin til, at ein skrásettur grannskoðari er strikaður úr skrásetingini, burtur, kann hann verða skrásettur aftur eftir umsókn.

Gr. 4. Einans fólk, sum eru alment skrásett sum skrásettir grannskoðarar kunnu nýta hetta heitið.

2. táttur. Virksemið hjá skrásettum grannskoðarum.

Gr. 5. Skrásettir grannskoðarar og felog, sum reka bókhalds-, roknskaparella grannskoðaravirki við skrásettum grannskoðarum sum luttakarum ella hava sovorðnar í starvi, kunnu bert hava meira enn eitt tilhaldsplass, um hvørt plássið er undir leiðslu av einum av virkinum knýttum skrásettum grannskoðara, sum bert er leiðari fyri hesum tilhaldsplássi.

2. petti. Landsstýrið skal hava skrivliga fráboðan áðrenn ein skrivstovudeild verður latin upp.

Gr. 6. Undirskriftin hjá einum skrásettum grannskoðara á ein roknskap verður, um ikki annað framgongur av áteknínglni, at roknskapurin er grannskoðaður av honum, og at hann er rætt uppsettur sambært bókhaldið, og at hann er uppgjørdur við umhygnari sannforing um verandi virðir, rættindi og skyldur, og at hann lýkur krov lógarinnar um uppsetan og framløgu av roknskapum.

tager en stilling, der efter de regler, som landsstyret fastsætter efter par. 8, ikke kan forenes med virksomheden som registreret revisor.

Stk. 2. Sletles en registreret revisor, skal registreringsbeviset straks tilbageleveres landsstyret.

Stk. 3. Ophører grunden til, at en revisor er slettet, kan han pány optages i registret efter anmodning.

Par. 4. Kun personer, der er optaget i revisorregisteret, må benytte betegnelsen » registreret revisor«.

Kap. 2. Registrerede revisorers virksomhed.

Par. 5. Registrerede revisorer samt selskaber, som driver bogføring, regnskabs- eller revisionsvirksomhed med registrerede revisorer som deltagere eller ansatte, må kun have mere end ét kontorsted, hvis hvert kontor ledes af en til virksomheden knyttet registreret revisor, der kun er leder af det pågældende kontor.

Stk. 2. For et kontorsted etableres, skal der indgives skriftlig anmeldelse herom til landsstyret.

Par. 6. En registreret revisors underskrift på et regnskab anses, medmindre andet fremgår af påtegningen, som udtryk for, at regnskabet er revideret af ham, og at det er rigtigt opstillet på grundlag af bogføringen og opgjort under omhyggelig hensyntagen til bestående værdier, rettigheder og forpligtelser og i overensstemmelse med lovgivningens krav til regnskabsaflæggelsen.

Gr. 7. Ein skrásettur grannskoðari má ikki geva váttan frá sær í roknskaparviðurskiftum, tá

1) hann í tænastuviðurskiftum, í hjúnalagi, í ættlýsingar- ella tilfeturstokuviðurskiftum ella í ætt- ella svágarviðurskiftum í upp- ella niðurgangandi grein ella í síðugrein so nær sum systkin, er knýttur at honum, sum biður um váttanina, ella hjá honum, grannskoðanin ynskist framd, ella at bókhaldara ella kassameistara hjá viðkomandi,

2) hann í førum, har váttanin er umbiðin av virkjum ella stovnum, ella grannskoðanin ynskist gjørd hjá hesum, á nakran av teimum undir 1) nevndu háttum er knýttur at limum í nevnd ella stjórn hjá viðkomandi ella at kassameistara ella bókhaldara á virkinum ella stovninum, ella

3) hann, hjúnafelagi hansara, foreldur ella børn hansara hava ein týðandi peningaligan áhuga í tí virki, um hvørs viðurskifti váttanin ynskist at verða givin, ella hjá hvørjum grannskoðanin ynskist at verða gjørd.

Gr. 8. Landsstýrið kann seta nágreinilígari reglur fyri virksemið hjá skrásettum grannskoðarum og starvstreytir teirra, og í hesum gera av, at ávisar vinnur og storv ikki kunnu samcinast við slíkt virksemi.

Par. 7. Ingen registreret revisor må afgive erklæring i regnskabsmæssige forhold, når:

1) han ved tjenesteforhold, ved ægteskab, ved adoptiv- eller plejeforhold eller ved slægts- eller svogerskab i op- eller nedstigende linje eller i sidelinjen så nært som søskende er knyttet til den, som har begæret erklæringen, eller hos hvem revisionen ønskes udført, eller til vedkommendes bogholder eller kasserer,

2) han i tilfælde af, at erklæringen er begæret af erhvervsvirksomheder eller institutioner, eller revisionen ønsker udført hos disse, på nogen af de under 1) angivne måder er knyttet til medlemmer af vedkommende bestyrelse eller direktion eller til virksomhedens eller institutionens kasserer eller bogholder, eller

3) han, hans ægtefælle, forældre eller børn har en mere betydelig økonomisk interesse i den virksomhed, om hvis forhold erklæring ønskes afgivet, eller hos hvem revisionen ønskes udført.

Par. 8. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler for registrerede revisorers virksomhed og forretningsbetingelser og herunder bestemme, at visse erhverv og stillinger ikke kan forenes med sådan virksomhed.

3. táttur. Reglur viðvíkjandi revsing v.m.

Gr. 9. Um onkur ger ímóti gr. 3, 2. pettí, gr. 4, gr. 5 og gr. 7, verður viðkomandi revsaður við sekt, um ikki storri revsing er uppiborin sambert lóggávuni annars.

2. *pettí.* Í reglugerð, sum landsstýrið

Kap. 3 Bestemmelser vedrørende straf m.v.

Par. 9. Overtrædelse af par. 3, stk. 2, pat. 4, par. 5 og par. 7 straffes med bøde, medmindre strengere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning.

Stk. 2. I forskrifter, der gives af lands-

ger sambært hesa lóg, kann sekt verða ásett fyri ikki at halda reglugerðina.

3. petti. Ein skrásettur grannskoðari, sum í virksemi sínum gevur skeiva skrivliga váttan, ella skrivliga vitnar nakað, sum hann ongan kunnleika hevur um, ella skrivar undir ein roknskap, sum ikki er grannskoðaður av honum, uttan at hefta fratangongur av tí givnu grannskoðaraváttanini, verður revsaður við sekt ella hefti, tó ikki storri revsing er uppiborin sambært lóggávuni annars.

Gr. 10. Borgarligu revsilógarinnar greinir 144, 150-152 og 154-157 verða nýttar á sama hátt viðvíkjandi skrásettum grannskoðarum. Viðvíkjandi meðarbeiðarum teirra verða greinirnar 144, 152 og 155 nýttar á sama hátt.

2. petti. Ein skrásettur grannskoðari, sum noktar at gera eitt átikið arbeiði liðugt ella noktar at átaka sær eitt umbiðið arbeiði, hevur uttan mun til reglurnar um tagnskyldu í revsilógini rætt til at greiða tí grannskoðara, sum kemur í hansara stað, frá grundini til noktan sína.

Gr. 11. Landsstýrið setur eina 5-manna grannskoðanarkærunevnd. Sorinskrivarin í Føroyum er formaður í hesi nevnd. Av hinum nevndarlimunum skal 1 vera statsgóðkendur grannskoðari, 1 skrásettur grannskoðari, 1 lógfroðingur og 1 búskapafroðingur.

2. petti. Ein skrásettur grannskoðari, sum misrokir tær skyldur, sum hoyra undir starv hansara, kann fáa átalu ella ávaring ella í mesta lagi kr. 10.000 í sekt frá kærunevndini.

styret i medfør af loven, kan der fastsættes straf af bøde for overtrædelse af bestemmelser i forskrifterne.

Stk. 3. En registreret revisor, der i sin virksomhed afgiver urigtig skriftlig erklæring eller skriftlig bevidner noget, hvorom han ingen kundskab har, eller underskriver på et regnskab, som ikke er revideret af ham, uden at dette fremgår af den afgivne revisionserklæring, straffes med bøde eller hæfte, medmindre strengere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning.

Par. 10. Borgerlig straffelovs par. 144, 150-152 og 154-157 finder tilsvarende anvendelse på registrerede revisorer. For så vidt angår disses medarbejdere, finder samme lovs par. 144, 152 og 155 tilsvarende anvendelse.

Stk. 2. En registreret revisor, der fratræder et hverv eller nægter at påtage sig et hverv, har uanset straffelovens regler om tavshedspligt ret til at meddele den revisor, der træder i stedet for ham, grunden til sin fratræden.

Par. 11. Landsstyret nedsætter et revisorankenævn bestående af 5 medlemmer. Sorenskriveren på Færøerne er formand for nævnet. Nævnet skal iøvrigt bestå af 1 statsautoriseret revisor, 1 registreret revisor, 1 med juridisk uddannelse og 1 med nationaløkonomisk uddannelse.

Stk. 2. En registreret revisor, der ved udøvelsen af sin virksomhed tilsidesætter de pligter, som hans stilling medfører, kan af ankenævnet tildeles advarsel eller frattesættelse eller pålægges en bøde på ikke over kr. 10.000,-.

3. petti. Um skrásetti grannskoðarin er grovliga ella oftani vanskettin í arbeiði sínum, soleiðis at orsak er at halda, at hann í framtiðini ikki rokir arbeiði sítt við umhygni, kann kærunevndin avgera, at hann verður strikaður úr skrásetingini 1 - 5 ár ella upp á óvissa tíð. Avgerðin skal kunngerast saman við upplýsingum um rættin til sambæri grein 12 at royna avgerðina hjá vanligu dómstólunum og um freistina fyri at royna hetta.

4. petti. Avgerð nevndarinnar kann ikki skjótast inn undir annan fyrisitingarligan myndugleika.

5. petti. Ber landsstýrið og/ella eitt landsgóðkent felag av skrásettum grannskoðarum kann krevja, at eitt mál verður viðgjort av kærunevndini.

Grein 12. Ein avgerð tikin sambært grein 11, 3. petti kann skjótast inn undir vanligu dómstólarnar av tí, sum avgerðin viðvikur.

2. petti. Áheitanin um dómsviðgerð sambært 1. petti verður send landsstýrinum í seinasta lagi 4 vikur eftir at avgerðin er kunngjord viðkomandi. Landsstýrið reisir ákæru móti viðkomandi sambært borgarligu rættargongdina.

3. petti. Ákærureisingin er freistað, men kann dómarin gera av, at viðkomandi ikki má reka grannskoðanarvirksemi meðan sakarmálið verður viðgjort. Um avgerð kærunevndarinnar verður dømd at vera lóglig, kann tað í dóminum verða avgjørt, at klagumál ikki er freistað.

Gr. 13. Grannskoðanarkærunevndin kann til eina og hvørja tíð taka eina tikna avgerð sambært gr. 11. 3. petti aftur, um søkt verður um hetta. Er grannskoðarin strikaður úr skrásetingini upp á óvissa tíð, og noktar kæru-

Stk. 3. Såfremt den registrerede revisor har gjort sig skyldig i grov eller oftere gentagen forsømmelse i udøvelsen af sin virksomhed og de udviste forhold giver grund til at antage, at han ikke fremtidigt vil udøve virksomheden på for vælig måde, kan ankenævnet frakende ham beskikkelsen som registreret revisor i 1 - 5 år eller på ubestemt tid. Afgørelsen skal indeholde oplysning om adgangen til efter par. 12 at begære domstolsprøvelse og om fristen herfor.

Stk. 4. Nævnets afgørelse kan ikke indbringes for anden administrativ myndighed.

Stk. 5. Kun landsstyret og/eller en landsdækkende forening af registrerede revisorer kan begære en sag optaget til behandling i ankenævnet.

Par. 12. En afgørelse efter par. 11. stk. 3 kan af den, afgørelsen vedrører, forlanges indbragt for domstolene.

Stk 2. Begæring i henhold til stk. 1 skal fremsættes over for landsstyret senest fire uger efter at afgørelsen er meddelt den pågældende. Landsstyret anlægger sag mod den pågældende i den borgerlige retsplejes former.

Stk. 3. Begæring om sagsanlæg har opsættende virkning, men retten kan ved kendelse bestemme at den pågældende under sagens behandling ikke må udøve revisorvirksomhed. Såfremt nævnets afgørelse findes lovlig ved dommen, kan det i denne dom bestemmes, at anke ikke har opsættende virkning.

Par. 13. Revisorankenævnet kan til enhver tid efter ansøgning ophæve en i henhold til par. 11, stk. 3 foretagen frakendelse. Er denne sket indtil videre, og afslår ankenævnet ansøgning om ophævelse af frakendelsen, kan den på-

nevndin umsókn um at taka avgerðina aftur, kann viðkomandi krevja avgerðina royndа hjá dómstólunum um 5 ár eru liðin aftaná at avgerðin var tikin og í minsta lagi 2 ár eru liðin síðani upp-afturtoka í skrásetingina seinast varð noktað við dómi. Gr. 11, 3. petti, 2. punktum og gr. 12, 2. petti verða nýttar á sama hátt her.

Gr. 14. Landsstýrið ásetur nærri reglur fyri virksemitnum hjá kærunevndini.

4. táttur. Ásetanir um bráðfeingisreglur og um nær lógin fær gildi.

Gr. 15. Lógin fær gildi beinanvegin.

2. petti. Grannskoðarar hava til tann 1/1 1981 rætt til at verða upptiknir í skrásetingina av grannskoðarum, um teir

1) lúka krøvini í gr. 1, 2. petti, samanber petti 3, og í minsta lagi í 3 ár hava havt sjálvstøðugt grannskoðaravirksemi sum høvuðsyrki,

2) lúka krøvini í gr. 1, 2. petti, nr. 1-4, samanber petti 3, og í minsta lagi í 10 ár hava havt sjálvstøðugt grannskoðaravirksemi sum høvuðsyrki, ella

3) lúka krøvini í gr. 1, 2. petti, nr. 1-4, samanber petti 3, og eftir at verða fyltur 40 ár, í minsta lagi í tey seinastu 10 árini hava starvast hjá einum statsgóðkendum grannskoðara og har hava útint alt vanligt bókhalds-, roknskapar- og grannskoðaraarbeiði.

4) lúka krøvini í gr. 1, 2. petti, nr. 1-4, samanber petti 3, og í minsta lagi í 10 ár hava starvast hjá einum statsgóðkendum grannskoðara og har hava útint alt vanligt bókhalds-, roknskapar- og grannskoðaraarbeiði, treytað av, at viðkomandi

gældende forbange afgørelsen prøvet ved domstolene, såfremt der er forløbet fem år efter frakendelsen og mindst to år efter, at generhvervelse af beskikkelsen senest er nægtet ved dom. Par. 11, stk. 3, 2. punktum og par. 12, stk. 2 finder tilsvarende anvendelse.

Par. 14. Landsstyret fastsætter nærmere regler for ankenævnets virksomhed.

Kap. 4. Overgangs- og ikrafttrædelsesbestemmelser.

Par. 15. Denne lov træder ikraft straks.

Stk. 2. Revisorer har indtil 1/1 1981 ret til at blive registreret når de

1) opfylder betingelserne i par. 1, stk. 2, nr. 1 - 5, jvf. stk. 3, og som i mindst 3 år har udøvet selvstændigt revisorerhverv som hovederhverv,

2) opfylder betingelserne i par. 1, stk. 2, nr. 1 - 4, jvf. stk. 3, og som i mindst 10 år har udøvet selvstændigt revisorerhverv som hovederhverv, eller

3) opfylder betingelserne i par. 1, stk. 2, nr. 1 - 4, jvf. stk. 3, og efter at have passeret en alder af 40 år, i mindst de seneste 10 år er blevet ansat hos en statsautoriseret revisor og der udøvet alt almindeligt forekommende bogførings-, regnskabs- og revisionsarbejde.

4) opfylder betingelserne i par. 1, stk. 2, nr. 1 - 4, jvf. stk. 3, og i mindst 10 år har været ansat hos en statsautoriseret revisor og der udøvet alt almindeligt forekommende bogførings-, regnskabs- og revisionsarbejde, betinget af at vedkommen-

hevur staðið eina av landsstýrinum góðkenda reynd í føroyskum skattarætti.

de har bestået en af landsstyret godkendt prøve i færøsk skatteret.

Viðmerkingar:

Í fleiri ár hevur talið av statsgóðkendum grannskoðarum, ið búgva og virka í Føroyum, staðið í stað, og roknast kann ikki við, at talið fer at okjast serliga skjótt framyvir. Tí fer torvurin á vælútbúnum grannskoðarum við ongari statsgóðkenning ikki at minka, men heldur hinvegin at vaksa.

Í lotuni kunna at kalla øll, óansað útbúgving, byrja grannskoðaravirksemi. Fyri at tryggja virkjum, felagum, einstaklingum og øðrum eitt úrval av grannskoðarum við hollum praktiskum og teoretiskum kunnleika, verður neyðugt at lóggeva hesum viðvíkjandi.

Lógin kemur, so sum hon nú er orðað, at tryggja samfelagnum eitt lið av skrásettum grannskoðarum, ið eru forir fyri væl og virðiliga at útinna alt vanligt bókhalds-, roknskapar- og grannskoðanararbeiði. Sostatt kunna øll trygt lata tílík arbeiði upp í hendur á einum eftir hesi lóg skrásettum grannskoðara.

1. viðgerð 21. december. Málið varð beint í lógarnevndina, sum 23. apríl 1980 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 19. december 1979 og undir 1. viðgerð 21. december beint í lógarnevndina.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður vist á, at torvurin á vælútbúnum grannskoðarum er vaksandi.

Í lotuni er støðan at kalla so, at einhvør, óansað útbúgving kann byrja grannskoðaravirksemi.

Henda lóg skal tryggja samfelagnum eitt úrval av grannskoðarum við hollum praktiskum og teoretiskum kunnleika.

Undir nevndarviðgerðini kom m.a. fram, at í lotuni eru fólk, ið hava nomið sær útbúgving í landi okkara og hava rætt til at fáa heitið «registreret revisor» frá danska Handilsministeriinum.

Ein samd lógarnevnd tekur undir við uppskotinum við hesum broytingum:

1) Í § 1, 4. stk. verður 1. punkt orðað soljóðandi:

«Landsstýrið kann víkja frá krøvunum í 2. stk., nr. 1.»

1) I § 1, stk. 4 affattes 1. punktum således:

«Landsstyret kan undtage fra bestemmelsen i stk. 2, nr. 1.»

2) Í § 1, 2. stk., nr. 6 verður í føroyska tekstinum «góðkendum grannskoðara» broytt til «statsgóðkendum grannskoðara.»

3) § 11 verður orðað soljóðandi:

«Landsstýrið setur eina 5-manna grannskoðarakærunevnd. 2 skulu vera lógfrøðingar, harav annar er formaður í hesi nevnd. Av hinum nevndarlimunum skal 1 vera statsgóðkendur grannskoðari, 1 skrásetur grannskoðari og 1 búskapurfrøðingur.»

4) § 15, 2. stk., nr. 1 verður orðað soleiðis:

«1) lúka krovini í § 1. 2. stk., 1-5. samanber stk. 3, og í minsta lagi í 3 ár hava havt sjálvstoðugt grannskoðaravirksemi sum høvuðsyrki, ella».

3) § 11 affattes således:

»Landsstyret nedsætter et revisorankenævn bestående af 5 medlemmer. 2 skal være jurister, heraf den ene er formand for nævnet. Af de andre udvalgsmedlemmer skal 1 være statsautoriseret revisor, 1 registreret revisor og 1 nationaløkonom.»

4) § 15, stk. 2, nr. 1 affattes således:

»1) opfylder betingelserne i § 1, stk. 2, nr. 1 - 5, jvf. stk. 3, og som i mindst 3 år har udøvet selvstændigt revisorerhverv som hovederhverv, eller».

2. viðgerð 28. apríl 1980. Broytingaruppskot til § 1 frá lógarnevndini samtykt við 30—0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 31—0. §§2—10 í landsstýrisins uppskoti samtyktar við 31—0. Broytingaruppskot til § 11 samtykt við 31—0, § 11 soleiðis broytt samtykt við 31—0. §§ 12—14 samtyktar við 31—0. Broytingaruppskot til § 15 samtykt við 31—0, § 15 soleiðis broytt samtykt við 31—0.

3. viðgerð apríl 1980. Lógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 30—0 atkv.

F.L. j.nr. 1100-5. Lóg nr. 65 frá 21. mai 1980.

48. Avloysingarlán til fiskifør

Ár 1979, mikudagin 19. december legði Ivan Johannesen, løgtingsmaður vegna løgtingsmeminar Paula Ellefsen, Ivan Johannesen og Asbjørn Joensen fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um lán til avloysing av fíggjan av fiskiførum.

§ 1. Landsstýrinum verður saman við fíggjarnevnd løgtingsins heimilað landskassans vegna at veita veðhald fyri lání til fiskifør til avloysan av falnum avdráttum uppá lán, sum vórðu veitt til fíggjan av bygging ella keypi av fiskifari.

§ 2. Avloysingarlánini verða umsitin av føroyska bankunum.

§ 3. Veðhald fyri avloysingarlán, sum verða tryggjað við veðhaldi í skipinum, kunnu veitast til fiskifor, um likindi eru til, at raksturin frammyvir eftir øllum fyrifiggjandi upplýsingum fer at bera seg.

§ 4. Landsstýrið ger reglur um treytirnar fyri veiting av veðhaldi eftir hesi lóg. Reglurnar skulu góðkennast av fíggjarnevnd løgtingsins.

§ 5. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna saman við føroyska bankunum at upptaka lán uttan fyri Føroyar fyri at dekka tann likviditetsterv, sum avloysingarlánini føra við sær, tó í mesta lagi upp til 30 milj. kr.

§ 6. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om lån til aflösning af finansiering af fiskerskibe.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til sammen med lagtingets finansudvalg på landskassens vegne at garantere for lån til fiskerskibe til aflösning af forfaldne afdrag for lån, der er ydet til finansiering af byggeri eller köb af fiskerskib.

§ 2. De færöske banker administrerer aflösningslånene.

§ 3. Garanti for aflösningslån, der skal pantesikres i fiskerskibene, kan ydes til fiskerskibe, såfremt der er udsigt til at driften efter alle foreliggende oplysninger bliver rentabel.

§ 4. Landsstyret fastsætter reglerne for ydelse af garanti i henhold til denne lov. Disse regler skal godkendes af lagtingets finansudvalg.

§ 5. Landsstyret får bemyndigelse til på landskassens vegne sammen med de færöske banker at optage lån udenfor Færöerne for at dække det likviditetsbehov, som aflösningslånene medfører, dog höjst 30 mill. kr.

§ 6. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Alt bendir á, at okkara fiskivinna nú er komin í so stórar trupulleikar, at tað er bráðneyðugt at fremja tiltøk, sum forða fyri at vinnan steðgar upp, áðrenn veruligar

politiskar loysnir eru fúnnar og framdar til varandi loysn av bestum trupulleikum.

Onnanfyri standandi uppskot gongur út uppá at gera tað mogulligt at forða fyri, at fatnir avdráttir uppá lán til figging, bygging og keyp av fiskiforum, fora við sær, at skip, sum annars lív var lagað, fara á húsagang.

Hetta lógaruppskot er sett fram í sambandi við uppskot um broyting av løgtingslóg nr. 46 frá 31. mai 1979 um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir. Broytingin av hesi lóg ger tað mogulligt at forða fyri, at torvandi likviditetur til gjaldan av rakstrarútreiðslum forir við sær, at skip, sum annars lív var lagað, fara á húsagang.

1. viðgerð 21. december. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.
Sama dag varð tingsins loyvi givið at frávikja tiðarfreistina at hava 2. viðgerð.
2. viðgerð 21. december. Uppskotið fall við 9—0 atkvoðum.

---

49. Broyting í løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskap og fiskavirkir

Ár 1979, mikudagin 19. december legði Ivan Johannesen, løgtingsmaður, vegna løgtingsmenninar Paula Ellefsen, Ivan Johannesen og Asbjørn Joensen fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.

§ 1. Í § 1 verða «5 milj. kr.» broytt til «35 milj. kr.».

2. stk. Í § 2, pkt. b verða «15%» broytt til «10%».

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

løgtingslov om ændring i løgtingslov om garanti for lån til fiskerskibe og fiskerivirksomheder.

§ 1. I § 1 ændres «5 mill. kr.» til «35 mill. kr.».

Stk. 2. I § 2, pkt. b ændres «15%» til «10%».

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Vist verður til viðmerkingarnar til lógtingsmál nr. 48/1979: Avloysingarkán til fiskifor.

1. viðgerð 21. december. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

Sama dag varð tingsins loyvi givið at frávíkja tíðarfreistini at hava 2. viðgerð av málinum.

2. viðgerð 21. december. Málið fall við 11—0, atkvoðum.

---

50. Fyrispurningur til løgmann

Ár 1979, hósdagin 20. december setti Eli Nolsoe, lógtingsmaður fram soljóðandi

f y r i s p u r n i n g

1. Var seinasti túrurin hjá «Nónhamar» til Grønlands at rokna sum royndarfiskiskapur?

2. Um svarið uppá fyrsta spurningin er játtandi, meinar lógmaður so, at Klaksvíkar kommuna eigur at gjalda umroddu kr. 500.000?

Viðmerkingar:

Samsvarandi avgerðini í landsstýri og fíggjarnevnd at veðhalda fyri útgerðarfáni til trolaran «Nónhamar» og eftir tí, sum hevur staðið í samgongublaðunum, var seinasti túrur hjá hesum skipi til Grønlands at meta sum royndarfiskiskapur.

Sum kunnugt veðheit Klaksvíkar kommuna við 500.000 kr. til útgerð fyri henda sama túrin, fyri at tað kundi lata seg gera at fáa skipið út.

Undir viðgerðini av lógtingsmáli nr. 32/1979: Rakstur av trolaranum «Nónhamar» svaraði lógmaður uppá fyrispurning, at hann metti, at Klaksvíkar kommuna fyribils kom at leggja út fyri omanfyri nevnda veðhald.

Tað, at ein kommuna veðheldur ella lettur gjald fyri royndarfiskiskap, tykir mær at vera nakað heilt nýtt. Tí loyvi eg mær at seta lógmanni henda fyrispurning, longu

nú meðan málið um raksturin frammyvir av trolaranum «Nónhamar» er til viðgerðar her á tingi.

30. apríl 1980 svaraði Atli P. Dam, logmaður fyrispurninginum frá Eli Nolsoe soleiðis:

svar

1. Landsstýrið og fíggjarnevndin játtaðu eigarunum av «Nónhamar» kr. 235.000 til at gera eina royND eftir kongafiski og svartkalva undir Grønlandi.

   Túrurin var sostatt lutvíst ein praktísk fiskiroynd, lutvíst ein vanligur veiðutúrur, eftirsum eigararnir sjálvir ætlaðu sær at gera hendan túrin og í hesum sambandi søktu um stuðul.

2. Klaksvíkar kommuna játtaði til sama endamál - óheft av teirri játtan landsstýrið og fíggjarnevndin hevdu givið kr. 500.000,- í útgerðarláni til hendan túr.

   Kommunan tók sær veð í veiðu og útgerð fyri hetta lán, men tað er ógreitt lógfrøðiliga sað, í hvørm mun kommunan kundi fáa slíkt veð í greiðum og útgerð.

   Er slíkt gjørligt, eigur kommunan at fáa endurgoldið fyri ónýtta útgerð, meu sigur lógfrøðiligur ella annar úrskurður, at slíkt pant kann takast, so eigur kommunan at rinda nevndu 500.000 kr. ÷ peningin, ið innkomin er fyri veiðuna.

   Málið er mær kunnugt ikki endaligt avgjort.

---

51. Veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir

Ár 1980, mikudagin 21. januar legði Atli P. Dam, lognaður fyri Vilhelm Johannesen, landsstýrismann fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir.

§ 1. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárunum 1980/81 og 1981/82 at veðhalda fyri lánum upp til 1 milj. kr. hvørt fíggjarárið til smærri ídnaðarvirkir.

§ 2. Hesi lán verða at nýta til stovnan av nýggjum virkjum, viðkan og nútímansgerð av gomlum o.t.

2. stk. Lánini mugu ikki fara upp um 70% av tí virði, sum nýggju flogurnar hava eftir meting og skulu verða tryggjað við panti innanfyri 70% av tí virði, pantsettu lutirnir hava.

§ 3. Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til mindre industrivirksomheder.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansårene 1980/81 og 1981/82 at garantere for lån indtil 1 mill. kr. hvert finansår til mindre industrivirksomheder.

§ 2. Disse lån skal anvendes til nyetablering af virksomheder, udvidelse og modernisering af ældre o.l.

Stk. 2. Lånene må ikke overstige 70% af nyinvesteringernes værdi i henhold til vurdering og skal sikres ved pant indenfor 70% af de pantsatte genstandes værdi.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg nr. 32 frá 1. juni 1978 um veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir fekk landsstýrið heimild til at veðhalda við 1 milj. kr. til smærri ídnaðarvirkir fyri fíggjarárini 1978/79 og 1979/80. Í viðmerkingunum í løgtingsmáli nr. 35/1977: Veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir varð nevnt: at hóast ídnaðargrunnurin og menningargrunnurin hava virkað í nokur ár, hevur ein ávísur tørvur verið á, at landsstýrið veitir veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir. Landsstýrið metir, at framvegis er ein ávísur tørvur til staðar, og at lógin eigur at verða endurnýggjað fyribils fyri tvey fíggjarár.

Í fíggjarárinum 1978/79 er veðhildið fyri kr. 825.000 og higartil í 1979/80 fyri kr. 440.000.

J. viðgerð 30. januar. Málið varð heint í fíggjarnevndina, sum 10. april legði fram soljóðandi

Alit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 22. januar 1980 og við 1. viðgerð tann 30. januar beint í figgjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at tað fær heimild landskassans vegna í figgjarárunum 1980/81 og 1981/82 at veðhalda fyri lánum upp til 1 milj. kr. hvort figgjarárið til smærri idnaðarvirkir.

Í viðmerkingunum sigur landsstýrið, at hóast idnaðargrunnurin og menningargrunnurin hava virkað í nøkur ár, er enn ein ávísur tørvur fyri, at landsstýrið veitir veðhald fyri lánum til smærri idnaðarvirkir.

Hesum er figgjarnevndin samd í og tekur einmælt undir við uppskoti landsstýrisins, tó so at hæddin verður broytt frá 1 milj. kr. til 1,5 milj. kr. og setur tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

Í § 1 verður «1 milj. kr.» broytt til «1,5 milj. kr.»	I § 1 ændres «1 mill. kr.» til «1,5 mill kr.»

2. viðgerð 15. apríl. Uppskot landsstýrisins við broyting frá samdari figgjarnevnd til § 1 samtykt við 26-0 atkvøðum, § 2 við 27-0 og § 3 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 21. apríl. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1427-2. Lóg nr. 49 frá 12. mai 1980.

52. Søla av sildaverksmiðjuni í Kollafirði (Landsfjósinum) til Kollafjarðar kommunu.

Ár 1979, mánadagin 21. januar legði Atli P. Dam, lognmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

uppskot
til

løgtingslóg um sølu av sildaoljufabrikkini, matr. nr. 229 í Kollafirði.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at selja matr. nr. 229 í Kollafirði við ástandandi bygningum.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om salg af sildeoliefabrikken, matr. nr. 229 i Kollafjarðar.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at sælge matr. nr. 229 i Kollafjorður med påførte bygninger.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Bygdarráðið í Kollafjarðar kommunu hevur sokt um at fáa matr. nr. 229 (gamla sildaoljufabrikkin) á Langasandi í Kollafirði til keyps. Ognin var upprunaliga 3.507 m² stór, men ein partur er tikin sum undirlendi undir verandi landsvegi.

Ætlan kommununnar er at leggja veg gjognum okið í sambandi við havnalagi og at nýta restina av ognini sum havnaoki. Kommunan kann sostatt ognarlaka okið, men vil heldur samráðast við landsstýrið um keyp.

Aftaná at landsverkfroðingurin í 1977 flutti verkstaðin í nýggj holi norðanfyri bygdina í Kollafirði, hava bygningarnir staðið ónýttir og eru ikki roktir. Landsstýrið hevur ongar ætlanir við teinum.

Mælt verður til, at landsstýrið fær heimild at selja ognina og í samráð við Kollafjarðar kommunu at ásetta solupris og aðrar neyðugar ásetingar í samband við avhendanina.

L. viðgerð 30. januar 1980. Málið varð beint í fíggjarnevndina.

F.L.j.nr. 1508-7.

53. Fiskiveiða á landleiðini

Ár 1980, mikudagin 30. januar legði Hilmar Kass, loglingsmaður vegna Sjálvstýrisflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til

loglingslóg um fiskiveiðu á landleiðini.

§ 1. Tað er ikki loyvt at fiska við troli ella gornum á avsettu gýtingarokjunum á Norðhavinum og vestan fyri Sandoynna frá 25. januar til 30. april.

§ 2. Henda lógin kemur í gildi beinan vegin.

loglingslov om fiskeri på fiskeriterritoriet.

§ 1. Det er ikke tilladt at fiske med trawl eller garn på de afmærkede gydepladser på Nordhavet og vest for Sandoy fra 25. januar til 30. april.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Nógv hevur verið frammi síðstu tíðina um stoðuna hjá toska- og hýsustovninum á landgrunninum, og tykjast menn at vera samdir í, at hesir stovnar hava ikki nóg góðar vakstrarmøguleikar - teir verða ov nógv fiskaðir.

Útróðrarmenn siga, at gýtingarfiskurin so snáft fer at samlast á gýtingarokjunum longu á pálsmessu. Tað má tí vera skeivt, at tey bestu gýtingarokini ikki eru friðað fyri trol og gorn fyrr enn frá 15. februar, tí tann fiskurin, sum ikki verður fiskaður, verður ørkymlaður, og rokknast má við, at skip missa gorn, sum verða standandi har alla vártíðina.

Einki kann vera skaðiligari fyri ein fiskastovn enn tað, at gýtingin verður órógvað.

Út frá tí,ið her er fort fram, verður hetta lógaruppskot lagt fyri loglingið.

1. viðgerð 8. februar. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 23. april legði fram soljóðandi

Álit

Málið var lagt fram av Sjálvstýrisflokkinum tann 30. januar 1980 og undir 1. viðgerð tann 8. februar 1980 beint í fiskivinnunevndina.

Eftir uppskotinum skal tað ikki verða loyvt at fiska við troli ella gornum á avsettu gýtingarokjunum á Norðhavinum og vestan fyri Sandoynna frá 25. januar til 30. april.

Í viðmerkingunum verður tilskilað, at einki kann verða skaðiligari fyri ein fiskastovn enn tað, at gýtingin verður órógvað. Uppskotsstillararnir meta, at toska- og hýsustovnarnir verða ov nógv fiskaðir.

Nevndin ávísir, at friðað fyri allari trolveiðu í tíðarskeiðinum 15. februar til 30. april er okið frá 12 — 20 fjórðingar millum rættvísandi norðan úr Norðbergi. Somuleiðis er trolfriðað okið í tíðarskeiðinum 15. februar til 10. april frá 15 — 20 fjórðingar millum rættvísandi norðan úr Norðbergi og rættvísandi 45° úr Bispinum. Soleiðis eru tvey onnur oki trolfriðað bæði í fjor og verða tað somuleiðis í ár. Annað er eystan fyri Fugloynna í tíðarskeiðinum 17. april til 31. mai á okinum 15 — 25 fjórðingar millum rættvísandi eystan úr Bispinum og rættvísandi eystan úr Mjóvanesi — hitt okið er norður úr Mýlingi frá 12 — 17 fjórðingar millum 315° rættvísandi úr Mikineshólmi og rættvísandi norðan úr Eiðiskolli í tíðarskeiðinum 15. oktober til 31. december.

Vísandi til hetta setir ein samd fiskivinnunevnd einki uppskot fram.

2. viðgerð 24. april. Málið fall við 3—0 atkvøðum.

---

54. Ymisk lógaruppskot um stuðul til fiskivinnuna

Ár 1980, leygardagin 23. februar legði Heðin M. Klein, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot I: *Minstalon og annar stuðul til fiskivinnuna.*

Uppskot II: *Studningur til veiðu av idnaðarfiski.*

Uppskot III: *Agnstudningur.*

Uppskot IV: *Brennioljustudningur til fiskiskip.*

1 Uppskot
til

Løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

§ 1. Við tí endamáli at gera Lønjavningargrunn Skipsfiskimanna føran at veita manningini, her at skilja sum eisini skipari ella bátsformaður, á føroyskum fiskifari minstulon og at veita annan stuðul til fiskivinnuna verður á fíggjarløgtingslógunum veittur grunninum árligur studningur.

2. stk. Lønjavningargrunnurin setur í reglugerð tær gjøllaru reglurnar fyri minstulønini og hinum stuðlinum. Reglugerðin verður at senda landsstýrinum til góðkenningar.

Minstaløn og minstivinningur.

§ 2. Treyt fyri, at persóni er tryggjað minstuløn, er, at hann er mynstraður eftir sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og viðkomandi yrkisfelag. Er ongin tilfkur sáttmáli, er treytin fyri minstuløn, at mynstrað er eftir sáttmála millum viðkomandi reiðara ella skipacigara og viðkomandi yrkisfelag. Í undantaksførum hevur landsstýrið heimild at gera frávik frá hesum reglum.

§ 3. Minstalonin er pr. 1. januar 1980 6.495 kr. um mánaðan, hvør veiðuferð verður roknað fyri seg. Minstalonin verður ikki skerd av manningarstudninginum eftir hesi lóg. Minstalonin verður hækkað við 105 kr. um mánaðan fyri hvørji 3 stig, prístalið er omanfyri 100. Fellur prístalið niður um 100, verður eingin prístalsviðgerð. Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvønn ársfjórðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum.

Løgtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.

§ 1. Med det formål, at Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna er i stand til at yde besætningen, i denne lov omfattende også skipper eller bådsformand, på færøsk fiskerfartøj mindsteløn og at yde anden støtte til udøvelse af fiskerierhvervet, bevilges der fonden årlige tilskud på finanslagtingslovene.

Stk. 2. Lønjavningargrunnurin fastsætter i et reglement de nærmere bestemmelser for mindstelønnen og tilskudene. Reglementet forelægges landsstyret til godkendelse.

Mindsteløn og mindsteindtægt.

§ 2. Det er en forudsætning for, at der er sikret en person mindsteløn, at denne er påmønstret i henhold til overenskomst mellem Føroya Reiðarafelag og vedkommende fagforening. Såfremt en sådan overenskomst ikke foreligger, er mindstelønnen betinget af, at der er mønstret efter overenskomst mellem vedkommende reder eller ejer af skibet og vedkommende fagforening. I særlige tilfælde har landsstyret bemyndigelse til at dispensere fra disse bestemmelser.

§ 3. Mindstelønnen er pr. 1. januar 1980 6.495 kr. om måneden, hver fiskefur beregnet for sig. Mindstelønnen reduceres ikke ved mandskabstilskudene i henhold til denne lov. Mindstelønnen forhøjes med 105 kr. om måneden for hver 3 points, prístallet overstiger 100. Falder prístallet under 100, finder ingen prístalsbehandling sted. Dyrtidsreguleringen finder sted hvert kvartal efter prístallet den 1. i kvartalet.

2. stk. Til fiskimenn, ið mynt tríðir eru fyri minni enn fullan part, verður minstalonin veitt sum ein lutfalsligur partur av fullari minstulon.

§ 4. Menningin á foroyskum deksfiskifari undir 100 brutto skrásett tons í útróðri innanfyri 100 fjórðingar úr landi í Foroyum verður, um hon ikki er undir minstulonarskipan, tryggjað ein minstaforvinningur. Minstaforvinningurin er pr. 1. januar 1980 232,50 kr. til hvonn mannin fyri hvonn útróðrardagin. Treyt fyri skipanini er, at fiskifarið hevur avreitt, og at manningin verður avroknað, og at fiskifarið er mannað, í báðum forum sum vanligt er á staðnum.

2. stk. Minstiforvinningurin verður hækkaður við 3,75 kr. fyri hvorji 3 stig, prístalið er omanfyri 100. Fellur prístalið niður um 100, verður eingin prístalsviðgerð. Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvonn ársfjórðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum.

Manningarstudningur.

§ 5. Til manningina á foroyskum fiskifari verða veittir hesir studningar:

a. á trolara í saltfiskaveiðu 50 oyru/kg saltfisk uppskipað vekt.
b. á skipi við línu, gørnum, snøri ella snellu í saltfiskaveiðu 50 oyru/kg saltfisk uppvigað vekt.
c. á frystiskipi í svartkalva og/ella hemaraveiðu 45 oyru/kg uppvigað vekt.
d. á trolara í flakaveiðu 45 oyru/kg av kílaskornum flaki uttan skræðu uppvigað vekt, annars 35 oyru/kg.
e. á deksfiskifari við línu ella snellu í feskfiskaveiðu 32 oyru/kg.

Studningurin lækkar við 1 oyra/kg fyri hvorji full 10 oyru/kg meðalavreiðingarprísurin á feskfiski land-

Stk. 2. Til fisker, der er p mønstret for mindre end en hel anpart, ydes mindstelon som en forholdsmæssig del af fuld mindstelon.

§ 4. Der sikres mandskabet på færøsk dæksfiskerfartøj under 100 brutto reg. tons i hjemmefiskeri indenfor 100 sømil fra land af Færøerne, såfremt mandskabet ikke er under mindstelønsordning, i mindsteindtægt. Mindsteindtægten er pr. 1. januar 1980 232,50 kr. til hver af mandskabet for hver fiskedag. Forudsætning for ordningen er, at fiskerfartøjet har indhandlet, og at mandskabet afregnes, og at fiskerfartøjet er bemandet, i begge tilfælde som det er sædvanligt på stedet.

Stk. 2. Mindsteindtægten forhøjes med 3,75 kr. for hver 3 points, pristallet overstiger 100. Falder pristallet under 100, finder ingen pristalsbehandling sted. Dyrtidsregulering finder sted hvert kvartal efter pristallet den 1. i kvartalet.

Mandskabstilskud.

§ 5. Til mandskabet på færøsk fiskerfartøj ydes disse tilskud:

a. på trawlere i fiskeri efter saltfisk 50 øre/kg opvejet vægt.
b. på skib med line, garn, snore eller snelle i fiskeri efter saltfisk 50 øre/kg opvejet vægt.
c. på fryseskib i fiskeri efter hellefisk og/eller haj 45 øre/kg opvejet vægt.
d. på trawler i filétfiskeri 45 øre/kg af kileskåret filét uden skind opvejet vægt iøvrigt 35 øre/kg.
e. på dæksfiskerfartøj med line, eller snelle i fiskeri efter frisk fisk 32 øre/kg.

Tilskudet reduceres med 1 øre/kg for hver fulde 10 øre/kg middelindhandlingsprisen på frisk fisk landet

aður í Føroyum hækkar í mun til avreiðingarprísin pr. 1. februar 1980.

f. á trolara og á deksfiskifari við garnum á ferskfiskaveiðu 5 oyru/kg.

g. á opnum útróðrarbáti 40 oyru/kg. Studningurin verður lækkaður eftir reglunum undir punkt e. Hevur báturin bensinmotor, verður latið 9 oyru eyka í studningi.

h. á fiskifari undir 12 brutto skrásett tons, ið avreiðir sild ella brisling frá føroyskum firði til agn, frystingar ella saltingar 25 oyru/kg av sildaella brislingaveiðuni. Fyri hvørja ferð avreiðingarprísurin hækkar við 10 oyru/kg í meðal, lækkar studningurin við 1 oyra/kg. Studningurin fyri kg kann tó ikki verða hægri enn avreiðingarprísurin. Er talan um báti við bensinmotori, er studningurin 4 oyru/kg hægri.

2. *stk.* Í teimum undir 1. stk. punkt e og f nevndu førum, har veiðan verður avreidd á plássum, har møguleikar ikki eru at virka veiðuna alla ella part av henni, og tann parturin, sum ikki kann virkast, beinanveg verður fluttur til næsta fiskavirki, verður latið 10 oyru/kg eyka fyri henda partin av veiðuni.

3. *stk.* Í teimum undir 1. stk. punkt a, b, og d nevndu førum, har veiðan verður landað í aðrari havn enn føroyskari, verður bert hálvur studningur latin.

Rakstrarstudningur.

§ 6. Til eigara av føroyskum fiskifari verða veittir hesir studningar:

a. trolari í saltfiskaveiðu 50 oyru/kg saltfisk uppvigað vekt.

på Færøerne stiger i forhold til indhandlingsprisen pr. 1. februar 1980.

f. på trawler og dæksfiskerfartøj med garn på ferskfiskfiskeri 5 øre/kg.

g. på åbne både 40 øre/kg. Tilskudet reduceres efter reglerne under punkt e. Har båden benzinmotor, ydes der 9 øre/kg ekstra i tilskud.

h. på fiskerfartøj under 12 brutto register tons, der indhandler sild eller brisling fra færøsk fjord til agn, frysning eller saltning 25 øre/kg af silde- eller brislingefangsten. Hver gang indhandlingsprisen stiger med 10 øre/kg i middel, reduceres tilskudet med 1 øre/kg. Tilskudet pr. kg er dog ikke højere end indhandlingsprisen. Er fiskeriet udøvet fra båd med benzinmotor, er tilskudet 4 øre/kg højere.

Stk. 2. I de under stk. 1 punkt e og f nævnte tilfælde, hvor fangsten indhandles på steder, hvor der ikke er muligheder at tilvirke hele fangsten eller en del af denne, og den del, der ikke kan tilvirkes, straks transporteres til nærmeste fiskerianlæg, ydes der 10 øre/kg ekstra for denne del af fangsten.

Stk. 3. I de under stk. 1, punkt a, b og d nævnte tilfælde, hvor fangsten landes i anden havn end færøsk, ydes der halvt tilskud.

Driftstilskud.

§ 6. Til ejer af færøskt fiskerfartøj ydes disse tilskud:

a. trawler i fiskeri efter saltfisk 50 øre/kg opvejet vægt.

b. frystiskip í svartkalva- og/ella hemaraveiðu 45 oyru/kg landað vekt.
c. trolari í flakaveiðu 45 oyru/kg av kílaskornum flakt uttan skræðu uppvigað vekt, annars 35 oyru/kg.
d. trolari,
   1) sum hevur storri hovuðsmaskinu enn 1400 hk ella
   2) sum hevur ella kann fáa veiðuloyvi uttan fyri foroyskt landleiðina til saltfiska-, frysti- ella ísfiskaveiðu, á feskfiskaveiði á foroyskum, ítlendskum ella altjóða sjóoki 5 oyru/kg.

e. trolari, sum ikki kemur undir fyrisetingarnar í punkt d. í feskfiskaveiðu á foroyskt landleiðini uttanfyri 12 fjórðingar úr grundlinjunum og trolari í ídnaðarveiðu við feskfiski sum hjáveiðu av hesi veiðu 43 oyru/kg.
f. fiskifari við trolloyvi til feskfiskaveiðu nærri landi enn 12 fjórðingar úr grundlinjunum 23 oyru/kg.

g. fiskifar 110 brutto skrásett tons og yvir í feskfiskaveiðu við línu 43 oyru/kg.
h. garnaskip ella deksfiskifar undir 110 brutto skrásett tons í línu-, snoris- ella snelluveiðu 23 oyru/kg.

i. 100% av frítíðarlonini, sum eigari letur av minstalonini og manningarstudninginum eftir § 5.

3. stk. Í teimum undir punkt a og c nevndu forum, hat veiðan verður landað í aðrari havn enn foroyskari, verður bert hálvur studningur latin.

Felagsreglur v.m.

§ 7. Studningurin eftir § 5, 1. stk. punktini e, f og g og § 6, 1. stk. punktini d, e, f, g og h verður bert latin fyri rundan fisk, kruvdur við høvdi, sum er blóðgaður og væl reinsaður og avreiddur í Føroyum.

b. fryseskib i fiskeri efter hellefisk og/eller haj 45 øre/kg landet vægt.
c. trawlere i filétfiskeri 45 øre/kg af kileskåret filét uden skind opvejet vægt, iøvrigt 35 øre/kg.
d. trawler, der
   1) har større hovedmaskine end 1400 hk eller
   2) har, eller kan få fiskeritilladelse uden for færøsk fiskeriterritorium til fiskeri efter saltfisk, frossen fisk eller frisk fisk, i fiskeri efter frisk fisk på færøsk, fremmed eller internationalt fiskeriområde 5 øre/kg.
e. trawler, der ikke falder under bestemmelserne i punkt d i fiskeri efter frisk fisk på færøsk fiskeriterritorium udenfor 12 sømil fra grundlinjerne og trawlere i industrifiskeri med frisk fisk som bifangst af denne fangst 43 øre/kg.
f. fiskerfartøj med trawltilladelse til fiskeri efter frisk fisk nærmere land end 12 sømil fra grundlinjerne 23 øre/kg.
g. fiskerfartøj, 110 brutto register tons og større i fiskeri efter frisk fisk med line 43 øre/kg.
h. garnfiskerifartøj eller deksfiskerfartøj under 110 brutto registreret tons i line-, snore- eller snellefiskeri 23 øre/kg.
i. 100% af feriekronen, som ejer betaler af mindstelønnen og mandskabstilskudet efter § 5.

Stk. 3. I de under punkt a og c nævnte tilfælde, hvor fangsten landes i en anden havn end færøsk ydes der halvt tilskud.

Fællesbestemmelser m.v.

§ 7. Tilskudene i henhold til § 5, stk. 1 punkterne e, f og g og § 6, stk. 1, punkterne d, e, f, g og h ydes kun for rund fisk med hoved uden indvolde, der er strubeskåren og godt renset og indhandlet på Færøerne.

§ 8. Hóast skipari ella annar av manningini eftir sáttmála fær meira enn manspart, verður studningurin til hann bert roknaður av einum manspartí. Skipari fær bert lutfalsliga í studningi so mikið, at vinningur hansara ikki kemur upp um 10.000 kr. við einum mánaða sum grunderlag. Annars luttaka allir av manningini við sama parti í studningsveitingini eftir § 5. Er mynstrað fyri minni enn heilan part, fær viðkomandi lut í mun til partin. Í sjálvdráttarveiðu verður býtið at laga seg eftir teimum býtisreglum, sum nýttar eru í hesum veiðuhátti.

§ 8. Uanset skipperen eller andre af mandskabet efter overenskomst får mere end en mandskabsandel, bliver tilskuddet til vedkommende kun at beregne af en mandskabsandel. Skipperen får kun forholdsmæssigt så meget i tilskud, at hans fortjeneste ikke overstiger 10.000 kr. med en måned som grundlag. Iøvrigt deltager hele mandskabet med samme andel i tilskudsydelserne efter § 5. Er der monstret for mindre end en hel andel, får vedkommende tilskud i forhold til andelen. Ved enkeltmandsfiskeri retter fordelingen sig efter de fordelingsregler, som anvendes under denne fangstform.

§ 9. Henda lóg fær gildi frá 15. februar 1980, samtíðis fer úr gildi løgtingslóg nr. 69 frá 26. september 1974 um mínstulon og annan stuðul til fiskivinnuna, sum lógin er broytt við løgtingslógunum nr. 28 frá 21. mai 1975, nr. 37 frá 21. mai 1975, nr. 41 frá 6. mai 1976, nr. 14 frá 3. mars 1977, nr. 27 frá 14. april 1977, nr. 20 frá 12. mai 1978, nr. 25 frá 1. juni 1978, nr. 26 frá 1. juni 1978 og nr. 35 frá 1. juni 1979.

§ 9. Denne lov har gyldighed fra 15. februar 1980, samtidig træder ud af kraft lagtingslov nr. 69 af 26. september 1974 om mindstelon og anden støtte til fiskerierhvervet, således som loven er ændret ved lagtingslovene nr. 28 af 21. maj 1975, nr. 37 af 21. maj 1975, nr. 41 af 6. maj 1976, nr. 14 af 3. marts 1977, nr. 27 af 14. april 1977, nr. 20 af 12. maj 1978, nr. 25 af 1. juni 1978, nr. 26 af 1. juni 1978 og nr. 35 af 1. juni 1979.

II

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um studning til veiðu av ídnaðarfiski.

§ 1. § 2, 1. stk. í løgtingslóg nr. 14 frá 5. mai 1975, sum broytt við løgtingslóg nr. 39 frá 6. mai 1976 um studning til veiðu av ídnaðarfiski verður orðað soleiðis:

1. «Tá ið fiskur verður landaður í Føroyum til ídnað til 30 oyru/kg í avreiðingarprísi, verður latið í prísstudningi 12 oyru/kg. Studningurin lækkar við ½ oyra/kg, fyri hvørt oyra avreið-

lagtingslov om ændring i lagtingslov om tilskud til fangst af industrifisk.

§ 1. § 2, stk. 1 i lagtingslov nr. 14 af 5. maj 1975, som ændret ved lagtingslov nr. 39 af 6. maj 1976 om tilskud til fangst af industrifisk formuderes således:

1. «Ved landing på Færøerne af fisk til industri til en indhandlingspris på 30 øre/kg ydes i tilskud 12 øre/kg. Tilskuddet nedsættes med ½ øre/kg for hver øre indhandlingsprisen overstiger

ingarprísurin er omanfyri 32 oyru/kg ella niðanfyri 28 oyru/kg.

2. *stk.* Tá ið fiskur verður landaður í Føroyum til idnað, verður latið í rakstrarstudningi til skipið 5 oyru/kg. Verður svartkjaftur landaður í Føroyum, og hesin ikki er partur í aðrari idnaðarveiðu, er rakstrarstudningurin 2½ oyra/kg. Rakstrarstudningurin lækkar við 1 oyra/kg fyri hvort oyra, avreiðingarprísurin er omanfyri 51 oyru/kg ella niðanfyri 28 oyru/kg.»

2. Núgaldandi 2. stk. verður 3. stk.

§ 2. § 5 í løgtingslóg nr. 72 frá 24. august 1979 um tíðarávmarkaðan eykastudning til fiskivinnuna verður framlongd at galda til 15. februar 1980.

§ 3. Henda lóg er galdandi frá 15. februar 1980.

32 øre/kg eller er under 28 øre/kg.

Stk. 2. Ved landing på Færøerne af fisk til industri ydes i driftstilskud til skibet 5 øre/kg. Ved landing på Færøerne af blåhvilling, og denne fangst ikke er en del af anden fangst til industri er driftstilskudet 2½ øre/kg. Driftstilskudet nedsættes med 1 øre/kg for hver øre, indhandlingsprisen er højere end 51 øre/kg eller er under 28 øre/kg.»

2. Nugældende stk. 2 bliver stk. 3.

§ 2. § 5 i lagtingslov nr. 72 af 24. august 1979 om tidsbegrænset ekstratilskud til fiskerierhvervet har fortsat gyldighed til 15. februar 1980.

§ 3. Denne lov er gældende fra 15. februar 1980.

IV

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um agnstudning.

§ 1. § 1 í løgtingslóg nr. 37 frá 1. juni 1979 um agnstudning verður orðað soleiðis:

«Í agnstudningi verður latið 1.50 kr./kg.»

§ 2. Henda lóg er galdandi frá 1. februar 1980.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om agntilskud.

§ 1. § 1 i lagtingslov nr. 37 af 1. juni 1979 om agntilskud formuleres således:

«I agntilskud ydes 1,50 kr./kg.»

§ 2. Denne lov er gældende fra 1. februar 1980.

Uppskot
til

løgtingslóg um brennioljustudning til fiskiskip.

§ 1. At lækka um prísin á brenniolju til føroysk deksfiskifor í fiskiveiðu verða úr landskassanum latin 44 oyru/litur í studningi.

brændselsolietilskud til fiskerskibe.

§ 1. Til nedbringelse af prisen af brændselsolie til færøske fiskerskibe i fiskeri ydes af landskassen 44 øre/liter i tilskud.

2. *stk.* Fær skip brenniolju fyri lægri pris enn 130,0 øyru/litur, lækkar studningurin við 1 øyra fyri hvort øyra, prísurin á brenniolju er niðanfyri 130,0 øyru/litur.

§ 2. Studningsskipanin verður fyrisitin av Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna. Fyri olju keypta í Føroyum verður studningurin avroknaður beinleiðis til oljufelagini.

§ 3. Henda lóg er galdandi frá 1. februar 1980.

Stk. 2. Safremt et skib får brændselsolie til en lavere pris end 130,0 øre/liter, formindskes tilskudet med 1 øre for hver øre, prisen for brændselsolie er under 130,0 øre/liter.

§ 2. Tilskudsordningen administreres af Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna. For olie, der er indkøbt på Færøerne, afregnes brændselstilskudet direkte til olieselskaberne.

§ 3. Denne lov er gældende fra 1. februar 1980.

Viðmerkingar:

Landsstýrið legði í fjor beyst fleirtættað stuðulsuppskot fyri løgtingið. Uppskotini umfataðu nýggjar reglur fyri brennioljustudning, eykajáttan til Ráfiskagrunnin, ávísan rakstrarstudning til deksfiskifor og nýggjar reglur fyri agnstudningi og studningi til ídnaðarveiðu. Uppskotini vóru samtykt og lýst sum lóg, ið hevði gildi frá 15. august 1979 til 31. januar 1980.

Í framloguskrivinum til uppskotini varð lagd áherðsla á, at tað var av alstórum týdningi, at bæði teir politisku myndugleikarnir og vinnan sjálv gjørdu neyðugar kanningar viðvíkjandi veiðu- og rakstrarmøguleikum fyri veiðuflotan yvirhovur við tí fyri eyga at fáa fiskiskiparaksturin í eina betri legu, og soleiðis, at tað verður best møguligt samsvar millum uppbygging veiðuflotans og teir veiðumøguleikar, sum eru til steðar.

Beint eftir at táverandi stuðulsuppskot vórðu samtykt, valdi landsstýrið limir í Fiskivinnuráð, ið hevði til uppgávu at vera landsstýrinum leiðbeinandi í fiskivinnumálum yvirhovur. Fiskivinnuráðið er í fleiri skrivum, sum løgtingsmenn hava lingið útflýggjað, komið við sínum uppskotum og tilmælum.

Landsstýrið hevur í síni viðgerð í stórum arbeitt út frá tí beinagrind, ið Fiskivinnuráðið hevur sett upp. Landsstýrið liggur tó í sínum tilmælum, sum nú verða lagd fyri løgtingið sum lógaruppskot, á einum lægri útreiðslustoði. Orsokirnar til tað eru fleiri.

Ráðið hevur í sínum stuðulsuppskoti til feskfiskaflotan havt sum fyritreyt, at øll meðalskip við mettum inntokum skulu kunna svara tær mettu útreiðslurnar fyri 1980. Landsstýrið sær seg ikki fort fyri at fáa til vega tær almennu peningaupphæddir, sum tað í tí føri hevði verið talan um til alla vinnuna samanlagt, og metir heldur ikki, at tað út frá einum langtíðarsjónarmiði hevði verið heppið fyri vinnuna sjálva og als ikki fyri samfelagið. Í teirri broytingar- og umstillingartíð, ið sumtíðis er lágkonjunkturtíð fyri fiskivinnuna, er tað av allarstorsta týdningi, at vinnan sjálv til tað ítarsta roynir at tillaga seg til tær nýggju umstoðurnar, bæði viðvíkjandi rakstrar- og veiðufyritreytum. Varð stuðulslegan lagd hægri enn í uppskoti landsstýrisins, er ikki

óhugsandi, at starvast varð minni á hesum okjum. Varð stuðulslegan lagd lægri, hevði úrtokan við studningi iroknaðum fallið ógvuliga ymískt fyri ymisk fiskifor, tey sum bíligari ella dýrari vóru í flogu ella rakstri, veiddu nitui ella meira ella á annan hátt vóru meira ella minni rationell.

Tað er landsstýrinum kunnugt, at sumni skip hóast stuðul ikki verða at svara hvorjum sítt. Verður nógv at resta I, er tað landsstýrisins fatan, at tað í summum forum kann verða skilabest, ja, kanska neyðugt at lata skip úr vinnuni. Í letta má tó í hvorjum fori metast um út frá rakstrar-, bygdamenningar- og stovnsvarðveitandi sjónarmiði.

Landsstýrið metir seg við sínum lógaruppskotum hava gjort tað, sum gerast kann, fyri at halda veiðuflota okkara í vinnu. Við teimum almennu útreiðslunum til fiskivinnuna uppá samanlagt umleið 192 mió. kr. í komandi fíggjarári, er bogin so hart spentur, at tað ikki kann verða talan um storri hækkingar frá almennari síðu. Við batum í rakstrarmoguleikum skipanna verða stuðulsupphæddirnar hin vegin at lækka.

Sjálvsagt er, at uppbæddin til Ráfiskagrunnin komandi fíggjarár verður munandi hækkað. Harafturat fer landsstýrið at geva nevndini fyri Ráfiskagrunnin loyvi til at nýta tær 8 mió. kr., ið eru eftir av teirri upphædd, sum í verandi fíggjarári varð avsett til tiltaksgrunnin. Hetta saman við reellum hækkingum í marknaðarprísum fyri fleiri fiskaslog og harvið minni prísmuni millum avrokningar- og avreiðingarpris, verður at skapa moguleikar fyri hækkingum í avreiðingarprís í til feskfisk. Landsstýrið fer at geva nevndini fyri Ráfiskagrunnin loyvi til at hækka avreiðingarprísirnar beinan vegin.

Landsstýrið er sinnað at endurskoða flokkingina og prisingina á feskum fiski, herundir gjognum Ráfiskagrunnin at áseta serligan avreiðingarpris fyri heilt feskan fisk, treytað av hagreiðing og góðsku. Landsstýrið fer tí beinan vegin at seta niður skjóttvirkandi nevnd við limum úr nevndini fyri Ráfiskagrunnin, Fiskivinnuráðnum, Vrakarastovninum, Heilsufroðiligu Starvsstovuni og Fiskasoluni at kanna hesi viðurskifti, og innan stutt tíðarbil at koma við tilmælum til landsstýrið.

Til teir einstoku tattirnar í lógaruppskotum landsstýrisins er at viðmerkja:

1. Eftir galdandi lógglvu verður latið í manningarstudningi til saltfiskamanningar á trolveiðu upprunaliga 18 oyru og bráðfengis 11 oyru, samanlagt 29 oyru/kg til saltfisk nr. 1 omanfyri 12". Landsstýrið skjýtur upp at hækka manningarstudningin til allan trolveiddan saltfisk upp til 50 oyru/kg fyri alla veiðuna. Harumframt verður mælt til at lata í rakstrarstudningi til skipið 50 oyru/kg. Hetta verður m.a. gjort fyri í mestan mun at fáa útnyttað kvoturnar í fremmandum sjóoki. Verður landað í útlendskari havn, verður hálvur studningur latin.

2. Eftir galdandi lóggávu verður latið í manningarstudningi til saltfiskamanningar á garnaveiðu og línuveiðu 52 oyru/kg og á snelluveiðu 55 oyru/kg við bráð-

fengisstudningi íroknaðum til saltfisk nr. 1 omanfyri 12". Landsstýrið mælir til at manningarstudningur upp á 50 oyru/kg verður toknaður av allari veiðuni.

3. Sum nú er, verður latið í manningarstudningi til manningar á flakatrolarum fyri kílaskorið flak uttan skræðu og við skræðu ávikavist 40 oyru og 31 oyru/kg við bráðfengisstudningi íroknaðum. Landsstýrið skjýtur upp, at hesin manningarstudningur verður broyttur til ávikavist 45 oyru og 35 oyru/kg.

4. Eftir galdandi lóggávu er manningarstudningurin á svartkalva- og hemaraveiðu 31 oyru/kg við bráðfengisstuðuli íroknaðum. Landsstýrið mælir til, at upphæddin verður hækkað upp í 45 oyru/kg. Harumframt mælir landsstýrið til at veita eins stóra upphædd í rakstrarstudningi. Grundgevingin er m.a. tann, at úrtokan á hesum veiðuhættum hevur ikki verið góð, hvørki hjá manning ella skipi, og at vit av hesum báðum fiskasloguni hava stóra óútnyttaða kvotu.

5. Manningarstudningurin á feskfiskaveiðu verður broyttur, soleiðis, at hann til manningar á línu- og snelluveiðu verður 32 oyru/kg. Studningurin lækkar við eintum oyra fyri hvørji full 10 oyru, avreiðingarprísurin hækkar í mun til prísin 1. februar 1980. Til manningarnar á feskfiskaveiðu fyri aðrar veiðuhættir verður studningurin 5 oyru/kg, og lækkar hann á sama hátt. Orsokin til broytingina er at finna í tí ójovnu manningarinntokuni fyri ymiskar veiðuhættir og er ætlað at minka um henda ójavna.

6. Um manningarstudning á ophum útróðrarbátum er at siga, at hann er tillagaður teimum studningsbroytingum annars, ið ætlanin er at fremja. Fyri fiskifor, sum avreiða fjarðasild frá føroyskum firði, eru tvær broytingar gjordar í studningsveitingini. Onnur er tann, at studningurin verður at umfata brisling, og hin, at tonsatalið á bátunum til tess at fáa studning verður hækkað úr 10 upp í 12 brutto skrásett tons, so studulsveitingin eisini verður m.a. at umfata teir sonevndu Nordafar-bátarnar.

7. Ávisur rakstrarstudningur til skip á feskfiskaveiðu verður í hovuðsheitum veittur í mun til rakstrarúrslit skipanna. Fyri trolarar, ið annaðhvort hava stórri hovuðsmaskinu enn 1400 HK ella kunnu fáa veiðuloyvi uttan fyri landleiðina til saltfiska-, frysti- og ísfiskaveiðu, er rakstrarstudningurin 5 oyru/kg. Hetta er umframt ta rakstrarligu grundgevingina gjort við teirri ásannan, at skipini hava eini serrætfindi og við teirri tilætlan, at kvotur okkara á øðrum leiðum verða í størstan mun nýttar. Orsokin til at ídnaðartrolarum verður veitt 43 oyru/kg í rakstrarstudningi, tá avreitt verður í Føroyum, av tí parti, sum er matfiskur í blandaðari last, er tann, at stórri ella minni partur av veiðuni hjá hesum skipum vanliga er feskfiskur (botnfiskur), og við teirri tilætlan, at mest møguligt av veiðu teirra verður avreitt í Føroyum. Rakstrarstudningur til línufor 110 brutto skrásett tons

og yvir á feskfiskaveiðu og til aðrar feskfiskatrolarar enn teir, ið áður eru nevndir, verður 43 oyru/kg. Tó verður hesin studningur til fiskifor, sum moguliga fáa veiðuloyvi innan fyri 12 fjórðingar úr grundlinjunum ávísa tið av árinum 23 oyru /kg grundað á, at hesi fáa eini serrættindi, sum onnur ikki hava. Rakstrarstudningur til garnaskip og deksfiskifor undir 110 brutto skráset tons á línu-, snoris- og snelluveiðu verður 23 oyru/kg.

8. Landsstýrið skjýtur upp, at tann sonevndi flutningsstudningur, sum í loluni er 7 oyru/kg, verður hækkaður upp í 10 oyru/kg.

9. Viðvíkjandi manningarstudningi verður tann broyting gjørd generelt, at studningurin til skipara ella annan av manningini verður altíð roknaður av einum mansparti.

10. Uppskot landsstýrisins um brennioljustudning hevur sama innihald og tað, sum fór úr gildi 31. januar 1980. Agnstudningur verður veittur við 1.50 kr./kg og verður eftir uppskotinum ikki tíðaravmarkaður. Moguleikarnir fyri prísáseting á agni verða nú kannaðir og miðað verður ímóti at leggja fyri lógtingið lógaruppskot hesum viðvíkjandi.

11. Studningurin til veiðu av ídnaðarfiski verður broyttur. Eftir tí tíðaravmarkaðu fyriskipan, sum fór úr gildi 31. januar 1980, varð botnmarkið fyri studningi sett til 33 oyru/kg í avreiðingarprísi. Studningurin tá var 12 oyru/kg lækkandi við ¾ oyra fyri hvort oyra, avreiðingarprísurin var omanfyri 35 oyru/kg. Nú verður broyting gjørd viðvíkjandi botnmarki og verður onnur avtrappingarskipan í tinu til avreiðingarprísin skotin upp báðar vegir. Harumframm verða veitt í rakstrarstudningi til ídnaðarveiðu 5 oyru/kg, tó verða 2½ oyra latin, tá svartkjaftur verður landaður og hesin ikki er partur í aðrari blandaðari ídnaðarveiðu. Rakstrarstudningurin lækkar við 1 oyra fyri hvort oyra, avreiðingarprísurin er omanfyri 51 oyru ella niðanfyri 28 oyru/kg. Hesin studningur verður bert veittur, tá ið landað verður í Foroyum.

At enda verður skotið upp, at tann skipan fyri studning til ídnaðarveiðu, sum fór úr gildi 1. februar verður framlongd til 15. februar. Somuleiðis verður skotið upp, at agnstudningurin og brennioljustudningurin óbroyttur fær gildi frá 1. februar 1980.

1. viðgerð 26. februar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 4. mars legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið varð framlagt av landsstýrinum 23. februar 1980 og varð við 1. viðgerð 26. februar beint í fíggjarnevndina.

Í tingmálinum eru 4 lógaruppskot:

1. Løgtingslóg um minstulon og annan studul til fiskivinnuna.

   Henda lóg skal avloysa løgtingslóg nr. 69 frá 26. september 1974 við seinni broytingum um minstulon og annan studul til fiskivinnuna.

   Eftir uppskotinum verður manningarstudningurin í flestu forum hækkaður við undantak av studningum til manningar á trolarum og garnaskipum til feskfiskaveiðu, og er hetta lið í einari útjevning av manningarinntokunum fyri ymsar veiðuhættir.

   Rakstrarstudningurin verður munandi hækkaður, tó soleiðis, at fyri trolarar við motori yvir 1400 hk og fyri trolarar, ið kunna fáa veiðiloyvi uttanfyri landleiðina, t.d. íslandsloyvir, er studningurin 6 oyru. Mett verður, at skip við nevndu loyvum hava minni torv fyri studningi enn omnur skip. Talan verður um 6 trolarar, ið hava havt íslandsloyvi og 4 saltfiskatrolarar, ið koma undir tann lægra studningin uppá 6 oyru.

   Í § 5, 2. stk., um flutningsstudning sær tað út til at vera komin ein skrivifeilur í, soleiðis at tað í staðin fyri «1. stk. pkt. c og f» eigur at standa «1. stk. pkt. c og g». Eisini hevur nevndin fingið at vita, at rakstrarstuðulin í § 6, *d*, ikki skal vera 5 oyru men 6 oyru.

2. *Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um studning til veiðu av iðnaðarfiski.*

   Eftir uppskotinum verður prísstudningurin 12 oyru eins og nú, men er avtalupplýsingin broytt soleiðis, at studningurin minkar, bæði um prísurin fer upp ella niður um ávikavist 32 oyru og 28 oyru. Bunnprísurin í hígartil galdandi lóg var 33 oyru. Umframt prísstudning verður nú eisini eftir uppskotinum veittur ein rakstrarstudningur uppá 5 oyru pr. kg, tó bert 2½ oyra fyri skip, ið eru á svartkjaftaveiðu burturav.

3. *Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um agnstudning.*

   Agnstudningurin verður eftir uppskotinum óbroyttur 1,50 kr. pr. kg, men er ikki longur tíðaravmarkaður.

4. *Løgtingslóg um brennioljustudning til fiskiskip.*

Lógin avloysir lóg, sum fór úr gildi 1. februar 1980, og er studningurin pr. litur tann sami sum frammanundan, nevniliga 44 øyru.

Umboð fyri Føroya Fiskimannafelag, Felagið Trolskip, Felagið Landfeiðin og Meginfelag Útróðrarmanna hava verið á fundi hjá nevndini og framlagt sini sjónarmið bæði munnliga og skrivliga. Við álitinum fylgja skriv frá ymsum felogum.

Nevndin hevur eisini tosað við stjóran í Lonjavningargrunni Fiskimanna, og metir hann útreiðslurnar til fiskivinnuna í komandi fíggjarári eftir fyriliggjandi lógaruppskotum, um veiðan verður tann sama sum seinasta ár (80.380 tons í feskfiski) til fylgjandi:

Agnstudningur	6,000	tús. kr.
Oljustudningur	35,200	— —
Skeljastudningur	0,300	— —
Flutningsstudningur	0,150	— —
Minstaløn	5,000	— —
Minstiforvinningur	0,300	— —
Hemara- og svartkalvaveiða	0,090	— —
Flakastudningur	0,200	— —
Saltfiskastudningur til manningina	2,700	— —
Saltfiskastudningur til skipið	1,100	— —
Idnaðarstudningur	10,100	— —
Feskfiskastudningur		
a) Rakstrarstudningur	22,700	— —
b) Manningarstudningur	15,100	— —
Til ráfiskagrunnin	80,000	— —
Frítíðarløn	2,200	— —
	181,144	tús. kr.

Eftir uppskotinum frá landsstýrinum verða útreiðslurnar til fiskivinnuna í komandi fíggjarári mettar til 192,000 tús. kr. Munurin er her sostatt umleið 11 mió. kr., um feskfiskaveiðan verður mett til tað sama sum seinasta ár. Um roknað verður við eini feskfiskaveiðu uppá 85.000 tons, og havt verður í huga, at skipanin skal galda frá 15. februar, t.v.s. í 13½ mánaða, verða útreiðslurnar fram til 1. april 1981 5 mió. kr. meira, ella at tað eftir fyriliggjandi metingum kann koma at vera eitt avlop uppá 5 mió. kr. Um so skuldi verið, at eitt avlop vísir seg at koma, tá komandi fíggjarár gongur út, mælir nevndin til, at hetta verður flutt til tiltaksgrunnin hjá ráfiskagrunninum. Hetta eigur at verða gjørt við einari viðmerking til § 16, konto 2490/3301 á komandi fíggjarløgtingslóg.

Ein meiriluti í nevndini (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Jørgen Thomsen og Jógvan Durhuus) mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum við hesum

broytingum

1) Í § 5, 2. stk. verða í staðin fyri orðini «1. stk. punkt e og f» sett: «1. stk. punkt e og g».

2) Í § 6, d, 2) verður «5 oyru kg» broytt til «6 oyru/kg».

1) I § 5, stk. 2, ændres ordene «stk. 1, punkt e og f» til «stk. 1, punkt e og g».

2) I § 6, d, 2) ændres «5 øre» til «6 øre/kg».

Ein minniluti (Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen) kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins I um minstulon og annan studul til fiskivinnuna og vísir til uppskot sambandsins í tingmáli nr. 59/1979. Uppskot landsstýrisins II um studning til veiðu av ídnaðarfiski og uppskot IV um oljustudning tekur minnilutin undir við. Uppskot landsstýrisins III um agnstudning mælir sami minniluti til at samtykkja við fylgjandi

broyting

Í § 1 verður «1,50 kr./kg.» broytt til: «2,00 kr./kg».

I § 1 ændres «1,50 kr./kg» til «2,00 kr./kg.»

Ein annar minniluti (Asbjørn Joensen) førir fram, at undir viðgerð fíggjarnevndarinnan av uppskoti landsstýrisins løgtingsmál nr. 54/1979 um studul til fiskivinnuna framgekk av teimum skjølum, ið framlogd vórðu av teimum ymisku felogum, ið umboða vinnuna, at tann av landsstýrinum roknaða nøgd av fiski, avreiddur í Føroyum, vildi vera um 116.000 tons sambært ta ætlaðu studningsupphæddina.

Fört varð eisini fram, at meira rímiligt var at rokna við eini fiskanøgd svarandi til 85.000 tons, ið er ein vokstur uppá 5.000 tons í mun til seinasta ár.

Um so var, vildi stór peningaupphædd vera óneyðuga kravd av skattaborgaranum.

Ein kanning av hesum viðurskiftum vísti, at munurin millum neyðugu upphæddina og ta veruligu einans gjordist um 7 — 8 milj. kr., har roknað var við 85.000 tonsum.

Henda peningaupphædd, ið solciðis eingin vissa er fyri, skal verða til avlops, ætlast løgd í tiltaksgrunn, t.v.s. í likviditet landskassans.

Viðvíkjandi teim einkultu studulsupphæddunum, sum bólkaðar eru upp í 5 partar, so er sjálvstýrisflokkurin av teirri áskoðan, at hetta nokk er ein bati, men at hetta á ongan hátt, kemur at virka vinnuna burtur úr verandi kreppu, men bert skumpa trupulleikarnar eitt vet longur framá, so sum gjort hevur verið seinastu árini. Solciðis verður tann stóra upphædd, ið avsett verður á landsins fíggjarlóg til fiskivinnuna, um

ikki í komandi fíggjarári, so við hesi gongd skjótt at rokka og gerast storri enn sum avreiðingarvirði, ið tá gerst stuðulsískoyti til fiskaprísin.

Soleiðis hava tolini á fíggjarlógini, § 16, um stuðul til fiskivinnuna seinastu árini verið á leið hesi:

	Játtan	*Nýt*
Fyri árið 1978/79	50 milj. kr.	80 milj. kr.
Fyri árið 1979/80	80 milj. kr.	120 milj. kr.
Fyri árið 1980/81	192 milj. kr.	?

Flokkurin er av teirri áskoðan, at her eigur annað lag at fáast á, so sum framfort tá ráfiskagrunnurin varð skipaður, eigur stuðulin at liggja í soluliðinum eins væl og neyðugt sparsemi eigur at vera fram á ti almenna okinum, soleiðis at ilogan har verður gjord í mun til tað, fiskivinnan og onnur vinna kann kasta av sær.

Fyri at svara hesar bráðneyðugu skyldur til vinnuna, verður av samgonguni enn einaferð mælt til broyting av inntokulógum, við broyting av skattalógini eins og við eykaskatti og meir-tolli.

Flokkurin tekur undir við, at tiltok verða sett í verk fyri at bota um fíggjarstoðu landsins, men tikið verður ikki undir við broyting í toll- og eykaimflutningsgjoldum, so sum skotið er upp, tá hesi gjold í stóran mun eru til bága fyri lágintokuna eins væl og teirri vinnu, ið hevur ilogana fyri neyðini.

Sigast má, at við gjordum og ætlaðum ilogum í skipabygging og skipakeyp, tað veri seg við stuðul og rakstri av ti almenna, er torfort at finna álvara í teimum uppskotum, landsstýrið hevur sett fram til loysn av verandi kreppu.

Ein parturin av teimum lógaruppskotum, har landsstýrið mælir til broyting, eru lógirnar um prístal og prístalsviðgerð av lonum.

Sum fíggjarstoða landsins er, mælir sjálvstýrisflokkurin til at seta prís- og lonarsteðg, men flokkurin er ímóti, at tiltok verða gjord, ið minka um úrtoknoguleikan hjá teim prístalslonu í samfelagnum uttan at hetta samsvarandis forir við sær prissteðg.

Vist verður annars til uppskot floksins um at geva lonarhækking fyri hvort stigið, prístalið fer upp.

Tað er eyðsæð, at storur partur av inntokunum verður lítið skattaður. Her mæla vit til, at nógv neyvari samsvar verður ímillum skatt og tann pening, fólk hevur til egna nýtslu.

Ein broyting á hesum viðurskiftum samskipað við eitt ávist sparsemi hevði betri virkað okkum burturúr verandi trupulleikum enn sum fyriliggjandi uppskot landsstýrisins.

Í ásannan av at inntokur landsins eru lækkaðar munandi tvey síðstu árini, er ikki gjorligt at taka tann útreiðslurvokstur á fíggjarlógina sum skotið upp av landsstýrinum, men neyðugt verður við skynsemi at minka ymsar játtanir, so neyðugi peningurin til fiskivinnuna kann fáast til vega uttan at leggja enn storri skattir og gjold á landsins borgarar.

FØROYA FISKIMANNAFELAG
TlF. I 1569

3800 Tórshavn, 25. februar 1980.

Føroya Løgting

her

Í sambandi við løgtingsmál *nr. 54/1979: Ymisk lógaruppskot um stuðul til fiskivinnuna* senda vit hjálagt løgtinginum yvirlit yvir inntoku- og veiðuviðurskifti hjá ísfiskaskipum í 1979 og annars yvirlit yvir inntokurnar hjá fiskimonnum á øðrum veiðiháttum í 1979. Um vit gera ein samandrátt av inntokutolunum hjá fiskimonnum vísir talvan niðanfyri gongdina í inntoku pr. dag bæði í krónum og samanborið við lønargongdina annars í samfelagnum.

	Ár	Dagbýta	Broyting	Lægsta dagsfon 1/7	Lutfall	Broyting
Stórri ísfiskatrolarar	1979	543		311	175%	
	1978	504	+ 8%	276	183	- 4%
Smærri ísfiskatrolarar	1979	434		311	140	
	1978	522	17%	276	189	26%
Ísfiskalinuskip	1979	327		311	105	
	1978	360	- 9%	276	130	- 19%
Ísfiskagarnaskip	1979	372		311	120	
	1978	439	15%	276	159	25%
Nótaskip	1979	454		311	146	
	1978	500	9%	276	181	19%
Rækjuskip	1979	680		311	222	
	1978	537	+ 28%	276	195	+ 14%
Innanfiskatrolarar	1979	438		311	222	
	1978	402	+ 9%	276	146	3%

Hekkutrolarar á saltf.-, flaka- og isfiskaveiði	1979	360		311	116	
	1978	362	- 1%	276	131	11%
Saltfiskulínuskip	1979	462		311	149	
	1978	459	+ 1%	276	166	—10%
Hennara- og svartkalvafrystiskip	1979	305		311	98	
	1978	222	+37%	276	80	23%
Snellnskip á saltfiskaveiði	1979	312		311	100	
	1978	319	- 2%	276	116	14%

Annars kann nevnast, at minstadaglønin pr. 1. januar 1980 var 7% hægri enn hon var pr. 1. juli 1979. Sum tað sæst av tolunum omanfyri er yvirhovur minking í inntøkum fiskimanna. Henda minking er lutvíst beinleiðis í krónum á flestu veiðihættum, sum eisini umfata nógv stórsta talið av fiskimonnum. Men tá sammett verður við lønarlagið annars er talan um minking í inntøkum fiskimanna á øllum veiðihættum uttan á rækjuveiði og á hennara- og svartkalvaveiði, og hendan seinna veiðan hevur framvegis eina dagløn, sum er undir minstudagløn á landi.

Til omannevndu uppskot, sum løgtingið nú skal hava til 1. viðgerð, hevur Føroya Fiskimannafelag fylgjandi viðmerkingar:

VIÐVÍKJANDI FESKFISKAVEIÐUNI

Vit sendu í november landsstýrinum bræv saman við hinum felagunum í landinum sum hava áhuga í feskfiskaveiðuni, har vit mettu, at neyðugt varð við eini hækking í ráfiskaprísunum pr. 1. oktober 1979, sum svaraði til kr. 1,20 pr. kg., um feskfiskaveiðan undir Føroyum skuldi kunna halda áfram.

Lætt er tó at siggja, at við hesum uppskoti er langt frá at fiskimenn hava fingið eina príshækkan, sum omanfyri nevnt, og vilja vit mætmæla at ikki í stórri mun er fylgt hesum tilmæli.

Fyri tær ymsu feskfiskaveiðurnar hava vit annars hesar viðmerkingar:

Viðvíkjandi línuskipum: Stórsti batin í uppskotinum frá landsstýrinum er hjá manningunum á línubátum, men her kunnu vit eisini vísa á, at her eru inntøkurnar so mikið lágar, at tær framvegis langt frá kunnu sigast at svara til, hvat hesir fiskimenn við teirra arbeiðsumstøðum kunnu baldast at hava krav uppá. Skotið verður upp, at umfram eina vanliga príshækking skal manningarstuðningurin hækkast úr 15 í 32 øyru pr. kg. Hesi 32 øyru skulu so minkast við 1 øyra fyri hvørji 10 øyru ráfiskaprísurin fer upp í mun til prísirnar 1. februar 1980.

Vit vilja undirstrika, at neyðugt verður við enn storri bata av inntøkumøguleikunum hjá hesum parti av flotanum, men annars halda vit ta uppskotnu avtrappingina vera heilt ógrundaða. Talan er jú als ikki um at avtrappa rakstrarstuðningin til skipini, hvussu høgt prisurin enn fer upp, og kann tað als ikki vera rímiligt og rætt at bert fiskimenn skulu avtrappast. Og annars at byrja at avtrappa hendan lutfalsliga avmarkaða bata, so skjótt prisurin er farin upp við teinum fyrstu 10 oyrunum fyrikemur okkum at vera burtur úr vón og viti. Inntøkutølini vísa heilt skilliga, at prisurin skal hækka við nógvar ferðir 10 oyrum, áðrenn inntøkurnar við linubátum kunnu sigast at vera bert nøkurlunda rímiligar, og tað sjálvt um hesi 32 oyru standa við. Vit kunnu bert nevna, at minstadaglønin fyri 8 tímars arbeiðsdag á landi í dag er hægri enn miðaldaglønin var við einum línubáti til ísfisk í 1979. Og so kann ein og hvør gera sær eina meting av hvussu munurin er á tímalønini.

So vit fara í minsta lagi at mæla til, at viðbótin hjá fiskimønnum verður ásett eftir sømu reglum sum rakstrarstuðningurin til skipini, t.v.s. uttan avtrapping. Tað kann eisini vera mint um, at mettu útreiðslutølini av hesi skipan eru bygd á ta fullu upphæddina, t.v.s. uttan avtrapping.

Viðvíkjandi trol- og garnaskipum. Skotið er upp, at manningarstuðningur til trol- og garnaveiði skal vera 5 oyru pr. kg. Sum framlagda uppskotið er orðað skal hesin stuðningur ikki avtrappast, men landsstýrismaðurin, sum legði málið fram, segði undir framløgini, at hetta var eitt mistak, og bað hann um at fáa hetta broytt undir viðgerðini í líggjarnevndini, og verða viðmerkingarnar niðanfyri gjørdar út frá hesum.

Hetta uppskot er ætlað at minka um viðbótina hjá trolara- og garnamønnum við 2 oyrum. Umroknað til pris merkir hetta sostatt eina lækking uppá 7—8 oyru hjá trolmønnum og 4—5 oyru hjá garnamønnum, ella ein miðallækking í inntøkuni uppá eini 2% í mun til hvat hon annars vildi verið. Hesi ætlan vilja vit mótmæla. Viðbótin er fastlagd eftir løgtingslóg frá 1975, og merkir hendan ætlan ein versnan av hesi skipan. Vit halda tað vera heilt órímiligt, tá talan verður um hækking av øllum møguligum veitingum at fara at minka um eina skipan, sum fiskimenn hava.

Vit hava jú longu víst á, at inntøkurnar hjá ísfiskamønnum beinleiðis eru minkaðar frá 1978 - 79. Hendan minking er í krónum hjá línubátum, garnabátum og smærri trolarum, meðan talan er um minking í inntøkuni í mun til lønarlagið annars hjá øllum ísfiskamønnum. Og alt bendir á, at henda lutfalsliga minking fer at halda áfram í 1980. Tí halda vit tað vera høpisleyst við beinleiðis lóggávu at okja um hesa niðurgongd í inntøkunum. Vit vilja undirstrika, at eingin bólkur av fiskimønnum, sum her er talan um, fær nakra órímiliga høga inntøku. Tað er nærmast tvørtur móti. Vit kunnu nevna sum dømi, at við lægstu timalønini í dag gevur ein 10 tíma arbeiðsdagur á landi meira enn miðaldaglønin var við teimum smærru ísfiskatrolarunum í 1979.

Vit kunnu bert taka uppaftur, at vit kunnu ikki góðkenna, at grundir eru fyri teirri ætlaðu skerjing av viðbótini, og vilja vit mæla til í minsta lagi, at lógargreinin hesum

viðvíkjandi verður samtykt sum hon stendur uttan nakra broyting, og vilja vit annars viðvíkjandi ætlaðu avtrappingini visa til tað sum er fort fram omanfyri.

Svartkalvastuðningur. Manningarstuðningurin til feskfisk er frá fyrstu tíð bert fyri rundan fisk. Hvi hesin munur varð gjordur vita vit ikki, men kanska hevur tá ikki verið veiddur annar flatfiskur enn kalvi, og hann hevur so havt so góðan prís, at ikki hevur verið neyðugt við stuðli. Fyri nokrum árum síðan fóru menn at veiða svartkalva. Hesin fiskur var flatfiskur, men tó ikki dýrari enn annar fiskur. Men vegna treytirnar um «rundan» fisk fekk svartkalvin ongan stuðning. Menn hildu tá tað vera órímiligt, at eitt so tilvildarligt «kriterium» skuldi avskera menn frá stuðul. Tí varð gjord ein serlig skipan, sum í dag gevur 15 øyru í manningarstuðul fyri svartkalva.

Men samb. uppskotið, sum er lagt fram á ting, er stuðningur til svartkalva burturdottin, tá reglurnar um rundan fisk standa við, og einki er nevnt um svartkalva. Hetta kann bert vera eitt mistak, sum vit vænta at figgjarnevndin rættar, nú vart er gjort við hetta. Tað er ikki nógvur svartkalvi, sum vanliga kemur uppá land, men beint nú fáa trolararnir nakað av svartkalva undir Føroyum, og tað vil vera beint órímiligt at avskera menn frá eini stuðningsskipan sum teir hava havt. Annars kostar svartkalvi ikki ti almenna eitt øyra, so um hetta hóast alt verður gjort kann tað bert vera ti, at menn vilja steðga eina veiðu, sum hóast alt kann økja um okkara moguleikar at veiða.

Eitt annað er um tað ikki vildi verið greiðari at strika treytirnar um at fiskurin skal vera rundur fyri at fáa stuðning, treytir sum eisini galda fyri rakstrarstuðning. Tá nú tann nýskapan er gjord við saltfiski, at hann allur kemur undir stuðning, vildi tað verið náttúrligt at gjort tað sama við feskfiski. Tað kann neyvan vera nokur sakfig grund fyri at t.d. skota ikki skal fáa stuðning, tá t.d. havtaska, sum kostar duputt so nógv, skal fáa. Henda broyting vil merkja at 100% í staðin fyri 98% av landaðum ráfiski kemur undir stuðning, og vil hetta gera skipanina meira einfalda og eisini meira rímiliga. Okkara tilmæli er tískil í fyrsta lagi, at allur feskfiskur verður undir sama treytum stuðningi viðvíkjandi, og annars í minsta lagi, at svartkalvin verður tikin við aftur eftir galdandi reglum.

Vit vilja undirstrika, at okkara tilmælir omanfyri viðvíkjandi manningarstuðningi øll kunnu baldast innanfyri ta mettu útreiðsluupphæddi uppá 14 mill. kr. við teirri veiðu sum komin menn rokna við í hesum árinum.

VIÐVÍKJANDI AGNSTUDNINGI

Her vilja vit visa á tað bræv, sum vit saman við reiðarafelagnum í farna ári sendu landsstýrinum, og har vit vístu á tað órímiliga í, at agnstuðningur ikki verður latin, tá agnið verður keypt uttanlands. Tað kunnu jú vera ymsar orsøkir fyri, at agn ikki verður keypt í Føroyum. Tað kann t.d. vera, at bóskandi agn ikki er at fáa í Føroyum, tá tað skal nýtast, ella at skipið er so langt heimanifrá, at tað er hagligari at fara

inn í fremmanda havn eftir agni. Tað er jú tað talan er um hjá línubátum t.d. Tað kann ikki vera rætt, at menn undir slíkum umstoðum ikki kunnu fáa agnstudning, tá torvurin hjá hesum vinnum er eins stórur og hjá teimum, sum keypa agnið í Foroyum. Oljustudningur verður jú latin, hvar eru oljan er keypt. Vit vilja tí mæla til, at agnstudningur verður latin til agn eisini, sum verður keypt í útlandinum.

VIÐVIKJANDI SALTFISKAVIÐBÓT

Uppskotið um saltfiskaviðbót er stórt sæð ein bati. Men tó er hend tann broyting, so vítt vit skilja lógina, at viðbótin skal býtast við einum parti meira enn eftir galdandi skipan, t.v.s. býtt verður við manningartalinum, meðan áður varð býtt til allar uttan skiparan. Hetta ger ikki so stóran mun tá nógvir mans eru við, men í einstøkum førum ger hetta, at manningin kemur at fáa minni burfurúr nýggju skipanini. Her er talan um snellfiskip á saltfiskaveiði, og kann hetta lýsast við fylgjandi dømi: Roknað verður við eini last uppá 50 t. 90% er studningsfiskur eftir galdandi skipan, og 12 mans eru við skipinum:

Gald. skipan:	90% av 50 t. er 45 t. á 55 oyru:	11 partar — kr. 2,250	
Uppsk. —	50 t. á 50 oyru:	12 partar — kr. 2.083	— 7%

Hetta kann ikki vera rett mannagongd, og vilja vit mæla til antin at upphæddin verður hækkað ella at býtt verður eftir galdandi hátti.

VIÐVÍKJANDI FLAKASTUDNINGI

Vit meta, at her má vera gjort eitt mistak, tá uppskotið er evnað til. Meðan saltfiskaviðbótin hjá trolarum er hækkað úr 29 oyrum pr. kg. fyri tosk nr. 1 omanfyri 12″ til 50 oyru pr. kg. fyri uppskipaða vekt, er flakaviðbótin bert hækkað úr 31 oyrum pr. kg. fyri skræðuflak, sum mest verður framleitt av, uppí 35 oyru, og annars fyri flak uttan skræðu úr 40 uppí 45 oyru. Hetta kann ikki vera rætt, at slíkur munur verður gjordur á hesum báðum bólkum av fiskimonnum. Talan er jú um sama slag av trolarum, sum veiða á sama leiðum eftir sama fiski og sum verða lontir eftir sama sáttmála. Hesir menn eru lonarliga eins fyri og mugu sjálvsagt fáa sama somdir, tá talan er um viðbót.

Fyri at eingin ivi skal vera um skeivleikan í hesum uppskoti skal niðanfyri verða roknað út, hvat viðbótin gevur pr. kg. ráfisk hjá báðum hesum slogum av trolarum bæði eftir galdandi og uppskotnu skipan.

Saltfiskatrolarar fáa sum sagt 29 oyru pr. kg. fyri nr. 1 omanfyri 12". Hetta er galdandi fyri tosk. Nakað av studningi verður eisini latin fyri upsa, men hevur hetta ikki so stóran áhuga í hesum sambandi. Við úrtokuprosenti uppá 45% gevur hetta

pr. kg. ráfisk:	29 oyru × 90%	× 45%	11,7 oyru
Flak við skræðu	31 —	40%	12,4 oyru
Flak uttan skræðu	40 —	36%	14,4 oyru

Við øðrum orðum er talan um nakað eins studning pr. kg. ráfisk. Men við uppskotinum hjá landsstýrinum verður stuðulin hesin pr. kg. ráfisk:

Saltfiskur	45% av 50 oyrum	22,5 oyru
Flak v/skræðu	40% av 35 oyrum	14,0 oyru
Flak u/skræðu	36% av 45 oyrum	16,2 oyru

T.v.s. at flak v. skræðu hereftir bert skal fáa um 62% av stuðlinum, sum saltfiskur fær, meðan flak uttan skræðu fær 72%. Eisini vísa tolini, at flakaviðbótin verður hækkað við 90%, meðan flak bert skal hækka við um 13%.

Tað skal eisini verða nevnt her, at meðan saltfiskatrolarar sum oftast landa í Føroyum og tí fáa fullan studning noyðast flakatrolarar sum oftast at landa uttanlanda og fáa teir tá bert hálvan studning, og ger hetta sjálvsagt bert munin uppaftur storri. Talan er bert um ein flakatrolara, og við honum vunnu menninir í 1979 bert 301 kr. um dagin. Og tá er enntá ikki tikin við ein enn verri túrur, sum byrjaði í 1978, men sum endaði í 1979. So her er avgjørt talan um eina botninntoku, har eingin grund er fyri at vera smáligur. Tað má vera heilt klárt, at upphæddin í landsstýrisuppskotinum má broytast, so latið verður tað sama pr. kg. ráfisk, sum latið verður saltfiskatrolarunum. Og tá verður upphæddin umleið hendan:

Flak við skræðu:	22,5 oyru pr. kg. ráfisk: úrtoku 40%	— 56 oyru
Flak uttan skræðu	22,5 oyru pr. kg. ráfisk: úrtoku 36%	— 63 oyru

Hetta skuldi verið so mikið sjálvsagt, at ikki skuldi verið spurt eftir kostnaði her, men nevnast skal bert, at landsstýrið hevur mett kostnaðin av sínum uppskoti til flakastuðul til kr. 200.000, so tað merkir bert promillir í samlaðu upphæddini, at hetta verður broytt samb. omanfyri standandi.

VIÐVÍKJANDI PRÍSTALSSKIPANINI

Her er uppskot um lutvíst at taka komandi tollhækkingar burturúr pristalinum og lutvíst at minka galdandi pristalsviðbotur við umleið ⅓. Bæði hesi viðurskifti koma at minka um vøksturin av minstulønini hjá fiskimonnum. Málið hvørt tollur skal vera við í pristalinum ella ikki er kanska ein politiskur spurningur, men vit kunnu ikki

góðkenna at minkað verður um dýrtíðarviðbøturnar í samband við minstulonina. Hon er jú av sær sjálvum minkað munandi seinnu árini, sum uppstillingin niðanfyri vísir:

1975: Minstalonin kr. 3.690	1% hækkan í prís. gav kr. 35 ella	0,95%
1980: Minstalonin kr. 6.495	1% hækkan í prís. gevur 35 × 1,448 - 51 kr.	— 0,78%
Eftir uppskoti kr. 6.593	1% hækkan í prís. skal geva 35 kr.	— 0,53%

Hetta vil siga, at eftir uppskotinum frá landsstýrinum verður dýrtíðarviðbótin av minstulonini bert um eina helvt av tí hon var í 1975, og hetta kunnu vit ikki góðtaka.

Vit vóna og rokna við at logtingið fer at hava hesar viðmerkingar í huga, tá nevndu uppskot verða viðgjord. Okkara tilmælir eru øll saklig og halda vit tey vera væl undirbygd, og rokna vit tískil við at tey verða tikin til eftirtektar.

Er ivi um nakran spurning, sum er reistur í hesum skrivi, er felagið altíð til reiðar at koma á fund at útgreina hetta nærri.

Virðisliga

FØROYA FISKIMANNAFELAG

Óli Jacobsen

FØROYA FISKIMANNAFELAG
Tlf. 1 1569

3800 Tórshavn, 28. februar 1980.

Figgjarnevnd Logtingsins
her

Í sembánd við viðgerðina av logtingsmáli nr. 54/1979 fara vit fyrst og fremst at vísa til okkara brev til Foroya Logting frá 25. februar, men vit fara tó at koma við nøkrum eyka viðmerkingum.

Viðv. manningarstudningi til linuskip. Menn kunnu vera ymsir á máli um hvussu tørvurin er til skip ávikavist manning á teimum ymsu veiðuhættunum. Men menn kunnu tó vera samdir um, at er tørvurin stórur á studningi til linuskipini, so er hann ikki minni til teir menn sum sigla við. Og skuldi tí verið rímligt við sama studningsupphædd pr. kg. til hesar báðar partar. Men her er tó munur gjordur á. Skipini fáa eyka 38 oyru pr. kg., meðan fólkið fær 17 oyru. Taka vit tað samlaða talið fyri rakstr-

arstudning og manningarstudning, verða tolini ávikavist 43 oyru til skipið og 32 oyru til fólkið, ella framvegis ein stórur munur. Tá fyrst hesin munur er gjordur vil tað já vera uppaftur meira órimiligt at fara at trappa av manningarstuðlinum, áðrenn hann er farin at virka, meðan rakstrarstudningurin skal standa órordur, hvussu prisirnir enn fara at laga seg. Hetta skal skiljast sum eitt argument afturat fyri ikki at avtrappa manningarstudningin samb. uppskotið, sum er til viðgerðar.

Viðvikjandi manningarstudning til trolarar og garnaskip. Fyriliggjandi uppskot við ætlaðari prishækking merkir ein heilt lítil bati í prisinum til manning á trolarum uppá 5 oyru. Men her kann skjótt vera talan um eitt minus eisini, tá hugsað verður um broytingina í veiðumynstrinum fram innóti at veiða bitigari fisk, og sum merkir kegri miðalpris. Miðalprísurin lækkaði já frá 1978 - 79.

Eitt afturat: Verður fyriliggjandi uppskot samtykt bæði viðvikjandi lækking í viðbótini og avtoku av viðbót til svartkalva, so merkir hetta, at ein inntokuskipan hjá fiskimonnum verður lækkað við *afturvirkandi kraft.* Tað at ymsar skipanir verða bottar við afturvirkandi kraft kann rímiligt góðtakast, sjálvt um tað er prinsipielt skeivt. Men um ein forverring nú verður samtykt við afturvirkandi kraft, so er tað væl fyrstu ferð í søguni, at tað er hent, og má tað sjálvsagt mótmælast.

Vist verður á tað sum áður er sagt um avtrapping her eisini, men um menn fyri einhvonn pris vilja hava avtrapping við í lógini, kann tilskilast, at fyri fyrstu 2 kr., prísurin hækkar skal eingin avtrapping finna stað. Viðvikjandi sjátvari avtrappingini undrar tað okkum, at tá hesi uppskot vórðu lagd fyri felogini var talað um eina lækking við 1 oyru fyri hvorju 15 oyru prísurin fer upp. Men nú eru tey 15 oyruni broytt til 10 oyru. Tað kann ikki vera rímiligt. Tey tíggju oyruni stava frá 1975, tá ráfiskaprísurin var 2 kr. kg. T.v.s, at viðbótin lækkaði við 1 oyra fyri hvorji 5% prísurin fór upp. Skulu nú hesi 10 oyru nýtast, so svarar hetta til bert 3%, fyri at lækka viðbótina.

Vit meta, sum áður sagt, at okkara minsta krav í hesum umfari má vera, at tær 14 mill. kr., sum eru avsettar til manningarviðbót verða nýttar. At torvur er á hesum halda vit okkum hava prógvað til fulnar. Galdandi uppskot kemur ikki at uppfylla hesa treyt, sum vist niðanfyri. Roknað verður við eini veiði av ráfiski uppá 85.000 t., sum konir menn halda vera realistiskt fyri inniverandi ár, men: Undir stuðul koma 98% av 85.000 (rundur fiskur) ella 83.300 t. Við veiðubýtinum í 1979 verður sanlaða upphæddin:

Húkveiddur fiskur	.....	37%	av 83.300 t. er 30.800 t. á 0,30	kr.	9.240.000
Netveiddur fiskur:	.....	63%	av 83.300 t. er 52.500 t. á 0,03	kr.	1.575.000
Tilsamans	.....			kr.	10.815.000

Nýtt eru 30 og 3 oyru, tí sum avtrappingin er orðið verða onguntið nýttar tær fullu upphæddirnar. Frá nevndu 10,8 mill. skal enntá dragast frá tað sum «spart» verður

vegna komandi avtrappingar. Trekkjast skal eisini tað frá, sum spart verður við avtøku av svartkalvaviðbót.

Vit hava í okkara brævi sett upp nøkur minstatilmælir, t.v.s. avtøka av avtrappingini og viðbót til allan fisk. Hetta kemur at kosta:

Húkveiddur fiskur:	37% av 85.000 t. er 31.500 t. á 0,32 kr.	10.080.000
Netveiddur fiskur: ...	63% av 85.000 t. er 53.500 t. á 0,05 kr.	2.675.000
		kr. 12.755.000

Undir hesum fyritreytum er enntá so mikið rúmsátt at ráð kundi verið til 1 - 2 øyru afturat í viðbót. Men sjálvt um menn ivast í um hesi tol halda kann nevnast, at sjálvt um húkveiddur fiskur kemur uppá 40%, og veiðan verður 90.000, verður kostnaðurin 14,2 mill. kr.

Vit vilja bert endurtaka at vit halda tað vera grundir fyri at endurskoða manningarstudningin til feskfisk og vóna vit at fiskimenn kunnu fáa ta ábót, sum veruliga er ætlað teimum, og sum eisini teimum tørvar.

Við heilsan

FØROYA FISKIMANNAFELAG

Óli Jacobsen

MEGINFELAG ÚTRÓÐRARMANNA

Tórshavn, 28. februar 1980

Til Fíggjarnevnd Løgtingsins
her

Meginfelag Útróðrarmanna ger støðuna soleiðis upp við fyriliggjandi uppskoti til nýggja studningsskipan.

Krøv okkara eru:

Vit skulu roknast sum fyrsta lið í framleiðsluni, soleiðis sum tað er okkara sjálvsagdi rættur. Vit skulu hava ásettan avreiðingarprísir, sum meðal útróðrarbátur kann bera seg við, og sum gevur manningini hampuliga inntoku. Og viðurlag fyri prístalshækkingar.

Í november 1979 sogdu vit, saman við Trolskip, Landleiðin og Fiskimannafelag-

num, Landsstýrinum frá, at hetta krav okkara kostaði 1,20 kr. pr. kg. omaná avreiðingarprisirnar 1. oktober 1979. Aftaná fekk Foroya Landsstýri útrokningar frá fiskivinnuráðnum, sum lógu í sonn legu, sum okkara. Tann 26. februar var full semja um, á umboðsmannafundi okkara, at halda fast við hetta kravið: Príshaeddin uppá 1,20 kr. pr. kg. beinanvegin og prístalsviðgerð, og ganga so langt sum at lýsa avreiðingarbann til foroysk virkir fyri lægri pris enn M.Ú. krevur.

So hvort sum krovini til stuðul eru vaksin hjá fiskivinnuni síðan 1975, og stuðulin hækkaðir, eru livikor útróðrarmannsins versnaði. Til nú bæði bátar og manningar eru koyrd fíggjarliga fastir. Soleiðis hevur okkara stuðulsskipan virkað í praksis. Og vit duga ikki siggja at hon fer at virka oðrvísi nú.

Vit hava fingið at vita, at tær 192,3 mió. kr. eru tað sum samfelagið er fært fyri at bera nú, og taka sjálvandi hetta til eftirtektar.

Vit fara tí at satsa uppá góðskuna á tí fiski, sum limir felagsins fera til lands. Tann netveiddi fiskurin, bæði daggamal og Isaður, má partvís geva toppgóðsku. Men framúr góður fiskur verður tann búkaveiddi fiskurin, avreiddur sama dag hann er veiddur.

Kortini verður hjá øllum limum felagsins ein spurningur um góðskumeting, av tí at vit skulu undir at hagreiða fiskin betur, fyri at kunna bjóða toppgóðsku.

Ráfiskanevndin má taka ráfiskakeyparar uppá orðið, og seta tey umleið 80 oyruni uppá kg. ráfisk, sum teir hava bjóðað útróðrarmonnum, sum eina príshækking nú beinan vegin. Og so endurskoða avreiðingarprisirnar, tá tað kanningararbeiðið, sum fiskimálaráðharrin hevur boðað frá viðvíkjandi feskfiski, verður liðugt um ein mánað.

Av teim 73 mió. kr., sum nú koma aftur at tí, sum var á fíggjarlógini, eru 13,6 mió. kr. avsettar til búkaveiddan fisk. Taka vit ta búkaveiddu tøgdina fyri 197 sum grundarlag, so geva hesar 13,6 mió. kr. pr. kg. meira í avreiðingarprísi, í staðin fyri rakstrar- og manningarstuðul.

Við hesum meina vit at hava vist á, at vit kunnu fáa krov okkara útfylt innanfyri rammurnar av stuðulsuppskotinum, og tí sum stendur okkum í boði frá fiskakeyparunum.

Og vit loyva okkum at heita á fíggjarnevndina at koma við broytingaruppskotum til fyriliggjandi landsstýrisuppskot, sum ganga okkum á moti samsvarandi tí, vit her hava fort fram.

MEGINFELAG ÚTRÓÐRARMANNA

Ísak Maras

formaður

FELAGIÐ NÓTASKIP

Tórshavn, 26. feb. 1980.

Makaprent til løgtingsins figgjarnevnd.

Føroya landsstýri
h e r

Viðv. komandi svartkjaftaveiði undir Føroyum.

Nú nótaskipini onga lodnu fingu fyri 1980, og sum tað ljóðar, at makrelkvotan bæði í norskum og EF sjógvi verður munandi minni, er vandi fyri, at hesin partur av veiðiflotanum ketur í heilt álvarsligar figgjartrupulleikar.

Vit hava fræt, at landsstýrið umhugsar at hækka studningin til landingarprísir á ídnaðarfiski og haraftrat at veita rakstrarstudning. Alt hetta er sjálvandi ein bati, men um veiðimøguleikarnir verða so nógv skerdir, sum nú útlit er til, so munar alt hetta næstan onki álíkavæl, tí bæði eru hesi skip so stór og avanserað, at keypsprísurin er sera hogur, haraftrat skulu tey nýtast til ymiskar veiðuhættir og eru tí so dýr í rakstri, at tey mugu hava maksimalar veiðimøguleikar fyri at kunna klára altar sínar útreiðslur.

Hesi ár, veitt hevur verið eftir svartkjafti, hevur mai mánaði verið sannur rokmánaði til fiskiskap, men seinasta ár bar ikki til, av tí at so nógv fremmand skip — og tá serliga norsk — trokaðu skip okkara burtur av teimum leiðum, har svartkjafturin vanliga stendur tættastur.

Vit heita tí á landsstýrið um ikki undir komandi samráðingum at loyva fremmandum skipum at veiða á niðanfyri nevnda øki frá 1. mai til 6. juni. Hetta er hvat aðrir gera fyri at verja teirra egna fiskiskap. T.d. sleppa føroysk nótaskip ikki at veiða nærri norsku strondini enn 40 fjórðingar úr landi frá 59° n.br. og suðuryvir.

Eisini hevur hetta alstóran týdning fyri fiskaprísin, tí um nótaskipini ikki kunnu veiða maskimalt, og Havsbrún fær eini 10.000 tons minni, so merkir hetta ein inntokumiss uppá 1 mill. kr. til virkið, sum so má lutast út aftur á hesi fáu skip.

Krav okkara má tí vera, at frá 1. mai til 6. juni mega føroysk nótaskip ikki verða tarnað av fremmandari fiskiveiði á einum øki norðanfyri 60° 20' n.br. og millum 6° 20' v.l. og 7° 30' v.l., tó so at fremmand skip ongastaðni koma nærri enn 40 fjórðingar úr landi.

Fyri at fáa maksimala úrtoku úr svartkjaftaveiðuni í ár, er neyðugt, at prísstuðningur fylgir við, um neyðugt verður at landa í útlandinum.

Virðingarmest
Eiler Jacobsen
form.

FELAGIÐ IDNAÐARSKIP

Frælsið 13
Tórshavn

Tórshavn, hin 23. februar 1980

Vísandi til uppskotið frá landsstýrinum viðvíkjandi studningi til fiskivinnuna skal verða sagt frá, at á fundi í Felagnum Idnaðarskip hin 21. februar í ár varð samtykt at senda soljóðandi broytingaruppskot.

1) Í uppskotinum stendur, at skip, sum veiða idnaðarfisk, skulu fáa 5 oyru pr. kg í eigarastudningi. Hetta halda vit verða ov lágt sett, tá hugt verður eftir, hvat onnur skip fáa. Til dømis fáa feskfiskaskip, sum veiða við Føroyar, 42 oyru pr. kg, um tey eru yvir 110 BRT og hava undir 1400 HK maskinu.

Dømi:	Meðalveiða pr. ár	Eigara-studningur	Studningur falt
Feskfiskabátar	1.000 t	42 oyru	420.000 kr.
Idnaðarbátar	4.000 t	5 oyru	200.000 kr.

Út frá hesum tolum vilda vit havt eigarastudningin broyttan til 10 oyru pr. kg fyri idnaðarfisk, so hann nokunlunda kom á hædd við tað, sum feskfiskaskipini eftir uppskotinum koma at fáa.

2) Viðvíkjandi prísstuðninginum til Idnaðarfisk halda vit, at hann ikki skal byrja at avtrappa, fyrrenn prísurin er 38 oyru í staðin fyri sum á uppskotinum 32 oyru.

3) Eigarastudningurin uppá 42 oyru pr. kg til feskfiskabátar skal eisini galda fyri feskfisk, veiddan av idnaðarbátum.

Osmund Justinussen
fm.

Sent til:
Føroya løgting,
Fíggjarnevnd løgtingsins.
Føroya landsstýri.

FELAGIÐ TRØLSKIP

Tórshavn, 20. feb. 1980

Til Føroya løgting og Føroya landsstýri

Felagið hevur á fundi ídag gjøgnumgingið tað uppskot, sum landsstýrið ætlar at leggja fyri løgtingið um stuðning til fiskivinnuna til at avloysa skipanina, sum fór úr gildi 31. januar í ár.

Felagið vil gera vart við, at tær upphæddir, sum eru nevndar undir stykkinum um feskfiskastuðning, eru útroknaðar eftir 116.000 tonsum av ráfiski. Hetta halda vit vera ov høgt sett tá vit vita, at tað berl vóru landað um 86.000 tons í 1979.
Vit halda ikki grundarlag vera fyri at rokna við stórri tonsatali í ár tá hugsað verður um, at TAC er ikki hægri fyri høvuðsfiskaslogini í ár enn í fjor, og nøkur skip eru farin frá fyri at fiska laks, og tað sær út til, at fleiri skip verða løgd vegna figgjartrupulleikar.

Um hesar 33,1 milf. krónurnar verða býttar út uppá 86.000 tons, vildi tað lutfallsliga givið til hesar 3 bólkarnar ávikavist 7, 56 og 29 oyru pr. kilo, sum t.d. fyri ein feskfiskatrolara, sum fiskar 1000 tons, vildi givið 140.000 kr. til avdráttir í staðin fyri onki.

Virðingarmest

Olaf Olsen.

FELAGIÐ TROLSKIP

Tórshavn, 28. febr. 1980.

Til fíggjarnevnd løgtingsins.

Vit vilja fyrst vísa til skriv til landsstýrið, dagfest 22. februar í ár um uppskot tess til studningsskipan fyri fiskivinnuna.

Vit vilja eina ferð enn vísa á, at vit ikki rokna við, at tað á nakran hátt verður møguligt at fiska 116.000 tons í ár (tað vildi verið ein øking uppá 45% í mun til 1979, og vildi annars í sær sjálvum bott heilt munandi um fiskivinnukreppuna), og tí vil m.a. upphæddin uppá 33,1 mió. kr. til rakstrarstudning langt frá til fulnar koma til útgjaldingar.

Vit taka til eftirtektar, at fíggjarætlanin er ikki ment at bera meir enn umleið 192 mió. kr. til fiskivinnuna, men vit vilja fora fram, at tann avsetti peningurin eigur at nýtast har, sum hann er settur av til at verða nýttur.

Tí vilja vit við hesum biðja fíggjarnevndina ávirka løgtingið til at broyta uppskotið um rakstrarstudning til ávikavist 7, 57 og 30 øyru ístaðinfyri 5, 42 og 22 øyru.

Hetta vil svara til eina rávørumegd uppá 85.000 tons landaða í Føroyum í 1980, og um løgtingið metir, at upphæddin ikki kemur at halda, skjóta vit upp, at 85.000 tons verður sett sum loft fyri rakstrarstudninginum.

Við hávirðing

f. v.

Olaf Olsen.

6. mars legði fíggjarnevndin

ÍSKOYTI TIL ALIT

Minnilutin (Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen) setur fram soljóðandi

broytingaruppskot

til uppskot landsstýrisins:

Í § 1, punkt 1, 2. stk. verður «5 oyru/kg» broytt til «10 oyru/kg».	I § 1, punkt 1, stk 2 ændres «5 øre/kg» til «10 øre/kg».

Sama dag legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

Broytingaruppskot
til

løgtingsmál nr. 54/1979: Ymisk lógaruppskot um stuðul til fiskivinnuna.
I: Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna.

Í uppskoti landsstýrisins verður í § 3 skoytt uppí sum «*3. stk.* Ongum fiskimanni má veitast minni enn hálv minstaløn.» og sum «*4. stk.* Hvørjir 20 dagar ein fiskimaður er mynstraður, verða at rokna sum ein lønarmánaður, tá minstaløn eftir 1. stk. verður roknað, og pro rata av færri døgum.»	I § 3 i landsstyrets forslag tilføjes: «*Stk. 3.* Ingen fisker kan få mindre end halv mindsteløn.» og som «*Stk.4.* For hver 20 dage en fisker er påmønstret skal regnes som en lønmåned, når mindsteløonnen efter stk. 1 skal beregnes, og pro rata af færre dage.»
Í § 4 verður skoytt uppí sum «*3. stk.* Fyri hvørjar 20 dagar sambært F.1. seðilin eiga manningar umfataðar av 1. stk. 1 mánaða minstaløn eftir § 3. Er dagatalið minni, verður roknað pro rata. Verður avreitt dag um dag, telja 12 avreiðingar sum 1 lønarmánaður.»	I § 4 tilføjes: «*Stk. 3.* For hver 20 dage i henhold til F. 1. seddelen, har mandskabet, der er omfattet af stk. 1 1 måneds mindsteløn efter § 3. Er antallet af dage mindre, regnes pro rata. Indhandles dag efter dag, regnes 12 indhandlinger som en lønmåned.»

Fíggjarnevndin legði eisini 6. mars fram soljóðandi

broytingaruppskot

Meirilutin Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Jørgin Thomsen og Jógvan Durhuus setur fram soljóðandi broytingaruppskot:

1. § 5 d. í uppskoti landsstýrisins 1: «45 oyru» verður broytt til «58 oyru» og «35 oyru» verður broytt til «48 oyru».	1. § 5 d. «45 øre» ændres til «58 øre» og «35 øre» ændres til «48 øre».

2. § 6 c. í uppskoti landsstýrisins I: «45 oyru» verður broytt til «58 oyru og «35 oyru» verður broytt til «48 oyru».

2. § 6 c.
«45 øre» ændres til «58 øre» og «35 øre» ændres til «48 øre».

Minnilutin Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen setur fram soljóðandi

broytingaruppskot

1. § 5 d. í uppskoti landsstýrisins I: «45 oyru» verður broytt til «62 oyru» og «35 oyru» verður broytt til «52 oyru».

1. § 5 d.
«45 øre» ændres til «62 øre» og «35 øre» ændres til «52 øre».

2. § 6 c. í uppskoti landsstýrisins I: «45 oyru» verður broytt til «62 oyru» og «35 oyru» verður broytt til «52 oyru».

2. § 6 c.
«45 øre» ændres til «62 øre» og «35 øre» ændres til «52 øre».

2. viðgerð 6. mars 1980.

I Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna.

Broytingaruppskot til § 3 frá Adolf Hansen fall við 3—0. Broytingaruppskot til § 4 fall við 3—0. Um §§ 1—4 í landsstýrisins uppskoti I varð atkvott við navnakalli soleiðis:

23 atkvøddu ja, 9 ikki.

Ja atkvøddu: Signar Hansen, Ivan Johannesen, Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Poul J. Olsen, Haldur Hansen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Andrias P. Jacobsen, Hanna Lisberg, Jona Henriksen, Ingrid Søndum, Karin Kjølbro, Jógvan Durhuus, Finnbogi Isaksen, Hans Marius Joensen, Edmund í Garði, Jógvan Sundstein, Øssur Dam Jacobsen, Eyðun Videro, Hákun Djurhuus, Óli Breckmann, Hilmar Bech.

Atkvøddu ikki: Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Eli Nolsoe, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Margeir Toftegaard, Jógvan Olsen, Agnar Nielsen, Pauli Ellefsen.

Broytingaruppskot til § 5, 2. stk. og § 6 frá meirilutanum í fíggjarnevndini samtykt við 20—0. Ja atkvøddu 21, 11 atkvøddu ikki.

Atkvøðugreiðsla við navnakalli um § 5 í landsstýrisins uppskoti varð henda:

Ja ,atkvøddu: Signar Hansen, Ivan Johannesen, Poul J. Olsen, Haldur Hansen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Andrias P. Jacobsen, Hanna Lisberg, Jona Henriksen, Ingrid Sondum, Karin Kjølbro, Jógvan Durhuus, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Edmund í Garði, Jógvan Sundstein, Øssur Dam Jacobsen, Eyðun Videro, Háku Djurhuus, Óli Breckmann og Hilmar Bech.

Atkvøddu ikki: Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Eli Nolsøe, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Margeir Toftegaard, Jógvan Olsen, Agnar Nielsen og Pauli Ellefsen.

§ 6 í landsstýrisins uppskoti (rakstrarstudningur) varð atkvott um við navnakalli. Ja atkvøddu 21, 11 atkvøddu ikki.

Atkvøðugreiðslan varð hendan:

Ja atkvøddu: Signar Hansen, Ivan Johannesen, Poul J. Olsen, Haldur Hansen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Andrias P. Jacobsen, Hanna Lisberg, Jona Henriksen, Ingrid Sondum, Karin Kjølbro, Jógvan Durhuus, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Edmund í Garði, Jógvan Sundstein, Øssur Dam Jacobsen, Eyðun Videro, Háku Djurhuus, Óli Breckmann og Hilmar Bech.

Atkvøddu ikki: Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Eli Nolsøe, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Margeir Toftegaard, Jógvan Olsen, Agnar Nielsen, Pauli Ellefsen.

§§ 7—9 vórðu samtyktar við 20--0.

3. viðgerð 6. mars.

I Broytingaruppskot frá Paula Ellefsen og Ivan Johannesen til 1 — 5 d varð atkvøtt um við navnakalli:

Ja atkvøddu: Ivan Johannesen, Eli Nolsøe, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Margeir Toftegaard, Jógvan Olsen, Agnar Nielsen, Pauli Ellefsen.

Atkvøddu ikki: Signar Hansen, Hilmar Kass, Adolf Hansen, Poul J. Olsen, Haldur Hansen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Andrias P. Jacobsen, Hanna Lisberg, Jona Henriksen, Ingrid Sondum, Karin Kjølbro, Jógvan Durhuus, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Edmund í Garði, Jógvan Sundstein, Øssur Dam Jacobsen, Eyðun Videro, Háku Djurhuus, Óli Breckmann og Hilmar Bech.

Burturstaddir: Asbjørn Joensen og Juul Jacobsen.

Broytingaruppskotið soslatt fallið við 8—22.

Atkvott varð sonuleiðis við navnakalli um broytingaruppskotið frá Hákun Djurhuus, Poul J. Olsen, Jørgen Thomsen og Jógvan Durhuus, og varð hetta samtykt við 22—8.

Ja atkvoddu: Signar Hansen, Ivan Johannesen, Eli Nolsoe, Poul J. Olsen, Haldur Hansen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Andrias P. Jacobsen, Hanna Lisberg, Jona Henriksen, Ingrid Sondum, Karin Kjølbro, Jógvan Durhuus, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Edmund í Garði, Jógvan Sundstein, Øssur Dam Jacobsen, Eyðun Viderø, Hákun Djurhuus, Óli Breckmann og Hilmar Bech.

Atkvoddi ikki: Hilmar Kass, Adolf Hansen, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Margeir Toftegaard, Jógvan Olsen, Agnar Nielsen, Pauli Ellefsen.

Burturstaddir: Asbjørn Joensen og Juul Jacobsen.

Málið soleiðis broytt endaliga samtykt við 20—0.

2. viðgerð 6. mars.

II Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um studning til veiðu av ídnaðarfiski.

Broytingaruppskot frá minnilutanum (Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen) til § 1, 2. stk. fall við 9—0. § 1 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 28—0. § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 6. mars.
Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 28—0 atkvøðum.

2. viðgerð 6. mars.

III Agnstudningur.

Broytingaruppskot frá Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen til § 1 fall við 8—0. § 1 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 28—0,
§ 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 6. mars.

Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 28—0 atkvøðum.

2. viðgerð 6. mars.

IV Brennioljustudningur til fiskiskip.

§§ 1 og 2 samtyktar við 28—0, § 3 uttan atkvoðugreiðsla.

3. viðgerð 6. mars.

Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 28—0 atkvoðum.

F.J., j.nr. 1539-4. Lógirnar nr. 22, 23, 24 og 25 frá 18. mars 1980.

---

55. Ymisk inntøkulógaruppskot

Ár 1980, leygardagin 23. februar legði Demmus Hentze, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot I: Broyting í skattalógini.
Uppskot II: Eykaskattur.
Uppskot III: Broyting í innflutningsgjøldum.
Uppskot IV: Broyting í eykainnflutningsgjøldum.

I

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjordar hesar broytingar:

1) Í § 9, 6. stk. verður «400.000 kr.» broytt til «500.000 kr.».
2) § 26, 2. stk. verður orðað soleiðis: «Hvør persónur, sum er undir fullari skattskyldu eftir reglunum í § 14, og sum er settur sjálvstoðugt í skatt sambært reglunum í hesi lóg, fær í

lagtingslov om ændring af lagtingslov om landsskat og kommuneskat

§ 1. I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 9, stk. 6 ændres «400.000 kr.» til «500.000 kr.».
2) § 26, stk. 2 formuleres således: «Enhver person, som er fuldt skattepligtig ifølge § 14 og, som er selvstændig ansat til skat efter de i denne lov gældende regler, ind-

útroknaða landsskattinum ein persónsfrádrátt.»

3) § 26, 3. stk. verður orðað soleiðis:
«Fyri leysar persónar verður persónsfrádrátturin kr. 4.200,-, tá skattskyldiga inntokan ikki er yvir kr. 20.000,-. Har inntokan er hægri, verður frádrátturin lækkaður við 2% av muninum millum kr. 20.000,- og inntokuna. Fyri hjún, har konan er sett í skatt sambært § 17, 2. stk. verður frádrátturin fyri hvort av hjúnunum 4.200,- kr. lækkað við 7,5% av skattskyldugu inntokuni, tá henda fyri hvonn ikki er yvir 20.000,-kr. Har inntokan er hægri, verður frádrátturin uppá 2.700,- kr. lækkaður við 3% av muninum millum kr. 20.000,- og inntokuni. Har bert annar hjúnarfelagin hevur skattskylduga inntoku, er frádrátturin 6.700,- kr., tá skattskylduga inntokan ikki er yvir 20.000,- kr. Har inntokan er hægri, verður frádrátturin lækkaður við 2% av muninum millum 20.000,- kr. og inntokuna.»

4) Í § 26, 5. stk., 1. punktum verður «6.500 kr.» broytt til «6.700 kr.»
5) Í § 26, 5. stk., 3. punktum verður «3.500 kr.» broytt til «3.700 kr.».
6) § 27, 1. stk. verður orðað soleiðis:
«Teir í § 14 nevndu óavmarkaðu skattskyldugu og teir í § 15, 1. stk. nevndu avmarkað skattskyldugu persónar lata skatt til landskassan soleiðis:
Er inntøkan minni enn 21.000 kr. verður latið 20%.

Er inntokan men minni enn verður latið av og av restini
Er indtægten men mindre end erlægges af og af resten
kr. kr. kr. kr. %
21.000 41.000 4.200 21.000 26
41.000 200.000 9.400 41.000 33
200.000 250.000 61.870 200.000 40,5
250.000 300.000 82.120 250.000 42,5
storri enn
over 300.000 103.370 300.000 44

nævnes der et personfradrag, der fradrages i den udregnede landsskat.»

3) § 26, stk. 3 formuleres således:
«For enlige personer udgør personfradraget kr. 4.200,-, hvis den skattepligtige indtægt ikke overstiger kr. 20.000,-. Overstiger den skattepligtige indtægt dette beløb reduceres fradraget med 2% af forskellen mellem kr. 20.000,- og indtægten. For ægtefæller, hvor hustruen er ansat særskilt til skat iflg. § 17, stk. 2, er fradraget for hver af ægtefællerne kr. 4.200,- reduceret med 7,5% af den skattepligtige indtægt, hvis denne for hver af ægtefællerne ikke er over kr. 20.000,-. Overstiger indtægten dette beløb, reduceres fradraget på kr 2.700, men 3% af forskellen mellem kr. 20.000,- og indtægten. Hvis kun den ene af ægtefællerne har skattepligtig indtægt er fradraget kr. 6.700,-, hvis den skattepligtige indtægt ikke overstiger kr. 20.000,-. Overstiger indtægten dette beløb, reduceres fradraget med 2% af forskellen mellem kr. 20.000,- og indtægten.»
4) I § 26, stk. 5, 1. punktum ændres «kr. 6.500» til «kr. 6.700».
5) I § 26, stk. 5, 3. punktum ændres «kr. 3.500» til «kr. 3.700».
6) § 27, stk. 1 formuleres således:
«De i § 14 omhandlede ubegrænset skattepligtige samt de i § 15, stk. 1 omhandlede begrænset skattepligtige svarer skat til landskassen således:
Er indtægten mindre end kr. 21.000 erlægges 20%.

7) § 27, 2. stk. verður orðað soleiðis:
«Tey, í § 14, nr. 5 nevndu felløg v.m. lata skatt til landskassa og kommunu við tilsamans 33% av teimum fyrstu 50.000 kr. í skattskyldugari inntøku, 43% av teimum næstu 100.000 kr. og 49% av restini. Hesin skattur verður býttur við 30% sum kommunuskattur og 70% sum landsskattur.»

7) § 27, stk. 2 får følgende formulering:
«De i § 14 nr. 5 omhandlede selskaber m.v. svarer skat til landskasse og kommune med tilsammen 33% af de første kr. 50.000 i skattepligtig indkomst, 43% af de næste kr. 100.000 og 49 % af resten. Denne skat fordeles med 30% som kommuneskat og 70% som landsskat.»

8) § 83, 2. stk. verður orðað soleiðis:
«Tó er ongantíð loyvt at halda meira enn helming av vinnuløn skattgjaldarans v.m. iroknað vinnuløn hjúnafelagans.»

8) § 83, stk 2 formuleres således:
«Dog kan der ikke ved nogen udbetaling indeholdes mere end halvdelen af skatteyderens arbejdsvederlag m.v. samt ægtefælles vederlag.»

§ 2. Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1980/81.

§ 2. Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1980/81.

Viðmerkingar:

Tað her framsetta lógaruppskot ber í høvuðsheitinum í sær broytingar í galdandi lógarreglum viðvíkjandi:

a. Avseting í rakstrargrunn,
b. persónsfrádrátturin í landsskattaútrokningini,
c. landsskattatalvuni og
d. partinum, ið kann eftirhaldast í vinnuløn v.m.

Viðv. a.
Heimilað verður at hækka avsetingina í rakstrargrunn úr 400.000 kr til 500.000 kr.

Viðv. b.
Byrjunarupphæddin hækkar sambært lógaruppskotið við 200 kr. fyri allar bólkar av skattaborgarum, soleiðis at persónfrádrátturin nú er sum víst niðanfyri:

	Persónsfrádráttur
Leysir persónar	4.200 kr.
Leysir persónar, ið eru yvir 67 ár ella fáa avlamis-, einkju- ella fólkapensjón	6.700 —
Hjún, har konan er samskattað við manninum	6.700 —
Hjún, har konan er sett í skatt fyri seg og annað teirra ella bæði eru yvir 67 ár ella fáa avlamis- og/ella fólkapensjón	3.700 —

Reglan um, at byrjunarupphæddin stendur við til eina inntoku uppá 20.000 kr. hjá tí einstaka skattgjaldaranum fyri so at minka við 2% av inntokuni omanfyri 20.000 kr. er óbroytt fyri nevndu bólkar av skattaborgarum.

Fyri serskattað hjún, frásæð omanfyri nevndu, verður persónsfrádrátturin nú 4.200 kr. lækkaður við 7,5% av inntokuni, tá henda fyri hvonn ikki er yvir 20.000 kr. Er inntøkan omanfyri 20.000 kr. lækkar persónsfrádrátturin við 3% av munninum millum inntøkuna og 20.000 kr.

Endamálið við teimum uppskotnu reglunum fyri serskattað hjún er at fáa storri javnvág millum skattin hjá samskattaðum hjúnum og serskattaðum hjúnum, har talan er um eina lítla inntoku hjá øðrum.

Viðv. c.

Tann landsskattatalva, sum her er skotin upp, ber í sær, at báðir inntokubólkarnir eru broyttir, samstundis sum procentupphæddirnar eru hækkaðar.

Tey lægstu prosentini 20 og 26 eru tó óbroytt, men inntøkubólkarnir broyttir, soleiðis at 20% verða tikin av inntokuni upp til 21.000 kr. (fyrr 20.000 kr.) og 26% verða tikin av inntokuni 21—41.000 kr. (fyrr 20—40.000 kr.).

Prosenttølini fyri næstu inntokubólkarnar 41—200.000 kr. og 200—250.000 kr. eru hækkað við ávikavist 2% og 2,5%.

Inntokubólkurin 250—300.000 kr. hevur nú eitt landsskattaprocent uppá 42,5%, og er hetta sostatt 2,5% lægri sammett við galdandi landsskattatalvu.

Hægsta landsskattaprosent er nú 44% yvir 300.000 kr. móti fyrr 40% fyri inntøkur yvir 250.000 kr.

Skattatalvan fyri partafelog er broytt soleiðis, at nú skulu gjaldast 33% av teimum fyrstu 50.000 kr. av tí skattskyldugu inntokuni. Galdandi lóg sigur 36% av teimum fyrstu 40.000 kr., síðani verður skotið upp at broyta 42% av teimum næstu 60.000 kr. til 43% av teimum næstu 100.000 kr. og av restini 49% í staðin fyri 48%.

Mett verður, at broytingarnar í landsskattatalvuni geva eina hækking í landsskattinum uppá 29 milj. kr., tá hækkingarnar í persónsfrádráttinum eru liknar við í metingina.

Viðv. d.

Tann partur, sum sambært higartil galdandi reglum kann haldast eftir hjá einum uppihaldara, nevniliga ein triðingur av lønini, hevur í praksis vist seg ikki at vera nóg

mikið fyri at halda skattaborgarar ájour við skattinum. Skotið er upp, at avmarkingin til helmingin av inntokuni verður galdandi bæði fyri uppihaldarar eins og fyri persónar, ið ikki hava uppihaldsskyldu. Tað hevur á mangan hátt verið trupult at halda fast við skiljanina millum uppihaldarar og ikki-uppihaldarar, og tá henda sundurbýtingin av skattaborgarum nú er tikin úr skattalógini viðvikjandi álikningini, er ikki gjørligt at halda fast við skiljanina í samband við innkrevjingina av skattinum. Tað er vert at strika undir, at skattavaldið hevur heimild at krevja inn ein lægri part av vinnuløn skattgjaldarans enn lógásetta hámarkið uppá helvtina av lønini, um umstøðurnar tala fyri hesum, og hetta ikki fordar møguleikunum fyri at fáa allan skattin hjá viðkomandi goldnan.

Sum frammanfyri nevnt verða tær her uppskotnu broytingar í skattalógini mettar at geva eina hækking uppá 29 milj. kr. Tær inntøkulógir fyri landskassan, sum samstundis við hesari verða framlagdar, eru mettar at geva landskassanum tilsamans 72,5 milj. kr.

Orsøkin til at so nógv verður tikið inn í hesum umfari er, at kontoin á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1980/81 «minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna» er sett til 119 milj. kr. Tey í dag framsettu lógaruppskot um stuðul til fiskivinnuna bera í sær eina upphædd av umleið somu stødd sum inntheintað verður, og kemur henda konto í fíggjarlógaruppskotinum tí at verða 191,5 milj. kr.

Landsstýrið metir sjálvt, at tey tiltok, sum her eru gjørd inntøkum og útreiðslum viðvikjandi ganga sera langt, men vónar landsstýrið samstundis, at tey sum heild verða ein bati fyri tað føroyska samfelagshúsarhaldið. Fiskifloti okkara er hesi bæði seinastu árini komin í eina fíggjarliga trongstøðu, serliga orsakað av minkandi veiðu og veiðimøguleikum og nógv dýrkandi rakstrarútreiðslum. Samstundis við hesum er tað hent, at gjaldsjavni okkara mótvegis útheiminum hesi ár er versnaður. Tær her framsettu lógir bera uttan iva í sær eina skerjing av keypiorkuni hjá fólki, og skuldi tí við hesum fort við sær eina betran av handilsjavnvágini og harvið eisini gjaldsjavnvágini.

Landsstýrið metir framtíðarvánirnar fyri hovuðsvinnu okkara soleiðis, at framleiðsluvirði fer at hækka so munandi, at núverandi almennu gjøldini til fiskiflotan kunnu við árunum lækkast í rættiligan stóran mun.

Fortreytirnar fyri avgjalds- og skattalógum kunnu skjótt broytast í einumhvørjum samfelagi, og er so eisini hjá okkum. Hóast landsstýrið arbeiðir við at fáa fram á tingbord uppskot til eina kelduskattaskipan og umleggjan av tollgjøldunum, kann fineðan koma torvur fram, sum ger ábotur neyðugar. Her verður t.d. hugsað um hækking av barnatilskotinum. Tílíkar sosialar ábotur kunnu eisini fremjast við serlóggávu og umhugsar landsstýrið at koma við uppskoti um stuðul til fólkapensionistar sum eitt partvíst endurgjald fyri tær hækkaðu oljuútreiðslurnar í húsarhaldinum.

Tá ið fort hevur verið fram, at tær her gjordu broytingar í inntokulógunum skulu standast av, at so nógvur skattur skal standa ógoldin hjá fólki, skal landsstýrið gera vart við, at hetta hevur einki við hvørt annað at gera. Rætt er tað, at tað hevur ta seinnu tíðina gingið nakað seinni við gjaldingunum enn frammanundan, men upplýsast kann, at av skattinum í hesum skattaári pr. 31. december 1979, tá 70% av skattinum vórðu fallin til gjaldingar, vóru goldin 58%, ella ein eftirstoða uppá 12%. Lagt skal vera aftrat, at inntokan hjá stórum parti av fólki okkara fellur ójavnt gjognum árið, og kemur tí eisini ein ójavni í gjaldingina íggjognum árið. Sum beinleiðis eftirstoða kann heldur ikki tað roknast, tá fólk fara í læru o.tl., og tí fáa útsetan við gjaldingini. Tá nú verður skotið upp at hækka afturhaldsupphæddina hjá arbeiðsgevarum, og meiríáttan fæst til skattainnheintingina, metir landsstýrið, at skatturin skuldi komið inn ájavnt við árini frammanundan.

II

Uppskot
til

løgtingslóg um eykaskatt til landskassan.

§ 1. Fyri skattaárið 1980/81 verður útskrivaður eykaskattur til landskassan.

2. stk. Skyldu at svara eykaskatt hava persónar ella felog, sum eru skattskyldug í hesum skattaári sambært løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 við seinni broytingum.

3. stk. Hesin eykaskattur verður roknaður av skattskyldugu inntøkuni, soleiðis sum henda verður ásett eftir reglunum í omanfyri nevndu lóg.

4. stk. Eykaskatturin verður fyri persónligar skattgjaldarar roknaður við 3% av skattskyldugu inntokuni omanfyri 90.000 kr. Fyri hjón, har bert annar hjúnafelagin hevur skattskylduga inntoku, verður eykaskatturin tó roknaður við 3% av inntokuni omanfyri 120.000 kr. Fyri felog verður eykaskatturin 5% av inntokuni omanfyri 90.000 kr. Reglurnar í § 27, 3. stk. í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 við seinni broytingum eru ikki galdandi fyri hesa lóg.

lagtingslov om ekstraskat til landskassen.

§ 1. For skatteåret 1980/81 udskrives ekstraskat til landskassen.

Stk. 2. Pligt til at betale ekstraskat påtægges personer eller selskaber, som er skatpligtige i dette skatteår i henhold til lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 med senere ændringer.

Stk. 3. Denne ekstraskat beregnes af den skatpligtige indtægt, saledes som denne er fastsat efter reglerne i ovenfor nævnte lov.

Stk. 4. Ekstraskatten beregnes for personlige skatteydere med 3% af den skatpligtige indtægt over kr. 90.000. For ægtefæller, hvor kun den ene af ægtefællerne har skatpligtig indkomst, beregnes ekstraskatten dog med 3% af indtægten over 120.000 kr. For selskaber beregnes ekstraskatten med 5% af indtægten over kr. 90.000. Regler i § 27, stk. 3 i lagtingslov nr. 50 fra 2. juli 1963 med senere ændringer gælder for denne lov.

§ 2. Eykaskatturin verður kruvdur av gjaldstovuni og fellur til gjaldingar saman við álíknaða skattinum fyri skattaárið 1980/81 eftir løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 við seinri broytingum.

2. stk. Um upphæddin er minni enn kr. 100,00, verður einki uppkravt.

§ 3. Reglurnar um inngjalding, herundir panting, eru tær somu, sum galdandi eru fyri landsskatt.

§ 4. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2. Ekstraskatten indkræves af gjaldstovan og forfalder til betaling sammen med den pålydende skat for skatteåret 1980/81 efter lagtingslov nr. 50 fra 2. juli 1963 med senere ændringer.

Stk. 2. Såfremt beløbet er mindre end kr. 100,00, indkræves dette ikke.

§ 3. Reglerne om indbetaling, herunder udpantning, er de samme, som er gældende for landsskat.

§ 4. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tann í hesum uppskoti nevndi eykaskattur verður mettur at geva landskassanum eina inntøku uppá 8,5 milj. kr. Annars verður vístur til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 55 I: Broyting í skattalógini.

III. Uppskot

til

løgtingslóg um broytingar í innflutningsgjøldum.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.m. við seinri broytingum verða avgjøldini av niðanfyri nevndu vorum broytt soleiðis:

1. *Bensin og bensinblandingar:*

1.01 Bensin og bensinblandingar. Undantikið er bensin til flogfør	1 litur	1,33 kr.

3. *Drykkjuvørur:*

Spirituosa og spritt:

Brennivín og akvavitt:

3.05 Av 50 rúmprosent og undir	1 litur	56,00 kr.
3.06 Yvir 50 rúmprosent, men ikki yvir 70 rúmprosent	1 litur	68,00 kr.
3.07 Yvir 70 rúmprosent	1 litur	126,00 kr.

Aðrar vorur, undantikið heilt denaturerað spiritus:

3.08	Av 50 rúmprosent og undir	1 litur	56,00 kr.
3.09	Yvir 50 rúmprosent, men ikki yvir 70 rúmprosent	1 litur	68,00 kr.
3.10	Yvir 70 rúmprosent	1 litur	126,00 kr.

Øl:

3.11	Øl, sum verður innflutt úr Danmark, og sum í lög nr. 111 frá 1. apríl 1922, § 2, sbr. lög nr. 221 frá 1. mai 1923, § 1, er nevnd		
	Skattaklassi II	1 litur	1,90 kr.
	Skattaklassi I	1 litur	4,00 kr.
	Skattaklassi A	1 litur	8,00 kr.
	Skattaklassi B	1 litur	12,00 kr.

3.12 *Annað øl:*

Av 2,25 vektprosent alkohol og undir	1 litur	1,90 kr.
Yvir 2,25 vektprosent, men ikki yvir 3,70 vektprosent alkohol	1 litur	4,00 kr.
Yvir 3,70 vektprosent, men ikki yvir 4,60 vektprosent alkohol	1 litur	8,00 kr.
Yvir 4,60 vektprosent alkohol	1 litur	12,00 kr.

Mineralvatn v.m.:

3.13	Mineralvatn, limonada, citrónvatn o.t. eins og aðrar alkoholfríar drykkjuvørur (t.e. sum innihalda í mesta lagi 2,5 rúmprosent av alkoholi), sum gjørdar eru úr fruktsaft	1 litur	0,90 kr.

5. *Glasvørur:*

5.01	Glasvørur, uttan fløskur, krukkur, lampugløs, glareygugløs, glasflot og ófolierað glas í talvum ella rútum	av virðinum	30%

Viðm.: Fotografiskar glasplátur koma undir 1pnr. 4.01.

6. *Gólvtilfar o.t.:*

6.01	Linoleum, congoleum og aðrir linoleumslíkar, expanko (korkparket), gummi, eisini tilfar úr plastikk og øðrum kunstevni sum t.d. vinyl, villanyl o.l. í rullum og plátum, tó undantikið parketbretti og -stavir, stein- og leirflísar og flótandi evni til stoyping oman á gólv sum t.d. linitol	av virðinum	22%

7. *Gummi:*

7.01	Dekk, eisini ringar og slangur til bilar, motorhjólhestar, hjólhestar, traktorar o.t.	av virðinum 25%

8. *Instrument, radiotól o.a.*

8.03	Sjónvarpsmóttakarar	300 kr pr. stk. + av virðinum 40%

13. *Leir-, steintoys- og postalinsvørur* undantikið rør, múrsteinar, taksteinar, flísar o.t.:

13.01	Baðikor, vask, klosetskálir, urinalir o.t.	av virðinum 15%
13.02	Aðrar vørur	av virðinum 30%

14. *Litarevni v.m.:*

14.02	Træverja	av virðinum 10%

15. *Luktilsi og kosmetikk:*
Alt til hold-, hár- og munnrokt, óparfumerað sum parfumerað, eisini øll sløg av hondsápu í føstum og flótandi líki

15.01	Sápa, shampo, tannpasta ella -pulvur	av virðinum 25%

17. *Manufaktur:*

17.01	Gólvteppi og gólvteppitoy	av virðinum 22%
17.02	Tógv og tráður, tó ikki fiskisnori, togverk, seglgarn og sutursilki Viðm.: Spunatilfar úr náttúrsilki og kunstsilki lata toll sum av tógvi. Annað spunatilfar er tollfrítt.	av virðinum 22%
17.03	Allar aðrar manufakturvørur, herundir meturvørur, voksdúkur, trikotasja, klædnaplogg, sokkar, hosur, handskar o.l., hóast tilfarið við hesum undantokum: filt tilsett tjøru, t.d. til taklegging, isoleringsfilt, pussifilt o.t., smergillørift, nótir og fiskigørn, hessian, segl- og pressenningsdúkur, grímur og gjørðir, tvistur, tvistburturkast, vatt bandagur, brokkbind, gummisokkar, coloplastposar og tilgjordir plastikk posar Viðm.: Vørur, ið eru gjordar úr plastikki ella øðrum kunsttilfari, verða tollaðar sum manufakturvørur. Tað er eingin treyt, at vøran er bundin ella vovin.	av virðinum 22%

18.	*Matvörur:*	
18.04	Kökur, biscuit, vaflur o.a.	av virðinum 35%
18.05	Chocoláta og chocoláturvörur, lakressvörur eins matísur, sukurvörur so sum karamellur, bonbons, marcipan, bomm o.l.	1 kg 12,00 kr. + av virðinum 32%
18.06	Sukur	1 kg 0,15 kr.
	Kakao, bæði kakaobonir, kakaosmor eins væl og kakaomjøl (kakaopulvur) og kakao í blokkum ella tílíkt.	
18.16	Við sukri	1 kg 12,00 kr. + av virðinum 32%
20.	*Innbúgv:*	
20.01	Møblar og lutir til møblar, Krambúðar-, skrívstovu-, klinikk- og salónirnbúgv o.l.	av virðinum 17%
22.	*Ravmagns- og gasstól o.a.:*	
22.01	Komfýrar, bakiovnar, kókiplátur, kókarar, vaflujørn, breyðsnerkjarar, hitaovnar, vatnhitarar, kulda- og frystiskáp, vaskimaskinur, uppvaskimaskinur, rørimaskinur, bonimaskinur, dustsúgvarar, strúkijørn o.l. húshaldstól og lutir til	av virðinum 22%
22.02	Matísmaskinur, kuldadiskar, frystidiskar, djúpfrystiboksir o.l. og lutir til	av virðinum 22%
22.03	Rakimaskinur og tílík tól til hár- og rakistovur. Háfjallsólir, massagutól, varmateppir og -pútur v.m. og lutir til	av virðinum 32%
25.	*Tubbak, tubbaksvørur o.a.:*	
	Sigarir og sigarillos til innkeypspris:	
25.01	35 oyru hvor ella undir	100 stk 45,00 kr.
25.02	yvir 35 oyru, men ikki yvir 65 oyru hvar	100 stk 55,00 kr.
25.03	yvir 65 oyru, men ikki yvir 80 oyru hvor	100 stk 65,00 kr.
25.04	yvir 80 oyru hvor	100 stk. 80,00 kr.
	Sigarettir til innkeypspris:	
25.05	4,00 kr. pr. 100 stk. ella undir	100 stk. 42,00 kr.
25.06	yvir 4,00 kr., men ikki yvir 6,00 kr. pr. 100 stk.	100 stk. 44,00 kr.
25.07	yvir 6,00 kr. pr. 100 stk.	100 stk. 46,00 kr.

Roykitubbak til innkeypspris:		
25.08 6,00 kr. pr. kg ella undir	1 kg	33,00 kr.
25.09 yvir 6,00 kr. pr. kg.	1 kg	63,00 kr.
Aðrar vorur:		
25.10 Skrátubbak og snús	1 kg	33,00 kr.

Í § 10 verður gjørd fylgjandi broyting:

a. Øl	1 litur	1,25 kr.
b. Mineralvatn, límonada, citrónvatn o.l. eins og aðrar alkoholfríar drykkjuvorur (t.v.s. sum innihalda í mesta lagi 2,5 rúmprosent av alkoholi), sum gjørdar eru úr fruktsaft	1 litur	0,70 kr.

§ 2. Tær í løgtingslóg nr. 64 frá 23. august 1974 galdandi reglur um lækking av innflutningsgjaldinum orsakað av skipan av samhandlinum millum Foroya og Felagsmarknaðin umfata eisini hesa lóg.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

Ingtingslov om ændring i indførselsafgifter.

§ 1. I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter m.v. med senere ændringer ændres afgifterne af nedenforstående varer således:

1. *Benzin og benzinblandinger:*

1.01 Benzin og benzinblandinger, undtaget herfra er benzin til flyvemaskiner	1 liter	1,33 kr.

3. *Drikkevarer:*

Spirituosa og sprit:

3.05 Af 50 rumprocent og derunder	1 liter	56,00 kr.
3.06 Over 50 rumprocent, men ikke over 70 rumprocent	1 liter	68,00 kr.
3.07 Over 70 rumprocent	1 liter	126,00 kr.
Andre varer undtagen fuldstændig denatureret spiritus:		
3.08 af 50 rumprocent og derunder	1 liter	56,00 kr.
3.09 over 50 rumprocent, men ikke over 70 rumprocent	1 liter	68,00 kr.
3.10 over 70 rumprocent	1 liter	126,00 kr.

Øl:

3.11 Øl, der indføres fra Danmark, og som i lov nr. 111 af 1. april 1922, § 2, jfr. lov nr. 221 af 1. maj 1923, § 1, benævnes		
Skatteklasse II	1 liter	1,90 kr.
Skatteklasse I	1 liter	4,00 kr.
Skatteklasse A	1 liter	8,00 kr.
Skatteklasse B	1 liter	12,00 kr.

3.12 *Andet øl:*		
Af 2,25 vægtprocent alkohol og derunder	1 liter	1,90 kr.
Over 2,25 vægtprocent, men ikke over 3,70 vægtprocent alkohol	1 liter	4,00 kr.
Over 3,70 vægtprocent, men ikke over 4,60 vægtprocent alkohol	1 liter	8,00 kr.
Over 4,60 vægtprocent alkohol	1 liter	12,00 kr.

Mineralvand m.m.:

3.13 Mineralvand, lemonade, citronvand o.desl. samt andre alkoholfrie drikkevarer (d.v.s. med et indhold af højst 2,5 rumprocent alkohol), fremstillet af frugtsaft	1 liter	0,90 kr.

5. *Glasvarer:*

5.01 Glasvarer, undtagen flasker, krukker, lampeglas, brilleglas, glasbøjer, og ufolieret glas i tavler eller ruder — af værdien 30%

Anm.: Fotografiske glasplader se ihnr. 4.01.

6. *Gulvbelægning o.l.:*

6.01 Linoleum, congoleum og anden lignende linoleumserstatning, expanko (korkparket), gummi, samt plastikbelægning og andet kunststof, som f.eks. vinyl, villanyl o.l. i ruller og plader, dog undtaget parketbrædder og -stave, sten- og lerfliser og flydende stof til støbning på gulve som f.eks. linitol — af værdien 22%

7. *Gummi:*

7.01 Dæk samt ringe og slanger til automobiler, motorcykler, cykler, traktorer o.l. — af værdien 25%

8. *Instrumenter, radiomodtagere m.m.:*

8.03 Fjernsynsmodtagere — 300 kr pr. stk. + af værdien 40%

13. *Ler-, fajance- og porcelænsvarer:*

undtagen rør, mursten, tagsten, fliser o.l.:

13.01 Badekar, vaskekummer, klosetskåle, urinaler o.l. — af værdien 15%

13.02 Andre varer — af værdien 30%

14. *Farvestoffer m.m.*

14.02 Træbeskyttelsesmidler — af værdien 10%

15. *Parfumer og kosmetiske artikler:*

Herunder toiletmidler til hud-, hår- og mundpleje, uparfumeret såvel som parfumeret, samt al slags sæbe til toiletbrug såvel flydende som i håndstykker:

15.01 Sæbe, shampo, tandpasta eller -pulver — af værdien 25%

17. *Manufaktur:*

17.01 Gulvtæpper og gulvtæppestoffer — af værdien 22%

17.02 Garn og tråd, med undtagelse af fiskesnore, tovværk, sejlgarn og sutursilke — af værdien 22%

Anm.: Spindestoffer af natursilke og kunstsilke

afgiftsberigtiges som garn. Andre spindestoffer er afgiftsfrie.

17.03 Alle andre manufakturvarer, herunder metervarer, voksduge, trikotage, klædningsstykker, stromper, sokker, handsker o.l. uanset materialets art med undtagelse af: filt, impregneret med tjærestoffer, f.eks. til tagbeklædning, isoleringsfilt, pudsefilt o.lign. smergelærred, fiskenet og færdige fiskegarn, hessian, sejl- og presenningsdug, grimer og gjorder, tvist, tvistaffald, vat, bandager, brokbind, gummistromper, coloplastposer og færdiglavede plastikposer — af værdien 22%

Anm.: Varer, der består af plastik eller andre kunststoffer afgiftsberigtiges som manufakturvarer. Det er ikke en betingelse herfor, at varen er strikket eller vævet.

18. *Spisevarer:*

18.04 Kager, biscuit, vafler o.lign. — af værdien 30%

18.05 Chocolade, chocoladevarer, lakridsvarer samt konsumis, sukkervarer såsom karameller, bonbons, marcipan, bolcher o.lign. — 1 kg 12,00 kr. + af værdien 32%

18.06 Sukker — 1 kg 0,15 kr.

Kakao, såvel kakaobønner, kakaoskaller, kakaosmør som kakaomel (kakaopulver) og kakaomasse i blokke eller deslige

18.16 Med sukkerindhold — 1 kg 12,00 kr. + af værdien 32%

20. *Møbler o.l.:*

20.01 Møbler og møbeldele, butiks-, kontor-, klinik- og salonudstyr o.lign. — af værdien 17%

22. *El- og gasapparater m.v.*

22.01 Komfurer, bageovne, kogeplader, kogere, vaffeljern, brødristere, varmeovne, vandvarmere, køle- og fryseskabe, vaskemaskiner, opvaskemaskiner, røremaskiner, bonemaskiner, støvsugere, strygejern o.l. husholdningsapparater og dele til sådanne — af værdien 22%

22.03 Barbermaskiner og lignende apparater til frisør- og barberstuer, højfjeldssole, massageapparater,

varmetæpper og -puder m.m. samt dele til sådanne	af værdien	32%

25. *Tobak, tobaksvarer o.a.:*

Cigarer og cigarillos til en indkøbspris af:

25.01 35 øre pr. stk. eller derunder	100 stk.	45,00 kr.
25.02 over 35 øre, men ikke over 65 øre pr. stk.	100 stk.	55,00 kr.
25.03 over 65 øre, men ikke over 80 øre pr. stk.	100 stk.	65,00 kr.
25.04 over 80 øre pr. stk.	100 stk.	80,00 kr.

Cigaretter til indkøbspris:

25.05 4,00 kr. pr. 100 stk. eller derunder	100 stk.	42,00 kr.
25.06 over 4,00 kr., men ikke over 6,00 kr. pr. 100 stk.	100 stk.	44,00 kr.
25.07 over 6,00 kr. pr. 100 stk.	100 stk.	46,00 kr.

Røgtobak:

25.08 Røgtobak af enhver art	1 kg	83,00 kr.

Andre varer:

25.10 Skråtobak og snustobak	1 kg	33,00 kr.

I § 10 foretages følgende ændring:

a. Øl	1 liter	1,25 kr.
b. Mineralvand, limonade, citronvand o.l. samt andre alkoholfrie drikkevarer (d.v.s. med et indhold af højst 2,5 rumprocent alkohol) fremstillet af frugtsaft	1 liter	0,70 kr.

§ 2. De i lagtingslov nr. 64 af 23. august 1974 gældende regler om nedsættelse af indførselsafgifter i anledning af ordningen af samhandelen mellem Færøerne og Fællesmarkedet omfatter også denne lov.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tær í uppskotinum nevndu broytingar í ymiskum innflutningsgjoldum verða mettar at geva eina meirinntoku uppá 11 milj. kr. Annars verður víst til viðmerkingarnar í logtingsmáli nr. 55 I: Broytingar í skattalógini.

IV

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjald.

§ 1. Í § 1 í løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 verður «4%» broytt til «7%».

§ 2. Tær í løgtingslóg nr. 64 frá 23. august 1974 galdandi reglur um lækking av innflutningsgjaldinum orsakað av skipan av samhandlinum millum Føroyar og Felagsmarknaðin umfata eisini hesa lóg.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om ekstraindførselsafgifter.

§ 1. I § 1 i lagtingslov nr. 32 af 19. maj 1979 ændres «4%» til «7%».

§ 2. De i lagtingslov nr. 64 af 23. aug. 1974 gældende regler om nedsættelse af indførselsafgifter i anledning af ordningen af samhandelen mellem Færøerne og Fællesmarkedet omfatter også denne lov.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tann í uppskotinum nevnda broyting í eykainnflutningsgjaldinum úr 4% upp í 7% verður mett at geva eina meirinntøku uppá 24 milj. kr. Annars verður víst til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 55 I: Broyting í skattalógini.

1. viðgerð 26. februar. Málið varð beint í skattanevndina, sum 4. mars legði fram soljóðandi

Alit

Landsstýrið legði hetta mál fyri tingið 23. februar 1980, og við 1. viðgerð 26. februar varð tað beint í skattanevndina.

Inntøkulógirnar eru 4: Broytingar í skattalógini, Eykaskattur, Broyting í innflutningsgjøldum og Broyting í eykainnflutningsgjøldum.

Uppskotið um broytingar í skattalógini umfatar bæði feløg og einstaklingar. Skotið verður upp, at feløg, sum áður hava havt loyvi at seta upp til 400.000 kr. í rakstrargrunn, skulu í framtíðini hava loyvi at seta 500.000 kr. í rakstrargrunn. Skattaprosentini fyri feløgini verða broytt soleiðis:

Núverandi skipan: 36% verða goldin í landsskatti og kommunuskatti tilsamans av skattskyldugari inntøku upp til 40.000 kr., 42% av teimum næstu 60.000 kr. og 48% av restini.

Uppskot: 33% verða goldin av skattskyldugari inntøku upp til 50.000 kr., 43% av teimum næstu 100.000 kr. og 49% av restini.

Fyri einstaklingar eru bæði skattaprosentini og persónsfrádrátturin broyttur. Broytingarnar í skattaprosentunum eru:

Av skattskyldugari inntoku upp til 21.000 kr. verða eftir uppskotinum goldin 20% í landsskatti (núverandi skipan: 20% av 20.000 kr.), av inntoku millum 21.000 kr. og 41.000 kr. 26% (núverandi: 26% millum 20.000 kr. og 40.000 kr.), av inntoku millum 41.000 kr. og 200.000 kr. 33% (núverandi 31% av inntoku millum 40.000 kr. og 200.000 kr.), av inntoku millum 200.000 og 250.000 kr. 40,5% (núverandi: 38%), av inntoku millum 250.000 og 300.000 kr. 42,5% (núverandi: 40%) og av inntoku yvir 300.000 kr. 44% (núverandi: 40%).

Samstundis verður persónsfrádrátturin, sum verður drigin frá í útroknaða skattinum, hækkaður við 200 kr. fyri allar bólkar. Hetta forir við sær, at inntøkur upp til 65 — 70.000 kr. fáa ikki meira skatt eftir uppskotinum, meðan inntøkur omanfyri fáa skattahækking. Viðlagt er eitt yvirlit frá líkningarráðnum, sum vísir skattabroytingina fyri stakar persónar og samskattað hjún. Av hesum sæst, at ein inntøka uppá 40.000 kr. fær 428 kr. minni í skatti enn eftir galdandi skipan, ein inntøka uppá 100.000 kr. fær 580 kr. meira og ein inntøka uppá 150.000 kr. fær 1580 kr. meira um árið.

Landsstýrið skjýtur eisini upp at hækka markið fyri tann partin av inntokuni hjá skattgjaldara, sum skattavaldið kann halda eftir hjá arbeiðsgevaranum. Hámarkið hevur higartil verið tríðing fyri uppihaldara, men hetta er ov lítið til at halda skattgjaldaran ájour í summum forum. Skotið verður tí upp at hækka heimildina til 50% av lønini hjá støkum og hjúnum.

Í uppskotinum er somuleiðis ein broyting fyri serskattað hjún við tí endamáli at fáa betri javnvág millum skattin hjá samskattaðum og serskattaðum hjúnum. Eftir galdandi lóg er tað so, at í teimum forum, tá annar hjúnafelagin hevur heilt lítla inntøku og hin eina meðalinntøku, fáa tey serskattaðu hjúnini væl meira í skatti enn samskattað hjún við sonn inntøku. Viðlagt er eitt yvirlit frá líkningarráðnum, sum vísir skattin eftir uppskotinum í hesum forum.

Annað inntokulógaruppskotið er um eykaskatt fyri skattaárið 1980/81. Eykaskatturin verður eftir uppskotinum 3% av inntokuni, sum liggur omanfyri 90.000 kr., tó hjá samskattaðum hjúnum 3% av inntøku omanfyri 120.000 kr. Reglurnar í skattalógini um, at ongin skal gjalda meira enn 50% av inntokuni í skatti, er ikki galdandi fyri eykaskattin, sum bert er fyri eitt ár. Felog skulu eftir uppskotinum rinda 5% í eykaskatti av inntoku omanfyri 90.000 kr.

Tríðja inntøkulógaruppskot landsstýrisins er um broytingar í punktgjoldunum (tollgjøldum). Skotið verður upp at hækka gjoldini fyri bensin, drykkjuvatur, glasvørur, gólvtilfar, gummi, instrument, radiotól, leir-, steintoys- og postulinsvørur, litarevni, luktilsi og kosmetikk, manufaktur, kokur, sjokulátu o.l., innbúgv, ravmagns- og gasstól og tubbak. Í flestu forum verða gjoldini hækkað við 2%.

Fjórða inntøkulógaruppskotið er um hækking av eykainnflutningsgjaldinum, sum umfatar allar vørur uttan innflutt skip yvir 20 br. reg. tons. Skotið verður upp at hækka hetta gjald við 3% til 7%.

Landsstýrið metir eykainntøkur landskassans av hesum 4 uppskotum soleiðis:

Broytt skattalóg	29	milj. kr.
Eykaskattur	8,5	milj. kr.
Punktgjold	11	milj. kr.
Eykainnflutningsgjald	24	milj. kr.
Tilsamans	72,5	milj. kr.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jóna Henriksen, Jógvan Sundstein og Finnbogi Isaksen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Eli Nolsoe og Ivan Johannesen) setur onki uppskot fram, men vísir til viðmerkingarnar í lógtingsmáli nr. 59/1979: Rakstrarstudningur, manningarstudningur, minstalon og minstiforvinningur.

Ein samd nevnd setur fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar

1. Lógtingið heitir á landsstýrið um í hesi tingsetu at leggja fram uppskot um hækkaðan barnafrádrátt.
2. Lógtingið heitir á landsstýrið um í hesi tingsetu at leggja fram uppskot um oljustudning til pensjonistar, sum hava egið húsarhald.
3. Lógtingið heitir á landsstýrið um at fremja lógina um gjald av ferðaseðlum.
4. Lógtingið heitir á landsstýrið um í hesi tingsetu at leggja fram uppskot um gjald av innfluttum lesnaði.
5. Lógtingið heitir á landsstýrið um í hesi tingsetu at leggja fram uppskot um skattalætta fyri lægri inntøkur sum endurgjald fyri vorudýrking, ið er orsakað av hækkaðum innfluttningsgjoldum.
6. Lógtingið heitir á landsstýrið um í hesi tingsetu at leggja fram uppskot um fastari reglur fyri ferðing og bilnýtslu hjá skattgjaldarum, sum ferðast og nýta bil bæði privat og vinnuliga.

Brutto inntoka	Skattskyldug inntoka	Koda 01			Koda 06		
		Núgaldandi skipan	Samb. uppsk.	Munur	Núgaldandi skipan	Samb. uppsk	Munur
40.000	36.000 — 35.400	4.480	4.052	+ 428	1.980	1.552	+ 428
60.000	56.000 — 55.400	10.880	10.660	+ 220	8.380	8.160	+ 220
80.000	76.000 — 75.400	17.480	17.660	- 180	14.980	15.160	- 180
90.000	86.000 — 85.400	20.780	21.160	+ 380	18.280	18.660	- 380
100.000	96.000 — 95.400	24.080	24.660	+ 580	21.580	22.160	- 580
110.000	106.000 — 105.400	27.380	28.160	+ 780	24.880	25.660	- 780
120.000	116.000 — 115.400	30.680	31.660	+ 980	28.180	29.160	- 980
150.000	146.000 — 145.400	40.580	42.160	+ 1.580	38.080	39.660	- 1.580
200.000	196.000 — 195.400	57.080	59.660	+ 2.580	54.580	57.160	- 2.580

Landsskattur + 15% kommunuskattur hjá konu.

Kona brutto	Kona skatt	Maður brutto	Maður laskt.	Tils.
0	0	80.000	15.160	15.160
100	+4.200	80.000	19.714	15.514
3.000	+3.975	80.000	19.714	15.739
10.000	+2.400	80.000	19.714	17.314

6. mars legði Adolf V. Hansen, lögtingsmaður vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Í landsstýrisins uppskoti verður § 1 7) orðað soleiðis:

«§ 27, 2. stk. verður orðað soleiðis:

«Tey í § 14, nr. 5 nevndu felag v.m. lata skatt til landskassa og kommunu við tilsamans 35% av teimum fyrstu 50.000 kr. í skattskyldugari inntoku, 45% av teimum næstu 100.000 kr. og 60% av restini. Hesin skattur verður býttur við 40% sum kommunuskattur og 60% sum landsskattur.»»

og 8) verður orðað soleiðis:

«§ 83, 2. stk. verður orðað soleiðis:

«Tó er ongantíð loyvt at halda eftir meira enn helming av vinnulon skattgjaldarans v.m.»»

2. og 3. viðgerð 6. mars 1980.

I landsstyrets forslag affattes § 1 7) således:

«§ 27, stk. 2 affattes således:

«De i § 14, nr. 5 nævnte selskaber betaler skat til landskassen og kommunen med ialt 35% af de første 50.000 kr. i skattepligtig indtægt, 45% af de næste 100.000 kr. og 60% af resten. Denne skat fordeles med 40% som kommuneskat og 60% som landsskatt.»»

og 8) affattes således:

«§ 83, stk. 2 affattes således:

«Dog er aldrig tilladt at tilbageholde mere end halvdelen af skatteyderens løn m.v.»»

I. § 1 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 20—0. § 2 uttan atkvoðugreiðslu. Broytingaruppskot frá Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum til § 1 fall við 2—0.
II. §§ 1—3 í landsstýrisins uppskoti samtyktar við 20—0. § 4 uttan atkvoðugreiðslu.
III. §§ 1 og 2 í landsstýrisins uppskoti samtyktar við 20—0. § 3 uttan atkvoðugr.
IV. §§ 1 og 2 í landsstýrisins uppskoti samtyktar við 20—0. Uppskotið til samtyktar frá samdari skattanevnd samtykt við 30—0.

Lógirnar endaliga samtyktar við 20—0.

F.L. j. nr. 430-12-36. Lógirnar nr. 16, 17, 18 og 19 frá 7. mars 1980.

56. Broyting í løgtingslóg um prístal

Ár 1980, leygardagin 23. februar legði Dánjal P. Danielsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um prístal.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 30 frá 21. mai 1975 um prístal verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verður «juli 1975 = 100» broytt: «januar 1980 = 100».
2) Í § 4 verður skoytt uppí sum nýtt «*3. stk.* Frá teimum útvegaðu smásøluprísunum dregur nevndin so vítt gjørligt frá hækkingar í innflutningsgjoldum, framleiðslugjoldum og øðrum gjoldum til landskassan, ið aftaná 1. januar 1980 verða lagdar á vørurnar v.m. Nevndin avger eisini, nær frádráttur skal gerast.»

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændringer i lagtingslov om pristal.

§ 1. I lagtingslov nr. 30 af 31. maj 1975 om pristal foretages følgende ændringer:

1) I § 1 ændres «juli 1975 = 100» til: «januar 1980 = 100».
2) I § 4 tilføjes som nyt «*Stk. 3* Fra de indsamlede detailpriser fradrager udvalget så vidt muligt forhøjelser af indførselsafgifter, fremstillingsafgifter og andre afgifter til landskassen, der efter 1. januar 1980 pålægges varerne m.v. Udvalget afgør også, hvornår fradraget skal ske.»

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg nr. 30 frá 21. mai 1975 varð prístalsgrundarlagið, ið staðið hevði við síðani 1939, tá vit fingu fyrsta føroyska prístal, broytt, og nýtt prístalsgrundarlag sett í gildi 1. juli 1975 við talinum 100.

Veksturin frá 1. juli 1975 til 1. januar 1980 er 44.8 stig og prístalið sostatt 144.8.

Fyri at geva eina rættari mynd av prísvokstrinum, verður tað mett at vera rætt, at føroyska prístalið eins og tað er í øðrum londum, við ikki alt ov longum millumbili verður flutt aftur til 100 og verður tað gjort við hesum lógaruppskoti.

Eftir uppskotinum skulu tollur, innflutnings- og framleiðslugjold til landskassan, ikki longur roknast við, men eins og beinleiðis skattur er tað frammanundan, verða bildin uttan fyri prístalið, og er hetta tað, ið eisini er vanligt í øðrum londum t.d. í Danmark.

Eftir galdandi lóg, verður fyri hvorja ferð prístalið hækkar við tveimum fullum stigum omanfyri 100, lønin hjá tímaløntum hækkað við 60 øyrum um timan og mánaðarlønin við 105 kr. og verður hetta óbroytt.

Endurgjald fyri frestandi 2.8 stig pr. 1. januar 1980 verður givið við aðrari lög.

1. viðgerð 26. februar. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 4. mars legði fram soljóðandi

Á lit

Málið var hin 23. februar 1980 saman við tingmáli nr. 57: Prístalsviðgerð av lønum, lagt fyri tingið av landsstýrinum. Við 1. viðgerð 26. februar 1980 vórðu málini beind í sosialu nevndina.

Uppskotini eru partur av samlaðu loysnini hjá landsstýrinum viðvíkjandi fíggjarligu kreppuni hjá fiskivinnuni og harvið samfelagnum sum heild.

Endamálið við prístalsuppskotunum er at byrgja fyri ov skjótum kostnaðarokingum í samfelagnum, sum skapa trupulleikar fyri vinnuna og eisini okja almennu útreiðslurnar og samlaða forbrúkið.

Broytingarnar bera við sær, at hækkingar í innflutningsgjoldum, framleiðslugjoldum og øðrum gjoldum til landskassan, ið aftaná 1. januar verða lagdar á vørurnar, verða drignar frá smásoluprísinum.

Prístalið verður síðani sett til 100 frá 1. januar 1980, tó soleiðis at endurgjald verður givið, fyri frestandi 2,8 stig á gamla prístalinum pr. 1. januar 1980.

Framyvir verður, fyri hvørja ferð prístalið hækkar við trimum fullum stigum omanfyri 100, lønin hjá tímalontum hækkað við 60 øyrum um tíman og mánaðarlønin við 105 kr. eins og áður. Av tí at prístalið verður afturstillað, skal tó storri príshækking enn áður til at útvega 3 stig.

Sambært eina útrokning frá hagdeildini sæst, at um príshækkanin í 1980 kemur at vera 15%, so vildi óbroytt prístalsskipan givið eina lonarhækking uppá kr. 6.209
Við teimum uppskotnu broytingunum verður lonarhækkingin kr. 3.621

ella kr. 2.588

minni. Hesar stava kr. 931 frá, at gjoldini ikki verða roknað við í prístalið, meðan kr. 1.657 stava frá afturflytanini av prístalinum.

Útrokningin, sum eisini umfatar broytingar í skattingini, er hjálogd sum skjal.

Sosiala nevndin hevur fingið mótmælisskriv viðvíkjandi prístalsbroytingini frá Arbeiðskvinnu- og Arbeiðsmannafelagunum í Suðuroy, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, S & K og Starvsmannafelagnum. Somu felog eins og Føroya Handverkarafelag og Tænastumannafelagið hava verið á fundi við nevndini. Á hesum fundum førdu felogini fram sini sjónarmið og mæltu frá at broyta lógina.

Eins og at tálma lonarvoksturin er eisini ætlanin at tálma inntokuvoksturin hjá øðrum samfelagsbólkum. Tí eigur landsstýrið beinanvegin at taka stig til betran av

vinningseftirliti og priseftirliti. Hetta verður millum annað at gera við betran av arbeiðsmoguleikunum hjá Prísráðnum.

Undir viðgerðini hevur sosiala nevndin býtt seg í tríggjar minniluta. Minniluti (Jógvan Sundstein og Jona Henriksen) mælir til at samtykkja bæði lógaruppskotini frá landsstýrinum. Tó skjýtur minniluti upp eina lítla broyting í máli nr. 56/1979 soleiðis:

Broytingaruppskot
til
uppskot um broyting í lagtingslóg um prístal.

Í § 1, 2) 3. stk. ganga orðini «so vítt gjørligt» út.	I § 1, 2) stk. 3 udgår ordene «så vidt muligt».

Ein annar minniluti (Eli Nolsoe og Flemming Mikkelsen) setur onki uppskot fram, men tekur stoðu í tingsalinum.

Ein triði minniluti (Karin Kjølbro) tekur ikki undir við uppskotinum, tí tað bert rámar lonmottakarar og serliga tey lágloutu og pensjónistar, og mælir til at verandi prístalslóg verður óbroytt.

6. mars varð lagt fram

Uppskoytisálit

Minniluti (Jógvan Sundstein og Jona Henriksen) vísir á, at landsstýrið á fundi við lontakarafelagini hevur greitt frá ætlanunum um at effektivisera prísansanina og seta fleiri prísansarar.

Eisini vísti landsstýrið á moguleikarnar í galdandi prislóg fyri at seta í verk tíðaravmarkaðan prís- og vinningssteðg.

Vist varð eisini á moguleikan fyri at fáa í lag samvinnu millum lontakara- og handilsfelagini, prísráðið og landsstýrið um fastar reglur fyri prís- og vinningsansanina.

Út frá hesum setir minniluti fram fylgjandi

Uppskot
til
samtyktar

1. Landsstýrið setir í samráð við prísráðið neyðugt eftirlitsfólk.
2. Landsstýrinum verður álagt at fáa í lag samvinnu millum vinnufelagini, prísráðið og landsstýrið um prís- og vinningsansingina.
3. Álagt verður landsstýrinum at mæla prísráðnum til at seta í verk vinningssteðg í tíðarskeiðinum 1. april til 31. december 1980.

SKJAL FRÁ HAGDEILDINI

BROYTINGAR Í PRÍSTALINUM

Leysliga mett verða 16,56% av vektgrundarlagnum í brúkaraprístalinum merkt av teimum broyttu punktgjoldunum.

Hetta merkir, at ein prísvokstur á hesum vørum uppá 1% hevur somu ávirkan á prístalið, sum ein miðalprísvøkstur á øllum vørum í prístalinum uppá 0,1656%.

Prísvoksturin á vørum, sum verða merktar av punktgjoldum, verður mettur til 2,4%. Hetta svarar soleiðis til ein miðalprísvokstur uppá 0,4%.

1. Eykainnflutningsgjaldið uppá 3% gevur ein prísvokstur uppá 2% (hetta er ikki eftirroknað á Hagdeildini).
2. Broyting í punktgjoldunum (tollur) gevur ein prísvokstur uppá 0,4%. Innflutningsgjeldini geva sostatt ein samlaðan prísvøkstur uppá 2,4%.

3. Broytingarnar í prístalinum frá 1.10. 1975 til 1.1. 1980 hava verið hesar:

Tíðarskeið	Prístal	Prístals-broyting	Broyting í meðal
1.10. 1975	101,3	6,8%	
1.10. 1976	108,2	6,7%	6,7%
1.10. 1977	115,4	6,6%	
1.10. 1978	123,0	14,1%	
1.10. 1979	140,4		
jan. 1979	123,9	16,8%	
jan. 1980	144,8	15 %	
jan. 1981	166,5		

Mett verður, at prísvoksturin í 1980 verður væl hægri enn árini 1975, 1976, 1977 og 1978, men nakað lægri enn í 1979, t.v.s. at her verður roknað við einum prísvøkstri uppá 15%.

4. Við hesum príshækkingum gevur óbroytt grundarlag prístal jan. 1981: 144,8 × 1,150 = 166,5.

4.2. Óbroytt prístalsgrundarlag, tó uttan innflutningsgjold og toll, gevur prístal 1. jan. 1981: 163,0.

4.3 Nýtt prístalsgrundarlag, t.v.s. at tollur og avgjald verða ikki roknað við, og prístalið sett til 100, gevur prístal 1. jan. 1981: 112,6.

Prístalsviðbótin fyri hvørji 3 stig er 1.260,— kr. Aftrat hesum kemur frítíðarløn við 9,5%. Tann samlaða prístalsviðbótin er:

1.260 kr. × 1.095 = 1.379,70 kr., ella 114,98 kr. pr. mánað.

Brutto inntoka	Skattskyldug inntoka	Koda 01			Koda 06		
		Núgaldandi skipan	Samb. uppsk.	Munur	Núgaldandi skipan	Samb. uppsk	Munur
40.000	36.000 - 35.400	4.480	4.052	+ 428	1.980	1.552	+ 428
60.000	56.000 — 55.400	10.880	10.660	+ 220	8.380	8.160	+ 220
80.000	76.000 — 75.400	17.480	17.660	+ 180	14.980	15.160	+ 180
90.000	86.000 - 85.400	20.780	21.160	+ 380	18.280	18.660	+ 380
100.000	96.000 - - 95.400	24.080	24.660	+ 580	21.580	22.160	+ 580
110.000	106.000 — 105.400	27.380	28.160	+ 780	24.880	25.660	+ 780
120.000	116.000 — 115.400	30.680	31.660	+ 980	28.180	29.160	+ 980
150.000	146.000 - 145.400	40.580	42.160	+ 1.580	38.080	39.660	+ 1.580
200.000	196.000 — 195.400	57.080	59.660	+ 2.580	54.580	57.160	+ 2.580

5.1. Prístalsviðbótin óbroytt:

Prístalið vekstur tá 166,5 stig ÷ 144,8 stig = 21,7 stig, tað er 1,8 viðb. pr. ársfjórðing.

Samlað prísviðbót ..... 6.208,92 kr.

5.2 Prístalsviðbótin, tá tolturin og avgjoldini ikki verða roknað uppí:

Prístalið vekstur tá 163 stig ÷ 144,8 stig = 18,2 stig, tað er 1,53 viðb. pr. ársfjórðing.

Viðboturnar fyri árið gova tá ..... 5.277,58 kr.

5.3. Prísviðboturnar eftir tí uppskoti, sum landsstýrið hevur lagt fram:

Prístalið vekstur tá 112,6 stig ÷ 100 stig = 12,6 stig, tað er 1,05 viðb. pr. ársfjórðing.

Viðboturnar verða tá tilsamans ..... 3.621,70 kr.

6.1. Tað, at innflutningsgjald og tollur verða tikin úr prístalinum, gevur eitt minni endurgjald:

6.208,92 kr. ÷ 5.277,58 kr. = 931,34 kr.

6.2. Samlaða minkingin eftir uppskotinum, t.v.s. at tollur og innflutningsgjold verða ikki roknað við, og prístalið verður sett aftur til 100, verður:

6.208,92 kr. ÷ 3.621,87 kr. = 2.587,05 kr.

7. Í talvuni niðanfyri er sett upp, hvussu broytingin sær út av at broyta prístalið, soleiðis sum landsstýrið hevur skotið upp, og við tí meirskutti (bæði broyting í skattastiganum og cykaskattur), sum eisini er skotin upp:

Inntøka	Skattabækking	Prisviðbót lækking	Brøyting	%
45.600 (48.187)	+ 310	2.587	+ 2.277	+ 5,0 (+ 4,7)
61.100 (63.687)	0	2.587	+ 2.587	+ 4,2 (+ 4,1)
64.600 (67.187)	+ 70	2.587	+ 2.657	+ 4,1 (+ 4,0)
84.600 (87.187)	+ 470	2.587	+ 3.057	+ 3,6 (+ 3,5)
104.600 (107.187)	+ 870	2.587	+ 3.457	+ 3,3 (+ 3,2)
124.600 (127.187)	+ 1.270	2.587	+ 3.857	+ 3,1 (+ 3,0)
144.600 (147.187)	+ 2.270	2.587	+ 4.857	+ 3,4 (+ 3,3)
164.600 (167.187)	+ 3.270	2.587	+ 5.857	+ 3,6 (+ 3,5)
184.600 (187.187)	+ 4.270	2.587	+ 6.857	+ 3,7 (+ 3,7)

VIÐBØTUR í 1979 í KR. OG % AV LØNINI

Viðbøtur pr. 1/1 - 1979:
0 viðbót á 105 kr. í 12 mánaðir ella kr. ..... 0 f. árið

Viðbøtur pr. 1/4 - 1979:
2 viðbøtur á 105 kr. í 9 mánaðir ella kr. ..... 1890 f. árið

Viðbøtur pr. 1/7 - 1979:
1 viðbót á 105 kr. í 6 mánaðir ella kr. ..... 630 f. árið

Viðbøtur pr. 1/10 - 1979:
3 viðbøtur á 105 kr. í 3 mánaðir ella kr. ..... 945 f. árið

Tilsamans fyri árið ..... 3465 f. árið

Niðanfyri er sett upp, hvat teir ymisku inntokubólkarnir fingu í prísviðbótum í 1979 í kr. og í % av lønini:

Inntøka	Viðbøtur í kr.	í % av inntøkuni
70.000	3.465	5,0
80.000	3.465	4,3
90.000	3.465	3,9
100.000	3.465	3,5
110.000	3.465	3,2
120.000	3.465	2,9
130.000	3.465	2,7
140.000	3.465	2,5
150.000	3.465	2,3

2. viðgerð 6. mars. Atkvoðugreiðslan varð hendan:

Broytingaruppskot frá Jonu Henriksen og Jógvan Sundstein til § 1 varð samtykt við 18—0. Atkvott var um § 1 í landsstýrisins uppskoti við navnakalli, og fall atkvoðugreiðslan soleiðis: 17 ja, 2 nei og 13 ikki.

Ja atkvoddu: Signar Hansen, Poul J. Olsen, Haldur Hansen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Andrias Petur Jacobsen, Hanna Lisberg, Jona Henriksen, Finnbogi Isaksen, Hans Marius Joensen, Edmund í Garði, Jógvan Sundstein, Øssur D. Jacobsen, Eyðun Videro, Håkun Djurhuus, Óli Breckmann og Hilmar Beck.

Nei atkvoddu: Juul Jacobsen og Adolf Hansen.

Atkvoddu ikki: Ivan Johannesen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Eli Nolsøe, Ingrid Sondum, Karin Kjølbro, Jógvan Durhuus, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Margeir Toftegaard, Jógvan Olsen, Agnar Nielsen og Pauli Ellefsen.

3. viðgerð 6. mars. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 17—0.

F.L. j. nr. 1111-4. Lóg nr. 20 frá 7. mars 1980.

---

57. Prístalsviðgerð av lønum

Ár 1980, leygardagin 23. februar legði Dánjal Pauli Danielsen, landsstýrismaðmr vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um prístalsviðgerð av arbeiðsløn.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 36 frá 21. mai 1975 um prístalsviðgerð av arbeiðsløn verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 ganga út orðini: «tann pr. 30. september 1975».
2) Í § 1 verður sett sum nýtt 2. stk.: «Sum endurgjald fyri avlopsstig eftir gamla prístalinum verður frá 1. apríl 1980 at rokna veitt eykaviðbót til tímalønir uppá 56 oyru um tíman.»

lagtingslov om ændring i lagtingslov om pristalsbehandling af arbejdslønninger.

§ 1. I lagtingslov nr. 36 af 21 maj 1975 om pristalsbehandling af arbejdslønninger foretages følgende ændringer:

1) I § 1 udgår ordene: «den pr. 30. september 1975».
2) I § 1 tilføjes som nyt stk. 2: «som kompensation for overskydende points efter det gamle pristal ydes fra 1. april 1980 et tillæg til timelønninger på 56 øre pr. time.»

3) Sum nýggj § 2 verður sett:
«Sum endurgjald fyri avlopsstig eftir gamla prístalinum verður frá 1. april 1980 at rokna veitt viðbót uppá kr. 98,- um mánaðin til tær mánaðarlønir sum eftir lóg, sáttmála ella avtalu verða prístalsviðgjørdar við 105 kr. um mánaðin ella 1.260 kr. árliga fyri hvørji 3 stig, prístalið er omanfyri 100.»

4) Í fylgjandi lógum ganga út orðini «pr. 30. september».

a) løgtingslóg um tænastumannalønir, sum broytt við løgtingslóg nr. 40 frá 21. mai 1975,
b) løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna, sum broytt við løgtingslóg nr. 41 frá 21. mai 1975,
c) løgtingslóg um samsýning landsstýrismanna, sum broytt við løgtingslóg nr. 26 frá 21. mai 1975.

5) Núverandi § 2 verður § 3.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi 1. april 1980.

3) Som ny § 2 indsættes:
«Som kompensation for overskydende points efter det gamle pristal ydes fra 1. april 1980 at regne et tillæg på 98 kr. pr. måned til de månedslønninger, som efter lov, overenskomst eller aftale pristalsreguleres med 105 kr. om måneden eller 1.260 kr. årlig for hver 3 points udsving i pristallet ud over 100.»

4) I følgende love udgår ordene «pr. 30. september 1975».

a) lagtingslov om tjenestemandslønninger, som ændret ved lagtingslov nr. 40 af 21. maj 1975,
b) lagtingslov om vederlag til lagtingsmænd, som ændret ved lagtingslov nr. 41 af 21. maj 1975,
c) lagtingslov om vederlag til landsstyresmænd, som ændret ved lagtingslov nr. 26 af 21. maj 1975.

5) Nuværende § 2 bliver § 3.

§ 2. Denne lov træder i kraft 1. april 1980.

Viðmerkingar:

Í øðrum tingmáli er skotið upp at føra prístalið aftur til 100 pr. 1. januar 1980. Prístalið er eftir higartil galdandi skipan 144,8 pr. 1. januar 1980. Dýrtíðarviðgerð av lønum er farin fram fyri hvørji full 3 stig. Dýrtíðarviðgerðin pr. 1. januar 1980 svarar til 142 stig, t.v.s. at 2,8 stig leypa av. Tímalønin og mánaðalønin verða dýrtíðarviðgjørdar við ávikavist 60 oyrum um tímin og 105 kr. um mánaðin fyri hvørji full 3 stig, og svara nevndu avlopsstig til 56 oyru hjá tímaløntum og 98 kr. hjá mánaðalønum, sum landsstýrið skjýtur upp, at tey fáa endurgjald fyri.

1. viðgerð 26. februar. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 4. mars legði fram soljóðandi

Á lit

Málið varð hin 23. februar 1980 lagt fram av landsstýrinum og við 1. viðgerð 26. februar 1980 beint í sosialu nevndina.

Nevndin hevur viðgjort málið saman við tingmáli nr. 56/1979 og vísir til álitið í hesum máli.

2. og 3. viðgerð 6. mars. Málið endaliga samtykt við 20—0 atkvoðum.

F.L. j. nr. 1300-6-3. Lóg. nr. 21 frá 7. mars 1980.

---

58. Avgjald av laksaveiðu

Ár 1980, leygardagin 23. februar legði Heðin Klein, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um avgjald á laksi, veiddum á landleiðini.

§ 1. Øll skip, sum fáa undantaksloyvi til laksaveiðu á landleiðini, skulu rinda landskassanum avgjald svarandi til 1 kr./kg av innvigaðari vekt.
2. stk. Nærri reglur um rindan av gjaldi v.m. er landsstýrinum heimilað at áseta í veiðuloyvi til viðkomandi skip.
3. stk. Peningur, ið fæst til vega sambært hesi lóg, verður at nýta til aling og úlseting av sjóbúnum laksi.

§ 2. Henda lóg fær gildi fyri allar uppskipingar aftaná 1. januar 1980.

lagtingslov om afgift af laks, fisket på fiskeriterritoriet.

§ 1. Det påhviler alle skibe, der har dispensation til laksefiskeri på fiskeriterritoriet en afgift til landskassen på 1 kr./kg indvejet vægt.
Stk. 2. Nærmere bestemmelser om afgiftens betaling m.v. er landsstyret bemyndiget til at fastsætte i fiskeritilladelsen til vedkommende skib.
Stk. 3. Indtægterne i henhold til denne lov anvendes til opdræt og udsætning af smolt.

§ 2. Denne lov har gyldighed for alle landinger efter 1. januar 1980.

Viðmerkingar:

Á vári 1968 fór fram royndarfiskiskapur eftir laksi við r/s Jens Chr. Svabo. Royndi var við flotlinu. Síðani eru á hvorjum ári gjordar royndir og kanningar av laksi undir Føroyum.

Hesar royndir gjordu, at farið varð undir at royna eftir laksi á okkara leiðum, og hava bátar verið á laksaveiðu á hvorjum ári uttan í 1971.

Úrslitið av fiskiskapinum hevur verið:

ár	bátar	tons
1968	3	3
1969	3	4
1970	4	6
1971	—	—
1972	2	8
1973	6	28
1974	5	18
1975	6	27
1976	9	40
1977	9	40
1978	8	37
1979	7	46

Í 1970 samtykti NEAFC at avmarka laksaveiðuna uttan fyri fiskimark. Frá 1971 var bert loyvt at veiða laks á víðum havi í tíðarskeiðinum 6. mai — 30. juni. Henda avmarking var galdandi, til fiskimarkið varð flutt út 1. januar 1977. Eftir hetta var eingin avmarking í laksaveiðuni í føroyskum sjógvi, til tað við kunngerð nr. 13 frá 3. apríl 1978 varð sett forboð fyri laksaveiðu. Tó kann landsstýrið eftir umsóku geva undantaksloyvi, ið alltíð skulu vera tíðaravmarkað.

Kanningar hesi seinastu 10—12 árini vísa, at leiðirnar undir Føroyum, serstakliga norðanfyri, eru góðar uppvakstrarleiðir hjá laksi. Og er hann á hesum leiðum stóran part av árinum.

Í seinnu árum er tað vorðið meira og meira vanligt, at lond gera eitt stórt arbeiði fyri at nøra um laksastovnin. Flest øll lond, sum veiða laks í sjónum, seta út sjóbúnan laks (smolt). Hetta hava eisini bæði ICES og NEAFC mælt til at gera. Nevnast kann, at tað landið á okkara leiðum, ið ger mest á hesum øki, er Svoriki. Teir seta so nógvan smolt út, at stórur partur av laksinum, ið fiskaður verður í Eystursjónum, er laksur, ið sviar hava slept. Til partvísa líggjan av hesi ítsetíng er tað vanligt, at teir, ið veiða laksin, læta eitt avgjald av veiðuni. Nevnast kann, at danskir bátar í 1979 lótu 50 øyru fyri kilo av laksi, ið veiddur varð (eisini undir Føroyum), til danska fiskimálaráðið. Peningurin verður brúktur til aling av smolti í Danmark. Danir høvdu í 1979 eina laksakvotu í svenskum sjógvi uppá 450 tons. Fyri hesa kvotu skuldi danski staturin gjalda 2 milj. kr.

Spurningurin um, nær best er at veiða laksin, hevur ofta verið frammi. Flestu lond eru sand um, at mest fæst burtur úr laksastovninum, um hann verður fiskaður á ferð heim aftur til árnar at gýta, ella tá hann fer upp í árnar, tí tá er hann stórur og feitur. Hesin háttur er ikki nýtiligur enn hjá okkum, av ti at stórur partur av tí laksi, vit veiða, fer ikki upp í føroyska árnar at gýta, men leitar burtur í onnur lond.

Nú laksaveiðan við Føroyar er í vokstri, er tað umráðandi at fara undir at ala smolt til útseting í mógv storri stíl enn higartil.

Eisini er tað neyðugt fyri at nokta torvin fyri sjóbúnum laksi til føroyskar laksalistoðir. Landsstýrið er av teirri áskoðan, at hetta eigur at verða gjort, men kostar tað sjálvsagt pening. Tí verður lógaruppskotið lagt fyri løgtingið.

Hjálagt sum skjal er uppskot um kunngerð um laksaveiðu á landleiðini.

UPPSKOT

K u n n g e r ð
um
laksaveiðu á landleiðini.

§ 1. Skip við laksaveiðuloyvi frá landsstýrinum kunnu veiða laks fram til 1. juli 1980. Tað er bert loyvt at veiða við línu.

§ 2. Laksur undir 60 cm, máldur fremst úr hovdinum til aftast á stertinum, er undirmátsfiskur. Loyvt er ikki at hava tílíkan laks um borð, men skal hann verða sleptur út aftur beinanvegin.

§ 3. Skiparin hevur skyldu at fora skipsdagbók og í hana skriva stykkjatal fyri hvonn dag sær, og hvar laksurin er veiddur. Hvonn mánadag skal hann geva Fiskivinnustovuni upplýsing um stykkjatal og vekt.
2. stk. Tá ið veiðan verður uppskipað í Føroyum, skal hon flokkast soleiðis:

Flokkur 1: yvir 9 kg
— 2: yvir 7 kg til og við 9 kg
— 3: yvir 5 kg til og við 7 kg
— 4: yvir 4 kg til og við 5 kg
— 5: yvir 3 kg til og við 4 kg
— 6: 3 kg og minni.

Skiparin sendir avrit av vektarseðlunum til Fiskivinnustovuna, beinanvegin veiðan er uppskipað.

§ 4. 1 kr./kg landað vekt verður at gjalda til landskassan (Føroya Gjaldstovu) fyri hvønn túrin sær. Avgjaldið er fallið til gjaldingar 14 dagar aftaná uppskiping.

§ 5. Vrakieftirlitið hevur eftirlit við uppskiping, flokking og avskiping og við, at reglurnar um minstamát eru fyldnar.

§ 6. Brot mót ásetanum í hesi kunngerð koma undir bót, og herafturat kann allur fiskireiðskapur, so sum línur, uppstandarar v.m. og fongur koma undir konfiskatión. Skipið kann eisini heftast til rindingar av bót og kostnað. Fiskiloyvið kann verða

tikið aftur, um forarin av skipinum er skuldsettur fyri brot móti reglunum í hesi kunngerð.

§ 7. Henda kunngerð kemur í gildi heinanvegin. Tó fær § 4, 1. punktum gildi fyri allar uppskipingar frá 1. januar 1980.

Foroya Landsstýri, februar 1980.

landsstýrismaður

I. viðgerð 17. mars. Málið beint í fiskivinnunevndina, sum 10. april legði fram soljóðandi

Alit

Málið var framlagt av landsstýrinum, og var við fyrstu viðgerð 17. mars 1980 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjort málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Hans M. Joensen, Karin Kjølbro (fyri Finnboga Isaksen), Øssur Dam Jacobsen og Eyðun Videro) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins óbroytt.

Minnilutin (Jógvan Olsen og Adolf V. Hansen) átalar uppá tað kraftigasta tað óskil, sum fer fram í landsstýrinum viðvikjandi kunngerðum. Í «14. september» fyri 21. februar 1980 og í Oyggjatíðindi fyri 21. mars 1980 hevur landsstýrið eina kunngerð um freytir fyri laksaveiðu á foroysku landleiðini.

Í § 1. 2. stk. í fyriliggjandi uppskoti biður landsstýrið tingið um heimild at gera reglur, hóast reglurnar eru settar í bløðini longu 21. februar 1980.

Minnilutin tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins við at leggja beinleiðis avgjald á tann veidda laksin, men tekur undir við, at tað eigur at verða gjort nógv meira við laksaaling enn higartil hevur verið gjort. Peningur til hetta endamál kann takast yvir fíggjarlógina, yvir stuðulslóggávuna, og moguliga av tí peningi, ið sjóverjan fær inn við sektum v.m., og sum fer í statskassan.

Út frá hesum setur minnilutin fram fylgjandi broytingaruppskot:

Uppskot
til
samtyktar

A. Tingið átalar, at landsstýrið sendir kunngerðir út, áðrenn lógin, sum skal heimilað kunngerðini, er samtykt.

B. Heitt verður á landsstýrið at kanna moguleikarnar fyri

1) at tann fíggjarligi stuðul, ið laksaveiða eigur saumbært nýliga samtyktu stuðulslóggávu,

og

2) at tann peningur, ið sjóverjan fær inn, og sum fer í statskassan, verður lagdur í grunn til laksaaling.

+ *skjal.*

SKJAL.

TREYTIR FYRI LAKSAVEIÐU Á FØROYSKU LANDLEIÐINI

1. Tað er ikki loyvt at veiða laks í tíðini frá 1. juli til 15. oktober.
2. Tað er bert loyvt at veiða laks við línu.
3. Minsta mát fyri laks er 60 cm, t.e. at laksur undir 60 cm skal sleppast út aftur helst livandi.
   NB. Tað er ikki loyvt at selja ella útflyta laks, ið er undir 60 cm.
4. Skipsdagbók verður skrivað, og talið av laksi tilskilað fyri hvønn dagin sær.
5. Veiðan, stykkjatal og vekt skal gevast upp til Fiskivinnustovuna hvønn mánadag, ella um túrurin er styttri enn 8 dagar fyri hvønn túrin sær. Skiparin sendir avrit av vektarseðlinum til Fiskivinnustovuna beinanvegin veiðan er uppskipað.
6. Avgjald uppá kr. 1,00 fyri kg. landað vekt verður at gjalda til Føroya landsstýri fyri hvønn túrin sær.
7. Vrakieftirlitið hevur eftirlit við landing, flokking og avskiping.

Flokkan:
flokkur 1. yvir 9 kg.
flokkur 2. yvir 78 kg. til og við 9 kg.
flokkur 3. yvir 5 kg. til og við 7 kg.
flokkur 4. yvir 4 kg. til og við 5 kg.
flokkur 5. yvir 3 kg. til og við 4 kg.
flokkur 6. minni enn 3 kg.

14. Sept. 21/2 - 80 og Oyggjat. 21/3 - 80.

FØROYA LANDSSTÝRI
FISKIVINNUSTOVAN

2. viðgerð 24. apríl. § 1 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 20—0, § 2 uttan atkvoðugreiðslu. Broytingaruppskot frá Adolf Hansen og Jógvan Olsen fullu bæði, pkt. A við 13—0 og pkt. B við 11—0.

3. viðgerð 28. april. Málið endaliga samtykt við 18—0.

F.L. j. nr. 453-1. Lóg nr. 68 frá 21. mai 1980.

---

59. Rakstrarstudningur, manningarstudningur, minstaløn og minstiforvinningur

Ár 1980, týsdagin 26. februar legði Pauli Ellefsen, løgtingsmaður vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um rakstrarstudning, manningarstudning, minstaløn, minstaforvinning v.m.

§ 1. Rakstrarstudningur verður veittur eigarum av føroyskum fiskifari soleiðis:

1. Trolari, sum hevur minni hovuðsmotor enn 1400 hk, og sum ikki kann fáa loyvi til ísfiska-, frysti ella saltfiskaveiðu uttanfyri føroysku landleiðina, fær 75 oyru pr. kg fyri feskfisk, veiddur uttanfyri 12 fjórðingar úr grundlinjunum og landaður í Føroyum. Trolari á fdnaðarveiðu fær sama studning fyri feskfisk sum hjáveiðu.
2. Fiskifar uppá í minsta lagi 110 brutto skrásett tons fær 75 oyru pr. kg fyri feskfisk, landaður í Føroyum. Fiskifar, garnaskip ella deksfiskifar, uppá minni enn 110 brutto skrásett tons á líru-, snoris- ella snelluveiðu fær 30 oyru pr. kg fyri feskfisk, landaður í Føroyum.

4. Fiskifar, sum hevur loyvi til at trola innanfyri 12 fjórðingar úr grundlinjunum, fær 30 oyru pr. kg fyri feskfisk, landaður í Føroyum.
5. Trolari, sum hevur størri hovuðsmotor enn 1400 hk og/ella sum hevur ella kann fáa loyvi til saltfiska-, frysti- ella ísfiskaveiðu við troli uttanfyri føroysku landleiðina, fær

lagtingslov om driftstilskud, mandskabstilskud, mindstelon, mindsteindtægt m.m.

§ 1. Driftstilskud bliver ydet ejere af færøske fiskerfartøjer saledes:

1. Trawlere, der har mindre hovedmotor end 1400 hk, og som ikke kan få tilladelse til at fiske friskfisk, frossen fisk eller saltfisk udenfor det færøske fiskeriterritorium, får 75 øre pr. kg for frisk fisk, fanget udenfor 12 sømil fra grundlinierne og landet på Færøerne. Trawlere på industrifiskeri får samme tilskud for frisk fisk som bifangst.
2. Fiskerfartøj på mindst 110 brutto reg. tons får 75 øre pr. kg for frisk fisk, landet på Færøerne.
3. Fiskerfartøj, fiskerfartøj med garn eller dækfiskerfartøj, som er mindre end 110 brutto reg. tons på line-, snore-, eller snellefiskeri får 30 øre pr. kg for frisk fisk, landet på Færøerne.
4. Fiskerfartøj, som har tilladelse til at trawle indenfor 12 sømil fra grundlinierne, får 30 øre pr. kg for frisk fisk, landet på Færøerne.
5. Trawler, som har større hovedmotor end 1400 hk og/eller som har eller kan få tilladelse til fiskeri efter saltfisk, frossenfisk eller frisk fisk med trawl udenfor det færøske fisker-

5 oyru pr. kg fyri feskfisk, landaður í Føroyum.

6. Trolari á flakaveiðu fær 50 oyru pr. kg av kílaskornum flaki uttan skræðu, annars 40 oyru, uppvigað vekt í Føroyum. Fyri veiðu, landað í aðrari havn enn føroyskari, verður latin hálvur studningur.
7. Trolari á saltfiskaveiðu og frystiskip á svartkalva og/ella heimaraveiðu fáa 50 oyru pr. kg uppvigaða vekt í Føroyum. Fyri veiðu, landað í aðrari havn enn føroyskari, verður latin hálvur studningur.
8. Fiskifari verður endurgoldin tann frítíðarløn, sum eigarin letur av minstuløn og manningarstudningum eftir § 2.

§ 2. Studningur verður veittur manningini á føroyskum fiskifari soleiðis:

1. Á trolara og á deksfiskifari við gornum fær manningin 5 oyru pr. kg fyri feskfisk, landaður í Føroyum. Hesin studningur lækkar eftir reglunum í pkt. 8.
2. Á deksfiskifari við línu ella snellu fær manningin 32 oyru pr. kg fyri feskfisk, landaður í Føroyum. Hesin studningur lækkar eftir reglunum í pkt. 8.
3. Á opnum útróðrarbáti fær manningin 45 oyru pr. kg fyri feskfisk, landaður í Føroyum. Hesin studningur lækkar eftir reglunum í pkt. 8. Hevur báturin bensinmotor, verður latin cykastudningur uppá 10 oyru pr. kg.
4. Á fiskifari undir 12 brutto skrásett tons, ið avreiðir sild ella brisling frá føroyskum firði til agn, frystingar ella saltingar fær manningin 25 oyru pr. kg av silda- ella brislingaveiðuni. Fyri hvørja ferð, avreiðingarprísurin hækkar við 10 oyrum pr. kg í meðal, lækkar studningurin við 1 oyra pr. kg. Studningurin pr. kg kann tó ikki vera hægri enn avreiðingarprísurin. Er talan um báf við bensinmotori, er studningurin 4 oyru hægri pr. kg.

territorium, får 5 øre pr. kg for frisk fisk, landet på Færøerne.

6. Trawler i filétfiskeri får 50 øre pr. kg af kileskæret filét uden skind, ellers 40 øre, opvejet vægt på Færøerne. For fangst, landet i anden havn end færøsk, ydes der halvt tilskud.
7. Trawler i fiskeri efter saltfisk eller fryseskib i fiskeri efter hellefisk og/eller sildehaj 50 øre pr. kg opvejet vægt på Færøerne. For fangst, landet i anden havn end færøsk, ydes halvt tilskud.
8. Fiskerfartøj får tilbagebetalt den fritidsløn, som ejeren bør betale af mindsteløn og mandskabstilskudet efter § 2.

§ 2. Tilskud bliver ydet mandskabet på færøskt fiskerfartøj således:

1. På trawlere og på dækfiskerfartøj med garn får mandskabet 5 øre pr. kg for frisk fisk, landet på Færøerne. Dette tilskud reduceres efter reglerne i pkt. 8.
2. På dækfiskerfartøj med line eller snelle får mandskabet 32 øre pr. kg for frisk fisk, landet på Færøerne. Dette tilskud reduceres efter reglerne i pkt. 8.
3. På åbne både får mandskabet 45 øre pr. kg for frisk fisk, landet på Færøerne. Dette tilskud reduceres efter reglerne i pkt. 8. Har båden benzinmotor, ydes der 10 øre pr. kg i ekstratilskud.
4. På fiskerfartøj under 12 brutto register tons, som indhandler sild eller brisling fra færøsk fjord til agn, frysning eller saltning, får mandskabet 25 øre pr. kg af silde- eller brislingefangsten. Hver gang indhandlingsprisen stiger med 10 øre pr. kg i middel, reduceres tilskudet med 1 øre pr. kg. Tilskudet pr. kg kan dog ikke blive højere end indhandlingsprisen. Er fiskeriet udøvet fra båd med benzinmotor, er tilskudet 4 øre højere pr. kg.

5. Á trolara á flakaveiðu fær manningin 50 oyru pr. kg av kílaskornum flaki uttan skræðu, annars 40 oyru, uppvigað vekt í Føroyum. Fyri veiðu, landað í aðrari havn enn føroyskari, verður latin hálvur studningur.

6. Á trolara á saltfiskaveiðu, á skipi við línu, garnum, snori ella snellu á saltfiskaveiðu, á frystiskipi á svartkalva- og/ella hemaraveiðu fær manningin 50 oyru pr. kg, uppvigað vekt í Føroyum. Fyri saltfisk, landaður í aðrari havn enn føroyskari, verður latin hálvur studningur.

7. Fyri feskfisk, avreiddur á plássi, har moguleiki ikki er at virka hann, og tí flutur til eitt fiskavirki á øðrum plássi, verður latin flutningsstuðningur uppá 12 oyru pr. kg. Tað er ein fyritreyt, at flutningur og viðgerð fara fram sum allarskjótast.

8. Studningurin eftir 1., 2. og 3. pkt. lækkar við einum oyra pr. kg fyri hvørji full 10 oyru pr. kg meðalavreiðingarprísurin á feskfiski landaður í Føroyum, hækkar í mun til avreiðingarprísin pr. 1. februar 1980.

§ 3. Minstalon og minstiforvinningur verða veittir manningini á føroyskum fiskifari soleiðis:

1a. Manningini á føroyskum fiskifari, um mynstrað er eftir sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og viðkomandi yrkisfelag, er tryggjað minstalon. Er eingin tilíkur sáttmáli, er treytin fyri minstalon, at mynstrað er eftir sáttmála millum viðkomandi reiðara ella skipaeigara og viðkomandi yrkisfelag. Í undantaksførum hevur landsstýrið heimild at gera frávik frá hesum reglum.

1b. Minstalonin er pr. 1. januar 1980 kr. 6.495 um mánaðin. Hvør veiðuferð verður uppgjørd fyri seg.

5. På trawlere i filétfiskeri får mandskabet 50 øre pr. kg af kileskåret filét uden skind, eller 40 øre, opvejet vægt på Færøerne. For fangst, landet i anden havn end færøsk, ydes halvt tilskud.

6. Trawlere på saltfiskfiskeri, på skibe med line, garn, snore eller snelle på saltfiskefangst, på fryseskibe i fiskeri efter hellefisk og/eller sildehaj får mandskabet 50 øre pr. kg opvejet vægt på Færøerne. For saltfisk landet i anden havn end færøsk, ydes halvt tilskud.

7. For frisk fisk, indhandlet på steder, hvor der ikke er mulighed at tilvirke denne , og derfor transporteres til fiskerianlæg på anden plads, ydes transportilskud på 12 øre pr. kg. Det er en betingelse, at transport og behandling foregår straks.

8. Tilskuddet efter 1., 2. og 3. pkt. reduceres med 1 øre pr. kg for hver hele 10 øre pr. kg middelindhandlingspris på fersk fisk, indhandlet på Færøerne, stiger i forhold til indhandlingsprisen pr. 1. februar 1980.

§ 3. Mindsteløn og mindsteindtægt bliver ydet mandskabet på færøsk fiskerfartøj således:

1a. Mandskabet på færøske fiskerfartøjer, såfremt der er monstret efter overenskomst mellem Føroya Reiðarafelag og vedkommende fagforening er sikret mindsteløn. Safremt en sådan overenskomst ikke foreligger, er betingelsen for at få mindsteløn, at der bliver monstret efter overenskomst med vedkommende rejder eller ejer af skibet og vedkommende fagforening. I særlige tilfælde har landsstyret bemyndigelse til at dispensere fra disse bestemmelser.

1b. Mindstelønnen er pr. 1. januar 1980 kr. 6.495 om måneden. Hver fisketur bliver beregnet for sig.

Minstalonin verður ikki skerd av manningarstudninginum eftir hesi lóg. Minstalonin verður hækkað við kr. 105 um mánaðin fyri hvørji 3 stig, prístalið er omanfyri 100. Fellur prístalið niður um 100, verður eingin prístalsviðgerð. Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvørm ársfjórðing eftir prístalinum tann 1. í ársfjórðinginum. Teir fiskimenn, sum eru mynstraðir fyri minni enn fullan part fáa hlutfalsligan part av fullari minstalon.

2a. Manningini á føroyskum deksfari undir 100 brutto skrásett tons á útiróðri innanfyri 100 fjórðingar úr landi í Føroyum, sum ikki er undir minstulonarskipan, er tryggjað minstiforvinningur. Minstiforvinningurin samsvarar við arbeiðsmannalon fyri 8 tímar íroknað frítíðarlon.

2c. Treyt fyri skipanini er, at fiskifarið hevur avreitt, og at manningin verður avroknað, og at fiskifarið er mannað, í báðum førum sum vanligt er á staðnum.

§ 3. Studningur eftir § 1, pkt. 1, 2, 3, 4 og 5 og eftir § 2, pkt. 1, 2 og 3 verður bert latin fyri rundan fisk, kruvdur, við hovdi, sum er blóðgaður og væl reinsaður og avreiddur í Føroyum.

§ 4. Eingin av manningini fær studning roknaðan út frá meira enn einum mansparti. Er mynstrað fyri minni enn heilan part, fær viðkomandi hlutfalsligan part. Í sjálvdráttarveiðu verður býtið at laga seg eftir teimum býtisreglum, sum nýttar eru í hesum veiðiháttí.

§ 5. Lønjavningargrunnurin setur í reglugerð nærri reglur um studningar v.m. eftir hesi lóg. Reglugerðin verður góðkend av Føroya Landsstýri.

Mindstelønnen bliver ikke reduceret af mandskabstilskudet efter denne lov. Mindstelønnen forhøjes med kr. 105 om måneden for hver 3 point, pristallet overstiger 100. Falder pristallet under 100, finder pristalsbehandling sted. Dyrtidsreguleringen finder sted hvert kvartal efter pristallet den 1. i kvartalet. De fiskere, der er påmonstret for mindre end en hel anpart, ydes mindstelønn som en forholdsmæssig del af fuld mindstelønn.

2a. Der sikres mandskab på færøsk dækfartøj under 100 brutto register tons i hjemmefiskeri indenfor 100 sømil fra land på Færøerne, hvorfremt mandskabet ikke er under mindstelønordning, en mindsteindtægt. Mindsteindtægten svarer til en arbejdsmandsløn på 8 timer iberegnet feriepenge.

2c. Det er en forudsætning for ordningen, at fiskerfartøjet har indhandlet, og at mandskabet afregnet, og at fiskerfartøjet er bemandet, i begge tilfælde som det er sædvanligt på stedet.

§ 3. Tilskud efter § 1, pkt. 1, 2, 3, 4 og 5 og efter § 2, pkt. 1, 2 og 3 bliver kun ydet for rund fisk med hoved, som er opskåret og indvoldene taget ud, strubeskåret og vel renset og indhandlet på Færøerne.

§ 4. Ingen af mandskabet får tilskud beregnet ud fra mere end en mandskabsandel. Er der monstret for mindre end hel andel, får vedkommende tilskud i forhold til andelen. Ved enkeltmands fiskeri retter fordelingen sig efter de fordelingsregler, som anvendes under denne fangstform.

§ 5. Lønjavningargrunnurin fastsætter i et reglement de nærmere bestemmelser for tilskud m.m. efter denne lov. Reglementet forelægges landsstyret til godkendelse.

2. stk. Útreiðslurnar, sum standast av hesi lóg, verða at játta yvir fíggjarlogtingslógina.

§ 6. Henda lóg fær gildi frá 1. februar 1980. Samstundis fara úr gildi logtingslóg nr. 69 frá 26. september 1974 um miðstuðul og annan stuðul til fiskivinnuna, sum lógin er broytt við logtingslógunum nr. 28 frá 21. mai 1975, nr. 37 frá 21. mai 1975, nr. 41 frá 6. mai 1976, nr. 14 frá 3. mars 1977, nr. 27 frá 14. apríl 1977, nr. 20 frá 12. mai 1978, nr. 25 frá 1. juni 1978, nr. 26 frá 1. juni 1978 og nr. 35 frá 1. juni 1979.

Stk. 2. Udgifter i forbindelse med denne lov, bliver bevilget over finanslogtingsloven.

§ 6. Denne lov har gyldighed fra 1. februar 1980. Samtidig ophæves lagtingslovene nr. 69 af 26. september 1974 om mindsteben og anden støtte til fiskerierhvervet, således som loven er ændret ved lagtingslovene nr. 28 af 21. maj 1975, nr. 37 af 21. maj 1975, nr. 41 af 6. maj 1976, nr. 14 af 3. marts 1977, nr. 27 af 14. april 1977, nr. 20 af 12. maj 1978, nr. 25 af 1. juni 1978, nr. 26 af 1. juni 1978 og nr. 35 af 1. juni 1979.

Viðmerkingar:

Tann 1. februar í ár fór lógin um tíðaravmarkaðan eykastuðning til fiskivinnuna úr gildi.

Nevnda lóg varð framd av sitandi samgongu, aftaná at tann politiska kreppan var loyst, sum seinasta summar tók seg upp millum samgonguflokkarnar á logtingi.

Sambandsflokkurin var ikki nøgdur við nevndu lóg, men hevði týðandi broytingaruppskot. Tey vóru feld av samgonguflokkunum.

Tað hevur í fullan mun vist seg, at fyribilslóggáva samgongunnar ikki loysti nakrar trupulleikar, tvørtur ímóti.

Sitandi samgonga og landsstýri hava vist vánaligan arbeiðsvilja, tá talan er um at loysa okkara fiskivinnutrupulleikar. Og samarbeiðsvilji yvirfyri andstøðuni hevur yvirhovur ikki verið til staðar. Viðurskiftini blivu eftirhondini so út av lagi vánalig, at Sambandsflokkurin kendi seg noyddan til at leggja uppskot fyri Føroya Løgting um at áleggja landsstýrinum at útflýggja tær upplýsingar, sum fiskivinnuráðið hevði fingið til vega og sent landsstýrinum, viðvíkjandi okkara fiskivinnu.

Hesar upplýsingar hevur flokkurin endaliga fingið fyri stuttum, og bendir hetta tilfar á, at tað er neyðugt við heilt munandi stuðuli, serliga til feskfiskaflotan undir Føroyum.

Hóast hetta stendur tað nú heilt greitt, at landsstýrið og samgongan ikki vilja fylgja teimum tilráðingum, sum fiskivinnuráðið hevur latið frá sær.

Sambandsflokkurin leggur tí fram hetta lógaruppskot, sum fyrst og fremst er bygt á tilráðingarnar frá fiskivinnuráðnum. Hin vegin er royndt at forma uppskotið soleiðis, at flest møgulig av smærru ynskjum landsstýrisins og samgongunnar eru tikin við.

Sambandsflokkurin setur uppskotið fram sum eina fyribilsloysn. Deils benda upplýsingarnar frá fiskivinnuráðnum á, at hesi tiltok ikki muna í fullan mun, og deils er tað ikki gjørligt at gera nóg útgreinaðar loysnir undir teimum arbeiðsumstøðum, sum andstøðan á løgtingi arbeiðir undir í dag.

Eitt kann tó eingin ivi vera um. Hetta lógaruppskot gevur eina nógv betri loyn fyri føroysku fiskivinnuna og fyri føroyska samfelagið, enn tey tiltok, sum sitandi landsstýri og samgonga ætla at fremja. Ein fylgjan av hesum er sjálvandi, at hetta lógaruppskot setur nakað storri krov til landskassan enn ætlanin hjá samgonguni.

Hin vegin metir Sambandsflokkurin, at tað er avgjort neyðugt at fremja tey tiltok, sum frá tilráðing fiskivinnuráðsins, eru tikin við í lógaruppskotið.

Tá talan er um ætlanir samgongunnar um minstulon og annan stuðul til fiskivinnuna, kann Sambandsflokkurin ikki taka undir við ella viðgera uppskotið frá 22. februar 1980, og setur tí sítt egna lógaruppskot fram. Viðvíkjandi studningi til veiðu av idnaðarfiski er Sambandsflokkurin heldur ikki samdur við landsstýrið. Á hesum øki verða sett fram broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins. Tað er serliga eitt hækkan av rekstrarstudninginum, hugsað verður um.

Eisini er ætlanin at seta fram aftur uppskot Sambandsfloksins um hægri agnstudning.

Sum nevnt í lógaruppskotinum skulu útreiðslurnar, sum standast av lógini játtast á fíggjarlogtingslógini. Um uppskot sambandsflokksins verður samtykt, so torvar fíggjan á fíggjarlogtingslógini til ein part av teimum almennu útreiðslunum, sum samgonga og landsstýrið hava sett fram uppskot um. Tað verður tí neyðugt at fremja sparililøk á teimum útreiðslu- og íloguokjum, sum eru minst neyðug. Herumfram slepst neyvan undan at fremja lóggávu um meirinntøkur til landskassan. Hesar meirinntøkulógir eiga at verða settar fram aftaná eina samlaða meting í samband við viðgerðina av fíggjarlogtingslógini fyri 1980/81.

Viðmerkjast kann annars, at Sambandsflokkurin er av tí áskoðan, at greiðast var at arbeitt við einum ávísum fiskaprísi, og at sloppið undan øllum teimum ymisku studningsreglunum. Arbeitt eigur at verða fram ímóti einari tílíkari skipan. Viðgangast má tó, at undir núgaldandi umstøðum, fyrst og fremst orsakað av verandi ymist uppbygdu sáttmálunum, er tað í royndi og veru ikki gjørligt at finna fram til fiskaprísir, sum gera tað møguligt at avtaka tær ymisku studningsreglurnar.

1. viðgerð 29. februar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 4. mars legði fram soljóðandi

Alit

Málið varð lagt fram av sambandsflokkinum 26. februar 1980 og undir 1. viðgerð 29. februar 1980 beint í fíggjarnevndina.

I viðmerkingunum til lógaruppskotið sigur sambandsflokkurin frá, at fyriliggjandi lógaruppskot fyrst og fremst er bygt á tilráðingarnar frá fiskivinnuráðnum. Hin vegin er roynt at forma uppskotið soleiðis, at flest moguligu av smærru yvskjum landsstýrisins og samgongunnar eru tikin við.

Sagt verður, at tá talan er um ætlanir samgongunnar um minstulon og annan stuðul til fiskivinnuna, kann sambandsflokkurin ikki taka undir við ella viðgera uppskot-

ið frá 22. februar 1980, og retur til fram frammanfyri standandi lógaruppskot. Útreiðslurnar, sum standast av lógini, skulu játtast á figgjarlogtingslógini.

Sagt verður, at neyðugt verður at fremja sparitiltak á teimum útreiðslu- og íloguokjum, sum eru minst neyðug á figgjarlogtingslógini. Sambandsflokkurin metir, at neyvan slepst undan at fremja lóggávur um meirinntokur til landskassan og verða slík uppskot at seta fram aftaná eina samlaða meting í samband við viðgerðina av figgjarlogtingslógini fyri 1980/81.

Meirilutin (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Jørgen Thomsen og Jógvan Durhuus) vísir til stoðu teirra í áðitinum í logtingsmáli nr. 54/ 1979: Ymisk lógaruppskot um studul til fiskivinnuna.

Undir viðgerðini í figgjarnevndini hevur sambandsflokkurin gjort vart við, at neyðugt er at rætta nummarroðina av greinunum, tá mistak er gjort í uppskotinum, og somuleiðis er neyðugt í § 1 í uppskotinum, pkt. 6 at broyta tolini 50 oyru og 40 oyru til ávikavist 60 oyru og 50 oyru, og í § 2, pkt. 5 at broyta tolini 50 oyru og 40 oyru til ávikavist 60 oyru og 50 oyru og setur minnilutin (Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen) sostatt fram soljóðandi

broytingaruppskot

1) § 1, pkt. 6 verður broytt soljóðandi; «50 oyru» verður broytt til «60 oyru», og «40 oyru» verður broytt til «50 oyru».
2) I § 2, pkt. 5 verður «50 oyru» broytt til «60 oyru» og «40 oyru» broytt til «50 oyru».
3) § 3 í uppskotinum á síðu 6 verður § 4, og § 4 í uppskotinum verður § 5, og á síðu 7 § 5 verður § 6, § 6 verður § 7.

1) § 1, pkt. 6 ændres til sålydende: «50 ore» ændres til «60 ore» og «40 ore» ændres til «50 ore».
2) I § 2, pkt. 5 ændres «50 ore» til «60 ore» og «40 ore» ændres til «50 ore».
3) § 3 i forslagets side 6 bliver § 4, og forslagets § 4 bliver § 5, og på side 7 bliver § 5 til § 6 og § 6 bliver til § 7.

Ein annar minniluti (Asbjørn Joensen) vísir samuleiðis til stoðu floksins í logtingsmáli nr. 54/1979: Ymisk lógaruppskot um studul til fiskivinnuna.

2. viðgerð 6. mars 1980. Broytingaruppskot frá Paula Ellefsen og Ivan Johannesen til § 1, pkt. 6 fall við 8—0.

§ 1 í uppskoti Sambandsfloksins fekk 8 atkvøður og málið sostatt fallið. Atkvøtt varð við navnakalli:

Ja atkvøddu: Ivan Johannesen, Eli Nolsøe, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Margeir Toftegaard, Jógvan Olsen, Agnar Nielsen og Pauli Ellefsen.

Nei atkvøddi: Sverre Midjord.

Atkvøddu ikki: Signar Hansen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Jutul Jacobsen,

Adolf Hansen, Poul J. Olsen, Haldur Hansen, Jørgen Thomsen, Andrias P. Jacobsen, Hanna Lisberg, Jona Henriksen, Ingrid Søndum, Karin Kjølbro, Jógvan Durhuus, Finnbogi Isaksen, Hans Marius Joensen, Edmund í Garði, Jógvan Sundstein, Óssur Dam Jacobsen, Eyðun Videro, Hákun Djurhuus, Óli Breckmann og Hilmar Beck.

---

60. Framleingjan av rakstrarstudningi

Ár 1980, týsdagin 26. februar legði Heðin M. Klein, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um framleiðing av rakstrarstudningi.

§ 1. § 3 í løgtingslóg nr. 72 frá 24. august 1979 um tíðaravmarkaðan eykastudning til fiskivinnuna verður framlongd at galda til 15. februar 1980.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om fortsat gyldighed af driftstilskud.

§ 1. § 3 i lagtingslov nr. 72 af 24. august 1979 om tidsbegrænset ekstratilskud til fiskerierhvervet har fortsat gyldighed til 15. februar 1980.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:
Í § 3 í løgtingslóg nr. 72 frá 24. august 1979 er fyrisett, at latið verður í rakstrarstudningi til føroysk deksfiskifor 5 øyru úr landskassanum fyri hvørt kg av øllum feskum fiski landaðum í Føroyum frá føroyskum fiskifari, og at treyt fyri studninginum er, at fiskurin er blóðgaður og fyrsta floks vara. Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna fyrisitur studningsskipanina. Skipanin var í gildi frá 15. august 1979 til 31. januar 1980.

Í fyriliggjandi lógaruppskoti verður mælt til at framleingja nevnda rakstrarstudning til 15. februar 1980, eins og gjort er við lógargreinina viðvikjandi fiskiaðarfiski í sonnu lóg.

1. viðgerð 26. februar. Málið beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð. Tingsins loyvi at frávikja tiðarfreistini varð givið.
2. og 3. viðgerð 6. mars. Uppskotið samtykt endaliga við 28—0 atkvæðum.

F.L. j. nr. 1539-3. Lóg nr. 31 frá 28. mars 1980.

---

61. Keyp av strandfaraskipi

Ár 1980, fríggjadagin 7. mars legði Hergeir Nielsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

U p p s k o t
til

logtingslóg um keyp av strandfaraskipi.

§ 1. Landsstýrinum er heimilað at keypa strandfaraskip fyri 21 mió. kr. og landskassans vegna at taka upp neyðug lán til hetta endamál.

§ 2. Landsstýrinum er heimilað at taka upp neyðug lán til umbyggingar av skipinum, tó hægst 3,5 mió. kr.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om køb af skib til kystfarten.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at købe et skib for 21 mio. kr. til kystfarten og på landskassens vegne at optage nødvendige lån til dette formål.

§ 2. Landsstyret bemyndiges til at optage nødvendige lån, dog højst 3,5 mio. kr., til ombygning af skibet.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tá komandi sumarferðaætlan tekur við, verður Stuyril bundin burturav í millumlanda sigling, og kann sostatt ikki rokja sigling innanoyggja umframt.

Landsstýrið hevur kannað moguleikan fyri útvegan av einum skipi í innanoyggja sigling í staðin fyri Smyril, og metir at skilabesta loysnin er keyp av systurskipinum hjá Smyrli, tí javngamla Mikkel Mols.

Mikkel Mols hevur staðið á solulista í fleiri ár fyri 4,5 mió. US $, og hevur hesa tíð verið í sigling lutvist sum charterskip og lutvist sum avloysingarskip.

Keypspeningurin, sum er 21 mió. kr., er ætlaður at fáa tilvega við 80% í láni frá Danmarks Skibskreditfond og 4 mió. kr. sum pant í skipinum. 80% fígging fæst eisini av umbyggingarkostnaðinum, sum verður mettur til 3 - 4 mió. kr. Tað tó vænt-ar er ætlanin at taka sum vanligt lán.

Skipið hevur fingið 8 ára klassing í fjor, og er í núverandi líki sum Smyril, tá hesin varð keyptur í 1975.

Neyðugt verður sostatt at gera broytingar, sum gera tað moguligt at koma umborð gjøgnum síðuna. Eisini verður neyðugt at skifta út innbúgvið í matstovunum, soleiðis at leysir stólar verða skiftir út við fastar bonkir, sum eru betur hóskandi í okkara sigling.

Tað verður ikki neyðugt við fleiri koyggjum, og kemur aftara matstovan sostatt at varðveita útsjónd sína.

Motorar og tekniskar installatiónir eru í góðum standi sambæt frágreiðing frá kønum monnum innan strandferðsluna.

Sum kunnugt hava ferðsluumstoðurnar til og frá Suðuroynni verið versnandi seinastu summrini, og er nú neyðugt, um ikki alt skal koyra fast, at útvega annað skip.

Við hesum fyri eyga samtykti landsstýrið í vetur at lýsa ferðaætlan fyri Smyril millumlanda burturav, og er henda ferðaætlan so neyv, at ikki kann siglast innanoyggja eisini.

Talið á ferðafólki og bilum um Suðuroyarfjørð hevur seinastu árini verið:

	ferðafólk	vokstur í %	bilar	vokstur í %
Árið 1975	43618		3147	
Árið 1976	77345	77,3%	10520	234,3%
Árið 1977	81194	4,7%	13659	29,8%
Árið 1978	90197	10,0%	15694	14,9%
Árið 1979	91444	1,4%	16875	7,5%

Viðari kann upplýsast, at flest fólk ferðast vikuskiftini mai - aug., har miðaltalið er 600. Somuleiðis er bilatalið størst hetta tíðarskeið, har miðartalið var 80. Fleiri ferðir fult skip, eins og tað kemur fyri, at bilar staunda eftir.

Størsti voksturin hevur verið innan farmaflutningin, sum er trifaldaður síðan Smyril kom.

11. mars legði Eydun Videro, løgtingsmaður fram søljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Løgtingslóg um leigu av ferðamannaskipi.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at leiga hóskandi ferðamannaskip til Suðuroyarsiglingina summarið 1980, meðan «Smyril» er í utlanlandssigling.
2. stk. Leigusáttmálin verður at góðkenna av fíggjarnevndini.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Lagtingslov om leje af passagerskib.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at leje passende passagerskib til sejladsen på Suðuroy sommeren 1980, medens «Smyril» sejler til udlandet.
Stk. 2. Lejekontrakten skal godkendes af finansudvalget.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Av tí at landsstýrið hevur lagt ferðaætlanina hjá Smyrli soleiðis, at hann ikki kann rokja Suðuroyar-siglingina komandi summar, verður sokt um heimild at keypa skip av sama slagi sum Smyril til at rokja innanlandssiglingina.

Landsstýrið setti seinasta heyst eina skipaferðslunevnd at kanna spurningin um uttanlandssiglingina. Nevndin hevur enn ikki framlagt nakað álit í málinum. Rættast hevði verið at givið nevndini stundir til fyrst at komið fram við sínum áliti, áðrenn stoða varð tikin til uttanlandssiglingina hjá Strandferðsluni, tí óhugsandi er ikki, at nevndararbeiðið kundi víst, at bæði skipini eru óhóskandi og órentabul til uttanlandssigling um veturin. Eisini átti álitið frá skipaferðslunevndini at kunna víst, hvørjar avleiðingar uttanlandssiglingin hjá Strandferðsluni fær á flutningin hjá hinum skipafeloguntum.

Við at leiga skip til komandi summarsigling, fær ein hovi til at kanna spurningin um uttanlandssiglingina nærri. Eisini fær ein at síggja, hvussu rentabiliteturin verður, av tí at summarrutan verður umleið tann sama sum rutan, ætlanin er at hava um veturin. Seinasta summar fall ferðafólka- og bilatalið á uttanlandsrutunum nógv, og tað er ikki óhugsandi, at ferðafólkatalið aftur fer at minka í summar, sum tiðirnar nú eru.

Fyri at «M. Mols» kann nýtast í innanoyggjasigling er neyðugt, at hann fær kostnaðarmikla umbygging av síðuportri. Samstundis ljóðar, at ætlanin er, at siglingin til Suðuroynna skal ganga á Drelnes, har serlig atlogubryggja, ið ikki ger síðuportur neyðugt, skal byggjast.

Spurningurin um keyp av «M. Mols» má sostatt sigast ikki at vera búgvin til avgerðar í lotuni.

Undirritaði loyvir sær tí at skjóta upp, at spurningurin um Suðuroyarsiglingina í summar verður loystur við, at landsstýrið fær heimild til saman við fíggjarnevndini at leiga hóskandi skip.

1. viðgerð 11. mars. Tingsins loyvi varð givið at vøgera broytingaruppskotið á hesum fundi. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 20. mars legði fram

Álit

Málið varð 7. mars 1980 framlagt av landsstýrinum og kom til 1. viðgerð 11. mars 1980, har tað var beint í fíggjarnevndina.

Í viðmerkingunum til málið ger landsstýrið vart við, at sambært komandi summarferðaætlan verður Smyril burturav bundin í millumlanda sigling og kann umfram ikki rokja sigling innanoyggja.

Landsstýrið sigur frá, at tað metir undir hesum umstoðum, at skilabesta loysnin er at keypa systurskipið hjá Smyril, ta javngomlu ferguna Mikkel Mols, og setir landsstýrið lógaruppskot fram samsvarandi hesari ætlan í 3 greinum.

Í 1. grein biður landsstýrið um heimild at keypa ferguna fyri 21 milj. kr. og heimild at taka neyðugt lán til hetta endamál, tað vil siga keyp.

Í 2. grein biður landsstýrið um heimild at taka upp neyðug lán til umbyggingar, og er henda lántoka avmarkað til hægst 3,5 milj. kr.

Í 3. grein verður sagt frá, at henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

Orðaskiftið á tingi undir 1. viðgerð vísti, at sjónarmiðini hjá tingmonnum í hesum máli vóru ymisk, og varð eitt broytingaruppskot framsett av logtingsmanni Eyðun Videro, og kom hetta til umroðu saman við landsstýrisuppskotinum, og varð tað eisini beint í fíggjarnevndina.

Broytingaruppskotið er í 2 greinum, og verður í 1. grein mælt til, at landsstýrinum verður landskassans vegna heimilað at leiga hóskandi ferðamannaskip til Suðuroyarsiglingina á summri 1980, meðan «Smyril» er í uttanlandssigling.

Í 2. stk. verður sagt, at leigusáttmálin verður at góðkenna av fíggjarnevndini.

Grein 2 setir hesa lóg í gildi beinanvegin.

Í viðmerkingunum vísir Eyðun Videro á, at landsstýrið seinasta heyst setti eina skipaferðslunevnd at kanna spurningin um uttanlandssigling, men hevur henda nevnd ikki framlagt nakað álit í málinum.

Eyðun Videro heldur tað vera umráðandi, at nevndin fær hovi til at koma fram við sínum áliti, tí óhugsandi er ikki, at hetta nevndararbeiðið kundi vist, at bæði skipini eru óhóskandi og órentabul til uttanlandssigling um veturin.

Eisini átti álitið frá skipaferðslunevndini at kunna vist, hvørjar avleiðingar uttanlandssiglingin hjá Strandferðsluni fær á flutningin hjá hinum skipafelagunum.

Við at leiga skip til komandi summarsigling, fær ein hovi til at kanna uttanlandssiglingina nærri og fær eina mynd av, hvussu rentabiliteturin verður, av tí at summarrutan verður umleið tann sama sum rutan, ætlanin er at hava um veturin.

Eydun Videro ger vart við, at seinasta summar fall ferðafólka- og bilatalið á uttanlandsrutunum nógv, og at tað ikki er óhugsandi, at ferðafólkatalið aftur fer at minka í summar, sum tíðirnar eru. Hann heldur ikki, at spurningurin um keyp av «Mikkel Mols» er búgvin til avgerðar í lotuni.

Ein minniluti (Poul J. Olsen, Jørgen Thomsen, Jógvan Durhuus), ið tekur undir við uppskoti landsstýrisins, er av teirri fatan, at uppskot landsstýrisins um keyp av strandferðaskipi er í tráð við ta semju, flokkarnir gjordu í heyst, har avgjort var, at skip skuldi keypast, og at ætlanin annars var at okja summarsiglingina komandi summar.

Minniluti metir, at hóast summarsiglingin varð hildin í sama líki sum í fjor, hevði verið neyðugt við øðrum skipi, tá tað vísir seg ógvuliga trupult at halda áfram við tí satnskipan, sum hevur verið millum Búgvuna og Smyril, síðan hesin varð keyptur í 1975.

Fyri at fáa eina haldgóða framtíðarloysn verður mett, at neyðugt verður at loysa innanoyggjasiglingina frá millumlandasiglingini.

Hvat innanoyggjasiglingini viðvíkur er nevnda skipastødd hóskandi, tá hugsað verður um ferðafólka- og bilaflutningstalið og ta vaksandi farmaflutningsmøguleika. Keypsprísurin verður somuleiðis mettur hóskandi, tá havt verður í huga, at samsvarandi skipastødd kostar umleið 100 mió. kr., tá talan er um nýbygging.

Spurningurin um millumlanda sigling frá í heyst av verður viðgjordur í skipaferðsluevndini, og verður tikin stoða til henda seinni, tá áfit vónandi fyriliggur.

Sambært upplýsingum frá strandferðsluni er ógvuliga torfort at fáa leigumál í lag. Marknaðurin er ógvuliga lítil, tá leigumál fyri komandi summar eru fingin í lag á flestu rutum.

Um skipastødd, 500 ferðafólk/100 bilar, varð fingin til leigu, hevði hallið av hesi verið umleið 4,5 mió. kr. størri enn við nýtslu av Mikkel Mols, og afturat hesum koma umbyggingar helst eins stórar og á Morten Mols, og er her tann vansi, at umbygging av leigaðum skipi kann verða kravd umbygd aftur til verandi líki, tá skipið varð leigað.

Ein annar minniluti (Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen) tekur ikki undir við uppskotinum um keyp av «Mikkel Mols», men setir í staðin fram

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at syrgja fyri, at m/f «Smyril» rekur Suðuroyar-siglingina alt árið.

Ein triði minniluti (Håkun Djurhuus), ið tekur undir við uppskotinum hjá Eydun Videro, førir fram:

Undir viðgerðini av málinum í figgjarnevndini, var figgjarnevndin í sambandi við Skipaferðslunevndina, og setti figgjarnevndarformaðurin henni nakrar spurningar í sambandi við hetta skipakeyp.

Spurningarnir vóru:

1. Hvorja avleiðing fær keyp av «Mikkel Mols» á millumlandasiglingina.
2. Hvorjar verða tær okonomisku avleiðingarnar fyri Strandferðsluna (og landskassan) av, at tvey Molsskip verða í sigling í summar.
   Inntokur av ferðafólki og farmi?
   Útreiðstur til olju, havnapengar og hýrur?
3. Hvat heldur nevndin er rættari, at keypa ella leiga skip?
4. Sæð út frá einum rekstrarokonomiskum sjónarmiði, hvat er rættast at gera við «Smyril» ella «Mikkel Mols» á vetri?
   a) at hann siglir farm (sum á summri) millum lond,
   b) at hann verður lagdur fyri teym.
5. Hvat kostar tað at avlýsa ferðaætlanina hjá «Smyrli» uttanlands, og hvorjar royndir hava menn av avleiðingunum av slíkari avlýsing.
6. Hvørjar ætlanir hava skipavinnufelagini? Og í hvønn mun og á hvønn hátt órógvar millumlandasigling Strandfaraskip Landsins við hallí hesar ætlanir?
7. Hvør loysn hevði í longdini verið hin besta til Suðuroyar-siglingina?

Ein meirihluti í Skipaferðslunevndini (Jóannes Hansen, T. Mikkelsen, Niclas Magnussen, Árni Joensen, Atli Jensen, Páll Poulsen og Rósing Rasmussen) svarar soleiðis:

1. Við keypi av m/f «Mikkel Mols» verður frígivin skipakapacitetur til millumlandasigling.
2. Nevndin hevur ikki neyðugar upplýsingar tokar fyri álitandi at svara spurninginum til ásettu tíð.
3. Um avvarðandi myndugleikar meta tað rætt at útvega eitt skip aftrat, so bendir nógv á, at forsvarligasta loysnin er at leiga hetta skip.

   Vit meta tað vera skeivt at fremja ílogur, so leingi ongar langtíðarloysnir enn eru fastlagdar fyri millumlandasiglingina, og sum vist verður á í § 7, tykir skynsamari vera at fremja ílogurnar á øðrum okjum, tá um innanoyggjasiglingina ræður.

   Tey skipaslog, sum skulu nýtast í tí har nevndu skipum, kunnu byggjast á foroyskum skipasmiðjum, og lúka harvið eina av treytunum í semjuskjalinum.
4. Verður svaraður sum spurningur 2.
5. Mett verður, at avlýsing av uttanlands summarferðaætlanini ikki viðfører beinleiðis endurgjaldskostnað.
6. Sambært vinnumboðini eru ætlanir teirra grundaðar á eitt ynski um stoðuga

útbygging og effektivisering av føroysku farmaskipavinnuni, har strembað verður ímóti størst moguligari luttoku í millumlandasigling.

Stoðið undir vinnuni er verandi Føroya-sigling, og ein og hvor kapping, sum er subsidierað við ikki at skula ganga undir sama krav um rentabilitet, vil taka hetta stuðl burtur og órógva útbyggingina.

7. Neyðugt verður at gera neyvar ekonomiskar kanningar í málinum, men ætlandi er rættasta langtíðarloysnin at leggja sambandið um Sandoynna.

Sandoyggin fæst tá inn í flutningsskipanina. Rutufrekvensurin fæst bægri, og samferðshuviðurskiftini hjá oyggjunum sunnanfyri og vestanfyri verða bott, samstundis sum fiviligari verður hjá ferðafólki. Einsháttað skip verða nýtt á nærum øllum innanoyggja rutum.

Ein minniluti í skipaferðslunevndini (Thomas Arabo og Dánjal Lydersen) svarar soleiðis:

1. Keypið av «Mikkel Mols» til Suðuroyar-siglingina verður mett at hava positivar avleiðingar á allan núverandi *uttanlands farmaflutning*. Eitt tílíkt skip skuldi hjálpt til at stytt tiðina hjá farmaskipunum í Føroyum. Sí okkara minnilutauppskot frá 24.2. 1980 í skipaferðslunevndini.
2. Hetta er eitt reint Strandferðslumál, og kann bert viðgerast har.
3. Minnilutin tekur ikki stoðu til henda spurning, tá tað í semjuni ímillum landsstýrisflokkarnar í august 1979 er tilskilað, at eitt innanoyggjaskip skal keypast. «Tí verður annað hóskandi skip *keypt* at nýta ímeðan.»
4. Til dagin í dag hevur øll nevndin verið samd um, at stremba fram ímóti at hava eitt álit liðugt hesum viðvíkjandi í mai mánað 1980.
5. Elsini í hesum ferð vísir minnilutin til semjuna frá august 1979, har sagt verður: «Uttanlandssiglingin á sumri 1980 verður okt, og fyritreytir fyri hesum kannaðar heinanvegin», og minnilutin heldur seg tí ikki kunna gera metingar um onnur alternativ.
6. Fyri at kunna svara henda spurning, mugu vit heilt og aldeilis konkret kenna málsetningin hjá teimum privatu skipafelagunum við upplýsingum um skipaslog og støddir, materiell, siglingarleiðir og frekvens.
7. Sum stoðan er í dag, er hetta loysnin, ið landsstýrið nú miðar ímóti.

Ein fjórði minniluti (Asbjørn Joensen) metir, at so sum landsins fíggjarstoða og fíggjarvánir eru, samanborið við tilráðing frá sakkonum viðvíkjandi landsins búskapi, kann ikki takast undir við keypi av gomlum skipi, so sum landsstýrið mælir til.

Minnilutin metir, at fyri neyðini er ein avmarkan av siglingini bæði innan- og uttanlands. Tann flutningsorka vit nú hava bæði til fólk og bilar eigur tá at nokta okkara torv, eins væl og sleppast kann undan at krevja enn metir í flutningspeningi frá teimum, ið hava hesa ferðslu fyri neyðini.

Figgjarnevndin hevur eisini havt til viðgerðar broytingaruppskot til landsstýrisuppskotið, har mælt verður til leigu av skipi til Suðuroyar-siglingina. Í ti avmarkaða tilfari, ið fekst til vega, fyri at loysa hesa ætlan, er einki, ið borgar fyri undirtoku av hesum broytingaruppskoti, tá hetta m.a. vil okja munandi um hall strandferðslunnar.

Tingsins loyvi varð givið at frávikja tíðarfreistini at bava 2. viðgerð av málinum 21. mars. Atkvoðugreiðslan um landsstýrisins uppskot § 1 fór fram við navnakalli, og var hon hendan:

Ja atkvoddu: Signar Hansen, Poul J. Olsen, Haldur Hansen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Andrias P. Jacobsen, Hanna Lisberg, Jona Henriksen, Ingrid Soindum, Karin Kjølbro, Jógvan Durhuus, Finnbogi Isaksen, Hans Marius Joensen, Edmund í Garði, Jógvan Sundstein, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Bech.

Nei atkvoddu: Eyðun Videro og Óli Breckmann.

Atkvoddi ikki: Ivan Johannesen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Hákun Djurhuus, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Agnar Nielsen og Pauli Ellefsen.

Burturstaðlur: Eli Nolsøe.

§ 1 fekk sostatt 17 ja-atkvoður, 2 nei-atkvoður og 12 atkvoddu ikki. § 2 varð samtykt við 17—0 atkvoðum.

Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum Paula Ellefsen og Ivan Johannesen fall við 8—0 atkvoðum. Broytingaruppskotið frá Eyðun Videro fall við 3—0.

21. mars varð uppiskoytisuppskot framlagt, undirskrivað av Jógvani Sundstein, Øssur Dam Jacobsen, Edmund í Garði, Poul J. Olsen, Jørgen Thomsen, Jógvan Durhuus og Signar Hansen, sum var soljóðandi

Uppskot til samtyktar við 3. viðgerð.

Álagt verður landsstýrinum at útvega roknskap yvir summarsiglingina hjá Smyrli 1980 beinanvegin aftaná, hon er lokin.

Uppgerðin, sum Strandfaraskip Landsins skal gera, verður at leggja fyri Løgtingið í seinasta lagi 15. oktober 1980.

21. mars varð nýtt iskoytisuppskot undirskrivað av Hákun Djurhuus, Juul Jacobsen, Eyðun Videro, Paula Ellefsen, Eli Nolsoe, Johs. M. Olsen, Hilmar Kass, Adolf Hansen, Óla Breckmann, Asbjørn Joensen, Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen og Jógvan I. Olsen lagt fram, sum var soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar við 3. viðgerð.

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at útvega roknískap fyri summarsiglingina hjá m/f «SMYRIL» fyri 1979 og fíggjarætlanartal fyri summarsiglingina hjá m/f «SMYRIL» og m/f «MIKKEL MOLS» fyri 1980.

Tingsins loyvi varð givið at frávíkja tíðarfreistini at hava 3. viðgerð av málinum. Ynski var frammi um, at fiskoytisuppskotini komu í nevnd. Orðaskifti stóðst av hesum, og atkvott varð um fiskoytisuppskotini skuldu í nevnd, men fall tað við at 15 atkvoddu fyri.

Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 17—3. Uppískoytisuppskotið frá Jógvani Sundstein v.fl. varð samtykt við 24—0. Uppískoytisuppskotið frá Hákuni Djurhuus o.fl. samtykt við 21—0.

F.L. j. nr. 1800-48-1. Lóg nr. 30 frá 28. mars 1980.

---

62. Prístalsviðgerð av feskfiskaprísum

Ár 1980, týsdagin 11. mars legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um prístalsviðgerð av feskfiskaprísum.

§ 1.

Fyri hvørji 3 stig prístalið broytist í mun til prístalið 100, verða teir pr. 31. mars 1980 galdandi avreiðingarprísir broyttir við 10 oyru pr. kg. Fellur prístalið niður um 100 verður ongin prístalsviðgerð.

lagtingslov om pristalsbehandling af råfiskepriser.

§ 1.

For hver 3 points udsving i pristallet ud over 100 ændres de pr. 31. marts 1980 gældende indhandlingspriser med 10 øre pr. kg. Falder pristallet ned under 100, finder ingen prisbehandling sted.

§ 2.

Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvonn ársfjórðing eftir pristalinum 1. í ársfjórðinginum.

§ 3.

Dýrtíðarviðgerð eftir § 1 fer bert fram í tann mun avreiðingarprísirnir, orsakað av marknaðarprísum v.m., ikki hækka eins nógv ella meira enn dýrtíðarviðgerðin.

§ 4.

Teir pr. 31. mars 1980 galdandi avreiðingarprísir megu undir ongum umstøðum lækkast.

§ 5.

Henda lóg kemur í gildi 1. april 1980.

§ 2.

Dyrtidsreguleringen foretages hvert kvartal efter pristallet den 1. i kvartallet.

§ 3.

Dyrtidsregulering efter § 1 foretages i det omfang, indhandlingspriserne, på grund af markedspriser m.v., ikke stiger tilsvarende eller mere end dyrtidsreguleringen.

§ 4.

De pr. 31. marts 1980 gældende indhandlingspriser må under ingen omstændigheder nedsættes.

§ 5.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingur:

Oljukrisan veturin 1973/74 førdi við sær at fiskivinnan kom í fíggjarligar trupulleikar. Við ymsum lógartiltokum hevur tingið roynt at demnna upp fyri hesum trupulleikum, men hava teir vist seg at venda aftur við stytri og stytri millumbilum. Við teimum lógum og reglum sum galdandi eru í dag kemur hendan afturvendan at halda áfram við enn stytri millumbilum.

Fyriliggjandi uppskot um pristalsviðgerð av avreiðingarprísunum vil føra við sær at úrtøka fiskivinnunar verður meira stabil, harvið verður longur millum tær afturvendandi kreppurnar.

Í álitinum til tingmál nr. 54/1979 verða tær samlaðu almennu veitingarnar til minstulon v.m. mettar til 181 mill. kr.

Í álitinum til tingmál nr. 67/1974 (vetrarting) verða tær tilsvarandi útreiðslurnar mettar til 37,5 mill. kr. Seinri komu tó ymsar hækkanir so samlaða talið var ca. 41 mill. kr.

Samantikið siggja broytingarnar í almennu veitingunum til fiskivinnuna, frá tí at pristalið var 100 í 1975 til tað var ca 145 í 1980, soleiðis út:

	1980	181 mill. kr.
	1975	41 mill. kr.
Broytingar		140 mill. kr.

Samlaðu feskfiskalandingarnar sonnu 5 árini eru:

1975	46.648 tons	
1976	61.951 tons	
1977	76.276 tons	
1978	81.509 tons	
1979	79.843 tons	
Ialt	346.227 tons	(meðal pr. ár 69.245 tons)

Var ein tílík prístalsskipan fyri avreiðingarprísirnar sett í gildi í 1975 hevdu fleiri av teim kreppum, fiskivinnan hevur verið í, verið umgingnar. Tær almennu veitingarnar vildu í so fall sæð soleiðis út tan roknað var við einum meðal tonsatali uppá 70.000, eini prístalsviðgerð uppá 100 kr./tons og við 15 stigum (100 til 144,8)

$$70.000 \times 100 \times 15 = 105 \text{ mill. kr.}$$

Tey samlaðu krepputiltokini loglingið skuldi tikið stoðu til hesi 5 árini vildu verið 35 mill. kr. nemliga: 140 - 105 mill. kr.

1. viðgerð 17. mars. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 28. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram á ting av Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 17. mars 1980 beint í socialu nevndina.

Nevndin hevur skrivað til hesi felog og stovnar:

Meginfelag Útróðramanna
Føroya Fiskimannafelag
Føroya Ráfiskakeyparafelag
Føroya Reiðarafelag
Føroya Fiskasølu

og biðið um teirra viðmerkingar til uppskotið.

Øll felogini uttan Føroya Ráfiskakeyparafelag hava svarað og eru svarini hjálogd sum skjøl til hetta álit.

Eisini hevur nevndin útvegað sær tilfar frá Hagdeildini um upphæddir yvir figgjarlógina til feskfiskaflotan 1975 til 1980, avreiðingarprísir 1975 - 1979 og prístalsútviklingin frá 1975 til 1980. Hesar upplýsingar eru hjálagdir sum skjøl.

Lógaruppskotið ásetur, at avreiðingarprísurin fyri feskfisk skal hækkast við 0,10 kr. pr. kg hvorja ferð prístalið hækkar við 3 stigum, um ikki prísurin hækkar av marknaðarprísum v.m.

Sagt verður í viðmerkingunum, at um hetta hevði verið gjort í farnu tíð hovdu fleiri av teim kreppum, fiskivinnan hevur verið í, verið umgingnar.

Í meðal hava feskfiskalandingarnar seinastu árini verið 69.245 tons. Framyvir mugu vit tó rokna við umleið 80.000 tonsum árliga. Tað vil siga, at eftir lógaruppskotinum fer hvor prístalshækking at kosta 8 milj. kr. um ikki marknaðarprísirnir ávirka avreiðingarprísirnar upp eftir.

Um prístalsviðgerð hevði verið í 1975 - 1980, hovdu avreiðingarprísirnir verið hesir grundað á prístalið 1/7 - 1975 = 100

	prístals-prísur	veruligur prísur
1/7 1975 prístal 100	1,92	1,92
1/7 1976 — 108.3	2,12	2,36
1/7 1977 — 112,9	2,32	3,01
1/7 1978 — 121,2	2,62	3,10
1/7 1979 — 132,1	2,92	3,04
1/2 1980 — 144,8	3,32	3,21

Sum tað sæst av frammanfyristandandi hava veruligu prísirnir líka til ársskiftið 1979/80 verið hægri enn prístalsviðgjordir prísir hovdu verið. Leggjast skal afturat, at 13. apríl 1980 eru veruligu prísirnir komnir uppá kr. 3,63. Tá vildi prístalsviðgjordi prísurin verið kr. 3,52.

Teir veruligu prísirnir eru meðalprísirnir, sum Lonjavningargrunnurin roknar út sum grundarlag fyri prísviðbótini.

Marknaðarprísirnir saman við almennum tiltokum hava sostatt stórt sæð hígartil hildið fiskaprísirnar omanfyri tað sum uppskotna skipanin einsamøll hevði klárað.

Nakað annað er, at fiskaprísirnir ikki hava klárað at givið fiskimonnum tað procentvísu hækking í úrtokum, sum svarar til samlaðu hækkingarnar á landi.

Sociala nevndin er samd um, at vanlig prístalsviðgerð av lonum á landi eftir einum importindex, sum nú verður nýtt, kemur at mótvika moguleikunum fyri úrtøkuhækking hjá fiskivinnuni. Loysnin er tó neyvan bara at flyta sonu prístalsviðgerð yvir á avreiðingarprísirnar. Ein prinsipielt betri loysn er at nýta eitt *samfelagsbúskaparligt berjarkúindex* fyri allar stættir.

Sociala nevndin setur so statt onki uppskot fram, men heitir á landsstýrið um beinanvegin saman við Búskaparráðnum og Hagdeildini at finna útrokningarháttin fyri tí her nevnda indexi, og síðani at leggja málið aftur fyri løgtingið.

FØROYA REIÐARAFELAG

Tórshavn, 22. apríl 1980

Løgtingsins sosiala nevnd
her

Bræv tykkara frá 18. mars 1980 við hjálagdum uppskoti um prístalsviðgerð av feskfiskaprísum (løgtingsmál nr. 62/1979) hava vit móttikið.

Felagið hevur havt málið til viðgerðar og kunnu vit áttala, at hugskotið sum so virkar tiltalandi, men vit halda okkum ikki til at geva ummæli útfrá teim fyriliggjandi upplýsingunum og teim avleiðingum ein tílík broyting kann fora við sær. Tað krevur eina gjølliga kanning og viðgerð.

Virðingarmest
O. Dam.

FØROYA FISKIMANNAFELAG

3800 Tórshavn, 11. apríl 1980.

Løgtingsins Sosiala Nevnd
her

Vit hava fingið sendandi til ummælis løgtingsmál nr. 62/1979: Prístalsviðgerð av fiskaprísum.

Vit taka sjálvsagt undir við øllum uppskotum sum kunnu stabilisera inntokurnar hjá fiskimonnum, men vit vilja tó gera vart við fylgjandi:

a. Vit meta tað ikki at vera nóg mikið, at inntøkur fiskimanna fylgja prístalinum eina. Tað er neyðugt at føra ein miðvísan fiskimannalønarpolitikk, soleiðis at inntøkurnar hjá fiskimonnum koma at fylgja lønargongdini í samfelagnum sum heild.
b. Vit meta at í fleiri førum eru inntøkurnar hjá fiskimonnum longu nú undir alt rímiligt mark, og her er tískil neyðugt við enn meira munandi tiltøkum fyri at fáa inntøkurnar á javnt við eina rímiliga lønarlegu. Her verður serliga hugsað um línuskip á ísfiskaveiði og frystiskip á hemara- og svartkalvaveiðu.

Annars meta vit hetta uppskot at vera ein positivur partur í einum fiskimannainntøkupolitikki og kunnu vit viðmæla tí vísandi til viðmerkingarnar omanfyri.

Við heilsan
FØROYA FISKIMANNAFELAG
Óli Jacobsen

MEGINFELAG ÚTRØDRARMANNA

Tann 19-3-1980.

Løgtingsins Sosiala Nevnd

Vit hava móttikið bræv tykkara dagf. tann 18-3-1980, og takka fyri, at vit verða eftirspurdir.

Alt síðan felag okkara varð stovnað í 1975, hevur verið arbeitt fram móti prístalsviðgjørdum avreiðingarprísum, soleiðis at útróðrarmenn fáa viðurlag fyri prístalshækkan, ístaðinfyri núgaldandi skipan, sum dregur avreiðingarprísirnar niðureftir, tá prístalið hækkar, og setur okkum í eina inntøkuliga serstøðu, millum teir lægstlontu.

Tá hetta mál hevur verið viðgjørt á fundi, hevur oftast tann áskoðan komið fram, um ikki ein prístalsútrokning eigur at vera spesielt fyri fiskimenn. Fort hevur verið fram, um tað vanliga brúkaraprístalið, sum er grundarlag undir tímalon uppi á landi, gevur nóg góða mynd av lívikostnaðinum hjá útróðramonnum. Spurt hevur verið, um ikki rættari hevði verið, at tikið oljuprísir, prísir á reiðskapi, sjóklæðir og annað tílíkt við í útrokningunum í hesum prístali.

Skulu vit ummæla løgtingsmál nr. 62/1979 skjótast gjørligt, soleiðis sum Sosiala Nevnd biður okkum um, so verða ikki stundir at kanna, hvussu tølini í uppskoti Framburðs- og Fiskivinnuflokkslins koma at virka í praktiskum útrokningum og í okkara húsarhaldi, sovítt sum hetta letur seg gera frammanundan.

Vit eru greiðir yvir, at fiskivinna altíð hevur somikið av óvissu við sær, at ringt er at meta um rímulig og høskandi tøl.

Meginfelag Útróðramanna mælir tí til, at Løgtingsmál nr. 62/1979: Uppskot til løgtingslóg um prístalsviðgerð av feskfiskaprísum, verður samtykt óbroytt, við tí fyrivarni, at henda løgtingslóg, tá hon hevur havt sína royndartíð, verður endurskoðað og tølini rættaði, um so er, at tey í praksis ikki hava gjort ta nyttu, sum tey í dag verða metta at kunna gera.

Við heilsan

MEGINFELAG ÚTRØDRAMANNA
Ísak Matras.

L/F FØROYA FISKASOLA

3800 Tórshavn, 28/4 - 1980.

Til Løgtingsins Socialu Nevnd
v/ Jógvan Sundstein, formanni
3800 Tórshavn.

Víst verður á uppskot løgtingsins nr. 62/1979:

prístalið og feskfiskaprísirnir

har socíala nevndin biður Føroya Fiskasolu um eitt ummæli í málinum.

Vit loyva okkum at vísa á grein í Dimmalætting frá 6. okt. 1973 endurprentaðí sama blað 21. juni 1975, har samanhangið prístal ella prístalsbroyting og fiskaprísir verða viðgjord.

Sum tað framgongur av greinini, so meta vit, at tann skipan, sum hevur verið galdandi tey seinastu árini, hevur verið órímilig og ólogisk, við tað at niðurstoðan stutt kann sigast at vera tann, at fiskaprísirnir verða lækkaðir, tá prístalið hækkar, og harvið bæði fastar- og tímalonir av sonnu orsøk hækka.

Vit hava einki beinleiðis uppskot til eina aðra loysn, sum samfelagsliga vil virka betur. Bert at broyta viðgerðina av ráfiskaprísinum samsvarandi við broytan av prístalinum og upp á sama hátt sum lønirnar á landi verða broyttar ger bert okkara búskapartiga trupulleikar upp aftur stórri, enn teir eru í dag.

Tann stóri spurningurin er, um tað er rætt og rímligt, og um ráðini hjá okkum eru til tess, at okkara lønarlag skal stýrast av innfluttningsprísinum av nýtsluvørum og luksusvørum eins væl og av avgjøldum á sonnu vørum.

Vísandi á heildarbúskapin vitja vit meta, at tann rættasti málin at koma eini loysn nærri viðvíkjandi uppskotinum um prístalsviðgerð av feskfiskaprísum, er at endurskoða prístalskonstruktiónina og ta ávirkan prístalið moguliga kann koma at hava á fiskaprísirnar og á lønarlagið sum heild. Í hesum sambandi slepst neyvan undan einari endurskoðan av øllum sáttmálunum eisini.

Sjónarmiðini, sum eiga at verða lagd til grund, eru, at um tjóðin skal verða sjálvbjargin, so kunnu vit ikki nýta meira, enn heildarbúskapurin kann bera. Hetta fører aftur til problematikkin um eitt útfluttningsprístal ella eitt recursvirðisprístal ella ein formil til býtið av bruttonationalproduktinum o.s.fr.

Okkara uppskot vildi verið, at henda heildarmetan fór fram, íðtenn aðrar broytingar verða gjordar í prístalsviðgerðini av bæði fiskaprísum og lønum.

Við heilsan
L/F FØROYA FISKASOLA
Birgir Danielsen
stjóri.

FISKAPRISIRNIR

Vit endurprenta her grein, sum Birgir Danielsen stjóri í Foroya Fiskasolu skrivaði í Dimmalætting 6. oktober 1973:

Prístalið hevur aftur gjort eitt risalop. 1. januar 1973 var prístalið 710, og tað er pr. 1. oktober 780, t.v.s. ein hækkan upp á ca. 10%. Hetta er einki óvanligt sammett við tær príshækkanir, sum fara fram í heiminum í dag. Eyðkennið allastaðni er príshækkanir, sum eru stoerri enn nakar hevur hoyrt um áður.

Henda príshækkanin hjá okkum uppá 10% hevur fört við sær eina hækkan í lønini upp á kr. 1,80 um tíman svarandi til 13%.

Í sama tíðarskeiði eru rávoruprísirnir hækkaðir munandi. Fyri tosk og hýsu vísir niðanfyri standandi talva prísirnar 1. januar samanborið við prísirnar 1. oktober 1973:

	1. jan	1. okt.	hækk. í %
toskur	2,08	2,37	14
hýsa	2,28	2,59	13,6

Í USA eru prísirnir fyri toskaflak í áðurnevnda tíðarskeiði hækkaðir frá 47 c/lbs til 80 c/lbs svarandi til 70% ella 58%, um tað verður lagt upp fyri lækkanini í dollarvirðinum. Tilsvarandi príshækkanir hava verið í Spania og Grikkalandi ávikavist um 17% og um 10%.

Sum flest ollum kunnugt, er grundarlagið undir útrokningini av ráfiskaprísunum soluprísirnir á marknaðinum ÷ allar útreiðslur, sum standast av sølu, so sum frakt, trygging etc., og allar útreiðslur sum standast av framleiðslu, t.d. arbeiðslon, pakkitilfar o.s.fr. Tað vil sige, tá ið lønir, pakkitilfar o.a. fer upp, mugu ráfiskaprísirnir lækka, og tá ið soluprísirnir faru upp, verða rávoruprísirnir at hækka tilsvarandi.

Myndin, sum onnanfyri nyndað, sær ikki so galin út. Men spurningurin er, hvussu vildi hetta sæð út, um vit hovdu havt áðurnevnda prístalsvokstur í tíðarskeiðinum 1. januar til 1. oktober og harvið tilsvarandi lønarhækkingar, og ongar hækkingar av okkara soluprísum?

Úrslitið vildi havt verið, at áðurnevnda hækking í timalønum vildi havt fört við sær eina lækkan av rávoruprísunum uppá umleið 7 oyru/kg.

Niðurstoðan er tann, at vit arbeiða eftir einum systemi fyri ásetan av ráfiskaprísunum, sum er so paradoksal, at hvorja ferð lønirnar hækka, vegna prísvokstur í samfelagnum, mugu ráfiskaprísirnir - prísirnir til fiskimannin — setast niður samsvarandi.

Tey seinastu árini hevur ein lækkan av prísunum til fiskimannin ikki verið neyðug, av tí at prísvoksturin á marknaðinum alltíð hevur verið nóg stórur til bæði at rinda hægri lønir og aðrar útreiðslur og til at geva nakað til fiskimannin eisini.

Tað er ikki óhugsandi, at í framtíðini kunna vit koma út fyri eini prísstaguatión. Um so er at prístalsvoksturin heldur áfram (og tað hava vit lov at rokna við) so vil hetta enda við eini framhaldandi lækkan av tí prísi, sum verður goldin fyri fiskin. Tað vil siga, vit hava eina stoðu, sum ikki er haldbar. Og uppaftur nógv verri vil stoðan gerast, um soluprísurin skuldi lækka.

Eisini ber systemið í sær, at tað er ongin áhugi hjá framleiðarunum at biliggera framleiðsluna (rasjonalisera), tí framleiðarin fær einki afturfyri, men má bera allar útreiðslur av eini rasjonalisering. Útbýtið kundi moguliga fingist upp og neyðugir lønartimar til eina ávísa nogd av fiski kundi óivað minkast, men hetta kemur at kosta pening og tað er óhugsandi, at ein parturin áteku sær henda kostnað og einki fáa av ágóðanum sjálvur.

Omanfyri nevndi framgangshátur til ótrokning av rávoruprísum er samsvarandi løgtingslóg nr. 21 frá 1969. Sostatt eru ikki heimildir til hjá prísásetingarnevndini ella øðrum at gera nakrar broytingar uttan viðari.

Eitt annað, sum eisini er vert at bita merki í, er, at pristilskotið er læst fast til 15 oyru pr.kg uttan mun til, hvussu soluprísirnir annars eru. Tað kann tykjast eitt sindur logið ella ólogiskt, at hava læst prísískoytið fast. Ein betri skipan vildi kanska verið at lagt prísískoytið í ein grunn, tá ið prísirnir eru so hægir sum teir eru í løtuni fyri at gjalda út av hesum grunni aftur seinni, um so er at prísirnir skuldu fallið aftur.

Mær kemur fyri, at vit í trikantinum, fiskimaður - arbeiðsmaður - framleiðari hava eina óhaldbara stoðu, og at vit við hvussu so er, tá ið soluprísirnir á marknaðinum koma at fella ella í minsta lagi at stagnera, vilja fáa problemir at striðast við, sum ikki verða lott at loysa við tí skipan, vit nú hava. Mær vitandi er í umbúna at seta niður eina nevnd at kanna viðurskiftini viðvíkjandi prísískoytinum. Spurningurin er, um ikki tað hevði verið rætt, at henda nevnd eisini fekk til uppgávu at meta um tey problemir, sum eg havi umrott í hesum greinastubba. Tað kundi hugsast, at funnið kundi verið fram til eina skipan, sum tryggjaði eitt rættvist býti av framleiðsluágóðanum og eitt rættvist býti av byrðunum, tá tær skulu berast og harvið ta neyðturviligu harmoni millum teir triggjar omanfyrinevndu partarnar. Tað er við hvussu er ein fortreyt, um so er at vinnulívið framyvir skal trívast her á landi, skrívar Birgir Danielsen at enda í greinini, sum stóð í blaðnum fyri nærum 2 árum síðani.

TABEL I.

Ymsir studningar til feskfiskafør og -manningar figgjarárini 1975/76 - 79/80.

	75/76	76/77	77/78	78/79	79/80[1]
Minstaløn tilsamans	4.844.326	3.204.015	3.135.112	4.060.365	5.232.000
Minstalon til feskfiskifør [2]	3.000.000	2.000.000	2.000.000	3.000.000	3.500.000
Minstivinningur til útróðrarbátar	—	48.956	79.277	82.391	245.000
Oljustudningur tilsamans	4.499.819	10.447.071	10.193.718	8.480.760	18.165.000
Oljustudningur til feskfiskafør [2]	1.962.000	4.555.000	4.444.000	3.698.000	7.920.000
Fritiðarlon tilsamans	555.551	1.032.410	860.045	745.905	967.000
Fritiðarlon til feskfiskafør [2]	290.000	539.000	449.000	390.000	503.000
Prísiskoyti til feskfiskamanningar					
ómynstraðar manningar	5.620.473	5.848.373	6.992.383	5.045.634	2.765.000
mynstraðar manningar	4.704.211	4.469.099	4.728.823	6.371.588	5.169.000
Ráfiskastudningur	7.992.000	8.057.000	13.387.000	48.122.000	40.000.000[3]
Rakstrarstudningur					971.000
Agnstudningur					2.618.000
Studningur tilsamans til feskfiskifor	23.568.684	25.459.472	32.001.206	66.627.222	63.446.000

[1] Útgjaldingar fyri 3/4 ár.

[2] Leysliga mett.

[3] Upplýst frá Ráfiskagrunninum.

TABEL 2

Avreiðingarprísir á feskfiski.

		1975	1976	1977	1978	1979
Toskur	1 A	2,60	3,50	3,60	3,30	3,70
—	1 B	1,90	2,65	3,20	2,90	3,05
—	2 A	2,15	2,55	3,45	3,20	3,35
—	2 B	1,10	2,25	3,10	2,75	2,90
—	3	1,00	1,00	1,00	1,00	1,15
Hýsa	1 A	2,15	2,60	3,40	3,25	3,65
—	1 B	1,15	2,30	3,05	2,80	3,05
Brosma	1	1,35	1,95	2,85	2,80	2,95
—	2	1,35	1,05	1,70	1,65	1,80
Longa		1,80	2,55	3,30	3,30	3,45
Upsi		1,00	1,80	2,50	2,50	2,65
Kongafiskur			—	1,15	1,15	1,75
Steinbítur				2,65	2,65	2,80
Blálonga		—	—	2,50	2,50	2,65
Kafvi 2		8,00	11,50	12,10	12,10	14,65
Reyðsprøka		1,90	2,60	2,75	2,75	2,90
Tunga		2,00	2,70	4,30	4,30	4,90
Toskurogn		—	—	—	—	
Upsarogn		—	—	—	—	—

Heimildartilfar: Ráfiskigrunnurin.

TALVA 3.

Prístøl

PRÍSTALSNEVNDIN
Tórshavn

PRÍSTØL

	Lutfall 1. juli 1975	Prístal 1. juli 1976	Prístal 1. juli 1977	Prístal 1. juli 1978	Prístal 1. okt. 1978	Prístal 1. okt. 1979	Prístal 1. apríl 1979	Prístal 1. juli 1979	Prístal 1. jan. 1979	Prístal 1. jan. 1980
Breyð og mjøl	4,39	103,1	107,6	117,3	119,2	120,4	121,0	121,4	128,9	132,3
Kjøt	10,23	108,1	112,1	120,0	120,9	123,4	123,9	124,7	128,3	134,0
Fiskur	3,95	104,4	118,3	139,8	143,2	145,7	148,4	151,3	154,5	158,4
Mjólk, fitivørur, egg	10,58	99,1	101,2	110,3	111,2	113,5	114,3	114,7	118,3	124,3
Frukt og grønmeti	3,76	111,5	117,6	128,5	145,7	129,8	135,7	158,0	178,1	159,9
Eplir	1,85	288,9	170,8	108,0	127,0	121,9	150,6	158,2	185,9	159,3
Sotmeti	3,97	81,3	74,0	76,8	77,6	80,1	81,4	82,1	84,8	89,2
Aðrar matvørur	0,69	106,4	118,2	129,7	133,8	137,0	140,4	142,4	148,4	155,0
Drekkavørur	2,77	108,0	138,6	187,5	161,9	173,0	172,9	168,8	175,4	188,2
Tubbak	3,76	104,8	106,5	109,0	110,0	118,7	122,3	125,8	137,8	140,3
Rúsdrekka	1,84	110,9	110,9	114,0	114,0	114,0	147,7	144,1	155,1	155,1
Klæðir, skógvar	10,20	104,7	112,9	122,7	123,7	125,7	126,8	128,0	130,5	133,0
Vask og snák	3,32	105,5	113,5	127,2	130,9	135,8	138,4	141,2	145,5	150,8
Búnytur	8,18	111,3	110,7	118,7	120,1	121,6	122,7	124,2	126,7	129,4
Olja og ravmagn	10,49	113,4	125,1	127,5	126,5	127,1	135,2	156,3	186,0	197,9
Býti	10,98	101,1	113,6	121,5	122,7	123,4	125,7	131,4	138,2	143,2
Aðrar vørur	9,04	109,3	101,9	124,4	125,5	126,6	130,3	132,8	137,5	147,3
Prístalið	100,0	108,3	112,9	121,2	123,0	123,9	127,5	132,1	140,4	144,8

29. apríl læt Adolf V. Hansen býta út millum tingmenn soljóðandi

NOTAT

1. juli 1971 var pristalið 625 og var fiskaprísurin tá 1,45 kr./kg.

1. juli 1975 var (gamla) pristalið 953. Her var talan um ein vokstur uppá 328 stig ella 52,48 %.

Fram til 1. juli 1975 varð nýttur ein lonarkofficientur uppá 1,30. Prosentvísi pristalsvoksturin viðv. lonum var sostatt 52,48 × 1,30 ella 68,22 %.

Hevði sociala nevndin havt nýtt fiskaprísirnar pr. 1. juli 1971 sum grundtol ístaðin fyri (botn-)prísirnar pr. 1. juli 1975, so hevði útrokningin á síðu 2 í álitinum sæð soleiðis út:

	Pristal		Pristals-prísir	Veruligur prísur	
1/7 1971	625		1,45	1,45	0,00
1/7 1975	953		2,44	1,92	0,52
1/7 1975	100		2,44	1,92	0,52
1/7 1976	108,3	(106)	2,64	2,36	0,28
1/7 1977	112,9	(112)	2,84	3,01	+ 0,17
1/7 1978	121,2	(121)	3,14	3,10	0,04
1/7 1979	132,1	(130)	3,44	3,04	0,40
1/2 1980	144,8	(142)	3,84	3,21	0,63

Sum tað sæst vildi tað uppskotna pristalið bert givið tap í prísi í juli ársfj. 1977, men tó skal viðmerkjast at samb. uppskotinum skuldi vanligur prísvokstur sum ikki stavaði frá pristalinum takast við í tann mun pristalið ikki var nóg mikið. Hetta sum kompensatión fyri tær lonarhækkanar, ið eru annað hvørt ár. Hesar hækkanir eru heldur ikki smáar hesi árini.

Eitt pristal sum her nevnt hevði spart landskassan fyri milliónir í studningi. Ábyrgdin og sparihugurin eins og tann sunni handilsligi áhugin hevði á henda hátt verið lagdur á teir rættu herðarnar.

Landskassin, ið sku kli verið hugvekjari, er vorðin hovdapúta hjá alt ov mongum.

2. viðgerð 29. apríl. § 1 í uppskotinum frá Foroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki fall við 8—0. Málið sostatt burturfallið.

63. Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1980

Ár 1980, mikudagin 19. mars legði Atli P. Dam, logmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

U p **p** s k o t
til
samtyktar

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 29. februar 1980 millum Føroyar og Noreg um sínamillum fiskirættindi í 1980.

Viðmerkingar:

Sambært skipanina millum Foroyar og Noreg um hovuðsreglurnar fyri sínamillum fiskiskap (tingmál nr. 49/1976) skulu partarnir fyri í ár í senn avtala nogdir og fiskaslog, sum loyvt verður portunum at fiska á sjóokinum hjá hvorjum oðrum.

Samráðingar um eina slíka avtalu fyri sínamillum fiskiskap í 1980 byrjaðu í Bergen tann 23. november 1979, hildu fram í Keypmannahavn 7. januar 1980 og aftur í Bergen 28. - 29. februar 1980. Partarnir samdust tá um viðlogdu skipan, sum í hovuðsheitum er ein framleingjan av skipanini fyri 1979 (tingmál nr. 25/1978). Samantikið eru nogdirnar, sum partarnir loyva, veiddar á sjóokinum hjá hvorjum oðrum munandi minni í 1980, enn tær vóru í 1979.

Fyri veiðuna av vanligum matfiski ber skipanin fyri 1980 í sær, at foroysk skip fáa loyvi til at veiða 6.200 tons á norska landgrunninum norðanfyri 62 gr. n.br. og í fiskivarðveitingarrokinum við Svalbard, harav toskur 4.350 tons, hýsa 600 tons og annar fiskur 1.250 tons. Harumframt er tað loyvt at veiða 1.800 tons av upsa sunnan fyri 62 gr. n.br. Tað vil siga, at samlaða nogdin av botnfiski verður 8.000 tons mótvegis 12.000 tonsum í 1979 ella ⅓ minni.

Afturfyri fáa norsk skip loyvi til at veiða 8.000 tons av botnfiski í foroyskum sjógvi mótvegis 11.500 tonsum í 1979, t.v.s. ein minking við sløkum triðingi. Hesin fiskiskapur skal miða ímóti at veiða longu, brosmu, blálongu og upsa, meðan toskur bert í minni mun má veiðast sum hjáveiða.

Viðv. sínamillum fiskiskapi av idnaðarfiski og makreli ber skipanin í sær, at foroysk skip fáa loyvi til at veiða 2.000 tons av makreli, 11.000 tons av lodnu, umframt 18.000 tons av hvítingsbróður, nebbasild, svartkjafti og brislingi. Av hesum 18.000 tonsunum má veiðan av brislingi í mesta lagi verða 3.000 tons. Harafturat er loyvt føroyskum nótaskipum í royndarfiskiskapi at veiða upp til 5.000 tons av svartkjafti. Veiðan av makreli má ikki byrja fyrrenn norskum kraftblokkaskipum er loyvt at fiska.

Norsk skip fáa loyvi til at veiða 50.000 tons av svartkjafti við tilsamans 60 skipum. Av skipunum mugu bert 14 verða á fiskileið í senn, umfram 10, sum hava loyvi til at leita eftir svartkjafti uttanfyri eina av vaktar- og bjargingartænastuni til eina og hvorja tíð ásetta hoyuðsfiskileið. Av nevndu nogd av svartkjafti skulu 45.000 tons veiðast í tíðarskeiðinum 1. mai til 10. juni og 5.000 tons restina av árinum í royndarfiskiskapi.

Samanborið við 1979 eru broytingarnar viðvikjandi ídnaðarfiskiskapinum eyðkendar av, at foroysk skip í norskum sjógvi í 1980 sleppa at veiða mununandi minni av makreli, men meira av øðrum fiskaslogum, meðan loyvda norska veiðan av svartkjafti í foroyskum sjógvi er mununandi skerd, bæði í nogd og tal á skipum í senn.

Eitt yvirlit yvir tey skip, ið ætla at taka lut í sínamillum fiskiskapinum í 1979, skal verða avvarðandi foroyskum og norskum myndugleikum í hendi innan 1. apríl 1980.

SÍ SKJAL 7.

1. viðgerð 24. mars. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 26. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum 19. mars 1980 og undir 1. viðgerð 23. mars 1980 beint í marknaðarnevndina.

Ein samd nevnd mælir til, at álagt verður landsstýrinum — áðrenn sínámillum fiskirættindasáttmálin verður gjordur við Noreg fyri 1981 — gjalla at kanna, hvussu nógv norðmenn veiða av Atlanto-scandiska sildastovninum, við skrivliga at leggja spurningin fram á fyrsta fundi aftur í Nordisk Kontaktorgan í fiskerispørgsmál.

Hesin spurningur saman við einari fiskaríbiologiskari meting av stovni og stoddini av sildini, ið veidd verður, verður at leggja fyri marknaðarnevndina á ólavsokutíðsetuni 1980.

Undir hesum fyritreytum mælir marknaðarnevndin til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein samd nevnd mælir til, at neyvari eftirlit verður við øllum útlendskum fiskiskipum á foroyskum sjóoki.

2. viðgerð 26. mars. Uppskot landsstýrisins varð endaliga samtykt við 28—0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 1500-4-2.

64 Skipan um sínámillum fiskiskap í 1980 Føroyar-Svøríki og Føroyar-Póland

Ár 1980, mikudagin 19. mars legði Atli P. Dam, logmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtykt

Løgtingið góðkennir, at loyvt verður 2 skipum úr Pólandi at veiða 5.000 tons av svartkjafti til matna og 2 skipum úr Svoriki at veiða svartkjaft á sjóoki Føroya í 1980.

Viðmerkingar:

Síðani útflytingina av fiskimarkinum til 200 fjórðingar hevur fyri 1 ár í senn loyvi verið givið 3 svenskum og 2 pólskum skipum at veiða svartkjaft á sjóoki Foroya. Fyri 1979 vóru loyvini góðkend av logtinginum við tingmáli nr. 52/1978.

Myndugleikarnir í Svoriki og Pólandi hava heitt á landsstýrið um samráðingar um rettindi til at fiska svartkjaft á sjóoki Foroya í 1980.

Samráðingar vóru í Goteborg 14. februar 1980 millum umboð fyri landsstýrið og umboð fyri svensku myndugleikarnar. Partarnir samdust um eina skipan fyri sínamillum fiskiskap í 1980. Skipanin ber í sær, at 2 svenskum skipum verður loyvt at fiska svartkjaft á sjóoki Foroya, og at foroyskum skipum verður loyvt at fiska 750 tons av toski í svenskum sjógvi í Eystrasalti. Hóast loyvi kundu gevast, luttók einki svenskt skip í svartkjaftafiskiskapinum við Foroyar í fjor.

Umboð fyri landsstýrið og umboð fyri pólsku myndugleikarnar samráddust 15. februar 1980 í Keypmannahavn. Partarnir samdust um eina skipan fyri sínamillum fiskiskap í 1980. Skipanin ber í sær, at 2 pólskum skipum verður loyvt at fiska 5.000 tons av svartkjafti til matna, og at foroyskum skipum verður loyvt at fiska 1.750 tons av toski í pólskum sjógvi.

Í árunum frammanundan hevur ikki verið sínamillum fiskiskapur millum Foroyar og ávikavist Svoriki og Póland. Talan hevur verið um einvísar somdir fiskiloyvum viðvíkjandi frá foroyskari síðu. Hovuðsatvoldin til hetta hevur verið, at svartkjaftastovnurin var meitur at vera stórur, væl fyri og ikki troyttur optimalt. Sambært

orðalagið í væntaða altjóðasáttmálanum um havrættarviðurskifti hevði ein frá føroyskari síðu ikki ræt til at nokta øðrum at veiða av tí partinum, sum var eftir, tá Føroyar hava tillutað sær sín part til egnan fiskiskap og til aðrar í býti fyri annan fiskiskap.

Hóast enn einki TAC (mest loyvda veiða) er ásett fyri svartkjaftastovnin metir landsstýrið, at veiðan av svartkjafti er vaksin so skjótt og er vorðin so stór, at umráðandi er, at ásett verður eitt TAC. Arbeiðið við at gera eitt tilmæli í so máta til politisku myndugleikarnar í avvarðandi londum eru fiskifroðingar í altjóða samvinnu komnir væl á veg við. Av hesi orsok er tað stoða landsstýrisins, at veiðunøgdirnar av svartkjafti á sjóoki Føroya eiga at svara til føroyska veiðutorvin og veiðuna hjá øðrum afturfyri veiðuloyvi til føroysk skip í fremmandum sjógvi.

Tað býtið av fiskirættindum tosk-svartkjafti, sum talan er um mótvegis Svoriki og Pólandi, metir landsstýrið vera gott. Fyri tey føroysku skipini, sum farn í Eystrarsalt at fiska, er tað av týdningi at hava fiskiloyvi bæði í svenskum og pólskum sjógvi, av tí at góðar fiskileiðir eru beint við fiskimarkið millum tey bæði londini.

1. viðgerð 24. mars. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 26. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 19. mars 1980 og undir 1. viðgerð 24. mars beint í marknaðarnevndina.

Ein samd marknaðarnevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Eli Nolsoe og Jógvan Olsen) átalar, at í avtalaðu skipanini er einki nevnt um, hvussu nógv tons verða loyvd svium at veiða av svartkjafti, og átalar eisini, at ávís skip hava fingið loyvi frá landsstýrinum at fara at veiða í Eystursjónum, áðrenn avtalan er góðkend av Føroya lagtingi.

Ein samd nevnd mælir til, at neyvari eftirlit verður við øllum útlendskum fiskiskipum á føroyskum sjóoki.

2. viðgerð 26. mars. Málið varð endaliga samtykt við 29—0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1500-1-7 og 1500-4-24.

65. Fyrispurningur til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann

Ár 1980, mikudagin 19. mars setti Ingrid Sondum, logtingslimur, Vilhelmi Johannesen, landsstýrismanni fram soljóðandi

fyrispurning

Hevur landsstýrið gjort nakað við at seta ta javnrættindanevnd, sum logtingið viðtók 26. apríl 1979 skuldi setast?

Viðmerkingar:

26. apríl 1979 — fyri 11 mánaðum síðani — var viðtikið á logtingi, at landsstýrið skuldi seta eina javnrættindanevnd smbr. § 11 í samgonguskjalinum, har sagt verður, at «virkað verður fyri javnrættindum ímillum kynini» (javnber logtingsmál nr. 49/1978).

Henda nevnd skal fyrst og fremst kanna, um og hvar mismunur verður gjordur á almennum og privatum arbeiðsplássum og í samfelagslivinum sum heild. Somuleiðis skal tað vera moguligt hjá einstaklingum ella felogum at venda sær til nevndina við spurningum, ið kunnu haldast hava týdning í hesum arbeiði.

Málið var lagt fram av Jonu Henriksen, Karin Kjølbro og Ingrid Sondum.

25. mars svaraði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

Fyrispurningurin, sum er settur av Ingrid Sondum, logtingskvinnu, 17. mars 1980, er soljóðandi:

«Hevur landsstýrið gjort nakað við at seta ta javnrættindanevnd, sum logtingið viðtók 26. apríl 1979 skuldi setast?»

Til henda fyrispurning kann verða upplýst, at landsstýrið hevur arbeitt við spurninginum um setan av eini *javnstaðunevnd,* sum nevndin sambært samtyktina frá 26. apríl 1979 skal eita, síðan henda samtykt varð gjordi.

Undir viðgerðini av málinum hevur landsstýrið frá Kvinnufelagssamskipan Føroya móttikið áheitan um at KSF verður umboðað í nevndini, eins og KSF mælir til, at tey arbeiðskvinnufeløg, sum ikki eru limir í Føroya Arbeiðarafelag, fáa eitt umboð í nevndina.

Á norðurlendska kvinnuløgfroðingafundinum, sum varð hildin í Svorlki í 1979, og har arbeiðið hjá javnstaðunevndunum í ollum norðanlondunum varð viðgjort, luttók ein fulltrúi í landsstýrinum sum umboð fyri Føroyar, og hevði í hesum við-

fangi samráðingar við umboð fyri dansku javnstoðunevndina á skrivstovu hennara í Keypmannahavn.

Á hesum grundarlagi og út frá teimum upplýsingum um javnstoðunevndirnar í norðanlondunum, sum eru saulaðar í bókini «Tiltak for likestilling mellom kvinner og menn på arbetsmarkedet i Norden», sum er givin út av Norðurlandaráðnum og Norðurlandaráðharraráðnum í røðini «Nordisk utredningsserie» í 1959, er nú gjord ein frágreiðing í málinum til nýtslu fyri landsstýrið í stoðutakanini til spurningin, hvussu føroyska javnstoðunevndin eigur at verða samansett, og hvussu starvsoki hennara eigur at verða lýst, og so skjótt tað tilmælið um hetta, sum í lotuni er í gerð, er liðugt, fer landsstýrið at taka stoðu til setanina.

Landsstýrið hevur mett, at tær royndir, sum javnstoðunevndirnar í hinum norðanlondunum hava av arbeiði sínum gjognum fleiri ár, áttu at komið føroysku javnstoðunevndini til góðar, so at hon beinan vegin fær eina hóskandi samanseting og tað rætta starvsokið, og tað tí ikki verður neyðugt eftir stutta tíð at gera broytingar hesum viðvíkjandi, sum tað hevur verið gjort í onkrum av hinum norðanlondunum.

Út frá hesum hevur málið verið gjolla kannað og umhugsað, og hetta arbeiðið er nú lokið, so at landsstýrið væntandi kann seta eina væl virkandi føroyska javnstoðunevnd nú í vár.

---

66. Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirættindi í 1980

Ár 1980, mikudagin 19. mars legði Atli P. Dam, logmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar.

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðlingdu skipan, dagfest 13. mars 1980, um sínamillum fiskirættindi í 1980 millum Føroyar og EEC.

Viðmerkingar:

1. 13. mars 1980 hava samráðingar verið í Brüssel millum umboð fyri landsstýrið og EEC-nevndina um sínamillum fiskirettindi í 1980 millum Foroyar og EEC. Úrslitið av samráðingunum er viðlagda skipan, daglest 13. mars 1980.

Samráðingarnar 13. mars 1980 vóru framhald av samráðingum í december 1979, januar og februar 1980. Av tí at partarnir ikki komu til sáttis um eina sínamillum skipan undir samráðingunum í december, januar og februar hevur eingin formlig skipan verið higartil í 1980. Sínamillum fiskiskapur er tó farin fram eftir reglunum í 1979. Veiddu nøgdirnar skulu roknast uppí loyvdu nøgdirnar fyri alt árið 1980, soleiðis sum tær eru fyrisettar í skipanini frá 13. mars 1980.

2. Loyvda talið á EEC-fiskiskipum at veiða á landleiðini er ikki endaliga ásett enn, men skulu samráðingar verða um m.a. henda spurning 27. mars 1980.

3. Loyvdu veiðunøgdirnar í 1980 av øsløgdum fiski eru hesar:

Hjá EEC-skipum á landleiðini, 1979-tølini eru sett í klombrum.

1.750 tons av toski (2.500 tons)
1.750 tons av hýsu (2.500 tons)
5.500 tons av upsa (13.500 tons)
5.000 tons av kongafiski (5.500 tons)
4.400 tons av blálongu (5.200 tons)
500 tons av longu (1.300 tons)
300 tons av brosmu (500 tons)
500 tons av flatfiski (700 tons)
600 tons av ymiskum fiskaslogum (600 tons)
25.000 tons av svartkjafti (30.000 tons).

Hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi:

(a).. 500 tons av longu og 500 tons av brosmu á Rock-All-leiðini; í 1979 vóru nøgdirnar tær sonnu. Eisini er loyvt at veiða 750 tons av ymsum botnfiski sum hjáveiðu fyrst og fremst í idnaðarfiskiskapi norðanfyri 56° 30′ N; 1979-nøgdin var 850 tons.

(b). 2.500 tons av tí eystara og 21.000 tons av tí vestara makrelstovninum; 1979-nøgdin var 40.000 tons.

(c). 5.000 tons av rossamakreli móti 6.000 tonsum í 1979.

(d). 20.000 tons av hvitingsbróður, 15.000 tons av nebbasild og 15.000 tons av brislingi; 1979-tølini vóru ávikavist 22.500 tons, 15.000 tons og 15.000 tons. Fiskast kunnu tó eyka 5.000 tons av hvørjum av nevndu fiskaslogum, treytað av, at samlaða veiðunogdin fyri hvitingsbróður, nebbasild og brisling ikki fer uppum 50.000 tons.

(e). 25.000 tons av svartkjafti eins og í 1979.

(f) 600 tons av sild í Skagerak; 1979-talið var 700 tons.

(g). 1.880 tons av rækjum í Vesturgrønlandi í NAFO-øki 1; í 1979 3.600 tons. Í 1979 kundu harafturat veiðast 536 tons vestanfyri miðlinjuna millum Grønland og Kanada. Herumframt royndarveiðu eftir rækjum í ICES-øki XIV (Eysturgrønlandi).

(h). 250 tons undir Vesturgrønlandi og 200 tons undir Eysturgrønlandi.

(i). 500 tons av kongafiski undir Grønlandi. Í 1979 var loyvt at fiska 300 tons undir Vesturgrønlandi og 300 tons undir Eysturgrønlandi.

SÍ SKJAL 8.

1. viðgerð 24. mars. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 26. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 19. mars 1980 og undir 1. viðgerð tann 24. mars beint í marknaðarnevndina.

Ein meiriluti (Jógvan Durhuus, Edmund í Garði, Eliesar Arge, Haldur Hansen og Hilmar Kass) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Jógvan I. Olsen og Eli Nolsoe) tekur ikki undir við sáttmálanum við EEC-londini, tí vit skulu lata EEC-londini fáa fisk av okkara grunnum afturfyri tað, sum føroyingar veiða í grønlendskum og donskum sjógvi, og eisini tí at ein treyt fyri henda sáttmála er, at Føroya Banki eins og okið á Norðhavinum, ið hava verið friðað fyri trolveiðu, nú verður lagt undir troling.. Hetta fører við sær, at oll húkaveiða uttan fyri 12 fjórðingamarkinum við hesum hevur fingið so vánaligar umstøður at arbeiða undir, at væntast kann, at henda veiða fer at doyggja út.

Um hesin sáttmálin verður samtyktur, og tann omanfyri nevnda húkaveiða skal hava nakra framtíðarvánir, so er einasta gongda leið tann, at henni verður storsti partur av okkara íslendsku kvotu tillaðaður. Út frá hesum setur minnilutin fram

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at tilluta minst 75% av botnfiskakvotuni, sum vit eiga í íslendskum sjógvi til húkaveiðu.

Ein samd nevnd mælir annars til, at neyvari eftirlit verður við øllum útlendskum fiskiskipum á føroyskum sjóøki.

2. viðgerð 26. mars. Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 19—0 atkvoðum.
Atkvott varð við navnakalli um uppskot til samtyktar frá minnilutanum Jógvan Olsen og Eli Nolsøe. Atkvøðugreiðslan varð hendan:

Ja atkvøddu: Ivan Johannesen, Asbjørn Joensen, Adolf Hansen, Eli Nolsøe, Jørgen Thomsen, Hans M. Joensen, Eyðun Videro, Håkun Djurhuus, Eilif Samuelsen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Agnar Nielsen og Pauli Ellefsen.
Atkvøddu ikki: Signar Hansen, Hilmar Kass, Poul J. Olsen, Haldur Hansen, Sverre Midjord, Andrias P. Jacobsen, Hanna Lisberg, Jona Henriksen, Ingrid Søndum, Karin Kjølbro, Jógvan Durhuus, Edmund í Garði, Eliesar Arge, Øssur Dam Jacobsen, Óli Breckmann, Flemming Mikkelsen og Hilmar Bech.
Burturstaddir: Jutul Jacobsen og Finnbogi Isaksen.

Uppskot minnilutans sostatt fallið við 13 ja-atkvøðum, 17 atkvøddu ikki.

F.L. j. nr. 1198-2/80.

67. Fyrispurningur til Dánjal Paula Danielsen, landsstýrismann

Ár 1980, fríggjadagin 21. mars setti Johs. Martin Olsen, logtingsmaður fram sóljóðandi

fyrispurning

Sum flest ollum kunnugt hevur Sjóvar sókn eitt landsveganet, sum ikki bert er óhóskandi til nútíðar ferðslu, men sum í mongum forum líka fram er vandamikið bæði fyri koyrandi og fótgangandi fólkið.

Vegurin er so smalur og útsýnið vánaligt, hetta er galdandi bæði innan og utanfyri bygdina.

Lastbilarnir eru vorðnir bæði stórir og tungir, so ein undrast yvir, at teir fáa loyvi til at lasta og flyta síni 20 - 25 tons eftir einum vegi, sum menn í síni tíð gjordu við eyrhoggara og spaka og við grótleypi á haki fingu tilfar tilvega við.

At fólkið í Sjóvar sókn eftir hondini er farið at ivast, um tað góða sinnalagið hjá avvarðandi myndugleikum er ikki so logið, tí neyvan finst ein sókn av slíkari stødd sum omanfyri nevnd við so út av lagi vánaligum veganeti, sum ikki fyri langari tíð síðan hevur fingið ella er í ferð við at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

Av tí at eg hesi seinastu 8 árini fleiri ferðir munnliga havi spurt bæði innan og uttan tingsins gátt avvarðandi myndugleikar, nær ætlanin er at byrja vegagerðina í Sjóvar sókn, serligaímillum bygdirnar Skála - Strendur, og havi fingið svarað, at man umhugsaði og arbeiddi við málinum, loyvi eg mær, eftirsum eg heldur ikki á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1980/81 dugi at finna nakra upphædd til nýgerð av vegi í áður nevndu sókn at spyrja samferðslumálaráðharran D. P. Danielsen.

1) Hví er eingin peningur, heldur ikki hesa ferð á fíggjarlógini 1980/81, avsettur til vegagerð Strendur - Skála ella aðrar staðir í Sjóvar sókn.
2) Er nokur ætlan gjørd, um so er, hvar kemur vegurin at ganga, og nær verður ætlanin framd.

23. apríl svaraði Dánjal P. Danielsen, landsstýrismaður fyrispurninginum frá Johs. Martini Olsen soleiðis:

Johs. Martin Olsen hevur sett mær hendan spurning:

1. Hví er eingin peningur, heldur ikki hesa ferð, avsettur á fíggjarlógini 1980/81 til vegagerð Strendur - Skála ella aðra staðni í Sjóvar sókn.
2. Er nokur ætlan gjørd, um so er, hvar kemur vegurin at ganga, og nær verður ætlanin framd.

1. Í viðmerkingunum til fíggjarlógina er vegurin Skálaboin - Skúla nevndur, men kundi tað sama staðið: Skálaboin - Strendur. Kemst hetta av, at arbeiðið er byrjað úr Skálaboini út eftir, og er peningurin ikki harvið oyramerktur til ávíst vegastrekki, men hvussu arbeiðið best verður gjort.
2. Arbeitt hevur verið við ymsum vegforingaprojektum á landsverksfrøðingsstovninum, og er nú komið til niðurstoðu, ið verður at leggja fyri bygdaráðið í Sjóvar sókn.

---

68. Keyp av royndar- og rannsóknarskipi

Ár 1980, mánadagin 24. mars legði Heðin M. Klein, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um keyp av royndar- og rannsóknarskipi.

§ 1. Landsstýrinum verður heimlað landskassans vegna at útvega royndar- og rannsóknarskip.
2. stk. Skipið skal vera 400 - 500 brutto skrásett tons til stoddar og hava maskinorku uppá 1500 - 2000 HK.

§ 2. Neyðugur peningur til keyp og innrætting av skipinum verður útvegaður við játtan á fíggjarløgtingslógini og/ella við láni.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om køb af forsøgs- og undersøgelsesskib.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at anskaffe forsøgs- og undersøgelsesskib.
Stk. 2. Skibet skal have en størrelse på 400 - 500 brutto register tons og maskinkraft på 1500 - 2000 HK.

§ 2. De nødvendige beløb til købet og skibets indretning bevilges på finanslagtingsloven og/eller tilvejebringes ved lån.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í skrivi frá 24. apríl 1979 mælir fyristoðumaðurin fyri Fiskirannsóknarstovuni til at útvega høkkandi royndar- og rannsóknarskip í staðin fyri Jens Chr. Svabo, sum er bygdur í 1960, er 85,5 m til longdar og hevur 350 hk maskinu.

Síðani Jens Chr. Svabo varð keyptur til fiskirannsóknar- og hjálparskip, er farin stór broyting fram í okkara fiskimynstri, í okkara fiskiskipaflota og í veinunum kravum, sum í dag verða sett til fiskirannsóknir og fiskiroyndir.

Jens Chr. Svabo er nú so gamal, at viðlikahaldið av bátinum er vorðið sera umfatandi og kostnaðarmikið. Báturin er so mikið lítil, at hann illa kann nýtast til kanningararbeiði av týðningi uno veturin og um várið, tá Fiskirannsóknarstovan hevur mest brúk fyri rannsóknarskipi. Eisini er at viðmerkja, at Jens Chr. Svabo umfram at vera ótíðarhóskandi er í ógvuliga ringum standi, og at Fiskirannsóknarstovan legði bátin 1. november í fjor, av tí at hon metti tað óforsvarligt at nýta bátin á vetrardegi. Hann kann heldur ikki nýtast til royndarfiskiskap á djúpum vatni eftir fiskaslogum, sum vit eru noyddir at leggja stórri áherðslu á.

Samanuntikið verður mett, at eitt nýtt fiskirannsóknarskip eigur at fáast til vega so skjótt, sum til ber. Hetta skip skal í mindsta lagi vera 400 - 500 tons til stoddar, vera hekkutogari og hava eina minstu maskinorku uppá 500 - 2000 hk.

Um keypt verður eitt føroyskt fiskiskip, verður tað neyðugt við eini umbygging, áðrenn tað kann nýtast sum rannsóknarskip. Keypspeningurin verður meltur til um 18,5 mió. kr., meðan umbyggingin er mett til 4 - 5 mió. kr.

Ætlanin er, at skipið umleið ein triðing av árinum verður nýtt til vísindarligar royndir, ein triðing til praktiskar fiskiroyndir og tann eina triðingin til vanligan fiskiskap til tess at bota um rakstrarútreiðslurnar ta fyrstu tiðina.

Fiskirannsóknarstovan metir rakstrarútreiðslurnar fróknað kapitalútreiðslur til netto kr. 5.024.000,00. Í hesum tali eru ikki tiknar við rentur og avdráttir, umleið 1 mió. kr. av láni til umbygging av skipinum.

Á fíggjarlogtingslógini fyri 1979/80 eru settar av til raksturin av J. Chr. Svabo kr. 1.680.000,00 og í uppskotinum til fíggjarlogtingslóg 1980/81 til rannsóknarskip kr. 2.781.400,00.

Í fíggjarlógaruppskotinum eru eisini avsettar 3 mió. kr. til praktiskar fiskiroyndir.

Í grunninum til havrannsóknarskip eru kr. 3.998.967,36 og í fíggjarlógaruppskotinum 1980/81 eru avsettar kr. 400.000,00.

Skriv frá 16. mars og 26. apríl 1979 viðvíkjandi ávikavist nýggjum fiskirannsóknar- og royndarskipi og um torvin á skipi hjá Fiskirannsóknarstovuni eru hjálagd sum skjal.

Sí SKJAL 9.

1. viðgerð 9. apríl. Atkvoðugreiðsla fór fram, um hvorja nevnd málið skuldi beinast í. Við tað at 11 atkvoður vóru fyri at beina málið í fiskivinnunevndina, varð málið beint í fíggjarnevndina, sum 30. apríl legði fram soljóðandi

Alit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 24. mars 1980 og undir 1. viðgerð 9. apríl beint í fíggjarnevndina.

Eftir lógaruppskotinum fær landsstýrið heimild landskassans vegna at útvega royndar- og rannsóknarskip. Skipið ætlast at vera 4 - 500 tons og hava maskinorku 1500 - 2000 hk. Fígging ætlast útvegað á fíggjarlogtingslúg og/ella við lántoku.

Í viðmerkingunum er tilskilað, at «Jens Chr. Svabo» er verðin ov gamal, og at báturin er lagdur 1. november í fjor. Landsstýrið metir tí, at nýtt fiskirannsóknarskip eigur at fáast til vega so skjótt til ber. Viðari verður sagt, at um keypt verður eitt foroyskt fiskiskip, verður tað neyðugt við eini umbygging, áðrenn tað kann nýtast sum rannsóknarskip. Keypspeningurin verður mettur til umleið 18,5 milj. kr. og umbygging til 4 - 5 milj. kr.

Ætlanin er at nýta skipið soleiðis: ⅓ av árinum til vísindaligar royndir, ⅓ til praktiskar fiskiroyndir og ⅓ til vanligan fiskiskap til tess at bota um rakstrarúrslitið.

Landsstýrið hevur síðani talásetingar viðvikjandi rakstrar- og kapitalútreiðslum.

Fíggjarnevndin hevur viðgjort málið og býtt seg í 5 minnilutar.

Minnilutin (Hákun Djurhuus og Poul Jacob Olsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins. Víst verður á, at eingin talupphædd er nevnd í lógini í samband við heimildina til at útvega royndar- og rannsóknarskip. Tað má metast at verða eitt heilt mínitigt krav, at upplýst verður, hvat skipið kostar, og at málið soleiðis lýst kemur aftur til fíggjarnevndina. Herafturat er minnilutin av teirri áskoðan, at betri var, um útvegað varð eitt skip við minni tonsatali og minni maskinorku. Út frá hesum setir minnilutin (Hákun Djurhuus og Poul Jacob Olsen) soljóðandi

I

u p p s k o t
til
samlyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna moguleikarnar fyri at útvegað verður eitt hóskandi royndar- og rannsóknarskip, tó við teirri avmarking at yvskiligt var, at hetta skip var av minni stødd og hevði minni maskinorku enn tað, sum vísst verður til í vómerkingum landsstýrisins í fyriliggjandi lógaruppskoti. Rakstrar- og kostnaðarhátturin verður at lýsa, og verður úrslitið av øllum hesum at leggja aftur fyri fíggjarnevndina.

Minnilutin (Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og setir fram soljóðandi

II

u p p s k o t
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna moguleikarnar fyri at byggja eitt hóskandi rannsóknarskip á foroyskari skipasmiðju og at útvega upplýsingar um fíggjarligu avleiðingarnar av at útvega og reka deils eitt tílíkt skip og deils eitt minni rannsóknarskip enn tað, sum landsstýrið hevur lagt upp til.

Úrslitið av hesum kanningum verður at leggja fyri løgtingið.

Minnilutin (Jørgen Thomsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og setir fram soljóðandi

III

u p p s k o t
til
samtyktar.

Heitt verður á landsstýrið um at samráðast við føroyskt skipasmiðjurnar um bygging av hóskandi royndar- og rannsóknarskipi og at leggja úrslitið av hesum fyri løgtingið.

Minnilutin (Jógvan Durhuus) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Asbjørn Joensen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og setir einki uppskot fram.

2. viðgerð 30. april. § 1 í landsstýrisins uppskoti varð samtykt við 21—0, § 2 við 23—0 og § 3 utan atkvøðugreiðslu.

Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum Jørgen Thomsen fall við 4—0. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen fall við 8—0. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum Poul I. Olsen og Hákon Djurhuus fall við 12—0.

3. viðgerð sama dag. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 21—0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 1525-9. Lóg nr. 56 frá 12. mai 1980.

69. Løgtingslóg um læraraútbúgving

Ár 1980, mikudagin 26. mars legði Hergeir Nielsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi:

Uppskot
til

Løgtingslóg um læraraútbúgving.

I. TÁTTUR
Hugtak og endamál læraraskúlans.

§ 1. Útbúgvingin hevur til endamáls at útbúgva lærarar til fólkaskúlan. Útbúgvingin miðar eisini móti at leggja støði undir undirvísing innan aðrar skúlaformar.

2. stk. Útbúgvingin skal geva tann fakliga og námsfrøðiliga kunnleika og ta verkligu skúling, ið er neyðug fyri at kunna leggja til rættis, fremja og meta um undirvísingina og laga hesa eftir skiftandi fortreytum í skúlanum og hjá næmingunum.

3. stk. Útbúgvingin skal fremja ta persónligu menningina hjá teimum lesandi við evnisarbeiði, við samarbeiði og við medábyrgd fyri útbúgving teirra.

4. stk. Útbúgvingin skal vekja áhuga fyri námsfrøðiligum menningararbeiði og leggja støði undir fatanina av sambandinum millum læararyrkið og virki skúlans í samfelagnum.

5. stk. Útbúgvingin skal venja tey lesandi til at samarbeiði við foreldur, starvsfelagar og onnur, ið hava ábyrgdina av uppaling og útbúgving næminganna.

§ 2. Útbúgvingin, ið fer fram á Føroya Læraraskúla, tekur 4 ár.

§ 3. Landsskúlastjórin kann eftir tilmæli frá læraraskúlanum gera av, at undirvísing í einum ella fleiri lærugreinum og skeiðum kann fara fram í

Løgtingslov om læreruddannelse.

KAPITEL 1.
Almindelige bestemmelser.

§ 1. Uddannelsen har til formål at uddanne lærere til folkeskolen. Uddannelsen tager tillige sigte på at give grundlag for undervisning i andre skoleformer.

Stk. 2. Uddannelsen skal give de faglige og pædagogiske kundskaber og den praktiske skoling, der er nødvendig for at kunne planlægge, gennemføre og vurdere undervisningen og tilpasse denne efter skiftende forudsætninger i skolen og hos eleverne.

Stk. 3. Uddannelsen skal fremme de studerendes personlige udvikling gennem arbejde med stoffet, gennem samarbejde og gennem medansvar for deres uddannelse.

Stk. 4. Uddannelsen skal vække interesse for pædagogisk udviklingsarbejde og give grundlag for forståelse af sammenhængen mellem lærergerningen og skolens funktion i samfundet.

Stk. 5. Uddannelsen skal øve de studerende til at samarbejde med forældre, kolleger og andre, der er ansvarlige i elevernes opdragelse og uddannelse.

§ 2. Uddannelsen gives på Færøernes Seminarium og er 4-årig.

§ 3. Undervisningsdirektøren kan efter indstilling fra seminariet bestemme, at undervisning i et eller flere fag og kurser kan finde sted i helt eller del-

fullum ella lutvísum samarbeiði við aðrar útbúgvingarstovnar.

§ 4. Landsstýrið kann gera av, at aðrar útbúgvingar í samarbeiði við læraraútbúgvingina kunnu setast á stovn við læraraskúlan.

vist samarbejde med andre uddannelsesinstitutioner.

§ 4. Landsstyret kan bestemme, at der ved seminariet kan etableres andre uddannelser i samarbejde med læreruddannelsen.

2. TÁTTUR

Uppteka á Føroya Læraraskúla.

§ 5. Uppteka á læraraskúlan er treytað av, at umsokjarin hevur staðið hægri fyrireikingarroynd, studentsroynd ella kann prógva samsvarandi kunnleikastoði.
2. stk. Afturat tí í 1. stk. nevndu fakligu útbúgving eigur dentur at verða lagdur á, at umsokjarin hevur luttikið í verkligum arbeiði.

§ 6. Uppteka á Læraraskúlan fer fram við skúlaárs byrjan.
2. stk. Landsskúlastjórin kann tó undir serligum umstoðum loyva frávik frá hesi áseting.

§ 7. Avgerð um upptøku verður tikin av rektaranum við læraraskúlan eftir samráðing við lærararáðið.

§ 8. Landsskúlastjórin kann eftir tilmæli frá læraraskúlanum gera av, at útbúgving, ið fingin er aðrastaðni kann íroknast læraraútbúgvingini.

KAPITEL II.

Optagelse på Færøernes seminarium.

§ 5. Optagelse på seminariet er betinget af, at ansøgeren har bestået højere forberedelseseksamen, studentereksamen eller kan dokumentere tilsvarende kundskaber.
Stk. 2. Foruden de i stk. 1 nævnte faglige kvalifikationer bør der lægges vægt på, at ansøgeren har deltaget i praktisk arbejde.

§ 6. Optagelse på seminariet sker ved skoleårets begyndelse.
Stk. 2. Undervisningsdirektøren kan dog under særlige omstændigheder tillade fravigelse af denne bestemmelse.

§ 7. Afgørelse om optagelse træffes af seminarierektoren efter forhandling med lærerrådet.

§ 8. Undervisningsdirektøren kan efter indstilling fra seminariet bestemme, at uddannelse erhvervet andre steder kan indgå i læreruddannelsen.

3. TÁTTUR

Læraraútbúgvingin.

§ 9. Útbúgvingin skal fyri øll lesandi fevna um:
1. Tær námsfroðiligu lærugreinirnar: Námsfroði/undirvísingarlæra, sálarfroði, praktikk og námsfroðilig sergrein.
2. Lærugreinirnar føroyskt við kunnleika til íslendskt og norskt, danskt við kunnleika til svenskt, skriving, rokning,

KAPITEL III.

Læreruddannelsen.

§ 9. Uddannelsen skal for alle studerende omfatte:
1. De pædagogiske fag: Pædagogik/undervisningslære, psykologi, praktisk skolegerning og pædagogisk specialc.

2. Fagene færøsk med kendskab til islandsk og norsk, dansk med kendskab til svensk, skrivning, regning,

kristnikunnleiki og likamsvenjingar við svimjing.
3. Grundútbúgving í trimum av lærugreinunum: evning, sangi/tónleiki, smiði, handarbeiði og heimkunnleika.
4. Samtíðar- og samfelagskunning.
5. Víðari útbúgving í tveimum av lærugreinunum í fólkaskúlanum (linjulærugreinir).
6. Iskoytisskeið og felagstímar.
2. stk. Umfram ta í 1. stk. nevndu útbúgving kunnu tey lesandi velja:
a) undirvísing sum skeið ella lesiringar.
b) undirvísing í fjóðføris-tónleiki.

3. stk. Tey lesandi velja námsfrøðiliga sergrein og linjulærugreinir innan teir givnu moguleikar.
4. stk. Landsskúlastjórin ásetur eftir samráðing við læraraskúlan, hvørjar lærugreinir, ið kunnu vera liniulærugreinir og skeiðlærugreinir.

§ 10. Eftir reglum, ið Landsskúlaráðið ásetur eftir samráðing við læraraskúlan, kunnu lesandi vegna serstakar umstoður sleppa undan útbúgving í einari ella fleiri av teimum lærugreinum, sum eru nevndar í § 9, 1. stk.
2. stk. Frágreiðing um undantoku verður skrivað á fráfaringarprógvið.

§ 11. Sambært § 9, 1. stk., nr. 2 skal undirvísingin í lærugreinunum donskum, skriving og roknin enda við eini royn við endan á 1. útbúgvingarári. Við stoði í hesum royndarúrsliti og eini meting av avvarðandi næmingi í hinum lærugreinunum, sum undirvísingin sambært § 9, 1. stk. hevur fevnt um, her íroknað praktikk, ger læraraskúlin av, hvørt tann lesandi kann halda fram við útbúgvingini 2. útbúgvingarárið.
2. stk. Aftan á 1. útbúgvingarárið verður hildið fram við undirvísing í føroyskum, sum endar við royn eftir fjórða ári.
3. stk. Við endan á undirvísingini í lærugreinini praktikk verður ein meting

kristendomskundskab og legemsøvelser med svømning.
3. Grunduddannelse i 3 af fagene: forming, sang/musik, sløjd, håndarbejde og hjemkundskab.
4. Samtids- og samfundsorientering.
5. Videregående uddannelse i 2 af folkeskolens fag (linjefag).
6. Supplerende kurser og fælles-timer.
Stk. 2. Udover den i stk. 1 nævnte uddannelse kan de studerende vælge:
a) undervisning i form af kurser eller studiekredse.
b) undervisning i instrumental-musik.

Stk. 3. De studerende vælger pædagogisk specialfag og linjefag inden for de givne muligheder.
Stk. 4. Undervisningsdirektøren fastsætter efter forhandling med seminariet hvilke fag, der kan være linjefag og kursusfag.

§ 10. Efter regler, der fastsættes af undervisningsrådet efter forhandling med seminariet, kan studerende fritages for uddannelsen i et eller flere af de i § 9, stk. 1. nævnte fag, når ganske særlige forhold foreligger.
Stk. 2. Oplysning om fritagelse gives i afgangsbeviset.

§ 11. Uddannelsen efter § 9, stk. 1, nr. 2, i fagene dansk, skrivning og regning skal afsluttes med en prøve ved udgangen af uddannelsens 1. år. På grundlag af resultatet af denne prøve og en vurdering af den pågældende i de øvrige fag, som undervisningen har omfattet efter § 9, stk. 1, herunder i praktisk skolegerning, afgør seminariet, om den enkelte studerende kan fortsætte uddannelsen i dens 2. år.
Stk. 2. Efter 1. uddannelsesår fortsættes med undervisning i færøsk sprogfærdighed, som afsluttes med en prøve efter 4. år.
Stk. 3. Ved afslutningen af undervisning i faget praktisk skolegerning fore-

gjord av stoðuni hjá tí lesandi. Til tess at enda ta samlaðu útbúgvingina skal tann lesandi hava tað undirvísingarfimi, sum er neyðugt fyri at rokja undirvísingina í fólkaskúlanum.

4. stk. Í hinum lærugreinunum verður stoðan hjá teinnum lesandi staðfest við endaligum royndum, ið verða hildnar, tá ið avvarðandi undirvísing er lokin. Áðrenn royndin verður hildin, gevur lærarin eitt stoðumet, sum verður sett í prógvtokuskjallið saman við royndarmeti næmingsins við tað endaligu royndina.

5. stk. Tó verða ongan royndir í
a) sangi/tónleiki sambært § 9, 1. stk. nr. 3. Tó verður stoðumet givið av læraranum/lærarunum í lærugreinini.
b) skeiðevnum eftir § 9, 1. stk. nr. 6.
c) evnum, ið undirvist verða í eftir § 9, 2. stk.

6. stk. Øll, ið hava nomið ta undirvísing, sum miðar ímóti læraraprógvtoku, hava atgongd at fata upp til hesa prógvtoku.

§ 12. Tær royndir, sum nevndar eru í § 11, eru skrivligar og munnligar. Landsskúlastjórin kann loyva, at skrivligar royndir verða hildnar í staðin fyri munnligar í ávísum lærugreinum.

2. stk. Læararnir við læraraskúlan halda fráfaringarroyndina stuðlaðir av prógvdómarum, sum landsskúlastjórin tilnevnir í neyðugum vavi. Somuleiðis tilnevnir landsskúlastjórin formannin fyri prógvdómaraarnar. Læararnir við læraraskúlan eru prógvhoyrarar, ið seta spurningarnar; men prógvdómararnir skulu vanliga góðkenna teir.

3. stk. Uppgávurnar til tær skrivligu royndirnar setur landsskúlastjórin eftir samráðing við prógvdómaran í lærugreinini eftir reglum, sum landsstýrið ásetur.

tages der en vurdering af den studerendes standpunkt. For at kunne afslutte den samlede uddannelse skal den studerende have den undervisningsfærdighed, som er nødvendig til varetagelse af undervisning i folkeskolen.

Stk. 4. I de øvrige fag konstateres de studerendes standpunkt ved afsluttende prøver, der holdes ved den pågældende undervisnings ophør. Forud for prøvens afholdelse gives af læreren en standpunktsbedømmelse, der påføres eksamensbeviset sammen med elevens standpunkt ved den afsluttende prøve.

Stk. 5. Der holdes dog ikke prøve i
a) sang og musik efter § 9, stk. 1 nr. 3. Der gives dog standpunktsbedømmelse af læreren/lærerne i faget,
b) kursusemner efter § 9, stk. 1, nr. 6,
c) emner for undervisning efter § 9 stk. 2.

Stk. 6. Adgang til at gå op til lærereksamen har enhver, der har gennemgået den dertil sigtende undervisning.

§ 12. De i § 11 omhandlede prøver er skriftlige og mundtlige. Undervisningsdirektøren kan tillade, at der afholdes skriftlige prøver i stedet for mundtlige i visse fag.

Stk. 2. Afgangsprøven afholdes af seminariets lærere med bistand af censorer, der i det fornødne omfang beskikkes af undervisningsdirektøren. Ligeledes beskikker undervisningsdirektøren formanden for censorerne. Seminariets lærere er eksaminatorer, spørgsmålene stilles af dem, men skal almindeligvis godkendes af censorerne.

Stk. 3. Opgaverne ved de skriftlige prøver stilles af undervisningsdirektøren efter forhandling med censoren i faget efter regler fastsat af landsstyret.

§ 13. Landsstýrið ásetur nærri reglur um
a) undirvísingina og lærugreinavavið,
b) royndarháttin, royndarkrovini og stoðumetingina,
c) royndarhaldið,
d) metingina og domingina og
e) prógv fyri loknari prógvtoku.

§ 14. Landsskúlaráðið kann víkja frá reglunum í hesi lóg í tann mun, neyðugt er til tess at fremja royndarvirksemi og námsfrøðiligt menningararbeiði.

4. TATTUR

Læraraskúlin.

§ 15. Ein læraraskúlarektari leiðir læraraskúlan, og skal hesin rektari luttaka í undirvísingini í einum vavi, sum landsstýrið hevur ásett.
2. *stk.* Læraraskúlarektaranum til hjálpar kann verða settur ein praktikkleiðari at leggja til rættis útbúgvingina hjá teim lesandi í praktikk.

§ 16. Sum treyt fyri setan í fast starv sum læraraskúlaadjunktur, -lektorur ella -rektari er, at viðkomandi umfram at hava tann neyðuga kunnleikan og námsfrøðiligu útbúgvingina, skal hava staðið eina royndi í námsfrøði og undirvísingarfimi. Landsstýrið ásetur nærri reglur um hesa royndi.

§ 17. Settir lærarar við læraraskúlan hava eftir gjøllari fyriskipan læraraskúlarektarans skyldu til at lesa tímar á Venjingarskúlanum sum ein part av teirra skyldnga tímatali. Tilfkar ásetanir kunnu bert verða gjørdar eftir avtalu við leiðaran á Venjingarskúlanum og landsskúlastjóran.

§ 13. Landsstyret fastsættes nærmere regler om
a) undervisningen og fagenes omfang,
b) formen for og fordringerne ved prøver og standpunktsbedømmelse,
c) prøvernes afholdelse,
d) karaktergivning og censur og
e) bevis for bestået eksamen.

§ 14. Undervisningsrådet kan fravige reglerne i denne lov i det omfang, det er nødvendigt for at fremme forsøgsvirksomhed og pædagogisk udviklingsarbejde.

KAPITEL IV.

Seminariet.

§ 15. Seminariet ledes af seminarierektor, der skal deltage i undervisningen i et af landsstyret fastsat omfang.
Stk. 2. Til bistand for seminarierektoren ved tilrettelæggelsen af de studerendes uddannelse i praktisk skolegerning, kan der ansættes en praktikleder.

§ 16. Det er en betingelse for fastansættelse som seminarieadjunkt, -lektor, eller -rektor, at vedkommende foruden at have den fornødne kundskabsmæssige og pædagogiske uddannelse skal have bestået en prøve i pædagogik og undervisningsfærdighed. De nærmere regler for denne prøve fastsættes af landsstyret.

§ 17. Fastansatte lærere ved seminariet har pligt til efter seminarierektorens nærmere bestemmelse at overtage timer i den faste øvelsesskole som en del af deres pligtige timetal. Sådan bestemmelse kan kun træffes efter aftale med øvelsesskolens leder og undervisningsdirektoren.

2. stk. Landsskúlastjórin kann loyva, at ein læraraskúlalærari á samsvarandi hátt tekur tímar innan aðrar skúlaformar.

§ 18. Limir í lærararáði læraraskúlans eru læraraskúlarektarin, lærarar, læraraskúlans tímalærarar troknaðir, leiðarin á Venjingarskúlanum og praktikkleiðarin. Ráðið velur sjálvt sín formann.
2. stk. Landsskúlaráðið ásetur nærri reglur um virksemið hjá lærararáðnum, smbr. logtingslóg nr. 58, dagfest 2. oktober 1978, um skúlafyrisiting, 7. kapitul.

§ 19. Tey lesandi við læraraskúlan kunnu velja eitt ráð, ráð teirra lesandi.
2. stk. Landsskúlaráðið ásetur nærri reglur um samansetingina av ráði teirra lesandi og rættindum tess, smb. § 18, 2. stk.

§ 20. Undirvísingin á læraraskúlanum er ókeypis.

§ 21. Landsskúlastjórin tekur eftir tilráðing frá læraraskúlarektaranum avgerðir um burturvísing. Áðrenn tilráðing verður sett fram, skal málið viðgerast í lærararáðnum.

Stk. 2. Undervisningsdirektøren kan tillade, at en seminarielærer på tilsvarende måde overtager timer i andre skoleformer.

§ 18. Lærerrådet ved seminariet består af seminarierektoren, seminariets lærere, herunder timelærere, lederen af seminariets faste øvelsesskole og praktikkederen. Rådet vælger selv sin formand.
Stk. 2. De nærmere bestemmelser vedrørende lærerrådets virksomhed fastsættes af undervisningsrådet, jfr. lagtingslov nr. 58 af 2. oktober 1978 om styrelsen af undervisningsvæsenet, kapitel 7.

§ 19. De studerende ved seminariet kan vælge et råd, de studerendes råd.
Stk. 2. Undervisningsrådet fastsætter de nærmere bestemmelser om sammensætningen af de studerendes råd og dets beføjelser, jfr. § 18, stk. 2.

§ 20. Undervisningen på seminariet er vederlagsfri.

§ 21. Afgørelser om bortvisning træffes af undervisningsdirektøren efter indstilling fra seminariets rektor. Inden indstilling sker, skal sagen behandles i lærerrådet.

5. TÁTTUR

Venjingarskúlin.

§ 22. Til læraraskúlan verður knýttur ein venjingarskúli,ið fevnir um ein grundskúla og ein framhaldsskúla.
2. stk. Skúlin og læraraskúlin samarbeiða um ætlanirnar fyri virksemi skúlans sum venjingarskúli.
3. stk. Upplæring teirra lesandi í praktikk skal lutvís vera á hesum venjingarskúla.

§ 23. Sum ískoyti til ta í § 22, 3. stk. nevndu upplæring í praktikk verður

KAPITEL V

Øvelsesskolen.

§ 22. Til seminariet skal være knyttet en øvelsesskole, der omfatter en grundskole og en fortsættelsesskole.
Stk. 2. Skolen og seminariet samarbejder om planerne for skolens virksomhed som øvelsesskole.
Stk. 3. De studerendes oplæring i praktisk skolegerning skal delvis foregå i denne øvelsesskole.

§ 23. Til supplering af den i § 22, stk. 3, nævnte oplæring i praktisk

givið teimum lesandi moguleika fyri at fáa hesa upplæring í øðrum fólkaskúlum ella góðkendum privatskúlum, við tað at royndt verður at gera tey kunnug við tey ymsu skúlaslogini í landinum.

2. stk. Henda upplæring verður lingin í lag eftir avtalu millum læraraskúlarektaran og leiðararnar á teimum ymsu skúlunum, soleiðis at tær gjøllari ætlanir fyri skúlanna hjálp viðvíkjandi teirri verkligu útbúgving læraraskúlans verða lagdar eftir samráð millum læraraskúlan og skúlaleiðaran.

3. stk. Allir almennir og privatir skúlar, ið fáa almennan studning, hava skyldu til at vera tøkir til læraraupplæring teirra lesandi í praktikki í einum vavi, sum landsskúlastjórin ásetur, um so verður, at tvídráttur tekur seg upp.

4. stk. Hava tey lesandi flutning fyri neyðini til og frá venjingarskúlanum, rindar læraraskúlin hesa útreiðslu.

5. stk. Tey lesandi fáa vanliga ikki gjald fyri sjálvstøðuga undirvísing í praktikktíðarskeiðinum.

§ 24. Áðrenn leiðarin á tí venjingarskúla, sum er knýttur at læraraskúlanum, verður settur í starv, skal læraraskúlarektarin fáa hovi til at úttala seg.

2. stk. Tá ið avgerð verður tikin um, hvørjir lærarar skulu starvast við venjingarskúlan, so skal virki skúlans sum venjingarskúli verða havt í huga. Læraraskúlarektarin skal fáa hovi til at úttala seg, áðrenn avgerð verður tikin um starvsetan við skúlan.

3. stk. Lærarar við venjingarskúlan og við aðrar tílíkar skúlar, ið skulu undirvísa teimum lesandi í praktikk, verða av læraraskúlanum settir til hesa uppgávu eftir samráðing við teir avvarðandi skúlaleiðarar.

4. stk. Landsskúlastjórin ásetur støddina á teirri samsýning og/ella tímaniðurskurði, sum leiðarar og lærarar

skolegerning gives der de studerende adgang til at få denne oplæring i andre folkeskoler eller anerkendte privatskoler, idet der tilstræbes, at de bliver bekendt med de forskellige skoletyper.

Stk. 2. Aftale om denne oplæring træffes af seminarierektoren med de pågældende skolers ledere, således at de nærmere planer for skolernes medvirken ved seminariets praktiske uddannelse lægges efter forhandling mellem seminariet og skolens leder.

Stk. 3. Alle offentlige skoler og private skoler, der modtager offentligt tilskud, er pligtige til at stille sig til rådighed for de lærerstuderendes oplæring i praktisk skolegerning i et omfang, der i tilfælde af uoverensstemmelse fastsættes af undervisningsdirektoren.

Stk. 4. Er befordring af de studerende til og fra øvelsesskolen nødvendig, afholdes udgiften hertil af seminariet.

Stk. 5. De studerende modtager normalt ikke betaling for selvstændig undervisning i praktikperioden.

§ 24. Forinden ansættelse af lederen af den til seminariet knyttede øvelsesskole finder sted, skal seminarierektoren have lejlighed til at udtale sig.

Stk. 2. Ved afgørelse af, hvilke lærere, der skal gøre tjeneste ved den faste øvelsesskole, skal der tages hensyn til skolens funktion som øvelsesskole. Seminarierektoren skal have lejlighed til at udtale sig, inden der træffes bestemmelse om tjeneste ved skolen.

Stk. 3. Lærerne ved øvelsesskolen og ved de supplerende skoler, der skal undervise de studerende i praktisk skolegerning, antages hertil af seminariet efter aftale med de pågældende skolers ledere.

Stk. 4. Til ledere og lærere ved de i stk. 3 nævnte øvelsesskoler ydes hono-

við teir undir 3. stk. nevndu venjingarskúlar skulu hava.

6. TÁTTUR

Viðari útbúgving.

§ 25. Viðari útbúgving av lærarum fólkaskúlans kann fara fram á útbúgvingarstovnum í Føroyum, í Danmark og í øðrum londum.
2. stk. Reglur um hesa útbúgving ásetur Landsskúlaráðið.

§ 26. Lærarar í fólkaskúlanum ella við privatu skúlarnar, ið fáa almennan studning, herímillum royndarsettir lærarar, tímalærarar og fastir vikarar, sum fyribils mugu gevast við sínum lærarayrki, og sum mugu halda vikar undir útbúgvingini, kunnu fáa vikarútreiðslurnar afturgoldnar eftir reglum, sum landsstýrið ásetur.

§ 27. Sambært reglum, sum landsstýrið ásetur, kann studningur verða veittur til eftirútbúgving til lærarar, ið ikki eru settir ella av aðrari orsok ikki hava fingið vikarútreiðslurnar endurgoldnar eftir § 26, og somuleiðis til lærarar, ið hava fingið vikarútreiðslurnar endurgoldnar, men hvørs víðari útbúgving hevur borið serliga stórar útreiðslur við sær.

§ 28. Landsstýrið ásetur reglur um, í hvørjum vavi luttøka í víðari útbúgving verður at rokna upp í tað skylduga tímatalið hjá einum lærara.

7. TÁTTUR

Gildi v.m.

§ 29. Lógin kemur í gildi 1. mai 1980.
2. stk. Landsskúlastjórin kann viðvíkjandi næmingum í 3. og 4. flokki

rarer og/eller timenedsættelse hvis størrelse fastsættes af undervisningsdirektøren.

KAPITEL VI

Videre uddannelse.

§ 25. Videre uddannelse af folkeskolens lærere kan foregå på uddannelsesinstitutioner på Færøerne, i Danmark og i andre lande.
Stk. 2. Bestemmelser om denne uddannelse træffes af undervisningsrådet.

§ 26. Lærere i folkeskolen eller ved private skoler med offentligt tilskud, herunder lærere på prøve, timelærere og faste vikarer, der midlertidigt må ophøre med deres lærergerning og må holde vikar under uddannelsen, kan få vikarudgiften dækket efter regler fastsat af landsstyret.

§ 27. Efter regler, der fastsættes af landsstyret, kan der ydes stipendier til videre uddannelse til lærere, der ikke har ansættelse eller af en anden grund ikke har fået vikarudgift dækket efter § 26, samt til lærere, der har fået dækket vikarudgiften, men hvis videre uddannelse påfører dem særligt store udgifter.

§ 28. Landsstyret fastsætter regler for, i hvilket omfang deltagelse i videre uddannelse kan indgå i en lærers pligtige timetal.

KAPITEL VII

Ikrafttræden m.v.

§ 29. Loven træder i kraft den 1. maj 1980.
Stk. 2. Undervisningsdirektøren kan for så vidt angår elever i 3. og 4. klas-

í skúlaárinum 1980/81 og 1981/82 víkja frá reglunum í III. tátli.

3. stk. Lóg nr. 36 dagfest 7. februar 1962 um læraraútbúgving í Føroyum fer úr gildi sambært § 5 í rammulóg fyri Føroyar um læraraútbúgving.

ser i skoleårene 1980/81 og 1981/82 tillade afvigelser fra bestemmelserne i kapitel III.

Stk. 3. Lov nr. 36 af 7. februar 1962 om læreruddannelsen på Færøerne ophæves i henhold til § 5 i rammelov for Færøerne om læreruddannelsen.

Viðmerkingar til lógarupptøkutil:

Til § 1.
Til orðingina av endamálsreglunum eru brúktar reglurnar í teimum galdandi føroysku, dansku, íslendsku og norsku læraraútbúgvingarlógunum.

Í 1. stk. eru nýtslumøguleikarnir av útbúgvingini oktir, við tað at reglurnar fevna um aðrar skúlaformar, meðan tær galdandi reglur bæði í Føroyum og Danmark v.m. bert fevna um kvøld- og ungdómsskúla.

Til § 2.
Eftir uppskotinum tekur útbúgvingin 4 ár. Men í § 8 er gjordur møguleiki fyri, at útbúgving, ið er fingin aðrastaðni, kann koma við í læraraútbúgvingina.

Til § 3.
Her verður fyrst og fremst hugsað um samstarv við Fróðskaparsetur Føroya um lærarar, høli og útbúnað. Hetta kann verða av avgerandi týdningi, serliga tá ið tað snýr seg um undirvísingina í linjulærugreinum og ískoytisskeiðum.

Til § 4.
Her verður m.a. hugsað um útbúgving av barnagarðs- og frítíðarlærarum.

Til § 5.
Reglurnar merkja eina skerping í mun til galdandi reglur. Sum áður nevnt, varð hetta hildið at vera neyðugt, og eftir at HF-skeið varð sett á stovn í 1974 aftraf tí verandi studentaskúlanum, eru møguleikarnir fyri at lúka upptøkutreytirnar munandi oktir. Reglurnar í § 3 og § 5 í 1962-lógini um atburð, sjúku, likamlig brek og um at vera egnað(ur) til lærarastarvið eru ikki tiknar við.

Reglurnar í § 5, 2. stk. eru fast tengdar at endamálsreglunum.

Til § 6.
Reglurnar samsvara við § 4, 1. stk. í galdandi lóg. Tær eru fyrst og fremst ætlaðar lesandi, sum koma frá øðrum læraraskúlum.

Til § 7.
Reglurnar samsvara við § 6, 2. stk. í galdandi lóg.

Til § 8.
Reglurnar, ið samsvara við § 4, 3. stk. í 1962-lógini, eru serliga ætlaðar teirri útbúgving, ið lingin er á øðrum læraraskúlum og á Fróðskaparsetri Føroya.

Til § 9.
Í mun til 1962-lógina eru gjørdar hesar broytingar.

Aftur af teimum námsfroðiligu lærugreinum er sett námsfroðilig sergrein, ið skal fevna um eitt av niðan fyri standandi okjum:

a. undirvísing av næmingum í teimum yngru flokkunum í fólkaskúlanum,
b. undirvísing av næmingum í teimum eldru flokkunum í fólkaskúlanum og ungdóms- og frítíðarundirvísing og
c. undirvísing av næmingum við serligum trupulleikum.

Tað verður valfrælsi, har ið tað snýr seg um lærugreinirnar evning, sang/tónleik, smíð, handarbeiði og heimkunnleika.

Linjulærugreinir verða skipaðar í útbúgvingini.
Vegna tess, at læararnir bæði kunnu verða settir í starv við smáar og stórar skúlar, so hevur í arbeiðnum verið miðað ímóti at lata læararnar fáa eina víða útbúgving.

Til § 10.
Reglurnar samsvara við § 14 í galdandi lóg.

Til § 11.
Í mun til 1962-lógina verður prøvtøka hildin í kristnikunnleika og sangi/tónleiki.

Til § 12.
2. og 3. stk. samsvara við § 9 í 1962-lógini.

Til § 13.
Landsstýrið ætlar at seta ein lestrarætlanarbólk at gera eina kunngerð um læraraútbúgvingina til fólkaskúlan á Føroya Læraraskúla. Í hesum sambandi verða eisini settar undirnevndir av serkonum fólki at gera lesiætlan til tær einstoku lærugreinirnar. Úr lestrarætlanarbólkinum verður tilnevndur ein limur í hvørja einstaka undirnevnd.

Til § 15.
1. stk. samsvarar við § 17, 1. stk. í 1962-lógini. Í 2. stk. er talan um lógfesting av galdandi skipan. Praktikkleiðarans uppgávur eru m.a. vegna læraraskúlarektaran og undir hansara ábyrgd og í samstarvi við leiðarar og praktikklærarar venjingarskúlans at leggja til rættis praktikk-útbúgvingina og sum heild at fylgja við arbeiði praktikkantanna.

Til § 16.
Reglurnar samsvara við § 18, 1. stk. í 1962-lógini.

Til § 17.
Reglurnar samsvara við § 18, 2. stk. í 1962-lógini.

Til § 18.
Reglurnar samsvara við § 20, 1. og 4. stk. í 1962-lógini, við tí uppískoyti, at praktikkleiðarin somuleiðis er limur í lærararáðnum. Allir lærarar við læraraskúlan, ið ikki eru settir í fast stav, verða at rokna sum tímalærarar.

Til § 19.
Reglurnar samsvara við § 20, 3. og 4. stk. í 1962-lógini. Landsskúlaráðið hevur í hyggju at gera reglur um føst ráð og nevndir v.m. á læraraskúlanum.

Til § 20.
Reglurnar samsvara við § 16 í 1962-lógini.

Til § 21.
Hesar reglur eru settar í staðin fyri upptøkutreytirnar viðvikjandi heilsu, atburði v.m. Tá ið slíkar upptøkutreytir ikki verða settar eftir hesum lógaruppskoti, eru reglurnar gjørdar sum ein forskrift um, at burturvísing, sum sjáldan verður neyðug við læraraskúlan, bert kann fara fram eftir avgerð landsskúlastjórans. Av tí at reglurnar hereftir ikki viðkoma sjálvari læraraútbúgvingini, eru tær flittar til 4. tátt, har reglurnar um skipan og leiðslu av læraraskúlanum eru at finna.

Til § 22.
Reglurnar samsvara við § 11 í 1962-lógini.

Til § 23.
Reglurnar samsvara við § 12 í 1962-lógini.

Til § 24.
Reglurnar samsvara við § 19 í 1962-lógini. Í uppskotinum eru reglur um samsýning og/ella tímaniðurskurð skoyttar uppí.

Til § 25.
Her verður hugsað um viðlíkahald og ískoyti til kunnleika, sum fyrr er nomin. Undirvísingin kann t.d. fara fram á Fróðskaparsetri Føroya og í Danmark á Danmarks Lærerhøjskole, Danmarks Højskole for Legemsøvelser og Danmarks Sløjdlærerskole. Viðvíkjandi útbúgving í øðrum londum so kann slík útbúgving verða góðkend, um hon í innihaldi í minsta lagi samsvarar við eitt ársskeið á Danmarks Lærerhøjskole t.d. í fremmandum máli.

Til § 26.
Her er talan um lógarfesting av galdandi skipan.

Til § 27.
Í hesi § verður hugsað um tær serliga stóru útreiðslur, ið kunnu standast av luttøku á skeiði uttan fyri Føroyar.

Til § 28.
Reglurnar miða ímóti luttøku á skeiðum við Fróðskaparsetur Føroya, ið fevna yvir longri tíð við luttøku í undirvising ein ella fleiri dagar um vikuna.

Viðmerkingar:

Sambært lóg fyri Føroyar nr. 52, dagfest 14.02.1979 um læraraútbúgvingina (rammulógin), eigur Føroya heimastýri at ásetta nærri reglur um læraraútbúgvingina og víðari útbúgving læraranna.

Tann 30. november 1972 setti Foroya Skúlastjórn ein arbeiðsbólk at gera uppskot til nýggja læraraútbúgvingarlóg. Hesin arbeiðsbólkur legði fram álit tann 11. mars 1976. Vegna spurningin um yvirtøkuna av umsitingini av undirvísingarverkinum varð spurningurin um eina nýggja læraraútbúgvingarlóg fyribils skotin til viks. Kortini góðkendi skúlastjórnin í 1976, at læraraskúlin í undirvising sini miðaði seg eftir teimum stevnumiðum, sum stóðu í álitinum, fyrstu ferð við tí flokki, ið byrjaði á læraraskúlanum í 1976.

Eftir at rammulógin varð viðtikin, er umrodda álit, ið er hjálagt sum skjal, vorðið lagt fram fyri læararnar á læraraskúlanum, næmingaráðið og landsskúlastjóran til ummælis. Hesi ummæli eru at síggja sum 1. — 4. skjal. Harumframt er rammulógin viðlagd sum 7. skjalið. Við støðið í hesum tilfari gjørdi Landsskúlafyrisitingin eitt uppskot til løgtingslóg um læraraútbúgvingina. Hetta uppskotið hevur verið til viðgerðar í Landsskúlaráðnum, sum gjørdi einstakar broytingar viðvíkjandi móðurmálsundirvísingini og í talinum á linjulærugreinum. Hesar broytingar eru tiknar við í lógaruppskotið. Makaskjal av viðtoku Landsskúlaráðsins er viðlagt sum 5. skjal. Landsstýrið er av teirri áskoðan, at lógaruppskotið, ið er soleiðis broytt, er í samsvar við ásettu reglur í rammulógini.

SÍ SKJAL 10.

1. viðgerð 10. apríl. Málið varð beint í skúlanevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 26. mars 1980 og undir fyrstu viðgerð 10. apríl 1980 beint í skúlanevndina.

Við lóg fyri Føroyar nr. 52 dagfest 14. februar 1979 um læraraútbúgving (rammulógin) hevur Føroya heimastýri fingið heimild at áseta nærri reglur um læraraútbúgvingina og viðari útbúgving læraranna.

Føroya skúlastjórn setti 30. november 1972 ein arbeiðsbólk at gera uppskot til nýggja læraraútbúgvingarlóg, og legði hesin arbeiðsbólkur fram álit tann 11. mars 1976. Sjálvt um hetta uppskot ikki var lagt fram á tingi, samtykti Føroya skúlastjórn longu í 1976 at loyva Føroya Læraraskúla í undirvísing síni at miða seg eftir teimum stevnumiðum, sum stóðu í nevnda áliti.

Síðan omanfyri nevnda rammulóg varð viðtikin, hevur álitið verið lagt fyri lærararáðið og næmingaráðið á læraraskúlanum og fyri landsskúlastjóran til ummælis.

Landsskúlafyrisitingin gjørdi so, við stoði í tí tilfari, sum nú var komið fram, eitt uppskot til løgtingslóg um læraraútbúgving. Hetta uppskotið var síðan til viðgerðar í landsskúlaráðnum, sum gjørdi einstakar broytingar viðvíkjandi móðurmálsundirvísingini og í talinum á linjulærugreinum.

Skúlanevndin hevur havt fund við landsskúlastjóran og logfroðisliga ráðgevaran í landsskúlafyrisitingini. Eisini hevur nevndin havt fund við umboð fyri lærararáðið og næmingaráðið á læraraskúlanum.

Tá ið undantiknar eru málsligar rættingar og einstakar smábroytingar, mælir nevndin til trfggjar størri broytingar.

Fyrsta broytingin er í § 9, 1. stk. 3., har mælt verður til grundútbúgving í tveimum av fýra lærugreinum í staðin fyri trimum av fimm. Nevndin metir, at tað verður torfort hjá teimum flestu lesandi við læraraskúlan at velja triðju greinina.

Onnur broytingin er í somu grein og sama stykki punkt 5. Her mælir nevndin til, at viðari útbúgving verður í trimum lærugreinum (linjulærugreinum) og ikki, sum landsstýrið skjýtur upp, í tveimum. Hovuðsorsokin til hesa stoðutakan er tann, at nevndin metir, at við tveimum linjulærugreinum er vandi fyri, at fleiri linjulærugreinir koma at detla burtur, orsakað av at ov fá lesandi velja tær, og bólkarnir sostatt verða ov smáir til at fáa góðkenning.

Triðja broytingin er í § 11, 2. stk. Meðan skotið verður upp í landsstýrisuppskotinum, at grundútbúgvingin í foroyskum verður givin oll fýra árini, metir nevndin, at rættari er, at ikki verður ásett í lógini eitt fast áramál fyri undirvísingini, men at tímatalið verður okt. Sum nú er verður undirvíst 5 tímar um vikuna fyrsta árið,

Verður hetta tímatalið økt til 8 vikutímar og lagt yvir tey trý fyrstu árini (t.d. 4 + 2 + 2 ella 3 + 3 + 2), skuldi hetta givið føroyskum eina munandi betri støðu, samstundis sum moguleiki verður fyri at velja føroyskt sum linjufærugrein.

Meirilutin í skúlanevndini (Edmund í Garði, Andrias P. Jacobsen, Eilif Samuelsen og Ivan Johannesen) mælir tinginum til at samtykkja lógaruppskotið við teimum broytingum, sum eru nevndar í fylgjandi broytingaruppskoti. Samsvarandi hesum setur meirilutin fram soljóðandi

broytingaruppskot

I. TÁTTUR

1. *Endamál og almennar ásetingar.*

2. Í § 1, 2. stk., 3. reglu verður orðið «verkligu» broytt til «praktisku».

3. Í sama §, 3. stk., 3. reglu verður orðið «evnisarbeiði» broytt til «at arbeiða við evninum».

4. Í sama §, 4. stk., 4. reglu og fylgjandi verða orðini «av sambandinum millum læararyrkið og virki skúlans í samfelagnum» broytt til «av, hvussu læararyrkið og virki skúlans í samfelagnum hongur saman.»

5. § 2 fær hetta orðaljóð: «Útbúgvingin fer fram á Føroya Læraraskúla og tekur 4 ár.»

6. Í § 9, 1. stk. pkt. 1 verður orðið «praktikk» broytt til «praktiskt skúlayrki».

7. § 9, 1. stk. pkt. 3 fær hetta orðaljóð:

«Grundútbúgving í tveimum av lærugreinunum: evning, sangi/tónleiki, smíði og handarbeiði.»	«Grunduddannelse i to af fagene: forming, sang/musik, slojd og håndarbejde.»

8. § 9, 1. stk. pkt. 5 fær hetta orðaljóð:

«Viðari útbúgving í trimum av lærugreinunum í fólkaskúlanum (linjulærugreinir).»	«Videre uddannelse i tre af folkeskolens fag (liniefag).»

9. Í § 9, 4. stk., 4. reglu verður orðið «skeiðlærugreinir» broytt til «hvorji skeið, ið eru kravd eftir 1. stk. nr. 6.»

9. I § 9, 4. stk. 4. regla verdur ordid «kursusfag» broytt til «hvilke kursus, der er obligatoriske efter stk. 1, nr. 6.»

10. Í § 11, 1. stk. fáa tvær tær fyrstu reglurnar hetta orðaljóð:
«Útbúgvingin eftir § 9, 1. stk., nr. 2 skal í lærugreinunum».

11. Í sama grein, sama stykki 10. reglu verður orðið «praktikk» broytt til «praktiskt skúlayrki».

12. § 11, 2. stk. fær hetta orðaljóð:
«Aftaná 1. útbúgvingarárið verður hildið fram við undirvísing í føroyskum, sum endar við royND, tá ið undirvísingin er lokin.»

«Efter 1. uddannelsesår fortsættes med undervisning i færøsk, som afsluttes med en prøve ved undervisningens ophør.»

13. Í § 11, 3. stk., 2. reglu verður orðið «praktikk» broytt til «praktiskt skúlayrki».

14. Í § 12, 2. stk. 4. reglu verður aftaná orðunum «í neyðugum vavi» sett «eitt ávist áramál».

verdur aftaná ordunum «af undervisningsdirektøren» sett: «for et bestemt åremål».

15. Í § 12, 2. stk. 7. reglu verður orðið «prógvhoyrarar» broytt til «yvirhoyrarar».

16. Í § 13 fáa fyrstu tvær reglurnar hetta orðaljóð:
«Landsstýrið ásetur, eftir tilmæli frá landsskúlastjóranum, nærri reglur um».

«Landsstyret fastsætter, efter indstilling fra undervisningsdirektøren, nærmere regler om».

17. § 15, 1. stk. fær hetta orðaljóð:
«Ein læraraskúlarektari leiðir læraraskúlan, og skal rektarin luttaka í undirvísingini í tann mun, sum landsstýrið hevur ásett.»

«Seminariet ledes af en seminarierektor, der skal deltage i undervisningen i et af landsstyret fastsat omfang.»

18. Í § 18, 1. stk. verður «lærarar, læraraskúlans tímalærarar» broytt til «lærarar læraraskúlans, tímalærarar».

19. § 19, 1. stk. fær hetta orðaljóð:
«Tey lesandi við læraraskúlan velja eitt ráð, ráð teirra lesandi».

«De studerende ved seminariet vælger et råd, de studerendes råd».

20. § 22, 3. stk. fær hetta orðaljóð:
«Upplæring teirra lesandi í praktiskum skúlayrki skal sum mest vera á hesum venjingarskúla.»

«De studerendes oplæring i praktisk skolegerning skal fortrinsvis foregå i denne øvelsesskole.»

21. Í § 23, 1. stk. verða fyrstu reglurnar «Sum ískoyti til ta í § 22, 3. stk. nevndu upplæring í praktikk» broytt til: «Afturat tí í § 22, 3. stk. nevndu upplæring í praktiskum skúlayrki». Í sama stk. verða seinastu orðini «í landinum» strikað.

22. Í § 23, 2. stk. verður orðið «verkligu» broytt til «praktisku».

23. Í § 23, 3. stk. verða orðini «í praktikki» broytt til «í praktiskum skúlayrki».

24. Í § 24, 1. stk. verða seinastu orðini «at úttala seg» broytt til at «siga sína áskoðan».

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið:

25. Til § 5, 2. reglu:
Orðini «Sum áður nevnt, varð hetta hildið at vera neyðugt, og» broytt til «Hetta varð hildið at vera neyðugt».

26. Til § 9.
10. regla fær hetta orðaljóð:
«evning, sang/tónleik, smíð og handarbeiði.»

27. Til § 11.
Viðmerkingin fær hetta orðaljóð:
«Í mun til 1962-lógina verður prøvtøka hildin í kristnikunnleika.»

28. Til § 21.
Orðini «at burturvísing, sum sjáldan verður neyðug við læraraskúlan» verða broytt til «at tann burturvísing, sum í einstøkum forum kann fara at verða neyðug við læraraskúlan».

Ein minniluti (Finnbogi Isaksen) tekur undir við broytingaruppskoti meirilutans,

tó tekur hann ikki undir við broytingunum av § 9, 1. stk. pkt. 5 og § 11, 2. stk., men mælir í hesum báðum førum tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Arið eftir fingu danir eina lóg um Folketingets ombudsmand. Síðani hava Noreg, Finland og Ongland fingið ein slíkan stovn, og í løtuni arbeiða íslendingar og cyprurríkarar við at gera umboðsmansstovn í landi sínum.

Folketingets ombudsmand hevur sbr. danska lóg eisini innlit við statsins fyrisiting í Føroyum, men ikki viðvikjandi fyrisitingini hjá heimastýrinum og kommununum.

Almenna fyrisitingin hjá okkum arbeiðir vegna løgtingið og kommununar. Henda fyrisiting hevur ávirkan á viðurskiftini hjá hvørjum einstøkum borgara í Føroyum, og hevur tað tí stóran týdning, at hon virkar, sum hon skal bæði viðvikjandi rættleikanum av avgreiðslunum, og at hesar verða framdar uttan óneyðugan steðg. Dentur eigur her eins og í øðrum londum at vera lagdur á at fyribyrgja at fólk innan almennu fyrisitingina í virki teirra taka tilvildarligar ella órímiligar avgerðir ella á annan hátt gera seg sekan í skeivleika ella vansketni.

Sum ein trygd hjá løgtinginum, bygda- og býráðum og hjá tí einstaka borgaranum fyri, at fyrisitingin virkar, sum hon skal, halda undirritaðu, at ein slíkur umboðsmaður eigur at verða settur. Samstundis kann umboðsmaðurin eisini vera ein trygd hjá fyrisitingini sjálvari móti illgrunasemi.

Bæði tingið og hin einstaki borgarin skal kunna heita á umboðsmannin um kannan av ávísum málsviðgerðum, eins og umboðsmaðurin eisini skal kunna gera tað av sínum eintingum.

Av tí at umboðsmaðurin skal umboða lógtingið og kanna fyrisitingina, herundir eislni embætisforsluna hjá landsstýrismonnunum, verður mælt til, at tingið einsamalt velur nevndina til at fyrireika málið og áleggur nevndini at leggja álitið beinleiðis aftur fyri tingið.

Sama uppskot er lagt fram av Jógvan Sundstein á heysti 1978, málið varð beint í lógarnevndina, ið einmælt samtykti at taka undir við uppskotinum, men málið fekk kortini ikki nóg nógvar atkvøður í tinginum. Undirritaðu meta hetta mál at vera av stórum týdningi og leggja tað tessvegna framaftur.

1. viðgerð 16. apríl. Málið varð beint í lógarnevndina sum 23. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið var lagt fram 10. aprfl 1980 av Karin Kjølbro og Jógvan Sundstein og undir fyrstu viðgerð 16. í sama mánaða beint í lógarnevndina.

Ein meiriluti í lógarnevndini (Karin Kjølbro, Eydun Videro og Jákup Lindenskov) tekur undir við uppskotinum, meðan minnilutin (Eilif Samuelsen og Agnar Nielsen) ikki tekur undir við uppskotinum.

2. viðgerð 24. aprfl. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Signar Hansen, Hilmar Kass, Andrias Petur Jacobsen, Jákup Lindenskov, Jona Henriksen, Erlendur Paturssson, Karin Kjølbro, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Edmund í Garði, Jógvan Sundstein, Óssur Dam Jacobsen, Eydun Videro.

Nei atkvøddu: Adolf Hansen og Johs. M. Olsen.

Atkvøddu ikki: Ivan Johannesen, Asbjørn Joensen, Juul Jacobsen, Eli Nolsøe, Poul J. Olsen, Haldur Hansen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Jógvan Durhuus, Hákun Djurhuus, Óli Breckmann, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Jógvan Olsen, Agnar Nielsen, Pauli Ellefsen og Hilmar Bech.

Málið sostatt fallið við 13 ja-atkvøðum, 2 nei-atkvøðum og 17 atkvøddu ikki.

75. Sínámillum fiskiskapur av svartkjafti Føroyar—Ísland

Ár 1980, fríggjadagin 11. apríl legði Atli P. Dam, logmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Loyvt verður skipum, heimahoyrandi og skrásett í Íslandi, at veiða 20.000 tons av svartkjafti á sjóøki Føroya í 1980.

Viðmerkingar:

Viðskifti hava verið við íslendsku myndugleikarnar um sínámillum svartkjaftafiskiskap í 1980. Partarnir eru samdir um, at íslendskum skipum í 1980 verður loyvt at veiða 20.000 tons av svartkjafti á sjóøki Føroya, og at føroyskum skipum verður loyvt at veiða 20.000 tons av svartkjafti á íslendska sjóøkinum.

1. viðgerð 15. apríl. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevnda rviðgerð.
2. viðgerð 18. apríl. Uppskotið varð samtykt við 21—0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 1500-2-4

76. Nýggjan motor til »Másan«

Ár 1980, fríggjadagin 11. apríl setti Eli Nolsøe, løgtingsmaður, Hergeiri Nielsen, landsstýrismanni, fram soljóðandi

fyrispurning

Hevur landsstýrið ætlanir um at skifta motorin út á «Másanum», og um so er, nær verður tað gjørt?

Viðmerkingar:

Ikki kann sigast annað enn at ferðasambandið oyggjanna millum er nógv broytt til tað betra hesi seinastu árini. Vegir eru gjørdir og teir eru bæði breiðir og góðir, og har, sum fjøllini forða, eru og verða berghol gjørd, so at ferðslan við akførum ótarnað kann koma fram.

Har sum sjógvurin skilir oyggjarnar, sigla nú skjóttgangandi bilfergur, sum flyta fólk og bilar yvir um, so ferðslan kann halda fram á næstu oyggj. Onki verður spart í so máta, og hóast nógv prát um kreppu heldur henda útbygging og keyp av bilfergum á.

Millum Hvannasund-Svínoy og Fugloy flytir «Másin» ferðafólk og neyðsynjarvørur. Nógv verður mangan lagt til av manningini á «Másanum», tí tað er ikki altíð gamansleikur at sigla í hesum farvatni og flyta fólk og farm í land á ringastu brimplássum, sum vit hava í Føroyum.

«Másin» siglir við einum motori, sum er umleið 21 ára gamal.

Tað kann neyvan bera til, at leiðslan fyri Strandfaraskipum landsins og landsstýrismaðurin, sum umsitur sonu strandferðslu ikki eru vitandi um hesi út av lagi vánaligt viðurskifti, tí fleiri ferðir hevur verið skrivað um tað í bløðunum, og fleiri tingmenn hava borið hetta mál fram her frá tingsins talarapalli.

Eg loyvi mær tí at seta henda spurning til Hergeir Nielsen, landsstýrismann.

23. apríl svaraði Hergeir Nielsen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

Motorurin á Másanum er av slagnum B&W Alfa og smíðárið 1959, hann er undir eftirliti av klassa Bureau Veritas, Skipasýninum og Teknisku deild á Strandferðsluni.

Um so er, at motorurin ikki kann lúka ávís krøv trygdini viðvíkjandi, verða sjálvsagt stig tikin til ábøtur ella um neyðugt útskiftan.

Nevnast kann í hesum sambandi, at motorurin á Pride er 19 ára gamal, motorurin á Ternuni 20 ára gamal og motorurin á Tróndi 21 ára gamal, og at nýtslustigið av hesum motorum er munandi størri enn av motorinum á Másanum.

77. Broyting í lóg um fuglaveiðu

Ár 1980, týsdagin 15. apríl legði Dánjal P. Danielsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 17, stk. 2, nr. a) ganga orðini «lomviga, álku» út.
2) Í § 17, stk. 2, verður sett sum nýtt nr. d): «15. august — 1. april: Lomviga og álku».

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst m.v.

§ 1. I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 17, stk. 2, nr. a) udgår ordene «lomvie, alke».
2) I § 17, stk. 2, tilføjes som nyt nr. d): «15. august — 1. april: Lomvie og alke».

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Fyri nøkrum árum síðani var spurningurin um friðing av lomviganum til viðgerðar í fleiri tingsetum. Semja fekst ikki um nakra friðing, men vóru revsireglurnar gjørdar strangari eins og magasinbyrsur vórðu forbodnar, samanber løgtingslóg nr. 44 frá 24. mai 1974 um broyting í veiðulógini.

Kanningar seinastu árini, m.a. við upptøljingum, sum Fiskirannsóknarstovan hevur staðið fyri, vísa, at lomvigin seinastu 7 árini er minkaður ár undan ári.

Frá Andrias Reinert, Bergur Olsen, Arne Nørrevang, Erik Mortensen og Dorete B. Danielsen hevur landsstýrið fingið skriv dagfest 6. apríl 1980, har mælt verður til at friða lomviga og lunda frá 1. apríl til 15. august.

Við skrivinum fylgir nágreiniligt kanningartilfar um lomvigastovnin, sum vísir, at ein friðing er neyðug.

Friðing av lomviga og álku frá 1. apríl til 15. august førir við sær, at eggjaræning samstundis verður forboðin, samanber § 18 í lógini.

Nevnda skriv frá 6. apríl 1980 við frágreiðingum fylgir hjálagt sum skjal.

Sí skjal 11.

1. viðgerð 21. apríl. Málið varð beint í lógarnevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið, ið er lagt fram av landsstýrinum eftir áheitan av fuglafroðingum snýr seg um at friða lomviga og álku í tíðarskeiðinum 1. apríl til 15. august eins og eggjatæning verður forboðin.

Lógarnevndin hevur tosað við konar menn kring landið um henda spurning, og tekur meirilutin í lógarnevndini undir við uppskoti landsstýrisins um at friða lomviga og álku, meðan minnilutin (Agnar Nielsen og Ellif Samuelsen) mælir til, at tíðarskeiðið, har friðað verður, verður frá 1. mai til 15. august, og setur fram soljóðandi

broytingaruppskot

I § 1, 2) verður í staðin fyri «15. august — 1. apríl» sett «15. august — 1. mai».	I § 1. 2) ændres «15. august — 1. april» til «15. august — 1. maj».

28. apríl legði Andrias P. Jacobsen, løgtingsmaður fram soljóðandi

broytingaruppskot

Í staðin fyri § 1 punkt 2 í landsstýrisuppskotinum verður sett:

2) Í § 17, 2. stk. verður sett sum nýtt litra d:	2) I § 17, stk. 2 tilføjes som nyt litra d:
Lomvigi og álku:	*Lomvie og alk:*
við skjóting: frá 20. apríl til 10. mai	med skydning: fra 20. april til 10. maj
við snaru: frá 1. juni til 20. juni	med snare: fra 1. juni til 20. juni
at reka upp á land: frá 1. juli til 20. juli,	med drivning på land: fra 1. juli til 20. juli,
eisini er ræning loyvd.	endvidere er ægtagning også tilladt.

29. apríl legði lógarnevndin fram soljóðandi

uppískoytisálit

Undir 2. viðgerð 24. apríl 1980 varð málið beint aftur í lógarnevndina.

Lógarnevndin hevur tikið til eftirtektar tað, ið m.a. varð fort fram undir 2. við-

gerð, nevnliga spurningurin um ávirkanina av rovfuglinum og setur tessvegna fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar.

Landsstýrinum verður álagt at endurskoða veiðulógina og leggja fram uppskot í næstu tingsetu.

Haraftrat setur nevndin fram fylgjandi uppskot um broyting í uppskoti landsstýrisins:

§ 2 í uppskoti landsstýrisins verður orðað soleiðis:

«Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og er galdandi til 31. december 1985.»

§ 2 i landsstyrets forslag affattes således:

«Denne lov træder i kraft straks og er gældende indtil 31. december 1985.»

2. viðgerð 30. apríl. § 1 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 19—0 atkvøðum. Broytingaruppskot til § 1 frá minnilutanum í lógarnevndini (Agnar Nielsen og Eilif Samuelsen) fall við 14—0. Broytingaruppskot frá nevndini til § 2 samtykt við 18—0. Broytingaruppskot frá Andrias P. Jacobsen til § 1 fall við 8—0. Uppskotið til samtyktar frá samdari nevnd samtykt við 24—0.

3. viðgerð 30. apríl. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 19—0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 610-9-2. Lóg nr. 43 frá 12. mai 1980.

78. Rutusambandið inn á Skálafjørðin og fergulega á Sundi

Ár 1980, fríggjadagin 11. apríl legði Jógvan Olsen, logtingsmaður vegna Johs. Martin Olsen og Jógvan Olsen fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at syrgja fyri, at «Tróndur» regluliga kemur at røkja rutusambandið inn á Skálafjørðin alt árið, og at fergulegan, sum tingið áður hevur viðtikið, verður gjørd á Sundi.

Viðmerkingar:

Síðani fyrst í hesi øld hevur rutusamband úr Havn og inn á Skálafjørðin verið rikið av privatum felag fram til 1974, tá Strandferðslan yvirtók «Tróndur», sum røkti nevnda rutusamband.

Sum kunnugt var «Tróndur» fyrsta bilferga, sum keypt var til landið.

Hesi seinastu árini hevur henda ruta mangan verið misrøkt út um alt mark, við tað at «Tróndur» hevur verið fluttur í aðra rutu og onnur skip sum ikki kunnu flyta bilar, eru sett inn í staðin, t.d. «Dagstjornan», «Pride», «Dúgvan» og «Teistin», sum øll eru vrakað rutuskip. Hetta hevur so fort við sær, at fólk, ið ferðast við bíli av ringum royndum ikki kunnu hava álit á hesi rutu longur, av tí at tey alt ov ofta hava verið út fyri at fara nakkalong avstað aftur, hetta ger ongin fleiri ferðir.

Tað er ongum øðrum líkt enn, at Strandferðslan og landsstýrið við vilja máa støði burtur undan hesum rutusambandi og fáa tað niðurlagt.

Spurningurin um tað er neyðugt ella tað er eitt rímligt krav at hava eitt gott ferðasamband millum Eysturoynna og Tórshavn og annars aðrar vegir er ikki torførur at undirbyggja. Eysturoyggin hevur nógv fólk og nógv virkir av ymiskum slag, sum tørva eitt gott ferðasamband.

Hinvegin hevur Eysturoyggin onki sjúkrahús, ellisheim, skaðastovu. Ongar hægri skúlar, onki flúgvipláss, onga almenna umsiting av týdningi. Alt hetta vit til dagligt skulu nýta, mugu vit fara antin til Havnar, Klaksvíkar ella vestur í Vágar.

Øll hesi omanfyri nevndu ting kundu við líkt góðum rætti ligið í Eysturoynni, so tað má vera eitt minimums krav, at vit hava eitt gott og skjótt ferðasamband til og frá Eysturoynni.

1. viðgerð 16. apríl. Málið varð beint í vega- og havnanevndina, sum 28. apríl legði fram soljóðandi

A l i t

Hetta mál varð lagt fram av Jóhs. M. Olsen og Jógvani I. Olsen tann 11. april 1980.

Við 1. viðgerð varð málið beint í havna- og veganevndina.

Nevndin hevur havt málið til viðgerðar, og ein samt nevnd tekur undir við uppskotsstillarunum viðvíkjandi rutusiglingini inn á Skálafjørðin, tó soleiðis at «Tróndur» kann rokja aðrar uppgávur, tá hann ikki er í rutu á Skálafjørðinum, men í sambandi við gerð av ferjulegu, er nevndin av teirri áskoðan, at onnur pláss eiga at verða kannað, og setur tí fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar.

1. Álagt verður landsstýrinum at syrgja fyri, at «Tróndur» regluliga røkir rutusamsandið inn á Skálafjørðin.
2. Álagt verður landsstýrinum at seta í verk kanningar av umstøðunum viðvíkjandi gerð av ferjulegu á leiðini úr Sandvík inn á Sund.

2. viðgerð 28. apríl. Málið aftur beint í vega- og havnanevndina. Framhaldandi 2. viðgerð 29. apríl. Atkvøðugreiðslan 30. apríl. Uppskotið til samtyktar var samtykt við 24—0 atkvøðum.

---

79. Happadráttarloyvi til Útvarp Føroya

Ár 1980, fríggjadagin 11. apríl legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

U p p s k o t
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya.

§ 1. Í § 3 í løgtingslóg nr. 71 frá 20.

lagtingslov om ændring af lagtingslov om lotteritilladelse til Útvarp Føroya.

§ 1. I § 3 i lagtingslov nr. 71 af 20.

november 1969 um happadráttarloyvi til Útvarp Foroya við seinni broytingum verða orðini «30. apríl 1980» broytt til «30. apríl 1983».

§ 2. Henda lóg fær gildi frá 30. apríl 1980.

november 1969 om lotteritilladelse til Útvarp Foroya med senere ændringer ændres ordene «30. april 1980» til «30. april 1983».

§ 2. Denne lov træder i kraft den 30. april 1980.

Viðmerkingar:

Útvarp Foroya hevur sokt um, at lógin um happadráttarloyvi, ið gongur út 30. apríl 1980, verður endurnýggjað.

Í umsókn um endurnýgging av loyvinum hevur útvarpið upplýst fylgjandi:

«Løgtingslóg nr. 35 frá 1. juni 1978 um happadráttarloyvi til Útvarp Foroya fer úr gildi 30. apríl 1980.

Til 385 dráttir er inngoldið		13,7 milj. kr.
+ goldið í vinningum	4,3 milj. kr.	
skattur til landskassan	0,7 milj. kr.	
	5,0 milj. kr.	
umsitingarútreiðslur	0,6 milj. kr.	5,6 milj kr.
Útvarpsins partur		8,1 milj. kr.

Í samband við byggingina av útvarpshúsinum er brúk fyri meira peningi, bæði nú meðan byggingin fer fram, og tá ið liðugt er at gjalda rentur og avdráttir av lánum.

Heitt verður á landsstýrið um at endurnýggja happadráttarloyvið til 30. apríl 1983.»

Landsstýrið loyvir sær at mæla til, at lógin verður framlongd, tá útvarpinum tørvar meiri pening til fíggjan av byggingini av nýggju útvarpshúsunum og seinni til rentur og avdráttir av láninum.

1. viðgerð 16. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 11. apríl 1980 og undir fyrstu viðgerð 16. í sama mánaða beint í fíggjarnevndina.

Í viðmerkingunum verður sagt frá, at Útvarp Foroya hevur sokt um, at lóg um happadráttarloyvi, ið gongur út 30. apríl 1980, verður endurnýggjað. Upplýst verð-

ur, at til 385 dráttir eru inngoldnar kr. 13,700.000, og kom í part útvarpsins av hesum kr. 8,100.000.

Tá útvarpinum torvar pening til figgjan av byggingini av nýggju útvarpshúsunum og seinri til rentur og avdrátt, mælir landsstýrið til, at lógin verður framlongd til 30. apríl 1983.

Ein samd figgjarnevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 23. apríl. § 1 samtykt við 28—0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. 3. viðgerð 24. apríl. Málið endaliga samtykt við 29—0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 512-90. Lóg nr. 55 frá 12. mai 1980.

---

80. Løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensjónistar

Ár 1980, týsdagin 15. apríl legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

uppskot
til

løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensjónistar.

§ 1. Í figgjarárinum 1980/81 verður úr landskassanum veittur upp til 2 milj. kr. sum brennistudningur til pensjónistar við í mesta lagi 900 kr. til hvønn pensjónist.

§ 2. Brennistudningur verður latin til fólk, ið áðrenn tann dagin, sum ásettur er sum freist samtbært § 4, hava fingið játtað fólkapensjón, avlamispensjón ella einkjupensjón.

løgtingslov om brændselstilskud til visse pensionister.

§ 1. I finansåret 1980/81 ydes af landskassen op til 2 mill. kr. som brændselstilskud til pensionister med højst 900 kr. til hver pensionist.

§ 2. Brændselstilskud ydes til personer, som inden den dag, der fastsættes som frist i medfør af § 4, har fået bevilget folkepension, invalidepension eller enkepension.

§ 3. Treytirnar fyri brennistudningi eru, at:

a) eingin annar býr í húsinum enn
   1) pensjónisturin
   2) hjúnafelagin
   3) born, fosturborn og barnaborn undir 18 ár
   4) ógift born, fosturborn og barnaborn undir 25 ár, sum onga inntoku hava.
b) eingin partur av húsinum verður nýttur til handilsholi, goymslu, skrívstovu ella tílíkt, sum pensjónisturin ikki rekur sjálvur,
c) pensjónisturin seinastu mánaðarútgjaldingina áðrenn tann dagin, sum settur verður sum freist sbrt. § 4, hevur fingið óskerda pensjónsviðbót,
d) húsini verða hitað við olju, petroleum ella øðrum oljulíknandi evni ella við koli.

§ 4. Landsstýrið ásetur dagin, sum er seinasta freist at lata inn umsóku um brennistudning, soleiðis at umsóknir, sum koma seinni til almannastovuna, verða ikki tiknar við í býtið sambært § 6.

§ 5. Umsókn um brennistudning skal latast inn til almannastovuna á umsóknarblaði, sum almannastovan ger. Bygdaráðið / býráðið í viðkomandi kommunu skal geva umsóknini ummæli.

§ 6. Peningaupphæddin, sum ásett er í § 1, verður býtt javnt millum teir pensjónistar, sum lúka treytirnar í §§ 2 og 3, og eigu hjúnafelagar, sum bæði eru pensjónistar, ein part í felag.

§ 7. Brennistudningurin verður útgoldin teir dagar, sum landsstýrið ásetur.

2. stk. Um pensjónistur ikki meira eigur at fáa pensjón útgoldna ella

§ 3. Betingelserne for brændselstilskud er, at:

a) ingen anden bor i huset end
   1) pensionisten
   2) ægtefællen
   3) børn, plejeborn og børneborn under 18 år
   4) ugifte børn, plejeborn og børneborn under 25 år, som ikke har indtægt.
b) ingen del af huset benyttes som handelsvirksomhed, lager, kontor eller lignende, som ikke drives af pensionisten selv,
c) pensionisten i seneste månedsudbetaling for den dag, der er fastsat som frist ifølge § 4, har modtaget pensionstillæg, som ikke er nedsat,
d) huset opvarmes af olie, petroleum eller andet olielignende stof eller af kul.

§ 4. Landsstyret fastsætter den dag, som er den seneste frist for at indgive ansøgning om brændselstilskud, således at ansøgninger, som derefter indgår til almannastovan, ikke medtages i fordelingen efter § 6.

§ 5. Ansøgning om brændselstilskud indgives til almannastovan på blanket, udarbejdet af almannastovan. Bygderådet/byrådet i den pågældende kommune skal afgive udtalelse om ansøgningen.

§ 6. Beløbet, der er fastsat i § 1, fordeles ligeligt mellem de pensionister, som opfylder betingelserne i §§ 2 og 3, og ægtepar, som begge er pensionister, får tilsammen en andel.

§ 7. Brændselstilskudet udbetales på de tidspunkter, som landsstyret bestemmer.

Stk. 2. Hvis en pensionist ophører at være berettiget til pension eller dør,

doyr, dettur rætturin til brennistudning burtur frá og við fylgjandi útgjalding, um ikki einkja ella einkjumaður er ella við andlátið verður pensjónistur.

§ 8. Brennistudningur verður útgoldin av Føroya gjaldstovu.
2. stk. Annars hevur almannastovan fyrisitingina av brennistudninginum um hendi.
3. stk. Avgerðir, sum almannastovan hevur tikið, kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri landsstýrið.
4. stk. Landsstýrið kann, aftrat ásetingunum sbrt. §§ 4 og 7, áseta nærri reglur um fyrisitingina av lógini.

§ 9. Brennistudningur er ikki skattskyldugur.

§ 10. Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1980.

ophører retten til brændselstilskud fra og med forstkommende udbetaling, hvis ikke enken eller enkemanden er eller ved dødsfaldet bliver pensionist.

§ 8. Brændselstilskud udbetales af Føroya gjaldstova.
Stk. 2. Iøvrigt varetager Almannastovan administrationen af brændselstilskudet.
Stk. 3. Afgørelser, som almannastovan har truffet, kan inden for 4 uger indbringes for landsstyret.
Stk. 4. Landsstyret kan, ud over bestemmelser i medfør af §§ 4 og 7, fastsætte nærmere bestemmelser om lovens administration.

§ 9. Brændselstilskudet er ikke skattepligtigt.

§ 10. Denne lov får virkning fra 1. april 1980.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 55/1979: Yrnisk inntøkulógaruppskot, hevur ein samd skattanevnd í áliti dagfest 28. februar 1980 millum annað sett fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

2. Løgtingið heitir á landsstýrið um í hesi tingsetu at leggja fram uppskot um oljustudning til pensjónistar, sum hava egið húsarhald.»

Uppskotið varð samtykt av løgtinginum 6. mars 1980.

Vísandi til hetta leggur landsstýrið við hesum fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensjónistar.

Í mun til umrødda uppskot til samtyktar er í lógaruppskotinum tann broyting gjørd, at studningur ikki bert verður latin, um húsini verða hitað við olju, petroleum ella øðrum oljuliknandi evni, men eisini um tey verða hitað við koli. Landsstýrið hevur gjørt hesa broyting út frá teirri áskoðan, at prísurin á koli eigur at verða hækkaður, heldur enn at framleiðararnir av koli, sum nú er, selja kolið fyri ein billig-

an prís, og síðani fáa studning úr landskassanum til rindan av munninum millum framleiðslukostnað og solupris.

Annars skal landsstýrið viðmerkja, at uppskotið til løgtingslóg er sniðað á eitt hátt, sum víkur frá vanligari mannagongd í almannamálum, har ásett verður, at um viðkomandi beinleiðis eftir meting lýkur ásettar treytir, hevur hann/hon rætt til veiting av ávísari hædd.

Í hesum fori, har tað snýr seg um minni veiting, heldur landsstýrið tað vera forsvarligt at nýta tann hátt at áseta ávísa játtan, sum so verður býtt javnt millum tey, ið ávísan dag lúka ásettar treytir, sjálvt um hetta kann tykjast at vera órættvíst í einstøkum førum.

Út frá løgtingssamtyktini um «oljustudning til pensjónistar, sum hava egið húsarhald», hevur uppskotið til endamáls at gera tekniskar reglur og nærri at áseta innihaldið í nevndu treytum.

Talið á pensjónistum var tann 1. januar 1980:

Fólkapensjónistar	4.072
Avlamispensjónistar	1.064
Einkjupensjónistar	154
Tilsamans	5.290

Hátturin at býta út ávísa játtan ger eisini fyrisitingina rættiliga einfalda. Talan verður um at taka støðu eina ferð við alla, og aftaná bert at halda skil á, um tey, sum hava fingið játtaðan studning, halda uppat at vera pensjónistar. Hinvegin er tað eyðsæð, at almannastovan, tá umsóknirnar koma inn, fær drúgvt eyka arbeiði, sum verandi starvsfólkið ikki kann gera í vanligari arbeiðstíð. Hetta verður helst í summarfrítíðini og helst eitt stutt tíðarskeið. Tí verður tað neyðugt hjá almannastovuni at nýta yvirtíð og/ella eykafólk. Haraftrat koma eykaútreiðslur til vanligt skrivstovuhald, so sum prenting av umsóknarblaðum, postgjøld v.m.

Hesar útreiðslur kunnu leysliga metast soleiðis:

Starvsfólkaútreiðslur	50.000 kr.
Skrivstovuhald	10.000 kr.
Tilsamans	60.000 kr

Viðmerkingar til einstøka greinirnar:

Til § 1: Her er ásett sjálv játtanin.

Til § 2: Her er ásett avmarkingin til tey trý sløgini av pensjónistum. Sostatt eiga t.d. móttakarar av vanligari hjálp eftir § 9 ella av hjálp til stakar uppi-

haldarar eftir § 22 í forsorgarlógini, ella móttakarar av sjúkradagpeningi ikki rætt til brennistudning.

Sum skipanin er bygd upp, er tað neyðugt, at ávísur dagur er avgerandi, og sostatt kann brennistudningur ikki latast tí, sum seinni fær játtað pensjón, afturvirkandi.

Til § 3: *Til a)* Hovuðssjónarmiðið er, at bert pensjónistar í egnum húsi skulu hava brennistudning. Hetta ber í sær, at um pensjónisturin býr inni hjá vaksnum bornum ella øvugt, skal brennistudningur ikki latast. Mett verður, at ein kann rokna við, at ógift born undir 25 ár mangan eru undir útbúgving ella tílíkt, men treytin er, at tey ouga inntoku hava.

Til b) Um hús latvist verða nýtt til annað enn íbúð av øðrum enn pensjónistinum, kunna tey ikki undir hovuðssjónarmiðið. Um hús latvist eru útleigað ella latin til íbúð, er eingin rætturi til brennistudning sambært a).

Til c) Markið fyri óskerda pensjónsviðbót er fyri hjón 9.300 kr. sum ársinntoka umfram pensjónina. Landsstýrið metir, at viðurskiftini hjá pensjónistum, sum hava lægri inntoku, eru betri, ið hvussu er í so máta, at tey skulu ikki skerja brennistudningin hjá teimum, sum onga eyka inntøku hava.

Tað er ein fylgja av skipanini, at tað avgerandi má vera útgjaldingin í mánaðinum, áðrenn umsóknarfreistin er úti.

Til d) Tað er sjálvsagt, at tey helst ógvuliga fáu hús, ið ikki eru hitað við olju ella tílíkum ella við koli, koma ikki undir skipanina. Prísirnir á øðrum hitaevnum, t.d. á ravmagni eru helst ikki uppfarnir í sama mun sum prísurin á olju ella tílíkum.

Til § 4: Neyðugt verður at kunna gera upp ein ávísan dag, hvor hevur sokt og eigur rætt til brennistudning, fyri at býtið kann fara fram. Ætlanin er at seta freistina at vera um 8 vikur, aftaná at lógin er lýst.

Til § 5: Talan verður um upplýsingar, almannastovuni annars ikki hevur tarvað. Tí verður neyðugt, at upplýsingarnar, t.d. um, hvor býr í húsinum, verða váttaðar av kommunustýrinum, og at skjótt verður athorið.

Umsóknirnar skulu í øllum forum verða á almannastovuni áðrenn freistin sbrt. § 4 er úti. Um tá einki ummæli er komið frá kommunustýrinum, biður almannastovan kommunustýrið um ummæli, og tá er umráðandi, at kommunustýrið svarar skjótt. Tað er tí umráðandi, at almannastovan kann seta eina freist, sum kommunustýrið skal yvirhalda, sjálvt um tað verður mitt á sumri.

Um so verður, at umsókn frá kommununi hóast hetta ikki er komið, verður umsóknin frá pensjónistinum lagd til grund.

Almannastovan fer at boða kommunustýrinum frá, tá hetta lógaruppskotið er lagt fyri tingið, og biðja tey vera fyrireikað til avgreiðsluna av hesum málum, mogguliga soleiðis at formaðurin, skrivarin ella ein annar verður heimilaður at avgreiða hesi mál kommunustýrisins vegna.

Til § 6: Hetta er reglan um býtið av brennistudninginum. Hitaútreiðslurnar eru tær somu, um eitt ella tvey fólk búgva í húsinum. Tí eigur t.d. ein einkjumaður sama studning sum eini hjún.

Til § 7: Ætlanin er at seta gjalddagin fyri fyrstu útgjaldingina at vera um 8 vikur aftaná freistina at lata inn umsókn sbr. § 4 og hinar gjalddagarnar um ávikavist 3 og 6 mánaðar seinni. Sostatt verður samlaða gjaldið fyri figgjarárið útgoldið í trimum portum.

Til § 8: Hesar eru tekniskar ásetanir.

Til § 9: Av tí at ætlanin við uppskotinum er at veita lutvist endurgjald fyri útreiðslur hjá pensjónistum, metir landsstýrið, at brennistudningurin ikki eigur at verða roknaður sum inntoka, tá uppgjort verður til skatting.

1. viðgerð 17. apríl. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 28. apríl legði fram soljóðandi

Alit

Málið er lagt fram av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð bin 17. apríl 1980 beint í socialu nevndina.

Undir viðgerðini er nevndin komin til tað úrslit, at uppskotið, sum tað er lagt fram, viðførir alt ov nógvar fyrisitingarligar trupulleikar, bæði á Almannastovuni og hjá kommununum.

Nevndin er tí komin til ta niðurstoðu, at rættast er at veita øllum pensionistum, sum fáa pensiónsviðbót (eisini partvís) ein brennistudning uppá kr. 900,- árliga. Hjún fáa tó bert ein part.

Á hendan hátt fáa allir pensionistar, sum bert hava pensiónina, ella lítið meira enn pensiónina, at liva av, ein minni figgjarligan bata. Hervið fáa eisini tey, sum búgva inni hjá avvarðandi hendan studning, men nevndin metir, at tað samfelagsgagn, sum er í hesi skipan, rættvísger studningin eisini til hesi.

Nevndin mælir til, at studningurin verður útgoldin við oktober útgjaldingini 1980. Eisini verður skotið upp, at tey, sum hava ræt til pensión, pr. 1. oktober 1980, men ikki fáa hana játtaða fyrr enn aftaná, eisini fáa brennistudningin, men tá verður hann sjálvandi ikki útgoldin, fyrr enn útgjaldingin av pensiónini annars er greið.

Lógin geldur bert fyri 1980/81 og má tí endurnýggjast fyri komandi ár.

Sambært upplýsingar frá Almannastovuni snýr hetta seg um 2—2500 pensionistar, soleiðis at kostnaðurin verður ca. 2 milj. kr.

Nevndin hevur eisini viðgjort spurningin um sparing av brenni við at isolera og annars gera ábotur á eldri hús hjá pensionistum. Ofta er trupult hjá slíkum persónum at útvega sær lán til hesar ábotur, tí inntokugrundarlagið er so lágt. Sociala nevndin er av teirri uppfatan, at heimild eigur at verða givin landsstýrinum (Almannastovuni) at veita árligar studningar individuelt til pensionistar, sum kunna prógva útreiðslur til slík arbeiði og tað neyðuga í teimum. Lánistovnar kunnu moguliga fáa transport í slíkum játtanum.

Ein samd nevnd setur í staðin fyri uppskotið frá landsstýrinum fram hetta

I

u p p s k o t

til

løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensionistar.

§ 1. Í fíggjarárinum 1980/81 verður úr landskassanum veittur ein brennistudningur til pensionistar við kr. 900 til hvønn pensionist.

§ 2. Brennistudningurin verður latin til fólk, ið áðrenn 1. oktober 1980 hava fingið játtað fólkapensión, avlamispensión ella einkjupensión ella hava sent inn umsókn um slíka pensión, tí rætturin til hana er uppnáddur og seinri fáa pensiónina játtaða.

§ 3. Treytin fyri at fáa brennistudning er, at pensiónisturin við oktober útgjaldingina 1980 hevur rætt til pensiónsviðbót. Hjúnarfelagar, sum bæði eru pensionistar eiga ein part í felag.

§ 4. Brennistudningurin verður útgoldin av Føroya Gjaldstovu.
2. stk. Annars hevur Almannastovan fyrisitingina av brennistudninginum um hendi.
3. stk. Avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri landsstýrið.

§ 5. Brennistudningurin er ikki skattskyldugur.

§ 6. Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1980.

lagtingslov om brændselstilskud til visse pensionister.

§ 1. I finansåret 1980/81 ydes af landskassen et brændselstilskud til pensionister på kr. 900 til hver pensionist.

§ 2. Brændselstilskudet ydes til personer, som inden den 1. oktober 1980 har fået bevilget folkepension, invalidepension eller enkepension eller har indsendt ansøgning om sådan pension, fordi retten til denne er opnået og senere får pensionen bevilget.

§ 3. Betingelsen for at opnå brændselstilskud er, at pensionisten ved oktober udbetalingen 1980 er berettiget til pensionstillæg. Ægtepar, som begge er pensionister, får tilsammen en andel.

§ 4. Brændselstilskudet udbetales af Føroya Gjaldstovu.
Stk. 2. Iøvrigt varetager Almannastovan administrationen af brændselstilskudet.
Stk. 3. Afgørelser, som Almannastovan har truffet kan inden for 4 uger indbringes for landsstyret.

§ 5. Brændselstilskudet er ikke skattepligtigt.

§ 6. Denne lov får virkning fra 1. april 1980.

og hetta

II

Uppskot
til
samtyktar.

Álagt verður landsstýrinum áðrenn 1. december 1980 at leggja fyri løgtingið lógaruppskot um hjálp til pensionistar til isolering og liknandi ábøtur á egin hús.

2. viðgerð 29. apríl. Atkvott varð um uppskotið frá samdari nevnd í staðin fyri landsstýrisins uppskot. § 1 varð samtykt við 30—0, §§ 2-5 vóru samtyktar við 30—0, § 6 varð samtykt uttan atkvoðugreiðslu.

3. viðgerð 29. apríl. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 32—0.

F.L. j. nr. 1010-20. Lóg nr. 51 frá 12. mai 1980.

---

81. Loyvi til brygging av øli

Ár 1980, týsdagin 15. apríl legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

1

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om indførselsafgifter.

§ 1. I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 9 verður orðað soleiðis:

«Tað er bann fyri at framleiða tær í § 1 nr. 3.01-3.12 nevndu gjaldsskyldugu vørur og ol, sum í sær have yvir 4,6 vektprosent av alkoholi.»

2) § 10, punkt a verður orðað soleiðis:

«Øl.

2,25 vektprosent alkohol og undir 1 litur 1,25 kr.

Yvir 2,25 men ikki yvir 3,70 vektprosent alkohol 1 litur 4,65 kr.

Yvir 3,70 men ikki yvir 4,6 vektprosent alkohol 1 litur 8,70 kr.»

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

1) § 9 affattes således:

«Det er forbudt at fremstille de i § 1 nr. 3.01-3.12 nævnte afgiftspligtige varer samt at fremstille øl, der indeholder over 4,6 vægtprocent alkohol.»

2) § 10, punkt a affattes således:

«Øl.

2,25 vægtprocent alkohol og under 1 liter 1,25 kr.

Over 2,25 men ikke over 3,70 vægtprocent alkohol 1 liter 4,65 kr.

Over 3,70 men ikke over 4,6 vægtprocent alkohol 1 liter 8,70 kr.»

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

II

løgtingslóg um broyting í lóg «om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke».

§ 1. Lóg nr. 115 frá 4. april 1928 «om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m.» verður broytt soleiðis:

1) Í § 1 verður sum nýtt 2. stk. skotið inn:

«Hóast fyrisetanini í 1. stk. kunnu bryggjarfir, sum hava fingið loyvi landsstýrisins til tað, framleiða øl, sum inniheldur 2,25 men ikki yvir 4,6 vektprosent alkohol og at selja øltið, tá ið sølan er beinleiðis frá bryggjarínum ella goymslu til brúkara. Við tilfkari sølu krevjast tey sonu prógvini frá keypara fyri ikki at skylda skatt v.m., sum tá ið rúsdrekka verður innflutt. Landsstýrið skipar í kunngerð tær gjøllari reglurnar fyri eftirlitinum við at bryggjarfini halda hesar fyrisetanir. Reglurnar í lógini annars um handil, skonking v.m. galda eisini fyri tað øltið, sum her er umrætt».

lagtingslov om ændring i lov om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke.

§ 1. Lov nr. 115 af 4. april 1928 om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m. ændres således:

1) I § 1 indføjes som nyt stk. 2:

«Uanset bestemmelsen i stk. 1 kan bryggerier, der har fået landsstyrets tilladelse hertil, fremstille øl, som indeholder 2,25 men ikke over 4,6 vægtprosent alkohol og sælge dette, når salget finder sted direkte fra bryggeri eller depot til forbruger. Ved sådant salg kræves de samme bevisligheder fra koberen for ikke at skylde skat m.v. som ved indførsel af berusende drikke. Landsstyret udfærdiger ved kundgørelse de nærmere regler for tilsynet med bryggeriernes overholdelse af disse bestemmelser. Lovens regler iøvrigt om handel, udskænkning m.v. gælder også for det heromhandlede øl».

2) Í § 1 verður 2. stk. broytt til 3. stk.

2) I § 1 ændres stk. 2 til stk. 3.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Eftir galdandi tolllóg er barn fyri í Føroyum at framleiða øl, sum í sær hevur 2,25 vektprosent av alkoholi ella meira og eftir «Lov om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m.» er tað forboðið at handla við sterkari øli enn 2,25 vektprosent av alkoholi.

Innflutningurin til Føroya av sterkum øli liggur um 3 mió. fløskur árliga til eitt fakturavirði uppá umleið 6 milj. kr.

Innflutningurin í 1979 býtir seg soleiðis millum tær ymsu styrkirnar:

Skattaklassi II (veikt øl)	82.400 fløskur
Skattaklassi I (hof, grøn tuborg)	558.397 fløskur
Skattaklassi A (gulløl)	944.985 fløskur
Skattaklassi B (elefant, páskabryggj)	1.192.997 fløskur

Framleiðslan í Føroyum í 1979 av veikum øli var 3½ milj. fløskur.

Eftir uppskotinum svarar framleiðslugjaldið á føroyskt framleiddum øli umleið til innflutningstollin og 13% av serliga innflutningsgjaldinum, og skuldi landskassin sostatt fingið umleið somu inntoku av øli bryggjað í Føroyum sum av innfluttum øli.

Í viðlagda uppskoti til kunngerð um brygging og útflýgging av sterkum framgongur, hvussu ætlanin er, at eftirlitið við brygging og útflýgging skal fara fram.

UPPSKOT

K u n n g e r ð
um
brygging og útflýggjing av sterkum øli.

Við heimild í § 1, 2. stk. í lóg nr. 115 frá 4. apr. 1928 við seinni broytingum «om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m.» hevur landsstýrið fyrisett fylgjandi um brygging og solu av øli, ið kemur undir lógina:

§ 1. Landsstýrið kann geva bryggjaríunum í Føroyum loyvi, ið er galdandi fyri 2 ár í senn, at bryggja sterkt øl, sum í sær hevur í mesta lagi 4,6 vektprocent av alkoholi.
2. stk. Landsstýrið ásetur í loyvinum nærri reglur um eftirlit við framleiðsluni, eins og landsstýrið altíð kann áleggja nýggjar treytir.

§ 2. Tollvaldið hevur regluligt eftirlit við bryggingini, goymsluni og útflýggingini, og hava bryggjaríini skyldu at fylgja øllum krøvum, ið eftirlitið setur viðvíkjandi brygging, goymsluhølum og útflýggjan v.m.

§ 3. Framleiðslugjald fyri selt øl í einari viku skal rindast inn á Føroya gjaldstovu ella eina av deildunum í seinasta lagi í vikuni eftir.

§ 4. Ølið skal bíleggjast skrivliga ella gjøgnum telefon av keyparanum persónliga.
2. stk. Bryggjaríið sendir keyparanum gjøgnum post faktura og giroinngjaldingarkort uppá bíløgdu nøgdina, har framleiðslugjaldið er viðroknað í prísinum.
3. stk. Keyparin rindar peningin fyri ølið gjøgnum postverkið inn á serliga girokonto hjá bryggjarínum til hetta endamál og vísir samstundis fram gilduga skattaváttan.
4. stk. Ølið skal avheintast av keyparanum sjálvum ella einum, ið hevur fulltrú frá honum, frá bryggjarínum ella frá øðrum góðkendum útflýggingarstað. Samstundis skal vísast fram faktura og postkvittan og kvittan gevast fyri móttøkuna av ølinum.

§ 5. Landsstýrið ásetur, hvørjar 2 dagar í vikuni, øl kann útflýggjast.

§ 6. Landsstýrið kann góðkenna, at bryggjaríini eisini hava útflýggingarstað á plássum, har tað liggur fyri hjá tollvaldinum at hava eftirlit við goymslu og útflýgging.

§ 7. Verða treytirnar í loyvinum ella aðrar álagdar treytir ikki hildnar, kann loyvið til eina og hvørja tíð takast aftur.

1. viðgerð 21. apríl. Málið varð beint í serliga nevnd umboðað av øllum flokkum.

Í hesa nevnd vórðu valdir: Jógvan Sundstein, Hilmar Kass, Agnar Nielsen, Signar Hansen, Adolf Hansen og Andrias P. Jacobsen.

28. apríl legði nevndin fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram á ting av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð hin 21. apríl 1980 beint í eina serstaka 6-manna nevnd við einum umboði fyri hvørm flokkin.

Málið er lagt fram av tí, at føroysku bryggjarfini hava sokt landsstýrið um loyvi til at bryggja sterkari øl, enn tey hava loyvi til nú, út frá tí sjónarmiði, at tað sterka olið í stórum nogdum verður innflutt.

Lógaruppskotið frá landsstýrinum snýr seg um at gera broytingar í «lov om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.v.» og í lóg um innflutningsgjald v.m.

Broytingin í rúsdrekkalógini snýr seg um at loyva bryggjarfunum eisini at bryggja øl við styrkini frá 2,25 vektprocent (sum er tað nú loyvda) til 4,6 vektprocent, sum svarar til tað sonevnda gulløl.

Broytingin í lógini um innflutningsgjald snýr seg um at ásetta framleiðslugjald á føroyskt framleidda olið, sum svarar til tað gjald, ið lagt er á innflutta olið.

Loyvi til føroysku bryggjarfini at bryggja sterkt øl skal vera treytað av, at ikki verður lættari at fáa hendur á tí enn á tí innflutta. Reglur viðvikjandi skattarindan, rindan av fakturaprísi og framleiðslugjaldi, útflýggingarháttur v.m. eru greindar í uppskoti til kunngerð, sum er hjálogd málinum. Undir nevndarviðgerðini hava ynski verið framm um smávegis broytingar í kunngerðini samanber seinri.

Undir orðaskiftinum á tingi komu ymiskar áskoðanir fram, men nokur hovuðssjónarmið skulu nevnast:

1. Summir roðarar logdu dent á, at hetta bert var ein ídnaðarspurningur, nevniliga at framleiða tað sjálvir, sum vit annars innflyta.
2. Aðrir logdu dent á, at hetta var ein prinsipiel broyting av núverandi rúsdrekkaskipan.
3. Fleiri tingmenn settu fram ynski um at banna innflutningi av sterkum øli so sum Elefant, F.F. v.m. og nakrir skutu upp at skanta øl.

Síðani málið kom á ting, hevur tingið fingið skriv frá Felagsnevnd Føroysku Fráhaldsfelaga og frá Jógvan Andreasen, Vestmanna, sum mæla frá at samtykkja uppskotið. Eisini er komið skriv frá Esbern Fredriksberg, Klaksvík, sum ikki hevur somu áskoðan sum frammanundan nevndu.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við Vilhelm Johannesen, landsstýrismann, og fulltrúarnar Jalgrím Hilduberg og Torbjørn Mikkelsen.

Eisini hevur nevndin havt fund við Nepper Christensen, politimeistara, og Niclas Akraberg Poulsen, politiassistent, um málið.

Nevndin er ikki saund um, um málið er eitt ídnaðarmál ella eitt rúsdrekkamál, men sær tó tað órímiliga í at nokta framleiðslu í landinum av eini vøru, tá ið sama vøra annars frítt kann innflytast til landið.

Hinvegin verður eitt loyvi til føroyska bryggjarfini ein broyting í galdandi skipan, sum í dag er ásett beinleiðis í rúsdrekkalógini.

Nevndin hevur eisini tá stoðu, at ikki eigur at verða innflutt sterkari ol enn tað, sum kann framleiðast her á landi. Í samsvar við tað gongur hon inn fyri at forbjóða innflutningi av øli sterkari enn 4,6 vektprocent. Ein minniluti (Adolf Hansen) setur tó hetta mark til 3,7 vektprocent.

Eisini mælir meirilutin í nevndini til, at alt ol við eini styrki frá 3,7 til 4,6 vektprocent alkohol verður skamtað, og skjýtur upp, at tað verður loyvt hvørjum persón yvir 20 ár at útvega sær upp til 42 litrar um mánaðan av hesum øli, meðan restin ikki verður avmarkað.

Í sambandi við annað rúsdrekka mælir nevndin til at banna innflutningi av spiritus við meira enn 60 rúmprocent alkoholinnihaldi. Harafturat verður mælt til at skamta hvítvín og spiritus undir 23 vektprocent, soleiðis at ransónin av hesum verður 9 litrar um fjórðingsárið.

Hovuðsatvoldin til tilmæli um skamtan er at fyribyrgja ólógligari sølu. Um uppskotið verður samtykt, koma vit at hava hesa skamtunarskipan:

1) Spiritus yvir 23 rúmprocent	9 l fjórðingsárið
2) Hvítvín og spiritus undir 23 rúmprocent	9 l fjórðingsárið
3) Øl frá 3,7 til 4,6 vektprocent	42 l mánaðan

Samstundis við broytanini av ollframleiðsluni heitir nevndin á landsstýrið um at gera tiltøk til at áleggja framleiðarunum, bæði útlendskum og føroyskum, at taka so nógv fyri fløskur, at hesar ikki verða burturkastaðar og misprýða náttúruna.

Í samsvar við hesar viðmerkingar tekur meirilutin (Signar Hansen, Andrías Petur Jacobsen, Hilmar Kass og Jógvan Sundstein) undir við landsstýrisuppskotinum við teim umroddu broytingunum. Av tí at broytingarnar eru so mikið nógvar, verður í staðin fyri landsstýrisuppskotið sett fram hetta lógaruppskot. (tó verður deild II í landsstýrisuppskotinum óbroytt):

I

Uppskot
til

lagtingslóg um broytingar í lagtingslóg um innflutningsgjald.

§ 1. Í lagtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjald v.m. við seinni broytingum verða gjordar hesar broytingar:

1) Í § 1, nr. 3.12 ganga út ordini: «yvir 4,60 vektprocent alkohol.»
2) § 9 verður ordað soleiðis:
«Tað er bann fyri at framleiða tær í § 1, nr. 3.01 - 3.12 nevndu gjaldskyldugu vorur, at innflyta og framleiða øl, sum í sær hevur yvir 4,60 vektprocent av alkoholi og at innflyta rúsdrekka, sum í sær hevur yvir 60 rúmprocent alkohol.»

3) § 10, punkt a verður ordað soleiðis:
«Øl.
2,25 vektprocent alkohol og undir 1 litur 1,25 kr.
Yvir 2,25 men ikki yvir 3,70 vektprocent alkohol 1 litur 4,65 kr.
Yvir 3,70 men ikki yvir 4,60 vektprocent alkohol 1 litur 8,70 kr.»

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin, tó kemur broyting nr. 1) fyrst í gildi 1. juli 1980.

II Landsstýrisins uppskot óbroytt:

Uppskot
til

lagtingslov om ændringer i lagtingslov om indforselsafgifter.

§ 1. I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indforselsafgifter m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 1, nr. 3.12 udgår ordene: «over 4,60 vægtprocent alkohol.»

2) § 9 affattes således:
«Det er forbudt at fremstille de i § 1, nr. 3.01 - 3.12 nævnte afgiftspligtige varer, at importere og fremstille øl, der indeholder over 4,60 vægtprocent alkohol samt at importere spiritus, der indeholder mere end 60 vægtprocent alkohol.»

3) § 10, punkt a affattes således:

«Øl.
2,25 vægtprocent alkohol og under 1 liter 1,25 kr.
Over 2,25 men ikke over 3,70 vægtprocent alkohol 1 liter 4,65 kr.
Over 3,70 men ikke over 4,60 vægtprocent alkohol 1 liter 8,70 kr.»

§ 2. Denne lov træder i kraft straks, dog træder ændring nr. 1) først i kraft 1. juli 1980.

Uppskot
til

lagtingslóg um broyting í lóg «om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke».

§ 1. Lóg nr. 115 frá 4. april 1928 «om forbud mod at drive erhverv med be-

lagtingslov om ændring i lov om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke.

§ 1. Lov nr. 115 af 4. april 1928 om forbud mod at drive erhverv med be-

rusende drikke m.m.» verður broytt soleiðis:

1) I § 1 verður sum nýtt 2. stk. skotið inn:

«Hóast fyrisetningin í 1. stk. kunnu bryggjarfir, sum hava fingið loyvi landsstýrisins til tað, frameiða ol, sum innheldur 2,25 men ikki yvir 4,6 vektprocent alkohol og at selja olið, tí ið sølan er beinleiðis frá bryggjarínum ella goymslu til brúkara. Við tílíkari sølu krevjast tey sonu prógvini frá keypara fyri ikki at skylda skatt v.m., sum tá ið rúsdrekka verður innflutt. Landsstýrið skipar í kunngerð tær gjøllari reglurnar fyri eftirlitinum við at bryggjarfini halda hesar fyrisetanir. Reglurnar í lógini annars um handil, skonking v.m. galda eisini fyri tað olið, sum her er umrætt».

2) I § 1 verður 2. stk. broytt til 3. stk.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

ru eller drikke m.m. ændres sig ledes:

1) I § 1 indføjes som nyt stk. 2:

«Hæftet bestemmelsen i stk. 1 kan bryggerier, der har fået landsstyrets tilladelse hertil, fremstille øl, som indeholder 2,25 men ikke over 4,6 vægtprocent alkohol og sælge dette, når salget finder sted direkte fra bryggeri eller depot til forbruger. Ved sådant salg kræves de samme bevisligheder fra køberen for ikke at skylde skat m.v. som ved indførsel af berusende drikke. Landsstyret udfærdiger ved kundgørelse de nærmere regler for tilsynet med bryggeriernes overholdelse af disse bestemmelser. Lovens regler iøvrigt om handel, udskænkning m.v. gælder også for det heromhandlede øl».

2) I § 1 ændres stk. 2 til stk. 3.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

III Uppskot

til

løgtingslóg um skamtan av rúsdrekka.

§ 1. Ongum er loyvt at innflyta um ársfjórðingin meira enn 9 litrar av spiritusi við meira enn 23 rúmprosentum av alkoholi.

2. stk. Ongum er loyvt um ársfjórðingin at innflyta meira enn 9 litrar av heitvíni ella spiritusi við 23 rúmprocentum av alkoholi ella minni.

3. stk. Ongum er loyvt at innflyta og/ella keypa frá føroysku bryggjarínum meira enn 42 litrar tilsamans um mánaðin av øli, sum í sær hevur meira enn 3,70 vektprocent av alkoholi.

§ 2. Hvør tann, ið innflytir ella keypir

lagtingslov om rationering af spiritus.

§ 1. Ingen person har ret til at importere om kvartalet mere end 9 liter spiritus, der indeholder mere end 23 rumprocent alkohol.

Stk. 2. Ingen person har ret til om kvartalet at importere mere end 9 liter hedvin eller spiritus, der indeholder 23 rumprocent alkohol eller mindre.

Stk. 3. Ingen person har ret til at indføre og/eller købe fra de færøske bryggerier mere end 42 liter ialt om måneden af øl, der indeholder mere end 3,70 vægtprocent alkohol.

§ 2. Enhver, der importerer eller ko-

skanniað rúsdrekka, skal hava keypikort, harið tollvaldið ella postverkið forir hvorja innflutta ella keypta sending.

2. stk. Keypikortini fáast frá bústaðarkommununi móti gjaldi uppá 10 kr. fyri hvort kortið, harav helvtin fer í kommunukassan og helvtin í landskassan. Persónar, ið ikki hava bústað í Foroyum, kunnu frá landsstýrinum fáa serstakt keypikort til avmarkaða rúsdrekkanogd í mun til uppihaldstíðina í Foroyum.

3. stk. Keypikortini skulu ljóða uppá navn og verða bert flýggjað persónum yvir 20 ár.

4. stk. Keypikortini galda fyri eitt ár í senn (1. apríl - 31. mars). Tey eru strangt persónlig og mugu ikki verða lænt ella nýtt av øðrum.

§ 3. Landsstýrið kann í serligum førum gera undantak frá nøgdunum eftir § 1.

§ 4. Brot á hesa lóg verða revsað við bót eins og ein kann missa rættin til keypikort í styttri ella longri tíð.

ber rationeret spiritus, skal være i besiddelse af kobekort, hvori toldmyndighederne eller postvæsenet noterer enhver importeret eller kobt sending.

Stk. 2. Kobekortene fås fra bopælskommunen mod betaling af 10 kr. for hvert kort, hvor halvdelen tilfalder kommunekassen og halvdelen landskassen. Personer, der ikke har bopæl på Færøerne, kan fra landsstyret få et specielt kobekort til en begrænset spiritusmængde i forhold til den tid, de skal opholde sig på Færøerne.

Stk 3. Kobekortene skal lyde på navn og kan kun udleveres til personer over 20 år.

Stk. 4. Kobekortene gælder for et år ad gangen (1. april - 31. marts). Det er strengt personligt og må ikke udlånes eller benyttes af andre.

§ 3. Landsstyret kan i særlige tilfælde dispensere fra mængderne i § 1.

§ 4. Overtrædelse af denne lov straffes med bøde og kan man miste retten til at få kobekort i kortere eller længere tid.

Eisini setur sami meirilutin hetta

IV

u p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at gera fylgjandi broytingar í ordingini av kunngerðini um brygging og útflýgging av sterkum oli:

1) Í § 4, 2. stk. verður aftaná orðini «Bryggjarlið sendir» sett: «í fyrsta lagi dagin eftir bíleggingina».
2) Í § 4, 4. stk. verður aftaná orðini «góðkendum útflýggingarstað» sett: «ella sent til hansara persónliga bústað».
3) § 5 verður orðað soleiðis:
«Øl kann bert útflýggjast frá mánadegi til friggjadag í vanligu arbeiðstíðini.»

Meirilutin ásannar, at tað hevur verið stórur vokstur í rúsdrekkanýtslúni seinastu árini og eisini nógv rúsdrekkamisnýtsla.

Tað er ikki langt síðani, at W.H.O. — alheims heilsustovnurin — beinleiðis sendi út eina álvarsliga ávaring til allar góðar kreftir um at byrgja fyri rúsdrekkamisnýtslúni. Hendaávaring endaði við at siga, at tað einasta, sum munar, er at minka um alkoholinnihaldið.

Við tí, sum meirilutin frammanfyri hevur skotið upp, meta vit, at nakað verður vunnið á hesi leið. Kortini má ásannast, at nógv er eftir at gera fyri at koma burtur úr tí vánaligu stoðu, samfelag okkara er í rúsdrekka viðvikjandi. Bæði hvat ið viðvíkur respekt fyri lógini, klárari lógarreglur, eftirlit og ikki minst upplýsing er nógv at gera fyri at bota um stoðuna.

Meirilutin (Signar Hansen, Andrias Petur Jacobsen, Hilmar Kass og Jógvan Sundstein) setur tí fram hetta

V

u p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum:

1) at gera eina kanning av, hvussu núverandi rúsdrekkaskipan virkar samanliknað við orðaljóðið í lóggávuni á hesum øki.
2) at kanna avleiðingarnar, sum koma at standast av teirri broyting, sum nú er samtykt, og á Ólavsøku 1981 leggja frágreiðing fyri tingið.
3) Um kanningarnar sambært punktini 1 og 2 benda á tað, at koma við uppskotum um neyðugar broytingar í rúsdrekkalóggávuni á Ólavsokutingsetuni 1981.
4) Meira miðvist enn higartil at stuðla upplýsingararbeiði um vandarnar, ið standast av rúsdrekkamisnýtsluni.

Ein minniluti (Agnar Nielsen úr Sambandsflokkinum) lorir fram: Málið er lagt fram av Foroya Landsstýri, sum var tað eitt reint ídnaðarmál. Uppskotið gongur deils út uppá, at sterkari ol skal bryggjast í Foroyum, og deils at landskassin ikki skal missa nakað orsakað av hesi broyting.

Undir 1. viðgerð var av fleiri vist á, at tað er ein fyrimunur at flyta framleiðslúna av sterkum oli heim til Foroyar.

Minnilutin er sandur í, at ein tílík framleiðsla merkir eina ávísa sparing í innflutninginum uttanífrá. Eisini er minnilutin sandur í, at foroysk framleiðsla yvirhevur er at fyritrekkja fram um innflutning.

Undir 1. viðgerð var breið semja um, at vit í Foroyum hava stórar og vaksandi alkoholtruptulleikar. M.a. greiddi landsstýrismaðurin frá, hvussu læti tað er at fáa

fatur á stórum nogdum av sterkum øli, og hvussu ofta sami persónur kann fáa útflýggjað tílíkt øl.

Eisini fær ein varhugan av, at tað verður alt meira vanligt, at sterkt øl verður innkeypt í storri nogdum enn innflytarin hevur brúk fyri sjálvur, og verður selt øðrum.

Samanumtikið fekk ein undir 1. viðgerð av málinum týðiliga váttað tað, ein helt seg vita fraumanundan, nevniliga at alkoholtrupulleikarnir í Føroyum verða alt storri, serliga hjá tí unga fólkinum.

Ørgrannalondum okkara ljóðar, at teirra trupulleikar á hesum øki eftir øllum at doma eru enn storri enn okkara, og at tað fyrst og fremst er ølið, sum er orsøkin til hesar trupulleikar. Í uppskoti landsstýrisins verður vist á, at tað við kunngerð verður tryggjað, at tað ikki verður lættari at fáa fatur á føroyskt bryggjaðum sterkum øli, enn tað nú er at fáa fatur á útlendskum sterkum øli.

Hertil er at siga, at tað hevur gingið sera illa at fáa yvirhildið tær lógir og reglur, sum eru galdandi í Føroyum viðvíkjandi alkoholi. Herumframt vísir gongdin og tann núverandi hættisliga stoðan, at tað er avgjort neyðugt at gera ábøtur á galdandi reglur og at tryggja, at galdandi reglur verða hildnar.

Sum nú er, vilja tiltok, sum ganga út uppá at minka um olnýtsluna og/ella at forða fyri vokstri í olnýtsluni, hert ganga ímóti áhugamálum hjá útlendskum framleiðarum. Verður ølið bryggjað í Føroyum, er stoðan ein heilt onnur. Tá verður spurningurin um at seta tiltok í verk, sum ganga út yvir føroysk framleiðsluvirkir.

Minnilutin heldur tað vera av alstórum týdningi, at vit hava lagt til rættis ta best møguligu skipan á hesum øki, at henda skipan er fingin at virka, áðrenn ølkeldan sjálv verður flutt heim til Føroyar.

Í nevndini hava verið ummælt fleiri tiltok, sum kunnu bera okkum nærri eini betri spiritusskipan.

Minnilutin tekur heilt og fult undir við hesum tiltokum og mælir til at samtykkja hesi. Hóast uppskot landsstýrisins ber í sær ávísar fíggjarligar og arbeiðsmarknaðarligar fyrimunir, metir minnilutin spurningin so álvarsligan, at tað er neyðugt at seta reglur í verk og at fáa vissu fyri, at hesar reglur í royndi og veru virka á ein rímiligan hátt, áðrenn ynski landsstýrisins um at loyva føroysku bryggjaríunum at bryggja sterkt øl, verður gingið á móti.

Verða tílíkar reglur settar í verk nú beinanvegin, so verður tað ívaleyst møguligt eftir einum ári at kanna eftir um ein betri skipan er fingin, og tá kann spurningurin um bryggjan av sterkum øli í Føroyum verða tikin uppaftur, og kann minnilutin út frá hesum uppá núverandi tíðspunkt ikki taka undir við at geva loyvi til bryggjan av sterkum øli í Føroyum, og setur fram fylgjandi tvey

VI

u p p s k o t

til

broyting av uppskoti meirilutans til logtingslóg um skamtan av rúsdrekka.

1) § 1. Orðini í § 1, 3. stk. «innflyta og/ella keypa frá foroysku bryggjarínum» ganga út.
2) *2. stk.* Í § 1, 3. stk. verður «3,70» broytt til «2,25».
3) Í § 2, 1. stk. ganga orðini «ella keypir» og «ella keyptu» út.

1) § 1. Ordene i § 1, 3. stk. «indføre og/eller købe fra de færøske bryggerier» udgår.
2) *Stk. 2.* I § 1, stk. 3 ændres «3,70» til «2,25».
3) I § 2, stk. 1 udgår ordene: «eller køber» og «eller købt».

VII

u p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum, aftaná at reglurnar eftir uppskoti til logtingslóg um skamtan av rúsdrekka, broytt eftir uppskoti minnilutans, hava verið í gildi minst eitt ár, at kanna avleiðingarnar av hesi lóg og leggja úrslitið fyri logtingið.

Ein annar minniluti (Adolf V. Hansen) kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins út frá teirri meting, at talan er um munandi prinsipbroytingar uttan at bott verður um teir vána rúsdrekkavanar, ið nú ráða.

Minnilutin metir, at nakað munagott má gerast fyri at verja komandi ættarlið móti teimum fylgjum, ein stór og vaksandi rúsdrekkanýtsla forir við sær menniskjaligt, socialt og mentunarligt.

Minnilutin metir tær núgaldandi reglur at vera ov ótíðarhóskandi til at uppfylla uppruna andan í rúsdrekkalógini, orsakað av teimum broyttu samferðsluviðurskiftunum, tí broytta sociala mynstrinum og teimum broyttu fíggjarviðurskiftunum.

Nýtslan av sterkum oli og vínl er so nógv vaksin seinastu árini, at hon gevur øktar socialar trupulleikar, og metir minnilutin tað tí neyðugt at seta skamtan í verk fyri vínl og sterkum oli.

Tá minnilutin ikki setur seg forun fyri at atkvoða fyri uppskoti landsstýrisins, soleiðis sum tað er sett fram, er tað eisini út frá teimum sannroyndum, sum mangir serkønir hava verið frammi við í samband við ta stoðugt vaksandi alkoholnýtsluna í mongum av heimsins framkomnu londum, fyri ikki at tala um tey sonevndu tilafturskomnu londini. Tað er ikki long tíð síðan WHO — alheims heilsustovnurin — beinleiðis sendi út eina álvarsliga ávaring til allar góðar kreftir (íroknað Foroya løgting) um nú at taka saman hendur fyri at demma upp fyri sorgarleikinum í kjalarvørrinum av rúsdrekkamisbrúkinum. Henda ávaring konkluderaði í tí, at tað einasta, sum munar, er at minka um alkoholinnihaldið.

Hetta eru ikki tilvildarlig orð, tá tey koma frá einum so viðurkendum stovni sum alheims heilsustovnurin WHO.

Minnilutin avvísir blankt, viðurkennir yvirhovur ikki, tá sagt verður, at hetta bert er eitt ídnaðarmál. Tað er at seta tingini á hovdið. Tað at gera framleiðsluna av sterkum oli lógliga í Føroyum, er at vaksa um alkoholinnihaldið í tí sum bryggjast skal — og skal hetta verða tað einasta, sum tinkið samtykkir, ja, so er eiki gjort fyri at bota um skaðiligu avleiðingarnar av rúsdrekkanýtslu.

. . . . . .

Sami minniluti er, tá hetta er sagt, sjálvsagt púra greiður yvir, at vit koma ikki úr staði, vinna heldur ikki fram til nakra ábót við ikki at síggja koldu veruleikarnar í eygum, at viljin ikki er tilstaðar at forkoma rúsdrekkastreyminum í Føroyum. Og út frá hesum vil minnilutin verða við til at loyva brygging av oli í Føroyum við eini alkoholstyrki, sum ikki er storri enn 3,7 vektprocent alkohol, men undir teimum treytum, at øll framleiðsla av hesum sterka oli beinleiðis skal vera undir varðveitslu hjá tollvaldinum — sonnleiðis at alt annað innflutt rúsdrekka kemur undir hesa skipan. Tað vildi gjort viðurskiftini nógv greiðari, tað vildi spart skipaavgreiðslurnar fyri nógv stríð, tí goymslur terra eru altið úti fyri stuldri, tí har finst rúsdrekka goymt. Tað má fyri framtíðina vera so, at alt rúsdrekka kemur undir somu reglur við navna/nummarmerking á sendingini. Samanumtikið at ásettu treytirnar, sum tær eru skrivaðar í lógini nú verða fylgdar aftur.

Minnilutin setur tí uppskot fram um, at álagt verður landsstýrinum til Ólavsoku at seta fram uppskot samsvarandi hesum og setur sami minniluti (Adolf V. Hansen) fram soljóðandi

VIII

u p p s k o t
til
samtyktar.

Álagt verður landsstýrinum til ólavsokutingsetuna at framleggja lógaruppskot til broyting í rúsdrekkalógini o.a. eftir hesum rætningslinjum:

1) At ikki verður loyvt at innflyta, selja, keypa ella eiga tól til heimabrenning.
2) At alt rúsdrekka, sum er á goymslu í Føroyum, skal vera undir varðveitslu av tollvaldinum.
3) At øll sala av rúsdrekka skal verða í fløskum og skal týðiliga hava alkoholstyrkina ámerkta.
4) At reglugerð um serloyvi megu ikki selja umborð sterkari logir enn loyvt er at keypa í landi. Og at um borð má ikki seljast óuppskonkt meira enn loyvt er at flyta í land.
6) At bílegging og útloysing av rúsdrekka yvir 2,25 vektprocent verður strangt persónligt, og
7) At felagsinnflutningur, -keyp og -goymsla ikki verður loyvd, undantikið tað, ið nevnt er undir 2) um goymslur.

Minnilutin setur fram soljóðandi broytingaruppskot til uppskot meirlutans

I broytingaruppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld.

1) Í § 1 verða í 1) orðini «yvir 4,60 vektprocent alkohol» broytt til «yvir 3,70 vektprocent alkohol».
2) Undir 2) verða orðini «yvir 4,60 vektprocent ....» broytt til «yvir 3,70 vektprocent ....»
3) Undir 3) ganga orðini «Yvir 3,70, men ikki yvir 4,60 vektprocent alkohol í litur 8,70 kr.» úr.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om indførselsafgifter.

1) I § 1 ændres ordene i 1) «over 4,60 vægtprocent alkohol» til «over 3,70 vægtprocent alkohol».
2) Under 2) ændres ordene «over 4,60 vægtprocent ....» til «over 3,70 vægtprocent ....»
3) Under 3) udgår ordene «Over 3,70, men ikke over 4,60 vægtprocent alkohol i liter 8,70 kr.»

Minnilutin setur fram fylgjandi

broytingaruppskot
til

II
løgtingslóg um broyting í lóg «om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke».

Í § 1 undir 1) verða orðini «men ikki yvir 4,60 vektprosent alkohol ....» broytt til «men ikki yvir 3,70 vektprocent alkohol ....»

lagtingslov om ændring i lov «om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke».

I § 1 under 1) skal ordene «men ikke over 4,60 vægtprocent alkohol ....» ændres til «men ikke over 3,70 vægtprocent alkohol ....»

og endaliga setur minnilutin fram soljóðandi broytingaruppskot til uppskot meirlutans

broytingaruppskot
til

III

uppskot til løgtingslóg um skamtan av rúsdrekka.

3. stk. í § 1 verður orðað soleiðis:

»Ongum er loyvt at innflyta meira enn 42 lítrar um mánaðan av øli, sum í sær hevur meira enn 3,70 vektprocent av alkoholi«.

2) 1. stk. í § 2 verður orðað soleiðis:

»Hvør tann, ið innflytir skamtað rúsdrekka skal hava keypikort, harið rollvaldið ella postverkið forir hvørja innflutta sending.«

3) § 4 verður orðað soleiðis:

»Brot á hesa lóg verður revsað við bót eins og ein missir rættin til keypikortið í 1 ár ella longri.«

forslag til løgtingslov om rationering af spiritus.

Stk. 3. § 1 affattes således:

Der er ikke tilladt nogen at indføre mere end 42 liter øl om måneden, som indeholder mere end 3,70 vægtprocent alkohol«.

2) Stk. 1 i § 2 affattes således:

»Enhver, der indfører rationeret spiritus, skal have et købekort, hvor toldvæsenet eller postvæsenet påfører hver forsendelse.«

3) § 4 får følgende ordlyd:

»Overtrædelse af denne lov straffes med bøde samt fortabelse af rettigheden til købekort i 1 år eller mere.«

30 april lagdu Agnar Nielsen, Jákup Lindenskov, Juul Jacobsen og Jógvan I. Olsen fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Aðrenn lógaruppskotini í løgtingsmáli nr. 81/1979 Loyvi til bryggjan av øli, sum varð samtykt við aðru viðgerð, koma til atkvøðugreiðslu undir 3. viðgerð, verður at atkvøða um soljóðandi broytingaruppskot til:

II løgtingslóg um broyting í lóg »om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke«.

Aftaná »Henda lóg kemur í gildi beinanvegin« verður at seta soljóðandi petti:

Fólkaatkvøða fyri ella ímóti tí við aðru viðgerð samtyktu broyting, um tað verður samtykt við triðju viðgerð, verður at halda. Alagi verður landsstýrinum at skipa fyri fólkaatkvøðu áðrenn lógin kann verða lýts. Vísir fólkaatkvøðuúrslitið ein meirluta móti broytingini í lógini, so er broytingin burturdottin.

2. viðgerð 30. april. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum í nevndini (Agnar Nielsen) fall við at 13 atkvøddu ja, meðan 19 atkvøddu ikki. Atkvøðugreiðslan varð hendan:

Ja atkvoddu: Ivan Johannesen, Adolf Hansen, Eli Nolsoe, Sverre Midjord, Jákup Lindenskov, Jona Henriksen, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Agnar Nielsen, Pauli Ellefsen, Hilmar Bech.

Atkvoddu ikki: Signar Hansen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Juul Jacobsen, Poul J. Olsen, Haldur Hansen, Jørgen Thomsen, Andrias P. Jacobsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Jógvan Durhuus, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Edmund í Garði, Jógvan Sundstein, Øssur Dam Jacobsen, Eyðun Videro, Hákun Djurhuus og Óli Breckmann.

Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum (Adolf Hansen) pkt. 1 fall við 15—0, pkt. 2 varð atkvoðt við navnakalli og fall tað við 14 ja-atkvoðum, 1 nei-atkvoðu, 17 atkvoddu ikki.

Ja atkvoddu: Ivan Johannesen, Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Eli Nolsoe, Sverre Midjord, Jákup Lindenskov, Jona Henriksen, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Agnar Nielsen, Pauli Ellefsen og Hilmar Bech.

Nei atkvoddi: Andrias Petur Jacobsen.

Atkvoddu ikki: Signar Hansen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Poul J. Olsen, Haldur Hansen, Jørgen Thomsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Jógvan Durhuus, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Edmund í Garði, Jógvan Sundstein, Øssur Dam Jacobsen, Eyðun Videro, Hákun Djurhuus, Óli Breckmann.

Pkt. 3 og 4 frá sama minnilutu fullu við 12—0, pkt. 5 fall við 14—0 og pkt. 6 og 7 fullu við 15—0.

I. Uppskot til løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um innflutningsgjold varð samtykt við 22—0, § 2 varð samtykt við 24—0. Broytingaruppskot frá minnilutanum til uppskot meirlutans um lóg um innflutningsgjold fall við 13—0.

II. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Adolf Hansen) til § 1 í løgtingslóg «om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke» fall við 7—0. § 1 í landsstýrisins uppskoti varð samtykt við 21—0, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

III. Uppskot til løgtingslóg um skamtan av rúsdrekka. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Agnar Nielsen) til uppskot meirlutans um skamtan av øli fall við 12—0. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Adolf Hansen) til uppskot meirlutans um skamtan av øli til § 1 fall við 6—0. Broyting til § 4 fall við 6—0. Uppskotið frá meirlutanum til III Skamtan av øli varð samtykt við at § 1 varð samtykt við 23—0, § 2 22—0, § 3 20—0, § 4 23—0 og § 5 uttan atkvøðugreiðslu.

IV. Uppskot til samtyktar frá meirlutanum um broytingar í kunngerðini varð samtykt við 21—0.

V. Uppskot til samtyktar frá meirlutanum varð samtykt við 31—0 atkvøðum.

3. viðgerð 30. aprfl. Atkvøtt varð við navnakalli um broytingaruppskot frá Agnar Nielsen, Jákup Lindenskov, Jógvan Olsen, Adolf Hansen og Juul Jacobsen. Málið fall við 12 ja-atkvøðum, 1 nei-atkvøðu, 18 atkvøddu ikki, 1 var burturstaddur.

Ja atkvøddu: Ivan Johannesen, Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Eli Nolsoe, Jákup Lindenskov, Jona Henriksen, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Jógvan Olsen, Agnar Nielsen, Pauli Ellefsen og Hilmar Bech.

Nei atkvøddi: Finnbogi Isaksen.

Atkvøddi ikki: Signar Hansen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Poul J. Olsen, Haldur Hansen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Andrias P. Jacobsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Jógvan Durhuus, Hans Marius Joensen, Edmund í Garði, Jógvan Sundstein, Øssur Dam Jacobsen, Eyðun Videro, Håkun Djurhuus og Óli Breckmann.

Burturstaddur: Johs. Martin Olsen.

Atkvøtt var um I, málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 24—0, II sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 22—3 og III sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 24—0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 607-6-5. Lóg nr. 60, 61, 62 frá 19. mai 1980.

---

82. Broyting í skattalógini

Ár 1979, fríggjadagin 11. apríl legði Demmus Hentze, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í skattalógini.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

Í § 26, 1. stk., 1. punklum verður «800 kr.» broytt til «950 kr.».

§ 2. Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1980/81.

lagtingslov om ændring i skatteloven.

§ 1. I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommunuskat med senere ændringer foretages følgende ændring:

I § 26. stk. 1, 1. punktum ændres «800 kr.» til «950 kr.».

§ 2. Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1980/81.

Viðmerkingar:

Barnafrádrátturin í landsskattinum er 800 kr. fyri hvort barnið undir 16 ár. Frádrátturin hevur verið javnaður fleiri ferðir síðani skattalógin kom í gildi í 1963, seinast í 1978.

Hækkingin í barnafrádráttinum uppá 150 kr. verður mett at kosta landskassanum umleið 1,9 milj. kr.

1. viðgerð 16. apríl. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið legði málið fram 11. apríl 1980, og við fyrstu viðgerð 16. í sama mánaða varð tað beint í skattanevndina.

Landsstýrið skjýtur upp at hækka barnafrádráttin í landsskattinum við 150 kr. til 950 kr. fyri hvørt barnið undir 16 ár. Hækkingin verður mett at kosta landskassanum 1,9 milj. kr.

Ein samd skattanevnd mælir tinginum til at samtykkja uppskotið við teirri broytíng, at barnafrádrátturin hækkar við 200 kr. til 1.000 kr. Nevndin setur fram soljóðandi

broytingaruppskot

1 § 1, 2. stk. verður sett:	1 § 1, stk. 2 indsættes:
«1 § 26, 1. stk., 1. punktum verður «800 kr.» broytt til «1.000 kr.».»	«1 § 26, stk. 1, 1. punktum ændres «800 kr.» til «1.000 kr.».»

Tingsins loyvi at frávíkja tíðarfreistini varð givið. 2. viðgerð 23. apríl. Broytingaruppskot frá samdari nevnd til § 1 samtykt við 24–0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 24–0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 24. apríl. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 29—0.

F.L. j. nr. 430-1-15. Lóg nr. 44 frá 12. mai 1980.

83. Broytingar í ferðslulógini

Ár 1980, fríggjadagin 11. apríl legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til

lógtingslóg um broytingar í ferðslulógini.

§ 1. Í ferðslulógini, sbr. lógarkunngerð nr. 10 frá 18. mars 1966 við seinni broytingum, verða hesar broytingar gjørdar.

1) § 16 verður orðað soleiðis:

«*Kenning.*

Fyri rúsdrekkakoyring verður hann revsaður, sum koyrir ella roynir at koyra motordrivið akfar eftir at hava drukkið so nógv rúsdrekka, at alkoholstyrkin í blóðinum, meðan hann koyrir ella aftaná, fer upp um 1,20 o/oo.

2. stk. Fyri rúsdrekkakoyring verður somuleiðis hann revsaður, sum annars koyrir ella roynir at koyra motordrivið akfar eftir at hava drukkið so nógv rúsdrekka, at hann ikki er forur fyri at koyra akfarið á tryggan hátt.

3. stk. Fyri promillukoyring verður hann revsaður, sum uttan at vera sekur í rúsdrekkakoyring koyrir ella roynir at koyra motordrivið akfar eftir at hava drukkið so nógv rúsdrekka, at alkoholstyrkin í blóðinum, meðan hann koyrir ella aftaná, fer upp um 0,80 o/oo.

4. stk. Ásetingarnar í 1. - 3. stk. verða nýttar samsvarandi um hann, sum koyrir ella roynir at koyra súklu við hjálpimotori (prutli).

5. stk. Súklu, hestavogn ella hest er ongum loyvt at stýra ella royna at stýra, sum er so mikið ávirkaður

lagtingslov om ændringer i færdselsloven.

§ 1. I færdselsloven, jfr. lovbekendtgørelse nr. 10 af 18. marts 1966 med senere ændringer, foretages følgende ændringer.

1) § 16 affattes således:

«*Spritpåvirkning.*

For spirituskørsel straffes den, som fører eller forsøger at føre et motordrevet køretøj efter at have indtaget spiritus i et sådant omfang, at alkoholskoncentrationen i blodet under eller efter kørslen overstiger 1,20 o/oo.

Stk. 2. For spirituskørsel straffes endvidere den, som iøvrigt fører eller forsøger at føre et motordrevet køretøj efter at have indtaget spiritus i et sådant omfang, at han ikke kan føre køretøjet på betryggende måde.

Stk. 3. For promillekørsel straffes den, som uden at være skyldig i spirituskørsel fører eller forsøger at føre et motordrevet køretøj efter at have indtaget spiritus i et sådant omfang, at alkoholkoncentrationen i blodet under eller efter kørslen overstiger 0,80 o/oo.

Stk. 4. Bestemmelserne i stk. 1 - 3 finder tilsvarende anvendelse på den, der fører eller forsøger at føre cykel med hjælpemotor (knallert).

Stk. 5. Cykel, hestekøretøj eller hest må ikke føres eller forsøges ført af nogen, der som følge af på-

av rúsdrekka, at hann ikki er forur fyri á tryggan hátt at koyra akfarið ella ríða á hesti.

6. stk. Tað er forboðið at sleppa persóni, sum av rúsdrekka er í slíkum skili, at hann ikki er forur fyri á tryggan háttt at stýra akfari ella hesti, at koyra akfarið ella ríða á hestbaki.»

virkning af spiritus befinder sig i en sådan tilstand, at han ikke kan føre køretøjet eller hesten på betryggende måde.

Stk. 6. Det er forbudt at overlade føringen af et køretøj eller en hest til en person, der som følge af påvirkning af spiritus befinder sig i en sådan tilstand, at han ikke er i stand til at føre køretøjet eller hesten på betryggende måde.»

2) Sum nýggj § 16 a verður sett:

«*Eftirlit v.m.*

Løgreglunni er hvørja og eina tíð loyvt at krevja, at hann, sum koyrir akfar ella ríður á rossi, ger útandingarroynd.

2. stk. Løgreglunni er loyvt at føra persón fram til at taka blóð- og lendroynd, um grund er til at halda, at hann hevur brotið § 15 ella § 16, 1. - 5. stk., ella hann stýrir ella ikki er forur fyri at vera við til útandingarroynd. Er illgrunur um annað enn ávirkan av rúsdrekka, kann løgreglan føra tann, sum um verður, fram til læknakanningar. Sama er við illgruna um ávirkan av rúsdrekka, tá ið serligar umstøður mæla til tess.

3. stk. Landsstýrið kann gera gjøllari ásetingar um tær royndir og kanningar, sum nevndar eru í 1. stk. og 2. stk.»

2) Som ny § 16 a indsættes:

«*Kontrol m.v.*

Politiet kan til enhver tid kræve, at føreren af et køretøj eller en rytter foretager udåndingsprøve.

Stk. 2. Politiet kan fremstille en person til udtagelse af blod- og urinprøve, hvis der er grund til at antage, at han har overtrådt § 15 eller § 16, stk. 1 - 5 eller han nægter eller ikke er i stand til at medvirke til en udåndingsprøve. Angår mistanken andre forhold end spirituspåvirkning, kan politiet fremstille den pågældende til undersøgelse af en læge. Det samme gælder ved mistanke om spirituspåvirkning, når særlige omstændigheder taler derfor.

Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte nærmere bestemmelser om de i stk. 1 og stk. 2 nævnte prøver og undersøgelser.»

3) § 58 verður orðað soleiðis:

«Brot á hesa lóg ella tær sambært henni gjordu ásetingar verður revsað við bót, sbr. tó 2. - 5. stk.

2. stk. Rúsdrekkakoyring við motordrivnum akfari, tó ikki súklu við hjálpimotori (prutli), verður revsað við hefti ella fongsli í upp til 1 ár ella við bót, tá ið serliga linnandi umstøður eru.

3. stk. Promillukoyring verður

3) § 58 affattes således:

«Overtrædelse af denne lov eller de i medfør af denne givne bestemmelser straffes med bøde, jfr. dog stk. 2 - 5.

Stk. 2. Spirituskørsel med motordrevet køretøj, dog ikke cykel med hjælpemotor (knallert), straffes med hæfte eller fængsel indtil 1 år eller under særlig formildende omstændigheder med bøde.

Stk. 3. Promillekørsel straffes med

revsað við bót. Sama er við rúsdrekkakoyring á súklu við hjálpimotori (prutli). Hevur tann seki áður verið domdur fyri rúsdrekka- ella promillukoyring, kann revsingin kortini vaksa til hefti ella fongsul í upp til 1 ár.

4. stk. Brot á § 15, § 18 1. stk., § 18 a og § 26, 1. stk. verður revsað við hefti ella fongsli í upp til 1 ár, tá ið herðandi umstøður eru.

5. stk. Tann, sum koyrir motordrivið akfar, sum krevur forarabræv, tó at rætturin til at koyra ella verða stjóri á slíkum akfari er domdur frá honum, verður revsaður við hefti ella fongsli í upp til 1 ár ella við bót, um serliga limandi umstøður eru.

6.stk. Málini verða viðgjørd sum løgreglumál, uttan so at ákæran viðvíkur viðurskiftum, har ið tann spurningur kemur upp, um rætturin til at koyra ella verða førari á motordrivnum akfari skal verða domdur frá ákærda, sbr. § 59.

7. stk. Eiga bæði førarin og tað motordrivna akfarið, sum hann framdi brotið við, heima í útlondum, kann løgreglan halda akfarinum eftir, til bøtur, sakarkostnaður, skaðabøtur ella gjøkl fyri lógskylduga ábyrgdartrygging eru goldin, ella veitt er trygd fyri gjaldingina. Er peningshæddin ikki goldin, áðrenn tveir mánaðir eru liðnir frá tí, at sakarmálið varð avgjørt, verður roynt at fáa endurgjald í akfarinum.

8. stk. Viðvíkjandi eftirhaldi av akfari eftir 7. stk. verða reglurnar í §§ 745 og 746 í rættargangslógini um at leggja hald á lutir, sum hildið er, áttu at verið upptøkir, at nýta samsvarandi. Eftirhald er bert loyvt, um tað verður hildið neyðugt til at tryggja, at nevndu peningshæddir verða goldnar. Hevði tann, sum koyrdi, ongan rætt til at hava

bøde. Det samme gælder spirituskørsel med cykel med hjælpemotor (knallert). Er den skyldige tidligere dømt for spiritus- eller promillekørsel, kan straffen dog stige til hæfte eller fængsel indtil 1 år.

Stk. 4. Overtrædelse af § 15, § 18, stk. 1, § 18 a og § 26, stk. 1, straffes med bøde eller under skærpende omstændigheder med hæfte eller fængsel indtil 1 år.

Stk. 5. Den, der fører motordrevet køretøj, hvortil der kræves førerbevis, til trods for, at retten til at være eller blive fører af sådant køretøj er frakendt ham, straffes med hæfte eller fængsel indtil 1 år eller under særlig formildende omstændigheder med bøde.

Stk. 6. Sagerne behandles som politisager, medmindre tiltalen angår et forhold, hvor der opstår spørgsmål om frakendelse af retten til at være eller blive fører af motordrevne køretøjer, jfr. § 59.

Stk. 7. Er såvel føreren som det motordrevne køretøj, med hvilket overtrædelsen er begået, hjemmehørende i udlandet, kan køretøjet tilbageholdes af politiet, indtil forskyldte bøder, sagsomkostninger, erstatningsbeløb eller præmier for lovpligtig ansvarsforsikring er betalt, eller der er stillet sikkerhed for betalingen. Er beløbet ikke betalt inden to måneder efter sagens afgørelse, kan der søges fyldestgørelse i køretøjet.

Stk. 8. Med hensyn til iværksættelse af tilbageholdelse efter stk. 7 finder reglerne i retsplejelovens §§ 745 og 746 om beslaglæggelse af ting, der findes at burde konfiskeres, tilsvarende anvendelse. Tilbageholdelsen kan kun ske, for så vidt den findes påkrævet for at sikre betaling af de nævnte beløb. Var føreren uberettiget i besiddelse af

akfarið, er eftirhald ikki loyvt.

9. stk. Reglan í 7. stk. verður ikki nýtt, tá ið tann, sum koyrir, eigur bústað í Finlandi, Íslandi, Noregi ella Svøriki.»

4) Í § 58 a, 1. stk. verður «§ 58, 1. og 2. stk.» broytt til «§ 58, 1. - 6. stk.»

5) Í § 59, 1. stk., 1. pkt. verður aftan á setningarnar: «Frádøming av rættinum til at koyra motordrivið akfar,sum krevur førarabræv,» sett inn «tó ikki súklu við hjálpimotori (prutli)».

6) § 59, 2. stk., verður orðað soleiðis: «Rætturin til at koyra motordrivið akfar, sum krevur førarabræv, tó ikki súklu við hjálpimotori (prutli), skal verða frádømdur honum, ið koyrir slíkt akfar, um hannhevur verið sekur í rúsdrekka- ella promillukoyring. Eru serliga linnandi umstøður, verður hetta ikki neyðugt.»

§ 2. Lógin fær gildi beinan vegin.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot til broytingar í ferðslulógini er gjørt av nevndini, ið landsstýrið í 1977 setti at hava eygumi við ferðslulógini og aktuellum ferðsluspurningum.

Nevndin hevur, síðan hon varð sett, gjørt fleiri uppskot um broytingar í ferðslulógini og uppskot til kunngerðir.

Til tær einstoku greinirnar í lógaruppskotinum hevur nevndin gjørt viðmerkingar, sum fylgja hjálagt sum skjal.

SÍ SKJAL 12.

koretøjet, kan tilbageholdelse ikke ske.

Stk. 9. Reglen i stk. 7 finder ikke anvendelse med hensyn til forere, der er hjemmehørende i Finland, Island, Norge eller Sverige.»

4) I § 58 a, stk. 1 ændres «§ 58, stk. 1 og 2» til «§ 58, stk. 1 - 6».

5) I § 59, stk. 1, 1. pkt., efter sætningerne: «Frakendelse af retten til at føre motordrevet køretøj, hvortil der kræves førerbevis,» indsættes «dog ikke cykel med hjælpemotor (knallert)».

6) § 59, stk. 2, affattes således: «Retten til at føre motordrevet køretøj, hvortil der kræves førerbevis, dog ikke cykel med hjælpemotor (knallert), skal frakendes føreren af et sådant køretøj, hvis han har gjort sig skyldig i spiritus- eller promillekørsel. Under særlig formildende omstændigheder kan frakendelse dog undlades.»

§ 2. Loven træder i kraft straks.

Broyting í ferðslulógini



3866

1. viðgerð 15. apríl. Málið varð beint í lógarnevndina, sum 21. apríl legði fram soljóðandi

Alit

Málið varð lagt fram av Føroya landsstýri 11. apríl 1980 og undir 1. viðgerð 15. apríl beint í lógarnevndina.

Uppskotið snýr seg um eina ájourføring av lógini og umfatar tann partin av ferðslulógini, ið nevnist rúsdrekkakoyring (§ 16, 1. - 3. petti).

Eftir verandi lóg er ofta ilt at meta um og prógva, nær talan er um rúsdrekkakoyring. Í praksis vil tað siga, at bilførarar við promillum upp til 1.20 kunnu verða fríkendir í rættinum (sí hjálagda diagram).

Uppskotið, sum er lagt fram, mælir til, at tað verður sett eitt ávist lágmark 0,80 o/oo, sum verður kriminaliserað ella gjort til serligt rættarbrot. Hetta merkir eina skerping av verandi lóg, soleiðis at bilførarar við eini promillu frá 0,8 til 1.2 verða revsaðir lutvís við eini rettiliga stórari bót og lutvís við frádoming av koyrikortinum. Eftir verandi lóg verða bilførarar við hesi promillu ofta fríkendir.

Undir 1. viðgerð á tingi eins og undir nevndarviðgerðini varð fort fram, at uppskotið ikki bøtti um teir tvørlekar, ið standast av, at summir bilførarar rýma frá staðnum, tá skaðatilburður er hendur og siga seg at hava drukkið aftaná. Víst hevur m.a. verið til norsku ferðslulógina, hareftir bilførarar verða revsaðir fyri at hava drukkið inntil 6 tímar aftaná skaðatilburðin.

Lógarnevndin hevur havt fund við serligu ferðslunevndina undir landsstýrinum ella arbeiðsbólkin,ið hevur gjørt uppskotið. Føroya landfúti, ið er formaður í hesum arbeiðsbólki førdi fram eins og tað stendur í uppskotinum, at nevndin metir hetta arbeiðið sum ein part av tí setningi, ið landsstýrið hevði álagt, og at arbeitt verður víðari við seinna parti av málinum sum m.a. eisini viðvíkjandi spurninginum um 6 tíma regluna úr Noreg. Fort var fram, at uppskotið var ein skerping av verandi lóg, eins og tað var ein einfaldgering og effektivisering. Upplýst var eisini, at sorinskrivarn tekur undir við uppskotinum og gevur tí sitt viðmæli.

Málið er lagt fyri stjóran í Tryggingarsambandinum, ið tekur undir við uppskotinum og metir tað sum eina hjálp fyri tryggingina.

Ein samd lógarnevnd tekur undir við uppskotinum og heitir samstundis á Føroya landsstýri og biður um at bera tað so í bandi, at seinni partur av broytingunum í ferðslulógini verður lagdur fyri tingið til komandi tingsetu.

Lógarnevndin setur tí fram fylgjandi

u p p s k o t
til
samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at bera tað so í bandi, at seinni partur av broytingunum í ferðslulógini verður lagdur fyri tingið komandi tingsetu.

2. viðgerð 23. apríl. § 1 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 28—0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 28. apríl. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 29—0 atkvøðum.

F.L., j. nr. 514-5-1. Lóg nr. 57 frá 12. mai 1980.

---

84. Meting av skaða

Ár 1980, fríggjadagin 11. apríl legði Adolf Hansen, løgtingsmaður fram soljóðandi

U p p s k o t
til

løgtingslóg um meting av skaða

§ 1. Krevur tryggingartakari tað, skal tryggingarskaði metast av umboðum fyri bæði tryggingarfelag og tryggingartakara.

§ 2. Har annað ikki er avtalað, skal maskineftirlitið eftir áheitan umboða tryggingartakarar, tá metast skal smbr. § 1, uttan kostnað fyri tryggingartakaran.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om vurdering af skader.

§ 1. Hvis en forsikringstager forlanger det, skal en forsikringsskade vurderes af repræsentanter både for forsikringsselskabet og forsikringstageren.

§ 2. Hvor andet ikke er aftalt, skal maskintilsynet, efter anmodning repræsentere forsikringstageren, når vurdering skal foretages i henhold til § 1, og uden omkostninger for forsikringstageren.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Hóast tryggingartakarin eigur Tryggingarsambandið, so verða tryggingartakarin og tryggingin, tá metast skal um skaðar, tveir mótstríðandi partar. Tryggingartakarin kann appelera meting tryggingarsambandsins, men av góðum grundum verður hetta ikki gjørt, um skaðarnir eru undir eitt ávíst virði.

Við at tryggja tryggingartakaranum ókeypis sakkøna umboðan, kunnu nógvar misskiljingar ruddast av vegnum, samstundis sum eitt møguligt órættvísi ikki so lætt kann fyrikoma.

1. viðgerð 16. apríl. Málið varð beint í serliga millumtinganevnd viðvíkjandi tryggingarviðurskiftum, sum 29. apríl legði fram soljóðandi

A l i t

Málið varð við 1. viðgerð beint í serligu millumtinganevndina viðvíkjandi tryggingarviðurskiftum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og setur fram fylgjandi

u p p s k o t
til
samtyktar

Málið verður beint til landsstýrið at viðgera saman við tingmáli nr. 106/1979: Alit frá nevndini til kannan av tryggingarviðurskiftunum.

2. viðgerð 30. apríl. § 1 í uppskotinum fall við 3—0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar frá nevndini varð samtykt við 19—0 atkvøðum.

85. Tryggingarloyvi

Ár 1980, friggjadagin 11. apríl legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um tryggingarloyvi.

§ 1. Í tann mun Tryggingarsambandið Føroyar ikki kann ella vil átaka sær at tryggja 100 %, er tað loyvt tryggingartakara at nýta annað tryggingarfelag, uttan mun til §§ 1, 2 og 3 í løgtingslóg nr. 24 frá 28. mars 1956.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om forsikringstilladelse.

§ 1. I det omfang «Tryggingarsambandið Føroyar» ikke kan eller vil påtage sig at forsikre 100 %, har en forsikringstager ret til at bruge andet forsikringsselskab, uden hensyn til §§ 1, 2 og 3 i lagtingslov nr. 24, af 28. marts 1956.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tryggingarsambandið Føroyar hevur sambært løgtingslóg nr. 24 frá 28. mars 1956 einarætt at tekna allar nýggjar tryggingar í Føroyum, tó undantikið lívstrygging. Hesin einarættur er grundaður á eina bráðfengis kunngerð frá 17. juni 1940. Teir tilstandir, ið tá ráddu, gjørdu hesa kunngerð neyðuga.

Tær skerjingar, sum Tryggingarsambandið setti í gildi í vetur viðvíkjandi sjálvsábyrgd, eru av einum slíkum slag, at tað er neyðugt at geva fólki loyvi at nýta aðrar tryggingar, skulu tey ikki altfð hava hangandi yvir sær eina hóttan um fíggjarliga ruinering, um so verður, at tey koma út fyri eina ferðsluvanlukku.

Í viðgerð 16. apríl. Málið varð beint í serliga nevnd til kanning av tryggingarviðurskiftunum, sum 29. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið var við 1. viðgerð beint í millumtinganevndina til kannan av tryggingarviðurskiftunum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og skal vísa til viðmerkingarnar í tingmáli nr. 106/1979: Alit frá nevndini til kannan av tryggingarviðurskiftunum.

Nevndin setur sostatt einki uppskot fram.

2. viðgerð 30. april. § 1 í uppskotinum fall við 8—0, málið sostatt burturdottið.

---

86. Broyting í løgtingslóg um fólkabókasøvn v. m.

Ár 1980, fríggjadagin 11. apríl legði Dánjal P. Danielsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkabókasøvn v.m.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 44 frá 27. mai 1968 um fólkabókasøvn v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 6, 1. stk. verður «bygging» broytt til «keyp, bygging ella umbygging».
2. Í § 7, 2. stk. verður frammanfyri «byggikostnaðinum» sett: «keyps- ella».
3. Í § 7, 4. stk. verður frammanfyri «byggiætlanina», «byggistudningi» og «byggikostnaðinum», sett: «keyps- ella».
4. § 8 verður orðað soleiðis:
   «Á fíggjarløgtingslógini verður á hvørjum ári játtað ein peningaupphædd, sum svarar til 2,5% av samlaða rakstrarstudninginum til fólkabókasøvn, til rithøvundar, sum

lagtingslov om ændring af lagtingslov om folkebiblioteker m.v.

§ 1. I lagtingslov nr. 44 af 27. maj 1968 om folkebiblioteker m.v. foretages disse ændringer:

1. I § 6, stk. 1 ændres «opførelse» til «køb, bygning eller ombygning».
2. I § 7, stk. 2 indsættes:
2. I § 7, stk. 2 indsættes: «købs- eller» foran «byggeomkostninger».
3. I § 7, stk. 4 indsættes «købs- eller» foran «byggeprojektet», «byggetilskud» og «byggeudgifter».

4. § 8 formuleres således:
   «På hvert års finanslov bevilges et beløb svarende til 2,5% af det samlede driftstilskud til folkebibliotekerne til forfattere, der skriver på færøsk, og hvis bøger udlånes på folke-

skriva á føroyskum máli, og hvørs bøkur verða lænta út av fólkabókasøvnunum.»

bibliotekerne.»

§ 2. Henda lóg fær gildi 1. apríl 1980.

§ 2. Denne lov træder i kraft den 1. april 1980.

Viðmerkingar:

Sambært løgtingslóg nr. 44 frá 27. mai 1968 um fólkabókasøvn v.m. § 7, 4. stk. hevur landsstýrið heimild at veita 50% av ætlaða byggikostnaðinum í byggistuðningi til fólkabókasøvn.

Landsstýrið hevur verið av teirri áskoðan, at tað ber til at nýta lógina analogt og veita eini kommunu 50% í studningi eisini til keyp av einum bygningi til fólkabókasavn, men tá landsstýrið út frá hesi áskoðan bað um heimild frá fíggjarnevndini til at veita Klaksvíkar kommunu 50% av keypskostnaðinum ella 500.000 kr. í studningi til keyp av bygningi til fólkabókasavn í Klaksvík, var í fíggjarnevndini semja um, at nevnda løgtingslóg nr. 44/1968, § 7, 4. stk., ikki gevur heimild at veita umrødda studning, og málið verður sent landsstýrinum aftur við áheitan um at leggja fyri tingið lógaruppskot um broyting í nevndu løgtingslóg.

Vísandi til hetta leggur landsstýrið við hesum fyri tingið uppskot til broyting av §§ 6, 1. stk. og § 7, 2. og 4. stk. í løgtingslóg nr. 44/1968.

Síðani Klaksvíkar kommuna keypti umrødda bygning til fólkabókasavn fyri 1 milj. kr., hevur landsstýrið veitt kommununi rakstrarstudning til renting og avskriving av bygninginum sambært § 6 í umrøddu løgtingslóg, men um løgtingið samtykkir frammanfyristandandi uppskot til lógarbroyting, er ætlanin at veita Klaksvíkar kommunu studning til umrødda keyp við 50% ella 500.000 kr. við tí fylgju, at rakstrarstudningurin minkar samsvarandi.

Sambært § 8 í umrøddu løgtingslóg verða á fíggjarløgtingslógini á hvørjum ári játtaðar 10.000 kr., ið lutast rithøvundum, ið skriva á føroyskum máli, og hvørs bøkur verða lænta út av fólkabókasøvnunum.

Henda upphæddin, sum so hvørt hevur verið hækkað á fíggjarløgtingslógini, varð á fíggjarløgtingslógini 1979/80 sett til 37.400 kr. ella 2,5% av rakstrarstudninginum til fólkabókasøvn og er á fíggjarløgtingslógaruppskoti 1980/81 sett til 41.700 kr. ella 2,5% av rakstrarstudninginum til fólkabókasøvn hetta árið.

Vísandi til hetta nýtir landsstýrið hóvið til somuleiðis at seta fram uppskot um broyting av umrøddu § 8 í løgtingslóg nr. 44/1968, so at studningsupphæddin til rithøvundar verður útroknað sum 2,5% av rakstrarstudninginum til fólkabókasøvn.

1. viðgerð 15. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 21. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 11. apríl 1980 og 15. í sama mánaða undir 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjort málið, og er nevndin samd um at taka undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 24. apríl. § 1 samtykt við 26—0, § 2 uttan atkvoðugreiðslu.
3. viðgerð 28. apríl. Málið endaliga samtykt við 30—0 atkvoðum.

F.L. j. nr. 2230-1. Lóg nr. 64 frá 21. mai 1980.

---

87. Rutukoyring á Sandoynni

Ár 1980, týsdagin 15. apríl legði Hergeir Nielsen, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

1. Vísandi til § 6 í løgtingslóg nr. 51 frá 1. juni 1977 um fólka- og farmaflutning heimilar løgtingið landsstýrinum at gera sáttmála við akfarsfelog ella akfarseigarar um rutukoyring á Sandoynni grundað á álit frá samferðslunevndini.

2. Neyðugur peningur til rutukoyringina verður at játta á løgtingsfíggjarlógini undir § 6, Bil- og bussrutur, fyri fíggjarárið 1980/81 á eykafíggjarløgtingslóg.

Viðmerkingar:

Samferðslunevndin hevur í vetur havt samráðingar við umboð fyri rutukoyrarar, kommunur og skúlastýrið á Sandoynni, og somuleiðis hava samráðingar verið við skúlafyrisitingina um rufu- og skúlabarnakoyring á Sandoynni.

Úrslitið av samráðingunum sæst í hjálagda áliti, ið er tilevnað á sama hátt sum álitið viðvíkjandi Kirkjuboar- og Vestmannarutunum, sum varð lagt fyri tingið fyr í vetur.

Landsstýrið skal, tá uppskotið er samtykt, taka upp samráðingar við akfarseigarar á Sandoynni um ein sáttmála eftir hesum áliti, og verður miðað ímóti einum endaligum sáttmála í summar.

Sí skjal 13

1. viðgerð 18. apríl. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 28. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 15. apríl 1980 og undir 1. viðgerð 18. í sama mánaða beint í figgjarnevndina.

Landsstýrið hevur skotið upp, at tað eftir galdandi lóg um fólka- og farmaflutning fær heimild frá løgtinginum at gera sáttmála við akfarsfeløg ella akfarseigarar um rutukoyring á Sandoynni grundað á álit frá samferðslunevndini.

Eftir samráðingar við rutukoyrarar, kommunur og skúlastýrir á Sandoynni og við skúlafyrisitingina hevur samferðslunevndin lagt álit fram dagfest 1. apríl 1980 um málið.

Í viðmerkingunum verður tilskilað, at landsstýrið skal, tá uppskotið er samtykt, taka upp samráðingar við akfarseigarar á Sandoynni um ein sáttmála eftir fyriliggjandi áliti.

Eftir at málið varð lagt fram í løgtinginum hava kommunurnar á Sandoynni skrivliga vent sær til løgtingið.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur tann 24. apríl 1980 havt fund við umboð fyri kommunurnar í Sandoynni og við akfarseigarar, sum sáttmáli kann gerast við.

Meirilutin (Hákun Djurhuus, Poul J. Olsen, Jørgen Thomsen, Jógvan Durhuus og Asbjørn Joensen) mælir til at samtykkja uppskotið til samtyktar óbroytt.

Hákun Djurhuus og Poul Jacob Olsen eru av teirri áskoðan, at býtið av rutuni og rutuinntøkunum eigur at verða soleiðis, at p/f Bil, Sandoy, fær ⅔ og at felagið hjá Steintór Fagradal fær ⅓.

Asbjørn Joensen viðmerkir, at tað figgjarliga býtið verður skipað á tann hátt, at úrtøka luttakaranna verður í mun til arbeiðsbyrðuna.

Minnilutin (Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men er av teirri áskoðan, at serstakliga býtissáttmálin við akfarseigararnar eigur at verða góðkendur av fíggjarnevnd lógtingsins og setur sostatt fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Í petti 1 í uppskoti landsstýrisins verður sett sum síðsta punktum: «Sáttmálin verður at góðkenna av lógtingsins fíggjarnevnd.»

2. viðgerð 29. apríl. Broytingaruppskot frá minnilutanum Paula Ellefsen og Ivan Johannesen fall við 10—0. Landsstýrisuppskotið samtykt við 23—0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 1805-36.

---

88. Samtíðarskattur (kelduskattur)

Ár 1980, týsdagin 15. apríl setti Karin Kjølbro, lógtingslimur Demmusi Hentze, landsstýrismanni fram soljóðandi

fyrispurning

Hvussu langt er landsstýrið komið ávegis við fyrireikingunum til at seta í verk samtíðarskatt (kelduskatt), og nær kunnu vit vænta, at henda skipan fer at virka í Føroyum.

Viðmerkingar:

Ymiskt er hvørm ans og áhuga almenningurin hevur fyri einstoku samfelagsligu og politisku spurningunum. Í hesi tingsetu eru tað serliga stóru nýíløgurnar, ið lógtingið hevur samtykt at fremja og ætlar at fremja, sum borgarin hevur givið gætur og harnæst hesum, at landið og kommunurnar hava so nógvan skattapening útistandandi.

Ólivað gera avvarðandi myndugleikar tað, ið gerast kann fyri at fáa áliknaða skattin inn.

Í hesum sambandi er vert at nevna, at sitandi samgonga í grein 7 í samgonguskjalinum sigur, at:

«Arbeitt verður víðari fyri rættvísari skattalag, og skipað verður fyri samtíðarskatti (kelduskatti) skjótast gjørligt.»

Vit vita, at skattalóggáva okkara ikki er rættvís, og at mong við hogum inntokum hava lógarheimild til at gjalda lítlan skatt. Hetta ger, at tey, ið ikki kunnu niðurskriva inntoku sína skulu gjalda meiri í skatti enn tey annars vildu gjort, um háimtøkurnar guldu sín lutfalsliga part av samfelagsins útreiðslum.

Sum stoðan er í dag, eru tað uppaftur færri, ið bera byrðarnar av beinleiðis skattinum, og tí hevur tað vakt miklan ans, at onkur kommuna ætlar at seta skattaprosentið upp, tí ov lítið kemur inn av álíknaða skattinum.

Samtíðarskattur er ein innkrevjingarháttur og ger ikki skattalagið rættvísari, men eyðsæð er, at henda skattaskipan er av alstórum týdningi fyri at fyribyrgja tí stoðu, vit eru í í dag, har peningaligu viðurskiftini hjá landi og kommunum eru bøttislig samstundis sum ónogdin hjá teimum, ið gjalda sín skatt rættstundis, er alsamt vaksandi.

24. apríl svaraði Dennnus Hentze, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

S V A R

Til tann setta fyrispurning, hvussu langt landsstýrið er komið ávegis við fyrireikingunum til at seta í verk samtíðarskatt (kelduskatt), og nær vit kunnu væntа, at henda skipan fer at virka í Føroyum, skal eg svara, at henda nýumlegging av okkara skattaskipan krevur

1) eitt stórt lóggávuarbeiði og
2) umsitingarliga skal øll núverandi skipan við skattgjaldan og skattinnkrevjan leggjast heilt um.

Fyri at fáa tílík stórarbeiði frá hondum krevst í stóran mun serkon fólk, sum eina ávísa tíð, kunnu taka sær av hesum uppgávum burturav, og til tílíkt arbeiði hevur eingin játtan verið. Í hesum fíggjarárinum eru tó avsettar kr. 125.000 til kannan av kelduskattaskipanini, soleiðis at farast kann undir tað fyrireikandi arbeiði; bæði tí, ið viðvíkur lóggávuni og tí umsitingarliga. Landsstýrið fer tí ein av teimum fyrstu dogunum at finna fram fólk, ið fær til uppgávu at fata álit frá sær helst til heystar á hvonn hátt ein føroysk kelduskattaskipan katn verða bygd upp. Ein fyritreyt fyri, at ein tílík stórumlegging katn fara fram í hesum partinum av landsumsitingini, er sjálvandi, at torvandi peningajáttanir verða givnar av lógtinginum.

89. Kgl. fyriskipan um »menighedsråd«

Ár 1980, týsdagin 15. apríl legði Dánjal P. Danielsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at fremja hjálagda uppskot til «Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om menighedsråd».

Viðmerkingar:

Kirkjumálaráðið hevur gjort og sent landsstýrinum hjálagda uppskot til «Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om menighedsråd» við viðmerkingum og vísir til, at varabispur hevur sett fram ynski um, at ásetingarnar í «lov om menighedsråd» í størst møguligan mun verða settar í gildi fyri Føroyar.

Eisini vísir kirkjumálaráðið á, at ein endurskoðan av galdandi «Anordning, hvorved lov om menighedsråd sættes i kraft på Færøerne» frá 3. juli 1956 má haldast at vera rímilig, tá fleiri broytingar eru gjørdar í «menighedsrådsloven», aftaná at nevnda fyriskipan varð sett í gildi fyri Føroyar í 1956.

At enda upplýsir kirkjumálaráðið, at varabispur og «biskoppen over København stift» hava góðkent uppskotið.

Eftir at landsstýrið hevur móttikið hjálagda uppskot til fyriskipan við viðmerkingum er «menighedsrådsloven» broytt við lóg nr. 67 frá 27. februar 1980, og hesar broytingar hevur landsstýrið eftir avtalu við kirkjumálaráðið sett inn í uppskotið, eins og viðmerkingarnar eru broyttar samsvarandi.

Sum tilskilað í § 43 í uppskotinum, samanber viðmerkingarnar, fær fyriskipanin, um hon verður sett í gildi fyri Føroyar, ta fylgju, at val til kirkjuráð verða í Føroyum eins og í Danmark í november 1980, ein dag, sum kirkjumálaráðharrin ásetur, og síðani sambært § 3, 1. stk. og § 8, 1. stk., fjórða hvort ár sama tíð, meðan valið eftir galdandi reglum skuldi verið í november 1981. Henda broyting er í Danmark gjørd fyri at sleppa undan at hava val til kommunustýri og kirkjuráð í november sama ár, eftir at tíðin fyri kommunuval í Danmark er broytt frá fyrstu helvt av mars mánað til síðstu helvt av november mánað við lóg nr. 202 frá 18. mai 1977.

Í Føroyum førir broytingin júst við sær, at val til kommunustýri og kirkjuráð verða sama ár, men tá val til kirkjuráð sambært § 8 í uppskotinum til fyriskipan verður í fyrstu helvt av november mánað og val til kommunustýri sambært lógtingslóg nr. 45 frá 29. juni 1972 um føroyska kommunurnar § 2, 2. pátti, verður ein

av Foroya landsstýri ásettan dag í tíðarskeiðinum 20. november til 10. december, metir landsstýrið ikki, at hetta er til hindurs fyri, at «Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om menighedsråd» verður sett í gikli fyri Foroyar við somu reglum um val av kirkjuráði, sum «menighedsrådsloven» hevur.

Vísandi til hetta leggur landsstýrið umroddu fyriskipan fyri logtingið við tilmæli.

Forslag
til
Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om menighedsråd.

Vi Margrethe Den Anden, af Guds nåde Danmarks Dronning, gør vitterligt:

I medfør af § 49 i lov om menighedsråd, jfr. lovbekendtgørelse nr. 256 af 10. maj 1973, således som denne er ændret ved § 7 i lov nr. 329 af 26. juni 1975, lov nr. 163 af 27. april 1977 og lov nr. 67 af 27. februar 1980, sættes loven herved i kraft på Færøerne med de ændringer, der er anset for ønskelige af hensyn til de der gældende særlige forhold, sålydende:

Afsnit I.

§ 1. Der oprettes et menighedsråd for hvert sogn, jfr. § 10.

Ár 1980, týsdagin 15. apríl legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini landskassans vegna í fíggjarárinum 1980/81 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir, sum eru komin í fíggjarliga trongstøðu. Hin samlaða veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um 5 milj. kr.

§ 2. Treytirnar fyri at veðhald kann verða veitt eru hesar:

a. at líkindi eru til, at raksturin framyvir eftir øllum fyriliggjandi upplýsingum fer at bera seg,
b. at eginpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 15% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum, ella fingin verða onnur lán, sum ikki mugu krevjast afturgoldin yvir stytri áramál enn áramálið fyri tey lán, landið veðheldur fyri sambært hesa lóg.

§ 3. Henda lóg fær gildi beinnanvegin.

lagtingslov om garanti for lån til fiskeskibe og fiskerivirksomheder.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne i finansåret 1980/81 at garantere for lån til fiskeskibe og fiskerivirksomheder, der er kommet i driftsvanskeligheder. De samlede garantibeløb må ikke overstige 5 mill. kr.

§ 2. Betingelserne for at garanti ydes er disse:

a. at der er udsigt til, at driften fremover efter alle foreliggende oplysninger bliver rentabel.
b. at egenkapitalen forhøjes med mindst 15% af det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften, eller der opnås andre lån, der ikke må forlanges tilbagebetalt over kortere åremål end åremålet for de lån, for hvilke landet garanterer i henhold til denne lov.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 46 frá 31. mai 1979, sum fer úr gildi 31. mars 1980. Veðhaldsupphæddin verður óbroytt 5 milj. kr., og skal lógin fyribils bert galda hetta fíggjarárið.

Fyri árið 1979/80 eru veðhald givin fyri umleið 2 milj. kr.

1. viðgerð 17. april. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.
2. viðgerð 21. april. § 1 samtykt við 26—0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 23. april. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 24—0 atkvoðum.

F.L. j. nr. 1413-5-1. Lóg nr. 46 frá 12. mai 1980.

---

92. Broyting í stýrisskipanarlógini

Ár 1980, týsdagin 15. april legði Atli P. Dam, logmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya í sermálum.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum verður § 12 orðað soleiðis:

«Valrætt til logtingið hava tey, ið hava heimarætt og fastan bústað í Føroyum og eru komin til valrættaraldur, uttan so at viðkomandi er gjordur ómyndugur.

2. stk. Eingin kann atkvoða uttan hann er á vallistanum.

3. stk. Valbær til logtingið eru tey, ið eftir reglunum í 1. stk. hava valrætt til logtingið, uttan so at viðkomandi er straffaður fyri gerð, sum eftir almennari meting ger hann óverdigan at sita sum løgtingsmaður.»

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring af lagtingslov om Færøernes styrelsesordning i særanliggender.

§ 1. I lagtingslov nr. 1 af 13. maj 1948 om Færøernes styrelsesordning i særanliggender affattes § 12 således:

«Valgret til lagtinget har enhver, som har indfødsret og fast bopæl på Færøerne og har opnået valgretsalder, medmindre vedkommende er umyndiggjort.

Stk. 2. Ingen kan udøve valgret uden at være optaget på valglisten.

Stk. 3. Valgbar til lagtinget er enhver, som i henhold til bestemmelserne i stk. 1 har valgret til dette, medmindre vedkommende er straffet for en handling, der i almindeligt omdømme gør ham uværdig til at være medlem af lagtinget.»

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Reglurnar um valrætt og valbæri til løgtingið eru ásettar í § 12 í løgtingslóg nr. 1 frá 11. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum og í § 2 í løgtingslóg um val til Føroya løgting nr. 49 frá 20. juli 1978.

Eftir lógini kann ein missa valrætt og valbæri, um viðkomandi er kendur sekur í gerð, ið er vanærulig eftir almennari hugsan, um henda fylgjan av dóminum ikki er burturdottin. Straffverð gerð er ikki vanærulig, uttan so at ein er domdur til treytaleyst fongsul í meira enn 4 mánaðar, arbeiðshús ella trygdarvarðhald, og ikki eru liðin meira enn 5 ár frá, at straffin er útstaðin. Eisini kann ein missa valrætt og valbæri vegna móttøku av fátækrastudningi, sum ikki er afturgoldin, ella av tí at ein er farin konkurs.

Reglurnar um, at ein kann missa atkvoðurætt vegna móttoku av fátækrastudningi, ella av tí at ein hevur verið revsaður, kunnu ikki haldast at vera tíðarhóskandi longur, og eru heitini fátækrahjálp og vanærulig gerð ikki til eftir socialu lóggávuni ella straffilógini, og verður tí skotið upp, at valrættur bert verður treytaður av aldri, heimarætti og bústaði.

Í stýrisskipanarlógini eru valrættur og valbæri m.a. treytað av, at viðkomandi hevur fylt 20 ár. Ein broyting í valrættaraldrinum krevur, síðani hann er tilskilaður í hesi lóg, at broytingin verður samtykt av løgtinginum tvær ferðir við løgtingsvali imillum. Landsstýrið skjýtur upp, at sjálvur aldurin ikki stendur í stýrisskipanarlógini, men í vallógini.

Eftir uppskotinum verður valbæri bert treytað av, at ein hevur valrætt og ikki revsaður fyri eina gerð, sum ger hann óverdan at vera tinglimur. Eftir § 14 í stýrisskipanarlógini og § 44 í løgtingsvallógini avger løgtingið sjálvt gildi av vali tingmanna, og um ein tingmaður hevur mist sítt valbæri.

Lógin um stýrisskipan Føroya í sermálum kann eftir § 30 bert broytast, um uppskot verður lagt fyri tingið í vanligari tingsetu ella eykatingsetu. Um uppskotið verður samtykt, verður tingið upployst, og nýval fer fram. Verður uppskot samtykt av hesum nývalda tingi, verður tað at staðfesta.

Vísandi hertil leggur landsstýrið málið fyri tingið at viðtaka fyrstu ferð.

Verður broytingin í stýrisskipanarlógini samtykt, eigur í komandi tingsetu eisin' at verða sett fram uppskot um tilsvarandi broyting í § 2 í løgtingsvallógini.

1. viðgerð 17. apríl. Málið varð beint í serliga 6-manna millumtinganevnd til at viðgerða løgtingsmál nr. 92.

Valdir vórðu: Finnbogi Isaksen, Pauli Ellefsen, Jákup Lindenskov, Hilmar Bech, Hilmar Kass og Adolf Hansen.

Málið ikki avgreitt.

F.L. j. nr. 115-1.

93. Studningur til Vestmanna kommunu til regulering v. m. av av grundøki á havnarøkinum

Á 1980, týsdagin 15. apríl legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Alit

Í Vestmanna er skipasmiðjan í holt við umbygging og nýgerð. Í hesum sambandi verður ein partur av havnarøkinum reguleraður, soleiðis at bøtt verður um arbeiðsumstøðurnar. Arbeiðið er partvíst gjørt.

Nevndin skal loyva sær at mæla tinginum til at ganga umsøknini á møti og loyvir sær at seta fram soljóðandi

Uppskot
til

Løgtingslóg um studning til Vestmanna kommunu til ymisk arbeiði í sambandi við idnaðarbygging á havnarøkinum.

§ 1. Úr landskassanum verður veittur studningur til Vestmanna kommunu til at fylla út ella sprengja burtur fyri grundøki við havnina og til at regulera og festa øki uttan um idnaðarbyggingar, soleiðis at viðurskiftini lúka tey krav, sum galda fyri tílík virki. Studningurin er 75% av byggipeningunum, tó í mesta lagi 75% av kr. 600.000 og verður hann goldin við eins stórum ársgjøldum í trý fylgjandi fíggjarár, frá og við fíggjarárinum 1980/81 at rokna.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi beinan vegin.

Lagtingslov om tilskud til Vestmanna kommune til diverse arbejder i forbindelse med industribygninger på havnens areal.

§ 1. Af landskassen ydes tilskud til Vestmanna kommune til opfyldning eller udsprængning for grundarealer ved havnen og til regulering og befæstelse af arealer uden om industribygninger, så forholdene opfylder de for vedkommende virksomheder gældende krav. Tilskuddet andrager 75% af anlægsudgifterne, dog højst 75% af kr. 600.000, og udbetalt med lige store årsrater i tre på hinanden følgende finansår fra og med finansåret 1980/81 at regne.

§ 2. Denne lagtingslov træder i kraft straks.

2. viðgerð 18. apríl. § 1 varð samtykt við 23—0 atkvøðum, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 21. april. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 24—0 atkvøðum.

Lóg nr. 67 frá 21. mai 1980.

---

94. Landsstýrismál

Ár 1980, mikudagin 30. apríl legði landsstýrismálanevndin fram soljóðandi

Alit

Landsstýrið hevur sent løgtinginum útskriftir úr gerðabók landsstýrisins fyri tíðarskeiðið frá 1. august 1978 til 19. juli 1979. Málið varð beint til viðgerðar í landsstýrismálanevndini.

Landsstýrið hevur í hesum tíðarskeiði hildið umleið 60 fundir. Útskriftirnar eru úr gerðabókini fyri tvey landsstýri. Eftir løgtingsvalið í november 1978, varð nýtt landsstýrið skipað, og tað helt sín fyrsta fund 25. januar 1979.

Í gerðabókini sæst, at á fundi 9. februar 1979 hevur landsstýrið viðgjørt spurningin um royndarboringar í Saksunardali. Samtykt varð, at hesar royndarboringar skuldu gerast í samvinnu millum landsstýrið og DGU (Danmarks Geologiske Undersøgelser), soleiðis at landsstýrið hevði leiðsluna. Somuleiðis varð samtykt at seta ein arbeiðsbólk at leggja arbeiðið til rættis, og málið skuldi so leggjast fyri aftur landsstýrið til stoðutakan, áðrenn byrjað varð.

Av gerðabókini sæst ikki gjølla, hvat endamálið við hesi boring er, og heldur ikki sæst málið at hava verið til viðgerðar aftur í landsstýrinum.

Á fundi 8. mars 1979 var til viðgerðar eitt tilmæli frá Heðin Klein um at faka fiskiloyvið frá bretska trolaranum Starwood, sum triggjar ferðir eftir einum hálvum ári varð dømdur fyri at nýta ólógligan reiðskap og fyri ólógliga fiskiveiðu. Tilmælið fekk bert tvær atkvøður og fall.

Á sama fundi samtykti landsstýrið at taka sjálvbodnu dagpeningaskipanina úr donsku lógini og í staðin loysa málið við løgtingslóg, sum skuldi leggjast fyri tingið í tingsetuni 1979. Eisini skuldi spurningurin um arbeiðsgevaragjald til dagpeningaskipanina leggjast fyri løgtingið í tingsetuni 1979. Landsstýrismálanevndin ger vart við, at hesi uppskot ikki eru lagd fyri tingið enn, bóast tingsetan 1979 nú fer at enda.

Á fundinum 8. mars 1979 viðgjørdi landsstýrið eisini spurningin um, hvar lands-

skúlafyrisitingin skuldi liggja. I hesum sambandi varð nevnt, at umhugsað varð at seta eina nevnd at kanna spurningin um at flyta ymsar landsstovnar út, sum eru í Havn. Tað sæst ikki av gerðabókini, um nakað meira er gjort við hetta mál.

Landsstýrið hevur á fundi 10. mai 1979 viðgjort 4 mál um persónar, sum hovdu givið ov lítið upp í skatti. Samtykt varð at áleggja teimum sekt, svarandi til eftirlíkningina, hóast semja ikki fekst við skattgjaldararnar. Landsstýrismálanevndini kunnugt er henda mannagongd nýggj. Vanligt hevur verið at áleggja sekt svarandi til eftirlíkningina, tá avtala fekst við skattgjaldaran, men í teimum forum, tá semja ikki fekst, var vanligt at áleggja sekt svarandi til tríggjar ferðir eftirlíkningina.

Á fundi 18. juni 1979 viðgjordi landsstýrið skriv frá verjumálaráðnum um stoðu landsstýrisins til upplýsingararbeiði við tí enedamáli, at fleiri føroyingar koma at starvast á Flyvestationen, Thorshavn. Málið varð umrætt, men avgerðin útsett. Í gerðabókini sæst ikki, um landsstýrið seinni hevur tikið stoðu í hesum máli.

Landsstýrismálanevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jona Henriksen og Finnbogi Isaksen) tekur undir við avgerðum landsstýrisins og setir fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar

Løgtingið góðtekur fær avgerðir, sum landsstýrið hevur tikið sambært útskriftir úr gerðabókini fyri tíðarskeiðið 1. august 1978 til 19. juli 1979.

Minnilutin (Eli Nolsoe) kann ikki taka undir við meirilutanum vísandi til omanfyri standandi og okkara sera vánaligu fíggjarligu stoðu, men setur fram soljóðandi

U p p s k o t
til
samtyktar

Løgtingið góðkennir ikki umrøddu gerðabók landsstýrisins, men mælir landsstýrinum til at leggja frá sær sum skjótast.

2. viðgerð 30. apríl. Uppskotið frá meirilutanum (Jonu Henriksen og Finnboga Isaksen) samtykt við 20—0. Uppskotið frá minnilutanum (Eli Nolsøe) fall við 11—0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 204-2.

95. Veðhald fyri láni til P/f Fiskaaling

Ár 1980, týsdagin 15. apríl legði Heðin M. Klein, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til P/f Fiskaaling.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri upp til 1,5 mió. kr. í láni til P/f Fiskaaling at nýta til byggjan av smoltstøð við Áir.

§ 2. Lánið verður at tryggja við panti í smoltstøðini.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til P/f Fiskaaling.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån på indtil 1,5 mill. kr. til P/f Fiskaaling til opførelse af smoltstation ved Áir.

§ 2. Lånet skal sikres med pant i smoltstationen.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Landsstýrið leggur hervið fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um veðhald fyri láni til P/f «Fiskaaling».

I skrivi dagfest 6. mars 1979 til P/f «Fiskaaling» sigur landsstýrið m.a.:

«Vísandi til fund í landsstýrinum viðvíkjandi aling av laksasmolti í Føroyum verður við hesum sagt frá, at landsstýrið játtar felagnum koncessión til smoltstøð. Álagt verður P/f «Fiskaaling» at hava eftirlit við tí, ið verður innfluft av rogni og yngli, og at lata smásil og -laks til teir, sum ætla sær at fara undir at ala hesi fiskasløg. Landsstýrið gevur við hesum P/f «Fiskaaling» heimild at fara undir at útvega projekt og kostnaðarætlan fyri bygging av smoltstøð við Áir. Samlaða íløguætlanin verður at leggja fyri landsstýrið.»

Hetta er nú gjort.

Projektið umfatar sjálva smoltstøðina við tilhoyrandi installatiónum, sjógvpumpuanleggi og feskvatnveiting við tilhoyrandi leiðingum, samlibrunnum og tólum til vatnviðgerð, meðan klekistøð, byrjunarfóðingarannlegg og umsitingardeild ikki eru við.

Roknað er við at stoypa húsið á staðnum og isolera tað og klæða tað við timbri uttan. Tann eina síðan er tó roknað gjørd heilt úr timbri, uttan klodd sum restin av húsunum og innan klodd við vatnfostum plátum.

Hetta er gjørt fyri lættari at kunna víðka húsið seinri í takt við eina vaksandi framleiðslu.

Bygda økið verður 433 m² til viddar, og er byggikostnaðurin sambært Landsbyggifelagið mettur til 2,25 mió. kr. Tá eru eimstakar útreiðslur so sum útgrevstur og byggirenta ikki froknað.

P/f «Fiskaaling» hevur í eginpeningi kr. 400.000.— av játtanum á fíggjarlógunum 1979/80 og 1980/81, § 16 (2 × kr. 200.000,—). Landsstýrið hevur lagt fyri logtingið lógaruppskot um ávíst avgjald av laksaveiðu. Verður tað samtykt, er ætlanin at nýta peningin til partvísa fígging av smoltstoðini. Tað, sum tá verður eftir, er ætlanin at fíggja við láni, og tí verður logtingið sokt um veðhaldsheimild. Eftir lokna bygging verður roknað við, at lánigrunnar, sum eitt nú Iðnaðargrunnurin og Menningargrunnurin, taka lut í fíggingini, soleiðis at bankalánið verður minst moguligt.

Landsstýrið metir tað neyðugt at fara undir hesa bygging heinan vegin, av tí at P/f «Fiskaaling» hølast undir ov trongum umstøðum. Felagið fær illa hýst tí laksasmolti, sum tað í løtuni hevur um hendi, og um nakra øking kann undir núverandi umstøðum ikki verða talan um, heldur tvørturímóti.

Fyribils útbyggingin við Áir verður mett at hýsa 110.000 laksasmoltum, og niðað verður í framtíðini ímóti eini væl størri útbygging. Í hvussu er 30% av laksasmoltunum er ætlanin at seta út í rúman sjógv, meðan restin verður seld til foroyskar laksaalarar.

Nøkur eintøk av projektinum um smoltstoð við Áir eru hjálogd sum skjol.

1. viðgerð 18. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 21. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 15. apríl 1980 og undir fyrstu viðgerð 18. í sama mánaða beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at tað fær heimild landskassans vegna at veðhalda fyri upp til 1,5 milj. kr. til P/f Fiskaaling at nýta til bygging av smoltstoð við Áir.

Í viðmerkingunum verður greitt frá, at projektið umfatar smoltstoð við tilhoyrandi installatiónum, sjógvpumpuanleggi, feskvatnsveiting við tilhoyrandi leiðingum, samlibrunnum og tólum til vatnviðgerð, meðan klekistoð, byrjuntarfóðringaranlegg og umsítingar ikki eru við. Byggikostnaðurin er av landsbyggifelagnum mettur til 2,25 milj. kr. Tá eru útreiðslur til útgrevstur og byggirenta ikki froknað.

Viðvíkjandi eginpeningi hevur P/f Fiskaaling sjálvt 400.000 kr. og verður roknað við, at lógaruppskotið um ávíst avgjald av laksaveiðu verður samtykt í tinginum, fær felagið part av hesum peningi til fíggjan av smoltstoðini.

Mett verður, at neyðugt verður at fara undir byggingina beinanvegin vegna vánaligar hølisumstøður. Fyribils útbyggingin metist at hýsa 110.000 laksasmoltum, og verður í framtiðini miðað ímóti væl storri útbygging. Av laksasmoltinum er ætlanin at seta 30% út í sjógvin, meðan restin ætlast seld til føroyskar laksaalarar.

Fíggjarnevndin viðmerkir, at tá landsstýrið í skrivi sínum til p/f Fiskaaling frá 6. mars sigur, at landsstýrið játtar felagnum konsessión til smoltstoð, er tann veruligi týðningurin av hesum, at sambært løgtingslóg frá 14. mars 1974 er uttan loyvi frá landsstýrinum bannað at byggja, innrætta, nýskipa ella víðka virkir til kleking av rognum ella aling av fiski. Talan er sostatt ikki um konsessión í tí týðningi, hetta orðið vanliga hevur. Viðvíkjandi orðinum «smoltstoð» er fíggjarnevndin av teirri áskoðan, at orðið laksaalistoð er betri hóskandi og setur fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins:

Í § 1 verður orðið «smoltstøð» broytt til «laksaalistøð».	I § 1 ændres ordet «smoltstation» til «lakseopdrætningsanstalt».
Í § 2 verður orðið «smoltstøðini» broytt til «laksaalistøðini».	I § 2 ændres ordet «smoltstationen» til «lakseopdrætningsanstalten».

Við omanfyri nevndu broyting mælir ein samd fíggjarnevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 24. apríl. Broytingaruppskot til § 1 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 22—0 atkvøðum, § 1 soleiðis broytt samtykt við 22—0. Broyting til § 2 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 22—0, § 2 soleiðis broytt samtykt við 24—0 og § 3 samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 28. apríl. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 31—0.

F.L. j. nr. 1427-1-74. Lóg nr. 50 frá 12. maj 1980.

96. Ferðaseðla prísáseting

Ár 1980, týsdagin 15. apríl legði Adolf V. Hansen, logtingsmaður vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin

Uppskot
til
samtyktar.

Álagt verður landsstýrinum at skipa so fyri at prisirnir á ferðaseðlum verða roknaðir eftir fylgjandi rætningslinjum:

1) Eitt ávíst grundgjald verður at gjalda, og skal hetta vera eins fyri øll ferðasambond.
2) Oman á grundgjaldið verður lagt eitt fráleika ískoyti, roknað pr. kilometur í beina linju millum atløguplássini, tó solciðis at fráleikaískoyti fyri ein klometur altíð verður minni enn fyri undanfarna kilometurin.
3) Har skift verður millum atløguplass regluliga skal roknast við meðalfráleikanum.

Viðmerkingar:

Sum er sýnist Strandferðslan ongan fastar reglur at hava at áseta ferðaseðlaprisir eftir.

Dømi eru um at tikið verður sama gjald, hóast stóran mun í fráleikanum, og dømi eru um at tikið verður heilt upp í meira enn 5 ferðir so nógv pr. km. á eini rutu sum á aðrari.

Dømi eru eisini um, at við *sama skipi* verður tikið næstan trífalda so nógv pr. km. á eini rutu sum á aðrari.

Flokkur okkara er av terri áskoðan, at prisirnir skulu roknast eftir fráleikanum í beinari linju.

Flokkurin metir tað vera rætt, at tey, ið longsta veg hava at ferðast, gjalda minst pr. km.

Hugsast kundi, at rættast var at havt eins prisir yvir alt landið, men so vildu ferðafólk á teimum kortu leiðunum goldið enn meir pr. km. og vildi tað ikki verið rætt, av teirri orsøk at tey hava mera brúk fyri rutusambandi. Lutvíst tí tey arbeiða í granna bygdum ella á granna oyggjum, og lutvíst tí fleiri almennir stovnar v.m. hava deildir á sentralum, stórum plássum á teimum ytru oyggjunum.

Sum dømi kann nevnast at Leirvíkingar og Mikladalsfólk oftari hava fyri neyðini at fara til Klaksvíkar í sjúkraørindum enn t.d. Tvøroyra fólk, av teirri einfaldu orsøk at hvørki Leirvík ella Mikladalur hava sjúkrahús, skaðastovu ella lækna.

Sandoyingar, Eysturoyingar og Vágafólk saman við teimum, sum búgva á teimum

smærru útoyggjunum hava nógv brúk fyri at ferðast við strandferðsluni, tí hesar oyggjar og útoyggjar hava ongar almennar stovnar, og fólkið har býr, hevur tí fyri neyðini at fara til Havnar, Klaksvíkar ella Tvoroyri, um tey hava ørindi á tílíkum stovnum.

+ skjal.

FØROYA FRAMBURÐS- OG FISKIVINNUFLOKKUR	Fjarleiki í beina linju	Kostnaður	Kostnaður pr. km. í beina linju	Lutfall við kostnaðarminsta ferðasamband sum 100
VESTMANNASUND	4,0 km.	15 kr.	3,70 kr./km	529
TÓRSHAVN - NÓLSOY	5,0 km.	15 kr.	3,00 kr./km	429
KLAKSVÍK - LEIRVÍK	6,5 km.	15 kr.	2,30 kr./km	329
SAND - SKÚVOY	7,0 km	10 kr.	1,40 kr./km	200
TÓRSHAVN - TOFTIR	9,5 km.	15 kr.	1,60 kr./km	229
HVANNASUND - SVÍNOY ..	10,0 km.	10 kr.	1,00 kr./km	143
HVANNASUND - FUGLOY ..	12,5 km.	10 kr.	0,80 kr./km	114
TÓRSHAVN - SKOPUN	13,0 km.	15 kr.	1,10 kr./km	157
KLAKSVÍK - TÓRSHAVN ..	26,5 km.	35 kr.	1,30 kr./km	186
TÓRSHAVN - TVØROYRI ..	50,0 km.	45 kr.	0,90 kr./km	129
TÓRSHAVN - VÁGUR	59,0 km.	45 kr.	0,70 kr./km	100

1. viðgerð 18. apríl. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

Alit

Málið er lagt fram á ting av Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum, og við 1. viðgerð hin 18. apríl 1980 varð tað beint til viðari viðgerðar í sosialu nevndini.

Undir 1. viðgerð í tinginum kom fram, at moguliga vóru skeivleikar í ferðascðlaprísásetanini, men at roynt hevur verið at bott um hetta við at nýta somu mannagongd, sum her er skotið upp.

Nevndin er tí av teirri áskoðan, at best var, um málið varð viðgjort viðari av serkønum, og mælir tí til at beina málið til viðgerðar í samferðslunevndini.

Ein samd nevnd setur tí fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar.

Ferðaseðla prísáseting sambært løgtingsmál nr. 96/1979 verður beint til víðari viðgerð í Samferðslunevnd løgtingsins.

Tingsins loyvi varð givið at frávíkja tíðarfreistini at hava 2. viðgerð 23. apríl. Uppskotið frá samdari nevnd varð samtykt við 27—0.

---

97. Veðhald fyri láni til Klaksvíkar kommunu

Ár 1980, týsdagin 15. apríl legði Heðin M. Klein, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til Klaksvíkar kommunu.

§ 1. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni upp til 7 mió. kr. til Klaksvíkar kommunu.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til Klaksvík kommune.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån på indtil 7 mio. kr. til Klaksvík kommune.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við skrivi frá 14. apríl 1980 hevur Klaksvíkar kommuna sent umsókn um landskassaveðhald fyri einum láni uppá 7 mió. kr. Í umsóknini verður upplýst, at peningurin skal nýtast til:

Útskifting av vindeygum í skúlanum	kr.	550.000,—
Fótbóltsvøllurin	—	600.000,—
Nýggjan kirkjugarð	—	600.000,—
Liðugtgerð av Lítlu brekku	—	500.000,—
Liðugtgerð av Kráargøtu	—	1.350.000,—
Kommunubrekkan	—	700.000,—
Betongvegir	—	500.000,—
Bøgøta	—	300.000,—
Bakkavegur	—	150.000,—
Asfaltering	—	1.400.000,—
Stangarvegur — keyp av lendum	—	350.000,—
	kr	7.000.000,—

Ætlanin er gjøgnum Føroya Banka at taka lánið uttanlands. Sambært bankan verða lántreytirnar væntandi hesar:

Afturgjaldingartíðir	8 ár, 16 hálvárlig gjøld
Útgjaldingarkursur	99 5/8
Libor-rentan tann 15. apríl 1980 er henda:	
Fyri $	17 7/8% p.a.
Fyri DM	9 3/4% p.a.
Fyri Fl.	11 3/8% p.a.
Fyri S.Fr.	7 1/4% p.a.

Aftrat hesum skal leggjast 7/8% p.a.

Verður landskassaveðhald ikki játtað, verður útgjaldingarkursurin 99. og haraftrat tekur bankin 1½% p.a. fyri garanti fyri láninum.

Lánbyrða kommunar pr. 31. mars 1980 var netto kr. 39.536.235,40.

Á fíggjarætlan kommununar fyri 1980/81, sum er viðheft, verða samlaðu útreiðslurnar mettar til kr. 37.673.000,—.

harav til rentur	kr.	5.745.000,—
og til avdráttir	kr.	7.400.000,—

Lántorvur kommununar verður í 1980/81 mettur til kr. 7.850.000.

SI SKJAL 14

1. viðgerð 17. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 21. apríl legði fram soljóðandi

Alit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 15. apríl 1980 og undir fyrstu viðgerð 17. í sama mánaða beint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskotinum skal landsstýrið fáa heimild til landskassans vegna at veðhalda fyri láni upp til 7 milj. kr. til Klaksvíkur kommunu.

Í viðmerkingunum verður útgreinað, hvat lánið er ætlað til, og verður upplýst, at møguleiki er at fáa lán gjognum ávísan banka uttanlands.

Uppá fyrispurning hevur kommunan upplýst, at øll lán eru goldin ájour, og hevur eisini kommunan gjort vart við, at eingin endalig stoða er tikin um gjognum hvonn banka, lánið skal takast, um veðhaldið verður játtað.

Ein meiriluti (Hákun Djurhuus, Haldur Hansen, Jørgen Thomsen, Jógvan Durhuus, Pauli Ellefsen og Ivan Johannesen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Ein minniluti (Asbjørn Joensen) tekur undir við umsóknini um veðhald, men skoytir uppí, at neyðugt verður við einari endurskoðan av landskassaveðhaldinum fyri lán til kommunur v.fl., nú uttanlandsskuld samfelagsins er vorðin óvanliga stór.

2. viðgerð 24. apríl. 3. viðgerð 28. apríl. Málið samtykt við 31—0.

F.L. j. nr. 809-5-98. Lóg nr. 47 frá 12. mai 1980.

98. Lóg um summartíð

Ár 1980, týsdagin 15. apríl legði Dánjal P. Danielsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

Løgtingslóg um summartíð.

§ 1. Landsstýrið fær heimild til ein part av árinum í kunngerð at áseta, at dognið byrjar 1 tíma fyrr í mun til vanliga tíðarrokning. Landsstýrið kann samstundis áseta tær neyðugu fremjingarreglurnar.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Lagtingslov om sommertid.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til for en del af året ved bekendtgørelse at fastsætte, at døgnet begynder en time før i forhold til normal tidsregning. Landsstyret kan samtidig fastsætte de nødvendige overgangsbestemmelser.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Aftaná at europeisk lond hava innfort summartíð, er klokkan í Føroyum 2 tímar aftaná Europa-tíð. Broytingin av klokkutíðini verður gjort fyri at spara orku.

Orkuráðið hevur uppá fyrispurning svarað, at ráðið metir, at orkunýtslan í Føroyum er so lítið ávirkað av innfordari summartíð, at hetta ikki eigur at verða avgerandi fyri avgerðina, um summartíð skal innforast í Føroyum.

Munurin á klokkutíðini vísir seg at hava vissar trupulleikar fyri telefon og annað fjarsamband við útheimin, við tað at skrivstovutíðirnar í Føroyum og Europa bert falla saman í 3 — 3½ tíma pr. dogn.

Hin vegin kunnu trupulleikar møguliga koma at standast av at innfora summartíð í ár, við tað at ferðamátirnir v.m. eru gjørdar fyri summarið.

Landsstýrið heldur, at heimild eigur at verða til at broyta klokkuna, um tað aftaná samráðingar við teir ymisku vinnustættirnar, telefonverkið og telegrafverkið eru grundir, sum tala fyri hesum.

1. viðgerð 17. apríl. Málið varð beint í lógarnevndina, sum 21. apríl legði fram soljóðandi

Á l í t

Málið varð fratilagt av landsstýrinum 15. apríl 1980 og undir fyrstu viðgerð 17. apríl beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjort málið, og tekur ein samd lógarnevnd undir við uppskotinum frá landsstýrinum.

23. apríl legdu tingmenninir Jørgen Thomsen, Adolf V. Hansen, Hans M. Joensen, Háskun Djurhuus og Jógvan I. Olsen fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Sum nýtt 2. stk. til § 1 verður sett:

«Summartíð eftir 1. stk. skal lýsast 12 mánaðar, áðrenn hon kemur í gildi.»

Som nyt stk. 2 tilføjes i § 1:

«Sommertid efter stk. 1 skal bekendtgøres 12 måneder før den træder i kraft.»

Viðmerkingar:

Undir seinna heimsbardaga hendu vatnlukkur á sjónum, helst orsakað av feilmetingum av sjóvarfallinum, tí tá hevdu føroyingar summartíð.

Skal summartíð setast í gildi, má hon lýsast í so góðari tíð, at álmanakkar, hondbøkur, streymtalvur o.v. til eina og hvorja tíð kunnu útvegast í samsvar við ta klokkutíð, sum nýtt verður á staðnum.

2. og 3. viðgerð 29. apríl. Málið endaliga samtykt við 23—0. Broytingaruppskot frá Jørgen Thomsen o.fl. fall við 12—0 atkvøðum.

F.T., j. nr. 624-1. Lóg nr. 66 frá 21. mai 1980.

99. Fyrispurningur til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann

Ár 1980, týsdagin 15. apríl setti Jákup Lindenskov, løgtingsmaður Vilhelm Johannesen, landsstýrismanni soljóðandi

fyrispurning

Fer landsstýrið at leggja uppskot fyri tingið um stuðul til bygging av Føroya-húsi í Keypmannahavn.

Um so er, nær kann hetta verða greitt til tingið.

23. aprll svaraði Vilhelm Johannesen fyrispurninginum soleiðis

Fyrispurningurin, sum er settur av Jákup Lindenskov, løgtingsmanni, 15. aprll 1980, er soljóðandi:

«Fer landsstýrið at leggja uppskot fyri tingið um stuðul til bygging av Føroyahúsi í Keypmannahavn.

Um so er, nær kann hetta verða greitt til tingið.»

Í málinum um Føroyahús í Keypmannahavn, sum arbeitt hevur verið við, síðani Føroyahúsið í St. Kongensgade varð selt um ársskiftið 1976/77, er stoðan í lotuni tann, at ein fyrireikingarnevnd í Keypmannahavn við 5 limum eina tíð hevur arbeitt við ætlanini um bygging av einum Føroyahúsi á Artillerivej í Keypmannahavn.

Arbeiðið við hesi ætlan er komið so langt, at aftaná samráðingar millum landsstýrið, forsætismálaráðið og verjumálaráðið, sum eigur økið, er tilsogn fingin frá forsætismálaráðnum um, at økið fer at kunna verða leigað føroyingum undir sonu lagaligu treytum, sum eru galdandi fyri «Norges Hus» og «Norske Kirke» og «Den Svenske Kirke» í Keypmannahavn, tó treytað av, at «arealudvalget» millum ríkismyndugleikarnar og Keypmannahavnar kommunu ikki heldur nakað vera til hindurs fyri hesi nýtslu av økinum.

Herumfrant er tilsogn fingin frá «planstyrelsen» í umhvørvismálaráðnum aftaná samráðingar millum verjumálaráðið, umhvørvismálaráðið og kommunalu myndugleikarnar í Keypmannahavn um, at neyvan nakað er til hindurs fyri, at umrodda øki verður nýtt til bygging av Føroyahúsi. Í sonu tilsogn varð biðið um upplýsingar um, hvussu stórt øki tarvur er á til hetta endamál, og hvørjar bygningar ætlanin er at byggja har, til nýtslu fyri endaligu stoðutakanina hjá «arealudvalget», og í tilsognini varð somuleiðis mælt til, at samráðingar vera við «København's Magistrat 4. afdeling» um møguleikarnar fyri at fáa gjørt eina ætlan fyri ta neyðugu bygging á staðnum.

Í grunninum «Føroyahús í Keypmannahavn», sum á figgjarløgtingslógini undir

§ 19. Almannamál v.m. hevur tingið játtað kr. 200.000,- í figgjarárunum 1972/73 og síðani kr. 150.000,- á hvorjum ári, vóru tann 30. mars 1980 kr. 1.181.028,48. Á uppskotinum til figgjarlogtingslóg 1980/81 hevði landsstýrið avsett kr. 250.000,- til endamálið, men undir viðgerðini í figgjarnevndini varð upphæðin lækkað til kr. 150.000,-. Í lotuni eru sostatt kr. 1.331.028,- í grunninum til «Foroyahús í Keypmannahavn».

Til viðgerðar í landsstýrinum er í lotuni eitt tilmæli frá fyrireikingarnevndin viðvikjandi figging av bygging og rakstri av ætlaða Foroyahúsinum á Artillerivej í Keypmannahavn, og landsstýrið ætlar at samráðast við fyrireikingarnevndina í Keypmannahavn um hetta tilmæli nú í vár, áðrenn landsstýrið tekur endaliga stoðu til spurningin um figging av bygging og rakstri av Foroyahúsinum, og landsstýrið roknar sostatt við, at málið verður greitt at leggja fyri tingið í komandi Olavsokutingsetu.

---

100. Val av álismonnum og nevndum

Framlagt 23. apríl 1980.

Sí val av nevndum slóð 9.

---

101. Veiting av heimarætti

Ár 1980, týsdagin 15. apríl las formaðurin skriv frá landsstýrinum, har sagt verður frá, at ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lógir um veiting av heimarætti verða lýstar at galda í Foroyum.

Málið varð beint í lógarnevndina, sum 18. apríl legði fram soljóðandi

Alit

Landsstýrið hevur 11. apríl 1980 skrivað tinginum soljóðandi:

«Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg

nr. 3 frá 8. juni 1978, lóg nr. 2 frá 23. mai 1979 og lóg nr. 4 frá 4. december 1979 um veiting av heimarætti verða lýstar at galda fyri Foroyar.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri logtingið við viðmæli.»

Málið varð beint í lógarnevndina 15. apríl, og setur ein samd lógarnevnd fram fylgjandi

U p p s k o t
til
samtyktar

Lóg nr. 3 frá 8. juni 1978, lóg nr. 2 frá 23. mai 1979 og lóg nr. 4 frá 4. december 1979 um veiting av heimarætti verða lýstar at galda í Foroyum.

2. viðgerð 28. apríl 1980. Málið varð samtykt við 23—0 atkvøðum.

F.L., j. nr. 508-3.

---

102. Broyting í løgtingslóg um vápn

(løgtingsmál 43/1978 (vetrarting))

Ár 1980, fríggjadagin 18. apríl legði lógarnevndin fram soljóðandi

Á l i t

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 5. apríl 1979. Lógarnevndin viðgjordi málið og tók undir við uppskotinum soleiðis, sum tað var orðað og legði álitið fram 26. apríl 1979.

Sama dag leggja Agnar Nielsen, Edmund í Garði, Andrias P. Jacobsen, Hilmar Kass, Juul Jacobsen og Hans Marius Joensen fram broytingaruppskot.

Broytingaruppskotið, ið ber í sær, at tað verður loyvt sum nú at brúka hoglbyrsu og seyðabyrsu, sjálvt um ein ikki hevur fylt 18 ár.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins, treytað av at tað verður

skoytt uppi, at eitt mark verður niðureftir til 16 ár, og at fólk millum 16 og 18 ár einans hava loyvi at nýta hoglbyrsu tá tey eru saman við vaksnum fólki.

Nevndin mælir sostatt til at samtykkja uppskot landsstýrisins við fylgjandi

broyting

I § 1, nr. 1 í uppskot landsstýrisins verður skoytt uppí:

«Tó er loyvt fólkum millum 16 og 18 ár at nýta hoglbyrsu, tá tey eru saman við vaksnum fólki og fólkum niður í 16 ár at nýta scyðabyrsu.»

I § 1, nr. 1 i landsstyrets forslag tilføjes:

«Dog er det tilladt personer mellem 16 og 18 år at benytte haglgeværer, når de er sammen med voksne personer og personer ned til 16 år at benytte slagteapparat.»

2. viðgerð 23. apríl. Broytingaruppskotið frá lógarnevndini samtykt við 27—0. Uppskotið endaliga samtykt við 3. viðgerð 28. apríl við 30—0 atkvoðum.

F.L. j. nr. 605-1. Lóg nr. 54 frá 12. mai 1980.

---

103. Lærlingaviðurskifti

Ár 1980, hósdagin 23. apríl legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur 14. apríl 1980 sent lagtinginum bræv við áliti frá nevndini at kanna og leggja fram álit um ábøtur í viðurskiftum handverkslærlinga.

Brævið varð beint í lógarnevndina, og hevur nevndin viðgjort málið.

Ein samd lógarnevnd mælir til at senda málið til viðgerðar í skúlanevndini, og at skúlanevndin viðvíkjandi hesum máli verður gjord til millumtínganevnd. Samsvarandi hesum setur nevndin soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Málið verður beint í skúlanevndina, sum verður millumtinganevnd viðvíkjandi hesum máli.

Sama dag, 23. april, lagdu løgtingsmenninir Asbjørn Joensen, Halldur Hansen og Óli Breckmann fram soljóðandi

broytingaruppskot

I

Uppskot
til

løgtingslóg um lønurendurgjald fyri lærlingar.

§ 1. Landsstýrið verður heimilað at endurrinda handverksmeistarum útreiðslur til lønir hjá lærlingum í skúlatíðini tey 2 fyrstu læruárini.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinnavegin.

lagtingslov om refusion af lærlingelønninger.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at refundere håndværksmestre udgifter til lærlingelønninger i skoletiden de 2 første læreår

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

II

Uppskot
til
samtyktar.

Álagt verður landsstýrinum í ólavsøkutingsetuni at koma við einum endaligum uppskoti til broytingar í lærlingalógini og samstundis at hava kannað, um lærlingar kunnu koma undir dagpeningaskipanina, meðan teir eru sjúkir í lærutíðini.

Eftir orðaskiftið varð málið beint aftur í lógarnevndina, sum 24. april legði fram nýtt

Álit

Landsstýrið hevur 14. april 1980 sent løgtinginum brøv við áliti frá tí 7-mannanevnd, ið sett var av løgtinginum til at leggja fram álit um ábotur í viðurskiftum handverkslærliga.

Brævið var sannan við áfitinum beint í lógarnevndina, ið var samd um at senda málið til skúlanevndina og gera hesa nevnd til milluntinganevnd í hesum máli.

Tá hetta álit var lagt fram 23. april kom eitt broytingaruppskot, ið søyr seg um at endurrinda handverksmeistarum útreiðshurnar til lærlingalonir tvey tey fyrstu árini, tá lærlingurin er í skúla. Samstundis verður í viðmerkingunum álagt landsstýrinum í ólavsokutingsetuni at koma við einum endaligum uppskoti til broytingar í lærlingalógini og at kanna, um lærlingar kunnu koma undir dagpeningaskipanina, meðan teir eru sjúkir.

Aftaná orðaskifti undir 2. viðgerð var málið beint aftur í lógarnevndina, sum aftur hevur viðgjort málið.

Niðurstoðan er hon, at tað ikki er ráðiligt at taka endaliga stoðu í hesum spurningi í tinginum uppá so stutta tíð. Spurningurin um, at hitt almenna skal gjalda lutvísa lon og sjúkrapening eigur at vera lýstur nærri.

Harumfram verður hildið, at nimnælini frá ymisku felogunum og stovnum og skúlum skulu vera til skjals, áðrenn farið verður viðari við málinum.

Viðvíkjandi broytingaruppskotinum frá teimum 3 tingmonnunum, so er tað lagt fyri formannin í meistarafelagnum, ið ikki metir, at hetta broytingaruppskot, um tað verður samtykt, kann loysa ta trætu, ið hevur og framvegis er millum lærlingar og meistarar.

Samanumtikið kann sigast, at tað ikki er tilráðiligt at avgreiða málið, sum tað nú fyrilggur, og setur en samd lógarnevnd fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Lógarnevndin verður gjord til milluntinganevnd í lærlingamálinum og skal á ólavsøku leggja málið aftur fyri tingið.

SÍ SKJAL 15.

2. viðgerð 23. april. Uppskotið frá samdari nevnd um at gera lógarnevndina til milluntinganevnd hesum máli viðvíkjandi varð samtykt við 28—0 atkvøðum. Broytingaruppskotið frá Haldur Hansen o.fl. fall við 8—0 og uppskotið til samtyktar frá teim sonu fall við 11—0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 2115-8.

104. Heimild til landskassan til lántøku

Ár 1980, hósdagin 24. apríl legði Demmus Hentze, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um heimild til lántøku til landskassan.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka upp til 100 milliónir kr. í láni til tryggjan av rakstrinum.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 48 frá 28. juni 1975.

lagtingslov om hjemmel til låntagning til landskassen.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån på indtil 100 millioner kr. til sikring af driften.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 48 af 28. juni 1975.

Viðmerkingar:

Hesi seinastu 12 árini hevur landsstýrið havt heimild til innan ávís mork at taka lán til at tryggja likviditetsstoðna hjá landskassanum. Hetta svarar til stoðuna í mongum øðrum londum, av tí at oftani kunnu inngjaldingarnar til teir ymsu landskassarnar fella stytri ella longri, eftir at útgjaldingarnar fara fram. Tað ovugta kann sjálvsagt eisini koma fyri.

Fyrstu ferð landsstýrið fekk eina tilika heimild var við løgtingslóg nr. 64 frá 20. december 1968. Heimildin var uppá 20 milliónir, men lántokan var uppá 13,6 milliónir kr.

Aðru ferð fekk landsstýrið í mai 1970 heimild til at lána 20 milliónir (smbr. løgtingslóg nr. 18 frá 11. mai 1970). Samráðingar millum landsstýrið og ríkisstjórnina førdu til eina skipan, sum bar í sær møguleika hjá landsstýrinum við føroysku bankunum sum millumlið at lána í nationalbankanum upp í 20 milliónir. Hesin lánirættur hevur verið nýttur í skiftandi mun.

Utviklingurin í fyrru helvt av 70'unum fordi við sær, at lániupphæddin ella trekningsrættarmarkið, sum tað heldur er talan um, ikki noktaði tann vaksandi tørvin

fyri fígging av broytingunum í likviditetinum. Samráðingar millum landsstýrið og ríkisstjórnina - nationalbankan í februar 1975 fordu til semju um, at hægsta lániupphæddin skuldi broytast til 50 milliónir kr., samstundis sum at fyrrgaldandi kravið um, at lánið minst einaferð árliga skuldi vera fult afturgoldið, varð slept. Lógarheimildin til hægru upphæddina er løgtingslóg nr. 48 frá 26. juni 1975.

Síðani 1975 hevur trekningsmarkið verið 50 milliónir kr. Búskaparliga gongdin seinnu helvt av 70'unum hevur verið eyðkend av broyttum veiðumynstri og skjótt hækkandi rakstrarútreiðslum hjá fiskiflotanum, samstundis sum útviklingurin á prísinum á flestu fiskavorum hevur verið munandi trekari enn í fyrru helvt av 70'unum.

Nevndi útviklingur hevur borið í sær stórar og fyri ein part óregluligar broytingar í avgerandi táttum, tá talan er um likviditetsstoðu landskassans frá mánað til mánað og ár til annað. Í hesum viðfangi skal bendast á eftirfylgjandi yvirlit.

Broyting í %	*Innflutningur*	*Útflutningur*
1974-75	7,4	÷ 4,8
1975-76	21,2	36,1
1976-77	15,3	36,5
1977-78	8,3	÷ 10,1
1978-79	9,1	÷ 2,4

Annar táttur í gongdini er vøksturin í samlaðu upphæddini í landskassaroknskapinum ella fíggjarlógini.

Broyting í %	*Roknskapur*	*Fíggjarlóg*
1974-75		
1975-76	30	
1976-77	16	
1977-78	19	
1978-79	16	
1979-80		17
1980-81		25

Hesar árligu broytingarnar í upphæddunum, sum landskassin sum gjaldstovnur skal nøkta, bera samstundis í sær, at munurin millum inn- og útgjaldingar yvir stytri og lougri tiðarskeið alsamt vaksa og eru munandi øktar síðani 1975.

Fyri stuttum hevur løgtingið samtykt umfatandi tiltok fyri at bota um viðurskiftini innan fiskivinnuna. Út frá einum landskassalikviditetssjónarmiði hava hesi tiltok ta avleiðing, at útreiðslurnar falla til útgjaldingar stutt eftir at vera samtyktar, meðan inntøkurnar til landskassan av sjálvsøgdum orsokum koma til vega nakrar mánaðir aftaná.

Landsstýrið er av tí áskoðan, at torfort er at rokna út nágreiniliga likviditetslánitorvin fleiri ár fram.

Omanfyrinevndu tillýsingar benda á, at torvur er fyri munandi hækking av galdandi trekningsupphædd, og mælir landsstýrið til heimild til at lána upp til 50 miljónir kr. afturat higartil verandi heimild til styrk av landskassans likviditeti.

Samráðingar við avvarðandi ríkismyndugleikar verða framdar um stutta tíð til at koma til sættis um lániskipanina.

1. viðgerð 28. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 29. apríl legði fram soljóðandi

Alit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 24. apríl 1980 og undir fyrstu viðgerð 28. í sama mánaða beint í fíggjarnevndina.

Eftir lógaruppskotinum skal landsstýrið fáa heimild landskassans vegna at taka upp til 100 milj. kr. í láni til tryggjan av rakstrinum. Í viðmerkingunum greiðir landsstýrið frá heimildini til innan ávís mark at taka lán til tryggjan av likviditetsstoðuni hjá landskassanum. Heimildin er hækkað frá 20 milj. í 1968 til 50 milj. í 1975. Búskaparliga gongdin í seinru helvt av sjeytiárunum hevur til tíðir sett strong krav til likviditetsorku landskassans. Í ár hevur loglingið játtað munandi stuðulsupphæddir til fiskivinnuna. Tá hesar útreiðslur falla til útgjaldingar skjótt aftaná samtykt, meðan inntokulógirnar virka nakað seinri, er orsok til at galdandi lánheimildin verður hækkað.

Landsstýrið viðmerkir, at torlørt er at rokna út nágreiniliga likviditetstørvin fleiri ár.

Fíggjarnevndin hevur á fundi 29. apríl 1980 viðgjort málið. Undir viðgerðini í nevndini varð vístá, at fleiri tingmenn undir viðgerðini bóðu um upplýsingar frá landsstýrinum, nevniliga

1. Hvat er í teimum ymisku grunnunum, og
2. Hvussu er likviditetstørvur landskassans í nærmastu framtíð.

Fíggjarnevndin hevur biðið um hesar upplýsingar, og verða tær tiknar til viðgerðar, so skjótt tær eru fingnar til vega.

Meirilutin (Hákun Djurhuus, Poul J. Olsen, Jørgen Thomsen og Jógvan Djurhuus) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Pauli Ellefsen, Ivan Johannesen og Asbjørn Joensen) vísir á, at málið er ikki viðgjort í fíggjarnevndini, og kann nevndi minniluti tí ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 29. apríl. Atkvott varð við navnakalli um § 1, og varð hon samtykt við 19 ja-atkvøðum, 11 atkvøddu ikki.

Ja atkvøddu: Signar Hansen, Poul J. Olsen, Haldur Hansen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Andrias P. Jacobsen, Jákup Lindenskov, Jona Henriksen, Karin Kjølbro, Jógvan Durhuus, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Edmund í Garði, Jógvan Sundstein, Øssur Dam Jacobsen, Eyðun Videro, Hákun Djurhuus, Óli Breckmann og Hilmar Bech.

Atkvøddu ikki: Ivan Johannesen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Eli Nolsøe, Erlendur Patursson, Flemming Mikkelsen, Eilif Samuelsen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Agnar Nielsen og Pauli Ellefsen.

Burturstaddir: Juul Jacobsen og Adolf Hansen.

3. viðgerð 30. apríl. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 19—0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 440-5-2. Lóg nr. 45 frá 12. mai 1980.

---

105. Setan av nevnd at gera uppskot um tubbakslóggávu

Ár 1980, hósdagin 24. apríl løgdu tinglimirnir Karin Kjølbro, Eli Nolsøe, Signar Hansen, Jógvan Durhuus, Johs. M. Olsen, Flemming Mikkelsen, Poul J. Olsen, Hilmar Kass, Jona Henriksen, Jógvan Sundstein, Hans Marius Joensen, Edmund í Garði, Agnar Nielsen, Eilif Samuelsen, Øssur Dam Jacobsen, Haldur Hansen, Adolf Hansen, Asbjørn Joensen, Ivan Johannesen, Jógvan I. Olsen, Finnbogi Isaksen, Erlendur Patursson, J. Lindenskov og Pauli Ellefsen fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið samtykkir, at sett verður ein 3-manna nevnd at gera uppskot um eina tubbakslóggávu.

Nevndin skal vera liðug við arbeiði sítt í seinasta lagi í august í ár, og verður nevndarálitið við lógaruppskotinum tá lagt aftur fyri tingið.

Landsstýrið tilnevnir nevndina soleiðis:
Ein verður valdur eftir tilmæli frá felagnum Heilbrigdi.
Ein verður valdur eftir tilmæli frá Læknafelag Foroya.
Ein verður valdur beinleiðis av landsstýrinum. Hesin skal vera logfrøðingur.

1. viðgerð 28. april. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 28. april. Uppskotið samtykt og avgreitt við 22—0 atkvøðum.

---

106. Álit frá millumtinganevnd til kannan av tryggingarviðurskiftunum

(54/78 (vetrarting)
Ár 1980, týsdagin 29. april var framlagt soljóðandi

Álit

Við løgtingslóg nr. 47 frá 7. juni 1979 setti løgtingið eina millumtinganevnd til kanning av tryggingarviðurskiftunum.

Setningurin hjá nevndini var hesin:

1. At gera reglur um ásetan av tryggingargjoldum.
2. At kanna tryggingartreytir og tryggingargjold innan allar tryggingarbólkar í Føroyum.
3. At koma við tilráðing, hvat gerast kann fyri at minka um tryggingarútreiðsturnar.
4. At kanna avleiðingarnar, um einkarrætturin til at tekna tryggingar í Føroyum verður avtikin, og koma við tilráðing.

Nevndin skuldi havt lokið arbeiði sítt í tingsetuni 1979/80.

Í nevndina vórðu valdir hesir tinglimir:

Jona Henriksen, Eyðun Viderø, Signar Hansen, Hilmar Kass og Eli Nolsoe.

Sum ráðgevara í tryggingarmálum hevur nevndin havt Jógvan P. Johansen,

Strendur.

Frá Felagnum fyri Bilhandlarar hevur nevndin fingið skriv, sum fylgir hjálagt sum skjal.

Í viðmerkingunum til uppskotið frá Sjálvstýrisflokkinum um orsokina til at seta hesa nevnd var m.a. fort fram, at rættindini hjá Tryggingarsambandi Føroya at krevja eykagjøld ikki hava heimild í nokrum ásettum reglum um hækking av tryggingargjøldum, men at hesi verða ásett av nevndini eftir egnari meting. Nevndin heldur seg hava rætt til at krevja eins stór eykagjøld frá øllum tryggingartakarum, uttan mun til upphæddina av tryggingarábyrgdini og uttan mun til, um tað bert er ábyrgdartrygging.

Tryggingarsamband Føroya hevur einkarrætt til at tekna allar tryggingar í Føroyum. Tað er tí løgtingið, sum hevur ta endaligu ábyrgdina av, hvussu hesin rættur verður umsitin. Tað kann illa hugsast, at løgtingið hevur ætlað Tryggingarsambandi Føroyar heimild til tilvildarliga at krevja eykagjøld.

Misnøgd er ofta komin fram millum manna um tryggingargjøld og treytir í teimum ymsu tryggingarbólkunum. Ein spurningur, ið ofta hevur verið frammi, er um nøkur haldgóð grund er undir tí ógvuliga stóra muni í tryggingargjaldinum, sum Føroya Brunatrygging krevur fyri hús úr ymsum tilfari.

Útreiðslurnar hjá tryggingunum í Føroyum eru óvanliga høgar og er tað ti av størsta týdningi, at inunagóð tiltøk verða sett í verk, sum bøta kunnu um hetta. Ein skylda, sum ger, at onkrar tryggingar eru illa fyri samanborið við útlendskar tryggingar, er, at hesar kunnu vísa frá sær alt ov kostnaðarmiklar tryggingartakarar.

Nevndin hevur undir viðgerðini av hesum máli havt fundir við stjórarnar í Føroya Brunatrygging og Tryggingarsambandið Føroyar og við leiðaran á Bileftirlitinum um bilskaðar.

Í løgtingsmáli nr. 84/1979 hevur Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, sett fram lógaruppskot um meting av tryggingarskaðum. Nevndin hevur eisini havt hetta mál til viðgerðar og mælir til, at tað eisini verður tikið til viðgerðar av landsstýrinum sum niðanfyri tilskilað.

Eftir at nevndin fór til verka, var skjótt greitt, at uppgávan at kanna øll tryggingarviðurskifti var ov umfatandi, og avmarkaði nevndin tí sína uppgávu til at gera metingar um biltryggingar, brunatryggingar og myndugleikarnar yvir og eftirlitið við tryggingarsamtakinum.

1. *Biltryggingar:*

   a. Nevndin heldur, at neyðugt er fyri at minka um tryggingarútreiðslurnar, at lóggávan er soleiðis, at tryggingin ikki sum nú noyðist at gjalda fyri bilskaðar, framdir av førarum, ið hava verið ávirkaðir av rúsdrekka. Mælt verður til at innføra lógarreglu um, at førarum verður álagt innan 6 tímar frá tí, at skaðin er heldur, at melda seg til politivaldið og tá ikki verða ávirkaður av rúsdrekka.
   b. Tá so stórur munur er á prísinum á eykalutum, eigur møguliga at ásetast ójavnt tryggingargjald fyri ymisk bilsløg, ella at áseta eitt fast gjald fyri ávisar

eykalutir. Landsstýrið verður biðið um at kanna orsøkina til, at tað eru so stórir prísmunir á eykalutum, og hví verkstaðsímarnir í Føroyum t.d. eru 20% hægri enn í Danmark.

Higartil hevur tað verið so, at privatbilar og leigubilar hava verið nýttir til øll hesi endamál. Hetta er eingin góð loysn í longdini, seta tíðarkreviandi í mongum førum, og haraftrat eru samlaðu útreiðslurnar til tílíka koyring vorðnar so stórar, at tær lættliga fata upp um árliga raksturin av einum felags bili.

Tvey dømi: Støðisútbúgvingin einsamøll hevur í summarhálvárinum 1979 brúkt um 6.500 kr. til ymiska koyring (innsavning, ekskursiónir, vøruvognskoyring), sum ein stovnsbilur hevði kunnað tøkt. — Húsavørðurin, sum higartil hevur nýtt sín egna bil sum tænastubil uttan samsýning, hevur í sambandi við avtaluna frá 23.5.79 millum landsstýrið og Meginfelag starvs- og tænastumanna fylt út fyri september 1979 uppgetð yvir túrar í ørindum fyri stovnarnar. Talið er 57, ella 2-3 túrar um dagin í miðal. Við undantaksloyvi sbrt. §3 í avtaluni verður samsýning hansara sostatt fyri ein vanligan mánaða, sum september er, góðar 500 kr., tvs. at ein árssamsýning kemur upp á 5-6000 kr. Ein stovnsbilur loysir spurningin um tænastukoyringina hjá húsavørðinum.

Eftir gjølliga umhugsan eru vit komnir fram til, at bilurin, sum er nýtiligast hjá okkum, er ein VW-ALL-ROUND vøruvognur við setrum at

seta í og taka út eftir tørvi. Hann hevur pláss til eini 10 fólk og nakað av viðføri, og sum vøruvognur hevur hann sera hóskandi støddl. Prísurin er um **100.000 kr.** — Árligu takstrarútreiðslurnar verða mettar so: trygging 5000 kr., vegskattur 1000 kr., viðlíkahald 2000 kr., bensin til 16.000 km 6000 kr., tilsamans **14.000 kr.**

Semja er um, at tað skal vera húsavørðurin, sum hevur bílin undir hond og ber ábyrgdina av, at tær reglur, ið verða ásettar fyri nýtslu av honum, verða hildnar.

Vísandi til hesa umsókn hava vit sett tær neyðugu upphæddirnar í uppskoti til fíggjarætlan 1980/81 fyri Stovnarnar á Debesartrøð (felagsútreiðslur).

Ad § 15-2380: Heilsufrøðilig Starvsstova

Smbrt. skriv dagfest 2. oktobet 1979.

Kontonr. og -navn	Játtan 1978/79	Roknsk. 1978/79	Játtan 1979/80	Uppsk. 1980/81	Játtan 1980/81
790 Ymsar inntøkur	÷ 25,0	÷ 45,6	÷ 40,0	÷ 50,0	50,0
1014 Løn/starvsfólk	295,0	293,6	393,0	496,0	496,0
1015 Løn/avloysarar	20,0	11,7	20,0	20,0	20,0
1016 Løn/sáttmálalønt	130,0	142,8	140,0	285,0	155,0
1028 Løn/onnur	5,0	2,3	10,0	10,0	10,0
1040 Úrtíðarlønir	5,0	0,0	1,0	5,0	5,0
1120 Ferða- og dagpeningur	10,0	15,0	12,0	12,0	12,0
2030 Lýsingar	2,0	8,7	6,0	8,0	8,0
2150 Umsitingar	20,0	2,5	0,0	(20.0)20,0	20,0
2170 Ognartryggingar	3,0	0,8	3,0	3,0	3,0
2315 Prentlutir	5,0	1,6	5,0	5,0	5,0
2325 Postgjald	2,0	2,7	2,0	3,0	3,0
2335 Telefon og telex	13,0	14,0	11,0	22,0	22,0
2350 Sakkøn hjálp	10,0	0,0	5,0	10,0	10,0
2356 Aðrar skrivstovuútreiðslur	9,0	8,2	10,0	15,0	15,0
2508 Bókakeyp og innbinding	15,0	20,0	10,0	22,0	22,0
2530 Amboð	140,6	138,5	150,0	125,0	125,0
2537 Rannsóknir	0,0	÷ 5,9	(0,0) 0,0	50,0	0,0
2590 Aðrar útreiðslur	25,0	29,4	30,0	35,0	35,0
2592 Tænastuakfar rakstur	12,0	5,6	12,0	12,0	12,0
2593 Laboratoriirakstur	92,0	95,8	110,0	125,0	125,0
2380 Ialt	789,6	742,9	890,0	1233,0	1053,0
Brúkt procent		94,1 %			

Viðmerkingar

0790 **Inntøkur**
Væntandi hækka inntøkurnar við uml. 10.000 kr. til 50.000 kr.

1014 **Løn/sáttmálaløn**	Játtan 1979/80	Uppskot 1980/81
A. korrespondentur	95,0	111,0
B. laborantur, heilan dag	85,0	105,0
C. laborantur, heilan dag	85,0	105,0
D. laborantur, heilan dag	85,0	105,0
E. laborantur, hálvan dag	42,5	51,0
	393,0	477,0
Hædd fyri møguligum lønarhækkingum 4%		19,0
		496,0

Korrespondentur og laborantar eru nú lønt í 12. lønarflokki móti fyrr 9. lønarflokki. Hækkingin verður tí munandi móti árinum fyri.

1015 **Løn/avloysarar.** Óbroytt

1016 **Løn/sáttmálaløn**	Játtan 1979/80	Uppskot 1980/81
A. deildarleiðari (íroknað deildarleiðaraviðbót kr. 25.000 og eftirlønargjald 10%)	140,0	15
B. Eftirlitsfólk		130,0
		285,0

Neyðugt er við einum eftirlitsfólki við akademiskari útbúgving (bromatologi, verkfrøðingi, djóralækna, fiskaríkandidati ella farmaceuti). Hetta varð skotið upp longu við seinastu fíggjarætlan, men uppskotið varð ikki gingið okkum á møgi. Sum støðan er í dag, er javnan annar ella báðir deildarleiðararnir burturstaddir vegna arbeiði uttan fyri Starvsstovuna.
Hetta fólk skal hava eftirlitsarbeiði kring landið um hendur, til ymsar royndir (sí viðmerking til konto nr. 2537 rannsóknir) og ávís arbeiði á Starvsstovuni og umbiðin arbeiði.
Mett verður, at tað er avgerandi neyðugt við einum fólki afturat, so stundir betur verða til at taka sær av ymsum átroðkandi málum.

1028 **Løn/onnur**
Óbroytt. Kontoin verður nýtt til ymsar útreiðslur í samband við eftirlit og tøku av prøvum og tímalønta uppvaskihjálp.

1040 **Úrtíðarlønir**
Søkt varð um 6.000 kr. á fíggjarætlanini 1979/80, men einans 1.000 kr. vórðu játtaðar. Vit skjóta upp, at úrtíðarlønir verða settar

til 5.000 kr. Sum nevnt fyrr, kann verða neyðugt at fólk er á Starvsstovuni 1 tíma hvønn leygardag og sunnudag.

1120 **Ferða- og dagpeningur.**
Óbroytt.

2030 **Lýsingar**
Søkt verður um eina hækking upp á 2.000 kr. Peningurin verður m.a. nýttur til lýsingar í samband við frípláss á Statens Fagskole for Fiskeindustri í Vardø, Noregi. Talið av næmingaplássum trý tey seinastu árini hevur verið 3 í 1977/78, 3 í 1978/79 og 4 í 1979/80.

2150 **Húsannsiting**
Í viðmerkingunum seinasta ár varð biðið um at fáa flutt 20.000 kr., sum ikki vóru nýttar árið fyri. Søkt verður um at fáa peningin flutt-an yvir á hetta fíggjarárið (sí hjálagda kopi av brævi til landsstýrið dagfest 11/4 1979).

2170 **Ognartryggingar**
Óbroytt.

2315 **Prentlutir**
Óbroytt

2325 **Postgjald**
Søkt verður um eina hækking upp á 1.000 kr. til 3.000 kr.

2335 **Telefon og telex**
Søkt verður um eina hækking upp á 11.000 kr. til 22.000 kr. Roknskapurin pr. 30.9.79 vísir, at telefonútreiðslurnar longu eru komnar upp á kr. 8.267 móti teimum játtaðu 11.000 kr. fyri 1979/80 (75%).

2350 **Sakkøn hjálp**
Eingin peningur er nýttur í samband við sakkøna hjálp enn; søkt varð um 10.000 kr. seinasta ár, einans 5.000 kr. vórðu játtaðar.

Vit søkja í ár um 10.000 kr. og nevna samtíðis, at skulu vit hava møguleika at fáa sakkøna hjálp utaníffrá, er neyðugt við minst 10.000 kr. Søkt verður sostatt um 10.000 kr. við alternativum 0,0 kr. Spurningurin er, um Starvsstovan skal hava møguleika at fáa sakkøna hjálp skjótt, tá á stendur.

2356 **Aðrar skrivstovuútreiðslur**
Søkt verður um eina hækking upp á 5.000 kr. til kr. 15.000.

Ætlanin er at fáa útskift tvær útslitnar skrivimaskinur við nýggja elektriska skrivimaskinu (uml. 8.000 kr.).

2508 **Bókakeyp og útreiðslur**

	77/78	78/79	79/80	80/81
Søkt	15,0	15,0	15,0	22,0
Roknskapur	19,1	20,8		
Játtan	15,0	15,0	10,0	

Týdningurin at hava eitt gott stovnsbókasavn má ikki undirmetast. Tað var okkum ein smeitur, at játtaðar vórðu einans 10.000 kr.

seinasta ár móti uppskoti okkara 15.000 kr. (minimunstørvur). Einans tíðarritini (íroknað abstracts) kosta umleið 11.000 kr. Fakbøkur eru dýrar, í meðal 200 kr./stk. Víst verður annars til skriv til landsstýrið dagf. 19/4-79 um sama mál, við m.a. yvirliti yvir tíðarrit (avrit hjálagt). 25-30 fakbøkur + neyðug tíðarrit má sigast at vera avgjørt minstamark fyri tørvi okkara.

Listi verður gjørdur yvir tær fakbøkur, sum eru á Starvsstovuni í løtuni, og verður hann saman við tíðarritayvirlitinum sendur stovnum og fiskavirkjum til kunningar. Møguleiki verður síðan at lána bøkur frá H.S. gjøgnum bókasøvnini. Listi við afturatkomnum bókum verður somuleiðis regluliga at senda út. Bókasavnið er tó fyrst og fremst ætlað teimum, sum arbeiða á stovninum.

2537 **Rannsóknir**

Søkt verður um 50.000 kr. til ymiskar fiskiroyndir (m.a. lagtingsroyndir við ísaðum fiski, úrtøkuroyndir av ymsum fiskasløgum, kanningar um fiskalivur við Føroyar yvirhøvur er nýtilig til konserves vegna sandmaðk, royndir at nýta fiskaslógv (til djórafóður v.m.).

2590 **Aðrar útreiðslur**

Søkt verður um eina hækkan upp á 5.000 kr.

2592 **Tænastuakfar**

Óbroytt.

2593 **Laboratoriirakstur**

Søkt verður um eina hækkan upp á 15.000 kr. Víst verður til roknskapin fyri 1978/79, tá brúktar vórðu 95,8 móti teim játtaðu 92.0.

Tað skal verða sagt her eins og tey bæði undanfarnu árini, at um so er, at landsstýrið og fíggjarnevndin ikki halda seg til at kunna ganga umsóknini á møti (serstakliga viðvíkjandi fólki) meta vit tað sum sjálvsagt, at fíggjarnevndin heitir á okkum fyri at tosa um málið, áðrenn avgerð verður tikin. Heitt varð ikki á Starvsstovuna, hvørki seinasta ár (79/80) ella fyrrárið (78/79).

Somuleiðis skal verða nevnd, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan ikki heldur seg vera bundna at nýta allar játtanir, um so er, at mett verður í sjálvum fíggjarárinum, at ein játtan ella ein partur av eini játtan ikki nýtist at vera nýttur.

Viðmerking frá landsstýtinum:
konto 1016: Landsstýrið tekur ikki undir við einum eftirlitsfólki afturat.

Ad § 15-2390/3201 Barnabløð
Sbrt. skriv dagfest 10. okt. 1979:

Rakstrarroknskapur
fyri »Barnatíðindi« 1979

Inntøkur:

Lýsingar, blaðhald, søla	kr. 7875
Løgtingsstudningur	kr. 3000
	kr 10875

Útreiðslur:

Prenting, tilfarsrit	kr. 3000
Telefon	kr. 800
Telefon	kr. 780
Ljós, hiti	kr. 1200
Annað	kr. 100
Samsýning	kr. 4995
	kr. 10875

Ókeypis eintøk verða send teimum lýsandi.
Ókeypis eintøk verða send skúlabørnum.
Ókeypis eintøk verða send sjúkrahúsum.
Haldarar: 200, ársgjald kr. 15,-.

Ad 15-2390/3201 Barnabløð
Sbrt. skriv dagf. 20. sept. 1979 frá bókadeild Føroya Læratafelags.

Viðv. § 2390/3201
Vegna bókadeild Føroya Læratafelags fari eg at søkja um studning til Barnablaðið, kr. 20.000,-. Ætlanin er at vaksa eitt sindur um blaðið og gera tað til eitt barna- og ungdómsblað, av tí at so lítið lesitilfar er til henda aldursbólkin.
Ætlanin er at brúka studningin til hetta endamál.

Ad § 15-2390/3205 Útgáva av barnabókum.
Sbrt. skriv dagf. 20. sept. 1979:

Viðv. § 2390/3211
Vegna Bókadeild Føroya Læratafelags fari eg at søkja um studning til

bókaútgávu okkara við	**kr. 375.000**
Játtan 1980/81	kr. 350.000

Hetta er eitt sindur meira enn í fjøt.
Sum kunnugt fata skúlarnir nú undir at útvega sær skúlabókasøvn, men tíverri er lítið av føroyskum bókum til hesi søvn. Bókadeild Føroya

Læratafelags vil fegin bøta um henda tørvin og kann einans gera tað, um hetta arbeiðið verður stuðlað munandi fíggjarliga. Tí vóna vit, at umsóknin verður játtað.

Roknskapurin til skjals á landsskrivstovuni.

Ad § 15-2390/3206 Listasavn Føroya

Sbrt. skriv dagf. 7. oktober 1979:

Viðv. fíggjarlógini 1980.

Ein partur av tí játtan, ið ber navnið »Føroya Listasavn v.m.« hevur síðani 1956 verið studningur til listafólk, ið fáa sær útbúgving. Reglugerðin sigur, at Listafelagið lýsir studningin leysan og gevur umsóknunum viðmæli, meðan Landsstýrið ger av, hvør ið studning skal hava.

Listafelagið skjýtur upp, at studningurin eins og í verandi fíggjarlóg verður settur til **30.000** kr. Vit vita, hvørji eru undir útbúgving og vænta nakað sama tal av umsóknum sum í ár.

Ad § 15: 2390/3209: Doyvan av radioóljóði

Smbrt. skriv dagfest 18. september 1979.

Fíggjarløgtingslóg 1980/81

Vísandi til bræv landsstýrisins dagsett 4.9.79 skal stovnurin mæla til, at settar verða kr. 150.000,- á fíggjarløgtingslóg 1980/81 til doyvan av radioóljóði. Hetta er sama upphædd, sum mælt varð til at seta á núgaldandi fíggjarløgtingslóg.

Um so er, at eingin onnur reglugerð er fyri útvarpseftirlitið enn kunngerð nr. 1 frá 1. jan. 1957, er ikki heilt greitt hvussu eftirlitið skal tekast. Men sum tað nú er skipað, er ikki møguligt at haldda seg innan rammuna av galdandi játtan, kr. 100.000,-.

Higartil hevur doyvan av radioóljóði verið at funnið á fíggjarløgtingslógini undir § 15 (vísind, bókmentir og list), raksttarstað 2390 eftirlitið kom undir § 18 (handil, ídnaður o.t.) eins og arbeiðseftirlitið, bileftirlitið v.m.

Vísast skal í hesum sambandi til álit frá nevnditi viðv. privatradiosendarum dagsett 28. mai 1979. Sambært álitið er áðurnevnda kunngerð ótíðarhóskandi; mælt verður til, at hon verður endurskoðað og førd ajour í sambandi við eina umskipan av radioljóðeftirlitinum.

./. Hjálagt frágreiðing frá radioóljóðsefrirlitinum fyri árið 1978.

Ad § 15-2390/3211 Skúlabókaútgáva
Sbrt. skriv dagf. 28. sept. 1979:

Fyri Føroya skúlabókagrunn skal eg, eftir at nevndin hevur kannað um tær útreiðslur, ið ætlandi koma at verða fíggjarárið 1980/81, heita á landsstýrið um at seta á fíggjarløgtingslógina
sum studningsveitan..... 600.000,00 kr.

Hjálagt verður sent landsstýrinum:
1. Yvirlit yvir væntandi útreiðslur hjá Føroya Skúlabókagrunni 1980/81.
2. Roknskapur fyri 1978/79.
3. Yvirlit yvir bøkur, sum Føroya Skúlabókagrunnur eigur á goymslu hjá BMS 1. apríl 1979.
4. Yvirlit yvir útkomnat bøkur í 1979.
5. Yvirlit yvir bøkur, ið eru til prentingar.
6. Yvirlit yvir handrit, ið arbeitt verður við.

Yvirlit yvir væntandi útreiðslur hjá Føroya Skúlabókagrunni 1980/81.

1. Renta av kassakreditti í Sjóvinnubankanum	3000,00 kr.
2. Renta av kassakreditti í Føroya Banka.....	22000,00 kr.
3. Til bókaútgávu og niðurskurð av millumrokning við landskassan	575000,00 kr.
	600000,00 kr.

Upplýst kann vera, at løgtingsstudningurin í 1977/78 var 602000,00 kr
í 1978/79 ..... 525000,00 kr.
og í 1979/80..... 600000,00 kr.

Av tí at tað vísir seg at vera ógvuliga ilt at siga við vissu eitt ár frammanundan hvørjar bøkur verða lidnar av teimum, sum ætlanin er at prenta í árinum, vóna vit, at landsstýrið skilir tað natútliga í, at útreiðslurnar hjá grunninum summi ár eru størri enn onnur.

Av tí at sølan av bókum nú er økt so væl, meta vit, at vit fara at hjálpast við 600000,00 kr. í 1980/81.

Roknskapurin til taks á Landsskrivstovuni.

Ad § 15-2390/3217: Orðabókaútgáva
Smbrt. skriv dagfest 18. oktober 1979.

Umsókn um játtan á fíggjarlógini 1980/81
til útgávu av orðabókum

Við hesum loyvir Fróðskaparfelagið sær at endurnýggja umsókn sína frá 6.

oktober 1978 (ljósprent hjálagt) — helst við einum uppískoyti uppá 12.000 kr. til fyrru upphæddina í umsóknini, soleiðis at umsóknarupphæddin verður:

		játtan 1980/81
Til útkomnar orðabøkur	80.000 kr.	
Í grunn til komandi útgávur	20.000 kr.	
Tilsamans	**100.000 kr.**	**88.000**

Í hesum viðfangi er at viðmerkja, at tað tívetri einans hevur eydnast felagnum at útvega 15.000 kr. (og ikki 50.000 kr., sum vit vónaðu) aftrat teim 130.000 kr., sum peningastovnarnir hava givið til útgávuna av teimum báðum orðabókunum, føroysku-donsku og donsku-føroysku.

Tað eigur eisini at verða nevnt her, at í sambandi við komandi orðabókaútgávur er ógvuliga umráðandi at fáa — eins og áðrari 1966—1975 — eina fasta játtan í grunn.

Tað, sum fyrst liggur fyri at geva út, er enska-føroyska orðabókin, sum er komin heilt væl áleiðis. Alt tilfar til og arbeiði av handritagerðini er og verður goldið av Orðabókagrunninum, ið sbrt. fundatsinum frá 1959 (eintak hjálagt) fær allan avlopspening av orðabókasølu at nýta til føroyskt orðabókaarbeiði, men ikki -útgávu.

Ad § 16-2401: Vrakarastovnurin

Smbrt. skriv dagfest 5. november 1979:

Rakstrarstað 2401 Konto	Roknsk. 1978/79	Játtan 1979/80	Uppskot 1980/81	Játtan 1980/81
1004 Tænastumenn	804,0	810.000	895.000	895.000
1015 Avloysarar	58,6	70.000	80.000	80.000
1120 Ferða- og dagp.	109,8	100.000	110.000	110.000
2120 Leiguútreiðslur	24,0	25.000	28.000	28.000
2325 Postgjald	0,7	2.000	2.000	2.000
2325 Telefon v.m.	22,1	20.000	25.000	25.000
2356 Aðrar útreiðslur	40,3	-	25.000 1)	0.0
2356 Upplæring	-	-	20.000 2)	0.0
2356 Tænastubil	-	-	20.000 3)	0.0
	1.059,5	**1.027.000**	**1.205.000**	**1.140.000**

Viðm. 1. Her verður hugsað um elektroniskt mátitól til meting av góðskuni í fiski á teim ymsu aldursstigum.

Viðm. 2. Nógv ymisk nýggj fiskasløg og harav nýggjur viðgerðarháttur, og eisini keyparaynskir gera tað neyðugt við upplæting, útbúgving og upplýsandi arbeiði innan vrakarastættin. Tað er tí

neyðugt við skeiðvirksemi og eisini vitja á skeiðum uttanlands, tá tað er gjørligt, bæði fyri vrakieftirlitsmenn og góðskumetarar.

Viðm. 3. Ætlaðar útreiðslur til tænastubilin.

Ad § 16-2410: Nautiskt royndarkamar

Smbrt. skriv dagfest 21. september 1979.

Vísandi til tygara skriv jnr. 400-28-63 viðv. uppskoti til fíggjarløgtingslóg 1980/81, konto 16-2, rakstrarstað nr. 2410, skal hervið sigast frá, at útreiðslur Nautisk Royndarkamars nakað sum seinasta ár kunna setast til:

Samsýning, goldið beinleiðis av Gjaldstovuni	6600 kr.
Rakstrarútr., húsaleiga, el, reingerð, telf. transportur	4400 kr.
Viðlíkahald av reiðskapi og kumpashúsi	6000 kr.
Prøvgjald	1000 kr.
	ialt 16000 kr.

Ad § 16-2420: Sjómannsheim

Smbrt. skriv dagfest 20. september 1979 frá Hini Føroysku Sjómansmissiónini.

Fyrst vilja vit takka hjartaliga fyri studningin, sum vit fingu á fíggjarløgtingslógini 1979/80 til sjómansheimið Lívd í Føroyingahavnini og til arbeiðið í Reykjavík og Lerwick.

Til komandi fíggjarløgtingslóg 1980/81, § 16-2420, loyva vit okkum at biðja um niðanfyri nevnda studning við somu upphædd sum seinasta ár.

1. Til sjómansheimið »Lívd« í Føroyingahavnini	kr. 80.000,00
2. Til sjómansheimið í Reykjavík og arbeiðið í Lerwick	kr. 10.500,00
tilsamans	**kr. 90.500,00**

Rakstrarroknskapur fyri omanfyri nevndu sjómansheim og arbeiðið í Lerwick er sendur Landsstýrinum hin 28. mai í ár.

— — —

Smbrt. skriv móttikið 21. september 1979 frá Kitkjuliga missiónsfelagnum.

Vísandi til sktiv okkara dagfest 22. sept. 1978 viðvíkjandi rakstrarstaði gr. 16-2420 á fíggjarløgtingslógini, loyva vit okkum aftur í ár at søkja um

somu upphædd sum í fjør, og takka fyri tað, sum okkum er latið, og sum vit framvegis kunnu fáa.

Viðmerking frá landsstýrinum:

Hin Føroyska Sjómannsmissiónin	90.500 kr.
Bygging av sjómannsheimi í Reykjavík	35.000 kr.
Kirkjuliga missiónsfelagið	10.500 kr.
	136.000 kr.

Ad § 16-2420: Sjómannsheim

Smbrt. skriv dagfest 24. september 1979 frá byggineyndini fyri føroyska sjómannsheimið í Reykjavík.

Byggineyndin fyri føroyska sjómannsheimið í Reykjavík vil her vinsamligast heita á háttvirda landsstýri um ein árligan stuðul til framhald av bygging av sjómannsheiminum, sum nú er komin so langt, at tað verður liðugt til at tekja fyri veturin, og er skuldleys ogn.

Neyndi stuðul vit biðja um, er um gjørligt kr. 100.000 (hundraðtúsund) pr. át, til húsið er liðugt til starvs.

Vit leggja við autoriseraðan roknskap frá byrjan til árslok 31/12-78. Vit takka hjartaliga fyri munandi undanfarnan stuðul og vóna, at Landsstýrið framvegis fíggjarliga er fært fyri at veita okkum umbidna stuðul.

Ad § 16-2430: Vaktar- og bjargingartænastan

Smbrt. skriv ódagfest.

Fíggjarætlan fyri
Vaktar- og Bjargingartænastuna
1980/81

Skrivstovan	kr. 445.000,-	kr. 1345.000,-
Flúgving	kr. 700.000,-	
Aldumálarar		kr. 125.000,-
Bjargingarfeløg	kr. 75.000,-	kr. 1.345.000,-
Tjaldrið		kr. 5.699.000,-
Ólavur Halgi		kr. 5.012.000,-
		kr. 12.056.000,-

Fíggjarætlan fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna 1980/81

Skrivstovan	kr. 445.000,-	
Flúgving	kr. 700.000,-	
Aldumálarar	kr. 125.000,-	
Bjargingarfeløg	kr. 75.000,-	kr. 1.345.000,-
Tjaldrið		kr. 5.699.000,-
Ólavur Halgi		kr. 5.012.000,-
		kr. 12.056.000,-

Fíggjarætlan fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna

Skrivstovan, rakstrarstað 2430

Konto - navn	Roknsk. 1978/79	Játtan 1979/80	Uppskot 1980/81
790 Inntøkur	600.000,-		
1004 Løn/Tænastumenn	157.400,-	180.000,-	180.000,-
1014 Løn/Starvsfólk	135.100,-	140.000,-	140.000,-
1028 Løn/onnur	21.000,-		
1105 Útiviðbót	5.000,-		
1120 Ferða- og dagpeningur	6.000,-		
2180 Leiguútreiðslur	3.000,-		
2305 Innbúgv	8.100,-	15.000,-	15.000,-
2315 Prentlutir	4.000,-	10.000,-	10.000,-
2335 Telefon og telex	37.000,-	40.000,-	30.000,-
2533 Leiga av førum	209.500,-	700.000,-	700.000,-
2590 Aðrar útreiðslur	49.400,-	30.000,-	30.000,-
2596 Aldumálari	94.400,-	75.000,-	125.000,-
2598 Bjargingarfeløg	72.500,-	75.000,-	75.000,-
3315 Veðurprogram	27.800,-	40.000,-	40.000,-
	230.200,-	**1.305.000,-**	**1.345.000,-**

Her er ein hækking á konto 2596/aldumálari, tað kemst av, at útreiðslurnar eru vaksandi til hetta tiltakið.

Fíggjarætlan fyri
Vaktar- og Bjargingartænastuna

»Tjaldrið» takstrarstað 2431 Konto - navn	Roknsk. 1978/79	Játtan 1979/80	Uppskot 1980/81
790 Inntøkur	425.000,-		
1014 Løn/starvsfólk	1.980.300,-	2.150.500,-	2.618.000,-
1015 Avloysarar	150.400,-	180.000,-	220.000,-
1040 Úrtíðarløn	52.300,-	50.000,-	50.000,-
1210 Skeið	12.500,-	10.000,-	20.000,-
2170 Trygging	290.900,-	300.000,-	300.000,-
2510 Kostur	142.800,-	132.300,-	152.000,-
2530 Amboð	77.800,-	60.000,-	60.000,-
2541 Olja	806.300,-	933.700,-	1.634.000,-
2542 Dekksútgerð	75.700,-	110.000,-	115.000,-
2543 Maskinútgerð	66.500,-	70.000,-	80.000,-
2544 Skipasmiðjuútreiðslur	306.900,-	300.000,-	300.000,-
2590 Aðrar útreiðslur	185.600,-	200.000,-	150.000,-
	3.723.000,-	**4.496.500,-**	**5.699.000,-**

Hetta er ein merkbar hækking á konto 1014/løn - starvsfólk og kemur hetta mest av tí nýggja sáttmálanum millum Landsstýrið og Starvsmannafelagið. Ein onnur hækking er oljan, taka vit prísin á olju í dag og prísin fyri einum ári síðani, so er tað ein hækking uppá 80%.

Viðv. Tjaldrinum, so má havast í huga, at skipið stendur fyri [illegible]ari munandi ábót, sum vit ikki í løtuni eru førir fyri at meta um kostnaðin av, møguliga ikki undir kr. 1.000.000,-.

Fíggjarætlan fyri
Vaktar- og Bjargingartænastuna

»Ólavur Halgi« rakstrarstað 2433

Konto - navn	Roknsk. 1978/79 (1/11-78 31/3-79	Játtan 1979/80	Uppskot 1980/81
790 Inntøkur	47.100,-		
1014 Løn/starvsfólk	593.800,-	1.850.000,-	2.570.000,-
1015 Avloysarar	8.000,-	100.000,-	220.000,-
1040 Úrtíðarløn	11.500,-	30.000,-	50.000,-
1210 Skeið	2.200,-	10.000,-	20.000,-
2170 Trygging	96.800,-	140.000,-	220.000,-

2510 Kostur	82.300,-	126.000,-	152.000,-
2530 Amboð	35.200,-	60.000,-	60.000,-
2541 Olja	444.3000,-	600.000,-	1.050.000,-
2542 Dekksútgerð	28.500,-	80.000,-	80.000,-
2543 Maskinútgerð	28.000,-	70.000,-	70.000,-
2544 Skipasmiðjuútreiðslur	52.200,-	300.000,-	400.000,-
2590 Aðrar útreiðslur	128.400,-	130.000,-	120.000,-
	1.464.100,-	**3.496.000,-**	**5.012.000,-**

Hetta er ein merkbar hækking á konto 1014/løn - starvsfólk og kemur hetta mest av tí nýggja sáttmálanum millum Landsstýrið og Starvsmannafelagið. Ein onnur hækking er oljan, sum er hækkað umleið 80% síðani í fjør.

Viðmerking frá landsstýrinum

Umsóknin er uppá	kr.	12.056.000
Játtan til 1 starvsfólk	kr.	80.000
Umvæling av »Tjaldrinum«	kr.	1.000.000
Mettar inntøkur	kr. =	1.500.000
Játtan	kr.	11.636.000

Ad § 16-2440: Laksa- og sílaaling

Smbrt. skriv dagfest 2. oktober 1979

	Roknsk. 1978/79	Játtan 1979/80	Uppskot 1980/81
P/f Fiskaaling	300	500	500

Viðmerkingar:

Sum kunnugt hendu 2 óhapp norði á Oyrabakka í 1977, sum gjørdu, at vit mistu nógvan laks og nógv síl. Hetta gjørdi, at felagið hevði stórt hall bæði í 1977 og í 1978. Í ár hevur gingist betur, men tíverri hevur kaldi sjógvurin í ár gjørt, at vøksturin hevur verið minni enn vanligt. Kortini vænta vit betri úrslit enn seinastu 2 árini. Av hesum mæla vit til, at studningurin verður settur niður úr kr. 300.000,- í kr. 200.000,-.

Landsstýrið hevur givið 4 feløgum loyvi til laksa- og sílaaling. Av hesum ætla 3 bert at hava laksaaling. Ætlanin hjá teimum er at keypa smolt (sjóbúnan laks) frá p/f Fiskaaling. Um vit skulu hava nóg nógvan smolt at lata, er neyðugt at byggja kleki- og alistøð sum skjótast. Ein slík støð er nú í gerð norðuri við Áir. Á verandi fíggjarlóg eru játtaðar kr. 200.000,- til hesa bygging. Ætlanin er, at játtast skulu kr. 200.000,- um árið í 5 ár til støðina. Játtanin í 1980/81 verður sostatt 2. árið.

Ad § 16-2460: Fiskivinnuráðið

Fiskivinnuráðið
Fíggjarárið 1980/81

1/2 starvsfólk	kr.	40.000,-
Eykahjálp	kr.	20.000,-
Telefon v.m.	kr.	2.000,-
Samsýning, formaður	kr.	18.000,-
Samsýning aðrir ráðslimir	kr.	72.000,-
Ferðapeningur og vistarhald	kr.	20.000,-
Samanlagt	kr.	172.000,-

Ad § 16-2490: Minstaløn v.m.

Smbrt. skriv dagfest 25. oktober 1979.

Sbrt. skriv háttvirda landsstýrisins dagf. 4. september 1979 seta vit niðanfyri útreiðslurnar 1978/79:

Minstaløn	4.060.364,85
Minstivinningur útróðrarmanna	82.391,00
Prísískoyti til saltfisk	2.481.033,00
Útróðrarstudningur	5.045.634,06
Landingarstudningur, mynstraði skip	6.371.588,00
Flakastudningur	111.604,00
Hemara- og svartkalvastudningur	57.068,00
Jákupskeljastudningur	258.460,00
Ídnaðarstudningur	3.717.377,55
Brennioljustudningur	8.480.759,50
Frítíðarløn	745.905,00
Studningur til Ráfiskagrunnin	48.122.000,-
Fyrisæti	872.804,00
Rentuútreiðslur	357.683,52
Avsktiving uppá innbúgv	3.100,00
	80.767.773,41

Útgoldið frá 1. apríl til 31. august 1979:

Minstaløn	1.984.613,00
Minstivinningur útróðrarmanna	109.402,00
Prísískoyti til saltfisk	177.707,00

Hemara- og svartkalvastudningur	75.165,00
Flakastudningur	77.275,00
Útróðrarstudningur	1.298.343,64
Landingarstudningur, mynstraði skip	3.244.951,00
Frítíðarløn	808.772,00
Brennioljustudningur	5.299.402,27
Ídnaðarstudningur	4.674.767,00
Jákupskeljastudningur	29.040,00
Agnstudningur	202.499,00
Studningur til Ráfiskagrunning	19.000.000,00
Fyrisæti	484.910,73
Rentuútreiðslur	56.030,10
	37.522.877,74

Viðmerkingar frá landsstýrinum

Landsstýrið hevur mett játtanina út frá núgaldandi skipan.

Ad § 16-3302: Studningur til grunnin til endurnýgging av fiskiskipaflotanum

	Byggipeningur	Studningur
Føroyar	65.000.000	9.260.000 *)
Frakland	14.000.000	2.800.000
Tekniskat innleggingar		10.000.000
Bátat		500.000
		22.560.000

Ad § 17-2501: Landsdjóralæknaembætið

Smbrt. skriv dagfest 27. september 1979.

Konto	Roknsk. 1978/79	Játtan 1979/80	Uppskot 1980/81	Játtan 1980/81
1004 Løn/tænastumenn	187.7	190.0	219.0	219.0
1015 Løn/avloysara	0.0	0.0	20.0	0.0
1016 Løn/sáttmálaløn	138.7	140.0	153.0	153.0
1120 Ferða- og dagpeningur	13.7	20.0	20.0	20.0
2180 Leiguútreiðslur	3.0	3.0	3.0	3.0
2325 Postgjald	0.1	1.0	1.0	1.0
2335 Telefon/telex	3.0	5.0	5.0	5.0
2590 Aðrar útreiðslur	1.3	4.0	4.0	4.0
	347.5	**363.0**	**425.0**	**405.0**

Viðmerkingar:

Ad. 1004: 1 landsdjóralækni

Ad. 1016:	1 deildarleiðari, sáttmáli	113.639,73
	eftirlønargjald	11.363,97
	viðbót	25.000,00

Ad. 2590: Lýsingar, skrivstovulutir, prent, tíðarrit v.m.

Ad § 17-2504: Landbúnaðarráðgevari

Smbrt. skriv dagfest 27. september 1979 frá Royndarstøðini:

Uppskot til figgjarætlan 1980/81
viðvíkjandi Landbúnaðarráðgevaranum

Eiti á útreiðsluni:	Roknsk. 1978/79	Játtan 1979/80	Uppskot 1980/81	Játtan 1980/81
1004 Løn/tænastumann	125.300	135.000	140.000	140.000

Ad § 17-2505: Seyðaráðgevari og seyðatoyndir

Smbrt. skriv dagfest 13. oktober 1979.

Konto 1028: Roknskapur 1978/79.

Løn, onnur, ferðaútreiðslur, tlf. o.a.	8.505,30 kr.
Ávíst til Seyðaalistøðina á Oyri *)	1.494,70 kr.
	10.000,00 kr.
Konto 1050: Samsýningar	36.000,00 kr.
Konto 2590: Royndartæðing á Oyri og á Sandi, 1978	6.600,00 kr.
Seyðaalistøðin, Oyri 2 el-fáreklipper	2.986,50 kr.
bráð- og blóðsóttavaksin v/sproytu	7.985,50 kr.
2 brundseyðir	1.600,00 kr.
koyring, Dávur Emil Samuelsen	300,00 kr.
Seyðahúslán, Føroya Jarðarráð	12.717,60 kr.
Royndartæðing 1979	6.040,00 kr.
Herav goldið av konto 1028 *)	1.494,70 kr.
Konto 2590 í alt	**29.547,90 kr.**
Útgoldið meira enn játtað	549,90 kr.

Játtan 1979/80:

Konto 1050	Samsýningar	40.000 kr.
1120	Ferða- og dagpeningar	10.000 kr.
2590	Aðrar útreiðslur	40.000 kr.
		90.000 kr.

Uppskot 1980/81:

Konto 1050 Samsýningar	60.000 kr.	j. 40.000 kr.
Konto 1120 Ferða- og dagpeningur	15.000 kr.	10.000 kr.
Konto 2590 Aðrar útreiðslur	50.000 kr.	45.000
Tilsamans	125.000 kr.	95.000 kr.

Ad § 17-2510: Útskifting og matrikulstova

Smbrt. skriv dagfest 8. oktober 1979.

Rakstrarstað 2510 konto 2694	Roknsk. 1979/80	Játtan 1979/80	Uppskot 1980/81	Játtan 1980/81
1004 Løn/tænastumenn	560.581,-	662.000,-	754.275	754.275
1014 Løn/starvsfólk	1.849.232,-	1.915.000,-	2.222.038	2.222.038
1022 Løn/reingerð	48.173,-	40.000,-	55.000	55.000
1028 Løn/bønafólk	40.390,-	60.000,-	60.000	60.000
1120 Ferða- og dagpeningur	123.065,-	105.000,-	120.000	120.000
2180 Leiguútreiðslur	148.673,-	140.000,-	200.000	200.000
2110 El, hiti og vask	17.363,-	10.000,-	25.000	25.000
2530 Amboð	143.915,-	110.000,-	150.000	110.000
2592 Tænastuakfar	78.475,-	20.000,-	80.000	80.000
2512 Tilfar til skrivst.	55.880,-)		60.000)	
2512 tilfar til uppmáling	42.671,-)	350.000,-	40.000)	
2512 Tilfar til fotok.-litm.	0,-)		75.000)	300.000
2512 Kortkonstr. luftfoto	343.157,-)		225.000)	
2325 Postgjald	11.594,-	10.000,-	15.000	15.000
2335 Telefon, lýsingar o.a.	34.170,-	30.000,-	35.000	35.000
2590 Aðrar útreiðslur	64.820,-	30.000,-	70.000	50.000
790 ÷ Inntøkur	1.070.140,-	900.000,-	1.000.000 ÷	1.000.000
	2.492.019,-	2.602.000,-	3.186.313	3.026.313

Viðmerkingar til uppskotið

Roknað er við hesi manning:

Tænastumenn:

stjóri	34. lønarrammu
2 landmálarar	31. lønarrammu
2 hjálparlandmálarar	20. lønarrammu

Sáttmálalønt fólk

3 landmálarar — løntir eftir sáttmála fyri »Statsansatte landinspektører».

5 hjálparlandmálarar — løntir eftir sáttmála millum Landsstýrið og Teknikarafelagið.

3 næmingar — løntir eftir sama sáttmála.

3 teknarar — løntir eftir sama sáttmála.

1 teknínæmingur — løntur eftir sama sáttmála.

1 skrivstovufulltrúi løntur eftir sáttmála millum Landsstýrið og Starvsmannafelagið.
5 skrivstovufólk — lønt eftir sama sáttmála (harav 2 arbeiða 1/2 dag(.

Lønir roknaðar eftir prístalinum 1. okt. 1979, lønarhækkingum 1. juli og 1. apríl 1980.

Tænastumenn:	kr.	
stjóri	179.797,-	
landmálari 1	164.042,-	
landmálari 2	164.042,-	
hjálparlandmálari 1	123.197,-	
hjálparlandmálari 2	123.197,-	
	754.275,-	
Starvsfólk:		
landmálari 3	199.936,-	(íroknað
landmálari 4	144.233,-	(íroknað eftirløn)
landmálari 5	144.233,-	(íroknað eftirløn)
hjálparlandmálari 3	117.027,-	
hjálparlandmálari 4	117.027,-	
hjálparlandmálari 5	117.027,-	
hjálparlandmálari 6	117.027,-	
hjálparlandmálari 7	110.789,-	
hjálparlandmálaranæmingur 1	53.902,-	
hjálparlandmálaranæmingur 2	70.609,-	
hjálparlandmálaranæmingur 3	42.279,-	
teknari 1	110.608,-	
teknari 2	110.608,-	
teknari 3	88.233,-	
teknimæmingur 1	70.069,-	
skrivstovufulltrúi 1	121.845,-	
skrivstovufólk 1	113.818,-	
skrivstovufólk 2	53.486,-	(arbeiðir 1/2 dag)
skrivstovufólk 3	51.936,-	(arbeiðir 1/2 dag)
skrivstovufólk 4	86.087,-	
skrivstovufólk 5	86.603,-	
fotoarbeiði o.a.l.	94.647,-	
	2.222.038,-	
Tilsamans		**2.976.313,00**

Viðmerkingar:
1004-1014 Hvat lønunum viðvíkur verður víst til yvirlitið framman fyri, og verður viðmerkt, at prístalshækkingar og lønathækkingar sambært

sáttmála eru taldar við, og somuleiðis er í tænastumannalønini roknað við eini lønarhækking, ið svarar til tað, sum starvsmenn hava fingið, hóast sáttmálin enn ikki er broyttur. Tað sama er galdandi fyri sáttmálaløntar landmálarar og teknarar.

1022 Her verður víst á, at í roknskapinum 1978/79 eru nýttar kr. 48.000,- í lønum.

1028 Bønafólk verður helst nýtt í sambandi við marknasetingar, tá útskiftingarnar eru loknar innangarðs, og eru útreiðslurnar eitt sindur ójavnar ár um ár.

1120 Her verður víst til roknskapin 1978/79, har nýttar eru kr. 123.000,-.

2180 Landsstýrið hevur í hesum fíggjarárinum gjørt nýggjan leigusáttmála við P/f Dygd, og er leigan hækkað úr kr. 280,- til kr. 340,- pr. m².

2530 Her verður bókað innbúgv, skrivi- og roknimaskinur og landmálingsinstrument, ið eru dýr í innkeypi. Ein elektroniskur longdarmálari kostar soleiðis um kr. 70.000,-.

2592 Matrikulstovan hevur havt 4 bilar, og varð tað hildið hóskandi at nøkta tørvin. Koytt verður nú við 3 bilum. Samstundis verður gjørt vart við, at tann elsti bilurin vit nú hava verður útskiftur í komandi ári, og er í uppskotinum roknað við keypi av einum vøruvogni.

2512 Á hesi konto vórðu seinasta ár játtaðar kr. 350.000,-. Her er talan um tilfar til skrivstovuna, tilfar til uppmáling og tilfar til fotodeildina — tilsaman kr. 175.000,-. Harumframt kemur kortkonstruktión, luftfotografering o.a., ið er arbeiði sum fyri ein stóran part hevur verið gjørt uttanlendis, við tað, at vit ikki eiga tey tól, ið eru neyðug til hetta endamálið. Talið av bygdum, ið eru eftir at kortleggja, minkar í hvørjum, soleiðis at útreiðslurnar til nýggj matrikulkort og projekteringskort fara at minka sum frálíður. Men alt korttilfar skal haldast ajour, og aðrar kortteknískar uppgávur liggja á láni, ella verða gjørdar uttanlands. Matrikulstovan vil seinni í samráð við aðrar landsstovnar koma við uppskoti um skipan av eini kartografiskari deild, ið kann verða før fyri at taka sær av øðrum kortteknískum uppgávum, enn vit higartil hava verið førir fyri at avgreitt.

Teir niðurskurðir, sum eru gjørdir í uppskoti til fíggjarætlan fyri Matrikulstovuna seinastu árini, hava serliga rakt konto fyri amboð og kortkonstruktión v.m., og skerjir hetta møguleikan hjá Matrikulstovuni at útbyggja kortdeildina, so vit eisini kunnu taka okkum av øðrum uppgávum enn tær, ið ólagdar eru viðvíkjandi útskifting, matrikulering og umsiting av mattrikli.

790 Inntøkurnar eru ætlaðar til 1.000.000,- kr., av hesum umleið 500.000,- kr. fyri sundurbýtisgjøld o.a. Í árinum 1978 vórðu frábýtt 516 nýggj matr. nr., mest til grundstykki, 35 brúk nr., 96 samanleggingar, 753 marknaumskipanir, 52 marknaetingar og 8 vegsakir, og er kostnaðurin av hesi umsitingini nógv størri enn inntøkan.

Tey gjøld Matrikulstovan tekur, munnu neyvan liggja hægri enn 20-25% í mun til tilsvarandi gjøld t.d. í Danmark.

Hinar inntøkurnar stava frá útskiftingum og matrikuleringum, sølu av myndum og kortum.

Ad § 17-2520: Royndarstøðin í Hoyvík

Smbrt. skriv dagfest 27. september 1979.

Uppskot til fíggjarætlan 1980/81
viðvíkjandi Royndarstøðini

1014 Løn/starvsfólk	447.000	490.000	632.000
1028 Løn/onnur	26.400	28.000	30.000
2140 Umvælingar v.m.	36.000	45.000	40.000
2513 Brúkstilfar (leysafæ)	7.500	18.000	18.000
1120 Ferða- og dagpeningur	22.900	25.000	30.000
2060 Borðfæ	2.000	2.000	2.000
2170 Ognarrygging	10.200	14.000	15.000
2305 Innbúgv	0	0	4.000
2315 Prentlutir	7.600	6.000	9.000
2325 Postgjald	4.000	4.500	6.500
2335 Telefon og telex	13.300	9.500	14.000
2356 Aðrar skrivstovuútreiðslur	13.600	6.000	9.000
2525 Sáðing	50.500	45.000	55.000
2527 Vakstrarhúsútreiðslur	143.300	90.000	100.000
2528 Ísáðingarútreiðslur	107.800	120.000	135.000
2529 Nýkeyp	98.900	50.000	125.000
2590 Aðrar útreiðslur	36.800	30.000	45.000
2592 Tænastuakfør, rakstur o.a	12.200	16.000	24.000
	1.040.000	**999.000**	**1.293.500**
790 Inntøka	200.600	100.000	140.000
	Studningur	**899.000**	**1.153,500**

Viðmerkingar:

1004 Løn til landbúnaðarráðgevaran

1014 1 starvsfólk í 12. lønarflokki
2 starvsfólk í 9. lønarflokki
4 starvsfólk í 7. lønarflokki
Her er 1 fólk meiri enn í fjør, av tí at ísáðingin í Eysturoy og Streymoy skuldi gerast av stovninum.

1028 Løn til reingerð og hjálparfólk um summarið.
2140 Umvæling og viðlíkahald av øllum bygningunum.
2513 Brúkstilfar til allar deildirnar
1120 Ferðaútreiðslur innanoyggja og koyrigjald til ísáðarar
2170 Fluttnings-, bil-, maskin-, húsa- og fólkatrygging
2305 Skrivstovuinnbúgv til allar deildirnar
2315 Tíðartit, bøkur, fotokopiering v.m.
2325 Meginparturin brúktur í neytaeftirlitinum
2335 Stórur partur brúktur í uttanlandssamtalum vegna arbeiði í vakstrarhúsinum
2525 Tøð, fóður, brundir, kálvar v.m.
2527 Rakstrar- og viðlíkahaldsútreiðslur
2528 M.a. neytasáð (100.000) og køvievni
2529 Keyp av nýggjum amboðum og maskinum. Bilurin hjá stovninum má skiftast út í fíggjarárinum, og er eisini ætlanin at keypa tól at kanna innihaldið av taðingarevnum í mold.
2590 M.a. eisini til skeið uttanlendis og upplæring av ísáðarum
2592 Rakstur av tænastuakførum. Nú er ein bilur afturat vegna ísáðingatarbeiði.

<u>Ad § 17-2590/3401-3406: Landbúnaðarstudningur</u>

Smbrt. skriv dagfest 15. november 1979.

Við hesum verður latið vitað, at fíggjarætlanirnar fyri 1980/81 nú eru gjørdar fyri:

mjólkarstudningin
studningin til súrhoyggjabrunnar
veltistudningin
húsdýralógina
íløguna til jarðargrunnin
rentustudningin og
framleiðslunevnd búnaðarmanna

og ein uppgerð yvir meitnýtsluna fyri 1978/79.

	Roknsk. 1978/79	Játtan 1979/80	Fíggjarætlan 1980/81
studn. til mjólk, flutn., kjøtstudn.o.a.	1.486.877,06	2.100.000,00	2.200.000,00
studn. til súrhoysbr.	274.561,64	300.000,00	450.000,00
studn. til nýdyrkan, bøumvæling, køstar og landbr.	1.015.378,45	1.300.000,00	1.500.000,00
húsdýralógin	139.763,50	100.000,00	200.000,00
íløgur til Jarðargr. . . .	3.000.000,00	3.000.000,00	5.000.000,00
rentustudningur	800.000,00	700.000,00	800.000,00
framleiðslunevnd búnaðarmanna meitnýtsla fyri 1978/79 . .		550.483,43	
	6.716.580,65	8.050.483,43	10.250.000,00

Viðmerkingar til mjólkarstudningin:

Mjólkarmongdin er mest at kalla tann sama sum seinasta ár. Vøksturin, sum hevur verið seinastu árini, steðgaði á, mest orsakað av vánaligu fóðurstøðuni seinasta vetur. Eisini má roknast við at vøksturin, orsakað av nýggjum neytabrúkum, ikki verður javnur ár um ár, men heldur yvir eitt áramál. Talan er tí helst um eina seinking í vøkstrinum. Tað, at studningsupphæddin til mjólkarsølu er kr. 100.000,00 minni, skyldast, at tað vóru um 113.000 l minni ostamjólk í 1978/79 enn í 1977/78. Studningurin til ostamjólk er kr. 1,00/kg, til konsummjólk kr. 0,15/kg.

Neytakjøtsmongdin sýnist at liggja javnt, um 80.000 kg árliga.

Meitinýtslan fyri 1977/78 var kr. 587,10, og fyri 1978/79 kr. 274.669,16.

Í verandi fíggjarári er javningarstudningurin hækkaður frá 5 til 15 oyru/kg, og neytakjøtsstudningurin hækkaður við kr. 3,00/kg, og er í fíggjarætlanini roknað við einum framleiðsluvøkstri uppá 7,5%.

Viðmerkingar til nýdyrking:

Víddin av nýveltum var í 1978/79 421.103 m² móti 560.370 m² árið fyri. Hetta serliga orsakað av burturúr vánaliga veltingarveðrinum seinasta vetur.

Skal framburður vera, er neyðugt, at fóðurgrundarlagið er til staðar, og eigur tí nýdyrkingararbeiðið at halda fram í sama ella størri mun enn higartil.

Í 1977/78 vóru kr. 329.075,85 fluttar til 1978/79, og var meitnýtslan í 1977/78 kr. 233.442,25, meðan hon í 1978/79 var kr. 248.820,70.

Viðmerkingar til súrhoysbrunnar:

Minninýtslan í 1977/78 var kr. 69.136,68 og í 1978/79 kr. 59.575,04. Í verandi fíggjarári eru útgoldnar kr. 211.365,97, og eru tað fleiri størri fjós í gerð, har studningurin ikki er útgoldin. Í næstum fara fleiri fjós í gerð, eisini er tað ein vaksandi áhugi fyri at gera smærri brunnar, t.d. í sambandi við seyðahús.

Samanumtikið er hetta tekin um vaksandi studningstørv.

Viðmerkingar til húsdýralógina:

Ein týðandi táttur fyri framburði í búnaðarftamleiðsluni er aliarbeiðið. Í mun til játtanina 1978/79 uppá kr. 100.000,00, og eina minninýtslu uppá kr. 7.182,03 frá árinum fyri, var nýtslan í 1978/79 kr. 139.763,50, ið gevur eina meirinýtslu uppá kr. 32.581,47.

Viðmerkingar til íløgutørvin:

Tað er ein vaksandi tørvur á íleggingum til fjós, seyðahús, maskinur, uppdyrking o.a. á teimum einstøku brúkunum.

Eisini felagstiltøk búnaðarmanna, sum meiarívitksemi, sláturhúsvirksemi o.a., sum eru avgerðandi neyðug framleiðslulið, krevja stórar íleggingar. Samstundis sum havt verður í huga tær stóru príshækkingarnar, ið støðugt eru, er tað eyðsæð, at henda játtan er meira og meira fyri neyðini, um ikki steðgur skal koma í.

Nevnast kann, at tað eru fjós í getð og í umbúna m.a. á Viðareiði, millum Fjarða, Havnardali og Øravík.

Tørvurin á seyðahúsum er vaksin í stóruru um alt landið, ikki minst orsakað av teimum royndum, sum seinasti veturur gav monnum.

Sigast kann tí longu nú, at ikki er gjørligt at eftirkoma besum tørvi, uttan so, at fíggjarorka grunsins verður økt.

Nevnast kann, at til juli mánaða 1979 vóru lániumsóknir til grunnin fyri fíggjarárið 1979/80 til tiltøk fyri kr. 30 mill., ella — um hesi skulu játtast við 60% — ein lánitørv uppá kr. 18,9 mill.

Viðmerkingar til rentustudningin:

Um tað skal vera gjørligt at lúka bert ein part av tí tørvi, sum nevndur er frammanfyri, er neyðugt, at grunnurin framhaldandi kann læna aðrastaðni, og gerst hetta ikki uttan so at rentustudningurin heldur fram.

Viðmerkingar til framleiðslunevnd v.m.:

Víst verður í hesum til viðmerkingarnar, ið fylgdu við fíggjarørlanini seinasta ár, og til frágreiðing jarðarráðsins 1979, sum er hjáløgd.

Ad § 17-3407: Træplanting.
Smbrt. skriv dagfest 30. september 1979.

Skógfriðingarnevndin má sum sítt uppskot til fíggjarløgtingslóg eftir nevndarfund 28. og 29. september 1979 sum ta neyðugu fíggingina biðja um samlað, minst, fyri fíggjatárið 1980/81. . . . . kr. 715.500,00 ið er undirskot av rakstrinum sambært bilagi 1.

Fíggjarætlan fyri 1980/1981

Samanteljing av vanligu dagligu inntøkum og rakstrarútteiðslum stovnsins umframt viðalundanna røktar- og útbyggingarútteiðslum

		Játtan 1980/81
Inntøkur stovnsins (undirbilag II - niðari)	110.000	110.000
Føstu rakstrarútreiðslur stovnsins (undirbilag II - ovari)	426.000	356.000
Røktar- og útbyggingarútreiðslur viðalundanna (undirbilag Ia, Ib, Ic)	399.500	299.500
Tilsamans	**825.500**	**655.500**
Tá frá inntøkunum	110.000	110.000
verða drignar útreiðslurnar	825.500	655.500
fæst sum undirskot, sum søkt verður Føroya Landsstýri um at endurgjalda á fíggjarlógini	**715.000**	**545.500**

Skógarfriðingarnevndin **undirbilag Ia**

Fíggjarætlan fyri 1980/1981
Útreiðslur til viðalundirnar

Mikladalur:

St. 1,5 hekt. Árlig røkt ca. 200 arbeiðstímar á kr. 50,00 (tímaløn, frítíðarløn, dýrtíðarviðbøtur)	kr	10.000,00
Ítestandi plantur at seta og ábøtur	kr.	2.500,00
	Tilsamanskr.	12.500,00

Kunoy

St. 1,5 hekt. Árlig røkt ca. 200 arbeiðstímar á kr. 50,00	kr.	10.000,00
Ítestandi plantur og ábøtur	kr.	2.500,00
	Tilsamanskr.	12.500,00

Leirvík:

St. 1,0 hekt. Árlig røkt ca. 200 arbeiðstímar á kr. 50,00	kr.	10.000,00
Írestandi innhegning	kr.	6.000,00
Írestandi plantur og ábøtur	kr.	3.500,00
Tilsamans	kr.	19.500,00

Sólmundarfjørður:

St. 1,0 hekt. Árlig røkt ca. 200 arbeiðstímar á kr. 50,00	kr.	10.000,00
Tilsamans	kr.	10.000,00

Selatrað:

St. 1,5 hekt. Árlig røkt ca. 500 arbeiðstímar á kr. 50,00	kr.	25.000,00
Írestandi plantur og ábøtur	kr.	2.000,00
Tilsamans	kr.	27.000,00

Hvalvík:

St. 1,0 hekt. Árlig røkt ca. 100 arbeiðstímar á kr. 50,00	kr.	5.000,00
Tilsamans	kr.	5.000,00

Skógfriðingarnevndin undirbilag I b

Vágar:

Zatepta	kr.	0,00
Ellisheimið: plantur og ábøtur	kr.	15.000,00
Tilsamans	kr.	15.000,00

Kirkjubø:

St. 2,0 hekt. (nýggj viðalund). Árlig røkt ca. 200 arbeiðstímar á kr. 50,00	kr.	10.000,00
Plantur og ábøtut	kr.	20.000,00
Tilsamans	kr.	30.000,00

Tórshavn:

Gundadalur	st.	7,0 hekt.
Kerjar	st.	3,0 hekt.
Marknagil	st.	3,0 hekt.
Debesartrøð	st.	1,0 hekt.
Mattulág	st.	[illegible] hekt.
Havnardalur	st.	[illegible] hekt.

Árlig røkt ca. 3000 arbeiðstímar á kr. 50,00	kr.	150.000,00
Írestandi plantur og ábøtur	kr.	50.000,00
Tilsamans	kr.	200.000,00

Hoydalar:

St. 3,0 hekt. Árlig røkt ca. 600 arbeiðstímar á kr. 50,00.	kr. 30.000,00
Tilsamans	kr. 30.000,00

Vágur:

St. 4,0 hekt. Árlig røkt ca. 200 arbeiðstímar á kr. 50,00	kr. 10.000,00
Írestandi plantur og ábøtur	kr. 1.000,00
Tilsamans	kr. 11.000,00

Skógfriðingarnevndin **undirbilag I c**

Tvøroyri:

Sevmýri	st. 0,5 hekt.
Kirkjan	st. 0,5 hekt.
Sjúkrahúsið	st. 1,0 hekt.
Mangibakki	st. 2,5 hekt.

Árlig røkt ca. 500 arbeiðstímar á kr. 50,00	kr. 25.000,00
Írestandi plantur og ábøtur	kr. 2.000,00
Tilsamans	kr. 27.000,00
Útreiðslur til viðalundirnar ialt	**kr. 399.500,00**

Skógfriðingarnevndin undirbilag II

Figgjarætlan fyri 1980/1981
Føstu útreiðslur stovnsins

Skógfútin (23. lønarfl. 1. stig)	kr. 126.000,00
Arboretið	kr. 125.000,00
Nýggjur lastbilur	kr. 70.000,00
amboð.....	kr. 20.000,00
Ferðapeningur o.a.....	kr. 25.000,00
Tøð og hegn o.t.....	kr. 30.000,00
Umsiting (telefon, skrivstova, fundarpeningur)	kr. 30.000,00
Tilsamans	kr. 426.000,00

Inntøkur stovnsins:

Plantusøla, mett (brutto til umleið ..... kr. 110.000,00

Viðmerkingar til okkara uppskot til løgtingsfiggjarlóg 80/81
dagsett 30.9.1979, sum er sent landsstýrinum

Umframt tær á undirbilag 1a, 1b og 1c nevndu plantingar og plantagur eru í umbúna skógfriðingar av fylgjandi økjum:

Ad § 18. 2710: Arbeiðseftirlit

Sbrt. skriv dagf. 10. okt. 1979:

konto nr. - navn	Brúkt 1978/79	Játtað 1979/80	Ætlað 1980/81	Játtan 1980/81
790 Ymiskar inntøkur	÷ 14.200,00	÷ 15.000,00	÷ 15.000,00	÷ 15.000,00
1014 Løn/starvsfólk	320.200,00	381.000,00	474.000,00	384.000,00
1016 Løn/sáttmálalønt	198.000,00	207.000,00	207.000,00	207.000,00
1050 Samsýningar	51.800,00	50.000,00	50.000,00	50.000,00
1120 Ferða- og dagpeningur	23.200,00	20.000,00	30.000,00	20.000,00
2030 Lýsingar	300,00	5.000,00	10.000,00	5.000,00
2180 Leiguútreiðslur	0,00	0,00	56.000,00	0,00
2305 Innbúgv	10.000,00	0,00	134.000,00	30.000,00
2315 Prentlutir	11.400,00	10.000,00	30.000,00	15.000,00
2325 Postgjald	100,00	1.000,00	2.000,00	2.000,00
2335 Telefon/telex	6.600,00	6.000,00	6.000,00	6.000,00
2350 Sakkøn hjálp	0,00	0,00	20.000,00	10.000,00
2356 Aðrar skrivstovuútreiðslur	2.300,00	0,00	15.000,00	5.000,00
2734 Skeiðvirksemi	0,00	0,00	20.000,00	20.000,00
	609.700,00	665.000,00	1.039.000,00	739.000,00

1. Miðvágur »Tungar« ca. 1,3 ha
2. Klaksvík í Grøv ca. 7,8 ha

Tungan er longu innstikað, og inngytðingin í Grøv er í gongd.

Ynskjandi kundi verið, at byrja niðurseting á hesum støðum komandi sumunar, um alt gongur sum ætlað, men hava vit ikki sett nakra upphædd fyri útreiðslur til hetta endamál, við tað at skógfriðingin ikki enn er komin formelt í gildi.

Arboretplanturnar íalt umleið 10.000 í tali — sum eru niðursettar á plantuskúlanum í Hoydølum, tykjast yvirhøvur at koma stak væl fyri seg, og kann útplanting og søla av teimum væntandi byrja í 1981.

Eg vil loyva mær at viðmerkja, at um skarvað verður burtur av teirri upphædd, sum biðið er um, kann hetta koma at nerva serliga teimum ætlanum, sum oman fyri eru nevndar.

Víst verður annars til ársfrágreiðing skógfútans, sum er send landsstýrinum.

Frágreiðing:

			Játtan 1980/81
ad. 790	Óbroytt		
ad. 1014	Bruttoløn skrivstovufólk	105.396,00	105.395,00
	Bruttoløn eftirlitsmaður	113.460,00	113.460,00
	Bruttoløn eftirlitsmaður	106.800,00	106.800,00
	Bruttoløn eftirlitsmaður	42.000,00	42.000,00
	Bruttoløn frítíðatavloysara	15.000,00	5.000,00
	Lønarhækkan 3%	11.344,00	11.344,00
	Meirløn til eftirlitsmann eftir Helmer Christiansen	80.000,00	0,00
		474.000,00	**384.000,00**

ad. 1016 Óbroytt

ad. 1050 Óbroytt

ad. 1120 Útreiðslur til kilometurpening og ferðaútreiðslur eru øktar.

ad. 2030 Óbroytt.

ad. 2180 Ætlanin er at leiga nýggj arbeiðshøli frá Saltsøluni á Vestaru bryggju fyri **kr. 55.650,00** um árið.

ad. 2305 Deildini tørvar ein arbeiðsbil:

Ein Ford Taunus Station kostar	kr. 77.500,00
Vegskattur og trygging um árið	kr. 6.500,00
Keyp av dynamumetrum v.m. sum neyðug eru í arbeiði okkara til royndir av arbeiðsamboðum.	kr. 30.000,00
Keyp av ymiskum innbúgvi	kr. 20.000,00
	kr. 134.000,00

ad. 2315 Arbeiðseftirlitið hevur stóran tørv fyri at gera skrivligar informatiónir. Hetta kemur helst at kosta umleið ..... **kr. 30.000,00**

ad. 2325 Óbroytt

ad. 2335 Óbroytt.

ad. 2350 Tað er avgerandi neyðugt at luttaka í tí skeiðvirksemi, ið fer fram í grannalondum okkara, eins og vit mugu fáa hjálp frá serkønum monnum av og á.
Hetta kostar í minsta lagi ..... kr. 20.000,00

ad. 2356 Skrivstovan hevur stóran tørv á ymiskum, sum brúkt verður til arbeiðið á skrivstovuni. Síðsta át varð einki játtað her, og var hetta til stóran bága tí ca. ..... kr. 15.000,00

ad. 2734 1. apr. í át kom í gildi kunngerð um internt tryggleiksarbeiði á virkjum. Til tess at fáa hesa at virka, verður neyðugt at hava ymisk skeiðir innanfyri ymisk økir, og vænta vit at hetta kemur at kosta í minsta lagi ..... kr. 20.000,00

Ad § 18-2720: Bileftirlitið

Smbrt. skriv dagfest 4. oktober 1979.

	Roknsk. 1978/79	Játtan 1979/80	Uppskot 1980/81	Játtan 1980/81
790 Ymiskar inntøkur	910.5	100.00	+ 1500.0	+ 1500.0
1014 Løn/starvsfólk	534.9	640.0	650.0	650.0
1022 Løn/reingerð	33.6	45.0	70.0	50.0
1028 Løn/onnur	254.7	210.0	380.0	380.0
1040 Úttíðarlønir	8.9	0.0	15.0	10.0
1120 Ferðs- og dagpeningur	90.4	85.0	130.0	90.0
1212 Eftir itbúgving	2.9	20.0	60.0	20.0
2030 Lýsingar	0.0	1.0	1.0	1.0
2040 Dagbløð, tíðarrit v.m.	2.0	2.0	2.0	2.0
2110 El, hiti og vask	6.2	15.0	20.0	20.0
2180 Leiguútreiðslur	165.3	200.0	250.0	200.0
2305 Innbúgv	11.6	0.0	30.0	15.0
2315 Prentlutir	7.0	10.0	10.0	10.0
2325 Postgjald	5.3	10.0	10.0	10.0
2335 Telefon og telex	40.1	60.0	70.0	70.0
2355 E.D.V. útreiðslur	14.1	30.0	150.0	30.0
2356 Aðrar skrivstovuútreiðslur	18.3	25.0	50.0	25.0
2530 Amboð	6.3	20.0	300.0	110.0
2590 Aðrar útreiðslur	35.2	30.0	50.0	30.0
2592 Tænastuakfør rakstur	45.8	30.0	70.0	30.0
6590 Byggigtunnur	0.0	0.0	500.0	300.0
	372,1	433.0	1.318.0	553,0

Sambætt: .riv dagfest 15. nov. 1979:

Evni: Fíggjar lógaruppskot til løgtingslóg 1980/81.
Skjøl: 1.) Uppskot fyri 1980/81.
2.) Viðmerkingar til lógaruppskot 1979/80.
3.) Broytingaruppskot fyri 1979/80.
4.) Uppskot til inntøkubroytingar.

Vísandi til omanfyristandandi verður undirritaði at seta framm hesar viðmerkingar til fíggjarstøðu og tørv.

790 **Inntøkur:**

Sýn:

The parties agreed to continue to apply the licensing regime in force in 1979 preliminary until 15 April 1980.

The parties shall consult before 31 March 1980 with a view to establishing a licensing regime for each others' vessels for the whole of 1980.

However, the parties already agreed that for the shrimp fishery in NAFO subarea 1 and ICES subarea XIV the period of validity of licenses for a specific vessel may not overlap and that a 48 hours notice has to be given when a vessel decides to go from one subarea to the other.

IV. FISHERY REGULATIONS

Herring fishery in Skagerrak

Fishing for herring by Faroese vessels in Skagerrak is subject to the following Provisions:

a) Directed fishing for herring is prohibited from 1 January to 31 March 1980 and from 1. Oktober to 31. Desember 1980;
b) Directed fishing for herring for purposes other than human consumption is prohibited;
c) The use of trawl and purse seine is prohibited from Saturday midnight to Sunday midnight.

Brussels, 13 March 1980

R. Simonnet

A.P. Dam

Umseting

Váttað frásøgn um samráðingar um fiskiskap millum EEC og Føroyar í Brüssel 13. mars 1980.

I. 1. Ein sendinevnd umboðandi Felagsskapin við hatra R. Simonnet sum formanni og ein sendinevnd umboðandi Føroya landsstýri við Atla P. Dam sum formanni hittust í Brüssel 13. mars 1980 til samtáðingar um sínámillum fiskiskap í 1980.

2. Hesin fundurin var framhald av fundum frammanundan í Brüssel.

3. Samráðingarnar vóru grundaðar á sjónarmiðini í rammusáttmálanmillum Felagsskapin øðrumegin og ríkisstýri Danmarkar og Føroya Landsstýri hinumegin, undirskrivaður 15. mars 1977.

II. **Kvotur**

Sendinevndirnar samdust um at viðmæla myndugleikunum hvør hjá øðrum fylgjandi skipan fyri 1980:

1. Hvør av pørtunum skal lata kvotur, sum nevndar eru niðanfyri, til hin partin á sjóøki sínum:

1.1 Kvotur hjá EEC-skipum á føroyska sjóøki

Fiskasløg	ICES-ØKI	NØGD (tons)
Toskur	V b	1.750
Hýsa	V b	1.750
Upsi	V b	5.500
Kongafiskur	V b	5.000
Blálonga	V b	4.400
Longa	V b	500
Brosma	Vb	300
Flatfiskur	V b	500
Svartkjaftur	V b	25.000
Onnur fiskasløg	V b	500

1.2. Kvotur hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi:

Fiskasløg	Fiskiøki ICES-øki ella NAFO-øki	Nøgd (tons)
Longa	VI b	500 (1)
Brosma	VI b	500
Makrelur (eystari stovnur)	IV	2.500
(vestari stovnar)	IV (2), VIa (3) VII e,f,h	21.000
Rossamakrelur	IV, VIa (3), VII e,f,h	5.000
Hvítingsbróðir	IV, VIa (3)	20.000 (4) (5)
Brislingur	IV, VIa (3)	15.000
Nebbasild	IV	15.000 (4)
Svartkjaftur	VIa (3), VIb, VII (6)	25.000
Annar botnfiskur (bert hjáveiða)	IV, VIa (3)	750
Rækjur (pandalus borealis)	NAFO 1, (8) XIV	1.880 einans royndarfiskiskapur
Svartkalvi	NAFO 1, XIV	250
Kongafiskur	NAFO 1, XIV	500
Sild	Skagerak (7)	600

(1) Hesar kvotur, ið skiftast kann ímillum, kunnu bert fiskast við línu.
(2) Norðanfyri 60°N og vestanfyri 2°E.
(3) Norðanfyri 56° 30'N
(4) Hvør av hesum kvotunum kann yvirfiskast við í mesta lagi 5.000 tonsum, treytað av, at samlaða veiðinøgdin fyri hvítingsbróður, nebbasild og brisling ikki fer upp um 50.000 tons.
(5) Av hesum kunnu í mesta lagi 10.000 tons fiskast á ICES-økinum VIa norðanfyri 56°30', treytað av, at EEC eftir áheitan fær gjølligar upplýsingar um veiðunøgd og samanseting av hjáveiðu.
(6) Vestanfyri 12°V.
(7) Avmarkað vestureftir av eini linju frá Hanstolm vita til Lindesnes vita, suðureftir av eini linju frá Skagen vita til vitan á Tistlarna og hagani til til nærmastu strond í Svøríki.
(8) Sunnanfyri 68°N.

2 Um sildafiskiskapur á ICES-økjunum IV og VIa skuldi byrjað aftur í 1980 skulu partarnir ráðføra seg við hvønn annan.

3. Um støðan hjá toskastovninum undir Vestur- og Eysturgrønlandi batnar, og aðrir fiskimenn enn grønlendingar skuldu byrja toskafiskiskapin aftur, vilja partarnir ráðføra seg sínámillum við tí í hyggju at seta kvotu fyri Føroyar í hesum stovnum, havandi í huga føroysku áhugamálini á hesum øki.

III. **Fiskiloyvir**

Partarnir samdust um at halda fram at nýta loyvisreglurnar, ið galdandi vóru í 1979, fyri fyrst til 15. apríl 1980.

Partarnir skulu samráðast áðrenn 31. mars 1980 við tí endamáli at seta í verk loyvisreglur fyri skipini hjá hvørjum øðrum fyri alt árið 1980.

Viðvíkjandi rækjufiskiskapi í NAFO-øki I og ICES-øki XIV samdust partarnir um, at fiskiloyvi til hvørt einstakt skip ikki samstundis kann galda fyri sama tíðarskeið fyri bæði økini, og at fráboðan skal gevast 48 tímar áðrenn eitt skip ger av at flyta frá einum av økjunum til hitt.

IV. **Fiskaríforskriftir**

Fiskiskapur eftir sild í Skagerak

a) Beinleiðis fiskiskapur eftir sild er ikki loyvdur frá 1. januar til 31. mars 1980 og frá 1. oktober til 31. december 1980.
b) Beinleiðis fiskiskapur eftir sild til annað endamál enn matna er ikki loyvdur.
c) Nýtsla av troli og kraftblokki er ikki loyvd frá leygardegi á midnátt til sunnudag á midnátt.

Brüssel, 13. mars 1980.

R. Simonnet (sign.) Atli P. Dam (sign.)

Keyp av
Royndar- og Rannsóknarskipi.

Viðvíkjandi nýggjum fiskirannsóknar- og royndarskipi.

»Jens Chr. Svabo« hevur verið nýttur sum fiskirannsóknarskip síðan 1964. Í byrjanini eisini sum hjálparskip. Hann er bygdur í 1960, er 85,8 føtur langur og hevur 350 hesta Alpha-diesel maskinu eisini frá 1960.

Síðan báturin varð keyptur til fiskirannsóknar- og hjálparskip er farin fram stórbroyting í fiskimynstri, fiskiskipaflota og teimum krøvum, sum í dag verða sett til fiskirannsóknir og fiskiroyndir. Harumframt er báturin við at verða gamal, og vit meta at báturin ikki longur er hóskandi.

Nakað av vitan, um hvussu ágangurin er á fiskastovnarnar, fæst við at taka sýnislutir av landingunum, men harumframt er eisini neyðugt at gera kanningar við skip. Kanningar, vit meta verða neyðugar á hvørjum ári í framtíðini, eru:

1. Ekkointegratorkanningar. Stovnsmetingar av svartkjafti verða í dag bert gjørdar við ekkointegratorum. Sum eitt av týdningamestu strandalondunum sum fiska og regulera henda fiskiskap, eiga vit at fylgja væl við, at fiskiskapurin fer fram á hollum grundarlagi. Til hesar kanningar krevst eitt hampuliga stórt og væl útgjørt skip. Slíkar kanningar koma eisini at vera neyðugar, tá atlant-skandiski sildastovnurin kemur fyri seg aftur.
2. Á landgrunninum eiga á hvørjum ári at verða gjørdar botntrolkanningar við finmeskaðum troli fyri a) at kanna tilgongdina av ungfiski til nyttustovnarnar, og b) at kanna lutfallsliga býti millum tey ymsu fiskasløgini á landgrunninum. (Ursin modell).
3. Yngulkanningar av týdningarmestu fiskasløgunum.

Umframt fiskirannsóknir stílar Fiskirannsóknarstovan eisini fyri fiskiroyndum eftir lítið royndum fiskasløgum og fyri at royna nýggja útgerð. Hesar royndir verða gjørdar við leigaðum skipum. Tær mest átrokandi uppgávurnar nú eru:

1. Troling á djúpum vatni eftir blálongu, langasporli og kongafiski.
2. Rækjutroling í føroyskum sjógvi.
3. Línuroyndir á djúpum vatni.
4. Royndarfisking í Eysturgrønlandi (toskur, lodna og rækja).

Eitt skip, sum skal kunna geta allar hesar rannsóknir og fiskiroyndir, má vera hampuliga stórt (130-150 fót), vera væl útgjørt við trolreiðskapi, bæði botn- og flótitrol, kunna brúka línu og gørn og ikki minst hava góða maskinorku.

Samlaðu útreiðslurnar hjá Jens Chr. Svabo í fíggjarárinum 1975/76 (talva) vóru 1,3 mió. kr. Av hesum vóru hýruútreiðslurnar 780.000 kr. Útreiðslur til olju, trygging, viðlíkahald og fiskireiðskap verða størri hjá einum størri skipi, meðan manningarútreiðslurnar vaksa lítið meira. Inntøkan frá søla av fiski kundi eisini vaksið.

Í fíggjarárinum 1977/78 vórðu nýttar 3 mió. kr. til fiskiroyndir við leigaðum skipum.

Við einum størri royndarskipi kundu nógvar av teimum dýrastu royndunum verið gjørdar við hesum skipi, og játtanin til fiskiroyndir minkað samsvarandi.

»Jens Chr. Svabo« er eitt lítið skip og verður ofta tarnað av veðri. Við einum størri skipi kundi talið av arbeiðsdøgum verið nógv vaksið.

Fiskirannsóknarstovan vil út frá hesum mæla til, at keypt verður eitt størri skip til fiskirannsóknar- og royndarskip. Hetta eigur at vera 130-150 føtur stórt, hava góða maskinu (2000 hestar) og kunna nýta bæði flótitrol, botntrol, gørn og línu. Harumfram má pláss vera til laboratorium og fólk frá Fiskirannsóknarstovuni umborð.

Vit meta ikki, at tað er neyðugt at byggja eitt slíkt skip av nýggjum, tá fleiri hóskilig skip eru tøk fyri ein rímiligan pening, bæði heima og í útlondum.

Vit kunnu t.d. vísa á Ólav Halga, sum landsstýrið eigur, og sum lættliga kann umbyggjast til hekkutrolara. Eisini eru onnur hóskandi skip í landinum.

v. Fiskirannsóknarstovuna J.S. Joensen

M/S JENS CHR. SVABO 1976/77

Hýrur	kr.	776.335,96
Kostur	kr.	52.134,01
Olja	kr.	124.925,49
Umvælan og viðlíkahald	kr.	106.304,95
Kanningartól og fiskireiðskapur	kr.	120.060,60
Trygging o.a.	kr.	70.609,58
Ymist	kr.	46.295,63
	kr.	1.296.666,22
Søla av fiski	kr.	248.970,79

9. B.

UM TØRVIN Á SKIPI HJÁ FISKIRANNSÓKNARSTOVUNI

Sum víst á í skrivi til Føroya Landsstýri dagfest 14/9 - 1977 setur tann nýggja havrættarskipanin nógv størri krøv til Fiskirannsóknastovuna enn tann gamla.

Ærlan okkara við hesum skrivi er at lýsa skipstørvin hjá Fiskirannsóknarstovuni og í hvønn mun hann kann fyllast av Jens Chr. Svabo.

Fyri at gera sær eina fatan av tørvinum fyri einum skipi er neyðugt at greina arbeiðið hjá stovninum sundur í tað, sum vit kunnu kalla rannsóknararbeiði og tað sum vit kunnu kalla fiskiroyndir.

Markið er ikki altið líka hvast millum hesi bæði sløg av kanningum, men tað er neyðugt at skilja ímillum hóast alt.

Í londum, sum hava meira pening enn vit at leggja í vísindaligt arbeiði, finnast fiskifrøðingar, sum bert fáast við tað, sum vit kunnu kalla grundrannsóknararbeiði t.e. gransking, sum ikki í fyrstu syftu hevur nakað praktiskt endamál, men tænir til at økja um kunnleika okkara til tað, sum fer fram í havinum, og hevur ofta víst seg at fáa praktiskar fylgjur seinni.

Bæði rannsóknirnar og royndirnar hjá Fiskirannsóknarstovuni hava praktisk endamál.

Fiskirannsóknirnar hava til endamáls at svara spurninginum. Hvussu rentabla veiðu eftir einumhvørjum slag ella á einihvørjari leið við tí og tí reiðskapi.

Fiskirannsóknirnar hava til endamáls at svara spurningum. Hvussu tryggja vit eina rentabla drift ár undan ári við bert at loyva ein fiskiskap, sum røkir stovnin skynsamiliga.

Endamálið er at føra stovnarnar í manntal, at gera metingar og helst á ymiskum grundarlag yvir stovnsstødd, hvørja veiðu hann tolir, tilgongd o.s.fr. Men hetta er eingi einfalt arbeiði. Tað skal undirstrikast, at tað er arbeiðskrevjandi at gera hetta arbeiðið á forsvarligan hátt, og er ikki arbeiðskraft til hetta, so merkir tað í veruleikanum, at eingi svar kann gevast.

Hesar rannsóknir eru tað avgerandi grundarlagið undir møguleikunum hjá Fiskirannsóknarstovuni at geva leiðbeining til myndugleikarnar um, hvat stovnarnir undir Føroyum tola.

Fiskirannsóknarstovan hevði, tí myndugleikarnir skilja týdningin av hesum arbeiði, møguleikan av at vaksa um talið av starvsfólki í 1978. Hetta hevur gjørt okkum væl betur førar fyri at taka sýnislutir av og fylgja við veiðuni av týdningarmestu fiskasløgunum sum toski, upsa og hýsu (hóast enn eru tað stovnar, vit lítið fáa gjørt við).

Men eftir liggur eitt arbeiði at gera á sjónum. Viðhvørt verður brúkt eitt útlendskt orð um hetta arbeiði, t.e. »monitoring«, sum kanska kann umsetast at hava eftirlit við stovnunum serliga á feltinum, har sum fiski-

skapurin fer fram, herundir yngulkanningar etc.

Tá so mikið er sagt um rannsóknirnar, so er tað tí, at í dagligum práti er lætt at hoyra, at fólk skilja týdningin av eini fiskiroynd. Eydnast hon er so einfalt at síggja, at hon merkir beinleiðis vinning. Hetta er ikki so lætt at síggja við rannsóknararbeiðinum, men í veruleikanum kann ein misrøkt av hesum hava nógv størri fíggjarligar fylgjur enn fylgjurnar av royndarfiskiskapi, og tað kann vera dýrt at spara hesum viðvíkjandi.

Út frá hesum tvíbýti verður víst á í hesi framløgu, at tað, Fiskirannsóknarstovan hevur brúk fyri, er *einum skipi, sum uml. helvtina av tíðini røkir rannsóknaruppgávur og helvtina av tíðini royndarfiskiskap.*

Kanningar á sjónum.

Aldursbýtið av fiskinum, sum er fiskaður, ger okkum førar fyri neyvt at rokna støddina av gýtingarstovninum tvey ár aftur í tíðina, VPA analysa. Og nøgdin av innkomandi árgangum í fiskiskapin gevur okkum eina hylling á støðuni nú fyri botnfiskastovnarnar. Skulu vit harumfram hava vitan um útlitið frameftir, er neyðugt við yngul- og ungfiskakanningum á sjónum. VPA analysan er best egnað til stovnsmetingar, tá fiskiskapurin hevur verið í nógv ár, tá tað er nøkulunda lætt at aldursgreina fiskin og tá tað náttúrliga deyðatalið ikki er ov høgt. Harumfram krevur hesin mátin, at ein meting av fiskideyðatalinum seinasta árið verður gjørd. Er henda meting nógv skeiv, verður tann endaliga metingin av stovnsstøddini eisini skeiv. Samantikið er tað tí neyðugt umfram at hava fastar árligar kanningar á sjónum (monitorkanningar), sum gevur okkum óheft stovnsmet og kann lýsa styrkina á innkomandi árgangum.

Summar av hesum kanningum geva okkum stovnsstøddina ella partar av henni í absoluttum tølum, aðrar lýsa broytingar í stovnunum.

Slíkar neyðugar árligar kanningar kunnu býtast í 6 partar.

a) *Egg- og larvukanningar.* Talið av eggum og larvum í sjónum undir og stutt aftaná gýtingina lýsur teoretiskt, hvussu stórur gýtingarstovnurin er. Skal stovnsstøddin roknast út í absoluttum tølum, krevur hetta stórt arbeiði. Men verður ein kanningin gjørd á sama hátt ár undan ári, kann hesin máti lýsa broytingarnar í stovninum.

b) *Yngulkanningar.* Hetta vil siga innsavnan av tilfari, sum kann, so týðuliga sum gjørligt, lýsa, hvussu sterkir árgangirnir av fiski eru. Vanliga verður hetta arbeiðið undir Føroyum gjørt við yvirlitstrolling. Aðrar staðir verður afturat yvirlitstrolingini gjørd ein ekkumáting.

c) *Yvirlitstrolingar.* Hesar eru fyri a) at kanna tilgongdina av ungfiski til nyttustovnarnar og b) at kanna sambandið millum tey ymsu fiskasløgini á landgrunninum (Ursin modell) og c) at lýsa ferðing, gýtingarøki, gýtingartíð, matvanar o.s.fr.

d) *Ekkometingar.* Til at fáa eina metan av støddini á nógvum stovnum, sum liva uppi í sjónum, er í dag ein tann besti mátin at nýta ekkotól (ekko integratorar). Serliga er tað neyðugt hjá okkum at gera kanningar av svartkjaftastovninum. Um sildin í Norðhavinum kemur tyri seg aftur, verður hetta ein máti at lýlgja við í hesum stovninum.

e) *Plantu- og djórakanningar.* (Produksjónskanningar).

f) *Fiskiroyndir.* Fiskirannsóknarstovan skipar tyri fiskiroyndum av ymsum slag. Endamálið við teimum er at royna nýggja útgerð, nýggjar leiðir og at royna eftir lítið royndum fiskasløgum.

Í talvu eitt er sett ein meting av, hvat tíðin fer til hjá slíkum skipi. Roknað verður við í minsta lagi 250 dagar í drift. Yvirlitstrolingar liggja á markinum millum rannsóknir og royndarfiskiskap, so sum vit hava býtt tað upp í hesum riti. Jens Chr. Svabo hevur verið nýttur sum fiskirannsóknarskip síðan 1964. Í byrjanini eisini sum hjálparskip. hann er bygdur í 1960, er 85,5 føtur langur og hevur 350 hesa Alphadiesel maskinu, eisini frá 1960. Síðan báturin varð keyptur til fiskirannsóknar- og hjálparskip er farin fram stórbroyting í fiskimynstri (talva 2,) fiskiskipaflota (talva 3) og teimum krøvum, sum í dag verða sett til fiskirannsóknir og fiskiroyndir. Harumframt er báturin vorðin gamal og tí dýrur at viðlíkahalda, og vit meta ikki, at báturin longur er egnaður til sína uppgávu.

Í talvu 4 er sett út kanningarslag og minstastødd á skipi, ið er neyðugt til hesa kanning og í livønu mum kanningin kann gerast av Jens Chr. Svabo. Í talvu 5 er sett royndarfiskiskapurin, sum hevur verið seinnu árini og ætlanin fyri fíggjarárið 1979/80.

Nógvar av teimum kanningum, sum ikki krevja so stórt skip, kunnu sjálvandi eins væl um ikki betur gerast við einum størri. Tær flestu kanningarnar eru tíðarbundnar av gýtingunum um várið og kunnu tí ikki gerast seinni, um veðrið ikki er til vildar.

Í talvu 6 er sett út talið av døgum, Jens Chr. Svabo hevur verið leysur av kaj tey seinastu tvey árini og í talvu 7 er sett dagar í sjónum hjá ávikavist einum trolbáti, einum minni trolara og einum størri feskfiskatogara í 1978.

Samantikið meta vit, at eitt nýtt fiskirannsóknarskip eigur at fáast til vega so skjótt sum til ber. Hetta eigur í minsta lagi at verða 400-500 tons til støddar, verða hekkutogari og hava eina minstu maskinorku uppá 1500-2000 hk.

Eitt tílíkt skip kann rekast við eini manning uppá 8 - 10 monnum og við tí sáttmála, manningin á Jens Chr. Svabo hevur nú tilsvarar hetta íalt 12-15 mans.

Í talvu 8 eru manningarútreiðslurnar hjá Jens Chr. Svabo í 1978 settar saman við útroknaðum útreiðslum um manningin var 12 og 15 mans.

Eitt dømi.

Skipasmiðjan Mjellem og Karlsen í Bergen hevur bygt nógv fiskirannsóknarskip fyri norðmenn. Seinast hava teir gjørt eina seriu uppá 4 av sama slag. 3 tey fyrstu góvu norðmenn til menningarlond, tað seinasta, Michael Sars, hava teir sjálvir.

Mjellem og Karlsen hava sjálvbodnir sent okkum tilboð, hjálagt, uppá eitt systurskip til hesi uppá 22 mill. n.kr. við 12 mánaðar leveringstíð.

Michael Sars skal gera ekkointegratorkanningar av svartkjafti vestan fyri Bretsku oyggjarnar og undir Føroyum í apríl/mei og hava teir ætlað sær inn í Føroyum 1. mei. Tað verður tá høvi at síggja eitt tílíkt skip. Men eisini aðrir møguleikar kunnu hugsast, um bert krøvini omanfyri eru uppfylt.

Vit fara út frá hesum at biðja um ein fund við landsstýrið fyri at tosa nærri um málið.

Fiskirannsóknarstovan, 24. apríl 1979.
sign.
J.S. Joensen

Talva 1.

Rannsóknir:	Gýtingarstovnur upsi, toskur, hýsa, sild	50 dagar
	svartkjaftur	20 dagar
	tilgongd av yngli, frumframleiðsla I	40 dagar
	yvirlitstrolingar	30 dagar
	Royndarfiskiskapur	110 dagar

Mett býtið av kanningartíðini hjá einum kanningar/royndarskipi Roknað er við minst 250 døgum í drift.

Talva 2. Veiðan hjá føroyskum skipum 1961, 1966, 1971 og 1975-77, (fáhupartal og hummari ikki uppreknað), tons lívandi vekt av ruadum).

	1961	1966	1971	1975	1977	1978
Nærleiðir:						
Føroyagrunnurin:						
Toskur	9.521	7.957	12.754	22.986	29.028	28.430
Hýsa	8.454	6.902	10.480	8.757	20.079	18.282
Brosma	1.301	1.488	1.489	2.166	3.062	2.521
Longa	603	416	752	1.281	1.675	1.975
Upsi	929	1.167	5.653	2.517	5.153	15.900
Annað	547	843	1.398	2.403	3.498	5.760
Sild	-	6.425	1.704	-	50	373
Svartkjaftur	-	-	-	22	22.836	25.080
Tilsamans	21.355	24.698	34.239	43.132	85.331	99.071
Miðleiðir:						
Ísland:						
Toskur	10.602	3.414	8.565	9.490	7.261	7.306
Annað	2.357	11.119	6.553	6.169	10.054	10.286
Lodna	-	-	-	-	22.298	36.305
Svartkjaftur	-	-	-	-	593	2.810
Tilsamans	12.959	14.613	15.118	15.609	40.246	56.707
Norðsjógvurin, Skagerak, vestan fyri Bretsku Oyggjarnar:						
Sild	-	1.491	64.796	37.802	20.502	1.030
Brislingur	-	-	-	41.967	2.383	737
Makrelur	-	-	3.603	25.184	47.177	46.330
Hvítingsbróður	-	-	47.230	65.138	50.930	38.190
Svartkjaftur	-	-	-	482	6.280	14.500
Nebbasild	-	-	-	4.910	11.393	12.139
Annað	-	-	156	2.620	-	1.469
Tilsamans	-	1.491	115.785	177.903	140.025	114.410
Rock All, Ey.Grönland:						
Toskur	1.221	-	-	584	1.447	11
Annað	83	-	-	629	1.087	337
Tilsamans	1.304	-	-	1.213	2.434	348
Jan Mayen:						
Lodna	-	-	-		-	3.353
Fjarleiðir:						
New Foundland, Flemish Cap:						
Svartkalvi	-	-	-	825	1.280	810 1)
Toskur	5.470	14.854	17.604	9.421	6.860	8.707
Annað	56	19	46	131	370	126
Tilsamans	5.526	14.873	17.[illegible]	10.377	8.510	9.643
Grönland:						
Laksur	-	-	232	260	-	-
Toskur	56.406	64.528	16.440	5.718	7.346	-
Rækjur	-	-	496	5.263	12.841	7.759 x)
Annað	1.287	346	556	54	84	-
Tilsamans	57.693	64.874	[illegible]	[illegible]	[illegible]	[illegible]
Norðurnoreg:						
Toskur	3.934	-	5.877	11.309	9.167	9.057
Hýsa	295	-	81	299	213	32
Lodna	-	-	-	16.847	-	14.847
Sild	16.865	44.080	-	-	-	-
Annað	61	-	218	102	2.638	1.202
Tilsamans	21.155	44.[illegible]	6.[illegible]	28.5[illegible]	12.[illegible]	[illegible]
Samlaða veiðan	119.992	165.105	207.[illegible]	295.080	[illegible]	[illegible] xx)

1) Fyribils tal.
Heimildartilfar: Veiðibagtalsstovan

x) Til 9. desember 1978
xx) rekja av canadisk ørki kvotu

Talva 3. Føroyski fiskiskipaflotin í oktober 1963 og november 1978.

Skipastødd	trol	lína	annað
	15. oktober 1963		
5-100 tons	3	121	31
100-150 tons		6	14
150-500 tons	2	48	12
500-900 tons	12		
	17	175	57
	15. november 1978		
5-100 tons	24	234 *)	6
100-150 tons	10	7	2
150-500 tons	61	31	13 **)
500-900 tons	8		6
	103	272	27

*) Av hesum eru 21 bátar, ið trola um summarið.
**) Nótabátar, nakrir trola eisini eftir svartkjaftí.

Talva 4. Kanningarslag og skipstørvur

Kanningarslag	Árstíð	Minsta stødd	Jens Chr. Svabo
Yngulkanningar	juli	55-60	+
Plantu- og djóraæti	summarið	55-60	+
Ekkometingar, svartkjaft	januar-juli	300-400	÷
Yvirlitstrolingar	alt árið	300-400	÷
Fjarðakanningar	alt árið	30-40	+
Royndarfiskiskapur			
Ídnaðarfiskur		100-200	(+)
Línuroyndir			(+)
Trolroyndir			÷
Svartkjaftur			÷
Sildaleiting		200-300	÷
Garnaroyndir			(+)

Talva 5a. Fiskiroyndir 1972-1978.

	1972
Anna Maria	Royndir við egningarmaskinu
Bjarnoy	Royndir við flótitroli eftir svartkjafti
Kapilssund	Royndir við flótitroli eftir svartkjafti
Norðland	Royndir við flótitroli eftir svartkjafti
Finnur Fríði	Royndir við kraftblokki eftir svartkjafti
Poppy	Royndir við skeljadreggi
Vón	Royndir við botntroli (innanfyri 12 fj.)
Hvítanes	1 mann í Grønlandi fyri ICES, laks
Leikur	1 mann í Grønlandi fyri ICES, laks
Bakur	1 mann í Grønlandi fyri ICES, laks
	1973
Leivur Øssursson	Royndir við flótitroli eftir svartkjafti
Havornin	Royndir við flotlínu eftir hýsu
Poppy	Royndir við skeljadreggi
Núgvunes	Royndir við botntroli (innanfyri 12 fj.)
Vón	Royndir við botntroli (innanfyri 12 fj.)
	1974
Leivur Øssurson	Royndir við flótitroli eftir svartkjafti
	1975
Hallarkletur	Royndir við fronskum botntroli eftir upsa
Havaldan	Royndir við botntroli (uttanfyri 12 fj., 1 maður við)
	1976
Leivur Øssursson	Royndir við flótitroli eftir svartkjafti
Sigmund Brestisson	Royndir við flótitroli eftir svartkjafti
Gullfinnur	Royndir við flótitroli eftir svartkjafti
Petur á Gørðunum	Royndir við línu á djúpum vatni
Jógvan á Gørðunum	Royndir við línu á djúpum vatni
Brynhild	Royndir við dorg eftir makreli
Edda	Royndir við dorg eftir makreli
Dragasund	Royndir við gørnum eftir upsa
Fuglfirðingur	Royndir við botntroli eftir nebbasild
Kapilssund	Royndir við botntroli eftir nebbasild
Saturn	Royndir við kraftblokki vestanfyri 4°V
Rólant	Royndir við skeljadreggi
Poppy	Royndir við skeljadreggi
Karin Maria	Royndir við norskari nylonlínu
Hvítanes	1 maður við í Grønlandi
Havaldan	1 maður við botntroling undir Føroyum

	1977
Sigmundur Brestisson	Royndir við flótitroli eftir svartkjafti
Fuglfirðingur	Royndir við botntroli eftir nebbasild
Morgunstjørnan	Royndir við línu
Ranafossur	Royndir við línu
Reynsatindur	Royndir við línu
Miðvingur	Royndir við línu
Volunteer	Tarakanningar
Karin Maria	Royndir við línu eftir hávi
	1978
Leivur Øssursson	Royndir við ymiskum flótitrolum eftir svartkjafti
Krúnborg	Royndir við flótitroli eftir svartkjafti
Polarfisk	Royndir við flótitroli eftir svartkjafti
Suðringur	Royndir við troli eftir blálongu
Fame	Rækjuroyndir í Barentshavinum
Juvel	Royndir við gørnum eftir makreli
Royndarfarið	Tarakanningar

Talva 5b. Royndarfiskiskapur 1979/80.
Fyribilsuppskot frá Fiskirannsóknarstovuni.

1. Ídnaðartroling á djúpum vatni (>150 fv.) Størri ídnaðartrolari í 2 mánaðir.

2. Línuroyndir, svartkalvi. 1 størri línubátur í 1 mánaða.

3. Rækjutroling undir Føroyum. 1 minni rækjutrolari í 1 mánaða.

4. Garnaroyndir eftir sild og makreli. 2 bátar í 2 mánaðir.

5. Leiting eftir sild. 1 minni nótabátur í 1 mánaða.

6. Leiting eftir makreli undir Føroyum. 1 minni nótabátur í 1 mánaða.

7. Royndir við rúsum eftir brosmu og longu.

8. Broyting av svartkjaftatroli.

Talva 6. Dagar í drift »Jens Chr. Svabo«

Ár	mánaði	dagar í mánaði	dagar í sjónum	% í sjónum	viðmerkingar
1976	september	30	5.88	19.58	í dokk 20 dg í sept.
1976	oktober	31	8.77	28.29	eingin
1976	november	30	8.04	20.81	eingin
1976	desember	31	10.83	34.95	jólafrí 8 dagar
1977	januar	31	4.92	15.86	eingin
1977	februar	28	5.54	19.79	eingin
1977	mars	31	9.90	31.92	eingin
1977	apríl	30	5.94	19.79	páskafrí 5 dagar
1977	mai	31	9.54	30.78	í dokk 8 dagar
1977	juni	30	13.42	44.72	eingin
1977	juli	31	11.65	37.57	4 dagar Ólavsøka

Við eru bert dagar og tímar, tá skipið hevur verið leyst frá kei.

Talva 7. Dagar í drift hjá trimum fiskiskipasløgum (mett).

Trolbátur	umleið 150 dagar um árið
Minni feskfiskatrolari	umleið 220 dagar um árið
Stórur feskfiskatrolari	umleið 270 dagar um árið

Talva 8. Manningarútreiðslur m/s Jens Chr. Svabo 1978/79 og mettar útreiðslur, um manningin var 12 ella 15 mans.

9 mans	12 mans	15 mans
1.010.853,60	1.347.804,84	1.684.756,05

Talva 9. Útreiðslur hjá Jens Chr. Svabo í 1978/79.

Hýrur	kr.	1.010.853,60
Kostur	kr.	58.417,61
Olja	kr.	112.662,49
Umvælan og viðlíkahald	kr.	300.148,23
Kanningartól og fiskireiðskapur	kr.	123.808,05
Trygging o.a.	kr.	101.495,65
Ymiskt	kr.	2.671,08
	kr.	1.710.056,71
Søla av fiski	kr.	37.326,35

Skjal 10

Løgtingslóg
um
læraraútbúgving

Tilmæli um broytingar í
Betænkning om en læreruddannelseslov
på Færøerne 1976
Frá lærararáð Føroya Læraraskúla.

§ 5 stk. 2.

Ein partur av lærararáðnum mælir til at broyta orðingina soleiðis, at - »væsentlig« og - »forud for optagelsen« falla burtur.

Hereftir verður orðingin:

Foruden de i stk. 1 nævnte faglige kvalifikationer bør der lægges vægt på, at ansøgeren har deltaget i praktisk arbejde.

§ 9 stk. 1 pkt. 5.

Eitt sameint lærararáð mælir til at broyta 3 til 2.

Hereftir verður orðingin:

Videregående uddannelse i 2 af folkeskolens fag (linjefag).

§ 11

Eitt sameint lærararáð mælir til at seta eitt nýtt stykki inn millum stk. 1 og stk. 2.

Tað er soljóðandi:

Efter uddannelsens 1. år tilbydes der supplerende undervisning i færøsk sprogfærdighed i et rimeligt omfang. Ved denne undervisnings ophør kan der afholdes afsluttende prøve efter nærmere herom fastsatte regler.

Hereftir verða stk. 2, stk. 3, stk. 4 og stk. 5 at broyta nummarrað til ávikavist stk. 3, stk. 4, stk. 5 og stk. 6.

§ 11 stk. 3.

Mælt verður til at seta fylgjandi ískoyti:

Forud for prøvens afholdelse gives af læreren en standpunktsbedømmelse, der påføres eksamensbeviset sammen med elevens standpunkt ved den afsluttende prøve.

§ 11 stk. 4.

Mælt verður til at seta inn sum nýtt pkt. c:

Grundfag sang/musik. Der gives dog standpunktsbedømmelse af læreren/lærerne i faget. Jfr. § 9, stk. 1, pkt. 3.

§ 12 stk. 2

Mælt verður til at seta »Almindeligvis« — millum orðini: skal godkendes ..... seinast í stykkinum.

Hereftir verður ordingin .....men skal almindeligvis godkendes af censorerne.

§ 12 stk. 3.

Mælt verður til at seta -»læreren og«- millum: med censoren.

Ordingin verður hereftir soleiðis:

Opgaverne ved de skriftlige prøver stilles af skoledirektionen efter forhandling med læreren og censoren i faget efter regler fastsat af undervisningsministeren.

Lærararáðið mælit til at seta inn sum nýtt paragraf 14.

Med henblik på eventuel forsøgsundervisning bemyndiges undervisningsministeren til at godkende visse afvigelser fra denne lov.

Hereftir verða fylgjandi prgf. at flyta eitt talstig uppeftir, soleiðis at lógin kemur at innihalda 29 paragraffir.

§ 16 stk. 1.

Mælt verður til at broyta seinastu ordini: de kommunale skolemyndigheder — til: skoledirektionen.

Seinasta brot kemur hereftir at verða orðað soleiðis:

Sådan bestemmelse kan kun træffes efter aftale med øvelsesskolens leder og skoledirektionen.

Viðmerkingar til broytingartilmælini eru settar upp á serstøkum fylgiskjali.

Tórshavn, tann 7. 4. 79.

Fyri lærararáðið:
Kurt Madsen, formaður
Andrias Løjgaard, rektari

Viðmerkingar til tilmæli um broytingar í betænkning om læreruddannelseslov på Færøerne — 1976.
Frá lærararáð Føroya Læraraskúla:

§ 5, stk. 2.

Broytingaruppskotið ger ordingina linari. Ført verður fram, at ein støðgur (eitt ár ella fleiri) í lesnaðinum kann hava eina negativa ávirkan.

Í royndi og veru er praksis tann, at yvirhøvur verður tikið upp frá tí eldra endanum, og viðførir hetta, at tey allarflestu — um ikki øll — hava verið í praktiskum arbeiði, áður enn tey verða upptikin á Føroya Læraraskúla.

Eisini sputnir gurin um dokumentatión kann volda trupulleikar (arbeiði heima hjá foreldrum/vinna hjá fremmandum arbeiðsgevara).

Lærararáðið, sum saman við rektaranum einsamalt hevur ábyrgdina av uppløkuni, ynskir ikki at vera meira bundið av lógini enn neyðugt í hesum spurningi.

§ 9 stk. 1, pkt. 5

Linjulestur sambært lógaruppskotið er nú royndur í skjótt 2 ár.

Hesi tilboð hava verið givin:

Føroyskt, danskt, fysikk/kemi, matematikk, biologi, geografi, søga, enskt, týskt, kristni, evning, sang/musikk, smíð, hondarbeiði, húshaldslæra og fimleikur — í alt 16 tilboð.

Minst loyvda næmingatal í bólkinum er 3.

Við tí lítla næmingatali á hvørjum árgangi (24), verður neyvan nakrantíð møguligt at ganga øllum primetum ynskjum á møti, men neyðugt verður við einum ella fleiri umvalum, og summar linjugreinir koma at falla burtur á hvørjum árgangi.

Royndirnar higartil vísa, at við 3 linjugreinum verður vikutímatali teirra lesandi ov stórt, **um nóg mikið skal koma burtur úr** — tað verður ov mikið trýst á linjugreinalestrinum og ov lítil tíð til sjálvlesnað. Tað fakliga støðið hjá teimum, sum byrja lestur við Læraraskúlan, hevur víst seg vera veikari yvirhøvur, enn væntast kundi. Eisini hevur tað víst seg, at mong av teimum lesandi eru ivasom um triðja val.

Viðmerkjast skal, at við 2 tilvalum og við føroyskum sum øðrum vali, kunnu trupulleikar taka seg upp við setan í tí danska skúlaverkinum, við tað, at føroyskt hat ikki er relevant linjugrein.

2 kravdar linjugreinir geva sjálvsagt færri møguleikar at uppfylla valynskini — 48 mótvegis 72 við 3 valgreinum (við einum árgangstali upp á 24).

Hóast hesar avmarkingar vil lærararáðið avgjørt mæla til, at tað kravda linjugreinatalið verður sett til 2.

§ 11, nýtt stk. 2.

Royndirnar av undirvísingini eftir lógaruppskotinum hava víst, at ein teiðiliga stórur partur av teimum lesandi — aftan á at hava havt føroyskt í eitt ár — ikki eru nóg stinn í málbutðinum, serskrakliga í skrivligum.

Hetta kemst millum annað av, at summi av teimum lesandi hava tikið HF — ella studentsprógv í Danmark.

Tí vil ein meiriluti av lærararáðnum mæla til, at lógin má geva møguleika fyri framhaldandi undirvísing í føroyskum. Pricipielt eigur tilboðið at standa øllum í boði, men tørvurin verður størstur hjá teimum, sum ikki velja føroyskt sum linjugrein.

Meginparturin av teimum lesandi hevur í skrivi til lærararáðið biðið um at fáa hesa broyting í lag.

Spurningurin um karaktergeving fyri henda eykalestur, og hvørt karakteturin skal føtast inn á prógvskjalið eigur at takast upp til viðgerðar av teirri nevnd, sum verður sett til at orða kunngerðina til ta nýggju læraraskúlalógina.

§ 11 stk. 3.

Tað verður hildið rættast at lógarfesta regluna um árskarakter (lærarametingina). Samber § 11 stk. 5.

§ 11 stk. 4.

Tað hevur í praksis víst seg trupult at hava prøvtøku í grundskeiðinum sang/musikk. Nevnast kann, at eftir donsku læraraskúlalógini krevst í sang/musikk einans, at tann lesandi hevur møtt upp ávísan part av tímunum (80%). Á Føroya Læraraskúla er møtiskylda, og skuldi tí verið nóg mikið við einari lærarameting, sum verður førd inn á prøvskjalið.

§ 12, stk. 2.

Í summum lærugreinum kann tað koma fyri, at tann/tey lesandi skriva eina størri uppgávu, sum skal leggjast til grund fyri prøvtøkuna (afløsningsopgave). Í slíkum føtum kann tað gerast torført at fáa censorgóðtøku í rímiligari tíð. Ymisk kann vera, hvønn part av pensum serligur dentur hevur verið lagdur á.

§ 12, stk. 3

Uppskotið miðar ímóti at lógarfesta ein praksis, sum ofta hevur verið fylgdur. Tað má haldast heilt rímuligt, at tey, ið gera tær skrivligu uppgávurnar, gjøgnum læraran gerast gjølla kunnug við hvønn part av pensum serligur dentur hevur verið lagdur á.

Nýtt § 14.

Lærararáðið metir tað at verða natúrligt og neyðugt, at lógin hevur ein royndarparagraf.

§ 16, stk. 1

Vísast skal á, at læraraskúlin bet kostnaðin (læraralønir) fult út av teimum tímum, sum fastir lærarar við læraraskúlan lesa á Venjingarskúlanum. Tórshavnar kommuna hevur ongar útreiðslur av hesum.

Aftur at hesum kann vísast til stk. 2, har tað er skúlastjórnin, sum gevur loyvið. Tí heldur lærararáðið tað vera eyðsæð, at henda broyting eigur at gerast. Allar aðrar staðir í lógini, har talan er um samstarv millum Læraraskúlan og Venjingarskúlan verður avgerðarrætturin latin rektara og venjingarskúlastjóra upp í hendur, ella í summum føtum skúlastjórnini.

§ 22, stk. 4. og stk. 5.

Hildið verður neyðugt í kunngerðini nærri at lýsa, hvat orðini »nødvendig« og »normalt« standa fyri.

§ 23, stk. 2.

Í kunngerðini eigur nærri at tilskilast undir hvørjum formi Læraraskúlarektarin úttalar seg.

Føroya Landsstýri

Tórshavn, 23. juli 1979.

Viðvíkjandi uppskotinum til nýggja læraraútbúgvingarlóg.

Sum svar til skriv landsstýrisins dagfest 7. mei 1979, har ið eg hjálagt fekk sent til ummælis skriv frá Føroya Læraraskúla við tilmæli um broytingar í »Betænkning om læreruddannelseslov på Færøerne 1976«, skal eg hervið viðmerkja eftirfylgjandi:

Sum kunnugt eru nú meira enn 3 ár liðin, síðani álitið við uppskoti til nýggja lóg um læraraútbúgving í Føroyum var lagt fram, tann 11. mars 1976. Somuleiðis er kunnugt, at Læraraskúlin stutt eftir fór at skipa undirvísing sambært hesum uppskoti, og nú er komið hartil, at næmingar í 3 ár hava fingið undirvísing eftir hesi skipan.

Tað var tí við stórum forvirni, at eg sum formaður í teirri nevnd, sum gjørdi uppskotið og legði tað fram, fór undir at kanna tær viðmerkingar og tey broytingaruppskot, ið komu frá Læraraskúlanum, nú aftan á at hann hevði gjørt sínar royndir í 3 ár.

Tað var ongantíð hugsað, at uppskotið var lýtaleyst, og longu, tá ið tað varð gjørt, vóru ymisk fyribrigdi í uppskotinum, sum eitt sjálvt var í iva um. Eisini er eitt og annað hent hesi 3 ártini síðani tá bæði í skúlans verð og í samfelagnum annars, sum kundi verið orsøk til, at okkurt hevði verið øðrvísi sett fram í dag, enn tað tá var sett fram, og sumt av tí hevði verið í tráð við tær broytingar, ið ynsktat verða í hjálagda skrivi frá Føroya Læraraskúla.

Tað var tí við ávísari vælnøgd, at eg kundi síggja, at skipanin sambært uppskotið hóast alt hevði roynst so mikið væl, at Læraraskúlin ikki hevði álvarsligari viðmerkingar enn hann hevði. Tí hóast broytingarnar, ið ynsktar verða, eru fleiri, so eru tær flestu smáar.

Persónliga eri eg í mongum førum samdur við Læraraskúlan viðvíkjandi broytingunum, men tó ikki heilt í øllum, og fyri at fáa eitt greiðari yvirlit skal eg eftirfylgjandi gera viðmerking til hvørt punktið sær:

Til § 5 stk. 2.

Eg skal ikki mótmæla, at broytt verður soleiðis, sum lærararáðið hevur skotið upp.

Viðmerking.

Um tað mundið, tá ið uppskotið varð gjørt, var nógv tala um, at nú ið ungdómurin gongur so leingi í skúla, verður vandi fyri, at hann verður ov fremmandur fyri tí praktiska arbeiðinum, og tá ið nevndin hevði ætlanir um at skjóta upp at seta størri bókliga útbúgving sum treyt fyri upptøku á Læraraskúlan, so var mett, at tað samstundis átti at verða kravt, at tey, ið komu inn á Læraraskúlan, kendu nakað til tað praktiska arbeiðslívið. Fyrsta uppskotið, sum eg sjálvur setti fram í nevndini, var 1/2 ár í praktiskum arbeiði sum treyt fyri upptøku; men tað fekk ikki undirtøku av fleirtalinum í nevndini, og aftan á tingingar aftur og fram bleiv orðalagið soleiðis, sum tað stendur í uppskotinum frá nevndini.

Fleirtalið í lærararáð Læraraskúlans heldur nú, at eisini hetta orðaljóðið er nóg so nógv krevjandi og vil hava strokið orðið »væsentlig«.

Av tí at eg meti, at tað í veruleikanum fer at føra til nakað tað sama úrslit viðvíkjandi upptøkuni, um hetta orðið stendur ella ikki, skal eg ikki mæla ímóti, at tað verður strokið. Eg eri samdur við lærararáðnum í, at tað kann vera torført í ávísum førum at dokumentera, at ein hevur arbeitt praktiskt arbeiði, t. d. heima hjá mammuni.

At orðini »forud for optagelsen« verða strokin, havi eg onki ímóti, tí tey eru helst óneyðug í hesum sambandinum.

Til § 9 stk. 1. pkt. 5.

Eg eri ikki heilt samdur við lærararáðnum í hesi broyting.

Viðmerking.

Tá ið nevndin í síni tíð mælti til at hava linjulestur í trimum lærugreinum og ikki tveimum sum við danskat læraraskúlar, so var tað tí, at mett var, at vit, orsakað av at fleirtalið av fólkaskúlum okkara hava heldur fáar lærarar, hava meira brúk fyri lærarum við heldur breiðari útbúgving enn lond, har flestu skúlar eru stórir.

Nevndin var eisini greið yvir, at við ein so lítlan læraraskúla sum okkara, fór altíð at verða torført at uppfylla valyriski næmingatna, men at tað kortini fór at bera frægari til við trimum vallærugreinum enn við tveimum.

Tað var onganlíð ætlan nevndarinnar, at næmingarnir skuldu koma at hava stóra meira vikutímatal við at hava 3 linjulærugreinir. Ætlanin var, at útbúgvingin skuldi vera breiðari, men tilsvarandi grynri á henda hátt, soleiðis at skilja, at í staðin fyri t.d. at býta 12 tímar til linjulærugreinirnar í tvey (6 t. + 6 t.), um tvær linjulærugreinir vóru, skuldi verða býtt í trý (4 t. + 4 t. + 4 t.) við trimum linjulætugreinum.

Mett var, at henda útbúgving í dýpdini skuldi givið nóg mikið til, at

lætarar undirvístir á henda hátt, skuldu verið førir fyri at undirvíst í framhaldsdeild fólkaskúlans.

Eisini var mett, at henda útbúgving skuldi verið gott grundarlag hjá teimum lærarum, sum seinni ætlaðu sær at búgva seg víðari út til tess at kunna gerast lærari á onkrum øðrum lærustovni her á landi, har ið ikki verður kravt akademikaraútbúgving.

Eins og eg fyri 3 árum síðani var samdur í tí, sum sett var í uppskotið hesum viðvíkjandi, so eri eg tað somuleiðis enn.

Eg haldi framvegis at skipanin við 3 linjulærugreinum er betur hóskandi her á landi; og viðmerkingarnar frá lærararáðnum hava ikki kunnað sannfirt meg um, at teirra uppskot er á meira rættari leið. Heldur er tað tvørturímóti.

Til § 11 stk. 2.

Skal ikki mæla ímóti hesum uppskoti lærararáðsins, men heldur mæla til, at henda broyting verður gjørd, soleiðis at nýtt stykki kemur inn her.

Til § 11 stk. 3.

Skal ikki mæla ímóti hesum uppskoti lærararáðsins, men heldur mæla til, at henda broyting verður gjørd.

Til § 11 stk. 4.

Eg eri samdur við broytingaruppskoti lærararáðsins, men orðaljóðið hevði verið betri, um tað stóð soleiðis:

c) »sang og musik efter § 9, stk. 1, pkt. 3. Der gives dog standpunktsbedømmelse af læreren/læerne i faget«.

Viðmerking.

Tá ið lærugreinin sangur/tónleikur í grundútbúgvingini var sett sum prøvtøkulærugrein í upprunaliga uppskotinum, var tað við tí í huga, at ein lærugrein, ið ikki er prøvtøkulærugrein ímillum mangar aðrar prøvtøkulærugreinir, er heldur illa fyri, hvat ið áhuga næminganna viðvíkur. Men lærararáðið hevur ivaleyst rætt í tí, at henda lærugreinin er vánaliga egnað sum prøvtøkugrein; eisini hóast so er, at tey, ið minst evni hava til hesa lærugrein, kunna hava valt hana frá. Sambært § 9, stk. 1, pkt. 3 skulu tey bert hava 3 lærugreinir av 5, og tí kunna teir næmingar, ið eingi evni hava til sang/tónleik velja hana frá. Men við at geva árskarakter skuldi helst borið til at hildið uppmøtingina og áhugan á góðari leið, og tað skuldi eisini borið til hjá teimum, sum skulu seta lærara at fáa skil á, hvør ið er førur fyri at syngja og spæla, og hvussu tey eru før fyri tí.

Til § 12 stk. 2.

Eri samdur við lærararáðnum her.

Til § 12 stk. 3.

Her eri eg ikki samdur við lærararáðnum.

Viðmerking.

Sum ført fram í viðmerkingini frá lærararáðnum, hevur tað oftast verið praktiserað tey seinastu árini, at læraraír hava verið spurdir um, hvat teir hava lisið í árinum, og ein orsøk til hetta hevur verið, at vit ikki í fleiri ár hava havt eina vetuliga góðkenda lesiætlan, og tær fyribilsætlanir, ið vit hava havt, hava verið fyri nógvum broytingum. Tað hevur tí verið neyðugt hjá teimum, ið hava gjørt uppgávurnar, at samráðast við læraraarnar, og hetta eigur kanska í mongum førum eisini at fara at vera gjørt í framtíðini, sjálvt um vit fara at hava fingið nýggjar góðkendar lesiætlanir; men **eg haldi ikki, tað er beint at seta hetta í sjálva lógina.**

Fyri orðið »skoledirektionen« eigur helst at skula setast »undervisningsrådet«.

Til nýggja § 14.

Skal onki siga ímóti, at nýggj § 14 verður sett inn her.

Eg kann vera samdur við lærararáðnum í tí, at tað kann vera hent, at lógin hevur eina royndargrein.

Til § 16 stk. 1.

Kann vera samdur við lærararáðnum í hesum broytingaruppskoti; men fyri orðið »skoledirektionen« eigur tó helst at setast »undervisningsrådet«.

Annars er sum heild at viðmerkja, at við tí broyting í huga, sum vit um stutta tíð fara at fáa í stýringini av skúlaskapinum, eigur orðið »skoledirektionen« helst at ganga út alla staðni í uppskotinum, og í staðin fyri eigur helst at verða sett »undervisningsrådet« ella kanska onkuntíð »undervisningsdirektoratet«, og kanska eigur í onkrum føri orðið »undervisningsministeren« at vera skift út við »landsstýrið« ella kanska í onkrum føri við »undervisningsrådet«.

Men hvussu tey røttu orðini hesum viðvíkjandi skulu koma á tað rætta staðið í lógaruppskotinum má vera eitt mál, sum tey lógkønu mugu taka sær av.

Ludvig Petersen

Skjal 10 C

Nýggjar viðmerkingar frá lærararáð Føroya læraraskúla um uppskot til ta komandi læraraútbúgvingarlógina.

Tann 7.4.79 sendi lærararáð Føroya Læraraskúla til Føroya Landsstýri tilmæli um broytingar í »Betænkning om en læreruddannelseslov på Færøerne« saman við tilhoyrandi viðmerkingum.

Í skrivi frá 23. juli 1979 hevur landsskúlastjórin Ludvík Petersen gjørt sínar viðmerkingar til nevndu tilmæli.

Lærararáðið hevur á fundi tann 14. (og 20.) november havt viðmerkingar landsskúlastjórans til umrøðu.

Í royndd og veru eru bert 2 punktir, sum ymiskar meiningar eru um § 9 stk. 1 pkt. 5 og § 12 stk. 3.

Viðvíkjandi § 9 stk. 1 pkt. 5

Undir teirri nýggju viðgerðini kom fram, at semjan, sum víst varð til í tilmælinum frá 7. 4. 79, á fundinum 14.11. ikki var so fullkomin, sum áður hildið. Aftaná drúgvt orðaskifti vísti atkvøðugreiðslan fylgjandi:

Fyri 2. linjugreinum:	6 atkvøður
Fyri 3. linjugreinum:	8 atkvøður
Fyri 2. linjugreinum við møguleika fyri einari 3.:	3 atkvøður

Málið er altso torført at koma til sættis um.

Tá tað í tilmælinum frá 7.4.79 stendur »Eitt samein lærararáð« kemst hetta í fyrstu syftu av, at lærararáðið tá samdist um at vísa sameining út eftir.

Í aðru syftu kann vísast á, at líknandi drúgvt orðaskifti hevur verið um orðingina av § 9 stk. 3 »Grunduddannelsen i 3 af fagene ...etc.

Har var ein partur av lærararáðnum upprunaliga fyri at broyta 3 til 2.

Hetta kom ikki ígjøgnum, meðan uppskotið um at broyta linjugreinatalið frá 3 til 2 varð viðtikið.

Tað er mest líkt til, at lærararáðið ella í minsta lagi ein partur av ráðnum heldur tað vera neyðugt og rímiligt við niðurskurði í øðrum førinum, men full semja er fyti hvørgum.

Í hvussu er eru hesir ivaspurningar á ein vissan hátt natúrliga samantengdir.

Viðvíkjandi § 12 stk. 3.

Lærararáðið heldur fast við tilmæli sítt frá 7. 4. 79.

Vísi verður til hjálagt uppskot frá lærara og lesandi um ótraditionellan prøvtøkuform í skrivligari matematik.

Um slíkur prøvtøkuformur skal kunna gjøgnumførast, gerst neyðugt við sínámillum forhondssamráðingum millum lærara og prøvdómara longu í 7. lestrarhálvu ella kanska fyrr.

Andrias Højgaard

SKJAL 10 C

Tórshavn 16. 11.79.

Til Føroya Landsstýri
Tinganes

Á fundinum við landsstýrismannin í skúlamálum í heyst, har uppskot um broytingar í »Betænkning om en læreruddannelseslov på Færøerne« frá 1976, vóru til viðgerðar, kom til sjóndar, at full semja ikki var um okkurt av brovtíngaruppskotunum.

Lærarar og næmingar á Føroya Læraraskúla samdust tí um, at taka hesar spurningar upp av nýggjum.

Aðalnevnd næminganna hevur spurt næmingarnar á skúlanum um teirra áskoðan um hesar spurningar. Og eru tí viðløgd skjøl at rokna sum niðurstøða næminganna.

Tilmæli frá Aðalnevnd næminganna á Føroya Læraraskúla, um broytingar í »Betænkning og en læreruddannelseslov på Færøerne« frá 1976.

§ 9 stk. 1 pkt. 1

Mælt verður til, at lærugreinirnar pedagogikk og undirvísingarlæra verða lagdar saman til eina lærugrein.

Orðingin verður soljóðandi:

De pædagogiske fag: Pædagogik/undervisningslære, psykologi, praktisk skolegerning og pædagogisk speciale.

§ 9 st. 1 pkt. 2.

Flest allir næmingar og lærarar á Føroya Læraraskúla eru samdir um, at lærugreinin Føroyskt eigur at verða styrkt. Tí vilja vit mæla til, at føroyskt fær eitt pkt. fyri seg í lógini.

Stk. 1 pkt. 2 verður tá soljóðandi:

Faget færøsk med kendskab til islandsk og norsk.

Sum ein fylgja av hesum meta vit at § 11 stk. 1, má broytast samsvarandi. Sí hetta undir viðmetking til § 11 stk. 1.

(§ 9 stk. 1 pkt. 2)

Tá vit nú hava hugsað okkum at føroyskt verður strikað undir pkt 2 hava vit ætlað at restin av lætugreinunum undir pkt. 2 koma undir eitt nýtt pkt. 3.

Stk. 1 pkt. 3 verður tá soljóðandi:

Fagene dansk med kendskab til svensk, skrivning, regning, kristendomskundskab og legemsøvelser med svømning.

Hereftir verður pkt. 3 til pkt. 4 og pkt. 4,5 og 6 at broyta til ávíkavist pkt. 5,6 og 7.

§ 9 stk. 1 pkt. 3

Við tað at vit ynskja eina styrkta støðu til lærugreinina føroyskt, er greitt, at hetta krevur at skorið verður niður aðtastaðni. Tí fara vit at mæla til, at núverandi pkt. 3 verður **talið á gundskeiðum lækkað** úr trimum niður í tvey.

§ 9 stk. 1 pkt. 5.

Ein meiriluti av næmingunum mælir til, at núverandi pkt. 5 verður broytt — við trimum linjugreinum.

§ 11 stk. 1.

Henda broyting er nær knýtt at tilmælinum um broyting í § 9 stk. 1 pkt. 2, og eigur tí at verða lisin við hesum í huga.

Vit hugsa okkum § 11 stk. 1 soljóðandi:

Uddannelsen efter § 9 stk. 1 pkt. 3, i fagene dansk, skrivning, regning og kristendomskundskab skal afsluttes med en prøve ved udgangen af uddannelsens første år (restin óbroytt).

N. B. við pkt. 3 verður sipað til tann partin av pkt. 2, ið vit mæltu til at broyta til pkt. 3.

Vegna Aðalnevnd næminganna

Viðmerkingar til tilmæli um broytingar.

Viðmerkingar til verandi § 9, stk. 1 pkt. 1.

Tær royndir, sum eru gjørdar seinastu fýra árini í lærugreinunum pedagogik og undirvísingarlæru, vísa, at hesar lærugreinir eru so nær knýttar at hvørjari aðrari, at grundarlag er ikki fyri at lesa tey atskild.

Viðmerkjast kann, at undir okkara umstøðum verður talan um sama lærara í báðum lærugreinum.

Viðmerkingar til ætlaða § 9 stk. 1, pkt. 2 og § 11 stk. 1.

Tað verður mett, at allir lærarar hava stóran tørv á hollum kunnleika um tað føroyska málið, antin teir undirvísa beinleiðis í hesi lærugrein ella ikki. Av tí at tað hevur verið mett bæði av næmingum og lærarum, at hetta støðið ikki er so gott, sum ynskjast kann, hava vit hildið tað verið tætt, at føroyskt verður styrkt við hækkaðum tímatali og kemur at fevna um. t.d. trý ár í mun til núverandi eina ári.

Viðmerkingar til núverandi § 9 stk. 1 pkt. 3.

Í fyrsta lagi er hesin niðurskurður ætlaður sum ein máti at geva rúm fyri føroyskum á einari frammanundan ov trongari tímatalvu.

Í øðrum lagi hava toyndir víst, at tá næmingar skulu velja trý grundskeið, verður triðja valið ofta eitt frával av restini ístaðin fyri eitt val. (t.d. hevur ein maður uttan áhuga fyri tónleiki og uttan forkunnleika til handarbeiði einki val).

Viðmerkingar til nuverandi § 9 stk. 1, pkt. 5.

Tað er ikki stór semja um hetta pettið. T.d. eru tey, sum hava flestu royndirnar, 4. fl., ikki serliga samd, meðan semjan er størri í 1. og 2. fl. Tey flestu eru samd um, at vandin fyri at fleiri lærugreinir detta burtur er stórur, um talið av linjugreinum verður sett til tvey.

Tað kann skapa ónøgd hjá teim næmingum, sum ikki kunnu fáa eina lærugrein, tí hon er dottin burtur.

Haraftur ímóti er 4. fl. samdur um, at arbeiðsbyrðan kann gerast ov tung við trimum linjugreinum. Tí má dentur leggjast á, at endamálið við linjulestrinum verður endurskoðað og kunngerðirnar broyttar.

Tað kann nevnast, at meirilutin í 4. fl. var fyri tveimum linjugreinum, um føroyskt samstundis varð økt so nógv, at tað kundi verða roknað sum ein linjugrein hjá øllum.

Annars kunnu næmingarnir sum heild taka undir viðmerkingunum hjá L. Petersen landsskúlastjóra um at varðveita tríggjar linjugreinar.

Ár 1980 tann 23. januar kl. 15.30 var fundur í Landsskúlaráðnum á skrivstovuni í Jónas Broncksgøtu 27,1.

Á fundi vóru Signar Hansen (formaður), løgtingsmaður, Torkil Beder, sóknarprestur, Edmund í Garði, løgtingsmaður, Petur Eli Mikkelsen, fyrstilætari og Petur Højgaard Simonsen, fyristøðumaður.

Ludvig Petersen, landsskúlastjóri, ið er avgreiðslustjóri hjá Landsskúlaráðnum, og Petur Jacob Sigvardsen, ið var skrivari, vóru eisini á fundi. Avgreitt var:

Uppskot til nýggja læraraskúlalóg.

4. J.nr.

Landsskúlaráðið samtykti at viðmæla uppskotið við teirri viðmerking:

a) føroyskt verður kravd lærugrein øll árini.

b) grundútbúgving í trimum av teim 5 lærugreinunum.

c) linjulesturin í tveimum av lærugreinunum í fólkaskúlanum.

Viðvíkjandi § 12. 3 stk. var semja í Landsskúlaráðnum um, at nevnda stykkið skuldi hava ta upprunaligu orðingina, ið ljóðar soleiðis:

Uppgávurnar til tær skrivligur royndirnar setur landsskúlastjórin eftir samráðing við prógvdómaran í lærugreinini eftir reglum sum landsstýrið ásetur.

Skjal 10 E

Betænkning
om
EN LÆRERUDDDANNELSESLOV PÅ FÆRØERNE

afgivet af
det af Færøernes skoledirektion
den 30. november 1972 nedsatte udvalg

Tórshavn 1976

Indholdsfortegnelse

		Side
Kapitel 1.	Udvalget nedsættelse og kommissorium	3
Kapitel 2.	Forslag til lov om læreruddannelsen på Færøerne	4
Kapitel 3.	Bemærkninger til lovforslaget	13

Kapitel 1.

Udvalgets nedsættelse og kommissorium

På et møde i Færøernes skoledirektion den 30. november 1972 vedtog denne at nedsætte udvalg til at udarbejde forslag til ny læreruddannelseslov. Det blev samtidig vedtaget, at de medlemmer, der havde været medlemmer af det af landsstyret nedsatte HF-udvalg, burde være medlemmer af udvalget vedrørende læreruddannelsesloven.

Uvalget kom således til at bestå af følgende:

Landsskolekonsulenten som formand, seminarierektor, gymnasierektor, en repræsentant for seminarieeleverne, en repræsentant for læreforeningen og en repræsentant for gymnasieeleverne.

I skrivelse af 26. september 1973 anmodede skoledirektionen de pågældende om at indtræde i udvalget.

Dette afholdt sit første møde den 21. november 1973 med følgende sammensætning:

Landsskolekonsulent Ludvig Petersen (formand)
Rektor Andreas Højgaard, Færøernes seminarium
Rektor Arnbjørn Mortensen, Føroya Studentaskúli
Fuldmægtig Inger Christiansen, Færøernes Landsstyre
Overlærer Eilif Samuelsen, Føroya Læraraf felag
Seminarieelev Petur Simonsen
Gymnasieelev Magni Dalgaard

Skoledirektionen godkendte på et møde den 17. marts 1975, at fuldmægtig J. A. Sørensen udpegedes til sekretær for udvalget.

Fra det andet møde blev Petur Simonsen afløst af Jóannes Ejdesgaard og Magni Dalgaard af Helena Dam, og på det syvende møde blev Jóannes Ejdesgaard afløst af Magnus Hansen og Helena Dam af Sonja Sørensen.

Udvalget har afholdt i alt 16 møder.

Tórshavn, den 11. marts 1976.

Inger Christiansen	Ludvig Petersen (formand)
Magnus Hansen	Eilif Samuelsen
Andreas Højgaard	Sonja Sørensen
Arnbjørn Mortensen	John Arne Sørensen

Forslag til lov om læreruddannelsen på Færøerne.

Kapitel I
Almindelige bestemmelser

§ 1

Uddannelsen har til formål at uddanne lærere til folkeskolen. Uddannelsen tager tillige sigte på at give grundlag for undervisning i andre skoleformer.

Stk. 2. Uddannelsen skal give de faglige og pædagogiske kundskaber og den praktiske skoling, der er nødvendig for at kunne planlægge, gennemføre og vurdere undervisningen og tilpasse denne efter skiftende forudsætninger i skolen og hos eleverne.

Stk. 3. Uddannelsen skal fremme de studerendes personlige udvikling gennem arbejde med stoffet, gennem samarbejde og gennem medansvar for detes uddannelse.

Stk. 4. Uddannelsen skal vække interesse for pædagogisk udviklingsarbejde og give grundlag for forståelse af sammenhængen mellem lærergerningen og skolens funktion i samfundet.

Stk. 5. Uddannelsen skal opøve de studerede til at samarbejde med forældre, kolleger og andre, der er ansvarlige for elevernes opdragelse og uddannelse.

§ 2

Uddannelsen gives på Færøernes Seminarium og er 4-årig.

§ 3

Færøernes skoledirektion kan efter indstilling fra seminariet bestemme, at undervisning i et eller flere fag og kurser kan finde sted i helt eller delvist samarbejde med andre uddannelsesinstitutioner.

§ 4.

Undervisningsministeren kan efter indstilling fra Færøernes skoledirektion bestemme, at der ved seminariet kan etableres andre uddannelser i samarbejde med læreruddannelsen.

Kapitel II
Optagelse på Færøernes seminarium

§ 5

Optagelse på seminariet er betinget af, at ansøgeren har bestået højere forberedelseseksamen, studentereksamen eller kan dokumentere tilsvarende kundskaber.

Stk. 2. Foruden de i stk. 1. nævnte faglige kvalifikationer bør der lægges i væsentlig vægt på, at ansøgeren forud for optagelse har deltaget i praktisk arbejde.

§ 6

Optagelse på seminariet sker ved skoleårets begyndelse.

Stk. 2. Færøernes skoledirektion kan dog under særlige omstændigheder tillade fravigelse af denne bestemmelse.

§7

Afgørelse om optagelse træffes af seminarierektoren efter forhandling med lærerrådet.

§ 8

Færøernes skoledirektion kan efter indstilling fra seminariet bestemme, at uddannelse erhvervet andre steder kan indgå i læreruddannelsen.

Kapitel III

Læreruddannelsen

§ 9

Uddannelsen skal for alle studerende omfatte:

1. De pædagogiske fag: pædagogik, psykologi, undervisningslære, praktisk skolegerning og pædagogisk speciale.

2. Fagene færøsk med kendskab til islandsk og norsk, dansk med kendskab til svensk, skrivning, regning, kristendomskundskab og legemsøvelser med svømning.

3. Grunduddannelse i 3 af fagene formning, sang/musik, sløjd, håndarbejde og hjemkundskab.

4. Samtids- og samfundsorientering.

5. Videregående uddannelse i 3 af folkeskolens fag (liniefag).

6. suppletende kurser og fællestimer.

Stk. 2. Udover den i stk. 1 nævnte uddannelse kan de studerende vælge:

a) undervisning i form af kurser eller studiekredse.

b) undervisning i instrumental-musik.

Stk. 3. De studerende vælger pædagogisk speciale og liniefag inden for de givne muligheder.

Stk. 4. Skoledirektionen fastsætter efter forhandling med seminariet, hvilke fag, der kan være liniefag og kursusfag.

§10

Efter regler, det fastsættes af skoledirektionen efter forhandling med seminariet, kan studerende fritages for uddannelsen i et eller flere af de i § 9, stk. 1, nævnte fag, når ganske særlige forhold foreligger

Stk. 2. Oplysning om fritagelse gives i afgangsbeviset.

§ 11

Uddannelsen efter § 9, stk. 1, nr. 2, i fagene færøsk, dansk, skrivning og regning skal afsluttes med en prøve ved udgangen af uddannelsens 1. år.

På grundlag af resultatet af denne prøve og en vurdering af den pågældende i de øvrige fag, som undervisningen har omfattet efter § 9, stk. 1, herunder i praktisk skolegerning, afgør seminariet, om den enkelte studerende kan fortsætte uddannelsen i dens 2. år.

Stk. 2. Ved afslutningen af undervisning i faget praktisk skolegerning, foretages der en vurdering af den studerendes standpunkt. For at kunne afslutte den samlede uddannelse, skal den studerende have den undervisningsfærdighed, som er nødvendig til varetagelse af undervisning i folkeskolen.

Stk. 3. I de øvrige fag konstateres de studerendes standpunkt ved afsluttende prøver, der holdes ved den pågældende undervisnings ophør.

Stk. 4. Der holdes dog ikke prøve i

a) kursusemner efter § 9, stk. 1, nr. 6,

b) emner for undervisning efter § 9, stk. 2.

Stk. 5. Adgang til at gå op til lærereksamen har enhver, der har gennemgået den dertil sigtende undervisning.

§ 12

De i § 11 omhandlede prøver er skriftlige og mundtlige. Skoledirektionen kan tillade, at der afholdes skriftlige prøver i stedet for mundtlige i visse fag.

Stk. 2. Afgangsprøven afholdes af seminariets lærere med bistand af censorer, der i det fornødne omfang beskikkes af skoledirektionen for et bestemt åremål. Ligeledes beskikkes skoledirektionen formanden for censorerne. Seminariets lærere er eksaminatorer, spørgsmålene stilles af dem, men skal godkendes af censorerne.

Stk. 3. Opgaverne ved de skriftlige prøver stilles af skoledirektionen efter forhandling med censoren i faget efter regler fastsat af undervisningsministeren.

§ 13

Undervisningsministeren fastsætter efter indstilling fra skoledirektionen nærmere regler om

a) undervisningen og fagenes omfang,

b) formen for og fordringerne ved prøver og standpunktsbedømmelse,

c) prøvernes afholdelse,

d) karaktergivning og censur og

e) bevis for bestået eksamen.

Kapitel IV

Seminariet

§ 14

Seminariet ledes af en seminarierektor, der skal deltage i undervisningen i et af undervisningsministeren fastsat omfang.
Stk. 2. Til bistand for seminarierektoren ved tilrettelæggelsen af de studerendes uddannelse i praktisk skolegerning, kan der ansættes en praktikleder.

§ 15

Det er en betingelse for fastansættelse som seminariecadjunkt, -lektor eller rektor, at vedkommende foruden at have den fornødne kundskabsmæssige og pædagogiske uddannelse, skal have bestået en prøve i pædagogik og undervisningsfærdighed. De nærmere regler for denne prøve fastsættes af undervisningsministeren i samråd med Færøernes skoledirektion.

§ 16

Fastansatte lærere ved seminariet har pligt til efter seminarierektorens nærmere bestemmelse at overtage timer i den faste øvelsesskole som en del af deres pligtige timetal. Sådan bestemmelse kan kun træffes efter aftale med øvelsesskolens leder og de kommunale skolemyndigheder.
Stk. 2. Færøernes skoledirektion kan tillade, at en seminarielærer på tilsvarende måde overtager timer i andre skoleformer.

§ 17

Lærerrådet ved seminariet består af seminarierektoren, seminariets lærere, herunder timelærere, lederen af seminariets faste øvelsesskole og praktikkederen. Rådet vælger selv sin formand.
Stk. 2. De nærmere bestemmelser vedrørende rådets virksomhed fastsættes af undervisningsministeren efter indstilling fra skoledirektionen.

§18

De studerende ved seminariet vælger et råd, de studerendes råd.
Stk. 2. De nærmere bestemmelser om rådets sammensætning og beføjelser fastsættes af undervisningsministeren efter indstilling fra skoledirektionen.

§19

Undervisningen på seminariet er vederlagsfri.

§ 20

Afgørelser om bortvisning træffes af skoledirektionen efter indstilling fra seminariets rektor. Inden indstilling sker, skal sagen behandles i lærerrådet.

Kapitel V
Øvelseskolen

§ 21

Til seminariet skal være knyttet en øvelsesskole, der skal være udbygget med 8. - 10. årgang.
Denne drives af Tórshavn kommune, der er forpligtet til at stille øvelsesskole til rådighed, så længe seminariet opretholdes.
Stk. 2. Skolen og seminariet samarbejder om planerne for skolens virksomhed som øvelsesskole.
Stk. 3. De studerendes oplæring i praktisk skolegerning skal fortrinsvis foregå i denne øvelsesskole.

§ 22

Til supplering af den i § 21, stk. 3, nævnte oplæring i praktisk skolegerning gives der de studerende adgang til at få denne oplæring i andre folkeskoler eller anerkendte privatskoler, idet der tilstræbes, at de bliver bekendt med de forskellige skoletyper.
Stk. 2. Aftale om denne oplæring træffes af seminarierektoren med de pågældende skolers ledere, således at de nærmere planer for skolernes medvirken ved seminariets praktiske uddannelse lægges efter forhandling mellem seminariet og skolens leder.
Stk. 3. Alle offentlige skoler og private skoler, der modtager offentligt tilskud, er pligtige til at stille sig til rådighed for de lærerstuderendes oplæring i praktisk skolegerning i et omfang, der i tilfælde af uoverensstemmelse fastsættes af skoledirektionen.
Stk. 4. Er befordring af de studerende til og fra øvelsesskolen nødvendig, afholdes udgiften hertil af seminariet.
Stk. 5. De studerende modtager normalt ikke betaling for selvstændig undervisning i praktikperioderne.

§ 23

Forinden ansættelse af ledere af den til seminariet knyttede øvelsesskole finder sted, skal seminarierektoren have lejlighed til at udtale sig.
Stk. 2. Ved afgørelse af, hvilke lærere, der skal gøre tjeneste ved den faste øvelsesskole, skal der tages hensyn til skolens funktion som øvelsesskole. Seminarierektoren skal have lejlighed til at udtale sig, inden der træffes bestemmelse om tjeneste ved skolen.
Stk. 3. Lærerne ved øvelsesskolen og ved de suppletende skoler, der skal undervise de studerende i praktisk skolegerning, antages hertil af seminariet efter aftale med de pågældende skolers ledere.
Stk. 4. Til ledere og lærere ved de i stk. 3 nævnte øvelsesskoler ydes honorarer og/eller timenedsættelse, hvis størrelse fastsættes af skoledirektionen.

Kapitel VI
Videre uddannelse
§ 24

Videre uddannelse af folkeskolens lærere kan foregå på uddannelsesinstitutioner på Færøerne, i Danmark og i andre lande.

Stk. 2. Bestemmelser om denne uddannelse på Færøerne træffes af Færøernes skoledirektion.

Stk. 3. Bestemmelser om denne uddannelse uden for Færøerne træffes af undervisningsministeren efter forhandling med Færøernes skoledirektion.

§ 25

Lærere i folkeskolen eller ved private skoler med offentligt tilskud, herunder lærere på prøver, timelærere og faste vikarer, der midlertidigt må ophøre med deres lærergerning og må holde vikar under uddannelsen, kan få vikarafgiften dækket efter regler fastsat af undervisningsministeren efter forhandling med Færøernes skoledirektion.

§ 26

Der kan ydes stipendier til videre uddannelse til lærere, der ikke har ansættelse eller af en anden grund ikke har fået vikarudgift dækket efter § 25, samt til lærere, der har fået dækket vikarudgiften, men hvis videre uddannelse påfører dem særligt store udgifter.

Stk. 2. Undervisningsministeren fastsætter efter forhandling med Færøernes skoledirektion regler for ydelse af vikarudgiftsdækning og stipendier.

§ 27

Undervisningsministeren fastsætter — efter forhandling med Færøernes skoledirektion — regler for, i hvilket omfang deltagelse i videre uddannelse kan indgå i en lærers pligtige timetal og om ydelse af vikarudgiftsdækning.

Kapitel VII
Ikrafttræden m.v.
§ 28

Loven træder i kraft den 1. august 1976.

Stk. 2. Lov nr. 36 af 7. februar 1962 om læreruddannelsen på Færøerne ophæves. Denne lovs regler om læreruddannelsen finder dog fortsat anvendelse for de studerende, der har påbegyndt deres uddannelse i undervisningsåret 1975/76 eller tidligere.

Stk. 3. Færøernes skoledirektion kan fastsættes nærmere overgangsregler.

Bemærkninger til lovforslaget

De gældende bestemmelser om læreruddannelsen på Færøerne er fastsat i lov nr. 36 af 7. februar 1962. Den bestående undervisningsordning er imidlertid ikke tidssvarende, idet den navnlig ikke i tilstrækkeligt omfang tager hensyn til de krav til undervisningen, der stilles i den siden lovens tilblivelse meget større overbygning i folkeskolen. I 1962 var der 34 realklasser med 672 elever, medens der i 1974 var 51 realklasser med 1084 elever og 17 8. - 10. klasser med 811 elever. Hertil kommer de større krav, det stilles ved varetagelse af undervisningen i de valgfri fag. Disse vil blive accentureret, såfremt folkeskolen organiseres som enhedsskole.

I forbindelse hermed foreslås, at adgangsbetingelserne skærpes, således at HF, studentereksamen eller tilsvarende bliver adgangsgivende.

Efter forslaget indføres der mulighed for at etablere samarbejde med andre uddannelsesinsstitutioner og mulighed for at etablere andre uddannelser i samarbejde med læreruddannelsen.

Endvidere foreslås indførelse af liniefag i uddannelsen. Disse antal og den øvrige uddannelse er foreslået sammensat under hensyntagen til, at lærerne skal kunne ansættes såvel i skoler med overbygning og i bygdeskoler.

Efter forslaget indføres der bestemmelser om videre uddannelse og efteruddannelse af folkeskolens lærere.

Iøvrigt foreslås seminarieundervisningen opretholdt som en 4-årig uddannelse og således, at der optages elever i 1. klasse hvert år.

Til de enkelte bestemmelser i lovforslaget bemærkes iøvrigt følgende:

Til § 1.

Ved udarbejdelsen af formålsbestemmelserne har man anvendt bestemmelserne i de gældende færøske, danske, islandske og norske læreruddannelseslove. I stk. 1 er der sket en udvidelse i det område uddannelsen kan anvendes ved, idet der i modsætning til den gældende bestemmelse i den færøske og den danske lov er nævnt andre skoleformer, medens der i de øvrige love er anført aften- og ungdomsskole.

Til § 2.

Efter forslaget er uddannelsen 4-årig. Imidlertid er der i § 8 åbnet mulighed for, at uddannelsen erhvervet andre steder kan indgå i læreruddannelsen.

Til § 3.

Der tænkes her først og fremmest på et samarbejde med Fróðskaparsetur Føroya om lærere, lokaler og udstyr. Dette vil kunne blive af afgørende betydning, især for så vidt angår undervisningen i liniefag og supplerende kurset.

Til § 4.

Der tænkes bl. a. på uddannelse af børnehave- og fritidspædagoger.

Til § 5.

Bestemmelsen betyder en skærpelse i forhold til gældende regler. Som ovenfor er nævnt, er dette fundet paktrævet, og efter oprettelsen af HF-kurset i 1974 er der sammen med gymnasiet skabt væsentlige muligheder for at opfylde adgangsbetingelserne. Bestemmelserne i § 3 og § 5 i 1962-loven om vandel, sygdom og legemlig mangel samt egnethed for lærergerningen er udeladt.

Bestemmelsen i § 5, stk. 2, hænger nøje sammen med formålsbestemmelserne.

Til § 6

Bestemmelsen svarer til § 4, stk. 1, i den gældende lov. Den tænkes først og fremmest anvendt på de studerende fra andre seminarier.

Til § 7.

Bestemmelsen svarer til § 6, stk. 2, i den gældende lov.

Til § 8

Bestemmelsen, der svarer til § 4, stk. 3 i 1962-loven, tager først og fremmest sigte på uddannelse erhvervet på andre seminarier og på Fróðskaparsetur Føroya.

Til § 9

I forhold til 1962-loven er der foretaget følgende ændringer:

Under de pædagogiske fag er tilføjet pædagogisk speciale, der skal være et af følgende:

a. undervisning af elever i folkeskolens yngre klasser,
b. undervisning af elever af folkeskolens ældre klasser samt ungdoms- og fritidsundervisning og
c. undervisning af elever med særlige vanskeligheder.

Der indføres valgfrihed for så vidt angår fagene fomning, sang/musik, sløjd, håndarbejde og hjemkundskab.

Der etableres liniefag i uddannelsen. Ved udarbejdelsen er der søgt taget hensyn til, at uddannelsen skal være bred af hensyn til, at lærere skal kunne ansættes ved såvel skoler med overbygning som bygdeskoler.

Til § 10

Bestemmelsen svarer til § 14 i den gældende lov.

Til § 11

I forhold til 1962-loven er der indført eksamen i kristendomskundskab og sang/musik.

Til § 12

Stk. 2 og 3 svarer til § 9 i 1962-loven.

Til § 13

Det er skoledirektionens hensigt at nedsætte et studieplansudvalg til at udarbejde en bekendtgørelse om uddannelse af lærere til folkeskolen på Færøernes seminarium. I forbindelse hermed vil der blive nedsat underudvalg for de enkelte fag, sammensat af fagfolk til udarbejdelse af

læseplaner. I hvert underudvalg vil et medlem af studieplansudvalget blive til-forordnet.

Til § 14

Stk. 1 svarer til § 17, stk. 1, i 1962-loven. I stk. 2, er der tale om lovfæstelse af en gældende ordning. Praktiklederens opgaver vil bl.a. være på seminarietektorens vegne og ansvar og i samarbejde med øvelsesskolernes ledere og praktiklærere at tilrettelægge uddannelsen i praktisk skolegerning, og i det hele følge praktikanternes arbejde.

Til § 15

Bestemmelsen svarer til § 18, stk. 1, i 1962-loven.

Til § 16

Bestemmelsen svarer til § 18, stk. 2, i 1962-loven.

Til § 17

Bestemmelserne svarer til § 20, stk. 1, og 4 i 1962-loven, med den tilføjelse, at praktiklederen ligeledes er medlem af lærerrådet. Samtlige ikke fastansatte undervisere ved seminariet betragtes som timelærere.

Til § 18.

Bestemmelserne svarer til § 20, stk. 3 og 4, 1962-loven.

Det er skoledirektionens hensigt, at der udarbejdes bestemmelser om faste råd og udvalg m.m. på seminariet.

Til § 19

Bestemmelsen svarer til § 16, i 1962-loven.

Til § 20

Denne bestemmelse er et modstykke til optagelsesbetingelserne vedrørende helbred, vandel og egnethed. Da sådanne optagelsesbetingelser ikke stilles efter nærværende lovforslag, har man udformet bestemmelsen som en forskrift om, at den bortvisning, der i sjældne tilfælde vil kunne være nødvendig ved seminariet, kun kan ske efter skoledirektionens bestemmelse. Da bestemmelsen herefter ikke vedrøret selve læreruddannelsen er den flytter til kap. 4, hvor reglerne om seminariets ordning og administration iøvrigt findes.

Til § 21

Bestemmelserne svarer til de i § 11 i 1962-loven anførte.

Til § 22

Bestemmelserne svarer til de i § 12 i 1962-loven anførte.

Til § 23

Bestemmelserne svarer til § 19 i 1962-loven. I forslaget er det tilføjet en bestemmelse om ydelse af honorar og/eller timenedsættelse.

Til § 24

Her tænkes på vedligeholdelse og supplering af erhvervede kundskaber. Undervisningen kan f. eks. foregå på Fróðskaparsetur Føroya og i Danmark på Danmarks Lærerhøjskole, Danmarks Højskole for Legemsøvelser og Danmarks Sløjdlærerskole. For så vidt angår

uddannelsen i andre lande, kan der gives godkendelse heraf, såfremt indholdet mindst svarer til et årskursus på Danmarks Lærerhøjskole, f. eks. i fremmede sprog.

Til § 25

Der er her tale om lovfæstelse af en gældende ordning.

Til § 26

I denne § tænkes der på ekstraordinære store udgifter, der kan forekomme ved deltagelse i kurser uden for Færøerne.

Til § 27

Bestemmelsen tager sigte på deltagelse i kurser ved Fróðskaparsetur Føroya, der strækker sig over længere tid med deltagelse i undervisning i en eller flere dage om ugen.

Lov for Færøerne om læreruddannelsen

VI MARGRETHE DEN ANDEN, af Guds Nåde Danmarks Dronning, gør vitterligt:

Folketinget har vedtaget og Vi ved Vort samtykke stadfæstet følgende lov:

§ 1. Færøernes seminarium har til formål at uddanne lærere til folkeskolen. Uddannelsen skal tillige give et grundlag for undervisning i andre skoleformer.

§ 2. Undervisningen på seminariet er vederlagsfri.

§ 3. Videre uddannelse af folkeskolens lærere kan foregå på uddannelsesinstitutioner på Færøerne eller i Danmark.

§ 4. Færøernes hjemmestyre fastsætter de nærmere regler om læreruddannelsen og videre uddannelse af lærere.

Stk. 2. Regler, der specielt vedrører videre uddannelse på institutioner i Danmark, fastsættes dog af undervisningsministeren efter forhandling med hjemmestyret.

§ 5. Lovens ikrafttrædelsestidspunkt fastsættes af undervisningsministeren efter forhandling med Færøernes hjemmestyre.

Stk. 2. Samtidig ophæves lov nr. 36 af 7. februar 1962 om læreruddannelsen på Færøerne.

Givet på Christiansborg slot, den 14. februar 1979
Under Vor Kongelige Hånd og Segl
Margrethe R.

/Dorte Bennedsen

Broyting í lóg
um fuglaveiðu

Føroya landsstýri
3800 Tórshavn

Keypmannahavn, 6. apríl 1980

Uppskot til veiðubann av lomviga og álku

Sum kunnugt hevur talið av lomviga undir Føroyum verið støðugt minkandi seinastu 20-25 árini. Høvuðsorsøkin, til at ungfuglurin minkaði so bráddliga fyrst í 60-unum, var ivaleyst føðitrot. Færri pisur komu undan, og ungfuglurin helt minni til undir bjørgunum.

Henda broyting hevur ført við sær, at skjótingin nú tekur lutfalsliga meir av búfuglinum enn áður. Ágangurin frá byrsuni er samstundis vaksin. Ringt er at døma um mongdina av fugli, ið verður skotin, men í minsta lagi 400.000 skot verða loyst av á hvørjum ári. Ringmerkingarnar vísa, at geldfuglurin, t.v.s. ungfuglurin áðrenn hann verpur í fyrsta sinni, verður skotin, men umleið helvtin tykist at vera búfuglur.

Snaruveiðan minkaði munandi í 60-unum, men ársveiðan hevur tó ligið um 10-20 túsund tey seinastu 10 árini. Hesin fuglur er umleið 3 ára gamal.

Hjálagda frágreiðing vísir, at búfuglurin í Høvdanum á Skúvoy er minkaður niður í helvt hesi 20 árini. Minkingin hevur verið størst í Hestbjørgunum, í norðara parti av Sandsbjørgunum, í Vágabjørgunum og í Vestmannabjørgunum, meðan javnvág tykist at vera í Mykinesi og í Sumbiarbjørgunum.

Ringmerkingarnar vísa eisini, at veiðan hesi seinastu 10 árini hevur verið støtri enn stovnurin tolir. Á hjálagda korti sæst, at har lítið ella onki verður skotið nærindis bjørgunum — Mykines og Sumba, er javnvág, meðan afturgongdin er størst har mest verður skotið.

Nógv bendir á, at ein friðing kann steðga minkingini, og vónandi viðføra, at stovnurin fer at vaksa.

Vit heita tí á Føroya Løgting, um at banna allari veiðu av lomviga og álku frá 1. apríl til 15. august í fyribils 5 ár. Henda árstíðin er vald, so at búfuglurin verður vardur, meðan størsti parturin, sum kann veiðast, er veturgamal fuglur.

Dorete B. Danielsen
Arne Nørrevang
Andrias Reinert

Erik Mortensen
Bergur Olsen

LOMVIGATELJINGIN Á HØVDANUM Á SKÚVOY FRÁ 1973 TIL 1979

Bergur Olsen

Frágreiðing um lomvigateljingina á Høvdanum á Skúvoy í samband við eitt friðingaruppskot til løgtingið 9. apríl 1980.

Evnið má ikki nýtast til annað endamál.



Mynd 2. Myndin vísir hvørja tíð av árinum størsti parturin av lomviganum verður skotin. Tað myrka umráðið eru teir 4 ára gomlu, meðan restin er ímillum 4 og 14 ár. Ongin ringur er fingin aftur frá fugli, sum er yvir 8 ár ímillum 1. september og 1. mars.



Myndin vísir hvar mest fuglur verður skotin. Ein prikkur er settur fyri hvønn ring, vit hava fingið aftur. Størsti parturin av ringunum er settur á snarufugl undir St. Dímun og Viðoy. Bjørgini eru víst við tjúkkari svartari striku.

INNGANGUR.

Føroyingar bera orð fyri, at duga at røkta bjørgini og ikki taka meir enn fuglastovnurin tolir. Hetta kundu teir gomlu døma um, tí teir somu menninir vöru í bjørgunum í fleiri fylgjandi ár og sóu hvussu til stóð. Skúvoyingar góvust við lomvigafleyg 1968, tá talið av ungfuglinum minkaði bráddliga so nógv, at onki fekst á fleyg. Í 1974 góvust teir eisini við ræning, tí talið av eggum var minkað niður í o.u. helvt.

Seinastu 15 til 20 árini er mesti lomvigin fingin við byrsu og snaru, sum eru rættiliga nýggj veiðiamboð í Føroyum. Við hesum veiðihættum hava vit minni varhuga av, hvussu fuglurin trívist í bergininum enn teir gomlu høvdu. Sum kunnugt er hildið fram við hesum báðum veiðihættum, sjálvt um menn á búplássunum hava givið lomviganum frið. Tað er tí stórur vandi fyri, at veiðan er størri enn stovnurin tolir.

Samstundis sum ringmerkingar eru farnar fram fyri at finna veiðiágangin, hevur verið roynt at funnið fram til, um stovnurin framvegis er í minking. Tær elstu beinleiðis teljingarnar av lomviga eru gjørdar í Mykinesi 1957 av Arne Nørrevang og á Skúvoy 1961 av Anders Holm Joensen. Tá samlaði føroyski lomvigastovnurin bleiv taldur 1972, blivu tølini samanborin, og úrskurðurin var, at stovnurin í Mykinesi var í javnvág, meðan fuglurin í Skúvoy var minkaður við o.u. 20 %-um. Samlaði stovnurin bleiv mettur til o.u. 400.000 pør.

Minkingin á Skúvoy hevur helst verið væl størri, tí um ein samanber tølini, so taldi Anders H. Joensen 231.000 lomvigar frá eggini, meðan bert 110.600 sóust frá eggini 1972. Hetta gevur eina minking upp á o.u. 50 % frá 1961 til 1972.

Av tí at Høvdin á Skúvoy liggur væl fyri at telja, og tøl funnust, um hvussu nógvur fuglur var 1961 og 1972, samstundis við at talið av lomviga var rættiliga stórt (9.000), varð avgjørt at halda fram við teljingum har á hvørjum ári.

ARBEIÐSHÁTTUR

Í 1972 bleiv allur lomvigin á Høvdanum taldur við kikarum, sum økja 25 ferðir.

Henda teljing er endurtikin á hvørjum ári. Tað verður roynt at telja teir somu dagarnar á hvørjum ári, men tað er ikki altíð, at veðurlíkindini eru til vildar. Fyri at gera tølini meira álítandi, eru allar røkurnar teknaðar inn á eitt kort, so ein sær, hvussu nógv hvør einstøk rók er broytt. Mynd 1 vísir eitt petti av kortinum, sum bleiv nýtt 1979.



Mynd 1. Eitt petti av uppteljingarkortinum, sum bleiv nýtt 27.6.1979. Tølini, sum eru skrivað við maskinu, eru frá 1978, meðan hondskriftin er frá 1979.

Allar teljingarnar verða gjørdar ímillum kl. 9 á morgini og kl. 6 á kvøldi. Meðan teljingin fer fram, verða 18 røkur við til samans um 500 fuglum taldar annan hvønn tíma, fyri at kanna um broytingar fara fram, meðan talt verður. Samstundis, sum fuglurin verður taldur, verða myndir tiknar, sum skulu prógva, um stórar broytingar fara fram, ella um allar røkurnar eru tiknar við í teljingini.

Hesin teljingarháttur tekur langa tíð, og gott veður má vera, tá stórur kikari skal nýtast. Tað tekur o.u. 20 tímar at telja Høvdan í góðum líkindum.

Tað verður eisini arbeitt við at bøta um teljingarúrslitini við sjálvvirkandi fototólum, so minni broytingar kunnu mátast í framtíðini.

Úrslit

Teljingarár	1973	1974	1975	1976	1977	1978	1979
Lomvigatal	9616	9476		7713	8214	7533	6573
Broyting í %		-1,5		-18,6	+6,5	-8,3	-12,7

Talva 1. Úrslitið av teljingunum á Høvdanum á Skúvoy síðani 1972. Meðal minkingin á hvørjum ári hevur verið -5,8%.

Í 1975 taldi Dorete B. Danielsen, men av tí at størsti parturin bleiv taldur seint á kvøldi og tíðliga á morgni, tá minni av fugli er í bjørgunum enn um dagin, eru tølini ikki tikin við her.

Umrøða

Røkurnar í Høvdanum eru grunnar í mun til aðrastaðni í Skúvoyarbjørgunum, og lítið pláss er tí til geldfuglin. Hetta kann vera orsøkin til, at minkingin ikki tykist so stór her sum aðrastaðni á Skúvoynni, har lutfalsliga meir av geldfugli kann vera taldur við í 1961. Tølini frá Høvdanum kunnu tí hugsast at vísa minkingina av búfuglinum. Ein natúrligur stovnur, sum er í afturgongd, minkar sum oftast við einum ávísum meðal prosenttali á hvørjum ári, so tað tekur langa tíð áðrenn tann seinasti fuglurin doyr. Ein tílík kurva er teknað á mynd 2 frá 1961 til 1972. Meðal minkingin hevur verið um 4% á hvørjum ári. Síðani 1973 hevur meðal minkingin verið um 6% á hvørjum ári. Minkingin er sostatt økt seinastu árini. Um vit bert nýta teymeira gjølligu tølini frá 1973, sæst, at hendan øking í minkingini heldur fram. Ein slík minking er, sum sæst á mynd 2, meira vandamikil enn ein vanlig minking og kann koma av, at veiðan er nøkunlunda jøvn á hvørjum ári, meðan stovnurin, sum tikið verður av, minkar. At døma eftir lóðurnýtsluni er skjótingin síðani 1960 vaksin, so tað er ongin ivi um, at ágangurin frá byrsuni er vaksin hesi árini.

Sum sæst á ringmerkingarúrslitunum, verður lítið skotið nærindis Skúvoy, og skjótingarbátar eru ikki sæddir undir oynni, meðan teljingar eru farnar fram. Minkingin á Skúvoy er tí neyvan orsakað av ófriði á búplássinum, men heldur av at ov nógvur skúvoyarfuglur verður skotin um alt landið og tikin á snaru. Øðrvísi er undir Hestbjørgunum og í norðara parti av Sandsbjørgunum, tí her verður nógv skotið og ofta so tætt undir landi, at búfuglurin verður órógvaður.

Fyri at kanna eftir, um minkingin hevur verið tann sama í øllum bjørgunum, blivu Hestbjørgini og Vestmannabjørgini tald í 1979 og samanborin við úrslitini 1972. Hestbjørgini vístu eina minking upp á 85% og Vestmannabjørgini vístu eina minking upp á 33%.

ÚRSLIT

Hvussu nógv er merkt á hvørjum ári

Samlaða talið av lomviga, sum er merktur í Føroyum, er 6.248. 505 eru merktir meðan teir vóru písur, meðan restin var meir enn 1 ár, størsti parturin var snarufuglur. Talva 1 vísir hvussu nógvir eru merktir á hvørjum ári.

Talva I. Yvirlit yvir hvussu nógvur lomvigi er merktur á hvørjum ári.

Merkingar-ár	pisur	1 ár og eldri	Merkingar-ár	pisur	1 ár og eldri
1962	66	11	1970	0	2095
1963	15	17	1971	0	2068
1967	0	1	1972	0	5
1968	0	510	1973	230	267
1969	0	385	1977	194	385

PISUMERKINGARNAR

Hóast fáar pisur eru merktar, geva hesar merkingar eina góða leiðbeining um hvat hendir teimum, aftan á at tær eru farnar úr berginum. Fyrsta merking av lomvigapisum varð gjørd 1962. Av 31 pisum, sum blivu merktar í Trøllhøvda 27.7. 1962, eru 7 (23%) við vissu deyðir av mannaávum. 3 veturgamlir eru skotnir í Noreg, 1 er fingin á snaru undir St. Dímun og 3 eru skotnir vestan fyri Sandoy. Longu tá hevur veiðan sostatt verið munandi.

Á talvu 2 sæst hvussu gamal fuglurin er, tá hann kemur á snarurnar, og hevur hetta stóran týdning fyri metingina av snarumerkingunum.

Ár aftan á merking (jan. til jan.)

		Vetur 1.	1.	2.	3.	4.	5.	6.	7.	8.	9.	10.	11.	12.	13.	14.	15.	16.	17.
1962	Noreg	4sk	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
	Føroyar	0	0	0	2sk	0	1sk	0	0	0	0	1sk	1sk	0	0	0	0	0	0
1963	Noreg	1g	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	
	Føroyar	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	
1973	Noreg	6g 12sk	0	1sk	0	0	0	0											
	Føroyar	0	1sk	0	5sn	1sn	1sn	0											
1977	Noreg	0	0	0															
	Føroyar	0	0	0															
Til sam-mans	Noreg	7g 25sk	0	1sk	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
	Føroyar	0	1sk	0	7sn	1sn	1sn 1sk	0	0	0	0	1sk	1sk	0	0	0	0	0	0

Talva 2. Yvirlit yvir hvar á og hvørjum ári tann fuglurin, sum er merktur sum pisa fingin attur. Tað sæst eisini, hvørjir veiðihættir eru nýttir. g = garn, sk = skotin og sn = snara.

Snaran hevur givið fleiri ringar aftur, enn ein kundi væntað í mun til byrsuna. Hetta kann vera orsakað av, at teir, sum hava fingist við merking, vanliga veiða minst helvtina av allari snaruveiðuni. Vit hava tí fingið størsta partin av teimum ringunum, sum eru fingnir við snaruveiðu, meðan tað er meira óvist, hvussu stórur partur av skjótingamonnunum senda ringarnar inn.

Uttanlands er størsti parturin deyður fyrsta veturin í gørnum og við skjóting inni á teimum norsku firðunum (sí mynd).

SNARUMERKINGARNAR
SNARUVEIÐAN

Hvar verður roynt við snaru.

Av teimum 55 ringunum, sum ere fingnir aftur við snaru ímillum 1969 og 1974 er størsti parturin fingin undir St. Dímun og L. Dímun (58%). 22% eru fingnir undir Skúvoy, 13% undir Viðoy, 5% undir Beinisvørði og 2% undir Fugloy. Hesi seinastu árini hevur bert verið roynt undir Dímun og Beinisvørði, men sandingar eru nú byrjaðir aftur undir Skúvoy.

Hvat fyri fugl tekur snaran.

Tað hevur leingi verið kunnugt, at snarufuglurin er ungur fuglur. Hann hevur t.d. ikki beran plett undir búkinum, sum búfuglurin hevur á sumri. Av tí at lomvigin ikki verpur fyrr enn hann er á 5. ella 6. ári, kundi ein hugsað, at allur geldfuglur kemur á snarurnar. Talva 2 vísir, at størsti parturin av snarufuglinum er á 3. ári, men at eisini fuglur á 4. og 5. ári setir seg á snarurnar. Hetta samsvarar væl við bretskar kanningar, sum vísa, at størsti parturin av hellufuglinum, sum má hugsast at vera sami ársbólkur sum snarufuglurin, er á 3. ári. Tá snarufuglurin verður nevndur framyvir, verður tí hugsað um 3. ársbólk.

Hvussu stóran part av hvørjum ársbólki tekur snaran.

Fyri at finna fram til hvussu stóran part snaruveiðan tekur av 3. ársbólki, mugu vit meta um, hvussu nógvar av teimum lomvigupisunum sum eru merktar, hava verið á lívi, tá tær vóru undir Føroyum á 3. ári Vit kunnu so rokna út, hvussu stóran part snaruveiðan hevur tikið av

hesum tali. Nýggjastu bretsku kanningarnar vísa, at o.u. 30% eru á lívi á 3. ári. Um vit nýta hesi tøl, hevur snaran tikið 7,5% av 3. ársbólki. Hetta er eitt minstatal, av tí at vit rokna við at allir ringarnir verða latnir inn, og at tann føroyski ungfuglurin trívist líka væl sum tann bretski, sum er í javnvág.

Fyri at sleppa undan hesum óvissum, kunnu vit nýta lutfallið millum talið av ringum, sum eru fingnir aftur við skjóting av fugli, sum er merktur á snaru, og tað ein kundi væntað av snarufugli út frá pisumerkingunum. Um vit nýta pisutølini frá 1973 (talva 2), síggja vit, at 5 eru fingnir við snaru á 3. ári (1976), meðan ongin er fingin við skjóting frá 1976 til 1980. Av teimum 5.334 lomvigunum, sum eru merktir við snaru, eru 5,14% av ringunum fingnir aftur við skjóting tey fyrstu 3 árini aftan á merking. Fyri at finna snaruveiðuna, skal hetta prosenttal faldast minst 5 ferðir. Tað vil siga, at snaruveiðan tekur í minsta lagi 26% av 3. ársbólki. Taka vit allar pisumerkingarnar við, er úrslitið, at snaruveiðan tekur 36% av 3. ársbólki. Hesi tvey seinastu tølini eru óhugnaliga stór, men tey eru á góðari leið, um vit rokna við, at 3. ársbólkur í meðal er um 100.000 (sí næsta petti), og at snaruveiðan hevur verið um 15 til 25.000.

Av 4. ársbólki tekur snaran bert 0,8%, tí av teimum 4.800 lomvigunum, sum kunnu hugsast at hava havt ring á 4. ári, hevur snaran bert tikið 38. Um vit halda fram á sama hátt, fáa vit, at snaran tekur 0,12% av 5. ársbólki og 0,03% av 6. ársbólki. Her er roknað við, at 10% doyr burtur av á hvørjum ári, og at lomvigin ikki ræðist snarurnar í ár aftan á merking.

Hvussu nógvur snarufuglur er undir Føroyum.

Um vit framvegis rokna við, at tann føroyski lomvigin trívist líka væl sum tann bretski tey fyrstu 3 árini, kunnu vit rokna við, at 67 av teimum lomvigapisunum, sum blivu merktar 1973, vóru á lívi 1976 ímillum hin snarufuglin undir Føroyum. Av tí at vit vita, at 4 av hesum lomvigunum vóru ímillum 8.123 fuglar, sum blivu tiknir við snaru 1976, kunnu vit rokna út, at o.u. 136.000 snarufuglar vóru hetta árið. Størsti parturin er á 3. ári, men nakað hevur verið á 4. ári. Vit kunnu tí rokna við, at um 100.000 lomvigar á hvørjum ári náa 3 ára aldurin.

Av tí at fuglur, sum er merktur við snaru, helst ikki fer so væl upp á aftur snarurnar sum annar fuglur, ber ikki til at nýta snarumerkingarnar til hetta endamál.

Hvussu nógv pør eiga í Føroyum.

Um vit eisini rokna við at luttalsliga líka nógvar pisur koma undan tí føroyska lomvigastovninum sum tí bretska, ber til at met, um hvussu nógv pør áttu í Føroyum í 1976. 100 pør geva 21 lomvigar á 3. ári, og tá

100.000 lomvigar eru á 3. ári, má stovnurin hava verið um 476.000. Her eru sjálvandi nakrar óvissur, tí tølini eru smá, og tað er ikki givið, at tann føroyski lomvigin trívist líka væl sum tann bretski, men talið samsvarar væl við teljingina 1972, sum kom til tað úrslit, at o.u. 400.000 pør áttu í Føroyum.

Hvussu nógv verður fingið við snaru.

Snaruveiðan minkaði nógv fyrst í 60-unum, men nakrir fáir bátar hava hildið fram við hesari veiðu. Meðal ársveiðan hevur helst ligið ímillum 10- og 20.000 hesi seinastu 10 árini.

SKJÓTING

Hvar verður mest skotið.

Sum tað sæst á mynd 1 verður ógvuliga lítið skotið undir teimum stóru bjørgunum sunnanfyri í mun til tað, sum verður skotið norðanfyri. Hvør prikkur merkir, at ein ringur er fingin aftur, og tá størsti parturin av ringunum eru settir á snarufugl undir St. Dímun, vísir myndin samstundis, at hesin fuglur verður fingin um alt landið. Tað er tí torført hjá bæði skjótingamonnunum og teimum, sum eiga hesi bjørgini, at meta um hvussu stóran skaða byrsan ger. Fyrstu ávaringarnar, um at júst skjótingin hevði stóra skuld í minkingini, komu tí eisini frá bygdunum norðanfyri, har bjørgini eru lutfalsliga smá, men skjótingin stór.

Uppteljingar vísa, at fuglurin í Hestbjørgunum, sum liggja illa fyri, er minkaður frá 17.000 til 3.000 síðani 1972. Harafturímóti sigst lítil ella ongin minking at hava verið í búfuglinum í Mykines- og Sumbiarbjørgunum, sum mugu hugsast at vera minst ávirkað av skjóting (sí mynd 1).

Hvørja tíð á árinum verður fuglurin skotin.

Mynd 2 vísir hvørja tíð á árinum fuglurin, sum er merktur undir St. Dímun og Viðoy, er skotin. Teir, sum eru skotnir sama ár, sum teir eru merktir, eru ikki tiknir við, so vit kunnu rokna við, at hesin fuglur er ímillum 4 og 14 ár. Myndin vísir, at tann gamli fuglurin, búfuglurin, kemur fyrr inn undir land enn tann yngri fuglurin. Út frá einum friðingarsjónarmiði er tað tí av stórum týdningi, at fuglurin fær frið longu í apríl mánað.

Mynd 1. Myndin vísir hvar mest fuglur verður skotin. Ein prikkur er settur fyri hvønn ring, vit hava fingið aftur. Størsti parturin av ringunum er settur á snarufugl undir St. Dímun og Viðoy. Bjørgini eru víst við tjúkkari svartari striku.



Mynd 3.

Hvat fyri dag í vikuni verður lomvigin skotin.

Um ein hyggur eftir, hvat fyri dagar í vikuni fuglurin er skotin, sæst, at tað verður skotið rættiliga javnt allar gerandisdagar uttan leygardag, tá tað verður skotið gott tvær ferðir so nógv sum ein vanligan dag.

Tað er ongin ivi um, at ágangurin á lomvigan veksur samstundis við at frítíðin økist. Bert tað, at leygardagurin er vorðin fridagur, má sostatt hugsast at hava økt veiðiágangin frá byrsumonnunum við o.u. 15%-um.


Felid à ringum
40
30
20
10
0
1970
1975
1980
år

Hvussu stórur partur er fingin aftur við skjóting.

Av teimum 5.334 ringunum, sum eru settir á snarufugl, eru higartil 488 sendir inn aftur frá skjótingarmonnunum. Hetta er 9,1%, men tað er sjálvandi eitt avgjørt minstatal fyri hvussu nógv skjótingin tekur, tí 1., 2., og 3. ár er ikki tikið við, og helvtin av fuglinum er framvegis á lívi.

Tað er ógvuliga torført at meta um, hvussu stórur partur av skjótingamonnunum senda okkum ringarnar, men tað er helst á góðari leið, um vit rokna við at hava fingið o.u. helvtina av ringunum, sum hava sitið á fugli, sum er deyður av skjóting.

Mynd 4 vísir hvussu stórt tal av ringum er fingið aftur við skjóting á hvørjum ári. Av tí at fuglurin er merktur seint á sumri, er byrjað við I. ári aftan á merking. Tey tvey størstu merkingarárini vísa eina týðuliga minking í veiðiáganginum fá ár aftan á merking. Hetta má hugsast at hava samband við broytingina í atburðinum hjá lomviganum, tá hann verður búfuglur. Tá situr hann uppi í berginum ein stóran part av tíðini og verður tí meira vardur ímóti byrsuni enn tann ungi fuglurin, sum ferðast ímillum bjørgini. Minkingin í veiðiáganginum er ikki orsakað av at skjótingin sum heild er minni. Hetta sæst bæði á lóðurnýtsluni og av prosenttølunum fyrsta ár aftan á merking, sum vísa eina øking. Økingin í prosenttølunum kann eisini vera orsakað av, at skjótingarmenninir lata fleiri ringar inn nú enn fyrr.

Hvussu stórur partur av hvørjum ársbólki verður skotin.

Fyri at finna fram til hvussu stóran part skjótingin tekur av hvørjum ársbólki, mugu vit taka fyrilit fyri hvussu nógv hesin bólkur er minkaður orsakað av tí, sum doyr burtur av á hvørjum ári. Her er nýtt ein meðal minking upp á 10% á hvørjum ári, men hetta er helst í minna lagi. Mynd 5 vísir samlaða úrslitið frá 5334 merktum snarufuglum. Av tí at flestu fuglarnir eru merktir seinastu dagarnar í snarutíðini, siga teir lítið um, hvussu nógv verður skotið av fugli, sum er á 3. ári. Tann stóra snarumerkingin 1970 endaði tó 18. juni, og vísir hon, at eisini byrsan tekur sín størsta part av 3.ársbólki av snarufuglinum. Um vit rokna við, at skjótingartíðin fyri 3. ársbólk er tann sama sum fyri 4. ársbólk, kunnu vit rokna út, at skjótingin tekur 4,9% av fuglinum, sum er á 3. ári.



Mynd 5. Tann prosentvísi parturin, sum skjóting hevur tikið av hvørjum ársbólki, um 10% doyr burtur av á hvørjum ári tilsamans, og allir ringarnir verða sendir inn.

Av tí at snaran ikki tekur fugl, sum er á 1. og 2. ári, siga snarumerkingarnar okkum onki um hesar ársbólkar. Ov fáar pisur eru merktar, fyri at nakað kann sigast við vissu um hesar bólkar, men av teimum 505 pisunum, sum eru merktar, er 1 skotin á 1. ári (vangagrá), meðan ongin er skotin á 2. ári (sí talvu 2).

Ein stórur partur av 1. ársbólki er inni á teimum norsku firðunum á vetri (sí mynd). Á sumri síggjast vangagráir ikki vanliga undir Føroyum, men størsti parturin av fuglinum, sum verður skotin frá fyrst í november til fyrst í mars, er á 1. ári. Tað er ringt at meta um, hvussu stórur partur av hesum ársbólki verður skotin, men av tí at hetta er tann yngsti og tí størsti ársbólkur, er skjótingin lutfalsliga kanska ikki so stór.

Vit vita minst um tann bólkin, sum er á 2. ári. Hann verður ikki nógv skotin á vetri, og sjálvt um 200 mugu hugsast at hava havt ring á hesum aldri, er ongin ringur fingin aftur. Bretskar kanningar vísa, at o.u. 20% av hellufuglinum er á 2. ári. Hesin bólkur er helst ikki so nógv inni undir landi, nú lítið er til av æti og er kanska tann bólkur, sum nú sleppur best undan allari veiðu.

Hvussu nógv doyr á hvørjum ári.

Eitt av høvuðsendamálunum við ringmerkingini var, at finna fram til, hvussu stórur partur av lomvigastovninum doyr á hvørjum ári. Ætlanin var at nýta teir ringarnar, sum komu aftur við skjóting, og so samstundis finna fram til, hvussu stóran part skjótingin tók. Ein av treytunum, sum hendan útrokning byggir á, er, at innsavningarhátturin, veiðihátturin, ikki verður broyttur, og at allir ársbólkar skulu hava sama møguleika fyri at verða veiddir. Mynd 5 vísir, at stórur munur er á, hvussu ágangurin er á teir ymisku ársbólkarnar, og tað er ógjørligt at skilja ímillum hvat er orsakað av fugli, sum doyr burtur av, og hvat er orsakað av broyttum atburði, sum lomvigin eldist. Aðrar óvissur, sum gera hendan roknihátt ónýtiligan, er broyting í samlaða veiðiágangin- um og broyting í áhuganum at senda ringar inn. Úrslitið av hesum roknihátti er, at 21% av tí føroyska lomvigastovninum doyr burtur av á hvørjum ári, men sum nevnt er onki hald í hesum tali.

Tað kann hugsast, at innsavningarhátturin er meira javnur á vetri, tá fuglurin ikki er í berginum, og tí kunnu hesi tølini kanska nýtast. Við bert at nýta teir ringarnar, sum eru fingnir aftur uttanlands, er úrslitið, at bert 10,5% doyrt burtur av á hvørjum ári. Hetta tal kann samanberast við bretskar kanningar, sum eru gjørdar á sama hátt og vísa at o.u. 12 til 13% doyggja burtur av á hvørjum ári. Bretskar kanningar við at merkja búfugl í berginum og so fylgja við, hvussu nógv kemur aftur á hvørjum ári, vísa at tað helst doyr enn minni burtur av, kanska bert 6 til 9% á hvørium ári



Mynd 2. Broytingin í lomvigatalinum á Høvdanum síðani 1961. Av tí at lítið pláss er til hellufugl á Høvdanum, kann myndin hugsast at vísa minkingina av búfuglinum.

Urskurður

Lomvigastovnurin er framvegis í stórari minking, og minkingin er størst, har mest verður skotið. At dømna eftir tølunum frá Høvdanum hevur minkingin av búfuglinum verið størri í 70-unum enn hon var í 60-unum.

RINGMERKING AV LOMVIGA I FØROYUM

Frágreiðing um ringmerkingarúrslitini hjá Fiskirannsóknarstovuni í samband við eitt friðingaruppskot til løgtingið 9. apríl í 1980.

Evnið má ikki nýtast til annað endamál.

Bergur Olsen í samráð við Andrias Reinert og Arne Nørrevang.

INNIHALD

síða
1 Inngangur
1 Arbeiðsháttur
2 Úrslit
2 Hvussu nógv er merkt á hvørjum ári
2 Pisumerkingarnar
4 Snarumerkingarnar
4 Snaruveiðan
4 Hvar verður roynt við snaru
4 Hvat fyri fugl tekur snaran
4 Hvussu stóran part av hvørjum ársbólki tekur snaran
5 Hvussu nógvur snarufuglur er undir Føroyum
6 Hvussu nógv verður fingið við snaru
5 Hvussu nógv pør eiga í Føroyum
6 Hvussu nógv verður fingið við snaru
6 Skjóting
6 Hvar verður mest skotið
6 Hvørja tíð á árinum verður fuglurin skotin
9 Hvat fyri dag í vikuni verður mest skotið
11 Hvussu stórur partur er fingin attur við skjoting
11 Hvussu stórur partur av hvørjum ársbólki verður skotin
13 Hvussu nógv doyr burturav á hvørjum ári
15 Hvussu nógv verður skotið
15 Fleyg
15 Hvar verður lomvigin fleygaður
16 Hvussu stórur partur verður fleygaður
16 Reka upp á land
18 Útheimurin
19 Umrøða
22 Úrskurður

INNGANGUR

Seinru helvt av 60unum byrjaðu menn at tosa um, at okkurt mátti gerast, tí lomvigastovnurin hevði verið í minking í fleiri ár. Óscmja var tó um nakað kundi gerast, og um veiðan hevði nakra ávirkan. Í 1968 fór Fiskirannsóknarstovan tí undir kanningar av lomvigastovninum. Byrjað varð við ringmerkingum í samband við Zoologisk Museum. Andrias Reinert hevur leitt hetta arbeiðið, og høvuðscendamálið var at finna fram til:

1. Hvussu stórur partur av tí føroyska lomvigastovinum verður veiddur á hvørjum ári.
2. Hvussu stórur partur doyr av øðrum orsøkum.
3. Hvussu býtingin er av ungfugli og búfugli av tí veidda fuglinum
4. Nær fuglur á ávísum aldri verður veiddur.
5. Hvar størsta veiðan fer fram.
6. Hvar lomvigin heldur til uttan fyri Føroyar.

ARBEIÐSHÁTTUR

Best hevði verið at merkt pisur, men hetta er ógvuliga torført, og tí varð mesti dentur lagdur á at merkja snarufugl. Størsti parturin av ringunum er settur á snarufugl undir St. Dímun og Viðoy. 2 dagar bleiv merkt við omanfleyg undir St. Dímun. Pisurnar blivu merktar á rókunum stutt áðrenn tær fóru á sjógv. Merkjararnir fingu dagspris á lomviganum fyri hvønn fugl teir merktu. Nakað av lomviga er merkt, áðrenn hendan kanningin byrjaði, og eru hesi úrslitini eisini tikin við.

Mynd 6. Fólkatal og innflutningur av lóður í kg á hvørjum ári.



Mynd 6.

Innflutningur av patrónum á hvørjum ári um ein patrón vegar 45 g.

Hvussu nógvur lomvigi verður skotin.

Vit hava tíverri ongi hagtøl, sum beinleiðis vísa, hvussu nógvur lomvigi verður skotin, men út frá hagtølunum yvir lóður, sum er flutt inn (mynd 6), sæst, at ágangurin frá byrsuni er ógvuliga stórur og støðugt vaksandi. Tað er stórur munur á, hvussu nógv er innflutt á hvørjum ári, men hetta kemur helst av, at ikki alt lóðurið verður brúkt sama ár, sum tað er flutt inn. Í 70-unum eru í meðal nýtt 442.000 skot á hvørjum ari. Eitt sindur er nýtt til haru, álku og annað, men tað er helst ein lítil partur.

Í 1973 royndi Grækaris Olsen at telja, hvussu nógvur fuglur bleiv skotin av bátum úr Vestmanna. Hann fann fram til, at o.u. 9.000 lomvigar komu á land í Vestmanna. Um vit rokna við, at vestmenningar hava skotið tann fuglin, sum er fingin við Mýling, út fyri Saksun, norðan fyri Vágoynna, í Vestmannasundi og suðuri á Grunninum, er hetta 13,5% av samlaða talinum, sum er skotið, sum tí má vera um 67.000. Um vit rokna við at 150.000 skot verða nýtt til annað enn lomviga, kunnu vit nýta gott 4 skot upp á hvønn lomviga, fyri at koma upp á 67.000, sum tí kann hugsast at vera á góðari leið, men helst í minna lagi.

FLEYG

Hvar verður lomvigin fleygaður

Tann lomvigin, sum er fingin á fleyg hesi árini, er helst hjáveiða, tá menn fleyga lunda. 82% av ringunum eru fingnir aftur á Fugloy, 23% í Sumba, 18% á Viðoy, 9% á Skúvoy, 9% í Mykinesi, 5% á St. Dímun og 5% í Sandvík.

Frá teimum ringunum, sum eru fingnir aftur minst 1 ár aftan á merking, sæst, at størsti parturin av lomviganum verður fleygaður fyrstu helvt av juli.

Hvussu stóran part tekur fleyg.

Lomvigafleyg hevur verið ein týðandi táttur í fuglaveiðuni, men aftan á 1963 hevur illa borið til við hesum veiðihátti. Á Skúvoy hvarv hesin fuglur brádfliga, men lomvigi fekst framvegis á snaru í nøkur ár. Tað er tí væl hugsandi, at ein stórur partur av fleygingafuglinum var fuglur á 2. ári. Tey góðu árini vóru eisini vangagráir uppí í.

Av tí at merkingin 1970 endaði longu 18. juni og lítið verður fleygað áðrenn hesa tíð, kunnu hesi tøl nýtast til at rokna út hvussu stórur partur av lomviganum verður fleygaður, tá hann er á 3. ári. Av 1759 lomvigum, sum blivu merktir á snaru, blivu 7 fleygaðir sama ár. Tað vil siga, at fleyg tekur o.u. 0,4% av 3. ársbólki. 4.800 lomvigar kunnu hugsast at hava havt ring, tá teir vóru á 4. ári. Av hesum fugli er 0,2% fingin á fleyg. Fuglur, sum er yvir 4 ár, fæst vanliga ikki á fleyg.

Út frá ringmerkingunum kann onki sigast um, hvussu nógv verður fleygað av 1. og 2. ársbólki, burtursæð frá at ongir av teimum, sum blivu merktir, meðan teir vóru pisur, eru fingnir á fleyg.

REKA UPP Á LAND

Ein gamal veiðiháttur, sum hevur tikið nógvan fugl tey góðu árini, var tá vestmenningar rókn lomviga upp á Seyðaskorargjógv. Aftan á 1965 hevur ikki borið til við hesum veiðihátti. Ringmerkingarnar siga tí onki um hesa veiðu.

Fuglurin, sum bleiv veiddur, var hellufuglur og ungfuglur, sum fleyt undir berginum. Tey góðu árini vóru vangagráir eisini ímillum.

Mynd 7. Her sæst hvar lomvigin, sum er merktur í Føroyum, er fingin aftur uttanlands.



□ fingin í garni
✱ —·— við skjóting
✱ "funnin", olja o.a.
} Merktur við snæru

⊠ fingin í garni
✱ —·— við skjóting
✱ "funnin", olja o.a.
} Merktur við omanfleyg

⊟ fingin í garni
✱ —·— við skjóting
} Merktur sum pisa

Talið við síðuna av merkinum gevur mánaðin tá fuglurin bleiv veiddur ella funnin. Hvør prikkur stendur fyri 1 álmanakkaár aftan á merking. 0 = 1. aug. til 1. jan., I = 1. januar til 1. jan..

ÚTHEIMURIN

Bert 10% av ringunum, sum vit hava fingið aftur, eru komnir úr útheiminum. Mynd 7 vísir, hvar hesir fuglar eru deyðir, og tað sæst, at teir ferðast rættiliga víða. Av tí at munur er á veiðiáganginum og møguleikanum fyri at ein deyður fuglur verður funnin, má myndin takast við fyrivarni.

Størsti parturin av lomvigastovninum, sum beinleiðis er deyður av mannaávum uttanlands, er tann veturgamli lomvigin, sum verður skotin ella fingin í gørnum inni á teimum norsku firðunum.

Í Noreg hevur lomvigin verið friðaður frá 1. mars til 20. august hesi seinastu árini, men frá í ár er lomvigin friðaður alt árið. Skjótingin í Noreg hevur tikið minst 1% av okkara veturgamla fugli. Ein líka stóran part. . hevur garnaveiðan tikið. Av tí gamla fuglinum verður at kalla onki skotið, meðan garnaveiðan framvegis tekur ein lítlan part.

Í Íslandi er lomvigin friðaður á sumri.

Í Bretlandi er lomvigin friðaður alt árið. Eitt stórt arbeiði verður gjørt fyri at leita eftir deyðum fugli í fjøruni, serstakliga har oljudálkingin er størst. Hetta arbeiðið, »Beached Bird Survey«, hevur vundið nógv upp á seg seinastu árini, og ætlanin er, at tað í framtíðini skal umfata so nógv lond sum gjørligt. Hetta er ein av grundunum til, at so nógvur lomvigi er funnin á tí bretsku eysturstrondini hesi seinastu árini.

ÚMRØÐA

Eitt sermerki fyri lomvigan, sum flest annan sjófugl, er, at hann gerst ógvuliga gamal. Stovnurin kann tí klára seg, um bert fáar pisur koma undan á hvørjum ári, ella eintá um ongar pisur koma undan í nøkur ár. Fyri at fuglurin kann gerast so ógvuliga gamal, má lítið doyggja burtur av á hvørjum ári. Tað eru gjørdar nógvar royndir fyri at finna fram til, hvussu nógv doyr burtur av einum lomvigastovni á hvørjum ári, men ongi av hesum tølunum eru heilt álítandi, tí tey eru øll hámarkstøl á ein ella annan hátt. Størsti feilurin kemur av, at aluminiumsringarnir, sum eru nýttir, slítast so skjótt, at ein partur missir ringin, áðrenn hann doyr. Sjálvt um harðir monelringar nú verða nýttir til sjófugl, vísir tað seg, at eisini nakrir fuglar slíta hesar ringar so nógv, at nummarið ikki kann lesast. Tær flestu kanningar við vanligari ringmerking eru komnar til tað úrslit, at í mest lagi 12 til 13% doyr burtur av búfuglinum á hvørjum ári. Ein kanning, við at fylgja við hvussu nógvir av teimum merktu lomvigunum komu aftur á rókina á hvørjum ári, vísti, at í minsta lagi 6,5% doyði burtur av á hvørjum ári. Tað er sjálvandi eisini munur á, hvussu teir ymisku lomvigastovnarnir trívast.

Fyri at ein stovnur skal vera í javnvág, skal hvørt parið bert geva 2

búfuglar alt lívið. Tað er tí av stórum týdningi, hvussu langa tíð fuglurin er á lívi sum búfuglur. Fyri at kunna meta um, hvussu nógvan skaða tað ger, at t.d. bert 1% verður skotið av búfuglinum, má ein vita, hvussu stórur tann natúrligi deyðin er ella við øðrum orðum, hvussu stórur meðal aldurin hjá búfuglinum er.

Talva 3 vísir hvussu ymiska ávirkan ein veiða upp á 1% av búfuglinum hevur alt eftir hvussu nógv doyr burtur av stovninum av natúrligum grundum. Vit kunnu rokna við, at 1% skjóting á hvørjum ári av búfuglinum viðførir, at vit stytta meðal livitíðina hjá búfuglinum við 1/2 til 1 og 1/2 ár. Tað eru tey seinastu prosentini, sum hjálpa lutfalsliga mest, og tí ræður um at friða allan búfuglin, tá stovnurin er í minking.

Fuglur, sum doyr burtur á hvørjum ári í %-um		*50% av búfuglinum er deyður aftan á hesi ár*	*Munurin á meðalaldrinum hjá búfuglinum í árum*	*Munurin á meðalaldrinum hjá búfuglinum í %-um*
2	havhestur	34,3	11,5	50,4
3		22,8	5,8	34,5
4		17,0	3,5	26,0
5		13,5	2,3	20,5
6	lomvigi	11,2	1,6	16,7
7		9,6	1,3	15,7
8		8,3	0,9	12,2
9		7,4	0,8	12,1
10		6,6	0,6	10,0
11		6,0	0,6	11,1
12		5,4	0,4	8,0
13		5,0		

Talva 3. Her er vístur, hvussu ymiska ávirkan ein veiða upp á 1% av búfuglinum hevur, alt eftir hvussu nógv doyr burtur av stovninum av natúrligum grundum. Havhestur og lomvigi eru settir inn sum dømi um fuglasløg við ymiskum natúrligum deyða á hvørjum ári.

Mynd 5 vísir, at skjótingin tekur 0,9% av búfuglinum, men av tí at allir ringarnir ikki vera latnir inn, skal hetta tal helst hækkast til o.u. 2,3%. Um vit rokna við, at 10% doyr burtur av búfuglinum tilsamans á hvørjum ári, so vil ein friðing av búfuglinum økja meðallivitíðina hjá búfuglinum frá 6,6 ár til 8,7 ár, t.v.s. 32%!! Hetta er ein av grundunum til at veiða av búfugli er so vandamikil fyri stovnin, og torfør at døma um.

Størsta orsøkin til at fuglurin minkaði so brádliga fyrst í 60-unum, var ivaleyst tann, at føðin minkaði. Av tí at føðitrot hevur størst ávirkan á hvussu nógvar pisur koma undan og livikorini hjá tí unga fuglinum, var tað ungfuglurin, sum minkaði mest. Aftur at hesum kemur, at tann ungi fuglurin ikki er so bundin til bjørgini, sum tann eldri, og hann nýtist tí helst ikki at koma inn undir land fyrr enn á 3. ári, tá lítið av æti er undir Føroyum. Sjálv minkingin hevur tí helst ikki verið so stór sum hon tóktist at vera. Minkingin av búfuglinum í Høvdanum á Skúvoy hevur ligið um 4% á hvørjum ári í 60-unum, men er vaksin til 6% á hvørjum ári í 70-unum. Nógv av teimum smáu bjørgunum eru tó minkað nógv meir.

Tá ungfuglurin minkaði, fekst tjonki á fleyg, men snaran hevur framvegis kunnað tikið fuglin, tá hann er komin inn fyri at leita sær eftir búplássi. Skjótingarmenninir taka framvegis líka nógv ella meir enn fyrr. Tá ungfuglurin minkaði í tali, byrjaðu teir at taka lutfalsliga meir av búfuglinum, og sum nevnt er hetta til stóran skaða fyri stovnin, sum frammanundan var illa fyri.

Kemur nakað munandi undan av lomviga í Føroyum.

Lomvigin er ógvuliga gamal tá hann verpur á fyrsta sinni, og lítið kemur burtur úr tey fyrstu árini. Í Bretlandi verpur lomvigin, tá hann er á 5. ári, men teir eru í minsta lagi 6 ár áðrenn teir fáa pisur. Í Føroyum eru teir helst eldri og mynd 5 vísir, at teir kanska eru 9 ár áðrenn teir fáa pisur. Ágangurin frá byrsuni minkar niður í o.u. helvt frá 8. til 9. árið. Øll hesi árini tekur tann natúrligi deyðin sín part, skjótingin tekur sín stóra part og snaran tekur allan sín part her. Tað er tí lítið eftir av ársbólkinum, tá hann at enda fær pisur.

Tað er nógv, sum bendir á, at lomvigastovnurin í Føroyum hóast alt gevur nóg mikið ella meir til, at stovnurin kann vera í javnvág við ongari veiðu.

O.u. 100.000 lomvigar á 3. ári (snarufuglurin) koma undir Føroyar hvørt summar. Hesir hava klárað teir størstu natúrligu trupulleikarnar,

og ein kundi tí rokna við at o.u. 85.000 vóru á lívi á 6. ári, um ongin veiða var. Hetta hevði givið ein vøkstur upp á 35.000 (4,4%) búfuglar á hvørjum ári, um stovnurin er 400.000 pør og kundi cnntá hildið javnvág í einum stovni upp á 700.000 pør.

Búfuglurin í Skúvoyarbjørgunum, sum gevur o.u. helvtina av øllum lomviganum í Føroyum, er minkaður við o.u. 6%-um í meðal á hvørjum ári síðani 1973. At samlaða veiðan upp á o.u. 80.000 hvørt ár ikki hevur viðført størri minking, er eitt dømi um, at ikki sørt av pisum koma undan. Um ongin pisa kom undan, skuldi minkingin verið um 10% á hvørjum ári. Vit kundu tí væntað ein vøkstur upp á o.u. 4%, um ongin veiða var.

Um onki er komið til av búfugli, og 10% av búfuglinum, sum var, er deyður á hvørjum ári, so skuldi bert 15% verið eftir aftan á 18 ár. Teljingin á Høvdanum á Skúvoy vísir, at 45% eru eftir, og at minkingin hevur verið um 4% í meðal á hvørjum ári. Vit kunnu tí rokna við at o.u. 10% av ungum fugli kemur upp í búfuglin á hvørjum ári.

Tá her hevur verið skrivað um minking, hevur mest verið hugsað um stovnin sum heild, og tí hava tey stóru bjørgini verið nýtt sum dømi, men tað er kunnugt, at tá ein stovnur er í minking, eru tað ofta tey smáu bjørgini, sum verða rakt harðast. Bjørgini norðanfyri eru eisini minkað munandi meir enn her er nevnt, og Hestbjørgini eru um at vera avoydd.

Afturat tí, at veiðan beinleiðis tekur ov nógvan fugl, skaðar byrsan eisini produktiónina við at órógva fuglin bæði í berginum og har hann hevur møguleika fyri at finna sær nakað til matna inni undir landi.

Ein einsamallur lomvigi klárar vanliga ikki at klekja eggið ella fóðra pisuna, og tí mugu vit eisini rokna við, at eitt egg ella ein pisa misferst fyri hvønn búfugl, sum verður skotin.

ÚRSKURÐUR

Í eini 20 ár havá vit tikið meir burtur av lomvigastovninum, enn hann hevur tolað. Samlaði búfuglastovnurin er nú komin undir helvt. Um stovnurin skal hava møguleika fyri at menna seg aftur, so má í minsta lagi búfuglurin og suarufuglurin fáa frið. Hetta kann gerast við at friða lomvigan ímóti allari veiðu frá 1. apríl til 15. august.

Broytingar
í ferðslulógini

1. Almennat viðmerkingar til § 1.

§ 16, 1-3. stk., hevur uppskot um at áseta eitt promillumark og eisini um tað, at umframt grundregluna fyri rúsdrekkakoyring verður fingin í lag ein regla, eftir henni eisini koyring, tá ið maður hevur drukkið so nógv rúsdrekka, at alkoholstyrkin í blóðinum fer upp um ávíst lágmark, 0,80 0/00, verður gjørd til serligt rættarbrot, sum skotið verður upp at kalla promillukoyring. Eftir tí, sum skotið er upp, er tað rúsdrekkakoykring, tá ið promillan fer upp um eitt ávíst hámark, sum skotið er upp skal vera 1,20, og somuleiðis tá ið tað, serliga um óhapp hevur borist á í koyringini, eru sannroyndir til skjals umtað, at rúsdrekka hevur minkað um førið til at koyra akfar.

Skotið verður upp, at promillureglan verður samanbundin við broyting av viðbragds-lagnum, soleiðis at sekt verður nýtt fyrstu ferð, ið promillukoyring kemur fyri.

Um grunditnar fyri uppskotinum verður skilað til:

A. Galdandi reglur og rættarvenja.

eftir § 16, 1. stk. í galdandi ferðslulóg ber tað við sær revsing og frádøming av koyrikorti at koyra ella royna at koyra motordrivið akfar um koyrarin hevur »notið rúsdrekka so nógv, at hann er ikki í førur at koyra akfarið á fulltryggan hátt».

Avgerðin, um henda regla er brotin, verður grundað á ta meginreglu, at mettar verða allar umstøður í málinum, t.d. rúsdrekkapromilla, meting læknans aftan á ta klinisku royndina, frágreiðingar um nýtsluna, um koyringina og um atburðin hjá ákærda annars.

Men í rættarvenju verður promillan, meðan koyrt varð, mett at hava so stóran týdning, at hinar umstøðurnar einans fáa týding, tá ið komið er til spurningin um dómfelling ella frídøming í rættarliga teprum promillumillumbili, og eisini í teim fáu málum, har promillan, meðan koyrt varð, ikki er greidd, t.d. tí at avvarðandi hevur krógvað seg, til alt tað drukna rúsdrekka er brent.

Áðurnevnda promillumillumbil fæst ikki tilskilað gjølla, men liggur umleið 1,000 promillu við tað at mestu líkindi eru til dómfelling eftir rættarvenju, um promillan má haldast at hava verið oman fyri 1,00 meðan koyrt varð. Tað er bert heudingaferð, at dómur verður feldur, har ið promillan má haldast at hava verið niðan fyri 1,00, meðan koyrt varð, eins og frídøming ógvuliga sjáldan verður, tá ið promillan er oman fyri 1,00.

B. Eigur promillumark at verða ásett.

Við reglum sum rúsdrekkakoyring vil lóggávan kriminalisera slíkan stand, har koyriførið er minkað. Um so var, at tað út frá fyribyrgjandi bugleiðingum kundi haldast nóg mikið at nýta revsing í teimum løtum, har til ber at prógva slíkan stand við vitniførslu, kliniskari royND o.s.fr.,

hevði spurningurin um promillumark ikki komið upp. Hyggja vit bara at tí galdandi rættarskili, so kunnu vit sanna, at áðurnevnda fyritreyt ikki hevur verið lokin. Hóast § 16, 1. stk. í núgaldandi ferðslulóg ikki hevur promillumark á orði, hevur av fyribyrgjandi grundum verið hildið neyðugt at revsa í vissum førum, har ið tann funna promillan er einasta ella tó avgerandi grundarlag fyri dómfelling. Haldast má, at tað framvegis fer at vera neyðugt í vissan mun at revsa rúsdrekkakoyring í førum, har ið ikki ber til at útvega ítøkuligar upplýsingar um ikki rættvoðna koyting og minkað koyriføri. Tað má haldast ógjørligt at orða og nýta reglu um hetta, uttan at promillueyðkennið verður nýrt. Og áseting av promillumarki fer betur enn tann núgaldandi regla at siga veruleikan í rættarstandinum, eftir honum alkoholstyrkin í næstan øllum málum er nógv týdningarmest.

Móti áseting av promillureglu kundi hugsast at fört fram, at so verður tann fría prómeting slept, og rættarstøða borgaranna skerd. Hesum má verða mótmælt. Tað, sum verður kriminaliserað eftir nevndaruppskotinum um promillumark 0,80, er ikki ein ávís tilskilað minkan av koyrievninum í tí einstaka føri, men ein alkoholstyrki í blóðinum, sum eftir upplýsingum, ið eru til skjals, sbr. um hetta niðanfyri, tað er ógvuliga líkt til fer at elva til øktan vanda av koyringini.

Lagt skal verða afturat, at heilt vanligt er, at revsing er fastsett fyri gerðir, sum hugsandi er bera vanda við sær, men sum ikki í tí ávísa føri hava elvt til vanda. Eyðkent er, at nógvar av hinum ásetingunum í ferðslulógini hava til undirstøði hugsandi vanda.

Við tí í huga, sum frammanfyri er tikið fram, hevur nevndin ta áskoðan, at áseting av promillureglu er einki at aftra seg fyri.

Avgerandi ivi hevði ætlandi bara verið, um so varð, at promillumarkið varð sett á slíkan hátt, at ógvuliga líkt var til, at rættiliga nógvir fóru at verða skuldsettir, sum í royndum ikki høvdu havt fyri ferðslutrygdina týðandi alkoholstyrki og minkað koyrievni. Henda iva ber neyvan til at hava, har promillumarkið er 0,80, sum skotið er upp. Við so høgari promillu er vísindaliga prógva, at dugurin at koyra er munandi minni hjá næstan øllum persónum, eins og meiri enn helvt av teimum persónum, sum hava eina alkoholstyrki í blóðinum, ið er 0,80/ 0/00 — 1.00 0/00, við kliniskari royND vísa ávirkan av rúsdrekka.

Harafturímóti heldur nevndin seg m.a. av áðurnevndu sjónarmiðum ikki kunna mæla til áseting av marki lægri enn 0,80 0/00. Sjálvt um ávíst er, at smámvegis njóting av rúsdrekka minkar um viðbragdsevnið, eru upplýsingarnar um ta øktu hættu, hetta bet við sær, í royndum ið hvussu er ívasamar. Aftrat hesum kemur, at meðan eingin avgerandi ivi sýnist at vera í tí, at seta tøku av koyrirættinum í samband við koyring við promillumi 0,80, sbr. um hetta niðanfyri, so eigur tøka av koyrirættinum neyvan at gerast bundin við promillureglunni 0,50 t.d. Av tí at haldast má, at frádøming av koyrirættinum hevur munandi fyribyrgjandi ávirkan, so má

haldast at vera hættisligt at minka um hana við at áseta promillumark 0,50, sum ikki ber við sær nakra frádøming.

C. Revsiatgerðirnar.

a. Galdandi reglur og rættarvenja.

Tær galdandi reglur fyri brot á § 16, 1. stk., í ferðslulógini geva bert møguleika til at døma ein til fongsulsrevsing, umframt eina ógvuliga sjáldan nýtta reglu um sekt, tá ið serliga linnandi umstøður eru.

Miðalrevsingin fyri fyrsta brot uttan herðandi umstøður er 10 daga hefti, um promillan ikki fer upp um 1,20. Fer promillan upp um 1,20, men ikki 2,00, er revsingin 14 daga hefti. Frádømingartíðin er ávikavist 1 ár og 1 1/2. Er promillan oman fyri 2,00, verður revsingin harðari og frádømingartíðin longri.

b. Uppskot um broyttar reglur.

1. Revsing.

Nevndin skjýtur upp, at revsing fyri rúsdrekkakoyring sum higartil verður skerjing av frælsi.

Sekt verður skotið upp at nýta fyri promillukoyring, undantikin ávís føri, tá i ð hetta hendir aftur.

Tað økið, har skotið er upp at áseta sekt, er soleiðis ógvuliga avmarkað. Fyri ein part røkkur tað um eitt øki, har higartil revsing vanliga ikki kundi áleggjast —sostatt promillumøkið 0,80 — umleið 1,00 — og fyri ein part økið umleið 1,00 — 1,20, sum venja higartil hevur verið at revsa við fongsli, alt saman treytað av tí, at serligar umstøður ikki eru til.

Nevndin hevur ta áskoðan, at nýtsla av sekt í málum, sum minst varðar um, neyvan fer at vaksa um vandan fyri koyring aftan á rúsdrekkanýtslu, um tað annars verður áløgd sera dygg sekt. Roknað er við, at sektin í hesum málum vanliga verður sett til eina peningshædd, ið svarar til eina mánaðarnettoinntøku, ella verður sett eftir árligari bruttoinntøku, soleiðis at sektin verður 1.000 kr. fyri hvørjar 25.000 kr., sum vunnar eru.

Aftrat hesum kemur, at um hildið verður fast um galdandi teglur fyri frádøming av rættinum at koyra, og tær harafturat verða settar eisini at fata um tað økið, sum higartil ikki hevur verið kriminaliserað, sýnist revsiatgerðin so hørð, at tørvur er neyvan á fongsulsrevsing við. Tí haldast má, at tað ógvuliga nógv er vandin fyri at verða dømdur at missa koyriprógvið, ið er fyribyrgjandi.

Sektrevsing á áðurnevnda øki fer annars at vera í samsvari við gongdina í øðrum londum, har ið ikki er vanligt, at mál, ið hava minni upp á seg, bera við sær skert frælsi.

Verður revsing viðsekt framl á ornanfyri nevnda øki, vil nevndin halda góðar grundir vera til, at brot fyrstu ferð, í teimum førum alkoholstyrkin í blóðinum er millum 1,20-2,00, og ikki herðandi umstøður eru, verða

revsað við 10 daga hefti mótsett nú 14 daga. Tá ið koyrt verður við promilluni oman fyri hesa stødd, heldur nevndin ikki, at tæt fongsulsrevsingar, ið nú verða nýttar, eiga at verða linaðar. Nevndin heldur tað verða vandaleyst at stytta um fongsulsrevsingina út frá teirri hugsan, at haldast má, at revsingin eina mest virkat av tí, at hon er treytaleys, meðan tað neyvan hevur nakað at týða, um hon er 10 ella 14 dagar.

2. Frádøming av koyriprógvi.

Fradøming av koyriprógvi er ein ógvuliga mein atgerð, í mongum føri helst meinari enn fongsulsrevsing, ið hvussu er hjá teimum, ið koyrikortið fíggjarliga hevur nógv at týða. Sjálvt um frádøming av koyriprógvi soleiðis kann koma meint við, so má kortini haldast, at sjálv frádømingin hevur eina so munandi fyribyrgjandi ávirkan, at ikki eigur at verða slakað í teimum galdandi frádømingarreglunum. Ivamálið verður eftir hetta, um ein torir at halda tað vera ráðiligt at geva frádømingarregluni størri rúm. Eins og sæst av tí, ið áður er nevnt, ber tilmælta promillumarkið 0,80 við sær eina ávísa rúmkan av tí kriminaliseraða økinum. Við teimum einu lylgjum í geyma, sum frádøming av koyriprógvi kann fáa fyri hin einstaka, hevur ein í Danmørk havt ta hugsan, at vanliga eigut ikki at verða talan um at rúmka økið fyri treytaleysa frádøming.

Nevndin hevur ikki hesa somu áskoðan. Grundirnar fyri yvirhøvur at kriminalisera økið viga so nógv, at ikki eigur at verða gingið frá einari týðandi, kanska teirri týdningarmestu fyribyrgjandi virkan. Nevndin skjýtur tí upp, at frádømingarreglan eisini skal fata um hetta økið. Nevndin heldur, at frádømingartíðin eigur at verða ásett soleiðis, at hon svarar til tað, sum higartil hevur verið vanligt, tá ið koyrt verður við promillu, sum ikki fer upp um 1,20, tað vil siga frádøming av tættinum at koyra í 1 ár.

D. Útlond.

Í øllum skandinavisku londunum eru ásett lógfest promillumark, tó er ikki kunnugt, um lógaruppskot framsett um hetta í Finnlandi er framt. Tá ið Danmark et frá, har ið markið er 0,80, er markið 0,50.

Í øðrum londum er lógfest promillumark 0,80 ásett í Onglandi, Vesturtýsklandi, Belgiu, Eysturríki, Fraklandi og Luxembourg, meðan Holland og Grikkaland hava promillumark 0,50.

Henda frásøgn um lond, ið hava lógfest prpomillumark, er ikki fullfíggjað.

Ongastaðni í útlondum sýnast at hava verið ringar royndir av promillureglunum.

Í øllum londunum, tá ið Noreg er frá, vetður tað, ið nakar veit, einans sekt nýtt í tí niðara partinum av tí kriminaliseraða økinum.

II. Viðmerkingar til tær einstøku ásetingarnar.

Til nr. 1 (§ 16).

Viðv. 1.-3. stk. Sum frammanundan havt á orði verður skotið upp, at reglurnar fyri forboð verða býttar sundur í grovt brot, sum í lógini er nevnt rúsdrekkakoyring, og minni grovt brot, sum skotið verður upp at nevna promillukoyring.

Rúsdrekkakoyring er tað eftir 1. stk., tá ið alkoholstyrkin í blóðinum, meðan koyrt verður ella aftaná, fer upp um 1,20 0/00. Promillukoyring er tað eftir. 3. stk., um alkoholstyrkin í blóðinum, meðan koyrt verður ella aftaná, fer upp um 0,800/00, men ikki 1,20 0/00.

Viðvíkjandi 2. stk. er at siga, at umframt promilluregluna er neyðugt at hava ein áseting, sum gevur møguleika til at fella dóm fyri rúsdrekkakoyting út frá ítøkiligari meting. Ásetingin er ætlað at nýta, ið ikki hevur borið til at gera ella nýta blóðroynd, t.d. tí at tann, sum um varðar er rýmdur frá óhappastaðnum og krógvar seg so leingi, at blóðroynd ikki er nýtilig. Umframt hetta er ætlingin, at ásetingin í 2. stk. skal nýtast, har ið tann, sum varðar av, við at valda óhapp ella stóran vanda fyri hesum ella við grovum mistøkum í koyringini hevur sýnt, at hann ikki hevur havt ræði á akfarinum. Eru tílíkar ítøkiligar grundir til at halda hann vera óskikkaðan at koyra, eigur hetta at verða mett sum rúsdrekkakoyring og talt undir 2. stk.

Tann avmarkaða týdning, sum 2. stk. fet at hava í samband við promilluskipoanina, verður skotið upp at taka fram, soleiðis at í orðingini av núverandi reglu: »ikki førur fyri at koyra akfarið á fulltryggan hátt« verður »full-« lagt burtur úr, og at brot á 2. stk. verður javnmett við tær hættisligu umstøður, sum 1. stk. fevnir um.

Sum sæst av uppskotinum, ið nýtir orðingina »meðan koyrt verður og aftaná«, skal ikki bert svarast í teimum førum har ið komið er at promillumarkinum, meðan koyrt varð, men eisini tá ið komið er at tí aftan á koyringina.

Eftir teirri galdandi reglu í § 16, 1. stk. er tað avgerandi, at avvarandi, meðan hann koyrdi, ikki var førur fyri at koyra akfarið á fulltryggan hátt.

Atvoldin í uppskotinum er tann umstøða, at blóðroynd fyrst verður tikin ávísa tíð aftan á koytingina. Blóðroyndin vísir tískil ikki promillustøddina, tá ið koyrt varð, men bert tá ið hon var tikin. Til tess at finna promillustøddina, meðan koyrt varð, má tí verða roknað aftureftir, sum ofta er trupult. Hesar trupulleikt ber til at minka um, um so er at ábyrgd eisini verður galdandi, tá ið promillumarkið fyrst er nátt aftan á koyringina. Reglan hevur serligan týdning í teimum ikki sjáldsomu førum, har ið drukkið hevur verið fittliga nógv beint framman undan stuttum koyritúri, við tað at blóðroynd her kann hugsast at vísa promillu, sum er munandi størri, enn ein torir at líta á, hon hevur verið, meðan koyrt varð. Í tílíkum førum bindur lógaruppskotið ta revsiverdu gerð við promilluna, tá ið blóðroyndin varð tikin, tað vil siga, at tann promillan, sum retsmedicinsk institut hevur givið upp, beinleiðis fær verið nýtt sum

grundarlag, soleiðis at undan slepst at rokna aftur eftir til møguliga lægri promillu, meðan koyrt varð.

Móti tegluni kann verða tikið fram tað ivingarsama í tí, at hon leggur avgerandi dent á skilið, um hin avvarðandi var í aftan á kanska langa tíð aftan á — at hann sum koyrari kundi elva sær ella øðrum vanda. Men eyðsýnt er, at góðar rættarligar grundir tala til frama fyri reglu, sum ger tað møguligt at sleppa undan trupulleikum av rokning aftureftir í førum, har ið tann funna promilla liggur oman fyri tað ásetta markið. Sum studningur fyri slíka reglu kann harafturat verða nevnt, at tað ofta fer at vera tað, at løgreglan hevur lagt upp í koyringina, sum hevur gjørt, at tann avvarðandi ikki framleiðis koyrdi um tað mundið, tá ið blóðroyndin varð tikin. Aftrat hesum kemur, at tað, sum tilskilað í oman fyri nevnda dømi, hevði verið forargiligt, um koyrandi kundi sloppið undan ábyrgd júst við at koyrt beint aftan á at hava drukkið fittliga nógv av rúsdrekka.

Reglan um, at tað er tann størsta promillan, meðan koyrt verður ella aftaná, sum er avgerandi, er eisini í t.d. Noregi, Svøríki og Danmark. Í hesum londum løgdu teir áður dent á promilluna, meðan koyrt varð, men eru seinri vegna trupulleikar, ið av hesum stóðust, farnir at nýta ta reglu, sum nevndin hevur skotið upp.

Lagt verður aftrat, at eftir nevndatuppskotinum slepst sjálvsagt ikki heilt undan at rokna aftureftir. Í teimum førum, har ið tann promilla, sum funnin verður, er niðan fyri tað revsingarverda markið, má við rokning aftureftir støða verða tikin til, um tað frammanundan — meðan koyrt varð ella aftaná — hevur verið promilla oman fyri markið. Á samsvarandi hátt kann verða neyðugt at rokna aftureftir til tess at sanntoyna, um promillan, meðan koyrt varð, hevur ligið oman fyri tað mark, sum nevndin hevur skotið upp sum mark millum sekt og skerjing av frælsi.

Roknað er við, at í teimum førum, har sum roknað skal verða aftureftir, verður roknað við teirri rokningarpromillu, sum er lagaligast fyri ákærda, og hana hevur rættarlæknaráðið sett til 0,10 0/00 um tíman.

At enda skal verða sagt, at nevndatuppskotið loysir ikki tað vandamál, sum kemur upp í summum førum, har ið ákærdur sigur seg hava notið rúsdrekka aftan á koyringina, men áðtenn blóðroynd varð tikin. Men nevndin hugsar um at skjóta upp ein áseting, sum í ávísum førum kriminaliserar rúsdrekkanýtslu aftan á koyring. Hesar umráðingar eru ikki lidnar.

Viðv. 4. stk. Meginreglurnar um koyring við kenning eiga at vera tær somu fyri teir, ið koyra prutl, sum fyri teir, ið koyra motorakfør. Tá ið nevndin hevur skotið upp serstaka áseting fyri koyring við prutli, kemur tað av teimum ymisligum revsirættarfylgjum, sum eiga at standast av koyring við ávíkavist motorakfari og prutli.

Viðv. 5. stk. Viðvíkjandi súkklistum heldur nevndin ongar áneyðir vera til at skjóta upp broytingar. Orðini)á fulltryggan hátt« eru broytt til »á tryggan hátt«. Við hesum er ikki ætlað nøkur verulig broyting.

Viðv. 6. stk. Ásetingin samsvarar við ta galdandi reglu í § 16, 3. stk. Nevndin hevur ikki hildið seg kunna binda kriminaliseringina av »sleppa persóni...« saman við fasta promillureglu. Orðini »á fulltryggan hátt« eru broytt til »á tryggan hátt«. Við hesum er ikki ætlað nøkur verulig broyting.

Um nr. 2 (§ 16 a).

Ásetingarnar snúgva seg um eftirlitið við akfarskoyrarum o.ø. við kenning. Broytingarnar á hesum øki eru serstakliga reglan um tað, at løgreglan hvørja og eina tíð kann krevja, at koyrari ella hestmaður ger útandingarroynd — 1. stk. 0 og eisini avtøkan av teimum klinisku læknakanningum í næstan øllum rúsdrekkamálum — 2. stk., síðsta punkt —. Umframt hetta er í 2. stk. sett regla, sum er nýggj, og sum gevur løgregluni høvi til at føra koyrara, sum er undir illgruna fyri brot á § 15 í ferðslulógini, fram til blóðroyndartøku o.a. og til læknakanningar. At enda er í 3. stk. givið landsstýrinum heimild til seta gjøllari reglur fyri tær í 1. og 2. stk. nevndu royndir og kanningar.

Viðv. 1. stk. Rglan um útandingarroyndir (alcotestroyndir) er ásett til tess, at hesar royndir ber til at nýta sum lið í handahóvseftirliti við tí, at § 16 verður hildin. Slíkt eftirlit fær ikki bert vaksið um vandan fyri at verða uppdagaður, men fær eisini stóra fyribyrgjandi ávirkan yvirhøvur, av tí at teir vegfarandi, sum rokna við at sýnast heilt edrúir, vita, at teimum kann berast á at vera fyri handahóvseftirliti.

Persónar, sum sýta fyri at gera útandingarroynd, kuntu ikki tevsast, men kunnu sambært 2. stk. verða førdir fram til blóðroyndartøku.

Viðv. 2. stk. Regurnar um framførslu av persóni til tøku av blóð- og landroynd, um orsøk er til at halda, at hann er sekur í rúsdrekkakoyring ella promillukoyring, eru tær somu sum galdandi reglur, sbr. § 14, 4 stk. MEn tær galdandi reglur geva onga heimild til at føra persónar, sum verða hildnir at hava brotið § 15, fram til umnevndu roynd, og verður tí skotið upp at áseta reglu um hetta saman við almennari heimild til í slíkum førum at lata hesar (persónar) føra fram til læknakanningar. Harafturímóti er, um tann reglan, sum skotin er upp í § 16, 1.-4. stk., verður framd, eingin tørvur á almennari heimild hjá løgregluni til at lata rúsdrekkaávirkaðar koyrarar kanna av lækna, uttan so at serligar umstøður elva til tess. Hetta kemur av tí, at hesin prógvsvegur vanliga ikki longur hevur týdning fyri, hvussu málini enda. Klinisk roynd eigut tó framvegis

at verða nýtt í teimum málum, har illgruni eisini er um óviljað manndráp ella óviljað meiðsl eins og í øðrum serligum førum.

Um nr. 3 (§ 58)

Viðv. 1. stk. Ásetingin setir ta almennu revsirammu fyri brot á lógina ella tæt sambært henni givnu ásetingar til sekt.

Viðv. 2. stk. Ásetingin setir revsirammu fyri rúsdrekkakoyring við motordrivnum akfati, tó ikki súkklu við hjálpimotori (prutli), til hefti ella fongsul í upp til 1 ár. Í setliga linnandi umstøðum kann sekt verða nýtt eins og higartil.

Viðv. 3. stk. Ásetingin setir revsirammuna fyri promillukoyring til sekt. Sama revsiramma er fyri rúsdrekkakoyring við súkklu við hjálpimotori (prutli). Í ávísum førum, har hetta hendi aftur, kann revsingin verða hækkað til hefti ella fongsul í upp til 1 ár.

Viðv. 4. stk. Ásetingin setir revsirammuna fyri ávís kvalifiserað brot á lógina til sekt ella, tá ið herðandi umstøður eru, hefti ella fongsul í upp til 1 ár. Her skal verða sagt, at »sleppa persóni ... at koyra«, sbr. ta galdandi áseting í § 16, 3. stk., samanborið við § 58, 1. stk., ikki er varðveitt sum setliga kvalifiserað viðurskifti, men er beint undir 1. stk., har ið revsiramman er sekt.

Viðv. 5. stk. Ásetingin setir revsirammuna til hefti ella fongsul í upp til 1 ár fyri tann, sum koyrir motordrivið akfat, sum krevur koyriprógv, hóast rætturin til at vera ella gerast stjóri av slíkum akfari er dømdur frá honum. Ásetingin svarar til ta galdandireglu í § 58, 1. stk. Tá setliga linnandi umstøður eru, kann sekt verða nýtt eins og higartil.

Viðv. 6.-9. stk. Ásetingarnar svara til galdandi reglur í § 58, 2.-5. stk.

Um nr. 4. (§ 58 a).

Viðv. 1. stk. Orðingin er broytt.

Um nr. 5 og nr. 6 (§ 59, 1.-2. stk.)

Skilað verður til, at reglurnar um frádøming av koyriprógvi ikki galda fyri prutl. 2. stk. ásetur, at rætturin til at koyra skal verða frádømdur bæði fyri rúsdrekkakoyring og promillukoyring. Um gjøllari grundgeving fyri hesum verður víst til almennar viðmerkingar. Tá serliga linnandi umstøður eru, kann frádømingin verða slept.

Rutukoyring á Sandoynni

ÁLIT
FRÁ
SAMFERÐSLUNEVNDINI

Innihaldsyvirlit

Fotorð		2
1.	Fyritreytir	3
1.1.	Skúlabatnaflutningur	3
1.2.	Rutusigling	4
1.3.	Annar flutningur	5
2.	Ferðaætlanir	5
2.1.	Skálavík-Sand-Skopun	6
2.2.	Dalur-Húsavík-Meginskúlin	
	Dalur-Húsavík-Skopun	8
2.3.	Meginskúlin-Skarvanes	
	Sand-Skarvanes	10
3.	Sáttmáli við arbeiðstakara	11
4.	Ferðaseðlakostnaðir	12
5.	Fíggjarligar metingar	14
5.1.	Inntøkumetingar	14
5.2.	Útreiðslumetingar	15
5.3.	Rakstrarúrslit	16
	Tilmæli	17

Forord

Samferðslunevndin metir seg nú vera lidna við at kanna møguleikarnar fyri at samskipa rutu- og skúlabarnakoyring á Sandoynni.

Nevndin hevur havt fund við rutukoyrarar í Sandoynni, við umboð fyri kommunurnar í Sandoynni, við umboð fyri Meginskúlan, Sandoyar Skúlastýri og Skúlafyrisitingina, og er tann tilmælda koyriskipanin í tráð við hesar fundir.

1. Fyritreytir

1.1 Skúlabarnaflutningur

Í skúlaárinum 1978/79 vóru 150 næmingar á Meginskúlanum. Talið er umleið tað sama fyri skúlaárið 1979/80. Allir hesir næmingar verða fluttir millum heim og skúla. Núgaldandi reglur fyri flutning av skúlanæmingum siga, at fyri næmingar millum 12 og 16 ár verður roknað við 3 næmingum fyri hvørji 2 pláss til vaksin í bussinum, fyri næmingar yngri enn 12 ár verður roknað við 2 næmingum fyri hvørt pláss til vaksin. Eftir hesum reglum skal vera flutningskapacitetur til 100 pláss, og kapacitetskrøvini sundurskilað seg soleiðis:

Skopun	32 pláss	68 pláss
Sand	42 pláss	
Skarvanes	2 pláss	
Skálavík	14 pláss	
Húsavík	4 pláss	
Dal	6 pláss	

Tann í hesum áliti nevnda koyriskipan er bygd soleiðis upp, at eftir hesum reglum kunna allir skúlanæmingar verða fluttir til og frá skúlanum í senn. Tað verður roknað við fylgjandi tíðum fyri Meginskúlan

1. tími	8.10 - 8.55
2. tími	9.05 - 9.50
3. tími	9.55 - 10.40
4. tími	10.50 - 11.35
5. tími	11.55 - 12.40
6. tími	12.45 - 13.30
7. tími	13.40 - 14.25

Skúlaflutningur er nú til skúlan til 1. tíma og frá skúlanum aftaná 7. tíma mánadag-mikudag og aftaná 6. tíma hósdag og fríggjadag.

Koyriskipanin er bygd soleiðis upp, at koyring er til skúlan til 1. og 2. tíma (til 2. tíma er hetta samstundis koyring til/frá strandfaraskipinum).

Koyring er frá skúlanum aftaná 6. og 7. tíma (aftaná 6. tíma er hetta eisini koyring til/frá strandfaraskipinum, sum fer úr Tórshavn kl. 12.15).

Við tí uppsettu koyriskipanini er skúlin ikki so bundin í skemaplanleggingini sum áður, tað er møguligt hvønn dag at lata flokkar ella partar av flokkum (vegna valfríar lærugreinir) møta til 2. tíma ella fara aftaná 6. tíma, meðan onnur møta til 1. tíma og fara aftaná 7. tíma.

Tey donsku krøvini til skúlabarnaflutning eru, at børn yngri enn 12 ár, verða toknað 3 fyri hvørji 2 pláss til vaksin, og fyri eldri børn verður roknað við 1 vaksnamannapláss til hvønn. Eftir hesum teglum skal vera flutningskapacitetur til 147 pláss, og sundurskilar hesin kapasitetstørvur seg soleiðis:

Skopun	46 pláss	
Sand	65 pláss	101 pláss
Skarvanes	2 pláss	
Skálavík	20 pláss	
Húsavík	5 pláss	
Dal	9 pláss	

Eftir hesum krøvum, kunna ikki allir skúlanæmingar flytast í senn við tí í hesum áliti nevndu koyriskipan. Fyri at greiða skúlabarnaflutningin verður tá neyðugt hvønn dag at lata 2-3 flokkar møta til 2. tíma og lata 2 flokkar fara aftaná 6. tíma. Hetta vil minka kapasitetstørvin við umleið 20%, og vil flutningurin tí kunna greiðast. Undirvísingartíðin fyri teir einstøku flokkarnar vil veta tann sama, men tað verður tá neyðugt at hava skúlan opnan 7 tímar hvønn dag – tilsaman 35 tímar um vikuna — í mun til nú 33 tímar um vikuna.

1.2 Rutusiglingin

Tað er roknað við, at rutuskipanin kann greiða fylgjandi rutusigling:
Í tíðarskeiðinum 1. apríl — 30. september

Tórshavn-Skopun

mánadag	5.30	7.45	12.15	15.15	19.00	
Týsdag		7.45	12.15	15.15	19.00	
mikudag		7.45	12.15	15.15	19.00	
hósdag		7.45	12.15	15.15	19.00	
fríggjadag		7.45	12.15	15.15	19.00	21.15
leygardag		7.45		15.15		
sunnudag		7.45	14.00	17.00	21.15	

Skopun-Tórshavn

mánadag	6.30	9.15	13.45	16.45	20.00	
týsdag		9.15	13.45	16.45	20.00	
mikudag		9.15	13.45	16.45	20.00	
hósdag		9.15	13.45	16.45	20.00	
fríggjadag		9.15	13.45	16.45	20.00	22.15
leygardag		8.45		16.15		
sunnudag		8.45	15.00	18.00	22.15	

og í tíðarskeiðinum 1. oktobur - 31. mars

Tórshavn-Skopun

mánadag		7.45	12.15	15.15	
týsdag		7.45	12.15	15.15	
mikudag		7.45	12.15	15.15	
hósdag		7.45	12.15	15.15	
fríggjadag		7.45	12.15	15.15	19.00
leygardag		7.45		15.15	
sunnudag			14.00	17.00	

Skopun-Tórshavn

mánadag	9.15	13.45	16.45	
týsdag	9.15	13.45	16.45	
mikudag	9.15	13.45	16.45	
hósdag	9.15	13.45	16.45	
fríggjadag	9.15	13.45	16.45	20.00
leygardag	8.45		16.15	
sunnudag		15.00	18.00	

1.3 Annar flutningur

Frammanfyri eru viðgjørdar tær høvuðsflutningsuppgávur, sum eru, sum mynstrið er í løtuni, t.v.s. flutningur av skúlabørnum og flutningur av ferðafólki til/frá strandfaraskipinum. Hesin flutningur vil framvegis vera høvuðsuppgávan, men við einari regluligari rutu, vil eisini annar flutningstørvur verða nøktaður.

Til/frá arbeiði Koyriskipanin kann greiða hendan flutning, soleiðis, at úr øðrum bygdum kunna arbeiða í Skopun frá 8.15 til 16.15, 17.30 ella 20.00 og á Sandi frá 8.00 til 16.30, 17.45 og 20.15.

Handilsørindi, læknaørindi o.l. Av tí, at tutusamband er yvir allan dagin og rættiliga javnt, er møguligt at nýta koyriskipanina í samband við smærri ørindi.

Fyri fólk á rutuni Skálavík-Sand-Skopun kann hetta samband metast so gott, at hesin tørvur kann nøktast uttan at ferðafólkið hevur munandi bíðitíð.

Fyri fólk úr Húsavík og Dali, er sambandið ikki fult so gott, og kann tað verða neyðugt við serligum læknaviðtalutíðum fyri hesi.

Kvøldskúli, svimjing og onnur frítíðarítriv. Koyriskipanin er í vetrarhálvárinum løgd solciðis til rættis, at samband er til og frá kvøldskúlanum týskvøld og hóskvøld kl. 19.00 og 22.00. Kvøldskúlin byrjar um miðjan oktobur og endar um miðjan mars. Viðvíkjandi svimjing er rutusamband bæði summar- og vetrarhálvárið solciðis, at hesin flutningstørvur kann metast at vera nøktaður uttan eykakoyring. Kvøldtúrarnir í samband við kvøldskúlan týsdag og hósdag og kvøldtúrarnir tríggjadag, leygardag og sunnudag vilja eisini kunna nýtast í samband við onnur frítíðarítriv og í samband við at vitja fólk. Tó er kvøldsambandið ikki nóg gott til flutning í samband við dans. Samferðslunevndin metir, at ein slíkur flutningstørvur í bvtiani rættast verður greiddur við leigutúrum, ið antin dansifólkið ella fyrireikarnir skipa fyri.

2. Ferðaætlanir

Ferðaætlanirnar eru bygdar upp við 5 rutum.

Rutan Skálavík-Sand-Skopun verður koyrd við 2 bussum til umleið 37 sitipláss. Henda rutan røkir skúlabarnaflutning frá Skopun, Skálavík og part av børnunum av Sandi. Rutan koyrir runt í Skálavík, koyrir til Sands bygd og runt í bygdini og koyrir til Skopun, tað verður vanliga ikki koyrt runt í Skopun. Rutan kann metast at hava umleið fylgjandi steðgipláss: 4-6 í Skálavík, 1 á Sondum, 1 við vegin til Traðir, 6 í Sands bygd, 1 við Meginskúlan og vanliga 1 í Skopun. Í samband við skúlabarnaflutningin verða tó 3 steðgipláss í Skopun, tá ymisk vegarbeiði eru gjørd har, so tað slepst runt við einum bussi í tí ætlaðu støddini. Viðvíkjandi býlinginum í Trøðum, so verður hesin røktur av rutunum Dal-Húsavík-Meginskúlan. Dal-Húsavík-Skopun og Meginskúlin-Skarvanes, men ikki av rutuni Skálavík-Sand-Skopun. Tað hevði verið ynskiligt, um rutan Skálavík-Sand-Skopun eisini kundi koyrt til Traðir, men tíðin er ov knøpp til at gera hetta hvørja ferð. Fyri rutuna Tórshavn-Vestmanna verður nú arbeitt við at gera eitt skelti uppi við tilkoyringina til Kvívíkar, hetta skeltið skal lýsa, tá trýst verður á ein knøtt við steðgiplássið í bygdini; á tann hátt fet bussur bert til Kvívíkar, tá fók er at fara við ella eftir. Ein líknandi loysn kann hugsast í Trøðum, men hetta er ikki kannað enn.

Ruturnar Dal-Húsavík-Meginskúlan, Dal-Húsavík-Skopun og Skarvanes-Meginskúlin verða koyrdar við 2 bussum til umleið 19 sitipláss. Ruturnar røkja skúlabarnaflutning frá Dali, Húsavík, Trøðum, Skarvanesi og parti av børnunum av Sandi. Ruturnar kunna metast at

hava fylgjandi steðgipláss: 1-2 í Dali, 3 í Húsavík, 1 við Djúpadal, 1 á Skarvanesi, 1 á Sondum, 1 í Trøðum, 1 við Sands bygd, 1 við Meginskúlan og 1 í Skopun.

Rutan Sand-Skarvanes verður bert koyrd um fólk frammanundan biður um tað. Uppsettu ferðaætlanirnar eru eftir vanligari sigling og kann vanliga verða flutt upp til 56 ferðafólk til/frá strandfaraskipinum. Tá neyðugt er at sigla á Skálavík, og tá ferðafólkatalið et hægri, verður neyðugt við eykakoyring, og má í tí endaligu skipanini verða tikið hædd fyri hesum.

Ferðaætlanirnar eru ikki eins í summarhálvárinum — 1. oktober - 31. mars. Orsøkin til hetta er, at í summarhálvárinum er meira rutusigling til Sandoynna, og at rutuflutningurin á oynni í stóran mun er við ferðafólki til/frá strandfaraskipunum. Um veturin er ikki møguligt at sigla so seint í Sandoynna, og rutuflutningstørvurin í oynni er um kvøldið í samband við kvøldskúla, vitjan av fólki og annað frítíðarítriv.

2.1 Skálavík-Sand-Skopun
Í tíðarskeiðinum 1. apríl — 30. september

mánadag-hósdag*)									
Skálavík	7.30	8.30	10.30	13.00	14.05	16.00	17.00	19.15	
Sand	7.55	8.55	10.55	13.25	14.30	16.25	17.25	19.40	
Skopun	8.15	9.15	11.15	13.45	14.50	16.45	17.45	20.00	
Skopun	7.45	8.45	11.15	13.20	14.20	16.15	17.30	20.00	
Sand	8.00	9.00	11.30	13.35	14.35	16.30	17.45	20.15	
Skálavík	8.30	9.30	12.00	14.05	15.05	17.00	18.15	20.45	
fríggjadag									
Skálavík	7.30	8.30	10.30	13.00	14.05	16.00	17.00	19.15.	21.30
Sand	7.55	8.55	10.55	13.25	14.30	16.25	17.25	19.40	21.55
Skopun	8.15	9.15	11.15	13.45	14.50	16.45	17.45	20.00	22.15
Skopun	7.45	8.45	11.15	13.20	14.20	16.15	17.30	20.00	22.15
Sand	8.00	9.00	11.30	13.35	14.35	16.30	17.45	20.15	22.30
Skálavík	8.30	9.30	12.00	14.05	15.05	17.00	18.15	20.45	23.00
leygardag									
Skálavík	8.00		10.30			15.30		19.15	
Sand	8.25		10.55			15.50		19.40	
Skopun	8.45		11.15			16.15		20.00	
Skopun	8.45		11.15			16.15		22.00	
Sand	9.00		11.30			16.30		22.15	
Skálavík	9.30		12.00			17.00		22.45	
sunnudag									

Skálavík	8.00	14.14	17.15	21.30
Sand	8.25	14.40	17.40	21.55
Skopun	8.45	15.00	18.00	22.15
Skopun	8.45	15.00	18.00	22.15
Sand	9.00	15.15	18.15	22.30
Skálavík	9.30	15.45	18.45	23.00

*) mánadag verður aftur at roknað við einum túri í samband við rututúrin 5.30 Tórshavn-Skopun-Tórshavn. Koyrt verður frá Skálavík 5.45 og frá

Í tíðarskeiðinum 1. oktober — 31. mars

mánadag og mikudag									
Skálavík	7.30	8.30	10.30	13.00	14.05	16.00	17.00		
Sand	7.55	8.55	10.55	13.25	14.30	16.25	17.25		
Skopun	8.15	9.15	11.15	13.45	14.50	16.45	17.45		
Skopun	7.45	8.45	11.15	13.20	14.20	16.15	17.30		
Sand	8.00	9.00	11.30	13.35	14.35	16.30	17.45		
Skálavík	8.30	9.30	12.00	14.05	15.05	17.00	18.15		
týsdag og hósdag									
Skálavík	7.30	8.30	10.30	13.00	14.05	16.00	17.00	18.25	21.15
Sand	7.55	8.55	10.55	13.25	14.30	16.25	17.25	18.50	21.40
Skopun	8.15	9.15	11.15	13.45	14.50	16.45	17.45	19.05	22.00
Skopun	7.45	8.45	11.15	13.20	14.20	16.15	17.30	18.45	21.45
Sand	8.00	9.00	11.30	13.35	14.35	16.30	17.45	19.00	22.00
Skálavík	8.30	9.30	12.00	14.05	15.05	17.00	18.15	19.30	22.30
fríggjadag									
Skálavík	7.30	8.30	10.30	13.00	14.05	16.00	17.00	19.15	21.00
Sand	7.55	8.55	10.55	13.25	14.30	16.25	17.25	19.40	21.25
Skopun	8.15	9.15	11.15	13.45	14.50	16.45	17.45	20.00	21.45
Skopun	7.45	8.45	11.15	13.20	14.20	16.15	17.30	20.00	21.45
Sand	8.00	9.00	11.30	13.35	14.35	16.30	17.45	20.15	22.00
Skálavík	8.30	9.30	12.00	14.05	15.04	17.00	18.15	20.45	22.30

leygardag				
Skálavík	8.00	10.30	15.30	19.15
Sand	8.25	10.55	15.50	19.40
Skopun	8.45	11.15	16.15	22.00
Sand	9.00	11.30	16.30	22.15
Skálavík	9.30	12.00	17.00	22.45

sunnudag			
Skálavík	14.15	17.15	21.00
Sand	14.40	17.40	21.25
Skopun	15.00	18.00	21.45
Sand	15.15	18.15	22.00
Skálavík	15.45	18.45	22.30

2.2. Dalur-Húsavík-Meginskúlan
Dalur-Húsavík-Skopun

Í tíðarskeiðinum 1. apríl — 30. september

mánadag-fríggjadag *)							
Dalur	7.30	8.30	12.55	14.05	15.45	17.15	19.15
Húsavík	7.40	8.40	13.05	14.15	15.55	17.25	19.25
Meginskúlin	8.05	9.05	13.30	14.40	16.20	17.50	19.50
Skopun		9.15			16.30		20.00
Skopun		9.15			16.30		20.00
Meginskúlin	7.55	9.25	13.30	14.30	16.40	17.50	20.10
Húsavík	8.20	9.50	13.55	14.55	17.05	18.15	20.35
Dalur	8.30	10.00	14.05	15.05	17.15	18.25	20.45
leygardag							
Dalur	8.00				15.30		19.15
Húsavík	8.10				15.40		19.25
Meginskúlin	8.35				16.05		19.50
Skopun	8.45				16.15		20.00
Skopun	8.45				16.15		22.00
Meginskúlin	8.55				16.25		22.10
Húsavík	9.20				16.50		22.35
Dalur	9.30				17.00		22.45
sunnudag							
Dalur	8.00			14.15		17.15	21.00
Húsavík	8.10			14.20		17.25	21.10
Meginskúlin	8.35			14.50		17.50	21.35
Skopun	8.45			15.00		18.00	21.45
Skopun	8.45			15.00		18.00	21.45
Meginskúlin	8.55			15.10		18.10	21.55
Húsavík	9.20			15.35		18.35	22.20
Dalur	9.30			15.45		18.45	22.30

*) mánadag verður afturat roknað við einum túri í samband við rututúrin 5.30 Tórshavn-Skopun-Tórshavn. Koyrt verður úr Dali 5.45 og frá Skopun 6.30

Í tíðarskeiðinum 1. oktober — 31. mars

mánadag og mikudag								
Dalur	7.30	8.30	12.55	14.05	15.45	17.15		
Húsavík	7.40	8.40	13.05	14.15	15.55	17.25		
Meginskúlin	8.05	9.05	13.30	14.40	16.20	17.50		
Skopun		9.15			16.30			
Skopun		9.15			16.30			
Meginskúlin	7.55	9.25	13.30	14.30	16.40	17.50		
Húsavík	8.20	9.50	13.55	14.55	17.05	18.15		
Dalur	8.30	10.00	14.05	15.05	17.15	18.25		
týsdag og hósdag								
Dalur	7.30	8.30	12.55	14.05	15.45	17.15	18.25	21.10
Húsavík	7.40	8.40	13.05	14.15	15.55	17.25	18.35	21.20
Meginskúlin	8.05	9.05	13.30	14.40	16.20	17.50	19.00	21.45
Skopun		9.15			16.30			
Skopun		9.15			16.30			
Meginskúlin	7.55	9.25	13.30	14.30	16.40	17.50	19.00	21.55
Húsavík	8.20	9.50	13.55	14.55	17.05	18.15	19.25	22.20
Dalur	8.30	10.00	14.05	15.05	17.15	18.25	19.35	22.30
fríggjadag								
Dalur	7.30	8.30	12.55	14.05	15.45	17.15	19.15	
Húsavík	7.40	8.40	13.05	14.15	15.55	17.25	19.25	
Meginskúlin	8.05	9.05	13.30	14.40	16.20	17.50	19.50	
Skopun		9.15			16.30		20.00	
Skopun		9.15			16.30		20.00	
Meginskúlin	7.55	9.25	13.30	14.30	16.40	17.50	20.10	
Húsavík	8.20	9.50	13.55	14.55	17.05	18.15	20.25	
Dalur	8.30	10.00	14.05	15.05	17.15	18.25	20.45	
leygardag								
Dalur	8.00				15.30		19.15	
Húsavík	8.10				15.40		19.25	
Meginskúlin	8.35				16.05		19.50	
Skopun	8.45				16.15		20.00	
Skopun	8.45				16.15		22.00	
Meginskúlin	8.55				16.25		22.10	
Húsavík	9.20				16.50		22.35	
Dalur	9.30				17.00		22.45	

sunnudag			
Dalur	14.15	17.15	21.15
Húsavík	14.25	17.25	21.25
Meginskúlin	14.50	17.50	21.50
Skopun	15.00	18.00	22.00
Skopun	15.00	18.00	22.00
Meginskúlin	15.10	18.10	22.10
Húsavík	15.50	18.35	22.35
Dalur	15.45	18.45	22.45

2.3. Meginskúlin-Sand-Skarvanes
Sand-Skarvanes

mánadag-fríggjadag							
Meginskúlin						14.40	
Sand	7.10	8.20	9.00	12.45	13.40	14.45	17.45
Skarvanes	7.30	8.40	9.20	13.05	14.00	15.05	18.05
Sand	7.45	9.00	9.40	13.25	14.20	15.20	18.25
Meginskúlin	7.55	*)	*)	*)	*)		*)
leygardag							
Sand	7.45	9.00			16.40	21.30	
Skarvanes	8.05	9.20			17.00	21.50	
Sand	8.25	9.30			17.20	22.10	
	*)	*)			*)	*)	
sunnudag							
Sand	7.45			14.00	17.00	21.30	
Skarvanes	8.05			14.20	17.20	21.50	
Sand	8.25			14.40	17.40	22.10	
	*)			*)	*)	*)	

*) hesir túrar verða bert koyrdir, um ferðafólk frammanundan biður um tað.

3. Sáttmálar við arbeiðstakarar
Í øllum útrokningunum er brúkt sum grundarlag arbeiðstakarasáttmáli millum pf. Bil Tótshavn og Føroya Landsstýri.

Sáttmálin byggir á fylgjandi gjald til arbeiðstakara:

a. rutukm-kostnaður

fyri teir størru bussarnar	1,48 kr./rutukm
fyri teir minnu bussarnar	1,04 kr./rutukm

b. rututíma-kostnaður	63,01 kr./rututíma
c. fastur koyrikostnaður	
fyri teir størru bussarnar	uml. 24.000 kr./buss/ár
fyri teir minnu bussarnar	uml. 20.000 kr./buss/ár
d. fyrisitingarkostnaður	21.058 kr./buss/ár
e. renting og avskriving	20,13% av keypsprísinum av bussinum pr. ár.

viðv. c: Ein stórur partur av hesum gjaldi fylgir beinleiðis tryggingarupphæddini og vegskattinum, og er gjaldið tí ymiskt fyri hvønn buss.

viðv. e: Hetta gjaldið er grundað á keypsprísin á bussunum sum nýggjar, og er gjaldið roknað sum 8 ára annuiteetsavdráttur av hesum keypsprísi við 12% árligari rentu.

Á síðu 5 er nevnt, at ruturnar verða koyrdar við 2 stórum bussum til umleið 37 fólk á rutuni Skálvík-Sand-Skopun, og at 2 bussar til 19 fólk røkja ruturnar Dal-Húsavík-Meginskúlan, Dal-Húsavík-Skopun og Meginskúlin-Skarvanes.

Fyri at hava trygd fyri, at rutuskipanin altíð virkar, er neyðugt við einum eykabussi. Tað rættasta vildi verið, at hetta var ein bussur til umleið 37 ferðafólk, men tá hetta er ein dýr loysn fyri rutuskipanina — umleið 100.000 kr. meira enn at hava ein minni —, metir nevndin, at eykabussurin skal vera ein bussur til 19 ferðafólk. Fylgjurnar av at nýta ein buss í hesari støddini til eykabuss vil vera, at nakrar dagar um árið — trúliga í mesta lagi 10 dagar — koma nøkur børn úr Skopun umleið 20 minuttir ov seint í og úr skúlanum.

Samanlagt verður tí roknað við, at nýtast skulu 5 bussar, 2 til umleið 37 ferðafólk og 3 til umleið 19 ferðafólk. 1 bussur til umleið 37 ferðafólk er í oynni, keypsprísurin var umleið 400.000 kr. hin má útvegast, og verður keypsprísurin væntuliga umleið 650.000 kr. Í oynni eru fleiri bussar til 19 ferðafólk, rað kann tó roknast við at til tann triðja bussin í hesari støddini má skjótt útvegast ein meira tíðarhóskandi. Keypsprísurin fyri hesar tíggjar bussarnar er umleið 175.000 kr. fyri hvønn.

4. Ferðaseðlakostnaður

Ferðaseðlakostnaðurin fyri busstutur eftir hesi skipan er framlagdur fyri landsstýrið. Framlagt varð:

Prísirnir verða fastsettir við grundarlag eftir beinleiðis flutningstíð — rututíð — soleiðis at goldið verður lutfalsliga meira fyri tær stuttu leiðirnar enn fyri tær longu. Brúkt verða fylgjandi lutfalstøl:

0 — 15	minuttir rututíð	0,40
15 — 25	minuttir rututíð	0,50
25 — 35	minuttir rututíð	0,60
35 — 50	minuttir rututíð	0,80
50 — 65	minuttir rututíð	1,00
65 — 85	minuttir rututíð	1,20
85 — 110	minuttir rututíð	1,40
110 — 135	minuttit rututíð	1,60
135 — 165	minuttir rututíð	1,80
165 — 195	minuttir rututíð	2,00
195 — 230	minuttir rututíð	2,20
230 — 000	minuttir rututíð	2,50

Við endaligari fastleggjan av ferðaseðlaprísinum verða nýtt heil krónutøl.

Útbygd verður rabatskipan, soleiðis at fyri ymisk rutustrekkir verða eisini seld 10-túrakort og mánaðarkort. Kostnaðurin á hesum verður grundaður á fylgjandi:

10-túr-kort:	8 ferðir kostnaðin á einkultferðaseðlum
Mánaðarkort:	20 ferðir kostnaðin á einkultferðaseðlum

Út frá hesum eru ferðaseðlaprísirnir á rutunum Tórshavn-Kirkjubø og Tórshavn-Vestmanna fastsettir, har lutfallið 1,00 Tórshavn-Vestmanna er 25 kr. fyri einkultferðaseðil.

Og út frá hesum verða ferðaseðlaprísirnir fyri vaksin:

	einkultur ferðaseðil	10-túra-kort	mánaðar-kort
Skopun-Meginskúlan	10 kr.	80 kr.	200 kr.
Skopun-Sand	13 kr.	100 kr.	250 kr.
Skopun-Skálavík	20 kr.	160 kr.	400 kr.
Skopun-Húsavík	20 kr.	160 kr.	400 kr.
Skopun-Dal	20 kr.	160 kr	400 kr.
Skopun-Skarvanes	20 kr.	160 kr.	400 kr.
Meginskúlin-Sand	10 kr.	80 kr.	200 kr.
Meginskúling-Skálavík	15 kr.	120 kr.	300 kr.
Meginskúlin-Húsavík	15 kr.	120 kr.	300 kr.
Meginskúlin-Dal	15 kr.	120 kr.	300 kr.
Meginskúlin-Skarvanes	13 kr.	100 kr.	250 kr.
Sand-Skálavík	13 kr.	100 kr.	250 kr.
Sand-Húsavík	13 kr.	100 kr.	250 kr.
Sand-Dal	15 kr.	120 kr.	300 kr.
Sand-Skarvanes	13 kr.	120 kr.	300 kr
Húsavík-Dal	10 kr.	80 kr.	200 kr.

Nevndin metir, at smærri broytingar eiga at verða gjørdar í hesari takstskipan, og vónar nevndin skjótt at kunna senda landsstýrinum eitt álit hesum viðvíkjandi. Í inntøkumetingum er tó omanfyrinevndu takstir nýttir.

Viðvíkjandi ferðafólki, sum ferðast bæði við rutuskipunum og bussunum, metir nevndin, at her eigur ferðaseðil til allan teinin at kunna útvegast ávikavist umborð á strandfaraskipinum og í bussinum, sum grundarlag undir fastsetan av hesum kostnað eigur at verða nýtt 35 minuttir sum rututíð fyri strandfaraskipið — t.v.s. Tórshavn-Skopun 15 kr. Av tí, at ein slík skipan eisini gevur avsláttur í mun til at goldið ein ferðaseðil á strandfaraskipinum og ein í bussunum, er eisini sett upp, hvussu lutfallið av ferðaseðlinum skal býtast millum bussrutuna og Strandferðsluna:

	einkultur ferðaseðil	kostnaður Strand-faraskip-Landsins	Buss-ruturnar
Tórshavn-Skopun	15 kr.	15 kr.	0 kr.
Tórshavn-Sand	25 kr.	13 kr.	12 kr.
Tórshavn-Skálavík	30 kr.	13 kr.	17 kr.
Tórshavn-Húsavík	30 kr.	13 kr.	17 kr.
Tórshavn-Dal	30 kr.	13 kr.	17 kr.
Tórshavn-Skarvanes	30 kr.	13 kr.	17 kr.

Ferðaseðil Tórshavn-Sand skuldi annars kosta 15 kr. + 13 kr. tilsaman 28 kr. T.v.s. at takstskipanin gevur 3 kr. avsláttur, og av hesum er roknað við, at Strandferðslan ber 2 kr. og bussruturnar 1 kr. Viðvíkjandi ferðaseðlum Tórshavn-Skálavík/Húsavík/Dal/Skarvanes, so vildi ferðaseðil uttan avsláttur kosta 35 kr., her er so roknað við, at av avsláttrinum upp á 5 kr. ber Strandferðslan 2 kr., meðan bussruturnar bera 3 kr.

5. FÍGGJARLIGAR METINGAR

5.1. Inntøkumetingar

Gjaldið fyri skúlabarnaflutning til/frá Meginskúlanum er í løtuni uml. 527.000 kr. árliga, og verður roknað við hesum gjaldinum til rutuskipanina.

Metingar av ferðafólki til/frá Tórshavn, sum nýta ruturnar til/frá Skopun eru gjørdar undir fylgjandi fyritreytum:

1. Ferðafólkatalið til/frá teimum ymisku bygdunum er í lutfall til samlaða ferðafólkatalið til/frá Sandoynni sum íbúgvaratalið í bygdini í mun til íbúgvaratalið í Sandoynni og Skúvoynni.
2. Ferðafólkatalið til/frá Skopun til tær ymisku bygdirnar við rutuni verður roknað til 2/3 av omanfyrinevnda.

Ferðafólkið funnið undir hesum fyritreytum verður alt roknað at útvega sær einkultferðaseðil galdandi fyri bæði strandfataskipið og rut-

una. Ferðafólkaflutningur til/frá Sandoynni var í fjør við Rituni og Tróndi 49.589 ferðafólk. Úr frá hesum fæst sambært fyritreytirnar omanfyri fylgjandi ferðafólkaflutningur til/frá bygdunum:

	íbúgvar 30/6-79	ferðafólk til/frá bygdini	ferðafólk við bussrutunum	
Skopun	586	16.662	0	
Sand	622	17.586	11.724 á 12 kr.	140.688 kr.
Skálavík	241	6.853	4.569 á 17 kr.	77.673 kr.
Húsavík/Dal	189	5.374	3.583 á 17 kr.	60.911 kr.
Skúvoy	106	3.014	2.009 á 12 kr.	24.108 kr.
Ialt	**1.774**	**49.589**	**21.885**	**303.380 kr.**

Sum model fyri ferðafólkaflutning millum bygdir kann nýtast sama modell, sum tá líknandi metingar vórðu gjørdar viðv. rutunum Tórshavn-Vestmanna og Tórshavn-Kirkjubø.

Modellin er fylgjandi

$$\text{árligur ferðafólkaflutningur} = \frac{I_1 \times I_2}{d^2} \times 2{,}70$$

og gevur hetta fylgjandi ferðafólkaflutning millum bygdir á oynni:

Skopun-Sand	4.374 ferðafólk á 13 kr.	56.862 kr.
Skopun-Skálavík	238 ferðafólk á 20 kr.	4.760 kr.
Skopun-Húsavík-Dal	186 ferðafólk á 20 kr.	3.720 kr.
Sand-Skálavík	648 ferðafólk á 13 kr.	8.424 kr.
Sand-Húsavík-Dal	508 ferðafólk á 13 kr.	6.604 kr.
Skálavík-Húsavík-Dal	192 ferðafólk á 15 kr.	2.880 kr.
ialt		**83.250 kr.**

Út frá omanfyrinevndu fyritreytum fáast fylgjandi inntøkur til bussrutuna:

Skúlabarnaflutningur	527.000 kr.
flutningur til/frá strandfaraskipinum	303.380 kr.
flutningur millum bygditnar	83.250 kr.
ialt inntøkur samb. omanfyri	**913.630 kr.**

Eftir hesar uppsetingini er samlaða inntøkan av rutuferðandi undantikið skúlabarnaflutning 303.380 + 83.250 = 386.630 kr. Uppgivin tøl frá rutukoyrarum í Sandoynni eru hægri: pf. Bil hevur í granskoðaðum roknskapi fyri 1978 inntøkur av Rutu — dag og náttarkoyring 367.473 kr. og Steintór Fagradal hevur mett at hansara inntøka av rutuflutningi er uml. 200.000 kr. Samanlagt fæst, at rutukoyrararnir hava eina inntøku av rutuflutningi undantikið skúlabarnaflutning upp á uml. 570.000 kr. Hetta er við ferðaseðlakostn. umleið teir somu, sum verða tilmæltir í hesum áliti. Tað er ikki hjá rutukoyrarunum nøkur uppgerð, hvussu ferðafólkið sundurskilar seg eftir teimum ymisku rutunum og eftir teimum ymisku rututíðunum. Tað verður tó mett, at ferðafólkið til/frá Skopun í samband við strandfaraskipið er uml. 2/3 av samlaða ferðafólkatalinum, t.v.s. tað sama sum er mett í hesum áliti. Í álitinum er uppskotið ein øking av túratalinum í mun til tað núverandi koyringina. Henda økingin er í meðal uml. 70%, og verður roknað við, at hetta gevur eina øking í ferðaseðlasøluni millum bygdir upp á 30%.

Núverandi inntøkur av rutu- og skúlabarnaflutninginum í Sandoynni sundurskila seg uml. soleiðis:

Skúlabarnaflutningur	527.000 kr.
flutningur til/frá strandfaraskipinum	303.380 kr.
flutningur millum bygdir 570.000-303.380 =	266.620 kr.
ialt	**1.097.000 kr.**

Samanlagt kunnu inntøkurnar sambært omanfyri metast at verða:

Skúlabarnaflutningur	527.000 kr.
flutningur til/frá strandfaraskipinum	303.380 kr.
flutningur millum bygdir 1,3 × 266.620	346.606 kr.
ialt inntøkur	**1.176.986 kr.**

5.2. Útreiðslumetingar

Allar útreiðslumetingar eru grundaðar á sáttmálan millum pf. Bil Tórshavn og Føroya Landsstýri, og eru allar útrokningar gjørdar við núverandi gjøldum — grundarlag í prístalinum 1. januar 1980 —

Samanlagt er roknað við, at rutuskipanin skal hava 2 stórar bussar til uml. 37 sitipláss og 2 smáar bussar til uml. 19 sitipláss til rakstrarbussar, harafturat má rutuskipanin hava ein eykabuss. Sum nevnt á síðu 11 verður roknað við at eykabussurin er bussur til uml. 19 sitipláss. Harafturat verður roknað við fylgjandi keypsprísum fyri bussarnar:

1 stórur	keypsprís 650.000 kr.	650.000 kr.
1 stórur	keypsprís 400.000 kr.	400.000 kr.
3 smáir	keypsprís 175.000 kr. stk.	525.000 kr.
5 bussar	keypsprís	1.575.000 kr.

Samanlagt kemur kostnaður av tí uppsettu rutuskipanini at sundurskila seg soleiðis:

km-kostnaður			
Skálavík-Sand-Skopun	26 × (50 + 48) × 2 × 22 =	112.112 km á 1,48 =	165.926 kr.
Dalur-Húsavík-Meginsk.	26 × (20 + 22) × 2 × 16 =	34.944 km á 1,04 =	36.342 kr.
Dalur-Húsavík-Skopun	26 × (22 + 17) × 2 × 22 =	44.616 km á 1,04 =	46.401 kr.
Meginskúlin-Skarvanes	52 × 10 × 2 × 12 =	12.480 km á 1,04 =	12.979 kr.
Samlaður kostnaður			**261.648 kr**

tíma-kostnaður			
Skálavík-Sand-Skopun	26 × (50 + 48) × 2 × 45/60 =	3.822 h á 63,01 =	240.824 kr.
Dalur-Húsavík-Meginsk.	26 × (20 + 22) × 2 × 35/60 =	1.274 h á 63,01 =	80.275 kr.
Dalur-Húsavík-Skopun	26 × (22 + 17) × 2 × 45/60 =	1.521 h á 63,01 =	95.838 kr.
Meginskúlin-Skarvanes	52 × 10 × 2 × 25/60 =	433 h á 63,01 =	27.034 kr.
Samlaður tíma-kostnaður			**443.971 kr.**

fastur koyrikostnaður		
2 bussar til 37 ferðafólk	2 × 24.000 kr. =	48.000 kr.
2 bussar til 19 ferðafólk	2 × 20.000 kr. =	40.000 kr.
1 eykabussur til 19 ferðafólk	1 × 20.000 kr. =	20.000 kr.
samlaður fastur koyrikostnaður		**108.000 kr.**

Fytisitingarkostnaður til busseigarar		
5 bussar	5 × 21.058 kr. =	105.290 kr.

renting og av skriving	
20,13% av 1.575.000 kr.	317.048 kr.

tutan Sand-Skarvanes	
Tað verður toknað við, at túrarnir á ferðaætlanini, sum bert verða koyrdir, tá fólk frammanundan biðjur um teit, kunnu verða greiddir fyri	40.000 kr.

Samanlangt fáast fylgjandi útreiðslur

km-kostnaður	261.648 kr.
tímakostnaður	443.971 kr.
fastur koyrikostnaður	108.000 kr.
fytisitingarkostnaður til busseigarar	105.290 kr.
renting og avskriving	317.048 kr.
rutan Sand-Skarvanes	40.000 kr.
Ialt	**1.275.957 kr.**

5.3. Rakstrarúrslit

Samanlagt fæst eftir metingunum, at ruturnar koma at geva hall

Útreiðslurnar eru mettar til	1.275.957 kr.
Inntøkurnar eru mettar til	1.176.986 kr.
Mett hall á rutuskipanini	**98.971 kr.**

Tilmæli

Samferðslunevndin hevur nú viðgjørt rutukoyring í Sandoynni, og vil nevndin tilmæla landsstýrinum at fáa sær heimild til og gera sattmálar við akfarseigarar í Sandoynni sambært hesum áliti.

Tórshavn 1. apríl 1980

Atli Jensen
Hanus Hansen
P.J. Sivertsen
Niels Persson
Leivur Johannesen

Skjal 14

Veðhald fyri láni til Klaksvíkar kommunu

Fíggjarætlan
hjá
Klaksvíkar Kommunu
fyri
1980/81

UTREIÐSLUR:

20. Kommunala fyrisitingin	kr.	3.064.000,00
21. Social umsorgan	kr.	2.570.000,00
22. Skúlamál	kr.	4.025.000,00
23. Vegir og kloakkir	kr.	5.830.000,00
24. Gøtuljós	kr.	275.000,00
25. Havnir og lendingar	kr.	15.000,00
26. Vatnveitingar	kr.	1.235.000,00
27. Grótbrotið	kr.	+ 700.000,00
28. Renovatiónin	kr.	700.000,00
29. Brunamál	kr.	182.000,00
30. Svimjihøllin	kr.	472.000,00
31. Ítróttaranlegg og blómugarðar	kr.	543.000,00
32. Kirkjugarðar	kr.	872.000,00
33. Læknа- og heilsumál	kr.	440.000,00
34. Ymiskar útreiðslur	kr.	275.000,00
35. Studningar	kr.	530.000,00
36. Avdráttir	kr.	7.400.000,00
37. Burturleggingar	kr.	200.000,00
38. Rentuútreiðslur	kr.	5.745.000,0
Ábyrgdir og bøtan av figgjarstøðuni	kr.	4.000,00
Lántøka	kr.	+ 7.850.000,00
	kr.	29.823.000,00

INNTØKUR:

1.	Rentuinntøkur	kr.	1.050.000,00
6.	Sekrir og onnur gjøld	kr.	1.000,00
9.	Ymiskar inntøkur	kr.	82.000,00
10.	Álíknaður skattur	kr.	28.690.000,00
			29.823.000,00

Klaksvík, tann 10. apríl 1980

Skjal 15

Álit frá nevndini til at kanna og leggja fram álit um ábøtur í viðurskiftum handverkslærlinga.

Við skrívi frá 6. september 1978 hevur Føroya handverkslærlingafelag vent sær til Føroya løgting, har biðið verður um, at sett verður nevnd av øllum áhugaðum pørtum til at gera eitt álit um lærlingaútbúgvingina í Føroyum.

Sum dømi um arbeiðsevni hjá eini tílíkari nevnd nevnir lærlingafelagið:

Nútíðargerð av lærlingalógini
metingar av meistaralæruni og E.F.G.
kanning av undirvísing og undirvísingarmøguleikum á teknisku skúlunum
kanning av læruplássum viðvíkjandi arbeiðsumstøðum, frálæring, amboðum og arbeiðsgongd
metan av tørvunum á fakligum útbúgvingum
almenn upplýsing um læruviðurskifti
ávísing av læruplássum
umhugsan av nýggjari lønarskipan.

Annars verður í brævinum frá handverkslærlingafelagnum biðið um, at lønirnar hjá lærlingunum verða broyttar.

Úrslitið av hesum varð, at løgtingið samtykti broytingar í lærlingalønunum, og at samtykt varð hetta uppskot:

Landsstýrið setir sjeymannanevnd, ið skal kanna og leggja fram álit um ábøtur í viðurskiftum handverkslærlinga. Álit nevndarinnar skal vera landsstýrinum í hendi ikki seinni enn 1. mars 1979.

Tveir av limum nevndarinnar verða útnevndir eftir tilmæli frá Føroya handverksmeistarafelag, tveir eftir tilmæli frá Føroya handverkarafelag, tveir eftir tilmæli frá Føroya handverkslærlingafelag. Sjeynda limin, ið verður nevndarformaður, útnevnir landsstýrið uttan tilmæli.

Seinni samtykti løgtingið at víðka hesa nevnd við 2 limum, harav annar skuldi vera faklærari frá Tekniska skúlanum í Tórshavn og hin faklærari frá Tekniska skúlanum í Klaksvík.

Landsstýrið hevur síðani valt hesar nevndarlimir:
Føroya Handverkslærlingafelag: Kári Jensen, Tórshavn og Andreas Andreasen, Klaksvík.

Føroya Handverkarafelag: Andreas Poulsen, Tórshavn og Andreas Eltør, Klaksvík.

Føroya Handverksmeistarafelag: Vilhelm Johannesen, Tórshavn og Karl Johannesen, Toftir.

Tekniski Skúlin, Klaksvík: Jákup Pauli Sundsskarð, Klaksvík.

Tekniski Skúlin, Tórshavn: Charles Joensen, Argir.

Sum formann hevur Landsstýrið valt Kára D. Petersen, advokat, Tórshavn.

Nevndarlimirnir fingu boð um útnevnanina við skrivi frá 11. juli 1979.

Av tí at Kári Jensen er vorðin útlærdur í starvssíð nevndarinnar, hevur lærlingafelagið í staðin fyri sett John Müller, Tórshavn í nevndina.

Av tí at nevndarlimirnir ikki fingu boð um útnevnanina fyrr enn 11. juli 1979, er tað greitt, at frestin, sum upprunaliga varð sett til 1. mars 1979, kundi ikki yvirhaldast.

Á fyrsta fundi nevndarinnar varð gjørt greitt, at løgtingssamtyktin ikki fyriskrivaði nevndini nakran avmarkaðan setning, og at nevndin tí mátti taka arbeiðsuppgávu sína út frá innihaldinum í brævinum frá handverkslærlingafelagnum. Nevndin ásannaði, at tað var neyðugt, um eitt álit skuldi fyriliggja innanfyri rímiliga tíð, at avmarka hesa uppgávu.

Viðmerkt skal vera, at nevndin hevur kent eitt vist trýst á sær vegna tess, at samtyktin hjá løgtinginum um at hækka lærlingalønirnar hevur fört við sær, at meistarafelagið hevur givið limum sínum boð um ikki at gera lærusáttmálar.

Tá lærlingalógin ikki einans snýr seg um útbúgving av handverkslærlingum, men t.d. eisini útbúgving av skrivstovulærlingum, átti hendan útbúgving eisini at verið tikin við í eini nútímansgerð av lærlingalógini, men soleiðis sum nevndin er sett saman, hevur hon ikki hildið seg kunna viðgera annað enn viðurskifti handverkslærlinga.

Nevndin hevur umrøtt spurningin heilt at fara frá núverandi meistaralæru, og skipa útbúgvingina á sama hátt sum danska E.F.G. útbúgvingin, men menn hava verið ymsir á máli, um hetta var rætt. Afturat hesum kemur, at við teirri stuttu tíð, sum ætlað varð nevndini at arbeiða í, vórðu ikki stundir til at kanna eina so víttgangandi broyting til botns. Viðvíkjandi eini radikalari broyting av

lærlingaútbúgvingini er nevndin annars samd um, at hetta er ein spurningur, sum eigur at verða loystur sum lið í samlaða útbúgvingarpolitikki landsins.

Nevndin vil tó vísa á hesar ábøtur skúlanum viðvíkjandi:

1) Skúlin verður nútímansgjørdur við amboðum, hølum v.m.
2) Høvi skal vera hjá næmingum í 8. og 9. flokki í fólkaskúlanum at koma á styttri skeið á Tekniska skúla fyri at fáa innlit í handverkaraútbúgving.
3) *Forskúli:* Skipað verður fyri ajourførdum forskúla í flest møguligum handverksfakum. Tey handverksfak fyri hvørji bert forskúli finst í Førovum, mugu hava eitt innihald, ið gevur rætt til framhald á 2. parti innan fyri EFG í Danmark. Fyri tey, ið lúka vissar treytir, skal møguleiki vera fyri at koma á Tekniska skúla ókeypis og nema forskúlan. Lærlingar við sáttmála hava frammfhjárætt. Um næmingur hevur verið á forskúla verður lærutíðin stytt tilsvarandi.
4) *Skeið eftir forskúlan:* Hesi verða ajourførd soleiðis, at tey nøkta somu krøv sum í Danmark, men eiga tó at verða útbygd við lærugreinum, ið eru serstakar fyri føroysk viðurskifti, tá fakligu nevndirnar halda hetta vera neyðugt. Hetta vil møguliga føra við sær, at skúlatíðin verður longri enn mótsvarandi í Danmark.
5) Eftir loknan skúla skal lærlingurin á skúlanum gera sveinaroynd ella aðra fakroyndir eftir nærri fyrisettum reglum.
6) *Eftirútbúgving:* Høvi eigur at vera hjá øllum útbúnum handverkarum at koma á eftirútbúgvingarskeið.

Úrslitið av nevndararbeiðinum er hjálagda uppskot til broytingar í løgtingslóg um lærlingaviðurskiftir og metir nevndin, at um hetta uppskot verður lóg, skuldi tað bøtt munandi um hesi viðurskifti.

Tvær høvuðsatfinningar eru ímóti núgaldandi skipan:

1) Eftirlitið við útbúgvingini er ikki nóg gott, og tað hendir, at lærlingar ikki fáa ta upplæring frá meistaranum, sum teir skulu hava. Tað kemur fyri, at lærlingar verða settir til annað arbeiði, sum onki hevur við teirra fakligu útbúgving at gera. Tað verður eisini fört fram, at nøkur lærupláss eru óegnað til upplæting, og at tey ikki áttu at verið góðkend.

2) Tað verður av meistarunum mett at vera ein nokk so stórur fíggjarligur spurningur at hava lærling og løna honum, tá hesin ikki kann framleiða nakað av týdningi fyrstu tíðina. Afturat hesum kemur, at lærlingurin eisini skal hava løn, meðan hann er á skúla og undir sjúku. Hetta hevur m.a. fört við sær, at tað eru ikki nóg nógv lærupláss og at meistarin mangan freistast til heldur at lata lærlingin

gera okkurt, sum meistarin hevur nyttu av, enn at leggja størri dent á upplæringina.

Út frá hesum er uppskotið til broytingar gjørt.

Serliga skal verða víst á hesar broytingar:

§ 8, stk. 7. Tá tað er so at lærlingur, um hann ikki hevði krav uppá løn frá meistara, hevði havt rætt til sjúkradagpening, hevur nevndin mett, at lærlingurin er fult tryggjaður móti inntøkumissi vegna sjúku, um hann fær sjúkradagpening frá tí almenna, og meistarin rindar honum tað sum restar í, at hann hevur fulla løn.

§ 11, stk. 8. Nevndin hevur skilt, at tað er eitt ynski frá meistarunum at sleppa undan at gjalda lærlinginum løn, meðan hann vegna skúlagongd ikki arbeiðir. Fyri at ganga hesum ynski á møti, uttan at tað skal hava við sær inntøkumiss fyri lærlingin, skjýtur nevndin hesa loysn upp.

Viðmerkjasst skal, at lærlingar meta, at meistarin, sjálvt um hann rindar løn bæði undir sjúku og fráveru vegna skúlagongd, ikki hevur hall men harímóti vinning av lærlinginum.

§ *12 og § 12a:* Nevndin metir, at skipan av hesum fakligu nevndum verður eitt stórt framstig og vil geva eitt nógv tryggari eftirlit við lærlingaútbúgvingini.

Tá hesar nevndir eru farnar at virka, verða uppgávurnar hjá læruráðnum bert av umsitingarligum slag, og nevndin heldur tað tí vera rætt at taka læruráðið av og leggja uppgávur tess undir skúlafyrisitingina, sum jú kortini skal umsita teknisku skúlarnar.

Tá hetta er gjørt, skuldi eisini verið óneyðugt, at fútin skal hava til uppgávu at góðkenna lærusáttmálar, og verður henda uppgáva tí eisini løgd til landsskúlastjórnina.

Tað er nevndini greitt, at við at avtaka læruráðið, verður eisini nortið við handils- og skrivstovuyrki, men metir at landsskúlastjórnin røkir hesa uppgávur líka væl sum læruráðið.

§ *13:* Tá landsskúlastjórnin skal umsita sveinaroyndina, hevur nevndin hugsað sær, at hesar verða gjørdar á teknisku skúlunum. Harímóti heldur nevndin, at skipanin við skoðimeistarum skal halda fram.

Hóast nevndin metir, at landsskúlastjórnin kann røkja uppgávurnar hjá læruráðnum, so eru avgerðirnar í § 1 stk. 5, § 2 stk. 1 og § 4 stk. 1 av slíkum slag, at tær eiga at vera lagdar til landsstýrið.

Tær broytingar, sum annars eru gjørdar, eru fyrst og fremst at ymiskt óneyðugt og ótíðarhóskandi er tikið burtur úr lógini.

Tórshavn, tann 28/2 1980.

K. Johannesen
V. Johannesen

C. Joensen
Jacob P. Sundskarð
Andreas Eltør
A. Poulsen
Andreas Andreasen

Kári D. Petersen

Uppskot til broyting í løgtingslóg
um lærlingaviðurskiftir

§ *1.*

Í løgtingslóg um lærlingaviðurskiftir verða gjørdar hesar broytingar:

1) Har lógin nevnir orðið »fútin« ella »læruráðið« verður hetta broytt til »landsskúlastjórnin«. Tó verður »læruráðið« í § 1 stk. 5, § 2 stk. 1 og § 4 stk. 1 broytt til »landsstýrið«.
2) Í § 1 stk. 1 verður »5 ár« broytt til »4 ár«.
3) Í § 1 stk. 5 verða orðini »víðkað við ... av meginfelagnum« strikað og ístaðin verður sett »eftir tilráðing frá avvarðandi fakligu nevnd.«
4) Í § 1 verða stk. 6 og 7 strikað.
5) Í § 2 stk. 1 verður 3. punktum strikað.
6) Í § 2 stk. 1, 4. punktum verður aftaná »hóast fyristøðumaðurin eingi meistararættindi hevur« skoytt uppí »um landsskúlastjórnin og viðkomandi fakliga nevnd meta, at trygd er fyri at fólk hevur starv har sum uppfyllir treytirnar fyri at verða góðkend sum lærumeistari, og at tílíkt fólk alla tíðina kann taka sær av upplæringini.«
7) Í § 2 verður sett sum nýtt stk. 1 a: Eingin lærumeistari kann hava meira enn 3 lærlingar. Hann kann tó hava 2 lærlingar fyri hvønn svein hann hevur í starvi.
8) Í § 2 stk. 3 verða orðini »seinna punktum« strikað.
9) Í § 3 stk. 1 1. punktum verður »5 ár« broytt til »4 ár.«
10) Í § 3 stk. 2 verður 2. punktum strikað og í staðin fyri verður sett »eftir tilmæli frá avvarðandi fakligu nevnd«.
11) Í § 4 stk. 1 verða orðini »víðkað á sama hátt sum nevnt í § 3 stk. 2« strikað. Aftaná seinasta punktum verður sett: »Arbeiðstíð og yvirtíð verða roknað eftir sáttmála millum handverkarameginfelagið og handverksmeistarameginfelagið.«
12) Í § 4 verður sett sum nýtt stk. 6 a: frítíðin má ikki verða minni enn tilskilað í lóg um frítíðarløn.
13) § 8 stk. 3 verður orðað soleiðis: Gerst lærlingur sjúkur, skal lærumeistarin gjalda honum løn tó við frádrátti av tí, sum lærlingurin fær útgoldið í sjúkrapeningi frá tí almenna. Hetta er tó bert galdandi í 3 mánaðar. Lærumeistarin kann uttan útreiðslur fyri lærlingin krevja sjúkuna váttaða av lækna.
14) Í § 8 stk. 5 verður orðið »víðkaða læruráðið« broytt til »landsskúlastjórnin« og skoytt verður uppí endan av stykkinum »eftir tilmæli frá avvarðandi fakligu nevnd.«
15) Í § 8 verður stk. 6 strikað, og stk. 7 verður til stk. 6. Í hesum stk. verða orðini »1 mánaða fyri og 3 mánaðar eftir barnsburðin.«

16) § 9 verður orðað soleiðis: Eingin má taka lærling í læru so leingi hann hevur lærusáttmála við annan lærumeistara.
17) Í § 10 stk. 1,1. punktum verða orðini »ella part av starvi« strikað.
18) Í § 10 verða stk. 2 og stk. 4 strikað og í stk. 6 verða orðini »ella ikki kann fáa duguleikaprógv eftir stk. 4« strikað. Stk. 3 verður stk. 2 og stk. 5,6,7,8 og 9 verða ávikavist stk. 3,4,5,6,7. Í stk. 6 og stk. 7 sum nú verða, verður »stk. 4, 5, og 7« broytt til »stk. 3 og 5«.
19) Í § 11 verða stk. 2, 4 og 7 strikað. Stk. 3, 5 og 6 verða ávikavist stk. 2, 3 og 4.
20) Í § 11 verður sett sum nýtt stk. 7: Lærumeistarin skal gjalda lærlinginum fulla løn, ta tíðina hann gongur í starvsskúla. Lærumeistarin hevur rætt til endurgjald úr landskassanum fyri ta løn, hann rindar lærlinginum, meðan hesin ikki arbeiðir vegna skúlagongd í starvsskúla.
21) § 12 verður orðað soleiðis: »Landsskúlastjórnin hevur saman við teimum í § 12 a umrøddu fakligu nevndum eftirlit við lærlingaútbúgvingini og skal annars røkja tær uppgávur, sum eru tilskilaðar í hesi lóg«.
22) Nýggj § 12 a verður orðað soleiðis:
Stk. 1. Fyri hvørt fak verður sett ein faklig nevnd við 4 limum harav 2 verða valdir av meistarameginfelagnum og 2 av sveinameginfelagnum. Hesir velja formann sínámillum. Fakliga nevndin er ráðgevari hjá landsstýrinum og landsskúlastjórnini í øllum spurningum viðvíkjandi lærlingaútbúgvingini og verju av lærlinginum.

Stk. 2. Fakliga nevndin skal geva landsskúlastjórnini tilmæli um tær nærru reglurnar fyri útbúgving í avvarðandi faki. Landsskúlastjórnin ásetir hereftir tílíkar reglur og skipar fyri, at tær verða viðheftar hvørjum lærusáttmála.

Stk. 3. Fakliga nevndin skal á sínum øki virka fyri, at útbúgvingarviðurskiftini verða so góð sum gjørligt, og serliga at arbeiðsviðurskiftini verða løgd soleiðis til rættis, at tað arbeiðið, ið náttúrliga boyrir undir lærlingaútbúgvingina, kemur undir lógina. Við hesum fyri eyga, hevur fakliga nevndin rætt til at gera kanningar á teimum virkjum, sum hava ella ætla at hava í arbeiði fólk, sum lógin fevnir um.

Stk. 4. Fakliga nevndin kann, um hon aftaná at hava kannað eitt virki, heldur, at viðurskiftini í hesum virki eru so, at forsvarlig útbúgving hjá lærlingum ikki kann fara fram, mæla landsskúlastjórnini frá at góðkenna lærusáttmálar um lærlingar í hesum virki. Tá nevndin ger so, skal hon eisini koma við sínum grundgevingum

og siga frá, um hon heldur, at lærlingar, sum longu eru har, skulu hava rætt at siga sáttmála upp.

Stk. 6. Útreiðslurnar av fakligu nevndunum verða goldnar úr landskassanum.

23) Í § 13 verður stk. 1 orðað soleiðis: Landsskúlastjórnin skipar fyri sveinaroyndum og skal ansa eftir, at hesar verða skipaðar soleiðis, at størsti dentur verður lagdur á samlaðu læruna.
24) Í § 14 verða orðini »víðkað av læruráðnum ...« strikað og ístaðin verður sett »fakligu nevndunum«.
25) Í § 20 stk. 1 verður nr. 5 strikað.
26) Í § 21 verða nr. 9, 10 og 11 strikað.
27) Í § 23 verður stk. 1 orðað soleiðis: »Um landsskúlastjórnin aftaná ummæli frá avvarðandi fakligu nevnd metir, at viðurskiftini í einum virki eru til hindurs fyri, at lærlingur kann verða forsvarliga lærdur, kann hann taka lærurættin frá avvarðandi virki ella treyta lærurættin av, at tær broytingar verða gjørdar, sum eru neyðugar fyri, at læran kann verða forsvarlig.
28) Í § 23 stk. 2 verður ímillum orðini »teimum« »viðurskiftum« skotið inn »persónligu«.
29) Í § 24 verður »fútin « broytt til »landsskúlastjórnin« og orðini »læruráðnum ella« verður strikað.
30) Í § 26 stk. 2 verða orðini »eins og lærlingur... og restin av hesi § strikað.

§ 2.

Henda lóg fær gildi ....

Lesiætlanarnevndin

Frágreiðing og vegleiðing frá lesiætlanarnevndini
um lærugreinaevnið: Nøring

Í fororðinum til tey uppskot til leiðbeinandi lesiætlanir fyri fólkaskúlan, sum lesiætlanarnevndin legði fram á ólavsøku 1979, var viðmerkt soleiðis:

»Nevndin metir ikki hesi uppskot at vera endalig, og væntað verður, at skúlarnir, so nvørt sum skipað verður fyri eftir hesum fyribils vegleiðingum, lata hoyra frá sær, so møguligar broytingar kunnu verða gjørdar, áðrenn tær endaliga galdandi og meira fullfíggjaðu vegleiðandi lesiætlanir verða sendar út.«

Tað kann eisini viðmerkjast, at tað alla tíðina hevur verið og framvegis er ætlanin at senda út til skúlarnar meira nágreiniligar frágreiðingar og vegleiðingar bæði viðvíkjandi teim ymisku lesiætlanunum og viðvíkjandi ymiskum viðurskiftum í sambandi við skúlaarbeiðið bæði innan og uttan skúlagátt. Nakað er sent, men alt slíkt tekur tíð at gera, og við eini nýskipan er nógv, ið skal gerast. Tí er nógv eftir at gera av slíkum slag, men roynt verður at fáa alt gjørt so við og við og so hvørt, sum á iroðkar.

Samsvarandi hesum og orsakað av tí ógvuliga ymisku móttøku, tann vegleiðandi lesiætlanin fyri tað í fólkaskúlalógini § 11 kravda undirvísingarevnið nøring hevur fingið í talu og skrift, hevur lesiætlanarnevndin havt hetta evnið aftur til viðgerðat, og semja var um at fáa sent út eftirfylgjandi nágreiniligari frágreiðing og vegleiðing hesum umtødda evni viðvíkjandi nú beinanvegin.

Lesiætlanarnevndin heldur framvegis, at næmingarnir eiga at læra at meta um nøringina sum eina sjálvsagda lívsfunktión hjá øllum verum og venjast til at sýna álvara og virðing í umtalu av tí, sum hevur við hesa lívsfunktión at gera.

Eisini verður hildið, at sum lívsfunktión er nøtingin eitt natúrligt evni í undirvísingini í biologi í fólkaskúlanum. Henda lívsfunktión eigur ikki at verða sett í nakra serstøðu í undirvísingini. Upplýsingin um nøring eigur ikki at verða tagd burtur fyri næmingunum, heldur ikki eigur evnið at fáa eina grynri viðgerð enn hinar lívsfunktiónirnar. Nøringin og evnið við tilknýti til nøringarviðurskifti eiga ikki at skiljast burtutfrá og verða gjøtd til

nakað, sum skal viðgerast fyri seg sjálvan, leyst rivið úr fakligum og pedagogiskum samanhangi.

Lesiætlanarnevndin leggur dent á at viðmerkja, at tann lesiætlan, ið her er talan um, er fyri næmingar í 8. og 9. árgangi.

Eisini skal viðmerkjast, at ætlanin er, at í teimum einstøku lærugreinunum og -evnum skal lesiætlanin vera so, at næmingarnir sambært hana fáa kunnleika um øll tey viðurskifti, ið lærugreinin ella -evnið fevnir um, herundir í ávísum førum eisini hvørjar ymsar meiningar, ið eru um hesi viðurskifti. — Hetta seinasta kemur fyri í ymsum evnum í biologi, samfelagskunning, bókmentum, fremmandum átrúnaði, nøring o.ø.

Viðvíkjandi evninum nøring í hesum sambandi hevur nevndin hugsað sær tað soleiðis, at næmingarnir umframt tað, ar rað etiska sjálvandi verður tikið við í undirvísingina í teim tímum, ið verða til hetta evnið, eisini í kristniundirvísingini fáa at vita og fáa lært um, hvat ið er í kristnum anda. Her er at viðmerkja, at tímatalið í lærugreinini kristni í framhaldsdeildini er økt munandi tey seinastu árini, og tað fer m.a. betur at geva skúlanum høvi til at læta næmingarnar fáa at síggja lívsins trupulmál og spurningar í kristindómsins ljósi.

Ætlanin hevur altíð verið og er, at slík undirvísing fyri so búnar næmingar sum í 9. árgangi, og sum umframt at viðgera teir lívfrøðiligu spurningarnar í sambandi við nøringina, eisini skal fevna um tað sálarliga, samfelagsliga og etiska í nøringini, og tað krevur tí samarbeiði ímillum lærarar í fleiri lærugreinum, serliga í biologi, samfelagskunning og kristnikunnleika. Eisini bókmentir kunnu vera við til at hjálpa næmingunum til at fata teir trupulleikar, sum tann likamliga og sálarliga menningin á hesum aldursstigi kann føra við sær.

Men nevndin er vorðin var við ta viðmerking, at summi av teim fyribrigdum, sum koma fyri í undirvísingini innan undirvísingarevnið nøring á hesum aldursstigi, møguliga ikki koma fyri í kristnikunnleikatímunum.

Við hesum í huga verður mælt til, at lærubøkurnar til umrødda undirvísingarevnið verða gjørdar til ávísing til tey samfelagsligu viðurskiftini viðvíkjandi tí, ið viðgjørt verður, og við ávísing til, hvat ið tann kristna siðalæran sigur um hesi viðurskifti.

*Samanumtikið verður lagdur dentur á, at tað reint biologiska tilfarið má fyrst og fremst fevna um høvuðsevnini í nøringini, gitnaðin, fosturmenningina og føðingina. Men næmingarnir eiga eisini at fáa kunnleika um, hvat fyribrigdi sum abort, sterilisering og fyribyrging eru, og hvat tey bera í sær. Næmingarnir eiga at fáa kunnleika um tær mest kendu kynssjúkurnar; men slíka kunning ber til at geva í sambandi við kunningina um ígerðarsjúkur. Nevndin metir eisini, at næmingarnir í stuttari kunning eiga at fáa at vita um kynslig fyribrigdi, sum víkja frá.

Øll frágreiðing innan hetta lærugreinaevnið má vera saklig og bein og

verða givin høviskliga og varisliga. Í nógvum flokkum eru næmingarnir ymiskliga búnir, og í undirvísingini eigur fyrilit at verða tikið bæði fyri hesum og fyri tí, og mong ung á hesum aldursstigi natúrliga eru smæin, tá ið talan er um hesi umrøddu evni. Óvandamál í hesum sambandi má haldast burtur frá undirvísingini.

Saman við teirri kropsligu menningini má eisini verða talað um ta sálarligu menningina. Kunningin um tær sálarligu broytingarnar vilja hjálpa næmingunum til at skilja nakrar av teim trupulleikum, sum standast av hesum umbroytingarárum, og hon vil verða eitt natúrligt støði undir tí uppaling, skúlin ætlar at geva. Eitt týdningarmikið stavnhald fyri hesa uppaling má vera at hjálpa næmingunum til at skilja ta ábyrgd, hvør einstakur hevur í mun til seg sjálvan, til onnur, til heimið og til samfelagið.

Tá ið talan er um teir etisku tættirnar í undirvísingini, má ein vera varur við mong ymisk fyribrigdi. Tað er t.d. av týdningi at minnast til, at næmingarnir eru ymiskir og hava ymiska uppfatan av øllum, ið er rundan um teir, og teir koma frá heimum og umhvørvum, sum eru merkt av ógvuliga ymisligari uppfatan av tí siðiliga. Tann kunning, ið skúlin gevur, eigur altíð at vera samsvarandi endamáli fólkaskúlans, og hon eigur bæði í innihaldi og á tann hátt, hon verður givin, at hjálpa til at varðveita og styrkja álitisviðurskiftini ímillum heim og skúla.

Tað eru ivaleyst ikki nógvir næmingar, sum fáa sína fyrstu upplýsing um nøringatviðurskifti í skúlanum. Í hesi tíð, hvar ið so mangt bæði líkt og ólíkt er at síggja, lesa um og hoyra hesum viðurskiftum viðvíkjandi, munnu tey flestu, sum eru komin í 8. og 9. árgang, hava fingið so mikið av ymiskari kunning frá ymiskum síðum, at tey kenna seg á dandandi botni. Hjá summum man helst eisini vera so, at tey vita hvørki út ella inn. Tey ynskja og vóna at fáa eina hjálpandi hond.

Ein av skúlans uppgávum er altíð at vegleiða næmingarnar og hjálpa teimum at greiða tey trupulmál, teir stríðast við. Skúlin eigur eisini í hesum sambandi at syrgja fyri, at allir næmingarnir fáa neyðugar og álítandi upplýsingar, og hann eigur at rætta møguligar rangar hugsanir, sum næmingarnir kanska hava fingið.

Á hesum aldursstigi er tað vanliga ein flokkur av ungdómi, sum stendur ógvuliga spyrjandi um øll lívsins viðurskifti, vit hava framman fyri okkum í skúlastovuni. Tað er skúlans uppgáva so vítt gjørligt at hjálpa teimum at greiða hesar spurningar á besta og rættasta hátt og soleiðis, at vit sleppa teimum undan at koma sær út í óneyðugar trupulleikar.

Tórshavn 6. mars 1980
N.v.
Ludvig Petersen (formaður)

RED: 10 X



Nasjonalbibliote

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 1